

RE

Nas

N

Telephone: +47 7

LØGTINGS TIDINDI

1974

Løgtingstíðindi

1974

Bind A

Løgtingsmál

TÓRSHAVN 1976

INNIHALD

ÓLAVSØKUTINGIÐ 1974

ÁLITISMENN OG NEVNDIR

bls.

Løgtingsnevndir 3
Val av álitismonnum og nevndum 92

ALMANNAMÁL

Hækking av sosialum pensjónum v.m. 50
Yvirtøka av sosialu fyrisitingini 175
Uppskot til samtyktar viðvíkjandi hækkan av pensjónum 178
Broyting í lógum um fólkapensjón og avlamispensjón 179
Broyting í lógunum um fólkapensjón, avlamispensjón, almenna sjúkratrygging og barnapening til stakar uppihaldarar 349

ARBEIDSVIÐURSKIFTI

Prístalsviðgerð av arbeiðaralønum 65
Løgtingslóg um prístalsviðgerð av arbeiðsløn 297

FELAGSMARKNAÐURIN

Felagsmarknaðarmálið 42

FIGGJARMÁL

Figgjarløgtingslóg 1975/76 5
Broyting í lóg um skattligar avskrivingar 19
Felagsmarknaðarmálið (innflutningsgjøld) 42
Grannskoðan av almennum rokuskapum 53
Figgjarløgtingslóg 1975/76 101
5-ára figgjarætlan 132
Broyting í skattalógini 195
Lán til landskassan 275
Broyting í innflutningsgjøldum 343

FISKISKAPUR OG ONNUR SJÓVINNA

Broyting í manningarlógini 13
Minstaløn og annar stuðul til fiskivinnuna 14
Broyting í lóg um endurnýgging fiskiskipaflotans 38
Bann móti skjóting av grindahvali 52
Ymsar reguleringar av fiskiskapinum í norður eystara partinum av Atlantshavinum (NEAFC) 56
Reguleringar av fiskiveiðuni í Norður-vestara Atlantshavinum (ICNAF) 118
Regulering av fiskiveiðuni í Norður-Eystara Atlantshavinum (NEAFC) 121
Studningur til feskfiskaveiðuna 128
Regulering av veiðuni av norsk-arktiska toskastovninum (NEAFC) 135
Bráðfongis stuðul til útróðurin v.m. 140
Fiskirættindi føroyinga undir Islandi 169
Veðhald fyri lánum til iðnaðarskip 182
Troling á landleiðini 266
Broyting í lóg um minstaløn v.m. 300
Betri sjókort av Føroya landgrunni 302
Leiga av línuskipi til fiskiroyndir 303
Ráfiskagrunnurin 306
Broyting í lógini um minstaløn og annan stuðul til fiskivinnuna 323
Brennioljustudningur til fiskivinnuna 327
Studningur til veiðu av iðnaðarfiski 329
Framleingjan av lógini um bráðfongis studning til fiskivinnuna 338
Lán til fiskavirkir 351

FYRISPURNINGAR

Fyrispurningur til løgmann frá Ove Mikkelsen 79
Fyrispurningur til landsstýrið um skatt av tingmannalønum 223
Fyrispurningur frá Hilmar Kass til løgmann 230
Fyrispurningur frá Kjartan Mohr til løgmanns 232
Fyrispurningur til landsstýrið frá Jákup Mortensen 247

HAVNIR OG LENDINGAR

Vegir og lendingar 255

HEILSUMÁL

Kommunulæknaskipanin o.ø.m. í Føroyum 41
Kommunulæknaskipanin o.ø.m. í Føroyum 148
Heilsufrøðilig starvsstova 189

IDNAÐUR OG HANDVERK

Veðhald fyri lánum til smærri idnaðarvirki 217
Veðhald fyri láni til p/f Kyrruvik 340

LÁN OG LÁNABYRGDIR

Veðhald fyri láni til S.E.V. 11
Veðhald fyri láni til Tórshavnar kommunu 153
Veðhald fyri láni til Eggverkið 173
Veðhald fyri lánum til idnaðarskip 182
Landslán til kreppuhjálp 186
Veðhald fyri láni til L/f Grønlandsfelagið 201
Veðhald fyri lánum til sildaunjøl v.o. á goymslu 214
Veðhald fyri lánum til smærri idnaðarvirkir 217
Veðhald fyri láni til S.E.V. 234
Veðhald fyri láni til Runavíkar kommunu 236
Veðhald fyri láni til Fuglafjarðar kommunu 238
Veðhald fyri láni til Skála kommunu 240
Veðhald fyri láni til uttanbíggja kommunu 242
Lán til Telefonverkið 248
Veðhald fyri láni til p/f Kyrruvik 340
Lán til fiskavirkir 351

LANDBÚNAÐUR V.M.

Broyting í lóg um viðarlundir v.m. 219

LANDSSTÝRIÐ

Val av løgmanni og landsstýrismonnum 91
Landsstýrismál 127
Broyting í lóg um samsýning landsstýrismanna 290

LØGTINGIÐ

Tingsetanin 1
Frágreiðing frá løgmanni 1974 5
Vetrartingsetan 1974 87
Valrætur og valbreri 227
Broyting í lóg um samsýning løgtingsmanna 285

POSTVERKIÐ

Nýtsla av føroyskum frímerkjum 75
Danskar lógir um broytingar í postlógini 245

RÍKISLÓGIR

Ymsar rikislógir 80
Lóg um endurgjald fyri kjarnorkuskaðar 158
Lóg um eftirlit við arbeiðum av edlum metalum 184
Broyting í patentlógini 190
Veiting av rikisborgararætti 200
Konsularkonventión við Bretland 222
Kunngerð av sáttmála við Spania um straffidómar 224
Broytingar í postlógini 245
Lóg um broytingar í ymsum arvalógum 246
Ymsar rikislógir (broytingar í sjólógini) 353

SAMFERÐSLUMÁL

Strandferðsluútbyggingin 77
Ferðasamband við Sandoynna og Suðuroynna 80
Keyp av skipum til farleiðina Tórshavn - Skálafjørð 82
Flogvøllurin í Vágum 155
Keyp av skipi til millumlanda- og innanoyggja siglling 159
Vegir og lendingar 255

SKÚLAMÁL

Framhald av støðisúthúgvingini 6
Keyp av fastari ogn í Tórshavn 9
Sjómansskúlalóggávan 13
Broyting í læraralønarlógini 305

STÝRISSKIPANIN

Broyting í stýrisskipanarlógini 69
Broyting í stýrisskipanarlógini 147

TELEFONVERKIÐ

Lán til Telefonverkið 248

TRYGGING

Yvirtøka av vanlukkutryggingini 198

TÆNASTUMENN

Broyting í løgtingslóg um tænastumannalønir 292
Broyting í løgtingslóg um tænastumannaeftirlønir 295

UMSÓKNIR OG SKRIV TIL TINGIÐ

Skriv og umsóknir o.t. fraufagl á tingi 355

ÍTVARP OG SJÓNVARP

Happadráttarloyvi til Útvarp Føroya 212

VINNUMÁL

Forboð móti innflutningi og nýtslu av spæliautomatum 73
Forboð móti innflutningi og nýtslu av spæliautomatum 150
Nýtt pristalsgrundarlag 278
Kannan av lóggávuni um priseftirlit 287

YVIRTØKUMÁL

Yvirtøka av sosialu fyrisitingini 175
Yvirtøka av vanlukkutryggingini 198
Føroya undirgrund 201

LØGTINGSMÁL Í NUMMARRØÐ

	bls.
Tingsetanin	1
Tingnevndir	3
Frágreiðing frá løgmanni 1974 (skjal 3)	5
1. Figgjarløgtingslóg 1975/76 (úlavsokutingsetan)	5
2. Framhald av stoðisúlbúgvingini	6
3. Keyp av fastari ogn í Tórshavn	9
4. Veðhald fyri láni til S.E.V.	11
5. Broytingar í manningarlógini	13
6. Sjómansskúlalóggávan	13
7. Minstaløn og annar stuðul til fiskivinnuna	14
8. Broytingar í lógini um skattligar avskrivingar	19
9. Broytingar í løgtingslóg um endurnýgging fiskiskipaflotans	38
10. Kommunulæknaskipanin o.a.m. í Føroyum	41
11. Felagsmarknaðarmálið	42
12. Hækking av sosialum pensjónum v.m.	50
13. Bann móti skjóting av grindahvali á landleiðini	52
14. Grannskoðan av almennum roknskapum	53
15. Ymsar reguleringar av fiskiskapinum í norður eystara partinum av Atlantshavinum (NEAFC)	56
16. Prístalsviðgerð av urbeiðaratønum	65
17. Broyting í stýrisskipanarlógini (framloga av figgjarlógini) og	
17b. Uppskot til løgtingslóg um 18 ára valrættaraldur	69
18. Forboð móti innflutningi og nýtslu av spæliautomatum	73
19. Nýtsla av føroyskum frímerkjum	75
20. Strandferðslnútbyggingin	77
21. Fyrispurningur til løgmann frá Ova Mikkelsen	79
22. Ferðasamband við Sandoynna og Suðuroynna	80
23. Ymsar ríkislógir	80
24. Uppskot til løgtingslóg um keyp av skipum til farleiðina Tórshavn - Skálafjørð	82
Tingsetanin o.a.	87
Val av løgmanni og landsstýrismonnum	91
Nevndarval og val av álitismonnum og nevndum	92
1. Figgjarløgtingslóg 1975/76	101
2. Regulering av fiskiveiðuni í Norður-vestara Atlantshavinum (ICNAF)	118
3. Regulering av fiskiveiðuni í Norður-eystara Atlantshavinum (NEAFC)	121
4. Landsstýrismál	127
5. Studningur til feskfiskaveiðuna	128
6. 5-ára figgjarætlan	132

7. Regulering av veiðuni av norska-arktiska toskastovninum (NEAFC) 135
8. Bráðfongis stuðul til útróðurin v.m. 140
9. Broyting í stýrisskipanarlógini (framløgan av figgjarlógini) 147
10. Kommunulæknaskipanin o.ø.m. í Føroyum 148
11. Málið ikki framlagt 150
12. Val av álitsmonnum og nevndum 150
13. Forboð móti innfiutningi og nýtslu av spæliautomatum 150
14. Veðhald fyri láni til Tórshavnar kommunu 153
15. Flogvøllurin í Vágum 155
16. Lóg um endurgjald fyri kjarnorkuskaðar 158
17. Keyp av skipi til millumlanda- og innanoyggja sigling 159
18. Fiskirættindi føroyinga undir Íslandi 169
19. Veðhald fyri láni til Eggvirkið 173
20. Yvirtøka av sosialu fyrisitingini (lógarbroytingar) 175
21. Uppskot til samtyktar viðv. hækkan av pensjónum 178
22. Broyting í lógunum um fólkapensjón og avlaðispensjón (hækking av sosialveitingum) 179
23. Veðhald fyri lánum til Iðnaðarskip 182
24. Lóg um eftirlit við arbeiðum av ædlum metalum 184
25. Landslán til kreppuhjálp 186
26. Almenn evna-, bakteriu- og heilsufræðilig starvsstova 189
27. Broyting í skaltalógini 195
28. Yvirtøka av Vanlukkulryggingini 198
29. Broyting í patentlógini 199
30. Veiting av ríkisborgararætti 200
31. Føroya undirgrund 201
32. Veðhald fyri láni til L/F Grønlandsfelagið 204
33. Happadráttarloyvi til Útvarp Føroya 212
34. Veðhald fyri lánum til sildamjøl v.m. á goymslu 214
35. Veðhald fyri lánum til smærri iðnaðarvirki 217
36. Broyting í lóg um viðarlundir 219
37. Donsk kunngerð frá 28. mars 1963 av konsularkonventión frá 27. juni 1962 við Bretland 222
38. Fyrispurningur til landsstýrið um skatt av tingmannalønum 223
39. Donsk kunngerð frá 1. juni 1973 av sáttmála frá 3. februar 1972 við Spania um straffidómar 224
40. Fyrispurningur frá Kjartan Mohr til løgmanns 226
41. Valrættur og valbæri til løgtingið 227
42. Fyrispurningur frá Hilmar Kass til løgmann 230
43. Fyrispurningur frá Kjartan Mohr til løgmanns 232
44. Veðhald fyri láni til SEV 234

45. Veðhald fyri láni til Runavíkar kommunu 236
46. Veðhald fyri láni til Fuglafjarðar kommunu 238
47. Veðhald fyri láni til Skála kommunu 240
48. Veðhald fyri láni til uttanbíggja kommunu 242
49. Danskar kunngerðir um broytingar í postlógini 245
50. Donsk lóg um broytingar í ymsum arvalógum 246
51. Fyrispurningur til landsstýrið frá Jákup Mortensen 247
52. Lán til Telefonverkið 248
53. Vegir og leðingar 255
54. Troling á landleiðini 266
55. Lán til landskassan 275
56. Nýtt pristalsgrundarlag 278
57. Broyting í lóg um samsýning loglingsmanna 285
58. Kannan av lóggávumi um priseftirlit 287
59. Broyting í lóg um samsýning landsstýrismanna 290
60. Broyting í lóg um lenastumannalonir v.m. og flokking av lenastumanna størvum 292
61. Broyting í lóg um lenastumannalonir 295
62. Loglingslóg um pristalsviðgerð av arbeiðsløn 297
63. Broyting í lóg um minstulon v.m. 300
64. Betri sjókort av Føroya landgrunni 302
65. Leiga av linuskipi til fiskiroyndir 303
66. Broyting í læraralønarlógini 305
67. Ráfiskagrunnurin 306
68. Broyting í lógini um minstulon og annan stuðul til fiskivinnuna 323
69. Brennioljustuðningur til fiskivinnuna 327
70. Studningur til veiðu av idnaðarfiski 329
71. Framleingjan av lógini um bráðfongis studning til fiskivinnuna 338
72. Veðhald fyri láni til p/f Kyrruvík 340
73. Broyting í Innflutningsgjaldum 343
74. Broyting í lógnunum um fólkapensjón, avlaðnispensjón, almenna sjúkratrygging og barnapening til stokar uppihaldarar v.m. 349
75. Lán til fiskavirkir 351
76. Ymsar rikislógir (broytingar í sjálógini) 353
Skriv og umsóknir o.t. framlagt á tingi 355

Ólavsøkutingið 1974

Ár 1974, ólavsøkudag kl. 13.00 var løgtingið sett. Tingformaðurin frá seinastu tingsetu, J. Fr. Øregaard, lýsti, at ólavsøkutingið 1974 var sett sambært skriv frá løgmanni.

Tingmenninir eru:

Hákun Djurhuus, Klaksvík, ff.
Finnbogi Isaksen, Klaksvík, tf.
Poul J. Olsen, Klaksvík, jv.
Signar Hansen, Fuglafjørður, tf.
J. Fr. Øregaard, Gøta, jv.
Johs. M. Olsen, Strendur, sb.
Jógvan J. Olsen, Toftir, sb.
Jógvan Sundstein, Tórshavn, ff.
Agnar Nielsen, Vestmanna, sb.
Jógvan Durhuus, Vestmanna, tf.
Leon Joensen, Sørvágur, sb.
Haldor Hansen, Tórshavn, jv.
Trygvi Samuelsen, Tórshavn, sb.
Sigfried Skaale, Tórshavn, ff.
Knút Wang, Tórshavn, ff.
Erlendur Patursson, Kirkjubøur, tf.
Hanus við Høgadalsá, Tórshavn, tf.
Martin Joensen, Tórshavn, jv.
Hilmar Kass, Tórshavn, sj.
Kjartan Mohr, Tórshavn, fb.
Demmus Hentze, Tórshavn, ff.
Tórálvur Mohr Olsen, Sandur, jv.
Andreas Djurhuus, Vágur, sb.
Ove Michelsen, Vágur, tf.
Hilmar Bech, Porkeri, jv.
Joen P. Thomasen, Vágur, jv.

Síðan fór fram val av løgtingsformanni, næstformanni og løgtingsskrivarum.

Til formann varð valdur J. Fr. Øregaard.

Til næstformann varð valdur Finnbogi Isaksen (í lutakasti við Knútt Wang).

Til 1. skrivara varð valdur Agnar Nielsen.

Til 2. skrivara varð valdur Jógvan Sundstein (í lutakasti við Signar Hansen).

Síðan fekk løgmaður orðið.

Formaðurin bað tingmenn eftir gomlum siði ropa eitt níggju faldað livi fyri drottningini og eitt trý faldað livi fyri Føroyum.

2. september boðaði løgtingsformaðurin frá skrivi frá Demmus Hentze, har hann bað um farloyvi vegna utanlandaferð og at næsti maður hans tók sæti á tingi, meðan hann var burtur. Atkvøðugreiðsla um farloyvi og at næsti maður, Herman Winther, Skopun, tók sæti á tingi fyribils, varð samtykt við 24—0 atkvøðum.

5. september var seinasti fundur í ólavsøkutingsetuni.

Áðrenn fundarlok fekk løgmaður orðið og lýsti tingið at vera endað.

Gerðarbókin varð upplisin og undirskrivað av hjástøddum tingmonnum.

Í ólavsøkutingsetuni vóru 20 fundir og vóru 24 tingmál skráset.

Tingnevndir

Tingnevndir

(Fastar nevndir valdar 30. juli):

FIGGJARNEVND:

Fastir limir: **J. Fr. Øregaard**, Hilmar Kass, Trygvi Samuelsen, Andreas Djurhuus, Knút Wang, Hanus við Høgadalsá og Finnbogi Isaksen (eftir lutakast millum hann og Kjartan Mohr).

Tiltaksmenn: Poul J. Olsen, Haldor Hansen, Leon Joensen, Johs. M. Olsen, Kj. Mohr, Jógvan Durhuus, Ove Michelsen.

UMSÓKNARNEVND:

Hilmar Bech, Leon Joensen og Sigfried Skaale (eftir lutakast millum hann og Jógvan Durhuus).

LANDSSTYRISMÁLANEVND:

J. **Fr. Øregaard**, Jógvan Olsen og Demmus Hentze (eftir lutakast millum hann og Ove Michelsen).

AÐRAR NEVNDIR:

SKATTANEVND: (vald 7. august)

Hilmar Bech, Poul J. Olsen, Agnar Nielsen, Jógvan Sundstein og Finnbogi Isaksen.

FISKIVINNUNEVND: (vald 7. august)

Poul J. Olsen, Tórálvur Olsen, Leon Joensen, Ove Michelsen og Húkun Djurhuus.

LÓGARNEVND: (vald 7. august)

Trygvi Samuelsen, Poul J. Olsen, Martin Joensen, Demmus Hentze og Signar Hansen.

2 LIMIR TIL NORÐURLANDARÁÐIÐ OG TILTAKSLIMIR:
(valdir 13. august)

Formaðurin las skriv, har undirskrivaðu flokkar siga frá, at teir vóru gingnir saman um val av umboð til Norðurlandaráðið: — vegna Fólkaflokkin, Hákun Djurhuus, vegna Framburðsflokkin, Kj. Mohr, vegna Sjálvstýrisflokkin, Hilmar Kass.

Valið fór soleiðis fram:

Fastir limir: J. Fr. Øregaard, Demmus Hentze.
Tiltakslimir: Poul J. Olsen, Jógvan Sundstein.

MARKNAÐARNEVND: (vald 16. august):

Formaðurin legði fram uppskot til samtyktar frá Hákun Djurhuus, Hilmar Kass, Poul J. Olsen, Tr. Samuelsen, Kj. Mohr og J. Fr. Øregaard, um at í løgtingsins marknaðarnevnd sita tingformaðurin og ein limur úr hvørjum flokki. Hetta uppskot varð samtykt við 16 -0 atkvøðum, aftaná at samtykt varð at frávíkja tíðarfrestini.

Valdir vóru:

Fastir limir: J. Fr. Øregaard, Erlendur Patursson, Hákun Djurhuus, Kj. Mohr, Tr. Samuelsen, Hilmar Kass, Poul J. Olsen.
Tiltaksmenn: Finnbogi Isaksen, Jógvan Durhuus, Demmus Hentze, Jógvan Sundstein, Andreas Djurhuus, Agnar Nielsen, Tórálvur Mohr Olsen.

Frágreiðing frá løgmanni 1974

Frágreiðing frá løgmanni 1974

Eftir at løgtingið var sett ólavsøkudag 1974, helt løgmaður røðu
Røðan er prentað sum skjal 3.

Orðaskiftið um løgmansrøðuna 1974 var 4. og 5. september.

1, Fíggjarløgtingslóg 1975/76 (ólavsøkutingsetan)

Ár 1974, týsdagin 6. august legði Petur F. Christiansen, landsstýrismaður fram

Uppskot
til
Fíggjarløgtingslóg 1975/76

Sí skjal 2 A

F.L. J. nr. 400 - 20

2. Framhald av Støðisútbúgvingini

Ár 1974, týsdagin 6. august legði Asbjørn Joensen, landsstýrismaður, fram

Uppskot
til

løgtingslóg um broyting í fíggjarløgtingslógini 1974/75.

§ 1.
Undir § 15.9: Fróðskaparsetur Føroya á fíggjarløgtingslógini 1974/75 verða játtaðar 840.800 kr. til framhald av eini støðisútbúgving.

§ 2.
Henda lóg hevur gildi frá 15. mai 1974.

lagtingslov om ændring i finanslagtingsloven 1974/75.

§ 1.
Under § 15.9: Færøernes Akademi i finanslagtingsloven 1974/75 bevilges 840.800 kr. til fortsættelse af en basisuddannelse.

§ 2.
Denne lov har gyldighed fra 15. maj 1974.

Viðmerkingar:

Aftaná løgtingið hevði endað tingsetuna 1973 tók landsstýrið spurningin um framhald av støðisútbúgvingini upp aftur til viðgerðar og sendi fíggjarnevndini soljóðandi skriv dagfest 7. mai 1974:

«Landsstýrið søkir um góðkenning fíggjarnevndarinnar til, at støðisútbúgvingin við Fróðskaparsetur Føroya heldur fram frá heystsemestrinum 1974.

Í fylgiskjølum til uppskot landsstýrisins til fíggjarløgtingslóg 1974/75, jbr. bls. 73, verður frá fróðskaparsetrinum sagt frá, at eingin avgerð tá var tikin um framhald av støðisútbúgvingini, setrið vildi venda aftur til málið seinri, tá ið deildin hevði umhugsað, hvørjar framtíðaraetlanir, hon hevði við hesum undirvísingarhátti nú aftaná 2-ára royndartíðin er úti í summar.

3. mars hevði setursráðið fund og samtykti einmælt at støðga við at taka upp nýggjar næmingar til støðisútbúgvingina í eitt ár samstundis, sum hugsað verður um og avmarkingar verða, hvørjar undirvísingaruppgávur setrið í framtíðini eigur at taka uppá seg. Hugsað er um tær undirvísingaruppgávur, setrið longu frammanundan hevur, aðra útbúgving, sum stórur førvur er á í føroyska samfelagnum, t.d. fyrisiting og viðari útbúgving av lærarum, spurningar í sambond við støðisútbúgvingina (eisini spurningar um lærarur og høli) og um framhald av henni til t.d. tekn-

ikarar á millumstigi til eftirlitsarbeiði á fiskavirkjum, rannsóknararbeiði, elektronikk og dataviðgerð.

Setursráðið søkti tí ikki um játtan til framhald av støðisútbúgvingini heystsemestrið 1974, men um at fáa eina játtan uppá 170.000 kr. at nýta í samráð við landsstýrið at kanna, hvørjar uppgávur setrið í framtíðini eigur at taka uppá seg og leggja til rættis.

Landsstýrið hevði fa áskoðan, at støðisútbúgvingin var byrjanin til eina hægri útbúgving, eina útbúgving, sum bæði kundi nýtast í framhaldandi læru á øðrum lærustovnum og eisini við ymsum yvirbygningum til prøvtøku á ymsum økjum, har førvur var á lærdum fólki í føroyska samfelagnum. Landsstýrið vildi tó helst, at henda útbúgvingin helt fram, men ásannaði samstundis, at framhald ikki var gjørligt, um setursráðið ikki helt seg kunna taka undir.

Fíggjarnevndin og síðani løgtingið tóku til eftirtektar støðu setursráðsins til støðisútbúgvingina og játtaðu 170.000 kr. til fróðskaparsetrið til kanningar um, hvørjar undirvísingaruppgávur, setrið skal taka uppá seg, jbr. álitið til fíggjarløgtingslógina bls. 8.

Síðani hevur landsstýrið út frá tí støðu, tað hevur havt og enn hevur í hesum máli, at føroyska ungdóminum eigur at standa í boði heima tann útbúgving, vit fíggjarliga og yrkisliga forsvarligt kunnu geva honum, heitt á setursráðið um at umhugsa støðisútbúgvingina eina ferð. Kanningararbeiði eigur at kunna verða gjørt, eisini um støðisútbúgvingin heldur fram.

2. mai 1974 hevur eitt ikki sameint setursráð tikið ta støðu at taka undir í álitan landsstýrisins um framhald aftaná summarfrítiðina, og soleiðis at eingin broyting verður í støðisútbúgvingini hvørki í innihaldi ella í strukturi, eftir tí, landsstýrið hevur fingið upplýst, er tað ein meirilutí í ráðnum, sum er fyri hesi støðu.

Kostnaðurin verður mettur soleiðis fyri ávikavist akademiska árið 1974/75 og fíggjarárið 1974/75:

	akadem. árið	fíggjarárið
Inntøgur	360.510 kr.	300.000 kr.
Rakstur:		
Lønir	450.000 kr.	340.000 kr.
Fyrisiting	136.000 —	102.000 —
Biologi	6.000 —	4.500 —
Filosofi - psykologi	5.000 —	3.800 —
Fysikk	23.120 —	18.000 —
Kemi - biokemi	22.460 —	17.500 —
Matematikk — statistikk	20.000 —	15.000 —
	1.023.090 kr.	800.800 kr.

Her er roknað við næmingatalinum 21, verður talið minni, minka útreiðslurnar, men ikki lutfalsliga.

Aftaná hesum tølum er húsaútreiðslurnar. Um landsstýrið keypir húsini hjá Ninnu Zachariasen, jbr. onnur umsókn d.d. frá landsstýrinum til fíggjarnevndina, og húsið fyrifyrst verður latið støðisútbúgvingini, kunnu útreiðslurnar metast soleiðis:

Umvælingar v.m.	25.000 kr.
Hiti, ljós og reingerð	15.000 —
	40.000 kr.

ella í fíggjarárinum 1974/75 30.000 kr.

Vísandi til tað, sum her er fört fram, søkir landsstýrið um fíggjarnevndarinnar góðkenning til í fíggjarárinum 1974/75 yvir fíggjarlógarkonto § 15-9: Fróðskaparsetur Føroya at nýta 840.800 kr. til framhald av støðisútbúgvingini frá heystsemestrinum 1974.»

Fíggjarnevndin samtykti fyri sín part á fundi 7. mai 1974, at støðisútbúgvingin átti at halda fram við tilmæli um, at málið verður lagt fyri ólavsøkutingið.

1. viðgerð 8. august og málið beint í fíggjarnevndina, sum 16. august legði fram soljóðandi

Alit

Hetta mál er av landsstýrinum lagt fyri tingið og varð við fyrstu viðgerð beint í fíggjarnevndina.

Í viðmerkingunum vísir landsstýrið á gongdina í hesum máli, at setursráðið í mars í ár samtykti at steðga við hesi undirvising fyribils í eitt ár, meðan kannað var um møguligt framhald á broyttum grundarlag. Eisini verður fört fram at landsstýrið, aftaná at tingsetan endaði, hevði tikið upp samráðingar við setursráðið um framhald, og at hesar samráðingar førdu til, at setursráðið samtykti at halda fram við undirvísingini á óbroyttum grundarlagi.

Landsstýrið søkir nú um játtan á fíggjarlógini kr. 840.000. Fíggjarnevndin, sum viðgjørt hevur málið, tekur undir við tilmælinum og mælir løgtinginum til at samtykkja tað og setur fram fylgjandi:

Uppskot landsstýrisins verður at samtykkja.

2. viðgerð 20. august.

Gr. 1 samtykt við 22—0, gr. 2. samtykt uttan atkvgr. og soleiðis samtykt at fara til 3. viðgerð við 23—0.

3. viðgerð 22. august. Frávik frá tíðarfrest. Lógaruppskotið, sum samtykt við 2. viðgerð nú endailga samtykt við 21—0.

3. Keyp av fastari ogn í Tórshavn

Ár 1974, týsdagin 6. august, legði Ashjørn Joensen, landsstýrismaður, fram

Uppskot
til

løgtingslóg um keyp av fastari ogn.	**lagtingslov om køb af fast ejendom.**
§ 1.	§ 1.
Landsstýrinum er heimilt landskassans vegna at keypa ognina matr. nr. 951 e, Tórshavn, Tórshavnar bý við bygningum.	Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at erhverve ejendommen, matr nr. 951 e, Tórshavn, Tórshavnar by med bygninger.
§ 2.	§ 2.
Henda lóg kemur í gildi beinan veg.	Denne lov træder strøks i kraft.

Viðmerkingar:

I samband við málið um frambald av støðisútbúgvingini á Fróðskaparsetur Føroya, sum tók seg upp aftur í mai mánaða 1974, varð neyðugt eisini at finna eina loysn á hølismálinum.

F.L. j. nr 2439 - 1 — sí Ll. nr. 74/1974

Av tí at løgtingssetan tá var lokin, vendi landsstýrið sær til figgjarnevndina í soljóðandi skrivi dagfest 7. mai 1974:

øLandsstýrið søkir um figgjarnevndarinnar góðkenning til at keypa matr. nr. 951 c, Tórshavnar bý við ástandandi sethúsi.

Í ráðandi húsnaeyð í Tórshavn kemur tað rættiliga tíðum fyri, at landsstýrið í samband við setanina av tænastumonnum ella starvsfólki verður biðið um fyribils at útvega hús ella íbúð, til hann, ið settur er, sjálvur hevur havt stundir og umstøður at útvega sær innivist. Er talan um fólk, ið bert verða sett fyri stytri tíðarskeið, eitt ella tvey ár, er tað ofta ein fyritreyt hjá honum, ið settur verður, at viðkomandi stovnur útvegar innivist.

Torført hevur tað ofta verið at greiða henda spurning, serliga tí at vanliga er umráðingartíðin stutt. Lættari var, um landið hevði eini hús at taka til í førum sum hesi her nevndu.

Ætlanin var til komandi setu at leggja uppskot fyri løgtingið um, at landsstýrið fær heimild at keypa hús til nevnda endamál.

Við hesum endamáli hava samráðingar verið við frú Ninnu Zachariasen, Tórshavn, um keyp av húsi hennara á matr. nr. 951 c, Tórshavn.

Nú partarnir vóru samdir um freytirnar, kemur ein enn meira átroðkandi spurningur at loysa inn í myndina, tað er spurningurin um at útvega fróðskaparsetrinum høli til undirvising av næmingum í støðisútbúgvingini. Spurningin um framhald av støðisútbúgvingini hevur landsstýrið lagt fyri figgjarnevndina í øðrum skrivi d.d.

Húsið á matr. nr. 951 s, grundstykkið er 423 m², er bygt í 1929 úr betong, tað er 7,53 m × 10,67 m til støddar, kjallari, stovuhædd og loft, allar hæddirnar eru innrættaðar at búgva í. Húsið hevur miðstøðuhita. Hjallur hoyrir til. Ognin er í september mánaða metta soleiðis:

grundstykkið	38.000 kr.
húsið	270.000 —
tilsamans	308.000 kr.

Partarnir eru samdir um, at landið keypir ognina fyri 400.000 kr. Seljarin freytar sær tó umfram at leiga hús landsstýrisins á Landavegnum matr. nr. 920 c, Tórshavnar bý, fyri 500,- kr. fast um mánaðan, so leingi hon livir, og at húsið fær ymsar ábøtur. Landsstýrið er sinnað at góðtaka hesar treytir, tó soleiðis at leigan verður dýrtíðarjavnað.

Vísandi hertil søkir landsstýrið figgjarnevndarinnar góðkenning til, at landsstýrið keypir ognina matr. nr. 951 c, Tórshavnar bý fyri 400.000 kr. at bóka til útreiðslu á figgjarlógarkonto § 30-1-2: Keyp av húsum (nýggj konto).

Figgjarnevndin samtykti fyri sín part á fundi 7. mai 1974 at geva landsstýrinum heimild at keypa ognina við tilmæli um, at málið verður lagt fyri ólavsøkutingið.

1. viðgerð 8. august og málið beint til 2. viðgerð uttan nevndarviðgerð.
2. viðgerð 20. august.
gr. 1 samtykt við 23—0. gr. 2 samtykt uttan atkvgr., soleiðis samtykt at fara til 3. viðgerð við 23—0.
3. viðgerð 22. august. Frávik frá tiðarfrest. Lógaruppskotið, sum samtykt við 2. viðgerð nú endaliga samtykt við 20—0.

---

4. Veðhald fyri láni til SEV (12 milj. kr.)

Ár 1974, týsdagin 6. august, legði Asbjørn Joensen, landsstýrismaður

Uppskot
til

løgtingslóg um veðhald fyri láni til SEV.

§ 1.

Landsstýrinum verður heimilt landskassans vegna at veðhalda fyri láni 9 milj. kr. til elverkið SEV.

§ 2.

Hesa lóg fer gildi beitan vegin.

lagtingslov om garanti for lån til SEV.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at garantere for et lån på 9 mill. kr. til el-selskabet SEV.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkinagr:

Við løgtingslóg nr. 2 frá 25. januar 1973 fekk landsstýrið heimild at F.L. j. nr. 440-3-2. — Sí eisini Ll. nr. 76/1974

veðhalda fyri láni í Investeringsfonden for Færøerne — íleggingargrunnurin fyri Føroyar — upp á 5 milj. kr. til el-felagið SEV til rindan av arbeiði, sum varð gjørt í fíggjarárinum 1972/73, samanber løgtingsmál nr. 22/1972. Við løgtingslóg nr. 2 frá 7. januar 1974, samanber løgtingsmál nr. 14/1973 fekk landsstýrið heimild at veðhalda fyri 12 milj. kr., sum játtaðar vóru til rindan av arbeiði í fíggjarárinum 1973/74.

Sum frágreitt í hesum løgtingsmálinum er byggi- og kostnaðarætlanin henda:

Ymisk sekunder arbeiði	9,9	milj.	kr.
Primer arbeiði:			
Ymist	2,0	—	—
verkið í Botni (víðkan av avfalløki v.m.)	1,8	—	—
verkið á Tvøroyri (2800 HK diesel v.m.)	2,7	—	—
verkið á Sundi (2 × 10.000 HK diesel v.m.	24,7	—	—
	41,1	milj.	kr.

Íløgugrunnurin hevur játtað felagnum lán uppá 9 milj. kr. í fíggjarárinum 1974/75 og 2 milj. kr. í fíggjarárinum 1975/76 og leggur landsstýrið við hesum fram uppskot um heimildarlóg at veita landskassaveðhald fyri láninum uppá 9 milj. kr., sum játtað er í hesum fíggjarárinum.

1. viðgerð 8. august og málið beint til 2. viðgerð uttan nevndarviðgerð.
2. viðgerð 14. august.
gr. 1 samtykt við 20—0. gr. — gr. 2 samtykt uttan atkvgr. og soleiðis samtykt at fara til 3. viðgerð við 21—0.
3. viðgerð 16. august. Lógaruppskotið nú endaliga samtykt við 21—0.

5. Broytingar í manningarlógini

Ár 1974, týsdagin 6. august, legði Asbjørn Joensen, landsstýrismaður fram

Broytingar í manningarlógini.

Til Føroya løgting.

Løgtingsmál nr. 5/1974: Broytingar í manningarlógini.

Í løgtingssetuni 1973, jbr. løgtingsmál nr. 91/1973, legði landsstýrið fram uppskot til løgtingslóg um broytingar í løgtingslóg um manning av skipum. Løgtingið samtykti at goyma málið til komandi tingsetu.

Landsstýrið loyvir sær við hesum at endurnýggja framløguna.

---

6. Sjómannsskúlalóggávan

Ár 1974, týsdagin 6. august, legði Asbjørn Joensen, landsstýrismaður fram

Sjómannsskúlalóggávan.

Til Føroya løgting.

Løgtingsmál nr. 6/1974: Sjómannsskúlalóggávan.

Í løgtingssetuni 1973, jbr. løgtingsmál nr. 77/1973, legði landsstýrið

F.L. j. nr. 1600-3-3. Sí løgtingstíðindi nr. 91/1973.

F.L. j. nr. 1629-1-2. — Sí eisini løgtingsmál nr. 77/1973.

fram uppskot til samtyktar viðvíkjandi løgtingslóg um sjómansútbúgving. Løgtingið samtykti at goyma málið til komandi tingsetu.

Landsstýrið loyvir sær við hesum at endurnýggja framløguna.

Sí Løgtingstíðindi 1973, Bind B., Skjal 14.

---

7. Minstaløn og annar stuðul til fiskivinnuna

Ár 1974, týsdagin 6. august, legði Eli Nolsøe, landsstýrismaður, fram

Minstaløn og annar stuðul til fiskivinnuna — har undir uppskot til løgtingslóg um minstuløn og annan stuðul til fiskivinnuna.

Í løgtingssetuni 1973, jbr. løgtingsmál nr. 118, legði landsstýri við skrivi dagfest 2. apríl 1974 fyri løgtingið álit og uppskot frá 5-mannanevnd, landsstýrið hevði sett sambært løgtingssamtykt í tingsetuni 1972, jbr. løgtingsmál nr. 19.

Nevndin hevði fingið tann setningin at endurskoða lógina um minstuløn og annan stuðul til fiskivinnuna, álit nevndarinnar er dagfest 26. mars 1974.

Av tí, at málið kom so seint fyri í tingsetuni, vóru ikki stundir at viðgera tað, men var semja um at viðgera málið í tingsetuni 1974. Landsstýrið endurnýggjar tí framløguna.

Í hesum sambandi kann landsstýrið vísa til skriv til løgtingið frá Klaksvíkar Útróðrarfelag dagfest 26. juli 1974 um prísviðbótina fyri fisk avreiddur í Føroyum. Landsstýrið hevur fingið endurrit av skrivinum.

Sí Løgtingstíðindi 1973 Bind B, Skjal 16.

F.L. j. nr. 1517-2-1/73. Sí eisini Lt. nr. 69/74

1. viðgerð 9. august og málið beint í fiskivinnunevndina sum, 22. august legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð framlagt av landsstýrinum, og varð við 1. viðgerð beint í fiskivinnunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið.

Lógaruppskotið frá landsstýrinum er úrslit av kanningararbeiði hjá einari nevnd, sum varð sett av landsstýrinum til at kanna spurningin um minstuløn og annan stuðul til fiskivinnuna. Nevndin varð sett eftir at spurningurin hevur verið viðgjørdur í tingsetuni 1972. Figgjarnevndin bevði tá fingið málið til viðgerðar og helt, at umstøðurnar tá ikki vóru til at gjøgnumføra uppskot landsstýrisins, av tí at her snúði seg um stórmál, og at broytingar í viðurskiftum fiskimanna talaðu fyri eini endurskoðan av lóggávuni sum heild. Tingið legði í hesum viðfangi dent á, at endurskoðanin skuldi miða ímóti broytingum, soleiðis at lógin betri kom at samsvara upprunaligu ætlanini við henni. Endamálið við minstalønarskipanini og prísískoyti var, at stuðulin skuldi koma teimum til góðar, sum høvdu mesta tørv fyri honum, soleiðis at teir við lágari inntøku skulu fáa hægri stuðul enn teir við hægri inntøku. Sum árini eru liðin, síðani minstaløn og prísískoyti komu í gildi, er grundarlagið fyri hesum stuðli og reglunar, hann verður veittur eftir, broytt so mikið, at galdandi skipan ikki heilt gevur tað úrslit, sum veitingin av stuðlinum varð ætlað at geva.

Uppskotið, sum landsstýrið hevur lagt fram, er tað uppskotið, sum svarar til álitið og uppskotið, nevndin, landsstýrið setti, kom við. Í høvuðstáttum ber uppskotið í sær, at útróðrarmenn skulu fáa minstuløn, eina broyting av útrokningargrundarlagnum fyri prísískoyti til saltfisk, og at prísískoyti verður veitt til flakaskip.

Undir viðgerðini av hesum spurningum og lógaruppskotinum sum heild, er fiskivinnunevndin komin til ta áskoðan, at taka undir við uppskoti landsstýrisins viðvíkjandi broytingunum í útrokningunum av prísískoyti til saltfisk, og at veitt verður prísískoyti til flakaskip.

Viðvíkjandi spurninginum um minstuløn til útróðrarmenn, skjýtur kanningarnevndin upp, at deksfør undir 100 tons koma undir minstuløn og vísir í áliti sínum á, hvussu ein slík skipan kann umsitast.

Fiskivinnunevndin er av tí metan, at skulu útróðrarmenn koma undir minstuløn, er tað ikki rímligt einans at lata deksfør koma undir skipanina. Grundin til hetta er, at í mongum førum eru bæði opnir og hálvdekkaðir bátar eitt virðismikið grundarlag undir útróðri í Føroyum. Tað er órímligt, at hesir útróðrarmenn skuldu fallið uttanfyri minstulønarskipanina.

Harnæst er fiskivinnunevndin av tí áskoðan, at tann skipan, sum er

skotin upp, vil bera í sær rættiliga lítlan bata fíggjarliga sað fyri útróðrarmenn. Upplýst er, at í miðal út frá tølunum í 1973 vil skipanin geva einum manni 166 kr. um árið. Umfram hetta verður skipanin eftir øllum at døma rættiliga torfør at umsita.

Fiskivinnunevndin er av tí metan, at málið sum lagt fram av landsstýrinum ikki sum heild sað loysir ta høvuðsuppgávu, sum tingið stillaði. Soleiðis sum prísískoytisskipanin er í dag, verður prísískoyti veitt til fiskimenn, uttan mun til inntøkugrundarlag teirra. Tað eru eyðsýnd dømi um, at henda skipanin ber í mongum førum í sær, at ískoyti verður stórt hjá teimum sum frammanundan hava fregastu inntøkuna. Sonuleiðis kann sigast um minstulønina, at hon í summum førum — serliga tá talan er um stuttar og heilt stuttar túrar — ikki virkar eftir ætlan.

Uppskotið frá landsstýrinum broytir ikki í princippinum hesi viðurskifti.

Uppskotið frá landsstýrinum ber eisini í sær, at prísískoyti til feskan fisk avreiddan í Føroyum framvegis skal vera 15 oyru pr. kg. Fiskivinnunevndin metir, at tá havt verður í huga teir lækkaðu prísirnir á fiski, sum verður avreiddur í Føroyum ta seinnu tíðina, er tað rímiligt at hækka prísískoyti til útróðrarmenn. Fiskivinnunevndin mælir tí til at hækka prísískoyti til feskan fisk avreiddan í Føroyum og í Grønlandi við 10 oyru pr. kg.

Tá fiskivinnunevndin sum sagt metir, at uppskotið, sum lagt er fyri tingið, ikki sum heild sað loysir teir spurningar sum ætlanin var við tingsamtyktini um at endurskoða minstulønarskipanina og prísískoytisskipanina, mælir fiskivinnunevndin til, at landsstýrið setur eina nýggja nevnd til at kanna hesar spurningar við tí í hyggju at seta fram uppskot sum kunnu miða ímóti eini rættvísari og rímiligari skipan enn tann skipanin, sum nú er galdandi. Fiskivinnunevndin er samstundis sannd um, at uppskot landsstýrisins ber í sær tiltrongdar ábøtur og tekur tí undir við uppskotinum, men setur fram hetta

Broytingaruppskot

§ 2, 2. stk. fellur burtur.

§ 4, 1., 2. og 3. petti verður broytt til soljóðandi:

§ 4.

Tá ið førovskt fiskifar avreiðir feskan fisk í Føroyum verður latið í studningi til manningina 25 oyru fyri kg av veiðuni av øllum rundum, kruvdum fiski við høvdi, men hvørja ferð, prísurin hækkar við

§ 4.

Ved indkøbsling på Færøerne af frisk fisk fra færøske fiskerfartøjer ydes der mandskabet 25 øre pr. kg i tilskud af fangsten af al rund fisk med hoved uden indvolde, men for hver gang prisen

10 oyru í meðal, lækkar prisviðbótin við einum oyra, tó ongantfið niður um 15 oyru. Er talan um bátar við bensinmotori, er studningurin 7 oyru lægri fyri kg.

2. stk. Tá ið foroyskt fiskifar avreiðir feskum fisk í Grønlandi, verður latið í studningi til manningina 25 oyru fyri kg av veiðuni av øllum kryvlum fiski við hovdi, men hvørja ferð, prisurin hækkar við 10 oyru í meðal, lækkar prisviðbótin við 1 oyra, tó ongantfið niður um 15 oyru.

3. stk. Tá ið foroyskt fiskifar undir 10 brutto skrásett tons avreiðir sild frá foroyskum firði til agn, frystingar ella sallingar, verður latið í studningi til manningina 25 oyru fyri kg av sildaveiðuni, men fyri hvørja ferð prisurin hækkar við 10 oyru í meðal, lækkar prisviðbótin við 1 oyra, tó ongantfið niður um 15 oyru. Studningurin fyri kg kann tó ikki verða hægri enn avreiðingarprisurin. Er talan um bátar við bensinmotori, er studningurin 4 oyru hægri fyri kg.

forhøjes med 10 øre i gennemsnit, formindskes pristilskudet med 1 øre, dog ingensinde til under 15 øre. Er fiskeriet udøvet fra både med benzinmotor, er tilskudet 7 øre højere pr. kg.

Stk. 2. Ved indhandling i Grønland af frisk torsk fra færøske fiskerfartøjer ydes der mandskabet 25 øre pr. kg i tilskud af fangsten med hoved uden indvolde, men for hver gang prisen forhøjes med 10 øre i gennemsnit, formindskes pristilskudet med 1 øre, dog ingensinde til under 15 øre.

Stk. 3. Ved indhandling på Færøerne af fjordsild fra færøske fiskerfartøjer under 10 brutto registerton til agn, frysning eller saltning, ydes der mandskabet 25 øre pr. kg i tilskud af sildefangsten, men for hver gang prisen forhøjes med 10 øre i gennemsnit, formindskes pristilskudet med 1 øre, dog ingensinde til under 15 øre. Tilskudet pr. kg. kan dog ikke overstige indhandlingsprisen pr. kg. Er fiskeriet udøvet fra både med benzinmotor, er tilskudet 4 øre højere pr. kg.

Uppskot
til
samtyktar.

Heitt verður á landsstýrið at seta nevnd til kannan av spurningum í samband við minstuløn og annan stuðul til fiskivinnuna, soleiðis sum ætlanin var við tilmæli og uppskoti frá fíggjarnevndini í løgtingsmáli nr. 191/1972.

Úrslitið av kanningunum verður at leggja fyri tingið.

FISKIVINNUNEVNDIN, 19. august 1974.

2. viðgerð 23. august.

Formaðurin legði fram frá Fiskivinnunevndini soljóðandi

Broytingaruppskot
til
løgtingsmál nr. 7/1974: Minstaløn og annar stuðul til fiskivinnuna.

1) I § 4, 4. stk., verður 5 oyru fyri kg broytt til «15» oyru.

2) I § 10 verður í 1. punktum aftaná «1. oktober 1972» sett «og lær gildi frá 1. april 1974».

1) I § 4, stk. 4 ændres 5 øre pr. kg til «15» øre.

2) I § 10 ændres i 1. punktum efter ordene «1. oktober 1972» «og træder i kraft 1. april 1974».

FISKIVINNUNEVNDIN, 23. august 1974.

Atkvøðugreiðslan fór soleiðis fram:

gr. 1 samtykt við 21—0. — Broytingaruppskotið frá nevndini til gr. 2 samtykt við 21—0. — gr. 2 soleiðis broytt samtykt við 21—0. — gr. 3 samtykt við 21—0. — Broytingaruppskot frá nevndini til gr. 4 samtykt við 20—0. — gr. 4 soleiðis broytt samtykt 20—0. — gr. 5 - 6 - 7 - 8 - 9 - 10 samtyktar við 21—0. Lógaruppskotið soleiðis broytt samtykt at fara til 3. viðgerð við 21—0.

Uppskotið til samtyktar, samtykt við 21—0.

3. viðgerð 2. september.

Framlagt var broytingaruppskot frá nevndini, har tann rætting verður gjørd til broytingaruppskotið undir aðru viðgerð pkt. 2, at í føroysku tekstini verður sett millum «og» og «far» «gr. 7» og í donsku tekstini «paragr. 7» millum orðini «og» og «træder».

Broytingaruppskot frá nevndini samtykt við 24—0.

Uppskotið, sum samtykt við 2. viðgerð og soleiðis broytt, samtykt við 24—0.

8. Broytingar í lógini um skattligar avskrivingar

Ár 1974, mikudagin 7. august, legði Petur F. Christiansen, landsstýrismaður, fram

Uppskot
til

løgtingslóg um broytingar í løgtingslóg um skattligar avskrivingar.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 52 frá 29. december 1971 um skattligar avskrivingar v.m. við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1. Í § 2, 4. stk. verður strikað: «skal gerast við heilum prosentum og»
2. Í § 13, 3. stk. verður «45 prosent» broytt til «30 prosent» og «15 prosent» broytt til «10 prosent».
3. Sum nýggj § 16 b verður sett: «Avskriving hjá persónligum skattgjaldara av ogonum, sum eru undir hesum kapitli, verða gjørdar eftir reglunum í hesum og 1. kapitli við niðanfyri nevndu avmarkingum:
   1) Árlig avskriving eftir § 2, jmf. § 12 kann í mesta lagi vera ájøvn við vinningin av skipavakstri í inntøkuárinum.
   2) Ólyvir vakstrarvinningin kann persónur tó avskriva 20% av vøkstrinum í saldovirðinum í inntøkuárinum, um hesin

lagtingslov om ændring i lagtingslov om skattemæssige afskrivninger m.v.

§ 1.

I lagtingslov nr. 52 af 29. december 1971 om skattemæssige afskrivninger m.v. med senere ændringer foretages følgende ændringer:

1. I § 2, stk. 4. udgår ordene «skal foretages med hele procenter og»
2. I § 13, stk. 3 ændres «45 procent» til «30 procent» og «15 procent» til «10 procent».
3. Som ny § 16 b tilføjes: «Personlig skatteyder kan foretage afskrivning af aktiver, som henhører under dette kapitel, og efter reglerne i dette kapitel og kapitel 1 med nedenfor anførte begrænsninger:
   1) Årlig afskrivning efter § 2, jfr. § 12 kan ikke overstige overskuddet ved drift af skibe i indkomståret.
   2) Udover driftsoverskuddet kan personlig skatteyder dog afskrive 20% af tilgangen i saldoværdien i indkomståret, så-

F.L. j. nr. 430-10-3. — Sí eisini LJ. nr. 70/1974.

vøkstur er 10.000 kr. ella meira. Forskotsavskriving, sum er gjørd í inntøkuárinum 1974 og seinni av skipi, sum fyrstu ferð er tikin við í saldovirðið í inntøkuárinum, gongur frá áðurnevndu 20%.

3) Forskotsavskriving upp á byggisáttmála kann í mesta lagi vera 20% av avrádda byggikostnaðinum og ikki meira enn 10% í einum ári.

4) Persónur, sum pr. 31. december 1974 eigur skip ella part í skipi, kann hóast ásetingina í nr. 1 og 2 áfyvir rakstrarvinningin avskriva 20% tilsaman av saldovirðinum pr. 31 december 1974 í hesum inntøkuári.

5) Forskotsavskriving og onnur avskriving eftir hesum kapitli áfyvir rakstrarvinning, jmt. nr. 2 og 4, kann hægst vera 25.000 kr. árliga. Henda avmarking er tó ikki galdandi, har sáttmáli um bygging av skipi verður uppsagdur, og viðkomandi ger nýggjan skipabyggisáttmála innan árslok 1974.

2. stk. Rakstrarvinningur av skipi er eftir hesari grein nettovinningur, aftaná at rakstrarútreiðslur, herundir allar lønir, eisini reiðaraløn og hýrur eftir galdandi sáttmálum, eru farnar av, men áðrenn avskrivingar eru gjørdar.

§ 2.

Henda lóg fær gildi frá og við skattaárinum 1975/76.

fremt tilgangen udgør 10.000 kr. eller mere. Forskudsafskrivning, som er foretaget i indkomståret 1974 eller senere på skibe, som tilgår saldoværdien i indkomståret, fragår i førnævnte 20%.

3) Forskudsafskrivning på byggekontrakter kan højst andrage 20% af den aftalte byggesum og ikke mere end 10% i et enkelt år.

4) Person, som pr. 31. december 1974 er ejer af skibe eller skibsuparter kan tænset reglerne i nr. 1 og 2 i indeværende indkomstår udover driftsoverskuddet afskrive tilsammen 20% af saldoværdien pr. 31. december 1974.

5) Forskudsafskriving og andre afskrivninger efter dette kapitel kan, bortset fra driftsoverskud jfr. nr. 2 og 4, højst andrage 25.000 kr. årlig. Denne begrænsning gælder dog ikke i tilfælde af, at en kontrakt om bygning af et skib opsiges, og vedkommende derefter indgår en ny skibsbygningskontrakt inden udgangen af året 1974.

Stk. 2. Driftsoverskud af skib efter nærværende paragraf er nettooverskud efter at alle driftsudgifter, herunder alle lønninger, også rederlon og hyrer efter gældende overenskomster, er fratrukket, men forinden afskrivning er foretaget.

§ 2.

Denne lov træder i kraft fra og med skatteåret 1975/76.

Viðmerkingar:

16. mars 1974 legði skattanevnd landsstýrisins fram frágreiðing um ymisk skattamál.

Í hesi frágreiðing verða avskrivingar av skiptum, ið eru skipað sum partreiðarlir viðgjørdar (skjal VA) og víst verður á teir fyrimunir og vansar, ið standast av avskrivingunum.

Í frágreiðingini verður serliga víst á hesar vansar:

1. Stórur partur av bruttoinntøkuni hjá persónum kemur ikki til skattingar.
2. Persónar, ið eftir vanligari mannahugsan eru mentir at bera eina ávísa skattabyrði, sleppa ov lætliga í skatti og hava orsakað av avskrivingunum atgongd til socialar veitingar.
3. fløgurnar verða ov stórar, ójavnar og illa undirbygdar.

Hvussu avskrivingarreglurnar ávirka skattainntøku kommununnar og landskassans er víst í dømunum um avskrivingar á skjali 1.

Av skjalinum sæst, at maður, ið hevur eina innskotspening upp á kr. 10.000, við teimum fyritreytum, ið gjørdar eru, aftaná 3 ár hevur eina skattaútseting upp á kr. 20.400, og tá skattaútsetingin er mest kr. 36.680. Skattaútsetingin gevur sostatt munandi meir í tøkum peningi enn innskotið.

Dømið vísir, at nettoinntøka skipsins í livitíð tess verður skattað á vanligan hátt, men at meir-skattur landskassans er ógvuliga ójavnt býttur í millum árini. Frá 1974 til 1978 missir hitt almenna skatt. Hesin munur verður lutvíst uppvegaður í árunum 1979 81. Ikki fyrr enn í 1982, tá ið skipið verður selt, kemur rættilig vend í. Henda vend verður tó oftast flytt longur út í framtíðina við at menn gera nýggjar fløgur.

Skattamissur landskassans er sostatt ógvuliga stórur í fyrstu árunum og møguligur meirskattur av rakstri liggur oftast úti í eini framtíð, ið oftast er eitt munandi størri áramál enn dømi vísir.

Tað størsta vandamálið tykist tó at verða, at háinntøkurnar fáa munandi størri fyrimunir enn láginntøkurnar.

Avskrivingarnar flyta í stóran mun skattatrýstið frá háinntøkunum til láginntøkurnar og økja sostatt um skattatrýstið fyri meginpartin av fólkinum.

Í áðurnevnda frágreiðing IV kapitli, skjal IV G verður víst á, at háinntøkuborgararnir nýta avskrivingar í so stóran mun, at tann progressivi skattastigin í síðsta enda ikki sum heild gevur landskassanum størri skattaúrtøku. Hesar háinntøkur gjalda sostatt ikki tann skatt, ið ætlað var og eru av somu orsøk við, tá socialar veitingar skulu býtast út.

Tann stóra skattaútsetingin fyrstu árini og møguleikin fyri at útsetu

meirskattingina við nýggjum íløgum og harvið økja um skattaútsetingina við nýggjum íløgum og harvið økja um skattaútsetingina ger, at íløgurnar bliva stórar, ójavnar og vandi er fyri, at tær ikki altíð eru líka væl undirbygdar.

Í einum landi, har fiskivinnan er høvuðsvinna, er neyðugt við stórum íløgum á hesum øki. Vandamálið er, um hesar íløgur verða fíggjaðar á ein slíkan hátt, at samfelagsins útreiðslur verða skúgvaðar frá teimum, ið keypa skipini og eiga tey, til hin bólkin, ið ikki eigur skipini, sjálvt um hesin bólkur beinleiðis ella óbeinleiðis fær ágóðan av, at skipini verða keypt.

Í uppskotinum til broyting av avskrivingarreglunum, verður roynt at bøta um teir skeivleikar, ið her eru vístir:

Uppskotið miðar ímóti:

- at tryggja javnari íløgulag og regulera íløgurnar.
- at tryggja, at inntøkumissur landskassans verður munandi minni og sostatt tryggja eitt meira rættvist skattabýti, samstundis sum missurin verður javnaður ár undan ári.
- at tryggja, at ein størri partur av háinntøkunum kemur til skattingar.
- at tryggja, at sambandið millum ábyrgd og avskrivingar verður meira rímligt.
- at tryggja, at hóast tað, at íløgurnar verða reguleraðar, fáa menn við lýsni og vilja at taka eina risiko, fyrimunir, sum eru meira avvigaðir í mun til ábyrgdina.

Uppskotið avmarkar la skattaútseting, ið gerast kann í persóninntøkuni, soleiðis at henda í mesta lagi verður heldur minni enn 10% av keyps- ella sáttmálavirðinum. Henda broyting breiðkar um skattagrundarlagið og gevur javnari skattabýti.

Fyri harímframt at avmarka frádráttin hjá háinntøkunum er hægsti loyvdi frádráttur settur til kr. 25.000 hvørt árið sær.

Fyri at regulera íløgurnar er avskriving út yvir tað, sum nevnt er omanfyri, avmarkað í rakstrarvinningi. Harímframt verður forskotsavskrivingin av byggisáttmálum broytt sum heild frá 15% yvir 3 ár ella í mesta lagi 45% til 10% yvir 3 ár ella í mesta lagi 30%.

Hevur skipið ongan rakstrarvinning ella hall, kunnu avskrivingar ikki gerast út um áðurnevndu avmarkingar. Avdráttir mugu í hesum fori gjaldast til fulnar av eigaranum av egnu inntoku, uttan at eigarin fær nakra hjálp fgjøgnum avskrivingar og harvið spardum ella útsetttum skatti. Hall kann sum áður dragast frá persóninntøkuni.

Eftir núgaldandi reglum kann eitt møguligt virðisfall av skipi útjavnast

gjøgnum avskrivingar í persónligari inntøku ella inntøku av skiparakstri. Eftir broytingaruppskotinum verða hesir møguleikar munandi skerdir.

Fellur skipið í virði út um avskriving gjøgnum rekstrarvinning og avskrivingar eftir omanfyri nevndu reglum, kann hetta virðisfall eftir broytingaruppskotinum ikki gjøgnum avskriving dragast frá í skattskyldugu inntøku eigarans, fyrrenn skipið verður selt og virðisfallið ásannað.

Fyri at geva eina nærri lýsing av, hvussu broytingaruppskotini roynast eru nøkur dømi í skjali 2 og 3.

Samanbera vit skjal 1 og 2 sæst, at skattaútsetingin í persónsinntokuni eftir teimum fyritreytum, ið gjørdar eru, er kr. 8.000 ella 80% av innskotspeninginum á skjali 2, meðan skattaútsetingin í persónligari inntøku á skjali 1 longu í 1974 er 20.000 kr. ella 200% av innskotspeninginum. Tað sæst eisini av dømunum, at skattaútsetingin fellur javnari. Í dømunum skulu 8 ár til fyri at fáa ta skattaútseting í núgaldandi reglur geva í 4 ár.

Dømini vísa eisini, at fer innskotspeningurin upp um kr. 25.000 við teimum fyritreytum, ið gjørdar eru, so fellur skattaútsetingin í mun til innskotspeningin.

Hesi broytingaruppskot loysa meginpartin av teimum vansum, ið vist varð á í byrjanini. Tað ið frestar er at broyta grundarlagið fyri socialu veitingunum, soleiðis at avskrivingar, ið ikki svara til virðisfall, verða lagdar afturat skattskyldugu inntøkuni. Tann hækkaða skattskylduga inntøkan skuldi so verið grundarlag fyri úrgjaldan av socialum veitingum.

Petur F. Christiansen
landsstýrismaður

/ J. Djurhuus

SKJAL 1

LÝSING AV HVUSSU NÚGALDANDI AVSKRIVINGAR ROYNAST
(1.000 kr.)

	Bókaða virði skipsins 1/1	Hægst loyvda avskriving	Rakstrarúrslit áðrenn avskriving	Rakstrarúrslit aftaná avskriving	Skattamissur hjá kommununi (10%)	Skattamissur hjá landinum (30%)	Skattamissur hjá tilsamans (40%)	Skattaútseting í persónsinntøku	Skattaútseting brutto
1974	(100)[1]	15	—	+ 15	1,5	4,5	6,0	6,0	6,0
1975	(100)[1]	15	—	+ 15	1,5	4,5	6,0	12,0	12,0
1976	76	21	5	+ 16	1,6	0,48	6,4	18,4	20,40
1977	49	14,7	10	+ 4,7	0,47	0,14	1,88	20,28	26,28
1978	34,3	10,3	10	+ 0,3	0,02	0,12	0,12	20,40	30,40
1979	24,0	7,2	10	2,8	0,28	0,84	1,12	19,28	33,28
1980	16,8	5,0	10	5,0	0,5	1,5	2,0	17,28	35,28
1981	11,8	3,5	10	6,5	0,65	1,95	2,6	14,68	36,68
1982	8,3	—	—	—	—	—	—	—	
1982	100,0	91,7	—	91,7	9,17	27,51	36,68		

Fyritreytir:

Sáttmálavirði er kr. 100.000. Skipið verður í 1982 selt fyri upprunavirði, innskotspeningurin er 10% ella kr. 10.000.

Samlaða skattaprosentið er sett til 40% við 30% til landsskatt og 10% til kommunuskatt.

Skattaútseting brutto í síðsta rað er ájovn við 40% av samlaðu avskrivingunum, jmt. 2. rað, síðsta regla.

[1] Sáttmálavirðið.

SKJAL 2.

LÝSING AV HVUSSU BROYTINGARUPPSKOTIÐ ROYNIST
(1.000 kr.)

	Bókaða virði skipsins	Hægst loyvda avskriving	Rakstrarúrslit áðrenn avskriving	Rakstrarúrslit aftaná avskriving	Skattamissur kommununi (10%)	Skattamissur landinum (30%)	Skattamissur tilsamans (40%)	Skattaútseting í persónsinntoku	Skattaútseting brutto
1974	(100)[1]	10	—	+ 10	1,0	3,0	4,0	4,0	4,0
1975	(100)[1]	10	—	+ 10	1,0	3,0	4,0	8,0	8,0
1976	80	5	5	—	—	—	—	8,0	10,0
1977	75	10	10	—	—	—	—	8,0	14,0
1978	65	10	10	—	—	—	—	8,0	18,0
1979	55	10	10	—	—	—	—	8,0	22,0
1980	45	10	10	—			—	8,0	26,0
1981	35	10	10	—		—	—	8,0	30,0
1982	25	—	—	—	—	—	—	—	—
1982	100	75	—	75	7,5	22,5	30,0		

Fyritreytir:

Sáttmálavirði er kr. 100.000. Skipið verður selt í 1982 fyri upprunavirði. Innskotspeningurin er 10% ella kr. 10.000.

Samlaða skattaprosenti er sett til 40% við 30% til landsskatt og 10% til kommunuskatt.

Skattaútseting brutto í síðstu roð er ájovn við 40% av samlaðu avskrivingunum, jmt. 2. rað, síðstu reglu.

[1] Sáttmálavirðið.

SKJAL 3.

DØMI IÐ LÝSA HVUSSU BROYTINGARUPPSKOTIÐ ROYNIST

Dømi 1. Setur maður kr. 50.000 í inuskotspeningi og hetta er 10% av útveganarvirðinum kann hann forskotsavskriva í tvey ár 20% av kr. 500.000 ella **kr. 100.000.**

Avmarkingin á kr. 25.000 hvørt árið sær ger, at hann ikki kann frádraga meira enn kr. 50.000. Skattaútsetingin við einum skattaprosenti á 40% verður kr. 20.000 ella 40% av inuskotspeningínum.

Dømi 2. Maður hevur saldovirði við byrjan av árið á kr. 200.000. Skipið verður umbygt og parturin hjá hesum manni av umbyggingarvirðinum er **kr. 100.000.**

Hesin maður kann avskriva 30% av kr. 300.000, sum er nýggja saldovirði ella kr. 90.000. Rakstrarvinningurin sama árið er kr. 40.000. Í hesum førum kann hesin maður draga frá í aðrari inntøku 20% kr. kr. 100.000 ella kr. 20.000. Samlaða avskrivingin verður soslatt **kr. 60.000.**

Varð vøksturin av saldovirðinum í hesum føri kr. 200.000 gav hetta rætt til kr. 5.000 meira í frádrátti í aðrari inntøku.

Saldovirði 1/1	kr. 200.000
Vøkstur	kr. 200.000
Saldovirði 31/12	kr. 400.000
30% saldoavskriving	kr. 120.000

Av hesum kunnu kr. 40.000 nýtast til avskrivingar í rakstrarvinningi.

20% av virðisøkingini er kr. 40.000, men hægsta mark fyri frádrátti í persónintøku sambært § 16 B nr. 5 er kr. 25.000 hvørt árið sær. Samlaða avskrivingin verður soslatt í hesum dømi **kr. 65.000.**

Var rakstrarvinningurin kr. 95.000 bleiv samlaða avskrivingin kr. 120.000.

Dømi 3. Maður keypir part í skipi uppá 500.000 kr. og hevur fyrsta árið rakstrarhall uppá 20.000 kr. Hægst loyvdi frádráttur í persónsinntøkuni kann uppgerast soleiðis:

Hall	20.000 kr.
Avskriving 20% av 500.000 kr. = 100.000 kr., tó hægst	25.000 kr.
Samanlagt	45.000 kr.

Varð hetta hall ikki fyrsta árið, men eitt seinri ár, kundi bert hallið verið drigið frá.

1. viðgerð 13. august (sí nr. 9/1974 (ólavsøkutingsetan) og málið beint í skattanevndina, sum 2. september legði fram soljóðandi

Álit

Landsstýrið hevur lagt uppskotið fyri løglingið og við 1. viðgerð varð tað beint í skattanevndina.

Skattanevndin hevur viðgjørt málið og býtt seg í ein meirilutu og tveir minnilutar.

Meirilutin (Hilmar Bech, Poul Jacob Olsen og Agnar Nielsen) førir fram:

Í viðmerkingunum sigur landsstýrið, at 16. mars 1974 legði ein serlig nevnd, sum fyri landsstýrið hevur arbeitt við skattamálum, fram frágreiðing um ymisk skattamál.

Í hesi frágreiðing verða avskrivingar av skipum, ið eru skipað sum partreiðarlir viðgjordar og vist verður á teir fyrimunir og teir vansar, ið standast av avskrivingunum.

Í frágreiðingini verður serliga vist á hesar vansar:

1. Stórur partur av bruttoinntøkuni hjá persónum kemur ikki til skattingar.
2. Persónar, ið eftir vanligari mannahugsan eru meintir at bera eina ávísa skattabyrði, sleppa ov lættliga í skatti og hava orsakað av avskrivingunum atgongd til socialar veitingar.
3. Høgurnar verða ov slórar, ójavnar og illa undirbygdar.

I taldømum verður eisini vist á, at persónar, sum eru eigarar í skipum, hava størstu fyrimunirnar ley fyrstu árini, og serliga meðan skipið stendur í gerð, vegna reglurnar um forskotsavskriving, og av skjalinum sæst, at persónur, ið hevur ein innskotspening uppá t.d. 10.000,- kr. aftaná 3 ár kann fáa eina skattaútseting uppá 20.400,- kr., og tá skattaútsetingin er mest 36.680,- kr.

Herav sæst, at skattaútsetingin er munandi størri enn innskotið.

Í hesum sambandi skal tó verða gjørt vart við, at tá sagt verður, at teir sum eru partaeigarar í partreiðarínum sleppa undan at rinda skatt, so er hetta ikki rætt, tí í veruleikanum er tað ein skattaútseting.

Verður t.d. skipið selt, kemur viðkomandi at gjalda skatt av tí upphædd, hann hevur avskrivað í persónligu inntøkumi, uttan so at hann skjýtur nevndu upphædd inn í eitt nýtt skip o.s.fr. Skipanin er tann, at menn í øllum førum fyrr ella seinni skulu gjalda skatt av tí, ið avskrivað er.

Til tess at rætta uppá teir vansar, ið serliga skattanevndin hjá landsstýrinum hevur vist á í áliti sínum í spurninginum um partsreiðarír, hevur landsstýrið lagt hetta málið fyri tingið og sigur seg vi ðtí miða ímóti:

a t tryggja javnari íløgulag og regulera fløgurnar.
a t tryggja, at inntøkumissur landskassans verður munandi minni og sostatt tryggja eitt meira rættvíst skattabýti, samstundis sum missurin verður javnaður ár undan ári.
a t tryggja, at ein størri partur av háinntøkunum kemur til skattingar.
a t tryggja, at sambandið millum ábyrgd og avskrivingar verður meira rimuligt.
a t tryggja, at hóast tað, at íløgurnar verða reguleraðar, fáa menn við týsni og vilja at taka eina risiko fyrimunir, sum eru meira avvegaðir í mun til ábyrgdina.

Forskotsavskrivingin í privatari inntøku, sum higartil hevur verið upp til 45% yvir 3 ár, verður eftir uppskotinum avmarkað til 20% av avrádda byggikostnaðinum, tó ikki meira enn 10% í einum ári, og harnæst avmarkað til hægst 25.000 kr. árliga.

Onnur avskriving hjá persónligum skattgjaldara útyvir vanligan rakstrarvinning er avmarkað til 20% av vokstrinum í saldovirðinum í inntøkuárinum.

Meirilutin loyvir sær at vísa til, at tá verulig gongd kom á endurnýggingina av fiskiskipaflotanum seinast í 50-unum vegna lagaligar studnings- og lánimøguleikar vóru flestu reiðarlir partafeløg við fiskimonnum og øðrum sum partaeigarum, og hesir høvdu tá ougar skattligar fyrimunir, men flestu teirra mistu tað, teir settu í, tá skipini seinni komu í figgjartrupulleikar vegna fiskaloysi og vórðu seld.

Seinni vóru menn varugir við komandittfelagsformin, sum gav skattligar fyrimunir og varð hesin felagsformur tí nógv nýttur í sambandi við skipakeyp, inntil løgtingið broytti skattalógina soleiðis, at rakstrargøgn, ið vóru í gerð áðrenn 20. apríl 1972 ella skipabyggisáttmálar gjørdir áðrenn nevnda dag kundu verða rikin sum frammanundan, meðan onnur, ið vóru ognað eftir nevnda dag, har fingu partaeigararnir ikki teir skattligu fyrimunir sum fyrr.

Eftir hetta fóru menn í sambandi við skipakeyp at stovna partsreiðarfir, ið, sum vístá í viðmerkingunum frá landsstýrinum, geva skattaútsetingar í persónskattingini.

Men her skal tó vera nevnt, at í partsreiðariformintum heftir persónur fyri tann partin, hann eigur í skipinum. Setur hann t.d. 50.000 kr. í skip, og harvið ognar sær part, sum svarar til 500.000 kr., so hevur hann persónliga ábygrd fyri hesi upphædd og ábyrgd fyri lutvisan part av allari skuld og møguligum halli.

Meirilutin er tó í høvuðsheitinum samdur við teim sjónarmiðum, sum eru hildin fram í viðmerkingunum frá landsstýrinum um, at tað er rætt at seta í verk tiltøk, ið kunnu avmarka teir skattligu fyrimunir, sum persónligar inntøkur hava av at eiga part í skipi, tó soleiðis at henda avmarking ikki nervar fiskivinnu okkara í størri mun enn vinnan og samfelag okkara tola, og tí eru broytingar, sum landsstýrið skjýtur upp at gera, gjølla umhugsaðar.

Meirilutin heldur, at neyðugar og líka effektivar broytingar, sum avmarka skattafyrimunirnar, kunnu verða gjørdar við broytingum á tann hátt, sum niðanfyri verður sagt frá:

Forskotsavskrivingin verður sum higartil 45%, tó verður forskotsavskrivingin hjá persónligum skattgjaldara í mesta lagiájøvn við innskotnan eginpening útyvir vinning av skiparakstri. T.v.s. at ein í mesta lagi kann mótrokna tað í aðrari løn, sum er inngoldið.

Vanligar saldoavskrivingar kunnu í mesta lagi vera 15% av saldo útyvir skiparakstur. T.v.s. at ein hægst kann mótrokna 15% av saldo í aðrari inntøku, inne hevur framvegis møguleikar til at avskriva 30%, um skipið gevur so mikið av sær.

Í teimum førum, har avdráttir uppá upprunalig lán eru størri enn rakstrarvinningur frá skipum, skal partaeigarin sjálvur leggja út.

Meirilutin heldur eisini, at teir, sum eftir galdandi lóg, ið gevur rætt til forskotsavskriving uppá 15% í 3 ár, hava gjørt sáttmála um bygging av skipi áðrenn 2. september 1974, eiga at fáa eina yvirgangsskipan uppá 2 ár, og setur tí fram uppskot um hetta.

Við øðrum orðum mælir meirilutin til at avmarka forskotsavskrivingarnar meira enn skotið er upp av landsstýrinum, t.v.s. 20% verða 15% fyri persónligan skattgjaldara og ikki meira enn skotið er inn. Hinvegin

heldur meirilutin, at skal forskotsavskrivingin skerjast so mikið, er rímuligt at avskrivingin í rakstrartíðini er nakað lagaligari enn skotið upp av landsstýrimum.

Hetta er í tráð við tað, sum sagt er fyrr, at forskotsavskrivingin eigur ikki at vera ov rúm, meðan rakstraravskrivingin eigur at lætta um møguleikan hjá skipunum at konsolidera.

Í rakstrartíðini er annaðhvørt vinningur at avskriva ella tap at leggja út hjá einstaklingum, og virka avskrivingarnar tá ikki so likviditetsviðkandi sum í forskotsavskrivingartíðini.

Henda likviditetsvíðkan hevur annars í mongum føri borið við sær fyri samfelagið óynskta privatnýýtslu.

Í áliti sínum sigur serliga skattanevndin annars, at aðrar reglur áttu at verið umhugsaðar til skatting av partafelogum, so menn heldur valdu partafelagsformin. Hesum sjónarmiði fekur meirilutin undir í og vil tí mæla til, at nýggj regla verður gjørd fyri partafelagsskatting, sum kann eggja monnum til at seta pening í vinnulívið fyri harvið at skapa betri arbeiðs-, vinnu- og inntekamøguleikar fyri fiskimenn og arbeiðsmenn, heldur enn at seta pening á konto í sparikassa ella banka, og heldur enn at nýta hann.

Við tí uppskoti sum meirilutin her mælir til at samtykkja, verður vunnið á teimum vansum, sum vist er á í landsstýrisviðmerkingunum, og heldur meirilutin, at talan er um eitt avvegað uppskot, sum framvegis ger, at peningur verður skotin í fiskivinnuna, men sum tó ikki gevur la somu ovnýtslu sum áður. Á henda hátt skuldi verið byrgt fyri, at peningur bert verður skotin inn vegna skattligar fyrimunir.

Teir, sum reka fiskivinnuna ella hava áhuga fyri henni, fáa framvegis ávisan stuðul — t.v.s. lán yvir skattaskipanina í eini 2 - 3 ár — men koma so, tá skipið greiðir skyldur sínar, at gjalda fult av vinninginum, og verður hann lagdur omaná privatu inntøkuna.

Samanlagt skuldi javnvág komið í privatu viðurskifti teirra við tað almenna, meðan samstundis virksemið í samfelagnum er økt.

Meirilutin setur tí fylgjandi

Uppskot
til

løgtingslóg um broytingar í løgtingslóg um skattligar avskrivingar	**lagtingslov om ændring i lagtingslov om skattemæssige afskrivninger.**
§ 1.	§ 1.
Í løgtingslóg nr. 52 frá 29. december 1971 um skattligar av-	I lagtingslov nr. 52 af 29. december 1971 om skattemæssige af-

skrivingar v.m. við seinni broytingum verða gjordar hesar broytingar:

1) Í § 2, 4. stk. verður strikað: «skal gerast við heilum prosentum og»
2) Sum nýggj § 16 b verður sett:

«Avskriving hjá persónligum skattgjaldara av ognum, sum eru undir hesum kapitli, verða gjordar eftir reglunum í hesum og 1. kapitli við niðanfyri nevndu avmarkingum:

1) Árlig avskriving eftir § 2, jmt. § 12 kann í mesta lagi vera 15% av avskrivingarbæra saldovirði inum ítyvir vinningin av skiparakstri og teir í inntekuárinum til gjaldingar falnu avdráttir uppá upprunalig lán í skipum, sum skattgjaldarin er parthavari í, sum ikki rúmast innan fyri rakstrarvinning frá eganum skipum undir einum, tó í mesta lagi so nógv, at skattlig saldo er minst líka stór sum restskuldin uppá skipini.
2) Forskotsavskriving eftir § 13 kann í mesta lagi vera ájevn við innskotnan eginpening ítyvir vinning av skiparakstri.
3) Persónur, sum pr. 1. september 1974 hevur gjort sáttmála um bygging av skipi, kann hóast ásetinǵina í nr. 2 avskriva sambært § 13 fyri inntokuárini 1974 og 1975.

2. stk. Rakstrarvinningur av skipi er eftir rhesuri grein nettovinningur, aftaná at rakstrarútreiðslur, herundir allar lønir, eisini

skrivninger m.v. med senere ændringer foretages følgende ændringer:

1) I § 2, stk. 4 udgår ordene «skal foretages med hele procenter og»
2) Som ny § 16 b tilføjes:

«Personlig skatteyder kan foretage afskrivning af aktier, som henhører under dette kapitel, efter reglerne i dette kapitel og kapitel 1 med nednefor anførte begrænsninger:

1) Årlig afskrivning efter § 2, jfr. § 12 må ikke overstige 15% af den afskrivningsberettigede saldoværdi udover overskud ved drift af skibe samt de i indkomståret til betaling forfaldne afdrag på oprindelige lån i skibe, som skatteyderen er andelshaver i, som ikke dækkes af driftsoverskud sammenlagt fra egne skibe, dog højst så meget, at den skattemæssige saldo er mindst lige så stor som restgælden på skibene.
2) Forskudsafskrivning efter § 13 kan ikke overstige indskudt egenkapital udover overskud ved drift af skibe.
3) Personlig skatteborger, som pr. 1. september 1974 har underskrevet kontrakt om bygning af skibe, kan uanset bestemmelserne i nr. 2 afskrive efter reglerne i § 13 for indkomstårene 1974 og 1975.

Stk. 2. Driftsoverskud af skib efter nærværende paragraf er nettooverskud efter at alle driftsudgifter, herunder alle lønninger,

reiðaraløn og hýrur eftir galdandi sáttmálum, eru farnar av, men áðreenn avskrivingar eru gjørdar.

også rederløn og hyrer efter gældende overenskomster, er fratrukket, men forinden afskrivninger er foretaget.

Minnilutin (Jógvan Sundstein) førir fram:

Tað er ein sannroynd, at síðani lóg um rúmligari skattligar avskrivingar kom í gildi hevur figgjarliga framgongdin tikið dik á seg. Hetta er fyri ein stóran part hesum lógum fyri at takka. Rúmligar avskrivingar av arbeiðsamboðum geva størri íleggingarhug og betri figgjarmøguleikar og harvið fleiri arbeiðspláss bæði á sjógvi og landi. Hetta førir við sær størri arbeiðsinntøkur og størri eksportinntøkur.

Viðvíkjandi avskrivingunn av skipum hevur tó vist seg, at íleggingarhugurin hevur verið í størra lagi og kanska ikki altíð hevur verið nóg vøl umhugsaður. Tær skjótu avskrivingarnar hava fört við sær, at persónar, sum eftir vanligari hugsan eru meintir at bera eina ávísa skattabyrðu sleppa ov lættliga í skatti, í øllum førum fyri eina tíð. Samstundis hava tó íløgurnar frá hesum persónunn verið ein týðandi hjálp til útgevan av nýggjum skipum.

Tað er neyðugt at broyta avskrivingarlógina, men ansast má eftir, at tað eru tvey endamál, ið náast skulu við broytingini og tey eru:

1) ikki at steðga tí neyðugu og sunnu íløgu í nýtt skip

2) mest møguligt at avmarka tær órimuligu skattasparingarnar.

Uppskotið, sum var lagt fram av Landsstýrinum, uppfyllir ikki krøvini, ið frammanfyri eru sett, við tað at tað noktar avskrivingarrætt út um eitt vist mark hjá persónligum skattgjaldarum. Haraftarat var uppskotið merkt av at vera uppsett í skundi og vildi verið rættuliga fløkt at umsitið. Tað vildi tí undir ongum umstøðum verið klókt at viðtikið eina slíka lóg, og uppskotið er tí eisini slept av meirilutanum.

Ein so stór broyting í skattalógini, sum tann ið her er talan um, hoyrir náturligt heima í eini størri umskipan av allari okkara skattalóggávu, og átti at koniið saman við eini slíkari broyting av skattadagnum, men tað sær ikki út til, at Landsstýrið kemur við nøkrum slíkum uppskoti í bræði, og hendan broytan má tí fyribils koma at standa einsamøll.

Sambært tey áður nevndu endamálspunktini metir minnilutin tað eisini í framtíðini at hava stóran týðning, at fáa kapital frá øllum stættum í samfelagnum til skipabygging, men uttan at hetta skal vísa seg í órimuligum skattalætta hjá teim mest mentu. Minnilutin setir tí fram uppskot

sum framvegis gevur møgnleikar fyri avskrivingum, men avmarkar frádráttirnar týðandi.

Eins og meirilutin yvskir minnilutin at loyvdar avskrivingar fyrst verða fyritiknar í vinninginum frá skiparakstrinum, men eftir fólkaflokksins uppskoti eru møguligar restavskrivingar síðani avmarkaðar til í mesta lagi ein triðing av innløkuni áðrenn skattafrádrátt, meðan eftir meirilutans uppskoti avskrivingar verða loyvdar við upp til 15% av avskrivingargrundarlagnum. Hetta seinra kann framvegis koma at geva órímuligan skattalætta.

Loyvi at avskriva innanfyri triðingin av inntøkuni gildir eftir minnilutans uppskoti eisini forskotsavskriving. Hetta vil eftir fólkaflokksins uppfatan bøta um vandan fyri, at menn heldur fara at keypa brúkt skip enn byggja nýggj.

Tá ið eitt skattalágmark í minnilutans uppskoti er sett til tveir triðingar av inntøkuni uttan skattafrádrátt er mín uppfatan tann, at óneyðugt er við tí gamla lágmarkinum, sum er sett til prístalsgrundarlagið. Við at strika hetta verður eisini møguligt hjá teim lægru inntøkunum at seta pening í skip um annars umstøður eru til tess. Annars er fryktandi fyri, at prístalsgrundarlagið longu komandi ár kemur at nærka seg 30.000 kr. Við galdandi skattastiga verður tað lutfallsliga nógv hægri skattur til nominelt hægri inntøkur uttan tilsvarandi reallønarhækkingar. Fólkaflokkurin er fyri at lækka skattin fyri hesar inntøkur, tað vil siga, bruttoinntøkur upp til ca. 50.000 kr.

Minnilutin (Jógvan Sundstein) setir fram fylgjandi

Uppskot
til

Løgtingslóg um broytingar í løgtingslóg um skattligar avskrivingar

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 52 frá 29. december 1971 um skattligar avskrivingar v.m. við seinari broytingum verða gjørdar hesar broytingar.

Lagtingslov om ændringer i lagtingslov om skattemæssige afskrivninger.

§ 1.

I lagtingslov nr. 52 af 29. december 1971 om skattemæssige afskrivninger m.v. med senere ændringer foretages følgende ændringer.

1. I § 12, 1. stk. verður aftaná seinasta punktum sett: «Tó nýtist avskrivingin ikki at verða gjørd við heilum procenti.»
2. I § 16 verður sum nýtt 3. og 4. stk. sett:

3. stk. «Avskrivingarrætturin hjá persónligum skattgjaldara er tó avmarkaður til vinningin av skiparakstri í inntøkuárinum, og harafturat einum triðingi av aðrari inntøku við vanligum skattligum frádráttum, tó ikki skattafrádrátti.»

4. stk. Rakstrarvinningur av skipi sambært 3. stk. er nettovinningurin aftaná at rakstrarútreiðslurnar, herundir allar lønir, eisini reiðaraløn og hýrur eftir galdandi sáttmálum, eru farnar av, men áðrenn avskrivingar eru gjørdar.

§ 2.

I løgtingslóg nr. 50 frá 2. juli 1963 um landsskatt og kommuneskatt við seinri broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1. I § 8, d, verða strikað orðini: «Avskriving hjá persónum má tó ikki verða størri enn so, at skattskylduga inntøkan í minsta lagi er líka so stór sum livikostnaðurin eftir ti til eina og hvørja tíð galdandi prístalsgrundarlag. Líkningarvaldið kann tó í serligum førum gera undantak frá hesi reglu.»

§ 3.

Henda lóg fær gildi frá og við skattaárinum 1975/76.

1. I § 12, 1. stk. tilføjes efter sidste punktum: «Dog behøves afskrivningen ikke at foretages med hele procenter.»
2. I § 16 tilføjes som nyt stk. 3 og 4:

Stk. 3. «Afskrivningsretten hos personlige skatteydere er dog begrænset til overskuddet ved drift af skibe i indkomståret og desuden en trediedel af anden indtægt med almindelige skattemæssige fradrag, dog ikke skattefradrag.»

Stk. 4. Driftsoverskud af skib ifølge stk. 3 er nettooverskud efter at alle driftsudgifter, herunder lønninger, også rederløn og hyrer efter gældende overenskomster er fratrukket, men forinden afskrivning er foretaget.

§ 2.

I lagtingslov nr. 50 fra 2. juli 1963 om landsskat og kommuneskat med senere ændringer foretages følgende ændringer:

1. I § 8, d, udgår ordene: «Afskrivninger for personer må dog ikke være større end, at den skattepligtige indtægt mindst er lige så stor som levcomkostningerne efter det til enhver tid gældende pristalsgrundlag. Ligningsmyndighederne kan dog i særlige tilfælde dispensere fra denne bestemmelse.»

§ 3.

Denne lov træder i kraft fra og med skatteåret 1975/76.

Minnilutin (Finnbogi Isaksen) førir fram:

Tann núverandi skatta- og avskrivingarlógin skapar stóran mismun og stóra ónøgd í samfelagnum. Skattalógin er í dag ótíðarhóskandi sum heild, og hon er heldur ikki førd ájour við tær broyttu tíðirnar, síðani hon kom fyri meira enn 10 árum síðani. Hetta hevur ført við sær, at skattafrýstið á tær lágu inntøkurnar er tvífaldað eftir 10 árum, t.v.s. at ein arbeiðsmaður rindar í dag uml. tvær ferðir so stóran prosentpart av síni løn í skatti sum fyri 10 árum síðani.

Samstundis hava landsstýrið og ein stórur meiriluti av løgtinginum givið teimum stóru inntøkunum munandi skattalætta. Hetta kennir hvørt mansbarn til, og millum manna er stór misnøgd við, at tann og tey, sum ráðini hava, rinda lítlan og ongan skatt. Kanningar vísa eisini, at tann sokallaða progressiva skattaskipanin, har tey skulu rinda meira prosentvís í skatti, sum hava tær góðu inntøkurnar, virkar næstan ikki. Avskrivingar og aðrir frádráttir gera tað, at tær stóru inntøkurnar rinda umleið sama prosentvísa part av inntøkuni í skatti.

Uppskotið frá landsstýrinum, sum nú er viðgjørt í skattanevndini, má roknast sum lítil og ongin bati í tí skattliga órættvísinum, sum valdar í okkara samfelag í dag. Avskrivingarlógin verður framvegis galdandi, bert við nøkrum smærri avmarkingum, tey lágløntu koma framvegis at rinda ein órættvísa høgan skatt, og tey vælløntu hava framvegis møguleika at sleppa bíliga.

Semja er um, at tað kann vera torført hjá vinnulívinum at standa seg undir okkara núverandi samfelagsskipan, um tað almenna ikki spaðar til á einhvønn hátt. Men hjálpin kann veitast á so mangan hátt, hon kann hava eina meira ella minni gagnliga ávirkan, og hon kann vera meira ella minni órættvís ella rættvís.

Tjóðveldisflokkurin er av teirri áskoðan, at heldur enn at veita vinnulívinum hjálp gjøgnum órættvíst lága skatting av stórum inntøkum, eigur henda hjálp at verða veitt sum studningur og/ella sum lagalig lán bæði til íløgur og rakstur. Ein slík skipan hevði skapað størri rættvísi og vælnøgd í samfelagnum, umframt at hon hevði gjørt tað møguligt at beint íløgunum inn á eina leið, sum kønir menn til eina og hvørja tíð halda vera ta mest gagnligu.

Í seinastu tingsetu hevði tjóðveldisflokkurin uppskot um at áleggja landsstýrinum at koma við tilmælum um skatta-, studnings- og lánilógir samsvarandi teimum sjónarmiðum, sum eru førd fram omanfyri. Hetta uppskot fall. Harafturímóti eydnaðist tað flokkinum at fáa stóran meiriluta í tinginum fyri einum uppskoti, har álagt varð landsstýrinum at koma við uppskoti — longu í somu tingsetu — um at avtaka samskattingina av

hjúnum soleiðis, at inntøkurnar hjá hjúnum verða býttar í tvey, áðrenn tær verða skattlagdar. Frá landsstýrinum er onki uppskot komið enn.

Hóast hetta fer minnilutin her at seta fram uppskot til samtyktar um at áleggja landsstýrinum — longu í hesi tingsetuni — at koma við tilmælum um studnings- og lánilógir í staðin fyri avskrivingarlógina. Tað kann henda, at tað seinni í hesum árinum og í tingsetuni eftir nýggjár situr eitt landsstýri, sum fylgir tingsins samtyktum betur enn tað núverandi.

Minnilutin setur fram soljóðandi

Uppskot
til
samtyktar.

Løgtingið áleggur landsstýrinum at koma við uppskotum um hesi mál skjótast gjørligt og í hvussu so er í hesi tingsetuni:

1) Avtøka av avskrivingarlógini.
2) Studnings- og lániveitanir til vinnulívið, bæði til íløgur og rekstur. Hesar studnings- og lániveitanir skulu muna so mikið, at tær vega upp ímóti tí, sum avskrivingarlógirnar nú geva.
3) Rættvísari skattalóg, har láginntøkurnar verða munandi lagaligari skattaðar enn nú, og har samskattingin av hjúnum verður tikin av.

2. viðgerð 3. september.

Framlagt var broytingaruppskot frá Erlendi Paturssyni og fl.

Uppskot til løgtingslóg um avtøku av lógini um skattligar avskrivingar.

§ 1.
Løgtingslóg nr. 52 frá 29. december 1971 um skattligar avskrivingar v.m. við seinni broytingum fer úr gildi.

§ 2.
Henda lóg kemur beinanvegin í gildi.

Atkvøðugreiðslan fór soleiðis fram:

Uppskot til samtyktar frá minniluta í nevndini, Finnboga Isaksen, pkt. 1 fall við 6—0, pkt. 2 fall við 6—0, pkt. 3 samtykt 15—0.

Broylingaruppskotið frá Erlendi Paturssyni o.fl. gr. 1 fall við navnakalli, við at 4 atkvøddu ja og 22 atkvøddu ikki. Uppskotið sostatt burturfallið. Atkvøðan fór soleiðis fram:

Ja atkvøddu: Hanus við Høgadalsá, Erlendur Patursson, Jógvan Durhuus, Ove Michelsen = 4.

Atkvøddu ikki: Agnar Nielsen, Jógvan Sundstein, Martin Joensen, Hilmar Kass, Signar Hansen, S. Skaale, Herman Winther, K. Wang, H. Djurhuus, Tr. Samuelsen, Leon Joensen, A. Djurhuus, Jógvan Olsen, Johs. Olsen, Hilmar Bech, J. P. Thomasen, Tórálvur Olsen, P. J. Olsen, Kj. Mohr, H. Hansen, Finnbogi Isaksen, J. Fr. Øregaard. = 22.

Uppskotið frá minniluta í nevndini (Jógvan Durhuus) gr. 1 fall við 6—0. Uppskotið sostatt burturfallið.

Uppskotið frá meiriluta í nevndini (Hilmar Bech, Poul J. Olsen og Agnar Nielsen) gr. 1 — fyrsti partur til orðið «skiparakstur» samtykt 19—0. — gr. 1 frá orðunum «teir í inntøkuárinum» og restin av gr. 1 samtykt 14—0, gr. 2 samtykt 17—0 og soleiðis samtykt at fara til 3. viðgerð 17—0.

Uppskot frá minniluta (Jógvan Sundstein) gr. 1 fall við 6—0.

3. viðgerð 4. september. Frávik tíðarfrestini.

Framlagt var broytingaruppskot frá Hilmar Kass o.fl.:

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 50 frá 2. juli 1963 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum verður í § 8, stk. 1, c), aftaná orðið «klassingar» sett: «og høvuðssýn».

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinnan vegin.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om landsskat og kommuneskat.

§ 1.

I lagtingslov nr. 50 af 2. juli 1963 om landsskat og kommuneskat med senere ændringer tilføjes i § 8, stk. 1, c) efter ordet «klassifikation»: «og hovedsyn».

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

Broytingaruppskotið gr. 1 samtykt við 19. 0, gr. 2 samt. uttan atkvgr.

Lógaruppskotið so broytt endaliga samtykt við 19 0.

---

9. Broytingar í løgtingslóg um endnrnýgging fiskiskipaflotans

Ár 1974, mikudagin 7. august, legði Jákup Lindenskov, landsstýrismaður, fram

Uppskot
til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um endurnýgging av fiskiskipaflotanum.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 28 frá 30. mai 1970 um endurnýgging av fiskiskipaflotanum verða gjørdar hesar broytingar:

1. § 2 verður orðað soleiðis:
«Studningslán og/ella lán til bygging av deksfiskifari ella opnum útróðrabáti kann veitast við upp til 20% tilsamans av virði skipsins ella bátsins við maskinu og øðrum tilhoyri. Verður skip ella bátur bygdur aðrastaðni enn í Føroyum, er tað figgjarnevndin saman við landsstýrinum, sum taka avgerð

lagtingslov om ændring i lagtingslov om fornyelse af fiskerflåden.

§ 1.

I lagtingslov nr. 28 af 30. maj 1970 om fornyelse af fiskerflåden foretages følgende ændringer:

1. § 2 affattes således:
«Tilskudslån og/eller lån til bygning af dæksfiskefartøj eller åben fiskerbåd kan ydes med indtil 20% tilsammen af skibets eller bådens værdi med maskine og andet tilbehør. Såfremt skib eller båd bygges andetsteds end på Færøerne, er det finansudvalget sammen med landsstyret, der træffer afgørelse, om til-

um studningslán og/ella lán verður veitt.»

2. § 4, 1. stk. verður orðað soleiðis: «Studningslán og/ella lán verður tryggjað við pantirætti í fiskifarinum innanfyri 90% av virðinum. Studningslán er rentu- og avdráttarfrítt og verður avskrivað um grunnin í upp til 20 ár.»

3. § 6 verður orðað soleiðis: «Studningslán og/ella lán til nýggja maskinu, nýklassað frá verksmiðju, við í minsta lagi 1 árs garanti og aðrar tekniskar innleggingar í deksfiskifar ella opnan útróðrabát kann veitast við upp til 15 % av kostnaðinum, heruppií innleggingarkostnaðinum.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinan veg.

skudslån og/eller lån skal ydes.»

2. § 4, stk. 1 affattes således. «Tilskudslån og/eller lån sikres ved pant i fiskefartøjet indenfor 90% af værdien. Tilskudslån er rente- og afdragsfri og afskrives over fonden i indtil 20 år.»

3. § 6 affattes således: «Tilskudslån og/eller lån til ny maskine eller maskine, der er nyklasset fra fabrikken med mindst 1 års garanti, og andre tekniske installationer i et dæksfiskerfartøj eller åben fiskerbåd kan ydes med indtil 15% af omkostningerne, heri installationsomkostningerne.

§ 2.

Denne lov træder straks i kraft.

Viðmerkingar:

Í løgtingssetuni 1970 (vetrarting) jbr. løgtingsmál nr. 64, Løgtingstíðindi bls. 292, og í løgtingssetuni 1971, jbr. løgtingsmál nr. 9, Løgtingstíðindi A bls. 114 legði landsstýrið fyri løgtingið uppskot um at broyta lógina um endurnýgging fiskiskipaflotans soleiðis, at í staðin fyri at veita studningslán í sambund við, at fiskifør verða bygd ella tey fáa ymsar tekniskar innleggingar, skuldi verað møguligt eisini at veita vanlig lán, langfreistað og við lagaligari rentu, annaðhvørt saman við studningsláni ella einsamøll, men tó alt innanfyri hámarkið, lógin setur, í løtuni 20% av skipavirðinum, tó 25%, um bygt verður í Føroyum.

Grundgevingin fyri uppskotinum var, at rakstrartølini fyri tey nýggju skipini seinastu árini hava broytt seg tann vegin, at tað um raksturin skuldi verið gjørligt, at goldið aftur um ikki alt, so tó ein part av tí, sum higartil er latið sum studningslán.

Henda rakstrarmyndin er síðani tá, sum heild tikið, ikki broytt. Tað kann sigast, at á ymsum fiskileiðum er afturgongd í fiskanøgdini ella, at

fiskimøguleikarnir eru vorðnir tenari, men móti hesum vega hægri fiskaprisir.

Verður uppskotið samtykt, er ætlanin, at teir skipaeigarar, sum hava beinleiðis persónligar skattligar fyrimunir av skiparakstri, ikki skulu fáa studningslán, men heldur lagalig lán, t.d. at gjalda aftur yvir 20 ár, harav tey fyrstu 2 –3 árini eru avdráttar- og rentufrí, og rentan annars lægri enn rentan á vlánum frá realkredittstovnunum, í løtuni 6½ % p.a. í øðrum máli í hesi tingsetu, løgtingsmál nr. 8, skjýtur landsstýri ðupp at skerja tær skattligu avskrivingarreglurnar hjá hesum skipaeigarum, men hóast uppskotið verður samtykt, eru beinleiðis skattligir fyrimunir eftir.

Er talan um partafeløg ella, sum skattareglurnar eru í løtuni, eisini samløgufeløg, er ætlanin at veita helvtina í studningsláni og hina helvtina í lagaligum láni, serliga tá bygt verður í Føroyum.

Av tí, at tekniskar innleggingar kunnu vera peningakrevjandi, í summum førum meira peningakrevjandi enn nýbygningar, heldur landsstýrið tað vera beint, eisini í hesum førum at kunna veita lán partvís ella í staðin fyri studningslán.

Roknast má við, at fyrisitingin av eini lániskipan setur størri krøv til fyrisitingina í innkrevjing av avdrátti og rentu, bæði á landsskrivstovuni og á gjaldstovuni. Ein nýskipan hevur tí meirkostnað við sær vaksandi við talinum av útlánum.

1. viðgerð 13. august og var viðgjørt saman við løgtingsmáli nr. 8/1974 (ólavsøkutingsetan): Broytingar í lógini um skattligar avskrivingar, og varð heint í skattanevndina saman við nevnda máli. Sí hetta mál.

10. Kommunulæknaskipanin o.ø.m. í Føroyum

Ár 1974, hósdagin 8. august, legði Jákup Lindenskov, landsstýrismaður, fram fylgjandi:

Føroya løgting.

Løgtingsmál nr. 10/1974: Álitið: Kommunulæknaskipanin o.ø.m. í Føroyum.

Í løgtingssetuni 1973, sbr. løgtingsmál nr. 66/1973, legði landsstýrið fram uppskot til samtyktar viðvíkjandi álitinum: Kommunulæknaskipanin o.ø.m. í Føroyum. Løgtingið samtykti at goyma málið til komandi tingsetu.

Landsstýrið loyvir sær við hesum at endurnýggja framløguna.

Sí Løgtingstíðindi 1973 Bind B. Skjal 12 og 12 B.

F.L. j. nr. 913-7-15. — Sí eisini løgtingsmál nr. 66/1973 og løgtingsmál nr. 10. 1974 (vetrartingsetan).

11. Felagsmarknaðarmálið

Ár 1974, hósdagin 8. augusti legði Atli Dam, løgmaður, fram

Uppskot
til

løgtingslóg um lækking av innflutningsgjøldum orsakað av skipan fyri samhandilin millum Føroyar og Felagsmarknaðin.

§ 1.

Fyri ávisar vørur innfluttar eftir 1. september 1974 frá og við uppruna í límalondunum í Europeiska Felagsmarknaðinum verða innflutningsgjøldini, sum vóru galdandi 1. januar 1972, lækkaði soleiðis:

1.9. 1974	10%
1.1. 1975	20%
1.1. 1976	10%

§ 2.

Vørurnar, sum koma undir skipanina, eru eftir Bruxelles-nomenklaturinum:

Kap. 7. Grønmeti
Kap. 8. Frukt til matna; skal av melon og citrusfrukt.

Kap. 20. Vørur av grønmeti, frukt ella øðrum plantum og plantulutum.

§ 3.

Landsstýrinum er heimilað við kunngerð at fyriseta gjølligari reglur til at fremja lógina.

lagtingslov om nedsættelse af indførselsafgifter i anledning af ordningen af samhandelen mellem Færøerne og Fællesmarkedet.

§ 1.

For visse varer, der efter 1. september 1974 indføres fra, og som har sin oprindelse i medlemslandene i Det Europæiske Fællesmarked, nedsættes indførselsafgifterne, som disse var pr. 1. januar 1972, således:

1.9. 1974	10%
1.1. 1975	20%
1.1. 1976	10%

§ 2.

De varer, der kommer under ordningen, er i henhold til Bruxelles-nomenklaturen følgende:

Kap. 7. Grøntsager
Kap. 8. Spiselige frugter; skaller af melon og citrusfrugter.

Kap. 20. Varer af grøntsager, frugter eller andre planter og plantedele.

§ 3.

Landsstyret bemyndiges til med bekendtgørelse at foreskrive de nærmere regler til gennemførelse af loven.

F.L. j. nr. 1198-2/1974. — Sí eisini Ll. nr. 64/1974.

§ 4.

Henda lóg kemur í gildi 1. september 1974.

§ 4.

Denne lov træder i kraft 1. september 1974.

Viðmerkingar:

1. Løgtingið samtykti einmæli 25. januar 1974, jbr. løgtingsmál nr. 44, at áleggja landsstýrinum at taka upp samráðingar við ríkismyndugleikarnar og EF um viðskifti Føroya við EF og at leggja úrslitið fyri tingið.

Hesar samráðingar eru nú loknar.

Fingin er í lag ein skipan fyri samhandilin millum Føroyar og EF. Hon ber í sær, at EF gevur innflutningi úr Føroyum munandi tollsøndir, og at Føroyar afturímóti skulu minka innflutningsgjaldið fyri ávísar vørur, sum innfluttar verða frá EF. Lógaruppskotið snýr seg um lækkingarnar av innflutningsgjøldunum.

2. Samtykt av uppskotinum, so at tað kann gerast lóg frá 1. september 1974, er tí ein treyt fyri, at tær av EF samtyktu tollsøndir fyri føroyskar vørur koma í gildi frá 1. september 1974.

3. Tær søndir, sum Føroyar eftir lógaruppskotinum skulu sýna innflutningi frá EF-londunum, eru, at innflutningsgjaldið — í summum førum innflutningsgjøldini — skal minkast til frá 1. januar 1976 at vera 60% av galdandi gjøldum, sum eru óbroytt síðan 1. januar 1972.

Tann stigvísa lækkingin fer fram soleiðis, at av teimum í løtunt galdandi gjøldunum skulu uppkrevjast

frá 1. september 1974	90%
frá 1. januar 1975	70%
frá 1. januar 1976	60%

4. Vørurnar, sum koma undir lækkaðu gjøldini, eru grønmeti, ymsar urtir, frukt í feskum, køldum, frystum ella niðursodnum liki umfram vørur av frukt og grønmeti.

Fyri tær flestu av hesum vørunum verður uppkravt serliga innflutningsgjaldið uppá 13%, men summum av vørunum er eisini álagt serligt innflutningsgjald uppá 25%.

Mett eftir innflutningstølunum í 1972, sum eru tey seinast kunngjordu, vil lækkingin av innflutningsgjøldunum føra við sær ein árligan inntøkumiss fyri landskassan uppá 7 - 800.000 kr., tá ið gjøldini eru sett niður við 40%'um.

5. Tollsøndirnar, sum EF hevur samtykt at veita innflutningi úr Før-

oyum, fevnir viðvíkjandi vøruúrvali og lutfalsligari tolllækking munandi meira enn tær sømdir, sum frá føroyskari síðu skulu veitast. Endaliga orðalagið í teimum skjølum, sum eru partur EF's í handilsskipanini ,er nú framkomið, og er fyriskipan EF's hjáløgd.

Eftir nevndu løgtingssamtykt frá 25. januar 1974 varð spurningurin um eina handilsskipan fyri Føroyar eftir framløgu av Danmark til viðgerðar í EF-ráðnum. Ráðið gjørdi 4. februar 1974 eina samtykt um karmin fyri slíkari handilsskipan. Í samtyktini segði EF-kommissióniu seg vilja seta fram uppskot um skipanina í síðsta lagi 1. apríl 1974.

Hesa freist var EF-kommissiónin ikki før fyri at halda.

Landsstýrið hevur luttikið í tingingum við EF-kommissiónina um leir spurningar, sum tóku seg upp í samband við fyrireikingarnar til handilsskipanina. Harnæst hevur landsstýrið gjøgnum ríkisstýrið lagt trýst á fyri at skunda undir eina loysn av viðskiftunum við EF.

EF-kommissiónin legði loksins uppskot sítt fram á EF-ráðsfundi 22. - 23. juli 1974. Semja fekkst ikki í lag tá, men eydnaðist hetta 25. juli 1974. Hendan semjan er síðani váttað av myndugleikunum í limalondunum.

6. Sømdirnar, sum EF hevur samtykt at veita innflutningi úr Føroyum, eru í høvuðsfættum:

A. Fyri vørurnar undir skipanini og innfluttar úr Føroyum til upprunaligu EF-limalondini (Týskaland, Frakland, Italia, Belgia, Háland og Luxembourg) og Írland skal galdandi tollur lækkast við

40%	.....	1. september 1974
20%	.....	1. januar 1975
20%	.....	1. januar 1976.

Eingin nýggjur tollur skal krevjast av innflutningi til Bretlands.

B. Verandi dansku reglurnar um tollfrælsi fyri innflutning av føroyskum vørum halda fram, so leingi skipanin er galdandi.

C. Vørurnar, sum koma undir tollsømdirnar til onnur EF-limalond enn Danmark, eru í stuttum:

(a) allar ídnaðarvørur og
(b) hesar fiskavørur:
konsolidering av 0% tolli fyri saltaðan tosk og saltað toskafløk

fryst fløk	verandi	tollur	15%
frystar reyður við skel	—	—	12%
súrgarð sildafløk	—	—	20%
panerað saldafløk	—	—	15%
viðgjørdar fiskavørur (prepared food)	—	—	15%
hemari, kalvi og svartkalvi	—	—	8%
niðursodnar reyður og skeldýr	—	—	20%
fiskamjøl	—	—	2%

7. Ikki allar, men tær flestu av umbidnu tollsøndunum fyri fisk og fiskavørur vunnu frama. Tollsøndir eru fingnar fyri allar ídnaðarvørur, hóast bert eitt fátal av teimum í løtuni verður framleitt í Føroyum.

Undir samráðingunum um handilsskipanina hevur landsstýrið lagt dent á at vinna tollsøndir ikki einans fyri vørur, sum í løtuni verða framleiddar í Føroyum, men eisini fyri vørur, sum høgi tollurin í EF hevur tarnað framleiðslu og útflutningi av. Her er serliga hugsað um súrgað sildafløk og nógv viðgjørdar fiskavørur, sum eru næstan lidnar at seta á borðið.

8. Hóast Bretland ikki skal kunna krevja nýggjan toll av innflutningi úr Føroyum, ber skipanin í sær, at allar føroyskar fiskavørur undir skipanini frá 1. september 1974 kunnu innflytast tollfritt í Bretlandi. Av hesi orsøk verður frá nevnda degi umfram varðveiting av tollfrælsi fyri fryst fløk útflutningurin til Bretlands av m.a. frystum reyðum tollfríur. Bretland er høvuðsmarknaðurin fyri føroyskt veiddar reyður, og er tollurin í løtuni 10,8%.

9. Sum greitt frá koma eftir 1. januar 1976 at standa eftir 20% av galdandi EF-tolli fyri innflutning úr Føroyum. Tað vil sigu, at til dømis bar sum EF-tollurin er 15% ella 20%, kemur tá at vera eftir tollur uppá ávikavist 3% ella 4%.

Stigvísa tollavtøkan millum upprunaligu EF-limalondini og nýggju limalondini eins og millum upprunaligu limalondini og tey einstøku EFTA-londini er liðug 1. juli 1977.

Landsstýrisins sjónarmið, sum rikisstjórnin er samd í, er, at EF sambært ráðssamtyktina frá 4. februar 1974 hevur bundið seg til eisini at taka burtur seinastu 20%'ini av tollinum av innflutningi úr Føroyum. Hetta er frá danskari síðu fört fram í EF-ráðnum, sum hevur sagt seg at vilja umhugsa av nýggjum út frá úrslitinum av ST-havrættarstevnuni teir «fak-

torar», sum eru avgerandi fyri búskaparliga og sociala útviklingin í Føroyum. Ein av hesum «faktorum» vil sjálvsagt vera avtøka av seinastu **20%-tolllækkingarstiginum.**

10. Mett frá einum heildarsjónarmiði er frá føroyskari síðu orsøk til at vera nøgdur við skipanina fyri samhandilin millum Føroyar og EF. Uttan nakra samhandilsskipan vildi støðan verið, at okkara útflutningi til Danmarkar var tryggjað tollfrælsi til árslok 1975 og somuleiðis útflutninginum av frystum fløkum til Bretlands.

Fyrimunirnir við sikpanini við EF eru eyðsýndir. Teir eru í høvuðstættum:

(a) 80% tolllætti fyri flestu fiskavørur — minni og meira viðgjørdar — umframt fyri allar ídnaðarvørur til EF.
(b) varðveiting av tollfríum útflutningi til Danmarkar fyri allar føroyskt framleiddar vørur av føroyskum uppruna.
(c) tollfrælsi í Bretlandi fyri allar fiskavørur undir skipanini.
(d) onga skyldu til skerjing av framleiðslutreytunum fyri føroyska ídnaðin. Hetta saman við tolllættanum í EF kann fáa avgerandi týdning fyri uppbygging av øðrum ídnaði enn fiskaídnaði í Føroyum.

Okkara byrða við skipanini er áðurnevndi inntøkumissur fyri landskassan vegna lækkingar av ávísum innflutningsgjøldum.

11. At gera upp í krónum og oyrum búskaparliga týdningin av skipanini ber sjálvsagt ikki til. Týdningurin er ikki bert, at ávísar vørur nærum sleppa heilt undan tolli, ella at tollfrælsið verður konsoliderað, har tollurin í løtuni er fyribils avtikin. Týdningurin er eftir landsstýrisins metan í fult so stórt mát, at tolllætti er fingin fyri nú høgttollaðar vørur sum súrgað sildafløk og meira viðgjørdar fiskavørur, tí hetta vil stimbra og skunda undir føroyska framleiðslu av slíkum vørum.

Landsstýrið mælir, vísandi til tað, ið greitt er frá frammanfyri, til at samtykkja lógaruppskotið.

Sí eisini skjal 6 a

1. viðgerð 14. august, og málið við atkvøðugreiðslu beint til 2. viðgerð uttan nevndarviðgerð.

Dagsett 14. august framlagt

Rætting
til
Felagsmarknaðarmálið.

Sí skjal 6 b.

2. viðgerð 16. august (uttan um dagsskránna).

Gr. 1, 2 og 3 vóru samtyktar við 23 0 atkvøðum.
Gr. 4 varð samtykt uttan atkvøðugreiðslu.
Samtykt at beina málið í marknaðarnevndina, sum 21. august legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fyri tingið av landsstýrinum. Við 1. viðgerð varð tað beint til 2. viðgerð uttan nevndarviðgerð. Við 2. viðgerð varð málið beint í marknaðarnevndina, sum hevur viðgjørt tað.
Ein samd nevnd mælir til at samtykkja uppskotið óbroytt.
Erlendur Paturssson skilar til:

Tá ið EEC-málið var til viðgerðar í tinginum í vár, legði tjóðveldisflokkurin fram soljóðandi uppskot til samtyktar:

Løgtingið samtykkir, at tiknar verða upp samráðingar við danska ríkisstjórnina um, hvussu fylgjandi málsøki heilt verða løgd undir føroyskt lóggávu- og umsitingarvald:

1. Utanríkismál, har í millum fiskimarksmál og havbotnurin.
2. Búskaparmál, har í millum undirgrundin, allir lánigrunnar, gjaldoyris-, peninga- og bankamál.
3. Sosial mál.
4. Skúlamál.

Í greinargerðini, sum fylgdi uppskotinum, var nevnt, at øll hesi málsøki eru annað hvørt rein donsk ríkismál ella sokallað felagsmál. Men aftan á at Danmørk er vorðin limur í EEC-samgongunni, er avgerðarrætturin í summum av hesum málum longu fyri ein part lagdur undir myndugleikar EEC's, meðan miðað verður móti EEC-avgerðarvaldi í øðrum.
Hesin veruleiki samrímist ikki við einmæltu samtykt løgtings fyri í

somu tingsetu, sum var tann heilt at halda Føroyar uttan fyri EEC-samgonguna og bert at miða móti handilssáttmála við henda felagsskap. Hildið var, at skuldi henda samtykt hava fulla meining, noyddust vit at fáa í okkara hendur hesi nevndu málsøki, t.e. tey málsøki, sum við limaskapi Danmarkar annað hvørt longu fyri ein part vóru løgd undir vald EEC's ella komu at verða løgd har undir.

Tá málið var til viðgerðar í marknaðarnevndini settu Jákup Fr. Øregaard, Poul J. Olsen og Andreas Djurhuus einki uppskot fram, men høvdu annars ongar viðmerkingar til uppskotið. Heldur ikki Hákun Djurhuus og Hilmar Kass settu nakað uppskot fram, men søgdu, at «Vit hava einki við EEC at gera», tá ið samráðingarnar um handilssáttmála eru undantiknar. Heldur ikki Kjartan Mohr setti nakað uppskot fram.

Úrslitið var so tað, at uppskot tjóðveldisflokksins fekk bert atkvøður tjóðveldistingmanna og fall tí.

Erlendur Patursson metir at teir tingmenn, ið ikki vildu geva áskoðanum tjóðveldisflokksins gætur tá, mugu hava fingið slík próvskjøl á borðið, at teir taka støðu sína tá til umhugsannar av nýggjum.

Her skulu verða nevnd tvey skjøl. Annað er «Instruktion for den danske delegation til FNs 3. havretskonference i Caracas 20. - 29. august 1974». Hitt er fyriskipan EEC-ráðsins frá 1. august 1974 «om en toldordning for visse varer med oprindelse i og indført fra Færøerne». Bæði hesi skjøl prógva, at vit við nei-samtykt tingsins í vár als ikki eru vorðnir leysir av EEC-samgonguni, men at vit tvørtur í móti eru knýttir upp í hesa samgongu og politikk hennara.

Í fyrrnevndu «Instruks» verður sagt orðrætt um danskan fiskimarkspolitikk í Caracas-ráðstevnuni:

> «Ligeledes har der under det forberedende arbejde været gennemført et koordineringsarbejde de ni EF-lande imellem, og delegationen bør med henblik på eventuel fremlæggelse af fælles EF-standpunkter fortsætte dette samarbejde under konferencen i Caracas.»

Her verður tá við greiðum orðum sagt, at danskur fiskimarkspolitikkur — og har við eisini føroyskur fiskimarkspolitikkur — skal samskipast við fiskimarkspolitikk EEC-samgongunnar. Tað er tí ikki rætt, tá fyrrnevndu tveir limir í marknaðarnevndini siga, at «vit hava einki við EEC at gera», tá ið handilssamráðingarnar eru loknar. Í hvussu er prógvar hetta skjal, at **EEC hevur atmikið við okkum at gera.**

Í innganginum til fyrrnevndu fyriskipan verður tikið til:

> «.... erklærede rådet sig interesseret i at fællesskabet bidrager sit til udviklingen på Færøerne, og at det derfor er rede til på baggrund

af resultaterne af søretskonferencen, at tage de afgørende faktorer for den økonomiske og sociale udvikling i dette område af kongeriget Danmark op til fornyet overvejelse».

Tað er av hesum skjali púra greitt, at EEC-samgongan alsamt heldur seg hava nógv við Føroyar at gera — eisiniaftan á nei-samtykt løgtingsins. Ráðið sigur her bart fram, at tað hevur áhuga fyri at felagsskapurin ger sítt til at fremja framburðin í Føroyum, og at tað tí, við úrslitunum av Caracas-ráðstevnuni í huga, av nýggjum vil taka til umhugsunnar tað, ið hevur avgerandi týdning fyri búskaparligu og sosiala framburðinum í «dette område af kongeriget Danmark».

Samantikið er at siga, at longu á Caracas-ráðstevnuni hevur EEC tikið sær fyri at «fremja framburðin í Føroyum», og her verður so boðað frá framhaldinum, at reka búskaparligan og sosialan EEC-politikk í hesum «område af kongeriget Danmark». Danmørk er fullgildugur limur í EEC og Føroyar verða bert roknaðar sum «område» í hesum limalandi. Ella v.ø.o.: **EEC hevur longu kannað sær okkum.**

Eisini hefta skjal prógvar, at teir, sum í vár — aftan á nei-samtykt løgtingsins — mettu, at vit nú høvdu einki við EEC at gera, hava mistikið seg. Ella sum áður sagt — í hvussu er EEC hevur alnikið við okkum at gera.

Erlendur Patursson tekur til fullnaðar undir við uppskoti landsstýrisins um tollalætta fyri nærri tilskilaðar EEC-vørur — leið, ið tjóðveldisflokkurin frá fyrsta degi hevur mælt til at ganga. Men samtíðis mælir minnilutin — við tilvísan til tað, ið her hevur verið fört fram — tinginum til at samtykkja hetta

Uppskot

Løgtingið ger kunnugt, at tað ynskir ikki nakra sum helst uppílegging frá EEC-samgonguni í føroysk viðurskifti, hvørt heldur tað snýr seg um fiskimarksmál, búskaparmál, sosialmál ella onnur, og ger vart við, at áhugamál Føroya best verða umsitin og varðveitt av føroyingum sjálvum.

A sama fundi var samtykt við 22—0 at frávíkja tíðarfrestini at viðgera málið.

3. viðgerð sama dag (21. august).

Lógaruppskotið, sum samtykt við 2. viðgerð nú endaliga samtykt 26 – 0.
Uppskot til samtyktar frá minnihlutanum (E. Patursson) fall 6 – 0, og sostatt burturfallið.

---

12. Hækking av sosialum pensjónum v.m.

Ár 1974, fríggjadagin 9. august, legði Jákup Lindenskov, landsstýrismaður, fram

Uppskot
til
samtyktar

Løgtingið tekur undir við landsstýrinum í, at sosialu veitingarnar 1. januar 1975 ella 1. apríl 1975 verða hækkaðar, so tær betri samsvara við tær broytingar, framdar eru ella í næstum verða framdar í Danmark.

Viðmerkingar:

Landsstýrið hevur samráðst við ríkisstýrið um at fremja líknandi ajourføring av sosialu veitingunum, sum tær,ið framdar vóru frá 1. oktober 1972. T.v.s., at hækkingar, út um tað sum prísjavningin gevur, kunnu gerast, soleiðis at eisini teim stæltum, sum fáa sosialar veitingar, verður veittur reallønarbøti svarandi til broytingarnar í samfelagnum annars.

Grundupphæddin fyri ein einligan pensjónist er í løtuni í Føroyum 927 kr. um mánaðan, meðan lon í Danmark er 1.038 kr. ella umleið 12% meiri.

Ein hækking av grundupphæddini til somu upphædd sum í Danmark og ein hækking í samu lutfalli av lutum pensjónunum kann ætlast at fora við sær útreiðslur uppá umleið 7.2 milj. kr., harav staturin ber 3,5 milj. kr. og landskassin og kommunurnar ávikavist 3,1 milj. kr. og 0,6 milj. kr. ella tilsamans 3,7 milj. kr.

F.L. j. nr. 1010-5

Nevndu útreiðslur uppá umleið 7,2 milj. kr. verða ætlandi býttar soleiðis:

	Útreiðslur tilsamans	Staturin	Føroyar
Fólkapensjón	4.500.000	2.250.000	2.250.000
Avlamispensjón	2.000.000	1.000.000	1.000.000
Einkjupensjón	200.000	100.000	100.000
Viðkað hjálp	80.000	40.000	40.000
Vanlig uppihaldshjálp	160.000	40.000	120.000
Einkjuhjálp	280.000	70.000	210.000
	7.220.000	3.500.000	3.720.000

Tá landsstýrið setur uppskotið fram sum uppskot til samtyktar, er tað fyri at høvi skal gevast til at fyrireika neyðug lógaruppskot til fólkatingsetuna, sum byrjar 1. oktober í ár. Ætlanin er tó ikki, at Fólkatingið skal avgreiða hesi endaliga fyrr enn løgtingið hevur havt høvi til at viðgera og avgreiða tey.

Í sambond við at ymsar sosialir lógir koma til viðgerðar í tingsetuni, sum byrjar aftaná løgtingsvalið, kann landsstýrið annars siga frá, at uppskot viðvikjandi nýggjari lóg fyri skipan av umsorgan fyri tey andaliga ófullføru eisini verður framlagt.

Landsstýrið biður við hesum uppskoti til samtyktar fingið um heimild til at fyrireika nevndu hækkingar í sosialu veitingunum.

Í føstu nevndini sosialmálum viðvikjandi er sonja um, at hækkingar eru rímiligar; skal hædd takast fyri hesum á danska fíggjarlógini, er neyðugt at málið í høvuðsheitinum verður samtykt nú.

1. viðgerð 14. august og málið beint til 2. viðgerð uttan nevndarviðgerð.

2. viðgerð 16. august.

Uppskotið samtykt við 20- -0 og sostatt avgreitt.

13. Bann móti skjóting av grindahvali á landleiðini

Ár 1974, fríggjadagin 9. august, legði Ove Mikkelsen, løgtingsmaður, fram

Uppskot
til

løgtingslóg um bann móti skjóting av grindahvali á landleiðini.

§ 1.
Tað er ikki loyvt at skjóta grindahval á landleiðini nærri enn 70 fjórðingar úr landi.

§ 2.
Einasta undantak frá hesi lógini, tá einstakir hvalir aftaná grindadráp ikki kunnu avlívast á annan hátt.

§ 3.
Landsstýrið ger tjóðtun, sum reku veiði eftir grindahvali undir Føroyum kunnugt við hesa lógarsamtykt.

§ 4.
Henda lóg fær gildi beinan vegin.

Viðmerkingar:

Skjóting av grindahvali undir Føroyum sum veiðiháttur hevur verið ríkin, bæði av útlendingum og føroyingum í fleiri ár.

Tað hevur vist seg, serstakliga hesi seinastu árini, at grindir, sum koma til rakstur, eru óvanliga styggar. Talið á hvalum í bólkum tykist eisini at lækka ár um ár, og hetta hóast fiskiskip ofta boða frá stórum grindum langt úr landi. Orsøkirnar til, at grindirnar eru í so smáum bólkum og so styggar, tá tær koma undir land, kunnu sjálvandi verða ymiskar, men vist er, at er skotið í ein grindaflokk, spjaðist hann, rýmir langar leiðir og verður so styggur, at bátur næstan ikki kann koma í nánd.

Tvøst og spik var týðandi táttur í føroyska húsarhaldinum, og eru líka kærkomin enn, um slíkt fæst. Ja, ikki minst í hesum tíðum við ókendum høgum prísum á øllum matvørum.

Er ein orsøkin til at færri og smærri grindir koma undir land tann, at hon fær ikki frið fyri hvalastingarnum, so eigur hesin veiðiháttur at verða hannaður á okkara leiðum.

Tað má haldast skeivt, at fjøldin av fólkinum ikki fær ágóðan av grind, sum kundi lagt heinini, vegna tess at einstaklingar fáa loyvi at jagstra hana ov nær landi.

Tí verður hetta uppskot lagt fram.

---

14. Grannskoðan av almennum roknskapum

Ár 1974, týsdagin 13. august, varð framlagt

Uppskot
til
samtyktar

Løgtingið samtykkir at góðkenna niðanfyri standandi roknskapir saman við viðfylgjandi viðmerkingum frá løgtingsgrannskoðarunum:

1. Landskassin 1972/73.
2. Føroya Jarðargrunnur 1972/73.
3. Útvarp Føroya 1972/73.
4. Telefonverk Føroya Løgtings 1972/73.
5. Lønjavningargrunnur Skipsfiskimanna 1972/73.
6. Tjaldurs Apotek 1972/73.
7. Landssjúkrahúsið 1972/73.
8. Suðuroyar SSjúkrahús 1972/73.
9. Klaksvíkar Sjúkrahús 1972/73.

10. Húsalánsgrunnurin 1973/74.
11. Strandfaraskip landsins 1972/73.
12. Føroya yvirforuyndari 1972/73.
13. P/f Suðurfisk, roknskapur 1/4 - 1971 til 31/10 - 1973.
14. M/s Leivur Øssursson 1972/73.
15. M/s Jens Chr. Svabo 1972/73.
16. M/s Drangur, vaktarskip, 1972/73.

Viðmerkingar frá løgtingsgrannskoðarunum:

Vit hava gjøgnumgingið omanfyristandandi roknskapir við tilhoyrandi frágreiðingum frá roknskapargrannskoðarunum. Hetta er gjørt og verður nú lagt fyri tingið sambæt løgtingslóg nr. 16 frá 26. apríl 1965 við niðanfyristandandi viðmerkingum:

1. **Landskassans roknskapur:**

   a) Vit vilja gera vart við, at undir gr. 13, samferðslumál, er ein meirnýtsla uppá umleið 11 mill. kr., og er hetta á leið tað sama, sum nýtt var av nógv fyri árið 1971/72. Vit kravdu tá, at tað varð gjørd ein eykafiggjarlóg. Figgjarnevndin fók undir við okkum í hesum, og løgtingið samtykti, at so skuldi verða í framtíðini. Í hesum máli er einki hent enn, og verður hetta sostatt átalað av okkum.

   b) Vístur verður til síðu 3 í revisiónsfrágreiðingini. Løgtingsgrannskoðararnir taka undir við hesum og halda hetta vera sera løgið.

   c) Vístur verður til síðu 5 stk. 3.
   Hesum taka løgtingsgrannskoðararnir eisini fult undir við. Henda viðmerking frá roknskapargrannskoðarunum hevur nú verið tikin upp aftur í fleiri ár í frágreiðingini uttan at nakað er hent, og meina vit tí, at hetta tiltak eigur at verða framt nú.

2. **Føroya Jargargrunnur:**
   Ongar viðmerkingar.

3. **Útvarp Føroya:**
   Ongar viðmerkingar.

4. **Telefonverk Føroya Løgtings:**
   Vørukreditorar v.m. eru bókaðir við kr. 15.028.635,33. Tann størsti av hesum er L. M. Ericson við 8,76 mill. kr. Tá ið vit hava varhugan av at hetta talið ikki er beint, krevja vit at fáa at vita, hvussu stór

skuldin er 1/4 - 1974, og hvat rentan er, sum verður latin fyri hesa saldo.

Vit hava ta fatan, at samskipanin millum ta figgjarligu og ta teknisku leiðsluna er ikki so trygg, sum ynskjandi kundi verið. Vit mugu hava í huga, at Telefonverkið hevur stórar inntøkur og útreiðslur og stendur fyri stórum útbyggingum, so tað er áfroðkandi neyðugt, at hetta samarbeiði er sum tað eigur at vera, soleiðis at teir, ið leiðsluna hava, vita av hvørjum øðrum og at ongan óneyðugur fløkjur standast av hesum.

5. **Lønjavuingargrunnur Skipsfiskimanna:**
Ongar viðmerkingar.

6. **Tjaldurs Apotekið:**
Ongar viðmerkingar.

7. **Landssjúkrahúsið:**
Ongar viðmerkingar.

8. **Suðuroyar Sjúkrahús:**
Ongar viðmerkingar.

9. **Klaksvíkar Sjúkrahús:**
Ongar viðmerkingar.

10. **Húsalánsgrunnurin:**
Ongar viðmerkingar.

11. **Strandfaraskip landsins:**
Ongar viðmerkingar.

12. **Føroya Yvirformyndari:**
Ongar viðmerkingar.

13. **P/f Suðurfisk:**
Ongar viðmerkingar.

14. **M/s Leivur Øssursson:**
Ongar viðmerkingar.

15. M/s Jens Chr. Svabo:
Ongar viðmerkingar.

16. M/s Drangur, vaktarskip:
Ongar viðmerkingar.

---

15. Ymsar reguleringar av fiskiskapinum í norðureystara partinum av Atlantshavinum (NEAFC)

Ár 1974, týsdagin 13. august, legði Eli Nolsøe, landsstýrismaður, fram:

Uppskot
til
samtyktar.

I. Løgtingið tekur til eftirtektar tær reguleringar, sum umrøddar eru í viðmerkingum landsstýrisins í punktunum 1—6 um meskavidd, spell, blandaðan fiskiskap, sardinur, atlantoskandiska sildina og norðsjóvarsildina.

II. Løgtingið góðtekur viðlagda uppskot um «ændring i bekendtgørelse for Færøerne om regulering af fiskeriet i det nordøstlige Atlanterhav» skjal 1.

III. Løgtingið góðkennir ikki, at Danmark atkvøður fyri reguleringini umrødd í viðmerkingum landsstýrisins í punkt 7a um loyvda totalveiðu og býti av henni, men góðkennir, at Danmark atkvøður fyri punktunum 7b og 7c um friðing av gýtingargrunni og minstamát.

IV. Um stundir ikki verða fyri at leggja málið fyri løgtingið aftur, ger marknaðarnevnd løgtingsins ella, um hon ikki er vald, floksformenni-

nir á løgtingi saman við landsstýrinum í givnum føri av, um heimastýrið skal mótmæla, at ein reguleringsskipan um loyvda totalveiðu, nevnd undir punkt III, verður at seta í gildi fyri Føroyar.

Viðmerkingar:

Á 12. NEAFC-fundinum í Bonn í dagunum 26. juni til 2. juli 1974 vórðu tey undir punktunum niðanfyri 1 6 nevndu tilmæli til ríkisstýrini samtykt:

ad 1 Meskavíddin.

Í fleiri ár hevur minsta-meskan fyri trol á konventiónsøkinum 1, tá ið havleiðirnar um Føroyar eru undantiknar, verið 120 mm, tá talan hevur verið um trol, gjørd úr bumullí, hampi, polyester ella polyamod, annars 130 mm. Fyri Føroyar hevur minstameskan verið 10 mm lægri.

Í hesum hendi tann broyting, at frá 1. januar 1974 kom Føroya-økið undir somu minstumesku, sum øki 1 annars.

12. fundurin samtykti við 11 ja-atkvøðum og 3 nei-atkvøðum at viðka meskuna til ávikavist 130 og 140 mm frá 1. januar 1976, eitt land atkvøddi ikki.

ad 2 Spell (chafer).

Ein avleiðing av reglunum um minstumesku er, at tað ikki er loyvt at knýta verju til trolið, eina verju, sum í sínum virkningi ger, at trolið ikki stendur mát. Frá hesum eru tó undantøk fyri trolposan. Er talan um undirsíðuna, er undantaksreglan ógvuliga lagalig, meðan tað fyri ovara partin av posanum bert eru loyvd 3 ávís spell. Seinra undantaksreglan skuldi fara úr gildi 31. december 1975.

Á fundinum varð tó samtykt at framleingja skipanina um verju av ovara partinum av trolposunum fyri árið 1976, tó soleiðis at loyvda spellið bert verður tað, sum verður nevnt hitt polska, eitt av teimum trimum, sum nú eru loyvd. Fyri hesum atkvøddu 10 ja, 2 atkvøddu nei og 3 atkvøddu ikki.

Reglan er galdandi fyri øki 1.

ad 3. Blandaður fiskiskapur.

Til 1. januar 1975 er tann undantaksregla galdandi, at í idnaðarfiskiskapi er loyvt at veiða upp til 10% eftir vekt av undirmátsfiski.

Henda regla varð á fundinum framlongd til 1. januar 1976 og var skoytt uppí at av fiski, har minstamátsreglur eru galdandi, vard fiskasløg, má

samlaða veklin av hesum fiski í eini íduaðarlast ella part av henni utlan mun til, um fiskurin stendur mát ella ikki, ikki vera omanfyri 25%.

Fyri uppískoytinum vóru 12 ja-atkvøður, 2 nei, harímillum Danmark, og 1 atkvøddi ikki.

ad 4. Sardinur.

Samtykt varð at sela minstamát uppá 12 um fyri stoynin vestanfyri Portugal.

ad 5. Atlanto skandinaviska sildin.

Samtykt varð, at veiðiforboðið verður framlongt at galda fyri árið 1975 og at undantaksreglan frá forboðnum, at loyvt er at veiða upp til 20% av 1969-veiðuni av smásild til mat og agn, verður broytt til 10%.

Ongin broyting er í regluni, at forboðið ikki umfatar føroysku fjarðasildina.

ad 6. Norðsjóvarsildin.

Á 11. ársfundinum á vári 1973 varð samtykt at lata arbeiðsnevnd kanna sildastovnin í Norðsjónum. Frágreiðing frá nevndini skuldi síðani viðgerast á eykafundi í kommissiónini í december mánaða 1973.

Nevndin kom til tað úrslit, at stovnurin er so mikið niðurundirkomin av ovurfisking, serliga eftir teimum yngstu ársflokkunum, at bert nakrir fáir vánaligir ársflokkar vilja føra við sær, at fiskiskapur eftir sild heldur uppat. Nevndin skjeyt upp, at stovnurin verður bygdur upp og øktur við 100% eftir 4 árum. Loyvda totalveiðan í 1974 skuldi setast millum 310.000 og 390.000 tons, jú meira ið veitt verður av ungsild, jú lægri kvota. Til sammetingar var samlaða meðalveiðan í árunum 1970 - 73 581.000 tons, í 1973 573.000 tons.

Á eykafundinum var ásannað, at ongin møguleiki var fyri at fáa samtykt, at totalveiðan varð sett so lágt, sum skotið upp av arbeiðsnevndini. Loyvda veiðan mátti tí setast hægri, tøl vóru nevnd, ið lógu ímillum 400.000 og 464.000 tons. Men semja fekst tó hvørki um samlaðu veiðumøgdina ella um eftir hvørjum sjónarmiðum ein heildarmøgd skuldi býtast. Avgjørt varð tí at halda ein annan eykafund í mars mánaða 1974.

Heldur ikki á hesum fundinum fekst nøkur semja, men partarnir vóru tó komnir so mikið nærri hvørjum øðrum, at samtykt varð, at kommissiónsformaðurin skuldi senda limunum eitt uppskot, sum teir skuldu gera skrivligar viðmerkingar til, og síðani skuldi formaðurin gera endaligt uppskot at senda til skrivliga atkvøðugreiðslu.

Úrslitið av skrivligu atkvøðugreiðsluni varð, at øll londini uttan Noreg, Polen og Spania, ið atkvøddu nei, atkvøddu fyri uppskotinum. Uppskotið

var eftir atkvøðureglunum samtykt, men Noreg og Polen mótmæltu, at lað varð sett í gildi, hesi mótmæli vórðu tó tikin aftur seinri.

Tað, sum samtykt er av kommissiónini, er at seta loyvdu heildarveiðuna í tíðarskeiðinum 1. juli 1974 til 30. juni 1975 til 494.000 tons, hægst 107.000 tons av hesi veiðu má vera ungsild, 0 - 1 ára gomul.

Føroya partur verður 43.000 tons burtur av kvotuni til Danmark uppá 210.000 tons, til sammetingar var føroyska meðalveiðan í 1970 - 73 59.555 tons, í 1973 67.250 tons.

Ymisk mál vórðu ikki gjørd liðug á fundinum, men vórðu latin til skrivliga atkvøðugreiðslu. Tey eru hesi:

7. Regulering av sildaveiðuni vestanfyri Skotland (vestanfyri 4° W). ad Loyvd totalveiða og býti av henni.

Úrslitið av vitskapligum kanningum er, at hesin sildastovnurin er í vanda. Orsøkin er serliga, at reguleringarnar í Norðsjónum gera, at fleiri skip flyta vestureftir ta tíðina, reguleringarnar eru í gildi. Fiskibiologarnir mæla tí til, at loft verður lagt fyri loyvdu totalveiðuni, og at loftið verður sett til 156.000 tons í árinum 1975; til sammetingar var meðalveiðan í 1970 - 73 212.390 tons, í 1973 250.361 tons.

Bretland hevur skotið upp, at loyvda totalveiðan fyri 1975 verður sett til 205.000 tons, og at partur Danmarkar og Føroya verður samanlagdur 9.000 tons; meðalveiðan í 1970 - 73 var ávikavist 409 tons og 10.091 tons, í 1973 ávikavist 932 tons og 9.071 tons.

Á fundinum varð frá føroyskari síðu sagt, at Føroyar ikki kundi atkvøða fyri hesi nýggju kvotaskipanini, her eigur at verða steðgað, til úrslitini frá nýggju kvotaskipanini í Norðsjónum liggur fyri, tí hesi reguleringstiltøk hava eisini eina positiva ávirkan á sildastovnin vestanfyri Skotland.

Føroyar eru, tá ið um fiskiskap ræður í serumstøðum. Eftir landsstýrisins metan er ikki givið hesum serumstøðum nóg mikið gætur í bretska uppskotinum. Landsstýrið kann tí ikki ráða til, at løgtingið góðkennir, at Danmark atkvøður fyri uppskotinum í tí líki, tað nú liggur fyri. Samstundis sum hetta verður sagt ríkisstýrinum, verður ríkisstýrið biðið um at siga kommissiónini frá, at skuldi tað hent, at úrslitið av atkvøðugreiðsluni millum limalondini verður, at neyðugur meiriluti er fyri uppskotinum, kann løgtingið góðtaka reguleringsskipanina, men bert undir tí treyt, at

kvota Danmarkar og Føroya verður 12.000 tons og ikki 9.000 tons. Kunnu limalondini ikki góðkenna tílíkt fyrivarni, vil landsstýrið samráðast við marknaðarnevndina ella, um hon ikki er vald, so við formenninar fyri flokkarnar á Løgtingi, um mótmæli skal setast fram, at reguleringsskipanin verður sett í verk fyri Føroyar.

b. Friðing av gýtingargrunni.

Bretland skjýtur upp, at grunnur vestanfyri og norðarfyri Ytru Hebridurnar verður friðaður fyri sildafiskiskap í tíðini 15. august til 30. september á hvørjum ári. Kort yvir grunnin er viðlagt, skjal 2.

Landsstýrið mælir til, at Danmark atkvøður fyri uppskotinum.

c. Minstamát.

Bretland skjýtur upp at seta minstamát uppá 20 cm fyri sild veidd vestanfyri 4° W, tó við 10% undantaki bæði í sildaveiðu og blandaðari veiðu.

Landsstýrið mælir til, at Danmark atkvøður fyri uppskotinum.

Eli Nolsøe
landsstýrismaður

/ J. Djurhuus

Skjal 1.

Udkast

til

bekendtgørelse om ændring af bekendtgørelse for Færøerne om regulering af fiskeriet i det nordøstlige atlanterhav.

I henhold til Lov nr. 210 af 19. maj 1971 om internationale reguleringsforanstaltninger vedrørende fiskeri, § 3, fastsættes følgende:

§ 1.

I bekendtgørelse nr. 25 af 28. januar 1974 foretages følgende ændringer:

1) § 15 ophæves og i stedet indsættes:

§ 15. I perioden 1. juli 1974 til 30. juni 1975 må fiskeri efter sild i Nord-

søen og Skagerak kun finde sted efter autorisation af fiskeriministeren eller den, han bemyndiger hertil, og kun indenfor en fangstmængde af højst 43.000 tons. Nordsøen og Skagerak afgrænses i denne forbindelse i nord af den 62. nordlige breddegrad, i vest af den 4. vestlige længdegrad fra 62 grader nordlig bredde til den skotske kyst og i den engelske kanal af 1 grad vestlig længde samt i øst af en linie fra Skagen til Pater Noster fyr.

I forbindelse med den nævnte autorisation kan der foretages en fordeling af den nævnte fangstmængde mellem de således autoriserede.

Stk. 2. Uanset bestemmelsen i stk. 1 kan det tillades, at den del af den i stk 1 nævnte fangstmængde, der fanges før 1. februar 1975, forhøjes med 5%.

Stk. 3. Uanset bestemmelsen i stk. 1 må der i enhver landing af fisk forefindes indtil 20% sild efter vægt. Disse fangstmængder skal medregnes i de i stk. 1 og 2 nævnte mængder.

Stk. 4. Oplysninger om den aktuelle fangstmængde, jfr. stk. 2 og 3, kan gives løbende af landsstyret.

2) § 19, stk. 1, affattes således:

Overtrædelse af § 3, stk. 1, § 8, stk. 2, § 9, stk. 2, § 10, 2. punktum, § 14, § 15, stk. 1 og 3, § 15 a, § 15 b, stk. 1, § 16, § 17, stk. 1 og 2, og § 18, stk. 4, straffes med bøde.

§ 2.

Bekendtgørelsen træder i kraft dagen efter offentliggørelsen i Dimmalætting.

FISKERIMINISTERIET

Skjal 2.



Figure 1.

1. viðgerð 14. august og málið beint í Fiskivinnunevndina, sum 20. august legði fram soljóðandi

Álit

Málið var við fyrstu viðgerð beint í fiskivinnunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meirilutu og ein minniluta. Meirilutin (Poul J. Olsen, Tórálvur Mohr Olsen, Leon Joensen og H. Djurhuus) tekur undir við uppskoti landsstýrisins, men heldur, at í uppskoti til kunngerð, skjal I, har tað stendur «fiskeriministeren eller den, han bemyndiger hertil», eigur at standa «Færøernes landsstyre».

Broytingaruppskot

Í «udkast» til nýggja § 15 í bekendtgørelse nr. 25 af 28. januar 1974 verður í 1. petti sett «Færøernes landsstyre» í staðin fyri «fiskeriministeren eller den, han bemyndiger hertil».

Minnilutin (Ove Mikkelsen) vísir á:

Uppskot landsstýrisins byrjar § 1 soleiðis:

«Løgtingið tekur til eftirtektar tær reguleringar .....» o.s.fr.

Sostatt eru allar hesar reguleringar longu viðtiknar, og tykist tað tí minnilutanum fáfongt, at málið verður lagt fyri tingið í hesum líki.

Tjóðveldisflokkurin er altið fyri einum og hvørjum verndartiltaki fyri at varðveita einhvønn fiskastovn ímóti oyðing, men tá friðartiltøk verða gjørd, sum meinast ráma ta føroysku fiskiveiðuna fram um onnur lond, mugu vit mótmæla slíkum tiltøkum, og sum eftir okkara metan lítið og einki hava við friðing av fiskastovnum at gera. So við hesum uppskoti til samtyktar, 1 I verður mælt til at góðtaka øll punktini frá 1 til 6.

Punkt ad 1 snýr seg um meskavídd.

Her mælir minnilutin til góðtøku av, at Føroya-akið nú eisini skal koma inn undir minsta mark á meskavídd, hvar tað annars hevur verið loyvt at nýta meskur 10 mm smærri undir Føroyum enn aðrastaðni. Ynskiligt hevði verið, um lógin fyri víðkan av meskunum frá 130 mm til 140 mm kom í gildi áðrenn tilmælta tíðspunkt 1. januar 1976.

Í hesum viðfangi heitir minnilutin á landsstýrið um at upplýsa fyri tinginum, hvørvítt landsstýrið er kunnugt við, um teir útlendsku trolarar, sum eru tiknir við ólógligum reiðskapi í føroyskari havn — ov snúur meskar — hava fingið nakra bót ella tilíkt fyri hetta lógarbrot ella ei?

Punkt ad 2 Spell.

Minnilutin mælir til at mótmæla, at hesin verður loyvdur at nýta, tí úrslitið er, at hesin eyka posi, uttan um tann vanliga posan, er munandi minni meskaður, soleiðis at posin sum so verður so tættur, at kykt næstan ikki sleppur íggjøgnum, og tá so er, hjálpir lítið at tosa um meskastødd.

Til ad 3, ad 4 og 5.

Minnilutin hevur ongar viðmerkingar.

Ad 6 norðsjóvarsildin.

Minnilutin mælir til at mótmæla hesi kvotaskipan sum eina rakar føroysku sildaskipini harðast, meðan aðrir hava aðrar møguleikar fyri lønandi veiðu í hesum tíðarskeiði.

Og so leingi veiða av ungsild til íðnað framvegis er loyvd nærum óavmarkað er vingt at skilja hetta veiðubann sum verndartiltak móti sildastovninum.

I ad 7 regulering av sildaveiðu vestanfyri Skotland.

a. Loyvd totalveiða og býti hennara, tekur minnilutin undir við landsstýrinum um at mótmæla hesi viðtøku, men er fyri
b. Friðing av gýtingargrunni, eins og
c. Minstamát.

2. viðgerð 22. august.

Broytingaruppskot frá nevndini samtykt við 25—0.

Landsstýrisuppskotið og «Udkast til .....» so broytt samtykt við 20—0.

Málið sostatt avgreitt.

16. Prístalsviðgerð av arbeiðaralønum

Ár 1974, týsdagin 13. august, legði Jákup Lindenskov, landsstýrismaður, fram:

Uppskot
til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um prístalsviðgerð av arbeiðaralønum.

§ 1.

Í § 1, 1. stk., í løgtingslóg nr. 21 frá 16. mai 1961 um prístalsviðgerð av arbeiðsløn verður «1,15 oyru» broytt til «1,30 oyru».

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi 1. december 1974.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om pristalsbehandling af arbejderlønninger.

§ 1.

I § 1, stk. 1, i lagtingslov nr. 21 af 16. maj 1961 om pristalsbehandling af arbejdslønninger ændres «1,15 øre» til «1,30 øre».

§ 2.

Denne lov træder i kraft 1. december 1974.

Viðmerkingar:

Síðani 1943 hevur løgtingið gjørt av, hvør prísviðbótin skal vera í øllum arbeiðsviðurskiftum, har arbeiðsløn eftir siðvenju, sáttmála ella gerðadómi verður roknað sum ein ávís grundløn um tíman og hereftirat prísviðbót.

Eftir løgtingslóg nr. 21 frá 16. mai 1961 um prístalsviðgerð av arbeiðsløn við seinni broytingum er prísviðbótin nú 1,15 oyru fyri hvørt prístalsstigið omanfyri 100.

Prístalsgrundarlagið og reguleringin av arbeiðaralønum eru eftir lógini knýtt at hvørjum øðrum. Tað er tí ein týdningarmikil spurningur fyri allar partar á arbeiðsmarknaðinum, um tað prístalsgrundarlag, ið er, er hitt rætta at regulera arbeiðsløunirnar eftir. At kanna spurningin setti løgtingið í 1963 niðnr nevnd at kanna prístalsgrundarlagið. Nevndin gav álit frá sær til løgtingið í 1968, og samtykti løgtingið, at nevndin skuldi halda fram við kanningararbeiðinum, og skuldi úrslitið, sum skuldi byggjast á

F.L. j. nr. 1300-6-3. Sí eisini LI nr. 72/1974.

kanningar av lantakara húsarhaldum leggjast fyri løgtingið, Løgtingstíðindi 1968, bls. 228.

Striltið hevur gingið at fáa fram nýtt prístalsgrundarlag at leggja fyri løgtingið.

Frá arbeiðarafelogum og handverkarafelogum hevur landsstýrið fingið áheitanir um, at arbeiðið við nýggja prístalsgrundarlagnum verður framskundað eins og felogini skjóta upp, at prístalsviðbótin, til nýtt prístalsgrundarlag fyriliggur, verður lækkað til 1,50 oyra fyri hvørt prístalsstigið.

Arbeiðið við prístalsgrundarlagnum verður framskundað. Samráðingar eru millum landsstýrið og viðkomandi felog um málið.

Eftir teimum kanningum, ið gjørdar eru, sær tað út til, at núverandi skipan ikki gevur arbeiðarum full mótvirði fyri prístalsvøksturinum. Í hesi meting má tó eisini verða havt í huga, at arbeiðsvikan frá 1. juli 1970 er styttt niður í 42½ tíma, at styttingin ikki førdi við sær, at vanliga vikulønin varð lækkað, og at frítíðarsamsýningin varð hækkað úr 7% til 9½% frá 1. april 1973, eins og 4 vikur frítíð er lógfest frá og við frítíðarárinum 1974.

Hóast hesar ábøtur standur eftir øllum at dømi ein munur eftir at javna út. Hvussu stórur munurin er, er landsstýrið við teimum upplýsingum, ið liggja fyri, ikki fært fyri við vissu at úttala seg um. Tó metir landsstýrið, at ein hækking úr 1,5 oyru til 1,30 oyru fyri hvørt prístalsstigið ikki beri er ein bati í lønarviðurskiftum arbeiðara, men ein bati, sum arbeiðarar hava eitt rímligt krav um, og sum eigur at verða framdur nú, og áðrenn nýtt prístalsgrundarlag fyriliggur.

Mælt verður til, at broytingin fær gildi frá 1. december 1974.

1. viðgerð 16. august og málið beint í lógarnevndina, sum 23. august legði fram soljóðandi

Álit

Landsstýrið hevur lagt fyri løgtingið uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um prístalsviðgerð av arbeiðaralønum.

Eftir løgtingslóg nr. 21 frá 16. mai 1961 um prístalsviðgerð av arbeiðsløn við seinni broytingum er prísviðbótin 1,15 oyru fyri hvørt prístalsstigið omanfyri 100.

Í uppskotinum skjýtur landsstýrið upp, at 1,15 oyru verður broytt til 1,30 oyru og at broytingin fær gildi frá 1. december 1974.

Annars verður í viðmerkingunum til lógarnppskotið víst á, at nevnd er sett at kanna prístalsgrundarlagið í sini heild.

Málið varð framlagt 13. august 1974 og 1. viðgerð fór fram 16. august, har málið varð beint í lógarnevndina.

Nevndin hevur viðgjort málið og hevur býtt seg sundur í ein meirluta og ein minniluta.

Meirlutin (Demmus Henlze, Martin Joensen, Poul Jacob Olsen og Trygve Samuelsen) mælir tinginum at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Demmus Henlze ger hesar viðmerkingar:

Formálið við einari lønarhækking má altíð vera at geva ein veruligan lønarbata — eian reallønarhækking - - og ikki bert eitt hægri krónutal, sum einans førir við sær hækkandi prísir til skaða fyri okkum oll, meðan hann, ið lønarbatan skulði hava, eitki hevur fingið burtur úr hækkingini. Tað, ið arbeiðarar og onnur hava áhuga at vita við eini lønarhækking, er um ella hvussu mikið, hon hevur givið meir, tá árið er komið at enda.

Uppskot landsstýrisins sær út til at vera gjort í skundi, lagt fram í skundi og skulu avgreiðast í skundi, soleiðis at ongar kanningar eru farnar fram, um nakar veruligur lønarbati er í uppskotinum. Givið er tað, at hækkandi lønir geva hægri livikostnað — eisini fyri hann, ið lønarbatan hevur fingið — men tað, ið tyngir mest í hesum fori fyri arbeiðaran, er at hækkandi skattastigin fer avstað aftur við stórum parti av lønarhækkingunum, sum uppskot landsstýrisins gevur, so tá árið er komið at enda, er allur lønarbati burtur. Við tí inflatión, vit hava havt hesi seinastu árini, man uttan iva tann lønarvøkstur, sum hevur verið hjá arbeiðarum, vera horvin í nógv hækkandi skattum, serliga til landskassan við sínum nógv hækkandi skattastiga.

Tað er upplýst, at útreiðslan til ætlaðu lønarhækking liggur um 5 mill. krónur. Fólkaflokkurin er av tí áskoðan, at tað var best fyri allar partar, at hesar 5 mill. krónur vóru givnar við eini lækking av skattinum við broyting í skattalógini, soleiðis at skattastigin varð lækkaður fyri ársinntøkur, t.d. undir 50.000,- kr. Hetta vildi kenst sum ein veruligur lønarbati, ið ikki samstundis førdi prísvøkstur við sær og soleiðis bremsaði inflatiónini uttan.

Tá ið eingin meirluti á tingi sæst at vera, ið vil ganga hesa leið og uppskot landsstýrisins skal avgreiðast nú, fer Fólkaflokkurin at atkvøða fyri uppskotinum út frá tí áskoðan, at her er talan um eina fyribils loysn.

Minnilutin (Signar Hansen) førir fram:

Tjóðveldisflokkurin metir hesa broyting frá 1,15 oyru til 1,30 oyru fyri hvørt prístalsstigið at verða alt ov lítla. Víst verður til tað skriv, Havnar arbeiðsmannafelag hevur sent løgtinginum, har m.a. verður sagt.

Ein møgulig hækking í prísviðbótini frá 1,15 oyru til 1,5 oyru vil aldeilis

ikki skapa nakra javnvág millum lønina hjá okkara felagslimum og lønina hjá hinum stættunum. Víst skal eisini verða á, at reglan um javnvág við 1½% fyri hvørji 6 stig hjá starvs- og tænastumonnum hevur nú virkað síðani mai 1971. Tað má tí verða kravt, at ein nýskipan, sum ber rættvísi í sær, fær tilbakavirkandi kraft.

Tjóðveldisflokkurin setur tí hetta uppskot fram.

§ 1.

I § 1, 1. stk., í løgtingslóg nr. 21 frá 16. mai 1961 um pristalsviðgerð av arbeiðslønum verður «1,15 oyru» broytt til «1,90 oyru».

§ 2.

Lógin fær gildi frá 1. mai 1971.

§ 3.

Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

§ 1.

I § 1, stk. 1, i lagtingslov nr. 21 af 16. maj 1961 om pristalsbehandling af arbejdslønninger ændres «1,15 øre» til «1,90 øre».

§ 2.

Loven træder i kraft 1. maj 1971.

§ 3.

Denne lov træder i kraft straks.

2. viðgerð 23. august. Frávik frá tiðarfrestini uttan atkvgr.

Uppskot frá minniluta í nevndini gr. 1 fall 6—0, alt uppskotið sostatt burturfallið.

Landsstýrisuppskotið gr. 1 samtykt við 20—0. Alt uppskotið at fara til 3. viðgerð samt. 20—0.

3. viðgerð 3. september.

Framlagt broytingaruppskot frá Kj. Mohr o.fl. soljóðandi:

I gr. 2 í uppskoti landsstýrisins verður í staðin fyri «1. december 1974» sett «1. januar 1975» í báðum tekstunum.

Framlagt broytingaruppskot frá E. Patursson, soljóðandi:

I § 1, 1. stk. í uppskoti meirilutans millum «verður» og «1,30 oyru» verða sett orðini «í minsta lagi».

Broytingaruppskotið frá Kj. Mohr o.fl. samtykt 17—0.
Broytingaruppskotið frá E. Patursson samtykt 14—0.
Lógaruppskotið so broytt endaliga samtykt við 25—0.

17. Broyting í stýrisskipanarlógini (framløga av fíggjarlógini) og 17 B Uppskot til løgtingslóg um 18 ára valrættaraldur

Ár 1974, týsdagin 13. august, legði Atli Dam, løgmaður fram

Uppskot
til

løgtingslóg um broyting í stýrisskipanarlógini.

§ 1.

Í § 20, 1. stk. í løgtingslóg nr. 1 frá 13. mai 1948 um stýrisskipan Føroya í sermálum verður «1. september» broytt til «15. december».

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinnan vegin.

lagtingslov om ændring i styrelsesordningsloven.

§ 1.

I § 20, 1. stk. 1 i lagtingslov nr. 1 af 13 maj 1948 om Færøernes styrelsesordning i særanliggender ændres «1. september» til «15. december».

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Eftir stýrisskipanarlógini skal landsstýrið í hvørjari vanligari tingsetu innan 1. september leggja fram uppskot til fíggjarlóg fyri komandi fíggjarár.

Henda fyriskipan hevur sínt brek. Upplýsingar, landsstýrið skal hava sum grundarlag undir uppskotinum, mugu vanliga útvegast innan 1. juli ella 9 mánaðar, áðrenn lógin fær gildi. Tað slepst tí ikki undan, at játtanaruppskot verða givin við fyrivarni og eisini verða munandi broytt seinri. Eisini er at siga, at tað mangan er torført at fáa uppskot fram um summarið, tann tíðin fólk vanliga halda frí.

Landsstýrið heldur tí, at tað bæði fyri landsstýrið og ikki minni fyri løgtingið vildi verið en fyrmunur, um tíðarfreistin fyri framløgu av fíggjarlógaruppskotinum varð sett seinri í árinum. Hon kundi t.d. verið sett til 1. november, men síðani løgtingsval er í november mánaða, ber hetta ikki til. Um freistin varð sett til 15. december, skuldi eisini lands-

F.L. j. nr. 115-1. Sí eisini Ll. nr. 3/1975.

stýrið, valt aftaná løgtingsval, havt umstøður at viðgjort og lagt uppskot fram, tað er eisini nývalda landsstýrið, ið hevur ábyrgdina av fíggjarlógaruppskotinum.

§ 30 í stýrisskipanarlógini sigur, at verður broytingaruppskot av lógini samtykt, skal løgtingið uppleysast, og verður uppskotið fyrst at staðfesta sum lóg, um tað verður samtykt av nývalda tinginum.

1. viðgerð 16. august og málið beint í lógarnevndina, sum 23. auguts legði fram soljóðandi

Álit

Landsstýrið hevur lagt fyri løgtingið uppskot til løgtingslóg um broyting í stýrisskipanarlógini.

Eftir § 20, 1. stk. í løgtingslóg nr. 1 frá 13. mai 1948 um stýrisskipan Føroya í sermálum ekal landsstýrið innan 1. september leggja fram uppskot til fíggjarlóg fyri komandi fíggjarár.

Fört verður fram, at teir upplýsingar, landsstýrið skal hava um grundarlóg undir uppskotinum, mugu útvegast einar 9 mánaðar, áðrenn lógin fær gildi, og hevur hetta fört við sær, at uppskotið undir viðgerðini í løgtinginum má munandi broytast.

Landsstýrið skjýtur tí upp, at fíðarfreistin fyri framløguna verður sett til 15. december.

Málið varð framlagt 13. august 1974 og 1. viðgerð fór fram 16. august, har málið varð beint í lógarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg sundur í ein meirluta og ein minniluta.

Meirlutin (Dennmus Heintze, Martin Joensen, Poul Jacob Olsen og Trygve Samuelsen) mælir tinginum at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Minnilutin (Finnbogi Isaksen, ið møtti fyri Sigmar Hansen) setur fram hetta uppskot:

Í § 1 í uppskoti landsstýrisins verður «15. december» broytt til «15. januar».

I aðrar mátar setur sami minniluti fram hetta uppskot:

Uppskot
til

løgtingslóg um broyting í lóg um Føroya løgting.

§ 1.

Í lóg nr. 124 frá 28. mars 1923 «om Færøernes lagting» við seinni broytingum, samb. lógarkunngerð nr. 249 frá 24. juni 1939, løgtingslóg nr. 4 frá 14. mai 1948, løgtingslóg nr. 56 frá 5. september 1950, løgtingslóg nr. 26 frá 27. mai 1966 og 23. februar 1971 verður gjørd henda broyting:

§ 2, 1. stk., 1. pkt. fær hetta orðaljóð:

Valrætt og valbæri til løgtingið hevur maður og kvinna, sum hevur fylt 18 ár, hevur beinarætt og fastan bústað í Føroyum valdagin og samfelt ella samanlagt hevur havt fastan bústað í Føroyum í mansta lagi í 2 ár, uttan so at hann ella hon er dømdur ella domd sek í gerð, sum eftir almanna áskoðan er vanærandi, og henda fylgja av dóminum er ikki burturdoltin.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

lagtingslov om ændring i lov om Færøernes lagting.

§ 1.

I lov nr. 124 af 28. marts 1923 om Færøernes lagting med senere ændringer jfr. lovbekendtgørelse nr. 249 af 24. juni 1939, lagtingslov nr. 4 af 14. maj 1948, lagtingslov nr. 56 af 5. september 1950, lagtingslov nr. 26 af 27. maj 1966 og 23. februar 1971 sker følgende ændringer:

§ 2, stk. 1, 1. pkt. får følgende ordlyd:

Valgret og valgbarhed til lagtinget, har enhver mand og kvinde, som har fyldt 18 år, har indfødsret og fast bopæl på Færøerne på valgdagen, samt har haft fast bopæl på Færøerne i mindst to år sammenhængende eller i flere perioder, medmindre vedkommende ved dom er fundet skyldig i den offentlige mening vanærende handling uden at denne virkning af dommen er bortfaldet.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Ungdómurin í dag er meira búgvin nú, enn hann áður hevur verið - tað er tí rætt og rímiligt, at hann fær eitt orð at siga í tí politiska lívinum. Í fleiri londum er valrættaraldurin lækkaður til 18 ára aldur, meðan onnur lond hava hesa ætlan.

Í hesum uppskoti verður mælt til at seta valrættaraldurin til løgtingið til 18 ár. Harumframt verður miðað imóti at seta nýggjar reglur fyri valrætti til løgtingið. Í Danmark og øðrum demokratiskum londum er fremsta

freytin fyri valrætti, at viðkomandi hevur danskan rikisborgararætt. Hetta kriterium fáa vit ikki brúkt í Føroyum, so leingi heimastýrislógin ikki er tikin av og føroyskur borgarrættur fingin. Heimastýrislógin sigur í § 10, 2. stk., 1. pkt., at «valgret og valgharhed til organer, der henhører under det færøske hjemmestyre, kan gøres afhængig af, at vedkommende er færing». Í 2. pkt. verður sagt, «at iøvrigt kan ikke i lovgivning eller i forvaltning gøres forskel på færinger og andre statsborgere. Henda lógarregla gevur sostatt heimild til at skilja ímillum føroyingar og danir valrætti og valbæri viðvíkjandi.

Hetta kann gerast, sum mælt er til í fyriliggjandi uppskoti við at seta ta treyt, at veljari skal hava búð tvey ár í Føroyum. Hetta rakar ikki føroyingar, sum koma úr útlondum, uttan teir ongantíð hava búð í Føroyum, og tað man vera sjáldsamt. Heldur ikki rakar henda regla danir, sum eru fastbúgvandi í Føroyum.

Til uppskot minniluta til løgtingslóg um broyting í lóg um Føroya løgting við viðmerkingum, hevur meirilutin í nevndini at viðmerkja, at hetta einki hevur við málið um broyting í stýrisskipanarlógini (framløga av figgjarlógini) at gera, og hevur tí ikki viðgjørt tað.

2. viðgerð á seinni fundi sama dag. Frávik frá tíðarfrestini u. atkvgr.

Landsstýrisuppskotið (framløga av figgjarlógini) gr. 1 samtykt 20—0, alt uppskotið og at fara til 3. viðgerð samtykt 21—0.

Uppskot frá minniluta í nevndini (Finnboga Isaksen), sum møtti fyri Signar Hansen, at figgjarlógin skal verða framløgd eftir 15/1 ístaðin 15/12 fall 6—0.

Uppskot frá minniluta í nevndini (Finnboga Isaksen, sum møtti fyri Signar Hansen) kallað 17 B var viðgjørt á tann hátt, at atkvætt var um uppskotið skuldi fara aftur í nevnd. Hetta fall við 6—0 og var beint til 2. viðgerð uttan nevndarviðgerð, har uppskotið seinni varð afturtikið.

3. viðgerð 2. september. Atkvætt var 4. september.

Framlagt var broytingaruppskot frá J. Sundstein, F. Isaksen, J. Djurhuus og H. Kass, soljóðandi:

§ 2.	§ 2.
Í § 12 í løgtingslóg nr. 1 frá 13. mai 1948 um stýrisskipan Føroya í sermálum verður «20 ár» broytt til «18 ár».	I § 12 i lagtingslov nr. 1 af 13. maj 1948 om Færøernes styrelsesordning i særanliggender ændres «20 år» til «18 år».

§ 2 í uppskotinum verður § 3.

Hetta broytingaruppskot fall við navnakalli — 12 ja, 13 atkvøddu ikki og ein var burturstaddur.

Atkvøtt varð soleiðis:

Ja atkvøddu: Jógvan Sundstein, Martin Joensen, Hilmar Kass, Signar Hansen, Knút Wang, J. P. Thomassen, Haldor Hansen, H. við Høgadalsá, F. Isaksen, E. Patursson, Jógvan Durhuus, Ove Mikkelsen = 12.

Atkvøddu ikki: Agnar Nielsen, S. Skaale, Herman Winther, Hákun Djurhuus, Leon Joensen, Andr. Djurhuus, Jógvan Olsen, Johs. Olsen, Hilmar Beck, Tórálvur Olsen, Poul J. Olsen, Kj. Mohr, J. Fr. Øregaard = 13.

Burturstaddur: Tr. Samuelsen = 1.

Lógaruppskotið frá landsstýrinum endaliga samtykt við 21—0 atkv.

(Uppskotið skal verða lagt fram av nýggjum aftaná valið).

---

18. Forboð móti innflutningi og nýtslu av spæliautomatum

Ár 1974, týsdagin 13. august, legði Eli Nolsøe, landsstýrismaður, fram

Uppskot
til

løgtingslóg um forboð móti innflutningi og nýtslu av spæliautomatum, har vinningur verður latin.

§ 1.

Loyvt er ikki at flyta inn ella

lagtingslov om forbud mod indførsel og brug af spilleautomater med gevinst.

§ 1.

Det er ikke tilladt at importere

F.L.j. nr. 527/2

nýta spæliautomatir, har vinningur verður latin.

§ 2.

Brot á hesi lóg verður sektað við bót og hald verður lagt á ólógligar innfluttar spæliautomatir.

§ 3.

Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

eller gøre brug af spilleautomater, hvor gevinst ydes.

§ 2.

Overtrædelse af denne lov straffes med bøde og de ulovlige importerede spilleautomater koufiskeres.

§ 3.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Spurningurin um nýtslu av spæliautomatum við peningavinnuligum endamáli hevur verið umrøddur saman við landfútanum.

Semja er um, at neyðugt er at loysa málið soleiðis at løgreglan við týðiligari heimild hevur fastar reglur at ganga eftir.

Sum er, hevur verið noktað uppseting av tílíkum automatum sbr. § 49 í politiviðtøkuni, men henda heimild kann vera ivasom.

Aðrastaðni verða hesar spæliautomatir metlar at vera ein plága, sum — hevur hon fyrst fingið fótafesti — ikki er til at sleppa av við. Hartil eru tær forførar at hava eftirlit við. Ein hækking av avgjøldum hevur aðrastaðni heldur ikki ført til less at forða fyri spæliautomatum, har vinningur verður latin.

Heldur ikki verður lúldið nóg mikið at sela vissar treytir fyri uppseting av spæliautomatum.

Hesar og aðrar royndir, sum hava spillandi siðvenju við sær, liggja til grund fyri, at landsstýrið eftir tilmæli frá landfútanum setur fram uppskot um forboð at flyta inn spæliautomatir, har vinningur verður latin, eins og forboðið kemur at umfata nýtslu av teimum spæliautomatum, ið skuldu verið komnar til Føroyar.

---

19. Nýtsla av føroyskum frímerkjum

Ár 1974, mikudagin 14. august, legði Jógvan Durhuus, løgtingsmaður, vegna tjóðveldisflokkin, fram

Uppskot
til
samtyktar

Løgtingið áleggur landsstýrinum at forða fyri at frímerkir við føroyskum motivum verða tikin í nýtslu, fyrrenn yvirtøkan av postverkinum er fraud.

Greinargerð:

Fráboðað er at frímerkir við føroyskum motivum verða tikin í nýtslu í november mánaða í ár.

Tjóðveldisflokkurin metir, at hetta er skeiv framferð. Í 1948 gjørdi løgtingið eina samtykt um at yvirtaka postverkið, men er henda samtykt ongatið sett í verk. Undir viðgerðini av løgtingsmáli nr. 70/1972: Yvirtøka av skipaeftirlitinum varð soljóðandi uppskot sett fram:

Landsstýrinum verður álagt sambært tingsamtykt frá september 1948 at upptaka samráðingar við donsku ríkismyndugleikarnar um yvirtøku av postverkinum. Hetta uppskot varð tann 11. apríl 1973 samtykt við 18 atkvøðum.

Tjóðveldisflokkurin er av tí áskoðan, at henda løgtingssamtyktin eigur at verða sett í verk beinan veginn, og at frímerkir við føroyskum motivum skulu takast í nýtslu samstundis sum yvirtøkan fer fram.

Tað er eyðsæð, at frímerkir við føroyskum motivum fara at geva postverkinum eina stóra eykainntøku, og er tað ikki annað enn ein sjálvfylgja, at hesin peningur kemur til føroyska postverkinum til góður, tá yvirtøkan er framd.

Sjálvt um motivini á frímerkjunum verða føroysk, so mela vit ikki at frímerkið kann rópast føroyskt, so leingi postverkið er danskt.

1. viðgerð 21. august og málið beint í fíggjarnevndina, sum 23. august legði fram soljóðandi

Alit

Hetta mál er lagt fyri tingið av tjóðveldisflokkinum og varð við fyrstu viðgerð beint í fíggjarnevndina.

Meirlutin (Tr. Samuelsen, A. Djurhuus, Hilmar Kass, Knút Wang og J. Fr. Øregaard) setur einki uppskot fram í hesum máli, meðan Finnbogi Isaksen og Jógvan Durhuus, sum møtti fyri Hanus við Høgadalsá, ið er burturstaddur, mæla tinginum til at samtykkja uppskotið.

Minnilutin (K. Wang) krevur, at landsstýrið arbeiðir við málinum um yvirtøku av postverkinum og átalar, at landsstýrið hevur arbeitt við málinum um serlig føroysk frímerkir aftaná at tingið samtykti at áleggja landsstýrinum at framskunda yvirtøkuna av postverkinum.

Hilmar Kass og J. Fr. Øregaard eru á einum máli við Knút Wang um at skundað eigur at verða undir samráðingarnar um yvirtøku av postverkinum, tá hetta hevur stóran týdning eisini úteftir, og ikki er nøkur eykaútreiðsla fyri føroyska samfelagið.

2. viðgerð 23. august. Frávik frá tíðarfrestini u. atkvgr.

Atkvøðugreiðslan, ið varð útsett, fór fram 2. september við navnakalli og fall uppskotið við at 11 atkvøddu ja, 2 nei, 12 atkvøddu ikki og 1 var burturstaddur.

Atkvøðugreiðslan fór soleiðis fram:

Ja atkvøddu: Jógvan Sundstein, Signar Hansen, Herman Winther, Knút Wang, Hákun Djurhuus, Kjartan Mohr, Hanus við Høgadalsá, Finnbogi Isaksen, E. Patursson, Jógvan Durhuus, Ove Mikkelsen = 11.
Nei atkvøddu: Jógvan Olsen, Johs. M. Olsen = 2.
Atkvøddu ikki: Agnar Nielsen, Martin Joensen, Hilmar Kass, S. Skaale, Trygve Samuelsen, Andr. Djurhuus, Hilmar Beck, J. P. Thomassen, Tórálvur Olsen, Poul J. Olsen, Haldor Hansen, J. Fr. Øregaard = 12.
Burturstaddur: Leon Joensen.

Uppskotið sostatt burturfallið.

20. Strandferðsluútbyggingin

Ár 1974, fríggjadagin 16. august, legði Atli Dam, løgmaður, fram

I. Uppskot til samtyktar um útbygging av farmaflutninginum og Strandferðslu landsins.

Ásannandi, at tørvur er á útbygging av innanoyggja farmafluttninginum og innan Strandferðslu landsins eftir eini heildarætlan, tekur Løgtingið undir við landsstýrinum í, at í tíðarskeiðinum 1975-80 verður í høvuðsheitum fylgt teim tilmælum, gjørd eru í frágreiðingini viðvíkjandi kanning av rakstri Strandferðslunnar.

II. **Uppskot til**

løgtingslóg um bygging av tveimum strandfaraskipum.

§ 1.

Landsstýrinum er heimilt at gera sáttmálar og fremja neyðuga lántøku við landskassaveðhaldi til bygging av tveimum strandfaraskipum til siglingina Klaksvík-Lorvík og Suðuroy - Tórshavn - Klaksvík.

§ 2.

Áðrenn landsstýrið tekur bindandi avgerðir um sáttmálar og lántøku, verða málini at leggja fyri fíggjarnevndina.

§ 3.

Henda lóg fær gildi beinan vegin.

lagtingslov om bygning af to fartøjer til kystsejladsen.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til at indgå kontrakter og optage nødvendige lån med landskassegaranti til bygning af to fartøjer til kystsejladsen til ruterne Klaksvík-Lorvík og Suðuroy - Tórshavn - Klaksvík.

§ 2.

Inden landsstyret træffer bindende afgørelser vedrørende kontrakter og lånoptagelse skal spørgsmålene forelægges finansudvalget.

§ 3.

Denne lov træder straks i kraft.

Viðmerkingar:

Í seinastu tingsetu vóru uppskot frammi um at útvega nýggj og hóskandi før til siglingina Klaksvík-Lorvík og til Suðuroyar-siglingina. Tingið góðtók eftir tilmæli fíggjarnevndarinnar at bíða við støðutakan í hesum

málum, til álitið var tøkt viðvíkjandi teim kanningum av rakstri Strandferðslunnar, sum landsstýrið hevði sett í verk.

Kanningarúrslitið er sent øllum tingmonnum í juli mánaða, og hava teir havt høvi til at seta seg inn í spurningarnar, sum snúgva seg um grundsjónarmið og málseting fyri alment rikna ferðslu, miðstøðir fyri farmaflutningin, skipasløg og støddir, útreiðslu- og gjaldspolitikk og annað.

Landsstýrið tekur í høvuðsheitum undir við teim sjónarmiðum, framført eru í frágreiðingini og ætlar at halda fram við kanningunum innan teir einstøku tættirnar, soleiðis at røkkast kann fram til eina samskipaða samferðslu, har høvuðsdenturin er lagdur á at veita øllum økjum landsins møguleikar fyri búskaparligari menning.

Serliga eigur dentur at verða lagdur á, at ikki nakrir landspartar dragna afturúl í mun til aðrar, og eigur útbyggingin at byrja sum skjótast.

Landsstýrinum stendur greitt, at ikki allar kostnaðarmetingar koma at halda, og kanska eru skipafløgurnar tær mest óvissu, tí her er í sumunum førum talan um byggingar, sum liggja nøkur ár framm í tíðini. Heldur ikki eru allar neyðugar ferjulegur tiknar við í kostnaðarmetið, men heldur landsstýrið, at hetta eigur at verða tikið við, so hvørt tørvurin veksur, og so hvørt høvi er til at byggja í samband við havna- og lendingabyggingar annars.

Tá landsstýrið at byrja við søkir sær heimild til at gera sáttmálar um tvey skip, kemst hetta av, at her eru bæði fyrireikingartíð og byggitíð rættuliga long, so skulu skipini verða tøk, áðrenn veraudi ferðsla rættuliga verður darvað av ov trongum umstøðum, eigur at verða byrja í bræði.

Stovnsetan av farmarutum á landi og goymsluhúsbyggingar krevja ikki somu fyrireikingartíð, og vil landsstýrið, so hvørt hesin tørvur veksur í finnu ára skeiðnum, søkja sær neyðugar heimildir.

Viðvíkjandi ferjusambandi til Sandoynna metir landsstýrið, at rættast er at biða, inntil ein veit, hvørji skipasløg hava frægastu møguleikarnar í útbygdu havnini í Skopun, og inntil vissa er fyri, hvør frægasta leiðin er at ganga við ferjubygging í Kirkjubø.

Tað er meting landsstýrisins, at skulu mest fjarskotnu landspartarnir eiga somu fortreytir búskaparliga sum meginmikið, er neyðugt at stig verða tikin til endurnýgging innan strandfaratflotan heimanvegin, og at tingið annars tekur undir við ætlanunum fyri komandi árini.

21. Fyrispurningur til løgmann frá Ova Mikkelsen

Ár 1974, fríggjadagin 16. august, setti Ove Mikkelsen, løgtingsmaður, fram fyrispurning til løgmann soljóðandi:

1. Eru føroysk endurgjaldskrøv vegna laksaveiðibann undir Grønlandi send ríkisstjórnini á sama hátt sum bornholmsku reiðarnir gjørdu?

2. Um so er, eru tey føroysku krøvini góðtikin, og um ikki, við hvørjari moliveering eru krøvini so avvíst?

3. Um endurgjaldsmálið enn er gangandi, nær kann so endaligt úrslit væntast?

Viðmerkingar:

Vegna tess at bann móti laksaveiðu undir Grønlandi varð sett í gildi, vóru skip, sum róku hesa veiðu fyri stórum tapi. Her var serstakliga talan um skip frá Bornholm og úr Føroyum. (Tey føroysku vóru fýra í tali).

Tey bornholmsku skipini kravdu endurgjald frá statskassanum uppá umleið 9 mill. kr. og hava fingið endurgjald. Frá føroyskari síðu (Reiðarafelagið) hava tílík endurgjaldskrøv verið framsett gjøgnum Føroya landsstýri, men enn er ongin endalig avgerð kunngjørd teinum føroysku reiðarinnum, og loyvi eg mær tí at seta hesar spurningar til løgmann.

20. august var við 21 – 0 atkvøðum samtykt at fyrispurningurin skuldi umrøðast.

Sambært tinglista var fyrispurningurin seinni afturtikin.

22. Ferðasamband við Sandoynna og Suðuroynna

Ár 1974, týsdagin 20. august, legði Kjartan Mohr, løgtingsmaður, fram

Uppskot
til
samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at kanna møguleikarnar til at fáa samband við Suðuroynna og Sandoynna loftvegis við helikoptara til ferðafólk og post.

Viðmerkingar:

Nú so at siga allar tær størstu oyggjarnar eru samanbundnar við vegum, bergholum, brúm og ferjusambandi, eru Suðuroyggin og Sandoyggin tær oyggjar, ið ikki eru so lættar at binda saman við hinar oyggjarnar. Vert er at kanna um møguleikar eru fyri at landið ognar sær ein helikoptara, ið tekur 10 - 15 ferðafólk. Flúgvast kann eisini til útoyggjarnar, sum annars ikki nýta gott av sambandinum við hinar oyggjarnar.

Ein ella tveir helikoptarar vórðu so eisini tøkir til hjálp av sjóverjuni, ið lað nýggja sjóverjuskipið skal reka.

---

23. Ymsar ríkislógir

Ár 1974, týsdagin 22. august, var framlagt gjøgnum landsstýrið skriv frá ríkisumboðsmanninum um at seta í gildi fyri Føroyar lóg nr. 104 frá 20. mars 1970 um «Fondet til fremme af teknisk og industriel udvikling» ið verður lýst at galda í Føroyum. Landsstýrið viðmælir.

F.L. j. nr. 508-3 og 1223-1

Brævið var víst í lógarnevndina, sum 2. september legði fram soljóðandi

Álit

Ríkisumboðsmaðurin hevur spurt, um heimastýrið hevur nakað at viðmerkja til, at lóg nr. 104 frá 20. mars 1970 um «Fonden til fremme af teknisk og industriel udvikling» verður lýst at galda fyri Føroyar.

Landsstýrið hevur lagt málið fyri løgtingið við viðmæli og hevur tingið beint málið í lógarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið. Upplýst er fyri nevndini, at umsóknir eru frá Føroyum til henda grunn, men av tí at lógin ikki er lýst at galda fyri Føroyar, eru umsóknirnar ikki viðgjørdar.

Eisini hevur landsstýrið lagt fyri løgtingið fyrispurning frá ríkisumboðsmanninum um heimastýrið hevur nakað at viðmerkja til, at lóg nr. 3 frá 14. juni 1974 «Om indfødsrets meddelelse» verður lýst at galda fyri Føroyar.

Málið er av løgtinginum beint í lógarnevndina, ið hevur viðgjørt málið. Nevndin er samd um at mæla tinginum til at gera hesa

t i n g s a m t y k t

Lóg nr. 104 frá 20. mars 1970 um «Fonden til fremme af teknisk og industriel udvikling» og lóg nr. 3 frá 14. juni 1974 «Om indfødsrets meddelelse» verða lýstar at galda fyri Føroyar.

2. viðgerð 4. september.

Uppskotið samtykt við 24—0 atkvøðum.

24. Uppskot til løgtingslóg um keyp av skipum til farleiðina Tórshavn-Skálafjørð

Av 1974, mikudagin 4. september, legði Atli Dam, løgmaður, fram

Uppskot

til

løgtingslóg um keyp av skipum til farleiðina Tórshavn - Skálafjørð.

§ 1.

Landsstýrinum er heimilað landskassans vegna at taka upp neyðug lán til keyp av teim gøgnum loyvishavarin í løtuni nýtir á farleiðum Tórshavn - Skálafjørðin.

Lánini mugu ikki fara upp um kr. 2.500.000,-.

§ 2.

Henda lóg fær gildi beinan vegin.

lagtingslov om køb af skibe til ruten Tórshavn - Skálafjørð.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at optage nødvendige lån til køb af det materiel, koncessionsindehaveren for nærværende benytter på ruten Tórshavn - Skálafjørðin.

Lånene må ikke overstige kr. 2.500.000,-.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Samráðingar hava verið millum Thorshavns Mælkeforsyning & Margarinefabrik og landsstýrið um støðuna aftaná at «koncessións»tíðin hjá T. M. & M. er útlopin 1. september 1974.

Sambært loyvislreytirnar hevði hitt almenna eina ávísa skyldu at taka yvir tey skip og gøgn, nýtt hava verið á rutuni.

Um fingið vil taka undir við keypi fyri tann pris nú er vorðin semja um, ætlar T. M. & M. ikki at halda fram á rutuni, og felagið hevur heldur ikki havl áluga fyri at átaka sær skyldur at halda fram fyri eitt heilt «koncessións» tíðarskeið afturat.

F.L. j. nr. 1800-40. — Sí Ll. nr. 75/1974.

Landsstýrið metir at tað er beint at taka yvir rutuna nú heldur enn um eini tvey trý ár og mælir tí tinginum til at geva loyvi til umrødda keyp.

1. viðgerð 1. sept. Frávik frá tíðarfrest.
   Málið var beint til 2. viðgerð uttan nevndarviðgerð.

2. viðgerð 4. sept.
   gr. 1 samtykt 25—0. Lógaruppskotið alt og at fara til 3. viðgerð samtykt við 25—0.

3. viðgerð 4. sept.
   Uppskotið sum samtykt við 2. viðgerð, nú endaliga samtykt við 25—0 atkvøðum.

LØGTINGSTÍÐINDI 1974

VETRARTINGSETAN

Løgtingssetanin o. a.

Ár 1974, hósdagin 5. des. vurð løgtingið sett.

Elsti tingmaður, Kjartan Frits Mohr úr Tórshavn, tók formannssessin. Hann lýsti, at Føroya løgting er sett eftir kunngerð frá løgmanni samsvarandi løgtingslóg um stýrisskipan Føroya í sermálum frá 13. mai 1948, við skrívi frá 25. nov. 1974.

Aldursformaðurin bað Finnboga Isaksen og Hilmar Bech vera fyribils skrivarar.

Aldursformaðurin bað síðani Jákup Lindenskov, Erlend Patursson og Hilmar Kass fyri norðara part, Jógvan Sundstein, Poul J. Olsen og Johs. Olsen fyri sunnara part av Føroyum kanna valbrøvini.

Aftaná at valbrøvini vóru kannað, setti Jákup Lindenskov fram uppskot um góðkenning av hesum valbrøvum og kanningum:

Hákun Djurhuus, Klakksvík.
Finnbogi Isaksen, Klakksvík.
J. Fr. Øregaard, Norðagøtu.
Jógvan Sundstein, Tórshavn.
Signar Hansen, Fuglafjørður.
Jógvan J. Olsen, Toftir.
Jógvan Durhuus, Vestmanna.
Agnar Nielsen, Vestmanna.
Haldor Hansen, Tórshavn.
Vilhelm Nielsen, Sandavági.

og sum cykavaldir:

Poul J. Olsen, Klakksvík.
Asbjørn Joensen, Klakksvík.
Johs. M. Olsen, Strendur.

Uppskot varð sett fram av Jógvan Sundstein um at góðkenna hesi valbrøv og kanningar:

Erlendur Patursson, Kirkjubø.
Jákup Lindenskov, Tórshavn.
Pauli Ellefsen, Tórshavn.
Óli Breckmann, Tórshavn.
Tórálvur Mohr Olsen, Sandur.
Heðin M. Klein, Sandur.
Atli P. Dam, Tvøroyri.
Jógvan Hilmar Bech, Porkeri.
Ove Mikkelsen, Vági.
Jákup Mortensen, Tvøroyri.

og sum eykamenn:

Kjartan Mohr, Tórshavn.
Hilmar Kass, Tórshavn.
Eliesar Arge, Tórshavn.

Hetta varð samtykt við 23 -0 atkvøðum.

Aldursformaðurin upplýsti, at javnaðarflokkurin hevur 7 tingmenn, tjóðveldisflokkurin 6, fólkaflokkurin 5, sambandsflokkurin 5, sjálvstýrisflokkurin 2 og framburðsflokkurin 1 tingmann.

Aldursformaðurin upplýsti, at tað ikki var hoðað frá nakrari samgongu til val av formanni og næstformanni, og tí átti javnaðarflokkurin sum størsti flokkur formannin, og varð **J. Fr. Øregaard** valdur til formann --- eftir uppskoti frá Poul J. Olsen.

Tjóðveldisflokkurin átti sum næststørsti flokkur, næstformannin, og varð Finnbogi Isaksen valdur eftir uppskoti.

J. Fr. Øregaard tók nú formannssessin.

Formaðurin bað um uppskot til tingskrivarar.

Eftir uppskoti frá Poul J. Olsen, varð Hilmar Bech valdur til 1. skrivara, og eftir uppskoti frá Erlendi Patursson varð Heðin Klein valdur til 2. skrivara.

Tingformaðurin bað nú tingmenn rópa eitt 9-falt hurrá fyri Margrethu II drottning og eitt 3-falt hurrá fyri Føroyum. Hetta varð gjørt.

Á fundi 27. februar las formaðurin upp skriv frá Kjartan Mohr, at hann vegna sjúku ikki kann møta á tingi og tí biður um at næsti maður, J. P. Sørensen tekur sæti á tingi fyribils.

Á fundi 28. febr. 1975 bað formaðurin tingmenninar Poul. J. Olsen,

Jógvan Sundstein og Jógvan Olsen kanna valbrøvini fyri summaru helvt av Føroyum, tá ið hetta varð gjørt, skjeyt Jógvan Sundstein upp, at **J. P. Sørensen**, ið var næsti maður á lista F í Suðurstreymi, fyribils fekk sæti á tingi fyri Kjartan Mohr. Hetta varð samtykt við 19—0. — 11. august 1975 boðaði formaðurin frá, at Kjartan Mohr aftur tók sæti á tingi.

19. mars 1975 vórn framlagd skriv frá

1) Jákup Lindenskov, landsstýrismanni, sum bað um at næst valda valevni á javnaðarlistanum kom á ting fyri seg,

2) Atla Dam, lagmanni, sum bað um, at næst valda valevni á javnaðarlistanum í Suðuroy kom inn fyri seg,

3) Finnboga Isaksen, sum bað um, at næsta valda valevni á tjóðveldislistanum í Norðuroyum kom inn á ting fyri seg.

Formaðurin bað tingmenninar Jógvan Sundstein, Poul J. Olsen og Jógvan Olsen um at kanna valbrøvini fyri summaru helvt av Føroyum, og tingmenninar Jákup Mortensen, Ove Mikkelsen og Hilmar Beck um at kanna valbrøvini fyri norðaru helvt av Føroyum.

Tá hetta var gjørt, skjeyt Jógvan Sundstein upp, at tingið samtykkir, at Jona Henriksen tekur sæti á tingi fyri Jákup Lindenskov, og at Sverri Midjord tekur sæti á tingi fyri Atla Dam.

Hetta varð samtykt við 20 - 0 atkvøðum.

Somuleiðis skjeyt Jákup Mortensen upp, at Johan Simonsen tekur sæti á tingi fyri Finnboga Isaksen.

Hetta varð samtykt við 22—0 atkvøðum.

20. mars 1975 fór fram nýval av næstformanni, valdur varð: **Håkun Djurhuus.**

6. mars boðaði formaðurin frá skrivi frá E. Paturssoni um farloyvi og at næsti maður á lista E í Suðurstreym, Kjartan Mørkøre, tekur sæti á tingi, meðan hann er burturstaddur.

7. mars skjeyt Jógvan Sundstein, eftir at hann saman við Poul J. Olsen og Johs. Olsen eftir áheitan formannsins høvdu kannað valbrøvini fyri summaru helvt, at Kjartan Mørkøre tekur sæti á tingi fyri E. Paturssoni. Hetta varð samtykt við 19—0.

7. apríl varð boðað frá at E. Patursson aftur hevur tikið sæti á tingi.

17. apríl var eftir uppskoti formannsins uttan atkvgr. givið loyvi til frávik fyri viðgerð av øllum tingmálum, sum koma fyri restina av vetrartingsetuni.

30. apríl varð vetrartingsetan endað.

Løgmaður fekk orðið, og takkaði hann fyri gott samarbeiði.

Formaðurin bað tingmenn eftir gomlum siði rópa eitt nýggju falt livi fyri hennara hátign drottningini og eitt trýfalt fyri Føroyum. Hetta varð gjørt.

Tinglókin varð upplisin og undirskrivað.

I vetrartingsetuni vóru 68 fundir og skráset vóru 76 tingmál.

Val av løgmanni og landsstýrismonnum

Ár 1975, leygardagin 11. januar, fór fram val av løgmanni.

Atkvøtt var við seðlum.

Atli **Dam** varð valdur til løgmann við 18 atkvøðum, 7 seðlar vóru blankir og Kjartan Mohr fekk 1 atkvøðu.

Ár 1975, leygardagin 11. januar, vóru eftir uppskoti frá løgmanni, hesir valdir við 17 atkvøðum fyri og ongari ímóti:

Jákup Lindenskov.
Finnbogi Isaksen.
Petur Reinert.
Demmus Hentze.
Dánjal P. Danielsen.

Nevndarval og val av álitismonnum og nevndum

FASTAR NEVNDIR:

Ár 1974, mikudagin 11. desembar fór fram val av føstum nevndum.

Formaðurin legði fram soljóðandi skriv:

«Sagt verður hervið frá, at Fólkaflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin ganga saman um val av nevndum.

Hákun Djurhuus. Hilmar Kass.

og

«Framburðsflokkurin og Tjóðveldisflokkurin eru fyri fyrst gingnir saman um val av nevndum og álitismonnum.

Kj. Mohr. E. Patursson.

Síðan vóru føstu nevndirnar valdar:

Figgjarnevnd.

Fastir limir: Finnbogi Isaksen, Kjartan Mohr, Hákun Djurhuus, Hilmar Kass, J. Fr. Øregaard, Atli Dam og Pauli Ellefsen.

Tiltakslimir: Jógvan Durhuus, Erlendur Patursson, Eliesar Arge, Asbjørn Joensen, Poul J. Olsen, Haldor Hansen og Johannes M. Olsen.

Landsstýrismálanevnd.

Ove Mikkelsen, Óli Breckmann og J. Fr. Øregaard.

Umsóknarnevnd.

Jógvan Durhuus, Wilhelm Nielsen, Hilmar Bech.

Nýval av figgjarnevnd.

Ár 1975, týsdagin 28. januar fór fram nýval av figgjarnevnd.

Formaðurin las upp skriv frá javnaðarflokkinum, tjóðveldisflokkinum og fólkaflokkinum, har flokkarnir siga, at teir eru gingnir saman til val av nevndum og álitismonnum.

Og skriv frá sambandsflokkinum, sjálvstýrisflokkinum og framburðs-

flokkinum, har teir boða frá, at flokkarnir eru gingnir saman um val av øllum nevndum og álitismonnum.

Valdir vóru:

Fastir limir: Jógvan Durhuus, Signar Hansen, Poul Jacob Olsen, Hilmar Bech, **Hákun Djurhuus**, Asbjørn Joensen, Pauli Ellefsen.
Tiltakslimir: Erlendur Paturssen, Ove Mikkelsen, Haldor Hansen, Tórálvur Olsen, Eliesar Arge, Hilmar Kass, Johs. M. Olsen.

Aðrar nevndir.

Fiskivinnunevnd (vald 12. des. 1974):
Poul J. Olsen, Ove Mikkelsen, Hákun Djurhuus, Jógvan Olsen, Vilhelm Nielsen (hesin seinasti í lutakasti millum hann og Tórálv Olsen og Jógvan Durhuus).

Á fundi 29. januar 1975 fór fram nýval av
Fiskivinnunevnd: Poul J. Olsen, Ove Mikkelsen, Signar Hansen, Vilhelm Nielsen, Jógvan Olsen.

Kommunalnevnd (vald 29. januar 1975):
Haldor Hansen, Jógvan Durhuus, Heðin Klein, Johs. M. Olsen Eliesar Arge.

Lógarnevnd (vald 29/1 - 1975):
Tórálvur Olsen, J. Fr. Øregaard, **Heðin Klein**, Agnar Nielsen, Eliesar Arge.

Skúlanevnd (vald 29/1 - 1975):
Hilmar Bech, Signar Hansen, Jákup Mortensen, Óli Breckmann, Vilhelm Nielsen.

Vega- og havnanevnd (vald 29/1 - 1975):
Haldor Hansen, Jógvan Olsen, Kjartan Mohr, Signar Hansen, Heðin Klein, Vilhelm Nielsen, Óli Breckmann.

Marknaðarnevnd (vald 29/1 - 1975):
Fastir limir: J. Fr. Øregaard, Poul J. Olsen, **Erlendur Paturssen**, Jógvan Olsen, Hilmar Kass, Hákun Djurhuus, Jógvan Durhuus.

Tiltaksmenn: Haldor Hansen, Tórálvur Olsen, Ove Mikkelsen, Pauli Ellefsen, Ashjørn Joensen, Eliesar Arge, Óli Breckmann.

Undir valinum mótmæltu Hilmar Kass, Kjartan Mohr og Pauli Ellefsen, at valið ikki fór fram sum í síðsta valskeldi.

Formaðurin upplýsti, at hann ikki hevði fingið nakra fráboðan, um at val av marknaðarnevnd skuldi fara fram á annan hátt enn fyriskipað í tingskipanini.

Ár 1975, mikudagin 29. januar varð framlagt:

Í sambandi við valinum av Marknaðarnevnd las formaðurin soljóðandi skriv.

Vegna at tað er noktað Framburðsflokkinum at fáa umboðan í Marknaðarnevndini, vil eg sum tingmaður flokksins mótmæla at sýtt verður flokkinum umboðan.

Framburðsflokksveljarar eru ein týðandi partur av Føroya fólki, ið krevja at verða umboðaðir í Marknaðarnevndini, har uttanríkismál verða viðgjørd.

Framburðsflokkurin á tingi hin 29/1 - 1975

Kjartan Mohr.

(Sí eisini løgtingstíðindi 1973 um val av marknaðarnevnd).

Norðurlanda ráðið, val av 2 limum og 2 tiltaksmonnum (valt var 29/1 - 1975):

Fastir limir: J. Fr. Øregaard, Pauli Ellefsen.

Tiltakslimir: Poul J. Olsen, Johs. M. Olsen.

Julemærkelegatet.

Á fundi 29/1 - 1975 var sum umboð í Julemærkelegatet valdur Jógvan Sundstein.

Skúlastjórn.

26. februar 1975 valdi løgtingið hesar limir í Skúlastjórnina:

Fastir limir: Petur H. Simonsen, Petur Eli Mikkelsen, Edmund í Garði.

Tiltakslimir: Leon Joensen, Óli Jákup Jacobsen, Steingrím Niclasen.

Menningargrunnurin.

26. februar 1975 fór fram val av 1 limi í menningargrunnin. Valdur varð: Ove Mikkelsen.

Sosiala nevndin (vald 12. mars 1975):

Ove Mikkelsen, Jákup Mortensen, Jógvan Sundstein, Tórálvur Olsen, **Hilmar Bech.**

24. mars boðaði javnaðarfl. frá at **Sverri Midjord** var valdur í sosialu nevndina ístaðin fyri Hilmar Bech. Sí Lm nr. 10/1974 — vetrartingsetan.

Sjúkrahússtýrini. 14. mars 1975 valdi løgtingið sum sínar limir í sjúkrahússtýrini:

Landssjúkrahúsið: Jákup í Jákupsstovu, Knút Wang, Trygve Samuelsen. Allir Tórshavn.

Suðuroyar sjúkrahús: Hans Hendrik Strøm, Gunnar Vestergaard, Tvøroyri, Andreas Djurhuus, Vági.

Klakksvíkar sjúkrahús: Álvheðin Jacobsen, Johan Simonsen, báðir úr Klakksvík. Obert Eliasen, Fuglafjørður.

Skattanevnd (vald 24. mars):

Hilmar Bech, Jona Henriksen, Johan Simonsen, Jógvan Sundstein, Agnar Nielsen.

Val av álitismonnum og nevndum (21. april 1975):

Løgtingsvalnevndir:

A. Suðurstreymoyar prestagjald:

F a s t i r l i m i r: Herman í Stórustovu, Trygvi Árting, Olaf Nielsen, allir úr Tórshavn.

T i l t a k s l i m i r: Niels Debess, Sune Jacobsen, báðir úr Tórshavn.

B. Norðstreymoyar prestagjald:

F a s t i r l i m i r: Heini Johansen, bankamaður, Vestmanna, Óla Chr. Debess, bóndi, Kollafjørður, Sámal J. Samuelsen, skipari, Haldórsvík.

T i l t a k s l i m i r: Gunnar Joensen, lærari, Hvalvík, Kjartan Nielsen, Vestmanna.

C. Eysturoyar sýsla:
Fastir limir: Ólavur Gregersen, Gøtu, Herluf Bertelsen, lærari, Fuglafjørður, Arnold Abrahamsen, lærari, Fuglafjørður.
Tiltakslimir: Sigfríður Vørðhamar, Fuglafjørður, Jens Vesturtún, Eiði.

D. Norðoya sýsla:
Fastir limir: Dánjal Nielsen, stjóri, Klakksvík, Sámal Christiansen, skrívari, Klakksvík.
Tiltakslimir: Einar Waag, stjóri, Klakksvík, Sylvan Jacobsen, fiskimaður, Klakksvík.

E. Vága sýsla:
Fastir limir: Eli Frederiksen, lærari, Miðvági, Hensar Ellingsgaard, lærari, Sørvági, D. Danielsen, lærari, Sørvági.
Tiltakslimir: Napoleon Petersen, lærari, Sørvági, Sverri á Steig, Sandavági.

F. Sandoyar sýsla:
Fastir limir: Mortan Mikkelsen, Sandur, Thomas P. Olsen, keypmaður, Húsavík, Hanus Johansen, bóndi, Sandur.
Tiltakslimir: Óli Danielsen, jarðabrúkari, Húsavík, Søren Sørensen, Húsavík.

G. Suðuroyar sýsla:
Fastir limir: Niels P. Nolsøe, lærari, Vági, Henning Jespersen, bedingsmeistari, Tvøroyri, Johan O. Djurhuus, fyrrv. skúlastjóri, Vágur.
Tiltakslimir: Jaspur Holm, skrivstovumaður, Tvøroyri, Árni Brattaberg, Vágur.

Grannskoðari í Føroya Sparikassa:
Løgtingsvaldur: Dánjal J. Kjærbo, Fuglafjørður.

Kirkjustjórn:
Løgtingsvaldir: J. Fr. Øregaard, Kjartan Mohr, Vilhelm Nielsen.

Skipafelagið Føroyar, í nevndina fyri: Tórálvur Mohr Olsen, Ove Mikkelsen.

P/F Skipafelagið Føroyar, Umboðsmaður á aðalfundi hjá:
Fastur limur: Martin Joensen, Hvítanes.
Tiltakslimur: Jákup Weyhe, yngri, Tórshavn.

Sjóvinnubankanum, sum umboðsmaður á aðalfundi hjá:
Fastur limur: Karstin Højgaard, Tórshavn.
Tiltakslimur: Kjartan Mørkøre, prestur, Tórshavn.

Menningargrunnur Føroya, í stýri fyri:
Fastur limur: Signar Hansen, løgtingsmaður.
Tiltaksmaður: Jeffrei Henriksen, skúlastjóri, Tórshavn.

Føroya Listasavn, í stýri fyri: Ottar Jacobsen, skúlastjóri, Tórshavn, Øssur Dam Jacobsen, Vestmanna, Flemming Samuelsen, Tórshavn.

Grønlandsfelagið P/F, í nevndina fyri, vóru løgtingsvaldir:
Fastir limir: J. Fr. Øregaard, P. H. Weihe, Sørvági, Frederik Hansen, Søldafjørður.
Tiltakslimir: Poul J. Olsen, Leon Joensen, Sørvági, Johan Simonsen, Klakksvík.

Flogsamband Føroya P/f, sum umboðsmaður á aðalfundi varð valdur: J. Fr. Øregaard.

Chr. X og drottning Alexandrines legat, løgtingsvaldur í nevndina fyri: Jógvan Sundstein.

Vanlukkutryggingarráðið, í nevndina fyri:
Fastir limir: Hanna Lisberg, læraríinna, Tórshavn, Frederik Hansen, Søldafjørður, G. L. Samuelsen, blaðstjóri, Tórshavn.
Tiltakslimir: Vilhelm Johannesen, postmaður, Klakksvík, Jógvan Durhuus, løgtingsmaður, Vestmanna, Leon Joensen, vrakari, Sørvági.

Yvirpolitirætturin, løgtingsvaldir vóru:
Fastir limir: Eliesar Arge, yvirlækni, Tórshavn og Sigurd Joensen, sakførari, Tórshavn.
Tiltakslimir: Jógvan Sundstein og D. P. Danielsen, Tórshavn.

Føroya Brunatrygging, í stýri fyri, løgtingsvaldir:
Fastir limir: Tórálvur Mohr Olsen, løgtingsmaður, Sandur, Johan Simonsen, løgtingsmaður, Klakksvík, Eiden Müller, blaðmaður, Tórshavn.

Tiltakslimir: Martin Joensen, Hvítanes, Villjálmur Paturs-son, Tórshavn, Andreas Olsen, Tórshavn.

Realkredittstovnurin, løgtingsvaldir:

Jógvan Durhuus, Vestmanna, Zacharias Müller, keypmaður, Porkeri.

Lønarráðið, løgtingsvaldir:

Fastir limir: Sverri Midjord, Tvøroyri, Jógvan Sundstein, Tórshavn, Ove Mikkelsen, Vágur, Pauli Ellefsen, grannskoðari, Tórshavn.

Tiltakslimir: Hilmar Beck, løgtingsmaður, Porkeri, Háknn Djurhuus, løgtingsmaður, Klakksvík, Johan Simonsen, løgtingsmaður, Klakksvík, Agnar Nielsen, løgtingsmaður, Vestmanna.

Útvarpsnevndin, løgtingsvaldir:

Fastir limir: Háknn Djurhuus, løgtingsmaður, Klakksvík, Haldor Hansen, løgtingsmaður, Tórshavn, Jona Henriksen, løgtingskvinna, Tórshavn, Ólavur Mikkelsen, lærari, Tórshavn, G. L. Samuelsen, blaðstjóri, Tórshavn.

Tiltakslimir: Per Hansen, Glyvrar, Herman Jacobsen, Tórshavn, Marita Petersen, Tórshavn, Jógvan Durhuus, Vestmanna, Benny Samuelsen, Tórshavn.

Deciónsnevndin (løgtingsgrannskoðarar):

Sverri Midjord, Erlendur Paturssen, Óli Breckmann, Jákup Mortensen.

Nevningagrundlistin, í nevndina fyri:

Suðuroyar sýsla: Áki Dimon, Tvøroyri, Dion Nolsoe, Vági, Dánjal av Rana, Trongisvágur, Poul Johs. Poulsen, Sumba, Ejler Djurhuus, Tvøroyri.

Sandoyar sýsla: Zacharias Stórá, Skopun, Niels á Reynatúgvu, Sandur, Mortan Mikkelsen, Sandur, Louis Eystberg, Skopun, Thomas P. Olsen, Húsavík.

Streymoyar sýsla: Grímur á Dul, stjóri, Tórshavn, Tórstein Grækarisson, Kvívík, Olga Paturssen, Kirkjubour, Albert Hansen, Tórshavn, Jafet Danberg, Tórshavn.

Vága sýsla: Thor Nielsen, skipari, Sandavágur, Joen J. í Horni, skipari, Sandavágur, Frits Jacobsen, Sorvágur, Gudmund Nielsen, Miðvágur, Sigmund Frederiksen, Miðvágur.

Eysturoyar sýsla: Óli Fr. Olsen, Leirvík, Amundur Bertelsen, Strendur, Sofus Thomsen, Glyvrar, Poul Martin Joensen, Fuglafjørður, Karl D. Joensen, Lamba.

Norðuroyar sýsla: Hans A. Jacobsen, Klakksvík, Amaliel Hansen, Klakksvík, Ragnar Samuelsen, Klakksvík, Bjarti Højbro, Klakksvík, Sámal Christiansen, Klakksvík.

Húsalánsgrønnurin:

Hilmar Beck varð valdur fyri J. P. Thomassen, sum er deyður.

---

1. Fíggjarløgtingslóg 1975/76

Ár 1975, hósdagin 6. februar, legði Dennnus Hentze, landsstýrismaður, fram

Uppskot

til

fíggjarløgtingslóg fyri fíggjarárið 1975/76
finanslagtingslov for finansåret 1975/76.

Uppskot landsstýrisins í løgtingsmáli nr. 1/1974: Fíggjarløgtingslóg 1975/76 verður endurnýggjað við hesum broytingum og uppískoytum:

§/rakstrarstað/konto		kr.
1) § 1/0010	: Vanligur landsskattur ..... Sædvanlig landsskat	114.000.000
2) § 1/0010	: Sjómansskattur ..... Sømandsskat	4.000.000
3) § 2/0100	: Tollgjøld ..... Toldafgifter	142.000.000
4) § 3/0201	: Stuttleikagjøld (viðm.) ..... Forlystelsesafgifter (anm.)	+ 300.000

Í viðmerking til § 3.0201 verður «Ein fjórðingur» broytt til: «Helvtin».	I anmærkning til § 3.0201 ændres «En fjerdedel» til «Halvdelen».

5) § 6/0145	: Postverkið ..... Postvæsenet	+ 1.000.000
6) § 10/510	: Løgting ..... Lagtingsbygning	1.209.500

F.L. j. nr. 400-20. Sí eisini løgtingslóg nr. 6/1975.

7) § 11/1101	: Landsskrivstova ..... Landskontor	2.468.000
8) § 11/1160	: Manntalsstova ..... Folkeregister	240.000
9) § 11/1215	: Gjaldstovudeild í Saltangará ..... Oppebørselsfilial i Saltangará	209.000
10) § 12/2010	: Landssjúkrahúsið (D.A.H.) ..... Landssygehuset (D.A.H.)	14.320.000
11) § 12/2020	: Klaksvíkar sjúkrahús ..... Klaksvík sygehus	3.526.000
12) § 12/2030	: Suðuroyar sjúkrahús ..... Suderø sygehus	2.062.000
13) § 12/2040	: Tuberklastøðin ..... Tuberkulosestationen	162.000
14) § 12/2090/3009:	Dálkingarkanning ..... Forureuingsundersøgelse	60.000
15) § 13/4	: Flogferðsla, í grunn ..... Flyvetrafik, henlagt i fond	1.500.000
16) § 13/5	: Strandfaraskip, í grunn ..... Kystskibe, henlagt i fond	2.000.000
17) § 13/7	: Studningur til kommunur til asfaltering, í grunn ..... Tilskud til kommuner til asfaltering, henl. i fond	3.000.000
18) § 14/2210	: Fólkaskúlin og HF ..... Folkeskolen og HF	19.240.000
19) § 14/2290/3113:	Studningur til ferðir innanoyggja .. Tilskud til indenøs rejser	400.000
20) § 14/2295/3121:	Lærlingar ..... Lærlinge	400.000
21) § 14/2295/3127:	Skúlabarnaferðir innanoyggja ..... Skolebørns rejser indenøs	150.000
22) § 14/2295/3130:	Ítróttar- og skúlabyggigrunnur .... Idrets- og skolebyggefond	4.000.000
23) § 15/2375	: Fróðskaparsetur Føroya ..... Færøernes Akademi	2.327.000
24) § 16/2490/3301:	Minstaløn og annar stuðul til fiskivinnuna ..... Mindstetøn og anden støtte til fiskerierhvervet	25.000.000
25) § 16/2490/3305:	Laksa- og sílaaling ..... Lakse- og ørredrift	300.000

26) § 16/2490/3307: Praktiskar fiskiroyndir 500.000
Praktiske fiskeriforsøg

Viðmerkingar:

Lýsing av teimum ymsu broytingunum og uppískoytum:

ad 1: Vanligur landsskattur.
Enn fyriliggur ongin meting frá kommununum um skattainntøkuna í farna ári, men við óbroyttari skattalóg og við sama inntøkuvøkstri sum árini frammanundan verður landsskatturin mettur at geva umleið 114 mió. kr.

ad 2: Sjómansskattur.
Sjómansskatturin gevur í 1974/75 3,8 mió. kr. og verður mettur at geva 4 mió. kr. í komandi ári.

ad 3: Tollur.
Tollgjøldini koma í 1974/75 væntandi at geva 135 mió. kr. og verða í uppskotinum mett til 142 mió. kr.

ad 4: Stuttleikagjøld.
Nú verður ¼ av stuttleikaskattinum lagdur í serligan grunn til ymisk mentunnarendamál. Studningur úr hesum grunni hevur verið veittur til ungdómshús og sjónleikarhús og tá tørvurin er vaksandi verður skotið upp, at helvtin av stuttleikaskattinum verður lagdur í henda grunn. Samlaði stuttleikaskatturin verður mettur til 600.000 kr.

ad 5: Postverkið.
Landsstýrið hevur viðtikið at fremja yvirtøkuna av postverkinum skjótast gjørligt og verður hallið í komandi fíggjarári mett til 1 mió. kr.

ad 6: Løgtingið.
Í grunn til bygging av løgtingshúsi eru avsettar 1,5 mió. kr. og verður skotið upp at lækka talið til 1 mió. kr. Í grunninum vera tá umleið 7 mió. kr.

ad 7: Landsskrivstovan.
Talið er hækkað við 150.000 kr. til sakkona hjálp.

ad 8: Manntalsstovan.
Uppskotið um at avseta 300.000 kr. til EDV-viðgerð er strøkin, tá fyrireikingarnar til EDV-viðgerðina skulu gerast av fólki, sum nú starvast á manntalsskrivstovuni.

ad 9: Gjaldstovudeild í Saltangará.
Gjaldstovudeildin hevur tikið aftur umsókn sína um setan av einum skrivstovufólki, og verða harvið spardar 42.000 kr.

ad 10-13: Sjúkrahúsini.

Í mun til uppskotið á ólavsøku eru avsettar sum meirútreiðslur:

Landssjúkrahúsið	kr.	1.243.000,00
Klaksvíkar Sjúkrahús	—	701.000,00
Suðuroyar Sjúkrahús	-	162.000,00
Tuberklastøðin	- -	18.000,00

ad 14: Dálkingarkanning.

Peningurin 60.000 kr. er ætlaður at nýta til kanningar av hvørja ávirkan náttúrudálkingin hevur havt á føroyskar matvørur, t.d. fugl, egg, spik, og fyrst og fremst fyri kviksilvur og DDT. Danskur vísindastovnur veitir eina tilsvarandi peningaupphædd.

ad 15: Flogferðslu.

Leingjanin av flogvøllinum í Vágum er metta at kosta umleið 17 mió. kr. harav landskassin skal rinda helvtina. Skotið verður tí upp at hækka játtanina við 1 mió. kr. til 1,5 mió. kr.

ad 16: Strandferðslan.

Arbeitt verður við málinum um útvegan av størri skipi til Suðuroyarsiglingina. Mælt verður til at hækka játtanina við 1 mió. kr. til 2 mió. kr.

ad 17: Asfaltering av kommunalum vegum.

Eftir uppskotinum er studningurin til kommunurnar til asfaltering av vegum settur til 2 mió. kr. móti 4 mió. kr. í fíggjarárinum 1974/75. Skotið verður upp at hækka játtanina til 3 mió. kr.

ad 18: Fólkaskúlin.

Landskassans partur av útreiðslunum til HF-skeið í Norðoyum og Suðuroy verða mettar til 400.000 kr. í komandi fíggjarári, og haraftarat er játtanin hækkað við 950.000 kr. vegna dýrtíðarhækking av læraralønunum.

ad 19-21: Ymsir studningar.

Studningurin til ítróttarferðir og skúlabarnaferðir er hækkaður við ávikavist kr. 270.000 og kr. 80.000 fyri at lúka tørvin. Studningurin til lærlingar er lækkaður við 100.000 kr. til 400.000 kr. og verður, síðani reglurnar um studning frá SU komu í gildi, at nýtast sum ferðastudningur og sum studningur til lærlingar, sum ikki hava fingið studning frá SU.

ad 22: Skúlahyggigrunnurin:

Talið er hækkað við ½ mill. kr. Eftir yvirliti til studningar, sum koma til útgjaldingar í komandi fíggjarári, er henda hækking neyðug.

ad 23: Fróðskaparsetrið.

Til kanningar viðvíkjandi komandi hægri útbúgving í Føroyum vórðu í seinasta fíggjarári játtaðar 170.000 kr., men vera neyvan brúktar meira enn 10.000 kr. í hesum fíggjarári. Til kanningar í

komandi figgjarári verður skotið upp at játta 60.000 kr. umfram 20.000 kr. til flutningsendurgjald til lærarar, ella tilsamans 80.000 kr. eyka.

ad 24: Lønjavning v.m.
Talið er hækkað við 13 mió. kr.

ad 25: Laksauling.
Skotið er upp at hækka játtanina við 250.000 kr. til p/f Sílaaling at gera byrgingarnar á Oyrabakka lidnar fyri.

ad 26: Fiskiroyndir.
Landsstýrið er av tí áskoðan, at farast má undir at stuðla royndir um okkara leiðir eftir øðrum enn teimum fiskasløgum, sum vit higartil hava veitt.

Aftrat omanfyri tilskilaðu hækkingum koma hækkingar av landskassalónum pr. 1. apríl 1975 orsakað av prístalshækking. Hesar verða mettar til 1,1 mill. kr.

Samlaðu meirútreiðslurnar verða sostatt umleið 21.438.000 kr., meðan meirinntøkurnar verða mettar til 21.400.000 kr.

Sum tað sæst av hesum nýggja uppskoti til figgjarlóg fyri 1975/76 er her ein hækking í útreiðslum við um 21 mill. krónum í mun til uppskotið hjá fyrra landsstýrinum á ólavsøku. Av hesum útreiðslum liggur tann nógv størsta hækkingin í kontoini: Minstaløn og annar stuðul til fiskivinnuna við kr. 13 mill., soleiðis at henda konto nú stendur við einari samlaðari upphædd uppá kr. 25 mill. At henda upphædd fer at halda í komandi figgjarári, torir landsstýrið við vissu ikki at siga í løtuni, tí beint nú sigla vit inn í eina krepputíð fyri mesta partin av fiskiflotanum við teimum lækkandi prísunum á fiski og fiskavørum. Tað er longu ivasamt, um landskassin kann bera tær øktu útreiðslurnar uttan at gjørdar vera inntøkulógir at rinda hesar meirútreiðslur, men givið er, at um tað undir figgjarnevndarviðgerðini fram móti 1. apríl vísir seg átroðkandi neyðugt at koma fiskiveiðuflotanum og fiskimonnum á møti við at hækka nevndu 25 mill. enn meira, verður neyðugt hjá landsstýrinum at skapa inntøkur fyri hesi hækking við t.d. toll- og avgjaldshækkingum. Landsstýrið fer í sínum figgjarpolitikki í teimum førum, har tað letur seg gera, at haldi aftur í útreiðslum hjá tí almenna, um hetta gerst neyðugt. Sum vit vita er ein stórur partur av játtanum lógbundnar útreiðslur, meðan eitt vist tamarhald kann havast á øðrum útreiðslu-

postum. Leggjast skal tó aftrat, at tað dapra útlit fyri fiskivinnuna, sum er í løtuni, kann broytast aftur til tað betra, tá vit koma longur út á árið.

Sí skjal 2 A

1. viðgerð 11. februar og málið beint í figgjarnevndina, sum 24. mars legði fram soljóðandi

Álit

6. februar 1975 endurnýggjaði sitandi landsstýri á tingi tað figgjarløgtingslógaruppskotið, ið fráfarna landsstýrið legði fyri løgtingið 6. august 1974, men við uppískoytingum og broytingum.

Samlaðu meirútreiðslur av hesum uppískoytingum og broytingum vóru slakar 21,5 milj. kr., so figgjarløgtingslógaruppskotið frá landsstýrisins hond kom at verða stívar 271,1 milj. kr.

Undir 1. viðgerð av málinum 11. og 12. februar gjørdu løgtingsmenn vart við upphæddir, ið teir hildu, vóru settar ov lágt, og málsøki, hvr meira rívan burdi verið tikið til. Tó vóru tað eisini røddir, ið manaðu til varsemi, sum figgjarútlitini vóru júst nú.

1. viðgerðin endaði við, at málið varð beint í figgjarnevndina.

Vanligt hevur verið, at stór tøl eru komin aftrat undir figgjarnevndarviðgerðunum, og var tað figgjarnevndini greitt, at slík tøl eisini undir hesi figgjarnevndarviðgerð vildu gera vart við seg, men var tað ein sannd figgjarnevnd, ið hevði ta áskoðan, at sum tíðirnar vóru, var tað neyðugt, at figgjarnevndin «stakk fingurin í jørðina» viðvíkjandi figgjarútlitunum í nærmastu framtíð og fekk sær vissar upplýsingar av týdningi frá komum monnum, ið skuldu havt føling av «pulsinum» í vinnu- og figgjarmálum, áðrenn nevndin fór undir nakra endaliga talviðgerð, men aftaná at øll tøl, skjøl og fylgiskjøl viðv. figgjarløgtingslógaruppskotinum vóru gjøgnumgingin.

Samhært áðurnevnda sjónarmið vóru hesir fundir hildnir:

1. fundurin saman við Jóhan K. Joensen, Sólbjørn Jacobsen og Sofus Olsen, limir í búskaparráðnum,
2. fundurin saman við Birgir Danielsen, stjóra á Føroya Fiskasølu,
3. fundurin saman við bankastjórnum Rasmus Olsen, Sjóvinnubankanum, og Esbern Simonsen, Føroya banka,

4. fundurin saman við statsaut. grannskoðara Carl Vilhelm Weihe og skipara Ejler Jacobsen.
5. fundurin saman við Demmus Hentze, landsstýrismanni í fíggjarmálum og Nicodemus Rasmussen, stjóra á Føroya gjaldstovu,
6. fundurin saman við Demmus Hentze og statsaut. grannskoðara Carl Vilhelm Weihe.
7. fundurin saman við Jógvan Sundstein, landsgrannskoðara.

Tað, fíggjarnevndin vildi hava at vita, var:

Hvussu mun sóu upp á fíggjarvánirnar fyri føroyska búskapin í komandi fíggjarári og teirra meting av fíggjarligu heriorku okkara í komandi fíggjarári viðvíkjandi skatti og tolli.

Niðurstøðan av tí,ið sagt varð, var í stuttum heuda:

Vit koma at standa munandi fíggjarliga veikari í komandi fíggjarárinum,ið vit nú fara inní, enn í tí, vit fara útúr.

Útlit er fyri fallandi exporti, bæði í bruttomongd og krónum.

Útlit er ikki bara fyri trongstøðu hjá vinnumi, meu trongstøðan er longu ein veruleiki hjá parti av henni.

Lívreimin hjá tí almenna og einstaka í forbrúki má tí spennast inn, samstundis sum tørvur verður fyri kapitali, um ikki ólag og bráðsteðgur skal koma í hjól í samfelagsgonguverki okkara við óhugnaligum avleiðingum.

Sum væntað kommu stór miljóntøl at gera vart við seg undir fíggjarnevndarviðgerðini, miljóntøl,ið skulu verða tikin við, men tá fíggjarnevndin metti fíggjarligu støðuna so hættisliga, var ikki rúm fyri slikum tølum á fíggjarløgtingslógaruppskotinum, uttan so, at nógvastaðni mátti skarvast burturav, og varð hetta gjørt av eini sanduri fíggjarnevnd.

Meirilutin í fíggjarnevndini (Hákun Djurhuus, Hilmar Beck, Poul J. Olsen, Jógvan Durhuus og Signar Hansen) metir aftaná, at fíggjarnevndin hevur havt samráðing við líkningarráðið og gjaldstovuna:

at **samlaðu inntøkurnar** á landsstýrisins fíggjarløgtingslógaruppskoti kunnu verða settar til kr. 269.843.000,ið geva kr. 716.275 í vinningi.

Tá er í landsstýrisins inntøkuuppskoti:

§ 1/0010: Vanligur landsskattur mettur at geva 1 milj. kr. meira.
§ 1/0070: Sjómansskattur mettur at geva 1,6 milj. kr. meira.
§ 1/0095: Fólkapensjónsskattur mettur at geva 1,8 milj. kr. meira
§ 2/0100: Tollgjøld mett at geva 5,05 milj. kr. minni, og
§ 7/0501: Partur av avlopi danska tjóðarbankans mett at geva 1,5 milj. kr. meira.

Sum gjørt vart við, máttu stór miljónbeløb inn á útreiðslusíðuna í landsstýrisins fíggjarløgtingslógaruppskoti, ið vístu eina útreiðsluupphædd uppá um 271,1 milj. kr. uttan hesi miljónbeløb.

Neyðugt hevur tí verið at gjørt broytingar í útreiðslugreinunum fyri at fáa hesar miljónupphæddir inn uttan at hækka samlaðu útreiðsluupphæddina uppá kr. 269.126.785, sum er stiv miljón kr. minni enn uppskot landsstýrisins.

Broytingarnar á útreiðslusíðuni í mun til landsstýrisins uppskot eru hesar:

§ 10. Løgtingið.

Greinin sett til 2.884.000 kr., er lækkað við 265.000 kr.

Broytingarnar eru hesar:

501 løgtingið lækkað við 250.000 kr.

525 nýggj konto: indeksyvirlit (løgtingstíðindi) 35.000 kr.

Ætlanin er at gera indeksyvirlit viðvíkjandi løgtingstíðindum fyribils aftur til 1947.

530 grannskoðan lækkað við kr. 50.000.

Jógvan Sundstein, landsgrannskoðari metir ta eksterna grannskoðanina at kosta umleið kr. 40.000 og ta interna til 230.000 kr.

§ 11 Landsfyrisitingin:

Greinin sett til 17.251.000 kr. er lækkað við 971.000 kr.

Broytingarnar eru hesar:

1001: Upphæddin økt við 152.000 kr. Talið á landsstýrismonnum í uppskoti landsstýrisins var bara 5.

1150: Upphæddin lækkað við 100.000 kr. Setan av fólki verður steðgað.

1240: Upphæddin lækkað við 347.000 kr. Kontoin sett í fasta rammu.

1301: Kontoin lækkað við 179.000 kr. og sett í fasta rammu.

1270: Kontoin lækkað við 51.000 kr. og sett í fasta rammu.

1280: Kontoin lækkað við 100.000 kr. og sett í fasta rammu.

1295: Kontoin lækkað við 46.000 kr. og sett í fasta rammu.

Orðalagið «sett í fasta rammu» merkir her og aðrastaðni, har það er nýtt, at stovnarnir ikki í sínum peningabrúki kunnu fara út um hesa rammur.

§ 12 Heilsumál:

Greinin sett til kr. 22.655.725 er lækkað við kr. 1.716.725.

Broytingarnar eru hesar:
2010: Landssjúkrahúsið er hækkað við kr. 1.303.750.
2020: Klaksvíkar sjúkrahús hækkað við kr. 288.000. *)
2030: Suðuroyar sjúkrahús hækkað við kr. 324.975.

Sambæri upplýsingar frá sjúkrahússtjóra J. Djurhuus eru hesi tølini normalbudget. Herí eru sostatt ikki roknaðar ætlanir frá yvirlækninum um serstakar íleggingar og rakstrarkostnaðir til ávísar deildir, men ein øyrnalækni er tikin við. Í normalbudget er íroknað prístalslækking + kr. 400.000 til røntgentól (ein gjalding uppá kr. 400.000 av samlaðum keypi kr. 1.200.000).

*) Til keyp av røntgentólum soleiðis, at sjónemu kunnu verða lungakannaðir á sjúkrahúsinum í Klaksvík og á Tvøroyri, eru settar kr. 175.000 til hvørt sjúkrahúsið.

2050: Læknar, lækkað við kr. 200.000.

§ 13 Samferðslumál:
Greinin sett til kr. 67.200.000, lækkað við kr. 2.600.000.
Broytingarnar eru hesar:
1. Nýggir vegir og hýr, breiðkan av brúm og umsiting av vegum (viðm.) er lækkað við kr. 4.600.000.
2. Havnagerð í grunn er lækkað við kr. 1.500.000.
3. Lendingar í grunn er lækkað við kr. 1.000.000.
5. Strandfaraskip í grunn er hækkað við kr. 6.000.000.
6. Berghols- og brúgvagerð er lækkað við kr. 2.000.000.
7. Studningur til kommunur til asfaltering er hækkað við kr. 500.000.

Sambært keypssáttmála viðvíkjandi nýggjum strandfaraskipi um fallstíðir fyri rentur og avdráttir í fíggjarárinum 1975/76 eru tølini hesi:

Rentukostnaður kr. 1.380.000 verður settur undir § 5, lániskuld kr. 20.100.000 verður sett undir § 41. Avskrivingar 2,8 milj. kr. verða settar undir § 25, avdráttur kr. 4.020.000 + avskriving 2.800.000 kr. = 1.220.000 kr. verða settar undir § 24.

Berghols- og brúgvagerð fær lut av rakstraryvirskoti landskassans, tá fíggjarársuppgerðin er lokin.

Løgmaður hevur upplýst á fundi, at yvirskotið 1974/75 verður 40/50 milj. kr.

Fíggjarnevndin metir talið til 30 milj. kr., í lut til § 13 sostatt ein triðing harav.

§ 14 Skúlamál:
Greinin sett til kr. 32.755.000 er lækkað við 702.000 kr.
Broytingarnar eru hesar:
2220: er lækkað við kr. 152.000.
3116: er strokið
3130: er lækkað við kr. 500.000.
3132: er strokið
3145: er strokið

Í sambandi við hesa grein kann verða upplýst, at til dømis næmingarnir í Hoydølnu í fjør fingu umleið 1,7 milj. kr. frá Statens Uddannelsesstøtte.

§ 15 Vísind, bókmentir og list.
Greinin sett til kr. 8.632.000, er lækkað við kr. 349.000.
Broytingarnar eru hesar:
2310: lækkað við kr. 50.000.
2340: lækkað við kr. 99.000.
2375: lækkað við kr. 200.000.

§ 16 Fiskivinna, sigling o.t.
Greinin sett til kr. 37.548.000, er lækkað við kr. 4.250.000.
Broytingarnar eru hesar:
2430: Vaktar- og bjargingarskip, er lækkað við 250.000 kr.
3302: Studningur til grunnin til endurnýgging av skipaflotanum, er lækkað við kr. 4.000.000.
3306: Havrannsóknarskip í grunn, lækkað við kr. 500.000.
3307: Praktiskar fiskiroyndir, er hækkað við kr. 500.000.

Løgmaður hevur upplýst á fundi, at yvirskotið 1974/75 verður 40/50 milj. kr.

Fíggjarnevndin metir talið til 30 milj. kr., í lut til § 16 sostatt ein triðing harav.

§ 17 Landbúnaður og matrikulering.
Greinin sett til kr. 4.386.000 er lækkað við kr. 275.000.
Broytingarnar eru hesar:
2510: er lækkað við 150.000 kr.
2520: er lækkað við 30.000 kr.
3403: er hækkað við 80.000 kr.
3404: er lækkað við 300.000 kr.
3405: er hækkað við 200.000 kr.
3407: er lækkað við 50.000 kr.
3408: er lækkað við 25.000 kr.

§ 18 Handil, ídnaður o.t.
Greinin sett til kr. 5.457.000 er hækkað við kr. 1.272.000.
Broytingarnar eru hesar:
2705: er strokin, við kr. 228.000
3504: er hækkað við kr. 1.500.000

§ 19 Almenn forsorg.
Greinin sett til kr. 50.116.000, er hækkað við kr. 3.540.000.
Broytingarnar eru hesar:
2815 avsett til hækking av fólkapensjón og avlamispensjón kr. 3.500.000, løgt. nr. 22/1974
3684: er hækkað við kr. 40.000.

§§ 20, 21, 22 og 23 eru óbroyttar.
§ 24 Burturleggingar til avdráttir av lánum.

Greinin er sett til kr. 8.220.000.
2930 er hækkað við kr. 1.220.000

Aftrat uppskotinum 7 milj. kr. kemur viðvikjandi nýggjum strandfaraskipi munur millum avdrátt ..... kr. 4.020.000 og
avskriving ..... kr. 2.800.000

kr. 1.220.000

§ 25 Avskrivingar:
Greinin er sett til kr. 4.512.000 er hækkað við kr. 2.800.000.
Broytingin er hendan:
2940: er hækkað við avskriving 10% av nýggjum strandfaraskipi við kr. 2.800.000.

§ 26 Ymsar ognarútreiðslur, er óbroytt.

Sum tølini vísa, er nógv skarvað burturav innan vissar greinir, men tøl eru komin aftrat, ið hava etið upp fyri ein part burturavskarvingina.

Eitt steindur tó fast, og tað er, at samlaða talið ikki er vaksið undir fíggjarnevndarviðgerðini, men minkað.

Henda «skrift» á veggnum merkir, at fíggjarnevndin ikki heldur, at fíggjarvánir okkara kunnu bera sama vøkstur í fíggjarligum niðurgangstíðum sum í uppgangstíðum og roknar fíggjarnevndin við, at landsstýrið syrgir fyri, at leiðslurnar á teimum ymisku stovnum húsast so:

1. at løfini á fíggjarløgtingslógini verða hildin.
2. at arbeiðið verður gjørt fyri tær játtaðu upphæddir, ið samsvara við hvørt annað. (effektivisering).

Fíggjarnevndin er vorðin var við í fleiri førum útreiðshuupphæddir, ið verða nevndar úrtíðarløn.

Tað er fíggjarnevndarinnar áskoðan, at arbeiðið eigur at verða gjørt í arbeiðstíðini.

Samsvarandi tí, ið er ført fram í álitinum, mælir meirilutin (Hákun Djurhuus, Hilmar Bech, Poul J. Olsen, Jógvan Durhuus og Sigurd Hansen) løgtinginum at samtykkja viðlagda uppskot til fíggjarløgtingslóg fyri 1975/76.

Minnilutin (Paufi Ellefsen umboðandi Sambandsflokkin og Asbjørn Joensen umboðandi Sjálvstýrisflokkin) ynskir at gera hesar viðmerkingar:

Uppskot meirilutans til fíggjarlóg 1975/76 vísir kr. 269.843.000 og er sostatt hækkað við kr. 20.220.000 í mun til tað upprunaliga uppskotið, sum fráfarna landsstýrið legði fram 6. august 1974. Hetta er ein hækkan uppá 8%.

Serliga trý høvuðsmál hava almennan áhuga, nevniliga tollinntøkur, landsskattur og útreiðslur til loysn av tí kreppu, sum høvuðsvinna okkara er komin og sum útlit eru til fer at versna.

Tollinntøkur.

Fíggjarnevndin hevur havt drúgvar samráðingar við menn umboðandi ymiskar stovnar og virkisøkir fyri frá teimum at fáa upplýsingar og metanir um fíggjarligu útlitini fyri nærmastu framtíð.

Av samráðingunum framgekk heilt greitt, at allir hesir menn eru stúrnir okkara fíggjarviðurskiftum viðvikjandi.

Nýtslan fer at minka og førir hetta við sær fallandi tollinntøkur til landskassan.

Landsskattur.

Áliknaði landsskatturin fer væntandi at vera hampuliga stórur orsakað av, at hesin verður roknaður út frá inntøkunum í 1974. Allir kunnu tó vera samdir um, at tær inntøkur, sum skatturin skal gjaldast av – nevniliga inntøkan fyri 1975/76 hjá nógvum fer at verða vael lægri enn tilsvarandi inntøkur fyri 1974. Hetta vil bera í sær, at ein partur av skattinum ikki verður inngoldin rættstundis – at skattaeftirstøðurnar, sum longu nú eru nógv ov høgar, verða enn hægri.

Minnilutin er fegin yvir at hava luttikið í nevndu samráðingum við menn, sum, kønir hvør á sínum øki, hava givið virðismiklar upplýsingar, sum vátta, at ørsøk er til at vera varin.

Tað er tí serliga hugstoytt, at meirilutin ikki í størri mun hevur víst umhugsni, tá endalig støða var tikin til inntøknupphæddirnar tollur og landsskattur.

Tollurin skuldi verið lægri og skuldi verið avsett ein upphæð undir útreiðslum til fíggjan av vøkstrinum í skattaeftirstøðum.

Útreiðslurnar.

Minstaløn v.m.

Tann útreiðslunupphæddin, sum — javnber frammanfyri — hevur størstan áhuga, er innihildin í § 16 Minstaløn og annar stuðul til fiskivinnuna.

Núsitandi landsstýri økti hesa upphædd við kr. 13.000.000 í mun til upprunaliga uppskotið til fíggjarlógina 1975/76, og er hetta tal ikki broytt undir fíggjarnevndarviðgerðini. Hetta er eisini tann upphædd sum í minsta mun er viðgjørd. Minnilutin hevur einki fingið at vita um, hvussu menn eru komnir til vøksturin uppá kr. 13.000.000 og heldur einki um, hvussu tann fráboðaða heildarloysnin kemur at síggja út, ella hvat hon kemur at kosta.

Ferjan til Suðuroyar og millumlandasiglingina.

Í uppskoti meirilutans er innihildið undir útreiðslum kr. 13.100.000 viðvíkjandi ferjuni. Upphæddin er útreiðsluført undir greinunum 6; landsins stovnar, § 13 samferðslumál, § 24 avdráttir av lánum og § 25 avskrivingar. Meirilutin roknar í hesum við, at ferjan gevur positivt úrslit, áðrenn rentur og avskrivingar. Minnilutin roknar við, at skipið gevur hall og heldur sostatt, at ov lítið er útreiðsluført.

P/f Nordafar.

Allir flokkar á tingi hava givið tilsøgn um, at tað almenna stuðlar keypinum av tí parti av partapeninginum í p/f Nordafar, sum higartil hevur verið á útlendskum hondum. Í samband við viðgerðina av málinum legði landsstýrið fram kalkulation, sum vísir, at tað almenna fær veruligar útreiðslur uppá stívliga kr. 2.000.000 árliga. Minnilutin heldur, at hendu útreiðsla átti at verið tikin við í fíggjarlógina.

Um útreiðslurnar

kann annars sigast, at viðgerðin hevur verið drúgv og fyri sunnnar konti eisini gjøllig.

Aðrar konti, einstakar av heilt stórum týðningi hava lítla og onga viðgerð fingið.

Í fleiri førum hava verið framdir stórir niðurskurðir, og er kontoin, sum tað eitur í viðmerkingunum, sett í fasta rammu.

Summir av hesum niðurskurðum eru gjørdir uttan samráðingar við teir leiðarar, sum dagliga disponera yvir útreiðslunum, og hevur minnilutin varhugan av, at ikki allir hesir niðurskurðir í veruleikanum koma at halda.

Minnilutin hevur fört fram, at tað er neyðugt at skera niður almennu útreiðslurnar og er sostatt samdur við meirilutanum í flestu av teimum sparitiltøkum, sum innhildin í uppskoti meirilutans.

Sum tað framgongur av tí, sum frammanfyri er nevnt, er minnilutin sannførdur um, at inntøkuupphæddirnar í uppskoti meirilutans eru ov stórar og meðan fleiri týðandi útreiðsluupphæddir eru ov lágar.

Hóast uppskot meirilutans á pappírinum vísir eitt yvirskot uppá kr. 716.275, er talan eftir meting minnilutans um eitt veruligt hall.

Minnilutin hevur tí í fyrstu syftu kravt, at arbeitt varð víðari við tí fyri eyga at fáa veruliga javnvág á figgjarlógina og í aðru syftu at broyta uppskotið, soleiðis at veruliga hallið framgongur av figgjarlógaruppskotinum.

Samantikið kann sigast, at við teimum útlitum, sum eru fyri frammanbendir á, at tað áðrenn langt frálíður verður neyðugt at gera eina eykafiggjarlóg við munandi broytingum í mun til fyriliggjandi uppskot meirilutans.

Teir trupulleikar, sum samfelag okkara stendur yvir fyri verða torførir at loysa.

Tað vil altíð vera mark fyri, hvussu stórar og knappligar broytingar ein kann fremja í einum samfelag. Nevnda trupulleikar kunnu neyvan loysast eftir einum figgjarári.

Tað er neyðugt at gera loysnir við eitt sindur langur sikti. Á hesum oki átti meirilutin eftir lugsan Sambandsfloksins at broytt hugsunarhátt og tikið undir við ætlanini um gerð av tí langtíðarætlan, sum Sambandsflokkurin hevur kravt.

Umfram tær viðmerkingar, sum gjørdar eru frammanfyri, skal minnilutin gera viðmerkingar til nokur serstøk mál, og hevur minnilutin nokur broytingaruppskot til fyriliggjandi uppskot frá meirilutanum.

Í uppskotinum er sett av til hall av føroyskum postverki kr. 1.000.000. Fyri tað fyrsta er henda upphædd nógv ov lág, um postverkið verður yvirtikið. Pauli Ellefsen leggur aftrat, ta Sambandsflokkurin ikki er fyri at

fremja yvirtøkur, sum merkja stórar fíggjarligar byrðar fyri okkara samfelag.

Eisini er í uppskotinum avsett kr. 150.000 til kannan av, hvussu ein landsbanki skal setast á stovn. Hesum er Sambandsflokkurin ikki fyri.

Í nógvum plássum her á landi eru umstøðurnar hjá børnum vánaligar spæliplássum viðvíkjandi. Tey hava bert høvuðsvegir við stórari ferðslu at spæla á. Eftir tykki minnilutans er neyðugt at gera nakað á hesum øki.

Sum sagt fleiri ferðir fyrr verða stórir trupulleikar at vinna á innan vinnulívið. Tað er eftir okkara tykki neyðugt at avseta meira pening til stuðul til ídnaðarfyritøkur v.m.

Í samband við viðgerðina av sosiallógini hevur minnilutin ført fram, at neyðugt er at geva fyrst og fremst einkjum meiri hjálp. Her eigur at verða avsett ein upphædd longu í fyriliggjandi fíggjarlóg.

Byggingin av sethúsum er nærum steðgað orsakað av tørvandi financiering. Neyðugt verður at fáa pening uttani frá. Tílík financiering er væntandi dýrari rentu viðvíkjandi enn vanlig føroysk financiering. Minnilutin heldur tað vera neyðugt at seta pening av til rentustudning til fíggjan av sethúsum. Reglur eiga at verða gjørdar, sum tryggja, at hesin stuðul er so sosialt rættvísur sum gjørligt.

Í uppskoti meirilutans er avsett ein upphædd til kanningar av dálkan. Henda upphædd er ætlað til ávísa uppgávu, av hesum gjalda danir helmingin. Vit halda tað verða neyðugt at avseta nakað afturat til dálkingarspurningin í síni heild.

Út frá tí, sum frammanfyri er sagt, setur minnilutin (Pauli Ellefsen og Asbjørn Joensen) fram fylgjandi

Broytingaruppskot

til

meirilutans uppskot.

1. ad § 12/3008	Dálkingarkanning	60.000
	Fornreningsundersøgelse verður broytt til	100.000
2. ad § 13/8	Sum nýtt punkt Studningur til kommunur til gerð av frítíðarøkjum (spæliplássum) Tilskud til oprettelse af fritidsarealer (legepladser)	300.000

3. ad § 18/3504	Til menningargrunn	3.500.000
	Til udviklingsfond verður broytt til	4.000.000
4. ad § 19/3684	Fráhaldsfeløg	100.000
	Afholdsforeninger verður broytt til	200.000
5. ad § 19/ 2851	Sum nýtt punkt verður sett: Meirhjálp til einkjur v.m. Yderligere understøttelse til enker m.v. ..	300.000
6. ad § 19/ 3695	Sum nýtt punkt verður sett: Rentustudningur til figgjan av sethúsum Rentetilskud til financiering af beboelseshuse	500.000

Herumfrámt setur minnilutin (Pauli Ellefsen) fram fylgjandi:

Broytingaruppskot
til
meirlutans uppskot.

1. ad § 6/0145	Postverkið Postvæsenet ..... verður strikað.	÷ 1.000.000
2. ad § 11/1101	Landsskrivstovan Landskontoret	2.468.000
	verður broytt til	2.318.000

FIGGJARNEVNDIN, 24. mars 1975.

Hákun Djurhuus **Hilmar Bech** **Poul J. Olsen**
Jógvan Durhuus **Signar Hansen** **Pauli Ellefsen**
Asbjørn Joensen

2. viðgerð 25. mars. Frávik frá tíðarfrestini uttan atkvøðugreiðslu. Atkvøðugreiðslan fór soleiðis fram:

Fyrst varð atkvøtt um grein 10, sum varð samtykt við 24— 0 atkvøðum.

Grein 11: Broytingaruppskot frá Paula Ellefsen fall við 5—0 atkvøðum.
Grein 11 samtykt við 24—0 atkvøðum.
Grein 12 samtykt við 24—0 atkvøðum.
Broytingaruppskot til grein 13 fall við 8—0 atkv.
Grein 13 samtykt við 24—0 atkvøðum.
Greinarnar 14 til og við 17 samtyktar við 24—0 atkvøðum.
Broytingaruppskot til gr. 18 fall við 8—0 atkv.
Grein 18 samtykt við 24—0 atkv.
Broytingaruppskot til grein 19 - 2856, 3684, 3695, fullu við 8—0 atkv.
Grein 19 samtykt við 23—0 atkv.
Greinarnar 20 til og við 26 samtyktar við 24—0 atkv.
Greinarnar 30 til og við 46 samtyktar við 24—0 atkv.
Greinarnar 1 til og við 5: Inntøkur, samtyktar við 24—0 atkv.
Broytingaruppskot frá Paula Ellefsen til grein 6 - 0145 — fall við 6—0.
Grein 6 samtykt við 24—0 atkv.
Greinarnar 7 og 8 samtyktar við 24—0 atkv.
Uppskot formannsins, at málið í hesum liki fór yvir til 3. viðgerð, samtykt 24—0 atkv.

3. viðgerð 25/3.

Framlagt var broytingaruppskot frá Haldor Hansen, Jonu Henriksen, **Heðin Klein**, Johan Simonsen og Vilhelm Nielsen til grein 22 - 2580 varð samtykt við 14—0 atkv.

Uppskotið var soljóðandi:

f § 22: Aðrar og óvissar útreiðslur — verður sett undir

2910: Aðrar og óvissar útreiðslur:
Andre og uvisse udgifter:

2580: Studningur til politiska upplýsing v.m.
Tilskud til politisk oplysningsarbejde m.m.

«kr. 360.000,-» ístaðin fyri «kr. 200.000,-».

Fíggjarlógin so broytt endaliga samtykt við 23—0 atkv.

2. Reguleringar av fiskiveiðuni í Norður-Vestara Atlantshavinum (ICNAF)

Ár 1974, miðvikudagin 11. desember, legði Eli Nolsøe, landsstýrismaður fram soljóðandi:

Vísandi til § 3 í lóg nr. 210 frá 19. mai 1971 um «internationale reguleringsforanstaltninger» leggur landsstýrið fyri løgtingið at taka støðu til úrslitið frá 24. ársfundinum í millumlanda nevndini fyri Norður-Vestara Atlantshavið (ICNAF) við hesum viðmerkingum.

Ársfundurin varð hildin í Halifax, Kanada, í dagunum 4. - 14. juni 1974.

Av størsta týdningi vóru samráðingarnar um at seta hámarksveiðunøgdir fyri ymsar fiskastovnar, at seta loyvdar veiðunøgdir fyri linualondini og at betra eftirlitsskipanina hjá ICNAF.

Fiskifrøðingarnir høvdu frammanundan fundin einmælt samtykt at viðmæla, at hámarksveiðunøgdir vórðu settar fyri 55 fiskastovnar, fleiri av hesum stovnum eru tó sama fiskaslagið, men eru teir á ymiskum økjum. Við fáum undantøkum, har hámarksveiðunøgdin varð hækkað eitt sindur, vórðu tilmælini einmælt samtykt av nevndini.

Í øllum førum, bert lodnuveiða undantikin, samtykti nevndin eisini loyvdar veiðunøgdir fyri linualondini, tó í summum førum við einstøkum nei-atkvøðum. Veiðunøgdirnar fyri lodnu verða settar á eykafundi í januar mánaða 1975, nøgdirnar galda tó ikki fyri lodnu í grønlendskum sjógvi.

Eins og á 23. ársfundinum førdi Kanada fram, tá ið veiðunøgdirnar skuldu býtast, at Kanada sum strandaland í forbond átti at fáa so mikið til sín, sum tað hevur ella roknar við at fáa orku at veiða tað givna árið og ikki í mun til, hvat tað hevur veitt árini frammanundan. Frankarikið førdi fyri ein part sonnu sjónarmið fram, oyggjarnar Miquelon og St. Pierre hoyra undir Frankarikið. Eisini USA var av sonnu áskoðan fyri summara partin av konventiónsøkinum. Onnur lond, fjarfiskararnir, skuldu so býta tað, ið eftir var, og kundu t.d. nýta lykilin, at helvtin varð býtt í mun til veiðuna seinastu 10 árini og hin helvtin í mun til veiðuna seinastu 3 árini.

Í høvuðsdráttum varð býtt eftir nevndu sjónarmiðum.

Samlaða úrslitið er lagt við sum skjal 1.

Fyri Føroyar er tað so at siga bert reguleringin av toskaveiðuni, ið er av týdningi.

F.L. j. nr. 1519-2/74.

Talvurnar 1-11 á skjali 2 vísa, hvussu hámarksveiðunøgdirnar fyri tosk eru býttar millum londini í 1975. Til sammetingar eru sett veiðutølini fyri árini 1972 og 1973, og, um regulering hevur verið frammanundan, loyvdu veiðunøgdirnar í 1974.

Kort yvir konventiónsøkið er lagt við sum skjal 3.

Um toskaveiðuna undir Grønlandi er serliga at viðmerkja, at heildarveiðunøgdin fyri 1974 var sett til 107.000 t., í hesum tali er eisini veiðan uttanfyri konventiónsøkið, t.e. millum grønlendsku strondina og 3-fjórðingamarkið.

Á 1974-fundinum høvdu fiskifrøðingarnir skotið upp at seta heildarveiðuna so lágt sum 55.000 t. fyri at verja 1968-árgangin; hesin árgangur er í løtuni einasti árgangur, ið kann framleiða nýggjar árgangir, nóg stórir undir núverandi vána umstøðum.

Hámarksveiðunøgdin varð tó sett til 60.000 t., og veiðunøgd Danmarkar til 19.600 t., umframt tað, ið veitt verður millum 0 og 3 fjórðingar, mett til 9.000 t.

Avtalað varð í donsku sendinevndini ikki í forhond at býta veiðunøgdina millum Føroyar og Grønland, men partarnir skulu siga hvørjum øðrum frá, hvussu gongst við fiskiskapinum. Henda avtala er annars galdandi í øllum førum, har tað eru bæði føroysk og grønlendsk áhugamál.

Mótmælisfreistin er úti 11. januar 1975.

1. viðgerð 12. desember 1974 (uttan um dagsskránna) og málið beint í fiskivinnunevndina, sum 17. desember legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð við fyrstu viðgerð beint í fiskivinnunevndina.

Tað er einki at ivast í, at tær mongu reguleringarnar av fiskiskapinum á konventiónsøkinum føra við sær avmarkingar í fiskiskapi okkara á hesum leiðum. Tað er týðiligt, at rákið gongur tann vegin, at strandalondini kanna sær størri og størri part av fiskastovnunum, og minkar tá luturin hjá fjarfiskarunum, ímillum teirra føroyingar.

Hóast gongdin er henda, eigur í metingunum, tá ið hámarksveiðunøgd skal býtast millum lond, dentur eisini at vera lagdur á, hvønn týdning fiskivinnan hevur í landshúsarhaldinum í teimum ymisku londunum. Eitt land við fjølbroyttum vinnulívsmynstri, har fiskivinnan bert er ein partur av heildarmyndini, er betri ført at taka skerjingar í fiskiskapinum enn eitt land, har fiskivinnan ikki bert er álitið men lívstreytir. Føroyar er tað landið, sum fram um øll onnur sjálvt um vit taka Ísland við, er í hesari serstøðu. Landsstýrið eigur tí at greiða frá hesum umstøðum á øllum

fiskarifundum, har nomið verður við føroysk fiskivinnuáhugamál, at Føroyar hava ein serligan tørv, tá ið veiðunøgdir skulu býtast.

Av frágreiðingini hjá landsstýrinum framgongur, at øll limalondini hava samtykt at sela hámarksveiðunøgdir fyri teir fiskastovnar, talan er um, og við einstøkum undantøkum eisini er samd um, hvussu veiðunøgdirnar skulu býtast millum londini.

Fiskivinnunevndin setur fram fylgjandi

Uppskot
til
samtyktar

Vísandi til tað, ið fært er fram í álitinum tekur løgtingið til eftirtektar frágreiðing landsstýrisins í skrivi dagfest 29. november 1974 um reguleringar av fiskiveiðuni á Norður-Vestara Atlantshavinum (ICNAF) samtyktar á ársfundinum í Halifax, Kanada í døgunum 4. - 14. juni 1974.

FISKIVINNUNEVNDIN, 17. december 1974.

2. viðgerð 18/12 (Frávik frá tíðarfrest).

Uppskotið frá Fiskivinnunevndini samtykt við 21 - 0 atkv.

Sí eisini Skjal 9.

3. Reguleringar av fiskiveiðuni í Norður-Eystara Atlantshavinum (NEAFC)

Ár 1974, mikudagin 11. desember, legði landsstýrismaður, Eli Nolsøe, fram soljóðandi:

Vísandi til § 3 í lóg nr. 210 frá 19. mai 1971 um «internationale reguleringsforanstaltninger vedrørende fiskeri» leggur landsstýrið fyri løgtingið at taka støðu til úrslitið frá eykafundi í Hamborg í millumlanda nevndini fyri Norður-Eystara Atlantshavið (NEAFC) við hesum viðmerkingum:

Á vanliga NEAFC-ársfundiunum í Bonn í juni/juli 1974 varð samtykt at hava eykafund um regulering av fiskiskapinum serliga eftir toski á norður-arktiska økinum, frá 64° N og norður-eystureftir.

Eykafundurin varð hildin í Hamborg í døgunum 1. til 8. november.

Tað eydnaðist ikki at koma til semju um tílíkar reguleringar, málið varð tí skotið út til annan eykafund, sum verður í Bergen 13. til 15. januar 1975.

Onnur mál komu tó fyri á Hamborg-fundinum. Tey eru hesi:

1. **Regulering av veiðuni eftir toski, hýsu og hvítingi í Norðsjónum** (hagtølini IV).

   Bretland legði málið fram, tað hevur ikki verið fyri á fundi fyrr.

   Áðrenn fundin høvdu fiskifrøðingarnir kannað stovnarnar og kannað, um tað var neyðugt við reguleringstiltøkum. Teir mæltu til at seta hesar hámarksveiðumøgdir fyri árið 1975:

Toskur	230.000 tons	120.000 tons
Hýsa	260.000 tons	150.000 tons
Hvítingur	190.000 tons	110.000 tons

   Fyrra talrøð merkir ein fiskideyða á hædd við fiskideyðan í 1973 og onnur talrøð ein fiskideyða 50-60% í mun til 1973.

F.L.j.nr. 1504-3-2/74.

Úrslitið varð:

	Heildarveiða	Av hesum til Danmark
Toskur	236.000 tons	41.500 tons
Hýsa	275.000 tons	55.000 tons
Hvítingur	189.000 tons	82.000 tons

Heildarveiðan í meðal fyri tey trý árini 1971-1973 var fyri tosk 301.000 tons, fyri hýsu 225.000 tons og fyri hvíting 122.000 tons. Føroysk skip veiða tey trý fiskasløgini sum hjáveiðu í aðrari veiðu serliga í idnaðarveiðu eftir hvítingsbróður. Hagtølini, løgd fram á fundinum ganga aftur til 1964 og vísa fyri Føroyar:

	1969	1970	1971	1972	1973
Toskur	52	78	123	284	803
Hýsa	- -	- -	-	5	1.198
Hvítingur	- -	---	-	-	1.453

Áðrenn 1969, sum er fyrsta árið, har hvítingsbróður er millum hagtølini, hava vit eingi føl. At tølini eru so smá og ganga so stutt aftur í tíðina, kann skyldast, at hesi fiskasløgini nevndu ár og fyri ein part eisini tey seinru árini eru komin við í veiðutølini fyri hvítingsbróður.

Í teimum dansku hámarksveiðumøguleikunum eru Føroyar við í hesum tølum:

Toskur	800 tons
Hýsa	1.200 tons
Hvítingur	1.400 tons

Átta lond atkvøddu fyri reguleringsskipanini, meðan hini 7 londini (m.a. Danmark) onga atkvøðu góvu. Skipanin er sostatt samtykt.

2. **Regulering av veiðuni eftir reyðsprøku og tungu í Norðsjónum, Ermasundi, Bristol Sundinum og frska Sjónum.**

Í Norðsjónum varð úrslitið fyri 1975:

	Heildarveiða.	Av hesum í Danmark
Tunga	12.500 tons	600 tons
Reyðsprøka	126.000 tons	30.000 tons

Á hinum økjunum var eingin serkvota til Danmark. 11 lond atkvøddu fyri skipanina (m.a. Danmark), 1 land atkvødli ímóti og 3 atkvøddu ikki. Skipanin er sostatt samtykt.

Einasta veiðutalið Føroyar hava í árinum 1969-1973 er 1 tons av reyðsprøku í 1973 í Norðsjónum (hagtalsøkið IVa).

3. Regulering av sildaveiðuni í Keltiska Sjónum.

Heildarveiðan í 1975 varð sett til 24.000 tons. Eingin serkvota er til Danmark.

10 lond atkvøddu fyri (m.a. Danmark), 1 atkvøddu ikki, meðan Ireland vildi senda atkvøðu sína innan 1. december 1974. Skipanin er sostatt samtykt.

4. Regulering av makrelveiðu í Norðsjónum.

18. september 1974 var fundur í Oslo millum Danmark/Føroyar, Ísland, Noreg og Svøriki. Londini samtyktu at leggja fylgjandi uppskot viðv. hagtalsøkinum IIIa (Kattegat og Skagerak) og IV (Norðsjógvin fyri eykafundin í Hamborg:

a. Frá 1. januar til 1. juli 1975 kunnu samráðingarlondini fiska upp til 150% av veiðunøgdini sama tíðarskeið annað av árunum 1972 ella 1973, tó hægst 10.000 tons, Svøriki tó sonn nøgd sum Danmark. Øllum øðrum londum skuldi vera loyvt at fiska upp til 2.500 tons. Kvoturnar til samráðingarlondini vóru hesar:

Danmark	4.802	tons
Føroyar	8.586	tons
Ísland	2.500	tons
Noreg	10.000	tons
Svøriki	4.802	tons

b. Hjáveiða upp til 20% var loyvd í hvørjari landing.

c. Økið vestanfyri 0° norðanfyri 60° var undantikið.

Aftaná fundin møtti uppskotið mótstøðu frá norsku fiskivinnuni, mótstøðu ímóti at øll onnur lond høvdu loyvi at fiska 2.500 tons, Ísland skuldi tó hava loyvi at fiska hesa nøgd. Noreg broytti tí Oslo-avtaluna í samsvar við støðuna í Noreg og legði einsamalt uppskot fyri fundin. Eisini á fundinum var mótstøða frá fleiri londum, serliga tí at uppskotið var sent limunum so seint. Bretland var ímóti, at markið vestanfyri 0° gekk so langt suður sum á 60°. Fleiri lond, og tað vóru tey flestu, hildu, at reguleringarnar skuldu avmarkast til ídnaðarveiðu.

Noreg broytti síðani uppskotið til, at tað bert skuldi galda í ídnaðarveiðu eftir makreli, at markið norðureftir skuldi vera 60° bæði vestan-

og eystanfyri 0°, og at øll hini londini skuldu hava loyvi at fiska upp til 2.500 tons.

9 lond atkvøddu fyri, 2 atkvøddu ímóti (Danmark og Bretland) og 4 lond atkvøddu ikki. Skipanin er soslatt samtykt.

Makrelveiða Føroya fyrra hálvár 1972 og 1973 hevur verið:

	1972	1973
	5.400 tons	4.100 tons
av hesum til ídnað	3.200 tons	2.100 tons

5. **Mótmælisskipanin.**

Skrivarin hjá nevndini hevði frammanundan fundin gjørt vart við, at mótmælisskipanin, tær longu freistirnar, førir við sær, at tað tekur langa tíð at seta reguleringar í verk, tað er tíðum so, at mótmælisfreistin røkkur inn í reguleringstíðirnar.

Tað varð eisini greitt frá, at Holland eftir sini lóggávu ikki hevur heimild at seta reguleringstiltøk í verk, áðrenn mótmælisfreistin er úti, og kunnu tey ikki fáa afturvirkandi megi. Samráðst var um at styttta mótmælisfreistina við at broyta reglurnar í konventiónini. Eftir teimum royndum, ið eru, tekur tað tíð og langa lið at gera broytingar í konventiónini. Einki úrslit varð í so máta.

Tvey onnur uppskot, har tað ikki er talan um konventiónsbroyting, vórðu samtykt. Tey eru:

a. Um limalondini eimmælt á ársfundinum 1975 samtykkja hámarksveiðunøgd fyri sildaveiðu í Norðsjónum og býtið millum londini fyri tíðarskeiðið 1. juli 1975 til 30. juni 1976, verða hesi løl at standa við makt. Mótmælir kunnu ti ikki setast fram.

   Øll londini uttan eitt, sum ikki atkvøddi, atkvøddu fyri. Uppskotið er soslatt samtykt.

b. Viðvíkjandi samtyktunum undir punktunum 1 (toskur, hýsa og hvitingur í Norðsjónum), 2 (reyðsprøka og tunga í Norðsjónum og aðrastaðni) og 4 (makrelur) varð samtykt:

Øll limalondini skulu skrivliga og ikki seinri enn 20. december 1974, fyri makrel tó 15. december, siga skrivaranum frá, at tey treytað av, at øll hini londini gera tað sama:

1° ikki vilja mótmæla samtyktunum
2° ikki vilja nýta art 9 í konventiónini og
3° góðkenna, at samtyktirnar eru galdandi frá 1. januar 1975.

Einki land var ímóti.

Kort yvir part av konventiónsøkinum er lagt við.


80°
75°
70°
65°
75°
60°
45°
30°
60°
55°
50°
45°
XIV
IIa
IIb
IIIa
IIIb,c
IIId
IVa
IVb
IVc
Va
Vb
Vb1
Vb2
Via
Vib
VIIa
VIIb,c
VIIg,h,i,k
VIIIa
VIIIb
VIId,e
XII

1. viðgerð 17. desember 1974 og málið beint í Fiskivinnunevndina, sum 17. des. legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð við fyrstu viðgerð beint í fiskivinnunevndina.

Sum føroyskur fiskiskapur verður framdur á hesum leiðum, er tað samtyktin um regulering av makrelveiðunni, ið er av lýdningi.

Samtyktin hesum viðvíkjandi er tað betur fyri føroyskan fiskiskap enn avtalan frá Oslo-fundinum í september 1974, at hon bert umfatar makrelveiðu til ídnað, og at markið norðureftir ikki gongur longur enn til 60°.

Viðvíkjandi Føroya serstøðu í fiskivinnumálum og í spurninginum um býti av hámarksveiðunøgdini verður víst til viðmerkingarnar í álitinum í løgtingsmáli nr. 2/1974 (vetrarting): Reguleringar av fiskiveiðuni á Norður-Vestara Atlantshavinum (ICNAF).

Fiskivinnunevndin setur fram fylgjandi:

Uppskot
til
samtyktar.

Vísandi til tað, ið fært er fram í álitinum, tekur løgtingið til eftirtektar frágreiðing landsstýrisins í skrivi dagfest 4. december 1974 um reguleringar av fiskiveiðuni á Norður-Austara Atlantshavinum (NEAFC) samtyktar á eykafundi í Hamborg í dagunum 1. til 8. november 1974.

FISKIVINNUNEVNDIN, 17. december 1974.

2. viðgerð 18. des. uttan um dagsskráina. Frávik frá tiðarfrest.

Uppskotið frá Fiskivinnunevndini samtykt við 23—0 atkv.

4. Landsstýrismál

Ár 1974, 18. desember var framlagt landsstýrismál, avrit av Landsstýrisins gerðarbók 3. august 1973 — 22. juli 1974, eitt eintak til viðgerðar og eitt eintak til hvønn flokkin.

Málið var vist í **Landsstýrismálanevndina**, sum 10. april legði fram soljóðandi

Álit

Gerðarbók landsstýrisins gongur frá 3. august 1973 til 22. juli 1974. Í hesum tíðarskeiði hava verið 49 fundir og eru viðgjørd 231 mál. Prinsipmál av størri týdningi hava ikki verið viðgjørd, men aftaná fólkaatkvøðuna um brennivínslógina hevur verið til umræðu, hvørvítt úrslitið av fólkaatkvøðuni skuldi skiljast so, at praksis viðvíkjandi eykaloyvum átti at verða broyttur. Her hava landsstýrismenninir verið ójavnir á máli.

Stuðul er latin til menn og feløg til uttanlandaferðir í ymiskum ørindum, hesin peningur er tikin av konto á fíggjarlógini «til landsstýrið at ráða yvir». Eisini er rakstrarstuðningur latin til hotellið «Ferðamannaheimið» av tí orsøk, at raksturin hevur givið hall. Turisma, sum í mongum londum er ein týðandi inntøkukelda, tykist eftir hesum ikki at verða tað her hjá okkum.

Partafelagið «Iðnaðarútbygging», ið hevur ein partapening uppá kr. 50.000 hevur fingið ein studning uppá kr. 85.649,49. Hetta er partafelag, ið stovnað var til ger av kaðalum. Peningurin er tikin av kontoini «iðnaðarfremjandi endamál».

Belgiskt felag hevur søkt um loyvi at hava radiostøð í Føroyum. Landsstýrið hevur sent málið til ummælis hjá «Telefonverk Føroya Løgtings», men sæst málið ikki aftaná hetta 26. januar 1974 at hava verið viðgjørt í landsstýrinum.

Landsstýrismálanevndin hevur gjølla viðgjørt málið og hevur ongar viðmerkingar til tær avgerðir, sum tiknar eru, og setur fram fylgjandi

Uppskot

Tingið samtykkir tær avgerðir, ið tiknar eru í tíðarskeiðinum 3. august 1973 til 22. juli 1974.

LANDSSTÝRISMÁLANEVNDIN, 10. april 1974.

J. Fr. Øregaard Óli Breckmann Ove Mikkelsen

F.L.j.nr. 204-2/74

2. viðgerð 21. apríl 1975.

Uppskotið frá nevndini samtykt við 17–0 atkv. og málið sostatt avgreitt.

---

5. Studningur til feskfiskaveiðuna

Ár 1974, mikudagin 11. desember, legði Johs. M. Olsen, løgtingsmaður, fram

Uppskot
til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um minstuløn v.m.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 69 frá 26. september 1974 um minstuløn og annan stuðul til fiskivinnuna verða gjørdar hesar broytingar:

Í § 4, 1. stk. verða «25 oyru» broytt til «30 oyru».

Í § 4, 2. stk. verða «25 oyru» broytt til «30 oyru».

Í § 4, 3. stk. verða «25 oyru» broytt til «30 oyru».

§ 8a verður orðað soleiðis: «10 oyru fyri kg, fyri opnan bát 6 oyru kg, av veiðuni av feskfiski avreiddur í Føroyum kruvdur við høvdi. Hesin stuðul fevnir um tosk, hýsu, longu, brosnu og upsa.»

§ 2.

Henda lóg fær gildi beinan vegin.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om mindsteløn m.v.

§ 1.

I lagtingslov nr. 69 af 26. september 1974 om mindsteløn og anden støtte til fiskerierhvervet foretages følgende ændringer:

I § 4, stk. 1 ændres «25 øre» til «30 øre».

I § 4, stk. 2 ændres «25 øre» til «30 øre».

I § 4, stk. 3 ændres «25 øre» til «30 øre».

§ 8a formuleres således: «10 øre pr. kg, for åbne både 6 øre pr. kg af fangsten med hoved uden indvolde indhandlet frisk fisk. Dette tilskud omfatter torsk, kuller, lange, brosme og storsej.»

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

F.L.j.nr. 1517-2-1/74.

Viðmerkingar:

Sum øllum tingmonnum kunnugt hevur gongdin viðvíkjandi skipum og bátum, sum reka feskfiskaveiðu, tað seinastu tíðina verið soleiðis, at útreiðslurnar eru hækkaðar, meðan avrokningarprísirnir eru lækkaðir.

Avleiðingarnar av hesum eru sjálvandi tær, at manningin fær minni úrtøku og at ov litið verður til rakstur av skipum og bátum. Studningurin til eigarar av fiskiførum á feskfiskaveiðu er óbroyttur síðan lógin kom í gildi. Síðan 1969 inntil fyri kortum eru avrokningarprísirnir støðugt hækkaðir og hevur ti ikki verið neyðugt at ajourføra henda studning.

Teir seinastu mánaðarnar eru avrokningarprísirnir har aftur imóti lækkaðir munandi alt meðan útreiðslurnar til útgerð framvegis støðugt hækka.

Nevnast kann, at útreiðslurnar til olju eru meira enn dupult so stórar sum fyri tveimum árum síðan, og at fiskireiðskapur, nógv orsakað av oljuprishækkanini, eisini er vorðin nógv dýrari enn fyri bert einum ári síðan.

Tað er av avgerandi týdningi fyri samfelag okkara, at júst henda vinna fær nóg góðar umstøður at arbeiða undir. Fyri tað fyrsta geva umrøddu skip og bátar nógv arbeiðspláss umborð og fyri tað annað skapa hesi somu veiðufør grundarlagið undir øllum teimum arbeiðsplássum, sum føroyski flakaidnaðurin gevur.

Í uppskotinum hava vit bert tikið við eigarastudningi til tosk, hýsu, longu, brosmu og upsa. Undir viðgerðini eigur at verða mett um, hvørvitt ikki studningur eigur at verða givin viðvíkjandi fleiri ella kann vera øllum sløgum av feskfiski. Eftir okkara metan er tað avgjørt neyðugt at veita bráðfongishjálp til feskfiskaveiðuna. Vit skulu gera vart við, at tær í uppskotinum nevndu broytingar ikki merkja nakra endaliga loysn á spurninginum um minstuløn og annan stuðul til fiskivinnuna, sum eftir okkara metan eigur at verða kannaður sum heild.

A løgtingi, 9. december 1974.

SAMBANDSFLOKKURIN

1. viðgerð 28. jan. 1975 (saman við lm. nr. 8/1974 (vetrarting). Málið beint í figgjarnevndina, sum 30. januar 1975 legði fram soljóðandi

Álit

Uppskotið var av Sambandsflokkinum lagt fyri løgtingið tann 11. december 1974, og varð tað við 1. viðgerð beint í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Hákun Djurhuus, Poul J. Olsen, Hilmar Beck, Signar Hansen og Jógvan Durhuus) setur einki uppskot fram, men vísir til stoðu sína í tingmáli nr. 8/1974 (vetrarting).

Minnilutin (Pauli Ellefsen) førir fram:

Einki hendi í hesum máli fyrr enn landsstýrið tann 27. januar 1975 legði fram løgtingsmál nr. 8/1974/75: Bráðfeingis stuðul til útróðurin v.m.

Bæði nevndu tingmálini vóru til 1. viðgerð tann 28. januar 1975 og vóru beind í fíggjarnevndina.

Uppskot Sambandsfloksins hevur onga regulerings skipan.

Orsakað av at fiskaprísurin er fallin við næstan 40 oyrum síðan sambandsflokkurin legði fram uppskotið, er neyðugt deils at hækka oyraupphældirnar í uppskotinum og deils at gera eina regulerings skipan, sum tryggjar, at studningurin hækkar í ein ávisan mun, um prísurin seinri lækkar enn meira.

Um uppskot sambandsflokksins hevði verið viðgjørt beinanvegin, kundi tað verið komið í gildi um miðjan december 1974. Manning, skip og bátar høvdu tá fingið stuðul í tíðini, sum farin er síðani. Skotið verður til upp, at uppskotið fær afturvirkandi kraft frá 1. januar 1975.

Mælt verður til, at løgtingsmál nr. 5/1974 (vetrarting): Studningur til feskfiskaveiðuna verður viðtikið við hesum broytingum:

§§ 1 og 2 verða orðaðar soleiðis:

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 69 frá 26. september 1974 um minstuløn og annan stuðul til fiskivinnuna verða gjørdar hesar broytingar:

Í § 4, 1. stk. verða «25 oyru» broytt til «40 oyru».

1) Aftrat § 4, 1. stk. verður sett:

Um prísurin er lægri enn prísurin tann 30. januar 1975, verður prísviðbótin hækkað við 30% av muninum millum lækkaða prísin og prísin pr. 30. januar 1975.

§ 1.

I lagtingslov nr. 69 af 26. september 1974 om mindsteløn og anden støtte til fiskerierhvervet foretages følgende ændringer:

I § 4, stk. 1, ændres «25 øre» til «40 øre».

1) I § 4, 1. stk. tilføjes

Såfremt prisen er lavere end prisen den 30. januar 1975 forhøjes pristilskudet med 30% af forskellen mellem den formindskede pris og prisen pr. 30. januar 1975.

I § 4, 2. stk. verða «25 oyru» broytt til «40 oyru».

I § 4, 3. stk. verða «25 oyru» broytt til «40 oyru».

«8a verður orðað soleiðis «20 oyru fyri kg, fyri opnan hát 6 oyru kg, av veiðuni av feskfiski avreiddur í Føroyum kruvdur við høvdi. Hesin stuðul fevnir um tosk, hýsu, longu, brosnu og upsa.»

2) Um prísurin er lægri enn prísurin tann 30. januar 1975, verður prísviðbótin hækkað við 30% av muninum millum lækkaða prísin og prísin tann 30. januar 1975.

§ 2.

Henda lóg fær gildi 1. januar 1975.

I § 4, stk. 2, ændres «25 øre» til «40 øre».

I § 4, stk. 3 ændres «25 øre» til «40 øre».

§ 8a formuleres således: «20 øre pr. kg, for ålne både 6 øre pr. kg af fangsten med hoved uden indvolde indhandlet frisk fisk. Dette tilskud omfatter torsk, kuller, lange, brosme og storsej.»

2) Såfremt prisen er lavere end prisen den 30. januar 1975 forhøjes pristilskudet med 30% af forskellen mellem den formindskede pris og prisen den 30. januar 1975.

§ 2.

Denne lov træder i kraft 1. januar 1975.

Ein annar minniluti (Asbjørn Joensen) setur einki uppskot fram.

FIGGJARNEVNDIN, 30. januar 1975.

2. viðgerð 30. januar, saman við Lu nr. 8/1974 (vetrarting). Frávik frá tíðarfresl. Atkvøðugr. fór fram 31/1 atkvøtt var um gr. 1 í broytingaruppskoti frá Paula Ellefsen (ístaðin fyri upprunauppskotið). Atkvøtt varð við navnakalli:

Ja atkvøddu: Aguar Nielsen, Hilmar Kass, Asbjørn Joensen, Pauli Ellefsen, Jákup Mortensen, Jógvan Olsen, Johs. Olsen, Kjartan Mohr. 8 atkv.

Nei atkvøddi eingin

Atkvøddu ikki: Signur Hansen, Jákup Lindenskov, Jógvan Sundstein, Óli Breckmann, Eliesar Arge, Hákun Djurhuus, Vilhelm Nielsen,

Hilmar Beck, Atli P. Dam, Tórátvur Olsen, Poul J. Olsen, Haldor Hansen, Heðin M. Klein, Finnbogi Isaksen, Erlendur Patursson, Jógvan Durhuus, Ove Mikkelsen, J. Fr. Øregaard = 18.

Uppskotið sostatt burturfallið við 8 0 atkv.

---

6. 5-ára fíggjarætlan

Ár 1975, mánadagin 27. januar, legði Pauli Ellefsen, løgtingsmaður, fram:

Uppskot
til
samtyktar.

1. Løgtingið áleggur landsstýrinum beinanvegin saman við fíggjarnevndini at gera fíggjarætlan fyri tey næstu 5 fíggjarárini 1975/76 til 1979/80.

2. Løgtingið samtykkir, at eingin yvirtøka verður framd fyrr enn tann í fyrsta petti nevnda 5-ára fíggjarætlan er gjørd og tikin til eftirfektar av løgtinginum.

Viðmerkingar:

Seinast fráfarna landsstýri gjørdi eitt serliga stórt og virðismikið arbeiði fyri at leggja betur til rættis fíggjarligu umsitingina.

Nevnast kann millum annað, at landsbókhaldið fyri stóran part nú verður elektroniskt dataviðgjørt. Komið er langt áleiðis við einari tryggari og rationellari fíggjarligari umsiting.

Fyritreytirnar fyri at gera haldgóðar fíggjarætlanir eru sostatt nú til staðar.

Upplýsingar eru lættliga tøkir um hvat fram er farið og hvørjar avleiðingar av hesum hava verið.

Um menn nú bert kunnu finna út av og blíva samdir um hvat gerast skal framyvir, er lætt uppá forhond at rokna út hvørjar avleiðingar standast av hesum.

Almannakunngjørda samgonguskjalið týður saman við vallyftum uppá, at sitandi samgonga hevur í hyggju at fremja tiltøk, sum koma at kosta samfelag okkara stóran pening.

Sambandsflokkurin loyvir sær tí at heita á løgtingið, um at áleggja landsstýrinum at gera fíggjarætlan fyri tey næstu 5 fíggjarárini.

Heuda fíggjarætlan eigur at vísa væntaðu inntøkur og útreiðslur landskassans fyri tíðarskeiðið 1. apríl 1975 til 31. mars 1980.

Sjálvsagt eigur at framganga av viðmerkingum til fíggjarætlanina lær fyritreytir sum lær einstøku upphæddirnar hvíla á.

Umframt høvuðsupphæddirnar eigur fíggjarætlanartilfarið at vísa til dømis:

1. Minniinntøkur orsakað av skattalætta til lág- og meðalinntøkur og generellan toll- og skattalætta.

2. Meirútreiðslur viðvíkjandi núverandi viðtøkum og skuldbindingum v.m. orsakað av:

   prísvøkstri
   lønarvøkstri
   øktum socialum útreiðslum
   vøkstri í studningi v.m.
   til føroyska vinnulívið o.s.fr.

3. Meirútreiðslum orskaðar av nýggjum viðtøkum og skuldbindingum v.m.:

   álhaldandi sunnari samfelagsligari útbygging
   studningsveitan til føroyska
   vinnulívið
   sjúkratrygging
   arbeiðsloysistrygging
   stuðul til íbúðarmál o.s.fr.

4. Meirútreiðslur orsakað av teimum
   ymisku almennu initiativum og yvirtøkum
   sum samgongan ætlar at fremja.

5. Avlop og hvussi hetta skal nýtast.

Ofta verður í hesum døgum tosa um vánaligar framtíðarvónir.

Tað er altíð rætt at planleggja, eisini á tí fíggjarliga økinum, og tá serliga um vandi sýnist verða á ferð.

Einki landsstýri hevur sum hetta havt tilfar, umstøður og møguleikar til at lata úr hondum haldgóðar fíggjarætlanir.

Talan er ikki um stór krøv frá Sambandsflokkinum.

Tvær okkara størstu kommunur hava gjørt fíggjarætlanartøl 5 ár fram í tíðina. I grannalondum okkara eru gjørdir neyvir og vittfevnandi perspektivplanir.

Tað er bert náturligt at løgtingið fær fyrilagt best møguligar upplýsingar um avleiðingarnar av teimum tiltøkum sum ætlanin er at fremja áðrenn tiltøkini eru sett í verk. Á hendan hátt kann verða forða fyri stórum mistøkum.

Við hesum verður heitt á løgtingið um at samtykkja uppskotið.

1. viðgerð 31. januar og málið heint til 2. viðgerð uttan nevndarviðgerð.

2. viðgerð 7. februar.

Uppskotið til samtyktar fall við 5—0 atkv.

7. Regulering av veiðuni av norska-arktiska toskastovninum (NEAFC)

Ár 1975, mánadagin 27. januar, legði Petur Reinert, landsstýrismaður, fram

Uppskot
til
samtyktar.

Løgtingið tekur til eftirtektar reguleringina av veiðuni av norsk/arktiska toskastovninum samtyktar á NEAFC-fundinum í Bergen í døgunum 13. til 15. januar 1975.

Viðmerkingar:

Við skrivi dagfest 4. december 1974 greiddi landsstýrið løgtinginum m.a. frá, at á NEAFC-eykafundinum í Hamburg í døgunum 1. til 8. november 1974 eydnaðist ikki at koma til semju um regulering av fiskiskapinum eftir norska/arktiska toskastovninum; men varð málið skotið til viðgerðar á øðrum eykafundi í Bergen 13. til 15. januar í ár, jbr. løgtingsmál nr. 3/1974 (vetrarting).

Á Bergen-fundinum skuldi støða bæði takast til hámarksveiðunøgd, og síðani hvussu hon skuldi býtast millum linalondini.

Viðvikjandi hámarksveiðunøgdini var ikki semja millum fiskifrøðingarnar á Hamborgar-fundinum. Teir flestu bildu, at markið átti at setast millum 500.000 og 550.000 tons, meðan nakrir mettu, at 1.100.000 tons var beinara markið. Fundurin heitti á fiskifrøðingarnar um at kanna málí enn einaferð.

Á Bergen-fundinum varð upplýst, at stundir høvdu ikki verið at kanna málið gjølla, men við teimum upplýsingum, ið nú lógu fyri um støddina av 1970-ársflokkinum, hann er størri enn upprunaliga mett, hildu fiskifrøðingarnir seg kunna mæla til at seta hámarksveiðunøgdina í 1975 til 625.000—650.000 tons.

1 december mánaða 1974 hevur fundur verið í Oslo millum norsku og russisku fiskimálaráðharrarnar, og vórðu teir samdir um at skjóta upp, at veiðunøgdin varð sett til 800.000 tons.

Bergen-fundurin samdist um, at markið varð 810.000 tons, og at býtið varð hetta millum londini

F.L. j. nr. 1504-3-2 — 2/74.

Danmark (Føroyar)	11.000	tons
Frankaríki	30.500	tons
Noreg	305.000	tons
Polen	7.000	tons
Portugal	7.000	tons
Spania	7.000	tons
Stóra-Bretland	98.000	tons
Eystur-Týskland	10.000	tons
Vestur-Týskland	29.500	tons
U.S.S.R.	305.000	tons

Londini Belgia, Irland, Ísland og Svørík hava loyvi at veiða hvør 500 tons.

Samtykt varð eisini, at um land hevur nýtt sína kvotu áðrenn árslok 1975, kunnu skipini frá hesum landi halda fram við fiskiskapinum, tó bert við gørnum, línu og snøri.

Markið fyri reguleringina gongur frá Norður-Pólinum eftir meridianini 11°00' W til 63°00' N breidd, síðani í ein beinan eystan til 4°00' W, síðani í ein beinan sunnan til 62°00' N, síðani í ein beinan eystan til norsku strondina og hagani norður og norður-eystur fram við norsku og russisku strondini til 51°00' E.

Øll limalondini, ið vóru umboðað, atkvøddu fyri samtyktini.

Viðlagt er:

Skjal 1. Yvirlit yvir veiðutøl 1964-73.

Skjal 2. Fyribils veiðutøl 1. januar — 30. november 1974.

Petur Reinert
landsstýrismaður

/ J. Djurhuus

TABLE Ia. NORTH-EAST ARCTIC COD CATCHES 1964-1973. NOMINAL CATCH

CONTRY	1964 Tons	1965 Tons	1966 Tons	1967 Tons	1968 Tons	1969 Tons	1970 Tons	1971 Tons	1972 Tons	1973 Tons
Faroe Is. [1]	—	—	—	—	—	29.374	26.265	5.877	1.393	1.916
France [1]	8.634	526	2.967	664	—	—	44.245	34.772	8.915	17.028
German Democratic Republic [1]	297	91	228	43	255	5.907	12.413	4.998	1.300	4.760
Germany, Federal Republic of [2]	3.202	3.670	4.284	3.632	1.073	5.434	9.451	9.726	3.405	14.240
Netherlands [1]	585	816	121	6	—	133	—	—	—	—
Norway [2]	149.878	197.035	203.792	218.910	255.011	305.241	377.606	407.044	394.101	280.021
Poland [1]	—	—	—	—	—	7.856	5.153	1.512	892	843
Spain [1]	—	—	—	—	—	—	—	215	166	276
United Kingdom [2]	94.549	89.874	103.012	87.003	140.054	231.066	179.562	73.160	56.669	76.493
USSR [2]	180.550	152.780	169.300	262.340	676.758	612.215	276.632	144.802	96.653	387.196
TOTAL	437.695	444.842	493.704	572.605	1.073.751	1.197.226	931.327	687.106	563.574	782.713
Portugal 1963	3.000	4.000	4.500	5.400	6.000	9.500	8.500	25.700	5.900	5.000	8.200

Upplýst 13/1-75 í Bergen

TABLE 1b

	%	%	%	%	%	%	%	%	%	%
Faroe Is.	—		—	—	—	2.454	2.820	0.855	0.247	0.245
France	1,973	0,118	0.613	0.116	—	—	4.751	5.062	1.582	2.176
German Democratic Republic	0,068	0,021	0.047	0.008	0.024	0.493	1.333	0.727	0.231	0.600
Germany Federal Republic of	0,731	0,825	0,986	0.634	0.098	0.453	1.015	1.416	0.604	1.819
Netherlands	0,134	0,183	0,025	0.001	—	0.011	—	—	—	—
Norway	34,242	44.304	42,132	36,231	23.606	25.497	40.545	59.240	60.943	35.776
Poland	—	—	—	—	—	0.656	0.553	0.220	0.198	0.108
Spain	—	—	—	—	—	—	—	0.031	0.030	0.035
United Kingdom	21,602	20.204	21,296	15.195	13.044	19.300	19.260	11.375	10.055	9.773
USSR	41,250	34.345	35,001	45.815	63.028	51.136	29.703	21.074	17.150	49.463
TOTAL	100,000	100.000	100,000	100,000	100.000	100.000	100.000	100.000	100.000	100.000

[1] Source: Bulletin Statistique

[2] Source: Report of the North-East ARTIC Fisheries Working Group.

Skjal 2.

Fyribils veiðutøl 1. januar — 30. november 1974.

Toskur veiddur á norður - eystara arktiska økinum.

	tons	
Belgia	145	
Danmark (Føroyar)	5.052	
Frankariki	38.400	
Noreg	270.000	*)
Polen	9.898	
Portugal	29.240	
Spania	32.250	
Stóra - Bretland	80.860	
Eystur - Týskaland	4.840	
Vestur - Týskaland	72.390	
U.S.S.R.	415.000	**)

*) Umframt 37.000 tons «coastal cod».
**) Umframt 97.000 tons «coastal cod».

1. viðgerð 30. januar og málið beint í fiskivinnunevndina, sum 12. mars legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð við fyrstu viðgerð beint í fiskivinnunevndina.

Á fundinum í Bergen komu lionalondini ásamt um, at á hesum umtalaða øki skuldi totalnøgdin hægst vera 650.000 tons, og okkara partur 11.000 tons. Tað er týðiligt, at strandalondini kanna sær stórri og stórri part av fiskastovninum og minkar tá luturin hjá fjarfiskimonnum, og har í millum hjá okkum.

Hóast gongdin er hendan, eigur í metingunum, tá ið hámarksveiðunøgdir skulu býtast millum lond, dentur eisini at vera lagdur á, hvønn týdning fiskivinnan hevur í landshúsarhaldinum í teimum ymisku londunum. Eitt land við fjølbroyttum vinnulívsmøguleikum, har fiskivinnan bert er ein partur av heildini, er hetur fært at taka skerjingar í fiskiskapinum enn eitt land, har fiskivinnan ikki bert er álitið men lívstreytin. Føroyar er tað landið, sum fram um øll onnur er í hesi serstøðu.

Landsstýrið eigur tí at greiða frá hesum umstøðum á ollum fiskivinnu-

fundum, har føroysk fiskivinnumál koma til viðgerðar, at Føroyar hava ein serligan tørv, tá ið veiðunøgdir skulu býtast.

Í viðmerkingunum hjá landsstýrinum framgongur, at øll limalondini, ið umboðað vóru á fundinum atkvøddu fyri samtyktini at seta hámarksveiðunøgd fyri henda fiskastovn, ið talan er um, og vóru eisini sanid um, hvussu veiðunøgdirnar skulu býtast millum londini.

Uppskot
til
samtyktar

Vísandi til tað, ið fert er fram í álitinum, tekur løgtingið til eftirteknar frágreiðing landsstýrisins í skrivi dagfest 27. januar 1975 um regulering av veiðuni av norska/arktiska toskastovninum (NEAFC) samtyktar á fundi í Bergen í døgunum 13. til 15. januar 1975.

FISKIVINNUNEVNDIN, 12. mars 1975.

Poul Jacob Olsen **Ove Mikkelsen** **Signar Hansen**
Vilhelm Nielsen **Jógvan Olsen**

2. viðgerð 18. mars.

Uppskotið samtykt við 19 0, og sostatt endaliga avgreitt.

8. Bráfongis stuðul til útróðurin v.m.

Ár 1975, mánadagin 27. januar, legði Petur Reinert, landsstýrismaður, fram.

Uppskot
til

løgtingslóg um bráfongis stuðul til útróður v.m.

§ 1.

Umfram studningarnar í §§ 4, 1. stk. og 8 í løgtingslóg nr. 69 frá 26. september 1974 um minstuløn og annan stuðul til fiskivinnuna verða latnir fylgjandi eykastudningar:

Tá ið føroyskt fiskifar av línu-, snellu- og snørisveiðu avreiðir feskan fisk í Føroyum verður latið í eykastudningi til manningina 15 oyru fyri kg og til eigaran 10 oyru fyri kg av øllum rundum fiski, kruvdum, við høvdi, toskur yvir 70 cm tó undantikin. Hvørja ferð prísurin hækkar við 10 oyru í meðal fyri kg, lækkar samlaða prísviðbótin til manning og eigara við 1 oyra. Lækkaða prísviðbótin verður býtt millum manning og eigara í lutfallinum 3 : 2.

§ 2.

Treyt fyri studningsveitingini er, at fiskurin er blóðgaður, og at fiskurin annars er fyrsta floks.

§ 3.

Henda lóg er galdandi frá 1. februar 1975 til 31. mars 1975.

lagtingslov om midlertidig støtte til hjemmefiskeri m.v.

§ 1.

Foruden tilskudene i §§ 4, stk. 1 og 8 i lagtingslov nr. 69 af 26. september 1974 om mindsteløn og anden støtte til fiskerierhvervet ydes følgende ekstraordinære tilskud:

Ved indhandling på Færøerne af frisk fisk fra færøske fiskerfartøjer i fiskeri med langline, snelle eller håndsnøre ydes der mandskabet 15 øre pr. kg. og til ejeren 10 øre pr. kg. i tilskud til fangsten af al rund fisk med hoved uden indvolde, torsk over 70 cm dog undtaget. For hver gang prisen forhøjes med 10 øre i gennemsnit pr. kg, formindskes det samlede pristilskud til mandskabet og ejer med 1 øre pr. kg. Det lavere pristilskud fordeles mellem mandskab og ejer i forholdet 3 : 2.

§ 2.

Det er en betingelse for tilskudene, at fisken er strubeskåren, og at fisken iøvrigt er af første sortering.

§ 3.

Denne lov er gældende fra 1. februar 1975 til 31. marts 1975.

F.L. j. nr. 1510-1-6. — Sí eisini Ll. nr. 2/1975.

Viðmerkingar:

Landsstýrið hevur í seinastuni havt samráðingar við útróðrarmenn og umboð fyri nýstovnaða Meginfelag Útróðrarmanna.

Felagið vísir á, at útróðrarvinnan er komin í trupulleikar, og eru að serliga tríggir spurningar, ið eftir teirra áskoðan mugu greiðast:

1. Minstaløn.
2. Sjúkratrygging.
3. Úrløka í mun til prísvøkstur.

Fyrst verður eisini fram, at bátarnir kunnu ikki í dag standa seg við teimum ásettu avreiðingarprísunum.

Landsstýrið hevur viðgjørt málið og heldur, at neyðugt er at lætta um í fyriliggjandi trupulleikum hjá útróðrarflotanum. Til tess at koma fram til eitt berandi støði fyri eini haldgóðari loysn er neyðugt, at fyrisitingin fær rímiliga tíð til at kanna og viðgera viðurskiftini, soleiðis at landsstýrið um mánaðarskiftið mars - apríl kann leggja fram lógaruppskot um heildarloysu av rakstrarumstøðunum fyri útróðurin, bæði fyri rakstur av bátunum og fyri lønarviðurskiftini hjá útróðrarmonnum.

Meðan hetta arbeiðið fer fram, mælir landsstýrið til at útvega eina bráfengis hjálp.

Fundirnir við samráðingarnevnd Meginfelag Útróðrarmanna hava verið 20. og 22. januar í ár.

Á fundinum 20. januar handaði samráðingarnevndin landsstýrinum skriv dagfest sama dag, har skotið verður upp at læsa avreiðingarprísirnar fastar til ávísur hækkaður upphæddir, galdandi inntil ein heildarloysn er funnin, vantandi seinast 60 dagar seinni. Mett var eitt útreiðslutal fyri landskassan uppá millum 5 og 8 milj. kr.

Sí hjálagda skjal 1.

Landsstýrið útvegaði sær alt fyri eitt meting um landskassaneirútreiðsluna, um uppskotið frá Meginfelag Útróðrarmanna var lógfest. Við veiðutølum frá 1974 vildi meirútreiðsla landskassans verið kr. 7.117.000.

Sí hjálagda skjal 2 a-d.

Á fundinum tann 22. januar váttaði landsstýrið stuðu sína um skjóta fremjan av eini heildarloysn. Viðvíkjandi bráfeingis tiltaki var frá landsstýrissíðu greitt frá teirri mannagongd, ið neyðug er fyri at útvega lógarheimild og tí fyrireikingararbeiði viðvíkjandi hagtølum og korvandi upplýsingum, ið skulu til, áðrenn niðurstøða kann gerast.

Landsstýrið metir, at ein meirútreiðsla uppá 7.117.000 kr. berl í tveir mánaðar vil verða ov tung fyri orku landskassans.

Landsstýrið hevur gjørt eina fyribilsmetan av fíggjarligu trongstøðuni hjá útróðrinum, og verður framvegis arbeitt við málinum. Eitt uppskot

um eina heildarloysn kann ikki leggjast fram fyrr enn hagtøl eisini fyri 1974 eru tøk, og er tað metan landsstýrisins, at hesi tøl fyriliggja seinast í februar. Rakstrartølini fyri útróðrarbátarnar kunnu ikki úlvegast til fullnar fyrr enn í mars.

Landsstýrið ætlar at leggja fram eitt uppskot til eina heildarloysn, sum miðar ímóti, at tað er til mesta bata fyri avvarðandi vinnur, men er tað neyðugt í hesum sambandi at lýsa og meta um samfelagsligu og figgjarligu avleiðingarnar.

Landsstýrið hevur kannað samlaðu veiðuhagtølini fyri februar og mars 1973 og fyribils hagtølini fyri 1974.

Sí hjálagda skjal 3 a-h.

Tá ið avreiðingarprísurin í dag verður samanborin við meðalavreiðingarprísin í 1973 er úrslitið, at hin fyrri liggur 7% hægri. Flestu ráfiskaprísir eru nógv lækkaðir, síðan teir vóru í hæddini í februar 1974, men verða teir seinast ásettu ráfiskaprísirnir samanbornir við teir seinast lýstu prísirnar í Íslandi og Noregi, sæst, at teir føroysku prísirnir við fáum undantøkum liggja hægri enn bæði í Íslandi og í Noregi, tá núverandi studningur uppá 30 øyru verður lagdur aftrat.

Tað skal tó hertil sigast, at tað ikki er møguligt at siga nakað við vissu um, hvørji prísiskoyti verða løgd aftrat íslendsku prísunum, og hvørji iskoyti møguliga fjala seg í norsku prísunum.

Sí hjálagda skjal 4.

Fyri raksturin av útróðrarbátunum hava ikki bert teir lækkandi prísirnir havt týdning, men útreiðslurnar eru munandi bækkaðar. Samanborið við meðaltølini fyri 1973 eru hækkingarnar í dag hesar:

Olja	77%
Umvælingar	50%
Reiðskapur — lína	47%
Reiðskapur — trol	82%
Landingarútreiðslur (arb.løn) o.a.	29%
Trygging	15%

Hesi tøl sýna, at útróðrarflotin er verri fyri nú, enn hann var í 1973, við tað at tann lutvis lítla hækkingin uppá 7% á inntøkusíðuni ikki kann viga upp ímóti omanfyri tilskilaðu útreiðsluhækkingum.

Meginfelag útróðramanna hevur fört fram at størsti vansin í løtuni er, at bátar verða ikki mannaðir, tí úrtøkan er ov lítil, tó mælir felagið til, at tann stuðul, ið veitast kann, verður latin beinleiðis til fiskaprísin og fellur eftir vanligum útróðrarbýti, meðan prísiskoytisskipanin fellur burtur.

Landsstýrið heldur seg ikki kunna koma hesum ynski á møti í bráfongisloysnini m.a. tí, at ognarviðurskiftini hjá teim einstøku bátunum eru so ymisk. Stuðul latin yvir ein kamb vil tí seta ymsar ánarar við ójøvnum

skattaviðurskiftum ógvuliga ójavnt fyri, tí miðar uppskot landsstýrisins meira ímóti at veita manningini lutfallsliga størri bata.

Landsstýrið setur fram uppskot um prísiskoyti til tann part av fiski, sum hevur verið fyri tí mesta prísfallinum seinasta árið.

Kostnaðurin fyri landskassan av bráfeingis studningi er mettur at vera umleið 1 mill. kr. í februar og mars 1975.

Sí eisini skjal 10.

1. viðgerð 28. januar. Frávik frá tíðarfreslini u. atkvgr.

Viðgerðin saman við Lm. nr. 5/1974 (vetrartingsetan).

Formaðurin segði frá fleiri skrivum og fjarritum frá ymsum felogum í samband við frammanfyrinevndu mál, og vórðu hesi løgd saman við tingmálinum.

Málið beint í fíggjarnevndina, sum 30. januar legði fram soljóðandi

Álit

Tað er landsstýrið, ið hevur lagt hetta lógaruppskot fyri løgtingið, og sigur landsstýrið frá, at tað í seinastuni hevur havt samráðingar við útróðrarmenn og umboð fyri nýstovnaða Meginfelag Útróðrarmanna.

Undir hesum samráðingum er gjørt vart við, at útróðrarvinnan er komin í trupulleikar.

Landsstýrið, ið hevur viðgjørt málið, ásamnar, at neyðugt er at lætta um í fyriliggjandi trupulleikum hjá útróðrarflotanum, men vísir á í sínum viðmerkingum til lógaruppskotið.

At tørvur er fyri eini haldgóðari loysn á einum berandi støði.

At fyrisitingini tørvar rímiliga tíð til at kanna og viðgera viðurskiftini.

At landsstýrið um mánaðarskiftið mars - apríl skal leggja fyri løgtingið lógaruppskot um heildarloysn av rakstrarumstøðunum fyri útróðurin, bæði fyri rakstur av bátunum og lønarviðurskiftunum hjá útróðrarmonnum.

Fyriliggjandi uppskot um umleið 1 milj. kr. í eykastudningi til útróðrarvinnuna í tveir mánaðar er ein bráfeingis hjálp, meðan arbeiðið við heildarloysnini verður gjørt.

Málið varð við fyrstu viðgerð beint í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur býtt seg í ein meirilutu (Hákun Djurhuus, Poul Jacob Olsen, Hilmar Bech, Signar Hansen og Jógvan Durhuus) og tveir minnilutar (Asbjørn Joensen og Paula Ellefsen).

Meirilutin mælir løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Minnilutin Pauli Ellefsen førir fram:

Nevnda mál varð av landsstýrinum lagt fyri løgtingið tann 27. januar

1975. Tann 11. december 1974 legði Sambandsflokkurin fram løgtingsmál nr. 5/1974 (vetrarting). Studningur til feskfiskaveiðuna.

Uppskot landsstýrisins hevur í mun til uppskot Sambandsfloksins, sum nú er broytt, hesar vansar.

Eingin eykastudningur verður givin til tosk yvir 70 cm uttan mun til hvussu hann er veiddur.

Eingin eykastudningur verður givin til fisk veiddur við gørnum ella troli.

Tann eykastudningur, sum givin verður ein part av fiskinum, sum veiddur er við línu, snellu og snøri samsvarar við ein minni part av tí upplægd, sum fiskaprísurin er fallin við frá 11. december 1974, tá sambandsflokkurin setti fram sítt uppskot.

Eingin reguleringsskipan, sum tryggjar øktan eykastudning, um prísurin fellur enn meira, er í uppskoti landsstýrisins.

Minniluti hevur biðið um at uppskot landsstýrisins varð broytt soleiðis, at stórur toskur og fiskur veiddur við gørnum og troli eisini fekk eykastudning, at ein reguleringsskipan, sum innihildin er í løgtingsmáli nr. 5/1974 (vetrarting) verður innbygd í uppskotið, og at eykastudningur verður givin frá 1. januar 1975.

Meirilutin boðar frá, at landsstýrið fer at leggja fram heildarloysn fyri fiskivinnuna í næstum.

Tí fyrisló Sambandsflokkurin, at lóg um minstuløn og annan stuðul til fiskivinnuna bleiv broytt sum fyrisligið av Sambandsflokkinum ella við einari millumloysn, sum flokkarnir kundu blíva saundir um - - og at samlaða lóggávan um stuðul til fiskivinnuna við broytingum verður sett úr gildi tann 1. april 1975 ella tá fráboðaða heildarloysnin kann verða tikin til viðgerðar á løgtingi.

Um meirilutin hevði gingið við til hetta, hevði løgtingið staðið fullkomilga fritt og kundi lættari fingið til vega eina heilt nýggja heildarloysn, og haraftrat kundi verið veittur okkara feskfiskaveiðu sum munaði eitt sindur.

Tá meirilutin ikki kundi ganga nøkrum av okkara yuskjum á møti, seta vit einki uppskot fram og vísa til álit til løgtingsmál nr. 5/1974 (vetrarting).

Ein annar minniluti (Ashjørn Joensen) setur fram fylgjandi broytingaruppskot til uppskot landsstýrisins:

I § 1 verður orðalagið broytt soleiðis:

Tá ið føroyskt fiskifar av ísfiskaveiðu avreiðir feskan fisk í Føroyum ....

Orðini «toskur yvir 70 cm tó undantikin» verða strikað.

§ 2 verður orðað soleiðis:

Treyt fyri studningsveitanini er, at fiskurin er blóðgaður, og annars eftir góðskumeting at rokna undir 1A og 1B sum fyrsta floks fiskur.

Sjálvstýrisflokkurin ásannar við hesum broytingaruppskoti, at ikki er rokkið teim krøvum, sum sett eru fram av meginfelag útróðrarmanna, tó verður mett at broytingaruppskotið sum ikki skilir millum veiðihættir eins og stødd av fiski — verður ein munandi bati sammett við landsstýrisins uppskot, hvørs upphædd 15 oyru fyri kg mestsum longu er burtur orsakað av støðugt fallandi prísum, áður enn hetta uppskot kemur til 2. viðgerð.

Meira eigur tí at verða tikið til, eisini við tí í huga, at fiskimánaðarnir februar-mars eru av alstórum týdningi fyri ársúrtøku útróðrarmanna — at hesir mánaðar eru arbeiðsgevandi fyri virksemi á landi — tí er umráðandi, at ongin støðgur kemur í hesa høvuðsvinnu okkara.

Í viðmerkingum til landsstýrisuppskotið verður boðað frá heildarloysu, eins væl og feløg útróðrarmanna framseta ynski um umleggjan av studulsveitanini.

Samdir eru vit í, at heildarloysn er neyðug, og verður hendan sum boðað frá at koma fyri tingið í mars-apríl mánað — og vil sjálvstýrisflokkurin tí umhugsa hetta álvarsmál av nýggjum.

2. viðgerð 30/1. Frávik frá tíðarfrest fyri hetta mál og nr. 5/1974 (vetrarting).

Atkvøðgr. fór fram 31. januar.

Atkvøtt var við navnakalli um broytingaruppskot frá Asbjørn Joensen til gr. 1 í lógaruppskotinum frá landsstýrinum soljóðandi:

f § 1 verða orðini:	I § 1 ændres ordene:
«Tá ið føroyskt fiskifar av linu-, snellu- og snørisveiðu avreiða feskan fisk í Føroyum» broytt til:	«Ved indhandling på Færøerne af frisk fisk fra færøske fiskerfartøjer i fiskeri med langline, snelle eller håndsnøre til:
«Tá ið føroyskt fiskifar avreiðir feskan fisk í Føroyum».	«Ved indhandling på Færøerne af frisk fisk fra færøske fiskerfartøjer.»
Orðini «toskur yvir 70 cm» tó undantikin verða strikað.	Ordene «torsk over 70 cm» udelades.
§ 2 verður orðað soleiðis:	§ 2 formuleres således:
«Treyt fyri studningsveitan er at fiskurin er blóðgaður og ann-	«Det er en betingelse for tilskudene, at fisken er strubeskåren

ars eftir góðskumeting at rokna undir 1A og 1B sum fyrsta floks fiskur.»

og fisken iøvrigt efter kvalitetskontrol henføres under 1A og 1B som første klasse fisk.»

Ja atkvøddu: Agnar Nielsen, Hilmar Kass, Asbjørn Joensen, Pauli Ellefsen, Jákup Mortensen, Jógvan Olsen, Johannes Olsen, Kjartan Mohr = 8.

Nei atkvøddi eingin.

Atkvøddu ikki: Signar Hansen, Jákup Lindenskov, Jógvan Sundstein, Óli Breckmann, Eliesar Arge, Hákun Djurhuus, V. Nielsen, H. Beck, Atli P. Dam, Tórálvur Olsen, Poul J. Olsen, Haldor Hansen, Heðin M. Klein, F. Isaksen, E. Paturssen, J. Durhuus, Ove Mikkelsen, J. Fr. Øregaard = 18.

Uppskotið sostatt burturfallið 8—0.
Broytingaruppskot til gr. 2 afturtikið.
Grein 1 í lógaruppskotinum samtykt við 26—0.
Grein 2 samtykt 26—0.
Alt uppskot og sostatt at fara til 3. viðgerð samtykt við 26—0.
(Sí eisini atkvøðugreiðslu í løgtingsm. 5/1974)

3. viðgerð á seinni fundi sama dag.

Broytingaruppskot

frá Pauli Ellefsen o.ft. til gr. 1 og 3.

Uppskotið var saljóðandi:

§ 3 verður orða soleiðis:

Henda lóg er galdandi frá 10. januar 1975.

1 Aftaná orðini í § 1 «70 cm fó undantikin», verður sett:

Hvørja ferð prisurin lækkar aftaná 1. februar 1975 verður prisviðbótin lækka við 25% av prislækkanini til manning og 25% prislækkanir til bátar ella skip.

Fall við 8—0.

Lógaruppskotið, sum samtykt við 2. viðgerð, nú endaliga samtykt 26—0.

9. Broyting í stýrisskipanarlógini (Framløgan av fíggjarlógini)

Ár 1975, mikudagin 29. januar, legði løgtingsformaðurin fram

Uppskot
til

løgtingslóg um broyting í stýrisskipanarlógini.

§ 1.

Í § 20, 1. stk. í løgtingslóg nr. 1 frá 13. mai 1948 um stýrisskipan Føroya í sermálum verður «1. september» broytt til «15. december».

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi heinan vegin.

lagtingslov om ændring i styrelsesordningsloven.

§ 1.

I § 20. stk. 1 i lagtingslov nr. 1 af 13. maj 1948 om Færøernes styrelsesordning i særanliggender ændres «1. september» til «15. december».

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Í seinastu tingsetu (løgtingsmál nr. 17/1974) samtykti tingið við 21 atkvøðum broyting í lógini um stýrisskipan Føroya, soleiðis at tíðarfreistin fyri framløgu av fíggjarlógaruppskotinum varð broytt frá 1. september til 15. december.

Lógin um stýrisskipan Føroya í sermálum kann eftir § 30 bert broytast, um uppskot verða lagd fyri tingið í vanligari tingsetu ella eykatingsetu. Um uppskotið verður samtykt, verður tingið upployst og nýval fer fram. Verður uppskotið samtykt av hesum nývalda tingi, verður tað at staðfesta.

Vísandi hertil leggur landsstýrið málið aftur fyri tingið at viðlaka av nýggjum.

1. viðgerð 31. januar. Málið beint til 2. viðgerð uttan nevndarviðgerð.

2. viðgerð 7. februar.

F.L.j. nr. 115-1. – sí eisini LJ nr. 3/75.

Atkvøðugreiðslan 27. februar. Gr. 1 samtykt við 19—0. Gr. 2 samtykt u. atkvgr. Málið samtykt at fara til 3. viðgerð við 19—0.

3. viðgerð 7. mars. Lógaruppskotið, sum samtykt við 2. viðgerð, nú endaliga samtykt við 22—0.

---

10. Kommunulæknaskipanin o.ø.m. í Føroyum

Ár 1975, týsdagin 11. februar, legði landsstýrismaður Jákup Lindenskov fram soljóðandi:

Í løgtingssetuni 1973, sbr. løgtingsmál nr. 66/1973, legði landsstýrið fram uppskot til samtyktar viðvíkjandi álitinum: Kommunulæknaskipanin o.ø.m. í Føroyum. Løgtingið samtykti at goyma málið til komandi tingsetu.

Í løgtingssetuni 1974, sbr. løgtingsmál nr. 10/1974, endurnýggjaði landsstýrið framløguna.

Landsstýrið loyvir sær við hesum at leggja málið fyri Løgtingið aftur.

Sí løgtingsmál nr. 10/1974 ólavsøkutíngsetan og løgtingsmál nr. 66/1973 og skjal 12 og 12B Løgtingstíðindi 1973 Bind B.

1. viðgerð 11. mars og málið beint í sosialu nevndina, sum 11. apríl legði fram soljóðandi

Álit

Málið var til 1. viðgerð hin 11. mars 1975 og varð tá beint til viðgerðar

F.L.j. nr. 913-7-15.

í sosialu nevndini. Við tað at tilfarið, sum hoyrir til málið, er so rúgvumikið og nevndin má skaffa til vega fleiri upplýsingar frá t.d. sjúkrakassunum, sær hon seg ikki føra fyri at avgreiða málið, áðrenn tingið fer heim.

Harafturímóti ætla vit at avgreiða tað, til tingið kemur saman aftur á ólavsøku og leggja álit fram tá.

Nevndin setur tí fram hetta

Uppskot
til samtyktar

Málið verður viðgjørt viðari í sosialu nevndini, sum kemur at arbeiða sum millumtinganevnd og leggur fram álit í ólavsøkutingsetuni 1975/76.

SOSIALA NEVNDIN, 19. mars 1975.

Jógvan Sundstein Sverri Midjord Ove Mikkelsen
Jákup Mortensen Tórálvur M. Olsen

2. viðgerð 15. apríl. Uppskot frá sosialu nevndini samtykt við 16—0.

11. Málið ikki framlagt

F.L.j. nr. 360-1-1.

---

12. Val av álitismonnum og nevndum

Framlagt 11. februar 1975.

Sí val av nevndum síðu 92 — 99.

---

13. Forboð móti innflutningi og nýtslu av spæliautomatum

Ár 1975, týsdagin 11. februar, legði Jákup Lindenskov, landsstýrismaður, fram

Uppskot
til

løgtingslóg um forboð móti innflutning og nýtslu av spæliautomatum, har vinningur verður latin.

§ 1.
Loyvt er ikki at flytu inn ella

lagtingslov om forbud mod indførsel og brug af spilleautomater med gevinst.

§ 1.
Det er ikke tilladt at importere

nýla spæliautomatir, har vinningur verður latin.

§ 2.

Brot á besi lóg verður sektað við bót og hald verður lagt á ólógligar innlluttar spæliautomatir.

§ 3.

Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.

eller gøre brug af spilleautomater, hvor gevinst ydes.

§ 2.

Overtrædelse af denne lov straffes med bøde og de ulovlige importerede spilleautomater konfiskeres.

§ 3.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Spurningurin um nýtslu av spæliautomatum við peningavinnuligum endamáli hevur verið umrøddur saman við landfútanum.

Semja er um, at neyðugt er at loysa málið soleiðis at løgreglan við týðiligari heimild hevur fastar reglur at ganga eftir.

Sum er, hevur verið noktað uppseting av tilikum automatum sbr. § 49 í polítiviðtøkuni, men henda heimild kann vera ivasom.

Aðrastaðni verða hesar spæliautomatir mettar at verða ein plága, sum — hevur hon fyrst fingið fótafesti — ikki er til at sleppa av við. Hartil eru tær torførar at hava eftirlit við. Ein hækking av avgjøldum hevur aðrastaðni heldur ikki ført til tess at forða fyri spæliautomatum, har vinningur verður latin.

Heldur ikki verður hildið nóg mikið at seta vissar treytir fyri uppseting av spæliautomatum.

Hesar og aðrar royndir, sum hava spillandi siðvenju við sær, liggja til grund fyri, at landsstýrið eftir tilmæli frá landfútanum setur fram uppskot um forboð at flyta inn spæliautomatir, har vinningur verður latin, eins og forboðið kemur at umfata nýtslu av teimum spæliautomatum, ið skuldu verið komnar til Føroyar.

Hetta uppskot varð lagt fram sum løgtingsmál nr. 18 í seinastu tingsetu, men fekk tá ikki viðari viðgerð.

1. viðgerð 25. februar. Málið beint í lógarnevndina, sum 20. mars legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð av landsstýrinum lagt fyri løgtingið 11. februar í ár og varð undir 1. viðgerð 25. februar beint í lógarnevndina.

Í viðmerkingunum til uppskotið sigur landsstýrið, at hetta mál hevur

verið umrøtt saman við landfútanum, sum var samdur við landsstýrinum í ti sjónarmiði, at klárar lógarheimildir eru neyðugar til tess at finna veruliga loysn í málinum.

Í viðmerkingum landsstýrisins er umrødd § 49 í politiviðtøkuni, sum hingartil hevur verið nýtt sum grundarlag fyri noktan at seta upp spæliautomatir, og ljóðar henda lógargrein soleiðis á donskum máli:

«Ingen må uden politiets tilladelse offentligt give koncerter eller musikalske præstationer, afholde basar, dans eller maskerade, afbrænde fyrværkeri, foranstalte haveillumination, give miniske, ækvilibristiske, magiske eller deslige forestillinger, forevise seværdigheder, såsom menageri, sjældne dyr, verdensteatre, panoramer, perspektivkasser, stereoskopsamlinger eller deslige, lade afbenytte karuseller, fjederbøsser, skydebordte eller lign., afholde gevinstskydning, kaplløb eller lign. Til afholdelse af tombola udkræves amtets eventuelt justitsministerens (nu landsstyrets) tilladelse. Tilladelse til kirkekoncerters afholdelse må ikke meddeles, førend provstens eller vedkommende kirkestyrelses samtykke er erhvervet. Politiet kan, for et tidsrum af indtil 6 måneder ad gangen, meddele offentlige beværtninger en almindelig tilladelse til, under de fornødne indskrænkninger, i deres lokaler at lade opføre musikalske præstationer, dog kun ved sådanne personer, som forud er opgivne for politiet, uden at dette har haft noget imod dem at erindre. Tilladelsen kan til enhver tid tages tilbage, når dertil måtte vise sig grund.»

Lógarnevndin er samd við landsstýrið í ti, at henda lógargrein kann vera ivasom sum heimild til tess at nokta uppseting og nýtslu av spæliautomatum í Føroyum.

Lógarnevndin er eisini samd við landsstýrið um vandan, sum kann standast av, at tilíkar spælautomatir fáa fótin fastan í Føroyum. Í tá er at kalla ómøguligt at sleppa av aftur við tær — og veruligur menniskjaligur sorgarleikur kann standast av teimum.

Við hesum grundgevingum mælir ein samd lógarnevnd løgtinginum til at samtykkja landsstýrisuppskotið.

LÓGARNEVNDIN, 20. mars 1975.

Heðin M. Klein **J. Fr. Øregaard** **Tórálvur M. Olsen**
Eliesar Arge **Agnar Nielsen**

2. viðgerð 21. mars. Frávik frá tíðarfrest.

Gr. 1 samtykt við 19—0. Alt lógaruppskotið og at fara til 3. viðgerð samtykt við 19—0.

14. Veðhald fyri láni til Tórshavnar kommunu

Ár 1975, týsdagin 11. februar, legði Petur Reinert, landsstýrismaður, fram

Uppskot
til

løgtingslóg um veðhald fyri láni til Tórshavnar kommunu.

§ 1.
Landsstýrinum er heimilt landskassans vegna at veðhalda fyri láni til Tórshavnar kommunu upp til kr. 15.699.000,00.

§ 2.
Henda lóg fær gildi beinanvegin.

lagtingslov om garanti for lån til Tórshavn kommune.

§ 1.
Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at garantere for lån indtil kr. 15.699.000,00 til Tórshavn kommune.

§ 2.
Denne lov træder strakt i kraft.

Viðmerkingar:

Tórshavnar kommuna hevur í gerð skúla í eystara býarparti. Fyrsta byggistig er liðugt og farið verður nú undir 2. byggistig, sum ætlandi fer at kosta umleið 22 milj. kr. Av hesum skal kommunan rinda umleið 50% ella 11 milj. kr.

Kommunan er eisini farin undir størri kloakkgerð, sum ætlað at kosta umleið 2,5 milj. kr.

Kreditforeningen af kommuner i Danmark hevur játtað Tórshavnar kommunu eitt lán uppá kr. 15.699.000, sum við núgaldandi obligatiónskursum gevur netto umleið 10 milj. kr., og er tað ein treyt fyri hesum láni, at landskassin veitir veðhald. Landsstýrið er sinnað at veðhalda fyri hesum láni og leggur sostatt hetta uppskot til løgtingslóg um veðhaldsheimild fyri tingið.

F.L. j. nr. 801-3-60. — Ll. nr. 20/75.

1. viðgerð 25. februar. Málið beint í fíggjarnevndina sum 11. mars legði fram soljóðandi

Álit

Málið er av landsstýrinum lagt fyri løgtingið 11. februar 1975 og varð undir 1. viðgerð 25. februar beint í fíggjarnevndina.

Tað snýr seg um landskassaveðhald til Tórshavnar kommunu upp til 15.699.000 kr.

Í viðmerkingunum signir landsstýrið frá, at peningurin er ætlaður til 2. byggistig av skúla í eystara býarparti og kloakkgerð.

Fíggjarnevndin hevur fingið upplýst, at tánini hjá Tórshavnar býráð til dagin í dag eru 33.966.000 kr., og av hesum er landskassaveðhald fyri 11.290.000 kr.

Áliknaði skatturin 1973/74 var 25.502.000 kr. og áliknaði skatturin 1974/75 34.300.000 kr.

Fíggjarnevndin tekur einmælt undir við uppskoti landsstýrisins.

FÍGGJARNEVNDIN, 11. mars 1975.

Jógvan Durhuus **Signar Hansen** **Poul Jacob Olsen**

Hilmar Bech **Hákun Djurhuus** **Asbjørn Joensen**

Pauli Ellefsen

2. viðgerð 12. mars. Frávik frá tíðarfrestini.

Gr. 1 samtykt 22—0. Alt uppskotið og at fara til 3. viðgerð samtykt við 22—0.

3. viðgerð 19. mars. Lógaruppskotið, sum samtykt við 2. viðgerð, nú endaliga samtykt við 21—0.

15. Flogvøllurin í Vágum

Ár 1975, týsdagin 28. februar, legði Jákup Lindenskov, landsstýrismaður, fram

Uppskot
til

Løgtingslóg um Flogvøllin í Vágum.

§ 1.

Landsstýrinum verður heimilað at fremja niðanfyri tilskilaðu tiltøk viðvíkjandi flogvøllinum í Vágum og at taka tey lán, sum í hesum sambandi verða neyðug:

1. At leingja vøllin við 300 m — frá 1100 m til 1400 m ,
2. at gera tað, sum neyðugt er fyri at hesin vøllur samsvarar tilmælum ICAO's viðvíkjandi breidd og trygdarøkjum og
3. at seta upp ljós í tann mun, avvarðandi myndugleikar halda vera hóskandi.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi heiman vegin.

Løgtingslov om Flyvepladsen i Vágum.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til at lade fremme nedennævnte arbejder vedrørende flyvepladsen i Vágum og at optage de i denne forbindelse nødvendige lån.

1. Forlængelse af startbanen med 300 m — fra 1100 m til 1400 m,
2. udførelse af det, der er nødvendigt for at bringe banen i overensstemmelse med ICAO's anbefalinger om bredde og sikkerhedszoner samt
3. installationen af belysningsanlæg i den udstrækning, vedkommende myndigheder finder det påkrævet.

§ 2.

Denne lov træder straks i kraft.

Viðmerkingar:

Í Løgtingsmáli nr. 68/1973 varð samtykt at góðtaka, at landsstýrið fór undir samráðingar við rikismyndugleikarnar um

1. at nýggj innflúgvingartól verða uppsett í Vágum sum skjótast og
2. at flogvøllurin verður longdur til umleið 1400 m.

Hesar samráðingar hava verið havdar og í bræv frá rikisumboðsmann-

inum til landsstýrið dagfest 31. oktober 1974 verður boðað frá, at ríkismyndugleikarnir eru sinnaðir at taka lut í útreiðslunum til leinging av flogvøllinum, sum er mett at kosta 10 mill. kr., við helvtini, tó í mesta lagi við 5 mill. kr., og somuleiðis at rinda 50% av lí, tað kostar at gera vøllin út við ljósi í tanu mun, avvarðandi myndugleikar halda vera neyðugt. Kostnaðurin av hesi útgerð er leysliga mettur at verða 4 mill. kr.

Donsku loftferðslumyndugleikarnir hava gjørt kanningar fyri at finna fram til frægastu radionavigatorisku hjálpartólini, og helst verða royndarinnleggingar framdar í næstu framtíð. Kostnaðin av hesum royndum og møguliga varandi innleggingum rindar ríkiskassin allan.

Tá ið flogførini verða størri, koma og fara fleiri fólk í senn; deils hetta og deils tann støðugt vaksandi ferðafólkastreymurin gera, at í hesum sama viðfangi eisini nega útvegast rúmsáttari avgreiðsluhøli, og hevur tí danska loftferðslustjórnin í kvittanum at byggja nýggj avgreiðsluhús sum hava gólvvídd, ið er einar tvær ferðir hana í húsunum, sum eru.

Eisini verður neyðugt at økja munandi um parkeringsøki fyri flogfar eins og fyri bilar.

Kostnaðurin av hesum tiltøkum er mettur at verða einar 10 - 12 mill. kr., tá ið av tormar, og verður hann allur rindaður úr ríkiskassanum; roknað verður við, at farið kann verða undir hesi arbeiði einaferð í komandi fíggjarári, og at tað tekur um 1½ ár at fullføra tey.

Partur landskassans av útreiðslunum, ið standast av at útbyggja flogvøllin í Vágum, skuldi soleiðis eftir teim leysligu kostnaðarætlanum, ið liggja fyri verið um 7 mill. kr.

1. viðgerð 27. februar. Málið beint í fíggjarnevndina, sum 12. mars legði fram soljóðandi

Álit

25. februar 1975 legði landsstýrið løgtingsmál nr. 15/1974: Flogvøllurin í Vágum fyri tingið og varð málið við 1. viðgerð 27. februar beint í fíggjarnevndina.

Í § 1 í lógaruppskotinum verður sagt frá, at landsstýrinum tørvar heimild viðvíkjandi tiltokum fyri at fáa flogvøllin í Vágum meira útbygdan og settan í betri stand.

Tiltøkini eru hesi:

Flogvøllurin verður longdur við 300 metrum.

Flogvøllurin verður breiðkaður og fær trygdarøki samsvarandi tilmælum frá ICAO.

Flogvøllurin fær ljós samsvarandi tí, myndugleikar halda vera hóskandi.

Í viðmerkingunum frá landsstýrinum verða útreiðslurnar til leingjan

av vøllinum mettar at kosta 10 milj. kr. og hava ríkismyndugleikarnir givið tilsøgn um at rinda helvtina, tó í mesta lagi 5 milj. kr.

Eisini hava ríkismyndugleikarnir játtað at rinda helvtina av tí, tað kostar at flogvøllurin fær ljós. Leysliga er kostnaðurin av hesum mettur til 4 milj. kr.

Í kostnaðartalinum er íroknað, sambært tað fíggjarnevndin hevur fingið at vita, útreiðslutalið av at gera flogvøllin breiðari og við trygdarøkjum.

Aftur at hesum leysliga mettu útreiðslutølum uppá 14 milj. kr. upplýsir landsstýrið, at talan er eisini um at útstýra flogvøllin við frægastu radionavigatoriskum hjálpartólum, rúmsáttari avgreiðsluhúsum og munandi øktum parkeringsøki, bæði fyri flogfør og bilar.

Hesar útreiðslur, ið verða mettar til einar 12 miljónir kr. skal ríkiskassin rinda einsamallur.

Her er sostatt talan um eina samlaða flegging uppá kanska 26 - 30 milj. kr.

Spurdur undir 1. viðgerð, um hetta, at vit taltóku við helvt í útbyggingini av flogvøllinum viðvíkjandi leingjan, breiðkan og við hóskandi ljósi, skapti «præsedens», tá málið við floghavnum einaferð kemur fyri aftur, svaraði løgmaður, at so var ikki, tað ið her var talan um, var ein fyribilsloysn, hvørs fíggjan onki hevur við fíggjanina av hinum stórmálinum at gera.

At flogvøllinum í Vágum tørvar ábøtur, tekur fíggjarnevndin undir við landsstýrinum um, og er hetta samsvarandi áskoðan løgtingsins í løgtingsmáli nr. 68/1973.

Fíggjarnevndin mælir sostatt at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 14. mars. Gr. 1 samtykt 21—0. Alt málið og at fara til 3. viðgerð samtykt við 21—0.

3. viðgerð 14. mars, frávik frá tíðarfrestini.

Uppskotið, sum samtykt við 2. viðgerð, nú endaliga samtykt við 22—0.

---

16. Lóg um endurgjald fyri kjarnorkuskaðar

Ár 1975, týsdagin 25. februar, legði Jákup Lindenskov, landsstýrismaður, fram

Uppskot
til
samtyktar.

Eftir § 43 í lóg nr. 332 frá 19. juni 1974 «Om erstatning for atomskader (nukleare skader)» mælir landsstýrið ríkisstýrinum til, at henda lóg verður at sela í gildi fyri Føroyar við kongaligari fyriskipan.

Viðmerkingar:

Lógin avloysir lóg nr. 170 frá 16. mai 1962 «Om nukleare anlæg (atomanlæg)», sum varð sett í gildi fyri Føroyar við kongaligari fyriskipan nr. 462 frá 2. august 1973, sbr. løgtingsmál nr. 58/1972.

Lógarbroytingin er neyðug fyri at lúka ymsar millumlandasáttmálar, sum gjørdir eru síðani lógin frá 1962 kom í gildi. Lógin hevur helst ongan praktiskan týdning fyri Føroyar, men tá hon inniheldur reglur um eftirlit við at sáttmálar um ikki spjaðing av kjarnorkuvápnum verða hildnir, verður mælt til, at lógin eisini verður sett í gildi fyri Føroyar.

Viðlagt fylgir eintak av lógini.

1. viðgerð 28. februar. Málið beint til 2. viðgerð utan nevndarviðgerð.

2. viðgerð 19. mars. Uppskot landsstýrisins varð samtykt við 21 - 0 atkvøðum.

F.L. j. nr. 933/6. Sí eisini Lov nr. 332 af 19. juni 1974. Lov om erstatning for atomskader (Nukleare skader).

17. Keyp av skipi til millumlanda- og innanoyggja sigling

Ár 1975, týsdagin 25. februar, legði Finnbogi Isaksen, landsstýrismaður, fram

Uppskot
til

løgtingslóg um keyp av skipi til millumlanda og innanoyggja sigling.

§ 1.

Landsstýrinum verður heimilt at keypa skip til millumlanda og innanoyggja sigling og landskassans vegna at taka upp til 20 milj. kr. í láni til hetta endamál.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

lagtingslov om køb af skib til udlands og indenø's sejlads.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til at købe et skib til udlands og indenø's sejlads og landskassens vegne at optage lån op til 20 mill. kr. til dette formål.

§ 2.

Denne lov træder straks i kraft.

Viðmerkingar:

Landsstýrið hevur kannað møguleikarnar fyri at koma tørvinum á einum størri og betri útgjørdum skipi til Suðuroya-siglingina og tørvinum á skipi til millumlanda sigling á møti. Smyril er ov lítil til Suðuroya-siglingina um høgtíðirnar og vikuskiftini, serliga um summarið, skipið er einaferð tikið fyri at hava havt ov nógv ferðafólk. Eitt projekt er gjørt til bygging av nýggjum Smyrli og mett verður, at byggingin kemur at kosta einastaðni millum 50 og 60 milj. kr.

Í november í fjør tók landsstýrið tí í staðni upp samráðingar við Mols-linjuna, ið hoyrir undir D.F.D.S., um møguleikarnar at keypa ferguna MORTEN MOLS, sum røkir fergusamband millum Æbeltoft og Sjællands Odde. Í ár hava umboð fyri landsstýrið aftur verið í Danmark og kannað málið og hava havt samráðingar við D.F.D.S. um keypsprísin. Skipið, sum er bygt í 1969, kann fáast fyri 25,7 milj. kr. Tað er klassað í juni 1974.

Hetta skip er stórt og kann kanska sigast at vera í størra lagi, um tað

einans skal røkja Suðuroya-siglingina, men tað er væl hóskandi til aðra sigling eisini. Landsstýrið hevur uppskot um, at skipið, um tað verður keypt, skal sigla til Suðuroyar, til Klaksvíkar, til Bergen, til Hetlands og til Islands. Ætlanin er, at uttanlandssiglingin bert skal røkjast um summarið.

Skipið hevur 4 B & W høvuðsmotorar uppá tilsamans 10.000 hestar, 2 motorar eru koblaðir til hvørm av teimum báðum propellunum, og harafrat eru eisini bókpropellir, 800 hestar. Hetta er hent fyri okkum til sigling í teimum havnum, sum ætlanin er at bróka tað til m.a. í Tórshavn, í Klaksvík, á Tvøroyri og í Vági, tí hesar havnir eru trongar.

Skipið er væl útgjørt við navigatiónsútgerð.

Eisini til ferðafólkaflutning er tað væl útgjørt. Tað hevur 3 matsalar, 2 eru á hvør sínari hædd undir brúnni, og 1 er á høvuðsdekkinum aftan. Hesin seinasti matsalurin verður nú bert brúktur, tá ið skipið er fult av ferðafólki, og tað vil siga, at hann er ikki ofta í nýtslu. Ætlanin hjá landsstýrinum er at broyta henda matsalin soleiðis, at hann verður gjørdur til kømur í staðin fyri. Teir báðir fremru matsalarnir hava umleið 300 sitipláss tilsamans. Aftrat hesum eru so 40 flúgvarasetur úti í hørðinum framvið fann aftasta matsalin. Til børn er eisini spælirúm, og gongirnar eru góðar og rúmsáttar við rættiliga nógvum sitiplássum. Viðvikjandi koyggjum til ferðafólk er at siga at roknast kann við umleið 50, soleiðis sum skipið er útgjørt í løtuni, og harafturat koma so tær koyggjurnar, sum verða gjørdar í tí aftasta matsalinum. Flúgvarasetrini kunnu eisini brúkast sum liggistólar.

Skipið hevur neyðútgerð til 800 ferðafólk og umuning eftir galdandi reglum hjá Statens skibstilsyn. Viðvikjandi aðrari tryggdarútgerð, so uppfyllir skipið øll krøv, ið millumlanda konventiónir seta. Tað er onki til hindurs fyri at fáa loyvi frá Statens Skibstilsyn til sigling millum land eisini. I løtuni verður fingast, um hvørjar smærri broytingar skulu gerast fyri at lúka tey krøv, ið verða sett til hetta endamál.

MORTEN MOLS hevur ongar bumnar ella kranar. Øll lossing og lasting verður gjørd eftir roll-off - roll-on málanum.

Skipið hevur 2 maskinrúm, eitt til høvuðsmaskinurnar og eitt til hjálpimotorarnar og annað.

Skipið siglir, tá ið tað nýtir alla maskinnegina, góðar 20 mil og roknað verður við, at tað kann sigla 18 mil, tá 6.000 hestar verða brúktir. Hetta er tann ferð, ið ætlanin er at nýta vanliga. Skipið hevur loyvi at flyta 800 ferðafólk um summarið og 558 um veturin. Tað tekur 110 bilar ella kann ferma 1.000 tons um bildekkið í staðin verður brúkt til furu.

Koyrast kann umborð, t.d. harafturí, og í land harframmí, men hetta verður ikki gjørligt beinanvegin á øllum plássum í Føroyum av tí, at havnaviðurskiftini eru ikki gjørd til tað. Tað kann nevnast, at leiðslan

í Tórshavnar havn er sinnað at nýta krókin við havnaskrivstovuna, har tað ber til beinleiðis at koyra í land ella umborð t.d. gjøgnum frammendan. Í Klaksvík kann fergulegan ikki brúkast, so skipið fer vænlandi fyribils at nýta ta stóru atløgubryggjuna á vestara armi. Her má, eins og á Tvøroyri og í Vági, verða brúkt síðuportur, ið eisini er á skipinum.

Ferðin er so mikið stór, at ferðingartíðin úr Havn til Suðuroyar kemur at liggja um 2 tímar, og úr Havn til Klaksvíkar er tíðin umleið 1 tíma. Siglingin úr Føroyum til Bergen tekur millum 18 og 20 timar.

Tað er ætlanin at hava dupulta manning, sum hevur tilsamans 16 fólk hvør: 1 skipara, 2 stýrimenn, 1 maskinstjóra, 1 meistara, 4 matrósar, 2 motormenn, 1 kokk og 4 gentur. Aftrat hesum kemur nakað av eyka fólki til uttanlandatúrarnar. Viðvíkjandi rakstrarmeting verður annars víst til hjálagda yvirlit, sum løgtingsgrannskoðarin Jógvan Sundstein hevur gjørt. Eftir hesi uppseting eru inntøkurnar fyri 1 ár mettar til 8,7 milj. kr. tilsamans, og útreiðslurnar eru mettar til 8,4 milj. kr., soleiðis at 350.000,— kr. skulu verið eftir til rentur og avdrátt. Annars er ætlanin, at landskassin skal rinda rentur og avdrátt, sum tað fyrsta árið, eftir teimum lániupplýsingum, ið eru tøkar í løtuni, koma at verða 4,6 milj. kr.

Roknað verður við, at landskassin skal taka umleið 18 milj. kr. í láni, meðan restin verður goldin kontant. Tað fáast 2,75 milj. kr. í láni frá D.F.D.S., og restin kann fáast úr Skibskredittfondinum.

Tann núverandi SMYRIL verður boðin út til sølu beinanvegin, og søluperningurin fyri hann gongur inn í keypið av MORTEN MOLS.

Fimbogi Isaksen
landsstýrismaður

/ J. Djurhuus

Rakstraætlan fyri nýggjan Smyril
(Morten Mols, bygdur í 1969)

INNTØKUR:

Suðuroyarutan:

70.000 ferðafólk á 38/-	2.660.000,00	
14.000 bilar v/ førara á 75/-	1.050.000,00	
Farmaflutningur	750.000,00	4.460.000,00

Norðoyarutan:

35.000 ferðafólk á 28/-	980.000,00	
6.00 bilar v/ førara á 55/-	330.000,00	
Farmaflutningur	350.000,00	1.660.000,00

Kiosk — Cafeteria (30% av 1.000.000,00)		300.000,00
Koyggjur (10.000 á 20/-)		200.000,00
Postur		300.000,00
		6.920.000,00

Bergensrutan: (10 ferðir)

2.800 ferðafólk á 280/-	784.000,00	
750 koyggjur á 100/-	75.000,00	
600 bilar á 180/-	108.000,00	
Farmur	200.000,00	
Kiosk og Cafeteria	120.000,00	1.287.000,00

Islandsrutan: (4 ferðir)

800 ferðafólk á 280/-	224.000,00	
400 koyggjur á 100/-	40.000,00	
125 bilar á 180/-	22.500,00	
Farmur	20.000,00	
Kiosk og Cafeteria	35.000,00	341.500,00

Hetlandsrutan: (4 ferðir)

800 ferðafólk á 200/-	160.000,00	
200 koyggjur á 100/-	20.000,00	
100 bilar á 75/-	7.500,00	
Kiosk og Cafeteria	35.000,00	222.500,00
		8.771.000,00

ÚTREIÐSLUR:

Hýrur (32 fólk á 65.000,00)	2.080.000,00
Bykalon í sambend við uttanlandssigling	160.000,00
Kostpeningur	160.000,00
Oljunýtsla innanoyggja	3.250.000,00
Oljunýtsla uttanlanda	650.000,00
Skipasmiðjuútreiðslur (dokkseting)	400.000,00
Aðrar viðlíkahalds- og umsitingarútreiðslur	900.000,00
Trygging - 2% av kr. 26.000.000,00	520.000,00
Ymsar útreiðslur	300.000,00
	8.420.000,00
Til rentur og avdráti	351.000,00

Íloguútreiðslur: (keypsprísur 25,5 mill. kr.)

1. árið:

Rentur:

Skipskreditfond (7,1 mill. kr. — 5,5% p.a.)	390.000,00	
Skibskreditfond (9 mill. kr. - 7,5% p.a.)	675.000,00	
D.F.D.S. (seljarapant 2,75 mill. kr. 8% p.a.)	220.000,00	1.285.000,00

Avdráttur:

Skibskreditfond	2.840.000,00	
D.F.D.S.	550.000,00	3.390.000,00
Landskassin at rinda 1. árið		4.675.000,00

3. árið:

Rentur:		
Skibskreditfond	658.000,00	
D.F.D.S.	110.000,00	768.000,00
Avdráttur:		
Skibskreditfond	2.572.000,00	
D.F.D.S.	550.000,00	3.122.000,00
Landskassin at rinda 3. árið		3.890.000,00

7. árið:

Ongar rentur
Ongin avdráttur

Frammanfyristandandi rakstrarætlan er uppsett eftir teim uppførdu fyritreytum (tali av ferðafólki, prísum v.m.)

Fløgútreiðslurnar eru uppsettar eftir væntaðum lánum og forútseta eina eginfíggjan uppá 7-8 mill. krónur. Alternativir lánimøguleikar eru til stoðar.

Landskassans útreiðslur kunnu minkast við møguligum rakstraryvirskoti.

Tórshavn, hin 14. februar 1975

J. Sundstein
statsaut. revisor

1. viðgerð 26. februar. Frávik frá tíðarfrestini. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 6. mars legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fyri løgtingið av landsstýrinum 25. februar í ár og varð undir 1. viðgerð 26. februar beint í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meirilutu og ein minnilutu.

Meirilutin (Poul Jacob Olsen, Hilmar Beck, Jógvan Durhuus og Signar Hansen) førir fram:

Uppskotið frá landsstýrinum um keyp av skipi til innanoyggja og millumlanda sigling er ein rættiliga stór ætlan, og figgjarnevndin hevur tí viðgjørt hetta mál serliga gjølla. Á fundi við figgjarnevndina hava verið landsverkfrøðingurin Mikkjal Helmsdal, Jens Petur Arge, Alfred Jacobsen, stýrimaður, Niclas Magnussen og Johannes Nicolajsen frá teknisku deild landsstýrisins, Sofus Sivertsen, skipasýnismaður, Tummas Arabo frá strandferðsluni, Jóhan Ziskason, havnameisturi í Klaksvík, Atli Dam, løgmaður, Finnbogi Isaksen, landsstýrismaður og Demmus Hentze, landsstýrismaður. Haraftanat hevur figgjarnevndin útvega upplýsingar um tey krøv sum klassin og skipasýnið seta fyri at geva hesum skipi loyvi til sigling í Norðuratlantshavi. Meirilutin hevur tø fatan eftir samrøðurnar, at menn yvirhøvur halda skipið vera vælhóskandi til sigling her, og at tað við smærri broytingum lýkur tær treytir, ið setast skulu til eitt skip í sigling um okkara leið.

Meirilutin ásannar, at tað er avgjørt stórur tørvur á at fáa nýtt far serliga til Suðuroya sigling, av tí at Smyril er ov lítil og mangan um viku-skiftini siglir við ov nógvum fólki. Tað er ikki beint, at tað almenna hevur eitt ferðaskip, ið siglir við fleiri ferðafólkum eftir lógarreglurnar ásetta, og tað er tí avgjørt neyðugt at vend kemur í her. Samstundis ásannar meirilutin, at tað er tørvur á einum skipi til millumlandasigling. Hetta skipið kemur partvis at loysa henda spurning, sum hevur verið frammi í politiska orðaskiftinum nú í mong ár.

Verður hetta skip keypt, kemur tað at loysa spurningin um flutning av ferðafólki innanoyggja mong ár framyvir.

Figgjarnevndin hevur eisini gjølla viðgjørt ta uppseting yvir inntøkur og útreiðslur, sum fylgir við málinum frá landsstýrinum.

Undir orðaskiftinum um keypið av Morten Mols hevur verið frammi um skipið var nóg dygdargott. Á fundi í figgjarnevndini hevur stjórin á skipasýninum Sofus Sivertsen sagt, at stabilitetirin er tann besti, og at skipið í heila tíkið má metast at vera eitt ógvuliga gott skip. Hann hevur, at onki var til hindurs fyri, at skipið kundi sigla um okkara leiðir bæði summar og vetur, og er hetta váttað sambært telex frá Lloyds og skipasýninum. Hann roknaði tó við, at talið á ferðafólkum fór at verða nakað lægri sett til vetrasigling. Alfred Jacobsen, stýrimaður á Smyrli segði á fundi í figgjarnevndini, at skipið kann brúkast við teimum havnaviðurskiftum, sum vit hava, og at tað við tí útgerð, sum tað hevur, er lætt at manøvrera undir ymiskum veðurlíkindum. Hann metti, at skipið fór at

vera róligt, tí tað er so breitt, og at tað ikki átti at leggja seg nógv á liðina, sjálvt um tað er nógvur vindur.

Meirilutin heldur, at í komandi árum fer talið av ferðafólkum at vaksa og at javnvág fer at verða ímillum innføkur og útreiðslur, íð hvussu so er, tá eini tvey ár eru farin. Sjálvt um nakað av undirskoti verður, heldur meirilutin tað vera rætt at keypa hetta skip bæði fyri at loysa innanoyggja og millumlanda siglingina.

Spurningurin hevur eisini verið frammi, um skipið kann nýtast í havnini í Klaksvík. Her kann vísast á, at størri skip enn hetta hava siglt uppá Klaksvíkina fyrr. Havnarnevndin í Klaksvík hevur í brævi sagt, at hon vil lata aðra síðuna av pierinum á vestara armi til Morten Mols.

Hvat teimum fíggjarligu viðurskiftunum sum heild viðvíkir í dag, vil meirilutin vísa á tað, sum løgmaður hevur ført fram í nevndini, har hann segði, at yvirhøvur eru tey fíggjarligu viðurskiftini ikki so vánatig, sum tað hevur ljóðað. Løgmaður metti, at við keypinum av Morten Mols er talan um eina beinleiðis fyrstuútreiðslu uppá 6 til 7 milj. kr., og at henda útreiðsla í mun til fíggjarlógina annars og tær uppgávur landskassin noyðist at átaka sær, ikki er ov stór til at vit kunnu greiða hana uttan at nerva onnur samfelagsøki.

Tað hevur verið nevnt, at maskinarnið á Morten Mols ikki var tað besta. Fíggjarnevndin hevur spurt seg fyri hjá maskinkonum mannum og hjá Lloyds og hevur bæði munnliga og skrivliga fingið vissu fyri, at maskinurnar eru í lagi.

Meirilutin mælir tí til at samtykkja uppskotið frá landsstýrinum.

Minnilutin (Hákun Djurhuus, Asbjørn Joensen og Pauli Ellefsen) førir fram:

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið á tann hátt, at hon eftir førinnni hevur kannað og metti um støðið undir teimum ymiskn sjónarmiðunum, íð komu fram undir orðaskiftinum við 1. viðgerð av hesum tilmæli landsstýrisins um keyp av ferjuni «Morten Mols».

Ætlan landsstýrisins við hesum keypi er at loysa tvær uppgávur undir einum.

Innanoyggjasiglingarspurningin í sambandi við Suðuroynna, og millumlandasiglingarspurningin við ferðasambandi um summarið við Noreg, Hetland og Ísland.

Fíggjarnevndin hevur fingið upplýst, at Danmarkarsigling ikki kann samskipast við innanoyggjasigling.

Viðvíkjandi innanoyggjasiglingini verður sagt í viðmerkingunum til málið, at Smyril er ov lítil til Suðuroya-siglingina um høgtíðirnar og vikuskiftini, serliga um summarið, og at skipið einaferð er tikið fyri at hava havt ov nógv ferðafólk.

Fíggjarnevndin er samd um at laka undir við tí áskoðan, at spurning-

urin um Suðuroyar-siglingina verður forsvarliga loystur eftir tørvi og á ein slíkan hátt, at tað er eitt rímuligt forhold millum tørv og kostnaðin, **ið tað almenna skal gjalda.**

Viðvíkjandi sjálvari ferjuni er at siga, at hon er 92,66 m long og 16,84 m breið. Hon er útgjørd við 4 B & W dieselmotorum á 2.500 hestar = ialt 10.000 hestar. Lloyds hevur veitt siglingarloyvi til heilárssigling undir ávísum treytum.

Undir 1. viðgerð av málinum ivaðust menn um, at útreiðslutølini av ferjukeypinum fóru at halda, hjálagt málinum var rakstrarætlan, ið bygdi á keypsprísin 25,5 milj. kr.

Sambært tað, ið framkomið er undir figgjarnevndarviðgerðini, verða ábøtur av ferjuni eftir krøvum frá klassanum at kosta 2,8 milj. kr. aftrat, men kundi hetta ikki fáast upplýst fyri vist, tí onki fast tilboð fyrilá.

Í rakstrarmetingunum er roknað við søla av Smyril, og eru 8-10 milj. kr. nevndar. Um hetta sigur Tummas Arabo á fundi í figgjarnevndini 3. mars: «Tó er tað ein stórur spurningur, um ikki tað er orsøk til at steðga við at selja m/s Smyril til heystar.»

Viðvíkjandi sjálvum rakstrartølunum, ið siga frá eini árligari útreiðslu hjá landskassanum uppá 4.675.000 kr. sigur Jens Peter Arge, stjóri, á fundi í figgjarnevndini 28. februar, at eftir hansara áskoðan verður:

1. Undirskotið størri enn mett.
2. Skipið er ov stórt,

og hann metir hallið at koma uppá umleið 8-9 milj. kr. árliga, rakstur + fløgutútreiðslur (renta + avdrátt).

Hetta við støddini var eisini frammi undir 1. viðgerð, har sama áskoðanin um, at skipið var ov stórt, gjørdi vart við seg.

Skuldi tað vist at millumlandasiglingin kom at verða ein tyngri figgjarlig byrða, enn vit kunnu standa undir, koma vit við slíkum keypi at hava eitt skip til Suðuroyasiglingina, ið tekur 800 ferðafólk og upp til 110 bilar pr. túr.

Roknað við tí ferðafólki, ið var seinasta ár, vil hetta vetrarhálvárið geva 36 ferðafólk í meðal pr. túr og summarhálvárið 63; túrar hjá avloysingarskipi tá ikki tiknir við.

Taka vit so møgulig útreiðslutøl uppá 8-9 milj. kr. árliga í halli, so er eftir okkara tykki her onki rímiligt forhold millum tørv og kostnað. Undir 1. viðgerð var gjørt vart við, at her var talan um eina ferju, men ongastaðni, har skipið skal leggja at, er nøkur brúkilig ferjulega.

Upplýst er yvirfyri figgjarnevndini, at ætlanin er fyribils at nýta jarnlemmar eftir eini serligari konstruktión, men tað sigur seg sjálvt, at kravið um stórt miljónbeløb til ferjulegu stendur á gáttini um álvara gerst burtur úr keypinum.

Okkara fíggjarvánir eru so hættisligar, at tær krevja størsta varsemi í okkara peningaforbrúki, eisini frá almennari síðu. Vit hava ikki ráð til at yvirdimensionera nakað í hesari tungu tíð, nú vinnulívið stendur yvirfyri slíkum avbjóðingum, ið vit ikki enn hava tøl fyri kunna koma at tørva tí, um ikki alt ov nógv skal fara í skeljar.

Samsvarandi tí í álitinum framførda, kann ikki verða tikið undir við landsstýrisins uppskoti um keyp av «Morten Mols», men setir minnilutin (Hákun Djurhuus, Asbjørn Joensen og Pauli Ellefsen) fram soljóðandi

Uppskot
til
samtyktar

1. Landsstýrinum verður álagt at fyriveika byggjan av nýggjum straumdfaraskipi til Suðuroynna út frá teimum sjónarmiðum, at tað verður eitt ríminligt forhold millum tørv og tann kostnað, tað almenna skal gjalda.
2. Landsstýrið tekur avgerð saman við fíggjarnevnd løgtingsins, tá slík bygging verður at seta í verk.

2. viðgerð 7. mars. Frávik frá tíðarfrestini.

Minniluta uppskot frá Hákun Djurhuus, Paula Ellefsen og Asbjørn Joensen fall við 9—0. Gr. 1 í landsstýrisuppskotinum samtykt 15—0. Alt uppskotið og at fara til 3. viðgerð samtykt við 15—0.

3. viðgerð á seinni fundi sama dag. Frávik frá tíðarfrestini. Lógaruppskotið nú endaliga samtykt við 15—0.

18. Fiskirættindi Føroyinga undir Íslandi

Ár 1975, hósdagin 27. februar, legði Atli P. Dam, løgmaður

Uppskot
til
samtyktar.

Løgtingið tekur til eftirtektar viðløgdu skipan frá 22. februar 1975 um rættindi hjá føroyskum skipum at veiða undir Íslandi við snøri (snellu), línu og troli.

Viðmerkingar:

1. Eftir avgerð Íslands um at flyta fiskimarkið út frá 12 til 50 fjórðingar 1. september 1972 fóru fram samráðingar millum landsstýrið og íslendsku stjórnina um fiskirættindi føroyinga á íslendsku landleiðini.

Semjur vórðu gjørdar 16. august 1972 fyri veiðurættindini hjá føroyskum snellu- og línuskipum og 20. september 1972 fyri veiðurættindini hjá føroyskum trolarum, sí løgtingsmál nr. 34/1972.

Tann tá avtalaða skipanin fyri snellu- og línuskipini bar í høvuðsheitum í sær, at skipini eftir at hava fingið veiðuloyvi kundu fiska á landleiðini sum áður. Skipanin fyri trolararnar bar haraftarímóti í sær skerjingar í áður galdandi rættindum við at geva veiðuloyvi til ávísar navngivnar trolarar og við ikki at loyva 3 føroyskum íduaðartrolarum (frystitrolarum) at veiða innan fyri 50 fjórðingamarkið.

2. Á vári 1974 heitti landsstýrið á íslendsku stjórnina um samráðingar við tí í hyggju at tingast um reglurnar fyri føroyska trolfiskiskapin undir Íslandi.

Fyrst vegna alfingsvalið í Íslandi og síðani løgtingsvalið í Føroyum lá ikki fyri, at samráðingar kundu fara fram fyrr enn 21. og 22. februar 1975.

Imeðan hevði íslendska stjórnin gjørt av at flyta fiskimarkið út til 200 fjórðingar í 1975. Eisini hevði landsstýrið fingið boð um, at frá 1. januar 1975 var ikki loyvt teimum stóru nútimaus føroysku saltfiskatrolarunum at veiða á íslendsku landleiðini.

F.L. j. nr. 1500-2-4.

3. Um innihaldið í tí nýggju skipanini, sum semja fekst um 22. februar í ár, verður vist til viðløgdu skjøl, har skipanin er endurgivin á íslendskum og á føroyskum máli. Hendan skipan avloysir higartil galdandi skipanir.

Harumframt skal landsstýrið gera hesar viðmerkingar til nýggju skipanina:

(a) Avgerandi munurin millum hana og higartil galdandi reglur er, at hon frá 1. juli 1975 ásetur eitt hægstamark (eina kvotu) uppá 20.000 tons árliga fyri allan føroyskan fiskiskap undir Íslandi, meðan eitt slíkt hægstamark ikki higartil hevur verið galdandi.

20.000 tons svara til meðalveiðuna hjá føroyska skipanum undir Íslandi í tíðarskeiðinum 1972 - 74. Samanborið við heildarveiðuna í 1974, sum fyribils er mett til sløk 22.000 tons, er talan um niðurskurð uppá umleið 10%.

Í eini meting av kvotuni er vert at hava í huga, at grundarlagið undir skipanunum millum Ísland og ávikavist Bretland og Belgia er viðvíkjandi skerjingini av loyvdu veiðuni meðaltalið fyri síðstu 5 ára veiðu nógv minkað, umleið 30%. Vert er eisini at nevna í hesum viðfangi, at einasta útlendska veiða undir Íslandi, hesi síðstu 2-3 árini, sum ikki er minkað, er veiða føroyinga, sum tvørturímóti síðan 1972 er munandi økt. Eisini hevur tað týdning fyri metan av kvotuni, at íslendska veiðunøgdin serliga av toski stórt sað er óbroytt hesi seinastu 3 árini hóast útskifting av eldri trolarum við nýggjum (40) og hóast útflyting fiskimarksins.

(b) Veiðan, sum telur við í kvotuni, er allur fiskur veiddur eftir 1. juli 1975. Mett út frá teimum sjónarmiðum, sum íslendska stjórnin hevur grundað sína støðu til kvotering av føroyskum fiskiskapi á, hevur landsstýrið út frá tí, ið varð hildið fram undir samráðingunum, fingið ta fatan, at man frá íslendskari síðu er sinnaður til samráðingar seinni um eina hækking av kvotuni, kanska tá ein, eftir at kvotan hevur verið galdandi t.d. eitt ár, hevur greiðu á hæði føroysku veiðunøgdini og gongdini hjá íslendska heimafiskiskapinum.

(c) Fyri linuskipini ber nýggja skipanin stóra sað ouga broyting í sær í mun til higartil galdandi reglur.

Hjá snørisskipunum er talan um eina munandi einfaldari skipan viðvíkjandi loyvdu veiðuøkjunum innan fyri 12 fjórðingar enn tær reglur, ið hava verið galdandi síðani semjuna frá 1. august 1961 millum íslendsku og donsku stjórnina.

Nú er loyvt at veiða við snøri (snellu) alla staðni inn móti 4

fjórðingum frá grunnlinjuni, sum hon er fastløgd í íslendskari reglugerð frá 1972. Hendan reglugerðin broytir á ávísum strekkjum grunnlinjuna, sum var galdandi eftir skipanini frá 1961. Snelluveiða er tó loyvd heilt inn til grunnlinjuna ein stóran part á norðlandinum og petti av eystarlandinum frá Langanesi og suðureftir. Harafturímóti er snelluveiða ikki loyvd innan fyri 12 fjórðingar frá Snæfjallsjøklinum og vestur til Oyggjarnar 1. januar til 15. mai.

(d) Fyri trolfiskiskap er galdandi, at 10 trolarar fáa veiðuloyvi til ísfisk, men tveimum trolarum (størri og nútímans trolarar) er loyvt í 2 mánaðar í seinua hálvárinum at veiða saltfisk. Hugsað er her um teir báðar bátarnar, sum mistu veiðuloyvi teirra frá 1. januar 1975. Um so er, at ein ella fleiri av teimum 10 navngivnu trolarunum í nakrar mánaðar ikki veiða undir Íslandi, ella teir fara úr fiskiflotanum, eru íslendsku myndugleikarnir sinnaðir til at loyva øðrum trolarum at veiða í teirra stað.

(e) Føroysk skip, sum hava veiðuloyvi á íslandsmiðum, skulu sum higartil í einum og øllum lúka sonn treytir sum íslendsk skip á sonu veiðu.

(f) Sambært nýggju skipanina hava øll føroysk skip, sum veiða undir Íslandi, skyldu til einaferð um dagin at boða íslendsku myndugleikunum frá positiónini. Gjølligari reglur hesum viðvíkjandi eru ikki enn ásettar, men hetta verður gjørt um stutta tíð. Talan er annars um eina skyldu, sum íslendsk og útlendsk skip longu hava. Orsøkin til skylduna er umframt, at íslendska sjóverjan altíð veit um øll skip undir Íslandi, eitt trygdartiltak.

(g) Tann nýggja skipanin er eftir orðalagnum galdandi til 13. november 1975. Hesin dagurin er settur, av tí at sáttmálarnir millum Ísland og ávikavist Bretland og Belgia um fiskirettindi undir Íslandi fara úr gildi tá. Íslendska stjórnin vil ikki í løtuni ganga við til sáttmálabundnar skyldur út yvir 13. november í ár, m.a. av tí at stjórnin hevur gjørt av at flyta fiskimarkið út til 200 fjórðingar í seinasta lagi henda dag.

Soleiðis sum skipanin um føroyska fiskiskapin undir Íslandi er orðað, er grund til at roknu við, at tað stutta skeiðið, sáttmálin er galdandi, í veruleikanum ikki fer at ávirka føroysku fiskirettindini í rímuliga tíð aftaná 13. november 1975.

4. Føroyska sendinevndin til tingingarnar við íslendsku stjórnina hevði hesar luttakarar:

Atli P. Dam, løgmaður
Petur Reinert, landsstýrismaður
Erlendur Paturssøn, formaður í løgtingsins marknaðarnevnd
Poul Jacob Olsen, formaður í løgtingsins fiskivinnunevnd

sum ráðgevarar:

Hilmar Kass, sjómansskúlalærari
Jóhan Djurhuus, skrivstovustjóri
Jákup S. Joensen, fiskifrøðingur
Einar Kallsberg, ráðgevari
Jóhan á Plógv, skipari.

Landsstýrið mælir við hesum tinginum til at samtykkja uppskotið til samtyktar.

Sí skjal 5.

1. viðgerð 28. februar. Frávik frá tíðarfrestini.
Málið beint til 2. viðgerð uttan nevndarviðgerð.

2. viðgerð 7. mars. Uppskot til samtyktar frá landsstýrinum endaliga samtykt við 21—0.

19. Veðhald fyri lánið til Eggvirkið

Ár 1975, legði Jákup Lindenskov, landsstýrismaður, fram

Uppskot
til

løgtingslóg um veðhald fyri láni til Føroya Eggvirki.

§ 1.
Landsstýrinum verður heimilt landskassans vegna at veðhalda fyri láni upp til kr. 270.000 til p/f Føroya Eggvirki, Rituvík.

§ 2.
Henda lóg fær gildi beinanvegin.

lagtingslov om garanti for lån til Føroya Eggvirki.

§ 1.
Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at garantere for lån indtil kr. 270.000 til p/f Føroya Eggvirki, Rituvík.

§ 2.
Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Við heimild í løgtingslóg nr. 34 frá 26. apríl 1974 hevur landsstýrið veðhildið fyri einum láni uppá kr. 1.400.000 til p/f Føroya Eggvirki, Rituvík. Lógin gav landsstýrinum heimild til at veðhalda fyri láni upp til 70% av 2 milj. kr. og hægst 70% av metingarvirðinum. Virkið er virðismett til kr. 2.402.282, og sostatt hevði henda virðismeting givið møguleika fyri størri láni við landskassaveðhaldi, um ikki lógin samstundis avmarkaði veðhaldsheimildina til 70% av 2 milj. kr. Uppskot til hesa løgtingslóg varð lagt fram av tingmonnunum fyri Eysturoynna, løgtingsmál nr. 92/1973.

Landsstýrið hevur gjørt felagnum greitt, at í sambandi við hesa veðhaldsvelting verða ymsar treytir at lúka og ein kanning av framtíðarvirkseminum at seta í verk.

1. viðgerð 11. mars og málið beint í fíggjarnevndina, sum 10. apríl legði fram soljóðandi

Álit

Málið: Veðhald fyri láni til Eggvirkið, varð framlagt 6. mars 1975 av landsstýrinum og undir 1. viðgerð 11. mars beint í fíggjarnevndina.

Í viðmerkingum sínum til uppskotið, ið mælir til at geva landsstýrinum

veðhaldsheimild fyri láni upp til kr. 270.000 til p/f Føroya Eggvirki, Rituvík, verður víst á, at tað vóru tingmenninir fyri Eysturoynna, ið løgdu tað uppskot til løgtingslóg fram, ið gav landsstýrinum heimild at veðhalda fyri einum láni uppá kr. 1.400.000 til p/f Føroya Eggvirki, Rituvik.

Samlaða veðhald landskassans til hetta virki verður nú við landsstýrisins uppskoti kr. 1.670.000.

Av felagsins rakstrarroknskapi fyri árið 1974 vísa tølini, tá ongin avdráttur er goldin og uttan avskriving, eitt hall uppá kr. 135.116,52, men av tí, at felagið misti m/s Kongshavn, sum eldur kom í, verður vinningur viðvikjandi m/s Kongshavn uppførdur við kr. 170.424,15, so ársúrslitið verður kr. 35.307,63.

Vørusølan hevur hetta árið verið kr. 1.385.854,82, og kostnaður (fóður, pakkitilfar og farmagjald) kr. 991.551,13, so munurin millum vørusølu og kostnað hevur verið kr. 394.303,69.

Eftir hesum hevur úrslitið av sjálvum rakstrinum, tá vinningurin viðvikjandi m/s Kongshavn verður hildin uttanfyri, verið kr. 191.126,82, áðrenn rentur, avskriving og avdráttur vóru tikin við.

Rentuútreiðslur eru settar til kr. 326.243,34, og gevur tað tá eitt rakstrarligt hall uppá kr. 135.116,52.

Partapeningurin er í A-partabrøvum 400.000 og í B-partabrøvum 200.000, tilsamans kr. 600.000.

Skuldin er ialt kr. 3.184.554,47, hvarav landskassin veðheldur fyri kr. 1.430.806,66.

Bygningur, innrættan, innbúgv og bilur v.m. eru í roknskapinum sett til kr. 2.797.318,48.

Landsstýrið hevur gjørt felagnum greitt, at í sambandi við hesa veðhaldsveiting verða ymsar treytir at búka og ein kanning av framtíðarvirkseminum at seta í verk.

At Búskaparráðið verður uppi í hesari kanning vil fíggjarnevndin mæla til.

Fíggjarnevndin tekur undir við áskoðan landsstýrisins og mælir til at samtykkja landsstýrisins uppskot út frá sama sjónarmiði.

2. viðgerð 11. apríl. Frávik frá tíðarfrestini.

Gr. 1 samtykt við 23—0. Alt uppskotið og at fara til 3. viðgerð samtykt við 23—0.

3. viðgerð 15. apríl. Lógaruppskotið endaliga samtykt við 17—0.

---

20. Yvirtøka av sosialu fyrisitingini. (Lógarbroytingar)

Ár 1975, týsdagin 6. mars, legði Jákup Lindenskov, landsstýrismaður, fram

Uppskot
til
samtyktar.

Løgtingið mælir rikisstýrinum til at leggja hjáløgdu lógaruppskot fyri fólkatingið:

I. Forslag til Lov om ændring af lov for Færøerne om folkepension (Om landsstyrets overtagelse af administrationen m.v.)
II. Forslag til Lov om ændring af lov for Færøerne om invalidepension m.v. (Om landsstyrets overtagelse af administrationen m.v.)
III. Forslag til Lov om ændring af lov for Færøerne om offentlig forsorg (Om landsstyrets overtagelse af administrationen).
IV. Forslag til Lov om ændring af lov for Færøerne om børnebidrag til enlige forsørgere m.v. (Om landsstyrets overtagelse af administrationen).
V. Forslag til Lov om ændring af lov for Færøerne om børneforsorg (Om landsstyrets overtagelse af administrationen m.v.).

Viðmerkingar:

Í løgtingsmáli nr. 80/1973: Yvirtøka av sosialu fyrisitingini hevur Løgtingið 26. mars 1974 samtykt soljóðandi uppskot:

1. Landsstýrið yvirtekur fyrisitingina av sosialu málunum frá 1. apríl 1975.
2. Landsstýrið tekur upp samráðingar við ríkisstýrið um býti av fyrisitingarútreiðslunum.

Í framhald av hesum setur landsstýrið nú fram uppskot til samtyktar viðvikjandi teimum lógarbroytingum, sum eru neyðugar í samband við yvirtøkuna.

F.L. j. nr. 1010-9 — sí eisini skjal 9.

Sí skjal 11.

1. viðgerð 11. mars og málið beint í sosialu nevndina, sum 20. mars legði fram soljóðandi

Álit

Málið, sum er framlagt av landsstýrinum, varð til 1. viðgerð 11. mars 1975 og varð tá beint í sosialu nevndina.

Í løgtingsmáli nr. 80/1973 samtykti løgtingið hin 26. mars 1974 soljóðandi uppskot:

1. Landsstýrið yvirtekur fyrisitingina av sosialu málunum frá 1. apríl 1975.
2. Landsstýrið tekur upp samráðingar við ríkisstýrið um býti av fyrisitingarútreiðslunum.

Sambært hesa samtykt er omanfyrinevnda mál framlagt og inniheldur tað tær lógarbroytingar, sum eru neyðugar fyri, at yvirtøkan av umsitingini kann verða framd. Broytingarnar eru í teirri galdandi lóggávu viðvíkjandi:

1. Fólkapensjón
2. Avlamispensjón
3. Almennaforsorg
4. Barnapening til einligar forsyrgjarar
5. Barnaforsorg.

Á fundi hjá nevndini hevur verið Klaus Hermann, fulltrúi, sum skal verða leiðari av nýggju sosialu deildini hjá landsstýrinum, Almannastovuni. Hann greiddi frá lógarbroytingunum og hvussu fyrisitingin fer at vera skipað. Høvuðsbroytingin er tann, at Almannastovan kemur at umsita alt tað málsøki, sum sosiala deild Ríkisumboðsins áður hevur havt. Har, sum Ríkisumboðsmaðurin áður hevur verið klagustovnur, verður tað nú landsstýrið.

Til lógina um almenna forsorg er uppskot at seta sum nýtt stykki 1 A í § 14 um at sosialmálaráðharrin eftir samráðingar við landsstýrið kann áseta nærri reglur um útinnanina av forsorgini. Her er serliga hugsað um evnaveiku forsorgina, og er tað nevndini kunnugt, at samráðingar hava verið millum sosialmálaráðið og landsstýrið um at leggja undir Almannastovuna fyrisitingina av hesi forsorg í Føroyum, sjálvt um hon ikki verður

yvirtikin. Ætlanin er at sosialmálaráðharrin í næstu framtíð skal gera eitt cirkulære um, hvussu skipanin skal vera.

Lógarbroytingin setur eisini úr gildi lóg nr. 171 frá 16. mai 1934 «om foranstaltninger vedrørende åndsvage» og setur í gildi fyri Føroyar § 9-13 í lóg nr. 192 frá 5. juni 1959 «om forsorgen for åndsvage og andre særlig svagtbegavede».

Nevndin er samd um at mæla tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

SOSIALA NEVNDIN, 19. mars 1975.

Jógvan Sundstein Hilmar Bech Ove Mikkelsen

Jákup Mortensen Tórálvur Molir Olsen

2. viðgerð 24. mars. Uppskot til samtyktar frá Landsstýrinum samtykt við 19—0.

---

21. Uppskot til samtyktar viðv. hækkan av pensjónum

Ár 1975, mikudagin 12. mars, legði J. P. Sørensen, fyri Framburðsflokkin fram

Uppskot
til samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at skipa fyri, at fólka-, avlanis- og einkjupensionistar fáa viðurlag fyri tann munandi hækkaða oljupris - møguliga eisini fyri el-nýtslu.

Viðmerkingar:

Sum kunnugt hækkaði oljuprísurin fyrst í 1974 frá 36,5 til 93 øyru; hetta má ásannast var ein óvanliga stór hækkan í einum kasti, sum tók munandi av tí, ið fólka-, avlanis- og einkjupensjónistar fingu tá. Tíbetur er oljuprísurin nakað lækkaður, men má sigast at vera høgur enn. Hetta rakti uttan iva nevndu pensjónistar harðast, sum ikki høvdu ella hava tann stóra peningin at taka av og hava sostatt ikki umstøður til neyðugan hita. Og hvat skiltist av oljufeløgunum, so varð dúgliga spart - - eisini av teimum, sum høvdu góða inntøku - og hetta hóast landsstýrið hevði sett eina oljusparinevnd til at halda oljunýtslumi niðri, so tað er eyðvitað, at hetta kom okkara gomlu og avlanmu serliga illa við.

Tað er nokk so, at nevnda hitaviðurgjald verður veitt nøkrum einstøkum, og hetta kann ikki sigast vera serliga demokratiskt, um ein møguligur frammihjárættur valdar.

Í hesum sambandi kann verða nevnt, at strandferðslan við loyvi landsstýrisins hevur lýst við rabatkortum til bert fólkapensjónistar at ferðast við landsins skipum. Nevnda kort gevur rætt til 50% rabat. Hetta man neyvan hava tann ovurstóra týdning fyri fólk, ið eru komin upp í móti teimum sjeyti. Ikki so, at hetta er teimum væl unt - - men vil tó halda, at hetta við hitaviðurgjaldi er okkara gomlu ein munandi betur hjálp.

1. viðgerð 18. mars og málið beint í sosialu nevndina, sum 20. mars legði fram soljóðandi

Álit

Málið, sum er lagt fram av Framburðstlokkinum, var til 1. viðgerð hin 18. mars 1975 og varð beint í sosialu nevndina.

F.L.j. nr. 1010-15.

Nevndin er samd í tí sjónarmiði, at hækkingin av oljuprísinum er ein grundgeving fyri eisini at hækka pensjónirnar, men av tí, at nevndin samstundis hevur til viðgerðar tingmál nr. 22/1974 um hækking av sosialu veitingunum, hvar hækkingarnar eru uppá kr. 240,00 pr. mánað fyri hjón og kr. 141,00 fyri støk, er nevndin av teirri áskoðan, at gingið er uppskoti Framburðsfloksins á møti, um broytingarnar sambart mál nr. 22 verða samtyktar, og setur sostatt ongki uppskot fram í hesum máli.

SOSIALA NEVNDIN, 18. mars 1975.

Jógvan Sundstein Hilmar Beck Ove Mikkelsen
Jákup Mortensen Tórálvur Mohr Olsen

2. viðgerð 21. mars.

Uppskot til samtyktar frá Framburðsflokkinum fall 5 -0 og sostatt burturfallið.

---

22. Broyting í lógunum um fólkapensjón og avlamispensjón (hækking av sosialveitingum)

Ár 1975, mikudagin 12. mars, legði Jákup Lindenskov, landsstýrismaður, fram

Uppskot
til samtyktar

Løgtingið mælir ríkisstýrinum til at leggja hjáløgdu lógaruppskot fyri fólkatingið:

F.L.j. nr. 1010-5.

I «Forslag til lov om ændring af lov for Færøerne om folkepension (forhøjelse af grundbeløb m.v.)».
II «Forslag til lov om ændring af lov for Færøerne om invalidepension m.v. (Forhøjelse af ydelser)».

Viðmerkingar:

Í løgtingsmáli nr. 12/1974: Hækking av sosialum pensjónum v.m. samtykti løgtingið 16. august 1974 soljóðandi uppskot:

«Løgtingið tekur undir við landsstýrinum í, at sosialu veitingarnar 1. januar 1975 ella 1. apríl 1975 verða hækkaðar, so tær betri samsvara við tær broytingar, framdar eru ella í næstum verða framdar í Danmark.»

Í framhald av hesum setur landsstýrið nú fram uppskot til samtyktar viðvíkjandi teimum lógarbroytingum, sum eru neyðugar í sambond við hækkanina.

Av tí at einkjupensjón og aðrar veitingar eftir forsorgarlógini eru knýtt at fólkapensjónslógini, verða nevndu veitingar hækkaðar í sama mun sum fólkapensjónin.

Annars verður víst til viðmerkingarnar til lógaruppskotini.

SÍ SKJAL 12

1. viðgerð 18. mars og málið beint í sosialu nevndina, sum 20. mars legði fram soljóðandi

Álit

Málið, sum er framlagt av landsstýrinum, var til 1. viðgerð hin 18. mars 1975, og tá beint í sosialu nevndina.

Eftir lógaruppskotinum verða hækkingar at fara fram av fólka- og avlamispensjónini, eins og einkjupensjón og aðrar veitingar eftir forsorgarlógini, sum fylgja fólkapensjónslógini fáa tilsvarandi hækkingar.

Sum dømi um, hvat ið veitingarnar hækka, skal upplýsast, at fólkapensjónistar uttan aðra inntøku fáa hesar veitingar í mun til galdandi reglur:

Hjún

	samb. galdandi lóg		sambært uppskotið	
	pr. ár	pr. mánað	pr. ár	pr. mánað
Grundupphædd	19.152	1.596	21.852	1.821
Pensjónsviðbót	2.940	245	3.120	260
	22.092	1.841	24.972	2.081

Støk

	samb. galdandi lóg		samb. uppskotið	
	pr. ár	pr. mánað	pr. ár	pr. mánað
Grundupphædd	12.708	1.059	14.220	1.185
Pensjónsviðbót	2.556	213	2.736	228
	15.264	1.272	16.956	1.413

Veitingin til hjún hækkar sostatt við kr. 2.880 um árið ella kr. 240 um mánaðan. Fyri støk eru hækkingarnar ávikavist kr. 1.692 og kr. 141.

Samlaði kostnaðurin er mettur til kr. 8,4 milj., harav føroyski parturin er umleið helmingurin.

Undir 1. viðgerð varð funnist at tí muni, sum verður gjørdur viðvíkjandi hjálp til einkjur. Nevndin hevur eisini viðgjørt hetta málið. Sambært upplýsingar, ið eru fingnar til vega, er tað soleiðis, at einkjupensjón bert kann veitast teimum, sum verða einkjur aftaná, at tær hava fylt 45 ár. Harafturímóti kann veitast einkjuhjálp til tær, sum verða einkjur á yngri aldri. Men einkjuhjálpin er ávirkað av inntøku annars og er tí treytað av meiri figgjarligari trongstøðu enn einkjupensjónin. Annars eru upphædklirnar fyri fullari einkjupensjón og fullari einkjuhjálp tær somu.

Nevndin heitir á landsstýrið um at arbeiða fyri, at vilkorini hjá yngri einkjum til at fáa hjálp verða eins góð og hjá teim eldru.

Eisini verður heitt á landsstýrið um at virka fyri, at møguleikarnir fyri at kunna fáa undirhondshjálp ikki í so stóran mun sum hingartil verða

treytaðir av, at so at siga allur uppspardur peningur fyrst skal nýtast.
Nevndin mælir annars til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

SOSIALA NEVNDIN, 18. mars 1975.

Jógvan Sundstein Hilmar Bech Ove Mikkelsen
Jákup Mortensen Tórálvur Molr Olsen

2. viðgerð 24. mars.

Uppskot til samtyktar frá landsstýrinum, samtykt við 21--0 atkvøðum og sostatt avgreitt.

---

23. Veðhald fyri lánum til ídnaðarskip

Ár 1975, týsdagin 13. mars, legði Petur Reinert, landsstýrismaður, fram

Uppskot

til

løgtingslóg um veðhald fyri láni til keyp av reiðskapi til ídnaðarskip.

§ 1.

1. stk. Landsstýrinum er heimilt landskassans vegna í fíggjarárunum 1974/75 og 1975/76 at veðhalda fyri lánum til keyp av trol-

lagtingslov om garanti for lån til indkøb af redskaber til industrifiskeskibe.

§ 1.

Stk. 1. Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne i finansårene 1974/75 og 1975/76 at garantere for lån til indkøb af trawl-

F.L.j. nr. 1501-15. Sí eisini L. nr. 7/1975.

reiðskapi til ídnaðarskip, ið leggja um til feskfiskaveiðu.

2. stk. Veðhaldsupphæddin má ikki fara upp um kr. 75.000 til hvørt skipið og ikki upp um kr. 2.500.000 í alt.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

redskaber til industrifiskeskibe, som omlægger til fangst af ferskfisk.

Stk. 2. Garantien må ikke overstige kr. 75.000 til hvert skib og må ikke overstige ialt kr. 2.500.000.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Aftaná at prísurin fyri ídnaðarfisk er fallin so nógv, at ídnaðarfiskiskapurin ikki er lønandi í løtuni, er neyðugt fyri hesi skip, um tey ikki verða løgd, at leggja um til aðra veiðu.

Tá fíggjarstøðan, serliga hjá teimum nýbygdu ídnaðarskipunum, er vánalig, er neyðugt at útvega onkran stuðul til tey skip, ið ætla at leggja um til aðra veiðu í hesum førinum eftir feskum fiski. Landsstýrið hevur havt samráðingar við felagið Ídnaðarskip um spurningin í sínni heild.

Tað er bráneyðugt at útvegað verður ein veðhaldsskipan fyri lán til keyp av tørvandi reiðskapi, í hesum føri fyri trol, til tey skip ið leggja um til feskfiskaveiðu.

Tað er æflanin at veita fult veðhald (t.v.s. einki krav um eginpening) til keyp av trolunum.

Tá talið á skipunum, ið møguliga fara at leggja um til nevndu veiðu, kann koma upp á 30, verður mælt til, at veðhaldið samlað verður sett til 2,5 mill. kr.

Tað má metast at hava týdning at flakavirkini við hesi skipan fáa meira ráevni.

1. viðgerð 14. mars, frávik frá tíðarfrestini.

Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum sama dag á seinni fundi legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fyri tingið 13. mars 1975 og varð við 1. viðgerð 14. mars beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin tekur einmælt undir við uppskotinum, men minnir landsstýrið á tey sjónarmið, ið komu fram undir hesi viðgerð í samband

við fiskivinnuna, sum til dømis tað, at møguleiki fyri hjálp eisini verður útvegaður vinnuni í samband við aðrar umleggingar.

Hákun Djurhuus	Poul Jacob Olsen	Hilmar Beck
Ove Mikkelsen	Asbjørn Joensen	Pauli Ellefsen
	Jógvan Durhuus	

2. viðgerð sama dag á seinni fundi, har formaðurin bað um frávik frá tíðarfrestini fyri 2. og 3. viðgerð, hetta var samtykt uttan atkvgr.

Gr. 1 samtykt 21—0, alt málið og at fara til 3. viðgerð samtykt við 21—0 atkv.

3. viðgerð sama dag á seinni fundi.

Lógaruppskotið sum samtykt við 2. viðgerð, nú endaliga samtykt við 21—0 atkv.

---

24. Lóg um eftirlit við arbeiðum av edlum metallum

Ár 1975, týsdagin 18. mars, legði Jákup Lindenskov, landsstýrismaður, fram

Uppskot
til
samtyktar.

Eftir heimild í § 17 í lóg nr. 499 frá 29. november 1972 «Om kontrol med arbejder af ædle metaller m.v.» verður henda lóg at seta í gildi í Føroyum við kongaligari fyriskipan.

F.L.j. nr. 1112-3. — Sí eisini Lov nr. 499 af 29. november 1972: Lov om kontrol med arbejder af ædle metaller m.v..

Viðmerkingar:

Lógin avloysir lóg nr. 211 frá 16. juni 1961, sum varð sett í gildi í Føroyum við kongaligari fyriskipan frá 22. august 1964.

Høvuðsbroytingarnar í mun til galdandi lóg eru, at eftirlitið við at lógin verður hildin verður gjørt strangari og at krøvini til dygdina av lutum úr edlum metallum verða skerpað.

Viðlagt fylgir eitt eintak av lógini.

1. viðgerð 20. mars. Málið beint í lógarnevndina, sum 8. april legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð av landsstýrinum lagt fyri løgtingið 18. mars 1975 og varð undir 1. viðgerð 20. mars beint í lógarnevndina. Tað snýr seg um við kongaligari fyriskipan at seta í gildi fyri Føroyar lóg nr. 499 frá 29. november 1972 «Lov om kontrol med arbejder af ædle metaller», og er hetta heimilað sambært § 17 í somu lóg.

Høvuðsinnihaldið í lógini er, at fyriskipanir verða settar, soleiðis at tilfar úr edlum metalum — gulli, silvuri og platini — sum verður framleitt til vinnuligt endamál og/ella til sølu, skal, burtursæð frá serligum undantøkum sambært § 7, verða soleiðis avmerkt, at tað týðiliga sæst, hvør dygd er í viðkomandi vøru.

Serligt eftirsýn er sett og serlig nevnd fyri at hjálpa til við at umsita lógina. Eftirsýnið skal hava fría atgongd á teim virkjum, sum koma undir lógarinnar gildi. Teir einstaklingar ella tey virki, sum verða umfatað av lógini, og sum selja vøru úr edlum metalum undir følskum fyritreytum ella móti fyriskipanum í lógunum yvirhøvur, verða sektað við bót, um so ikki er, at tey eftir aðrari lóggávu standa fyri harðari dómi.

Høvuðsbroytingin í mun til galdandi lóg — nr. 211 frá 16. juni 1961, galdandi í Føroyum frá 22. august 1964 — er við øðrum orðum, at eftirlitið og krøvini til dygdina av lutum úr edlum metalum verða skerpað.

Ein samd lógarnevnd setur tí fram hetta

Uppskot
til
samtyktar.

Løglingið samtykkir fyriliggjandi lóg við tí broyting, at hon fær hetta heitið: Lóg um eftirlit við arbeiðum úr edlum metalum.

LØGARNEVNDIN, 8. apríl 1975.

2. viðgerð 10. apríl.

Uppskot til samtyktar frá landsstýrinum samtykt við 23—0.

Málið sostatt avgreitt.

---

25. Landslán til kreppuhjálp

Ár 1975, týsdagin 18. mars, legði J. P. Sørensen, løgtingsmaður, fram

Uppskot
til

løgtingslóg um landslán til kreppuhjálp.

§ 1.

Álagt verður landsstýrinum at taka upp lán uppá 75 milliónir kr. at hava til taks til kreppuhjálp til fiskivinnuna og virkir, ið skapa arbeiði.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

lagtingslov om landslån til krisehjælp.

§ 1.

Det pålægges landsstyret at optage et lån på 75 millioner kr. at have til disposition som krisehjælp til fiskerierhvervet og arbejdsskabende virksomheder.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Sum tíðirnar hava broytt seg á heimsmarknaðinum, koma vit føroyingar eisini at merkja tað dygt, serstakliga innan fiskivinnu, og tað sum stendst av henni uppi á landi, tað veri seg handverk, ídnaður, arbeiðsmanna- og starvsmannaslætturin, ja, at siga øll fjøldin av Føroya fólki.

Skipini eru komin í slíka kreppu nú, tað veri seg hvørja veiðu, tey eru útgjørd til.

Saltfiskurin, ið var ein tann mest álítandi, er nú eisini ivasamur, vegna at smáfiskurin má inn á goymslu, vónandi bert fyribils. Italien vil ikki keypa í løtuni. Spanien vil bert hava stóran fisk. Portugal er við at nationalisera, og vil bert lata tann pels, ið teir hava ráð til.

Alt samantikið má Løgtingið gera vart við, at her má makað álvarsamt gerast fyri at koma yvir hesa kreppu, og mugu vit leggja byrðarnar yvir á okkum øll, ið búgva á hesum kleinum, og tað gerst best við at omanfyri nevnda lógaruppskot verður samtykt.

FØROYA FRAMBURÐSFLOKKUR
J. P. Sørensen.

1. viðgerð 20. mars. Málið beint í fíggjarnevndina, sum 10. apríl legði fram soljóðandi

Álit

Málið er av Føroya Framburðsflokki framlagt 18. mars 1975 og varð við 1. viðgerð beint í fíggjarnevndina 20. mars.

Tað snýr seg um lániheimild til landsstýrið uppá 75 milj. kr., ið skulu verða til at taka til kreppuhjálp, nú útlit er fyri ringari tíðum vinnuliga, og sagt verður í viðmerkingunum, at allar herðar mugu bera tær byrðar, ið standast av at skula klára eina komandi krepputíð sum best.

Hetta sjónarmið er eisini bygt inn í tann samgongusáttmála, ið stjórnarflokkarnir gjørdu sínámillum, tá sitandi landsstýrið varð sett, og er meirilutin í fíggjarnevndini (Hákun Djurhuus, Poul J. Olsen, Jógvan Durhuus og Signar Hansen) tí av teirri áskoðan, at málið eigur at verða sent landsstýrinum til gjølligari viðgerð.

Vit hava fult álit á landsstýrinum, men at díkja teir undir við stórum miljónlániheimildum afturat teimum stóru ónýttu miljónlániheimildum, teir hava til at taka, er eftir okkara áskoðan at handfara álvarsemi aftanfyri krepputosið ov lættliga.

Tað er landsstýrið, ið situr við teimum umsitingarligu tólunum, ið best kunnu siga frá tørvi, mannagongd og stødd slíkari kreppuhjálp viðvíkj-

andi, og eigur tað tí eftir okkara áskoðan at verða landsstýrið, ið skal spæla út í hesum máli.

Samsvarandi hesum sjónarmiði setur meirilutin (Hákun Djurhuus, Poul J. Olsen, Jógvan Durhuus og Signar Hansen) fram hetta

Broytingaruppskot
til
samtyktar

Løgtingsmál nr. 25/1974 (vetrarting): Lán til kreppulíjálp verða at senda landsstýrinum til umhugsan og viðari viðgerð.

Minnilutin (Asbjørn Joensen og Pauli Ellefsen) setur onki uppskot fram

FÍGGJARNEVNDIN, 9. apríl 1975.

Hákun Djurhuus	Poul J. Olsen	Hilmar Beck
Jógvan Durhuus	Signar Hansen	Asbjørn Joensen
	Pauli Ellefsen	

2. viðgerð 11. apríl. Frávik frá tíðarfrestini.

Lógaruppskotið frá J. P. Sørensen fall við 2—0.

Broytingaruppskot frá meirilutanum í nevndini, uppskot til samtyktar, var samtykt við 17—0. Málið sostatt avgreitt.

26. Almenn evna-, bakteriu- og heilsufrøðislig starvsstova

Ár 1975, mikudagin 19. mars legði Dánjal Pauli Danielsen, landsstýrismaður, fram

Uppskot
til

løgtingslóg um almenna starvsstovu.

§ 1.

1. s.t.k. Landsstýrinum er heimilað at seta á stovn eina starvsstovu undir heitinum: evna-, bakteriu- og heilsufrøðiliga starvsstovan.

2. s.t.k. Starvsstovan er undir landsdjóralæknaembætinum.

§ 2.

Starvsstovan hevur til endamáls:

1. At gera kanningar av vatni, av ráevnum og øllum evnum yvirhøvur til matframleiðslu.

2. At gera kanningar av matvørum, annaðhvørt tær eru ætlaðar til útflutnings ella til nýtslu her á landi og í hesum sambandi at hava eftirlit við, at matvørurnar lúka tær treytir til reinføri og góðsku, sum settar eru ávikavist í keyparalandi og her á landi.

3. Á sínum virkisøki og í samstarvi við Fróðskaparsetur Føroya at gera vísindaliga gransking og geva undirvísing.

lagtingslov om et offentligt godkendt laboratorium.

§ 1.

Stk. 1. Landsstyret bemyndiges til at oprette et laboratorium under betegnelsen: kemisk, bakteriologisk og hygiejnisk laboratorium.

Stk. 2. Laboratoriet er underlagt landsdyrelægeembedet.

§ 2.

Laboratoriet har følgende formål:

1. At foretage undersøgelser af vand, af råstoffer og alle stoffer i det hele taget, der indgår i produktionen af madvarer.

2. At foretage undersøgelser af madvarer, hvad enten disse er beregnet til eksport eller til anvendelse her i landet og i denne forbindelse at have tilsyn med at madvarerne opfylder de krav til hygiejne og kvalitet, som stilles henholdsvis af køberland og her i landet.

3. Indenfor sit virksomhedsområde og i samarbejde med Fróðskaparsetur Føroya at udføre videnskabelig forskning og at give undervisning.

F.L. j. nr. 2235-16-5. — Ll. nr. 18/1975.

4. At veita heilsumyndugleikunum ráð og leiðbeiningar eftir reglum, landsstýrið setur.
5. Annars at taka uppá seg tær uppgávur, sum higartil hava ligið undir fiskifdnaðarstovuni.

§ 3.
Vrakarastovnurin er tá ið fiskivinnuna umræður starvsstovuni til hjálpar í eftirliti av virkjum og vørum, í øllum viðurskiftum, sum hava týdning fyri vørugóðsku og við tøku av sýnislutum o.t.

§ 4.
Deildarleiðarar verða settir av landsstýrinum eftir tørvi og eftir tilmæli frá landsdjóralæknanum.

§ 5.
Landsstýrið ásetur reglugerð fyri starvsstovuna. Somuleiðis er landsstýrinum heimilað at áseta gjøld fyri kanningar, ráðgeving, váttanir o.t.

§ 6.
Landsstýrið kann heimila starvsstovuni at taka upp samstarv við tilsvarandi stovnar í øðrum londum, serstakliga londum ið eru uppi í Norðurlanda Ráðnum, um eftirlit við matvørum og gransking hesum viðvikjandi.

§ 7.
Landsstýrinum verður heimilað at skipa eitt ráð av sakkønum at fylgja við gransking innan heilsufrøði og matframleiðslu og somuleiðis at vera ráðgevandi fyri landsstýrið og heilsumyndugleikarnar á hesum øki.

4. At give sundhedsmyndighederne råd og vejledning efter regler fastsat af landsstyret.
5. Iøvrigt at påtage sig de opgaver, der hidtil har været varetaget af Fiskeriets Forsøgslaboratorium.

§ 3.
Vragerinstitutionen er for så vidt fiskeriet angår pligtig til at assistere laboratoriet i tilsynet med virksomheder og varer i alle forhold, der har betydning for varekvalitet og ved udtagelse af prøver o.l.

§ 4.
Afdelingsledere ansættes af landsstyret efter behov og efter indstilling fra landsdyrlægen.

§ 5.
Landsstyret udarbejder et arbejdsregulativ for laboratoriet. Ligeledes er landsstyret bemyndiget til at fastsætte gebyrer for undersøgelser, rådgivning, attester o.l.

§ 6.
Landsstyret kan bemyndiges til at optage samarbejde med lignende institutioner i andre lande, især med lande, der er medlemmer af Nordisk Råd, om tilsyn med madvarer og forskning på disse områder.

§ 7.
Landsstyret bemyndiges til at nedsætte et råd af sagkyndige at følge forskningen indenfor hygiejne og madproduktionen og at være rådgivende overfor landsstyret og sundhedsmyndighederne på disse områder.

§ 8.

Tey, ið virka á starvsstovuni, kunnu ikki uttan loyvi frá landsstýrinum hava starv hjá ella vera uppi í nakrari vinnufyriføku, sum starvsstovan skal svara fyri. Øll, ið virka á starvsstovuni og somuleiðis ráðslimir eftir § 7, hava eftir borgarligu straffilógini tagnarskyldu við tí, tey undir arbeiðinum á starvsstovuni verða kunnug við.

§ 8.

De på laboratoriet ansatte kan ikke uden tilladelse fra landsstyret have ansættelse hos eller være deltager i nogen virksomhed, som laboratoriet skal kontrollere. Alle ansatte på laboratoriet og ligeledes rådsmedlemmer, jfr. § 7, har under ansvar efter borgerlig straffelov tavshedspligt med hensyn til forhold, de måtte blive bekendt med under arbejdet for laboratoriet.

§ 9.

Landsdjóralæknin saman við deildarleiðarunum gera ársfrágreiðing til landsstýrið á hvørjum ári og kunnu við loyvi frá landsstýrinum kunngera í skrift og talu upplýsingar — verkligar og vísindaligar —, sum ætlast at hava almennan áhuga.

§ 9.

Landsdyrlægen sammen med afdelingslederne udfærdiger hvert år en årsberetning til landsstyret, disse kan med tilladelse fra landsstyret i skrift og tale offentliggøre oplysninger — praktiske og videnskabelige — der må antages at have offentlig interesse.

§ 10.

Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

§ 10.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Í løgtingssetuni 1971 hevur løgtingið viðgjørt málið um bygging av evnafrøðiligari og bakteriologiskari starvsstovu, jbr. løgtingsmál nr. 7, Løgtingstíðindi bls. 105 og løgtingsmál nr. 82, Løgtingstíðindi bls. 360. Samtykt varð at byggja starvsstovuna sum deild av Fróðskaparsetri Føroya.

Starvsstovan var tiðug um ársskiftið 1974/75.

Eggingin til at farið var undir at byggja starvsstovuna var, at nýggjar standard heilsusamtyktir vóru settar í gildi fyri kommununnar um regluligt eftirlit við drekkingarvatni og matvørum og eftirlit við smittuvanda frá bústøðum og virkjum. Ein orsøkin var eisini millumlanda samarbeiði, at standardisera alla matvøruframbeiðslu og at forða fyri, at matvørur innihalda eitrandi evni, sum kunnu verða heilsuni til báða, og rørslan í teimum stóru matvørukeypandi londunum at hava eftirlit við teimum vørum, tey keypa, ikki bert heima hjá sær sjálvum, men eisini á frambeiðslustaðnum. Øll hesi tiltøk krevja kamingar v.m., sum vegna tørvandi starvsstovulikindi, ikki hevur verið gjørligt at útinna til fulnar í Føroyum.

Sum lað framgongur av viðgerðini frammanundan av málinum, var

ætlanin, at starvsstovan skuldi verða ein deild av fróðskaparsetrinum, soleiðis at hon var óheft. At starvsstovan er óheft, er neyðugt, tá ið hugsað verður um, hvørjar uppgávur hon skal røkja, serliga ta uppgávuna at hava eftirlit við matframleiðsluni.

Tá ið tað í fyrsta umfari varð hugsað um at leggja starvsstovuna undir fróðskaparsetrið, var grundgevingin, at setrið er óheftur stovnur, og at starvsstovan eisini skuldi taka uppá seg vísindaligar rannsóknir og undirvísing í samstarvi við fróðskaparsetrið.

Aftaná at landsstýrið hevur samráðst við fróðskaparsetrið og landsdjóralæknan er semja um, at leggja starvsstovuna undir landsdjóralæknaembætið, sum frammanundan hevur ábyrgdina av tí veterinera eftirlitinum, tó verður vísindalig gransking og undirvising framd í samstarvi við fróðskaparsetrið. Umleggingin ger onga broyting í figgjarligu viðurskiftini í sambandi við landskassan.

Dánjal Pauli Danielsen
landsstýrismaður

/ J. Djurhuus

1. viðgerð 21. mars og málið beint í lógarnevndina, sum 11. apríl legði fram soljóðandi

Álit

Landsstýrið legði málið fyri tingið 19. mars 1975, og varð tað undir 1. viðgerð 21. mars beint í lógarnevndina.

Í 1. § í uppskoti landsstýrisins, 2. petti, stendur, at starvsstovan er undir landsdjóralæknaembætinum. Í viðmerkingum landsstýrisins verður nevnt, at landsdjóralæknin hevur sum er ábyrgdina av tí veterinera eftirlitinum. Tí helt nevndin tað vera best at hava fund saman við landsdjóralæknanum og frá honum fáa nærri frágreiðing um ta ætlaðu starvsstovuna. Tann fundurin varð hildin 9. apríl.

Á hesum fundi upplýsti landsdjóralæknin, at ráskitsan til hesa heimildarlóg er tikin burtur úr «Lov nr. 182 af 5. juni 1959 om levnedsmiddelinstitut», men er sjálvsagt í øllum hitum tillagað teim serligu føroysku viðurskiftunum. Hann upplýsti, at starvsstovan — eins og navnið sigur — kemur í fyrstu syftu at hava tvær deildir: eina evnafrøðiliga (ella kemisk-fysiska) og eina bakteriu-heilsufrøðiliga. Landsdjóralæknin nevndi, at krøvini til matvørur hava verið og framvegis verða skerpað, bæði á heimamarknað og til útflutnings. Og skulu vit hava eftirlit við, at tey góðskukrøv til matframleiðslu sum krevjast, verða yvirhildin, krevst okkum tílíkt amboð sum hesa starvsstovu.

Landsdjóralæknin nevndi eisini, at skal t.d. síld útflytast, so krevja innflytaralondini, áðrenn vøran er innflutt, trygd fyri, at sildin er dygdarvøra. Tílík váttan hevur verið kravd av landsdjóralæknanum, men hevur hann sum er havt lítlar ella ongar møguleikar at eftirkanna hetta. Uppgávur sum hendan koma nátúrliga at falla undir ta tilætlaðu starvsstovuna.

Tann 22. juni 1972 kom í gildi fyri Føroyar løgtingslóg um løggilding av virkjum og fiskiførum til framleiðslu av matti. 2. § í hesi løgtingslóg ljóðar í sínu heild soleiðis: «Løggilding til matframleiðslu verður bert veitt virkjum og fiskiførum, sum eru innrætlað í samsvar við tær fyriskipanir, sum landsstýrið saman við heilsumyndugleikunum og almennu virkiseftirlitunum ásetir í reglugerð. Virki skulu yvir fyri landsstýrinum kunna prógva at hava neyðugt fullkomt fólk at standa fyri framleiðsluni.» Hugtakið heilsumyndugleikar umfatar í hesum føri heilsunevndirnar á viðkomandi støðum saman við landsdjóralæknanum. Reglugerðin, sum er nevnd í lógini, varð kunngjørd 21. september 1973, men metti landsdjóralæknin, at fult eftirlit við, at hon verður yvirhildin, ikki kann fáast í lag, fyrr enn heilsufrøðiliga starvsstovan kemur at virka.

Landsdjóralæknin upplýsti somuleiðis, at fiskiídnaðarstovan nú verður niðurløgd. Fyristøðumaðurin har hevði sagt upp til 1. apríl, men hevði seinni játtað at halda fram fyribils. Ætlanin er, at leggja lað arbeiðið, sum fiskiídnaðarstovan hevur havt, undir la komandi starvsstovuna.

Almenna peningaupphæddin til starvsstovuna er í núverandi fíggjarári sett til 509.000 kr., og landsdjóralæknin upplýsti, at starvsstovan fór sjálvsagt í virksemi sínum í ár at halda seg innan fyri tær rammur, sum hesin peningur setti. Landsdjóralæknin legði dent á, at sambært fyriliggjandi lógaruppskot kemur tað almenna, í hesum føri landsstýrið og fíggjarnevndin, í síðsta enda og í øllum førum at hava endaliga avgerðarrættin og endaliga ábyrgdina av starvsstovuni.

Lógarnevndin tekur undir við landsstýrisins uppskoti, men mælir kortini til tríggjar smávegis broytingar. Landsdjóralæknin hevur sjálvur sett fram tilnæli til tvær av hesum broytingum, og tekur nevndin undir við teimum.

Ein samd lógarnevnd setir tí fram hetta

Uppskot
til
samtyktar

Løgtingið samtykkir løgtingsmál nr. 26/1974 (vetrarting) við hesum broytingum:

1. §, 1. stk., fær hetta orðalag:

«Landsstýrinum er heimilað at seta á stovn eina starvsstovu undir heitinum: Heilsufrøðiliga starvsstovan.»	«Landsstyret bemyndiges til at oprette et laboratorium under betegnelsen: Hygiejnisk laboratorium.»

I 2. §, 3. stk., verður millum orðini

«geva» og «undirvísing» skotið inn orðið «praktiska».	«give» og «undervisning» tilføjet ordet «praktisk».

Byrjanin á 6. § verður í danska tekstinum broytt so:

	«Landsstyret kan bemyndige laboratoriet til at optage samarbejde»

soleiðis at tann danski tekstirin kemur at samsvara í tilsvarandi føroyska.

LÓGARNEVNDIN, tann 10. apríl 1975

Heðin M. Klein Tórálvur Olsen Agnar Nielsen
Eliesar Arge J. Fr. Øregaard

2. viðgerð 15. apríl.

Broytingaruppskot frá lógarnevndini til gr. 1, 2 og 6 samtykt við 20 -0, gr. 1, 2 og 6 soleiðis broyttar samtyktar 20- -0. — Gr. 3, 4, 5, 7, 8 og 9 samtyktar 20 0. Gr. 10 samt. n. atkvgr. Málið so samtykt at fara til 3. viðgerð við 20 -0.

3. viðgerð 16. apríl. Frávik frá tiðarfrest.

Málið sum samtykt við 2. viðgerð nú samtykt 24 0.

27. Broyting í skattalógini

Ár 1975, týsdagin 18. mars, legði Demmus Hentze, landsstýrismaður fram

Uppskot
til

løgtingslóg um broytingar í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 50 frá 2. juli 1963 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1) Sum nýtt nr. 3a) í § 14 verður sett:

»Persónur, sum fær sær tilhald í Grønlandi, er undantikin skattskyldu eftir hesari lóg, um tilhaldið, bert brotið við ferin o.t., í minsta lagi er 2 ár. Uppihaldari, sum hevur húski sítt eftir í Føroyum, fellur ikki undir hesa reglu, men er fullvegis skattskyldugur í Føroyum.»

2) § 92, 2. stk. verður orðað soleiðis:

«Skattur, sum er goldin í Grønlandi av inntøku hesuni, antin hann er beinleiðis álíknaður ella afturhildin, kann verða drigin frá í inntøkuskatti, sum latin skal verða í Føroyum av hesari inntøku. Frádrigið kann tó ikki verða meira enn lutfallsliga fellur á tað í Grønlandi skattaðu inn-

lagtingslov om ændringer i lagtingslov om landsskat og kommuneskat.

§ 1.

I lagtingslov nr. 50 af 2. juli 1963 om landsskat og kommuneskat med senere ændringer foretages følgende ændringer:

1) Som nyt nr. 3a) i § 14 tilføjes:

«Person, som lager ophold i Grønland, fritages for skattepligt efter nærværende lov, hvis opholdet, kun afbrudt af ferier o.l. vedvarer mindst 2 år. Forsørger, som har sin familie boende på Færøerne, falder ikke ind under her nævnte regler, men er han fremdeles skattepligtig på Færøerne.»

2) § 92, stk. 2, affattes således:

«Skat, som er betalt i Grønland af indkomst, stammende fra Grønland, enten ved direkte påligning eller ved indeholdelse, kan fradrages i den indkomstskat, som skal tilsvares på Færøerne af denne indkomst. Fradraget kan dog ikke være større end den skat, som forholdsmæssigt falder på den

tøkuna, sum eisini er skattað í Føroyum.»

3) 2. stk. verður hereftir 3. stk.

§ 2.

Henda lóg fær gildi beinan vegin.

i Grønland beskattede indkomst, der er pålignet på Færøerne.»

3) Stk. 2 bliver herefter stk. 3.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Aftaná seinasta veraldarbardaga hava føroyingar søkt sær vinnu í Grønlandi. Teir flestu hava bert verið har styttri tíðarskeið, meðan aðrir hava verið longri tíð, og aftur aðrir hava tikið sær fastan bústað, og hava tað bæði verið leysir persónar og uppihaldarar, sum við øllum húski sínum eru fluttir til Grønlands.

Føroyska skattalógin hevur fyrisett, at var maður uttanlands bráðfengis, var skattskyldan í Føroyum, til hann varð settur í skatt har sum fastbúgvandi. Bráðfengistilhald er í lógini sett til 4 ár. Tá skattalógin í 1963 varð gjørd, vurð ikki hugsað um, at als ongin skattur var í Grønlandi og hevdu tá ongir serligir skattaspurningar tikið seg upp, men tá føroyingar seinri í størri tali fóru til Grønlands at fáa sær arbeiði har og summir í longri tíð, kom fram spurningurin um framhaldandi skattskyldu í Føroyum. Mangir av hesum arbeiddu saman við donskum arbeiðarum, og sluppu teir undan skatti í Danmark, hevdu teir verið 2 ár ella longri í Grønlandi og gjørdi føroyingarnir hetta galdandi og vístu á tað órimiliga, at teir skuldu vera 4 ár har fyri at fáa sonn søndir.

Út frá hesum samtykti líkningarráðið at góðtaka nevnda 2 ára mark, og varð hetta seinri í samband við skattakæru góðtikið av landsskattanevndini. Skipanin hevur annars reynst vel, men er hon ongantíð lógarfest.

Frá 1. januar 1975 er nú skipað fyri skatti í Grønlandi, og verður hesin skattur kravdur av øllum inntøkum, fervunnum í Grønlandi ella umborð á grønlendskum skipum. Hetta ber í sær, at teir føroyingar, sum bert eru styttri tíð til verka í Grønlandi - - og hesir eru nógvir - - nú fara at koma undir tvær skattingar. Skatturin í Grønlandi verður ikki stórur, tí talan er bert um kommunuskatt, og verður frá inntøkumi latin fastur frádráttur, sum fyri leysar persónar er 20.000 kr. árliga og fyri uppihaldarar 30.000 kr. og verður síðan restin skattað við 15%.

Fyri at avvarðandi ikki skal rinda tvifalda skattaáløgu, verður her skotið upp, at fyriskipa reglur soleiðis, at tann í Grønlandi goldni skatturin verður drigin frá føroyska skattinum. Hetta fer at bera í sær, at skatturin hjá hesum persónum, sum nú koma undir skatt bæði í Føroyum og í

Grønlandi, veruliga bert verður hin sami, sum teir vildu goldið í Føroyum, um ongin skattur var í Grønlandi.

Landsstýrið hevur samráðingar við grønlandsmálaráðið og skattadepartementet um sáttmála fyri at forða fyri tvífalda skattaáløgu og viðvíkjandi upplýsingum um inntøkuviðurskifti og skattainnkrevjing á líkan hátt sum teimum sáttmálum, vit hava við Danmark, Bretland og onnur lond, men tá hesar samráðingar ikki eru lidnar, verður her sett uppskot til fyribils loysn av teimum málum, sum uttan iva fara at standast millum Føroya og Grønland og sum mugu loysast.

Dennus Hentze
landsstýrismaður

/ J. Djurhuus

1. viðgerð 20. mars og málið beint í skattanevndina, sum 11. apríl legði fram soljóðandi

Álit

Málið var lagt fyri tingið av landsstýrinum 18. mars 1975 og varð undir 1. viðgerð 20. mars beint í skattanevndina.

Tað snýr seg um broytingar í løgtingslóg nr. 50 frá 2. juli 1963 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum. Lógaruppskotið fyrisetur reglur fyri skattingina av føroyingum, sum hava fyribils arbeiði í Grønlandi. Tað hevur serligan týðing at fáa gjørt hesar broytingar nú, tí at skipað er fyri skatti í Grønlandi frá 1. januar 1975, og verður hesin skattur kraevdur av øllum inntøkum, forvunnum í Grønlandi ella um borð á grønlendskum skipum.

Lógaruppskot landsstýrisins ber í sær, at persónar, sum fáa sær tilhald í Grønlandi, eru undantiknir skattskyldu eftir hesi lóg, um tilhaldið, bert brotið við ferium o.t., í minsta lagi er 2 ár. Hevur uppihaldari hinvegin húskið sítt eftir í Føroyum, verður hann framvegis skattaður her á landi. Talan er um broyting í skattalógini frá 1963, sum setur bráfengisuppihald til 4 ár.

Somuleiðis fyriskrivar uppskot landsstýrisins greiðar reglur, so sloppið verður undan dupultari skatting, fyrst í Grønlandi og síðani í Føroyum, soleiðis at skattur goldin í Grønlandi verður frádrigin í tí í Føroyum álíknaða skatti.

Tann í Grønlandi goldni skattutvin, sum verður frádrigin, skal býtast lutfallsliga millum landskassan og kommununar.

Ein samd skattanevnd tekur undir við landsstýrisuppskotinum og mælir til at samtykkja tað.

SKATTANEVNDIN, 11. apríl 1975.

Johan Simonsen Jógvan Sundstein Jona Henriksen
Agnar Nielsen Hilmar Bech

2. viðgerð 16. apríl.
Gr. 1 samt. 23—0. Málið alt og at fara til 3. viðgerð samtykt 23—0.

3. viðgerð 17. apríl.
Málið sum samtykt við 2. viðgerð nú samtykt 24—0.

---

28. Yvirtøka av Vanlukkutryggingini

Ár 1975, týsdagin 18. mars, legði J. P. Sørensen, løgtingsmaður, fram

Uppskot
til
samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at skipa fyri, at løgtingssamtyktin frá 6. februar 1974 um broyting í vanlukkutryggingarfyriskipanini og yvirtøka av vanlukkutryggingarfyriskipanini sum føroyskt sermál verður sett í gildi heinanvegin.

Viðmerkingar:

Tá omanfyri nevnda løgtingssamtykt er frá 6. februar 1974, má tað tykjast løgið, at henda samtykt ikki verður framd. Tað er ein alt ov stórur ójavni í teirri lóg, sum eru fyriskrivar, hvussu vanlukku- og skaðaendur-

F.L. j. nr. 1411-3-2.

gjald verður goldið. Tann vanlukkutryggingarlóg, sum sagt eru í gildi, er nakað av tí mest órættvísa sum hugsast kann. Hetta hóast nakrar ábøtur eru framdar. Og tað er tí at undrast á, at løgtingssamtyktin ikki verður framd, so tey grelligu brek, nevnda lóg inniber, verður rættað. Teir skeivleikar, ið hugsað verður um, eru avgjørt tiltrongdir at fáa rættað skjótast møguligt.

FØROYA FRAMBURÐSFLOKKUR
J. P. Sørensen

1. viðgerð 20. mars. Avgjørt at málið var sent landsstýrinum.

Málið sostatt avgreitt.

---

29. Broyting í patentlógini

Bræv frá landsstýrinum, dagfest 12. februar 1975, um at seta í gildi lóg nr. 221 frá 14. april 1974, um broyting av patentlógini verður lýst at galda fyri Føroyar, varð við viðmæli lagt fyri løgtingið týsdagin 25. februar 1975 og varð beint í lógarnevndina, sum 20. mars legði fram soljóðandi

Alit

Ríkisumboðið hevur spurt, um heimastýrið hevur nakað at viðmerkja til, at lóg nr. 211 frá 14. april 1974 um broyting í patentlógini verður lýst at galda fyri Føroyar.

Landsstýrið hevur lagt málið fyri tingið við viðmæli.

Broytingin, sum er hend, er tann, at nýggj § 71, Teknologisk service, er komin aftrat, og ljóðar hon soleiðis í sínu heild: «Direktoratet for patent- og varemærkevæsenet kan efter anmodning påtage sig at løse særlige opgaver, der har karakter af teknologisk service». Og 2. stykki hevur hetta

F.L. j. nr. 1112-6. — Sí eisini frammanfyrinevndu ríkislóg.

orðalag: «Handelsministeren fastsætter regler om denne service og om betalingen herfor». Henda lóg fekk gildi í Danmark 1. oktober 1974.

Lógarnevndin hevur viðgjørt hesa lógarbroyting og mælir til, at løgtingið samtykkir hana.

LÓGARNEVNDIN, 20. mars 1975

Heðin M. Klein J. Fr. Øregaard
Tórálvur Olsen Eliesar Arge
Aguar Nielsen

2. viðgerð 21. mars. Samtykt við 18—0. Málið soslatt avgreitt.

---

30. Veiting av ríkisborgararætti

Ár 1975, hósdagin 30. januar, varð framlagt bræv frá landsstýrinum, har eftir ríkisumboðið hevur spurt um heimastýrið hevur nakað at viðmerkja til lóg nr. 1 frá 16. februar 1974 og lóg nr. 6 frá 13. november 1974 verða lýstar at galda fyri Føroyar. Málið heint í lógarnevndina, sum 20. mars legði fram soljóðandi

Álit

Ríkisumboðið hevur spurt, um heimastýrið hevur nakað at viðmerkja til, at lóg nr. 1 frá 6. februar 1974 og lóg nr. 6 frá 13. november 1974 um veiting av ríkisborgararætti verða lýstar at galda fyri Føroyar. Landsstýrið leggur málið fyri løgtingið við viðmæli.

Hetta mál hevur verið til viðgerðar í lógarnevndini, sum hevur hesar viðmerkingar:

Hetta mál er at meta sum avgreiðslumál, ið við jøvnum millumbilum koma fyri løgtingið.

F.L.j. nr. 508—3. — Sí eisini frammanfyrinevndu ríkislógir.

Lógarnevndin mælir til, at báðar tær nevndu ríkislógir verða lýstar at galda fyri Føroyar.

LÓGARNEVNDIN, 20. mars 1975.

Heðin M. Klein J. Fr. Øregaard Tórálvur Olsen
Eliesar Arge Agnar Nielsen

2. viðgerð 21. mars. Frávik frá tíðarfrestini.

Málið samtykt við 17—0 og sostatt avgreitt.

---

31. Føroya Undirgrund

Ár 1975, mánadagin 24. mars, legði Hilmar Kass, løgtingsmaður fram, vegna sjálvstýrisflokkin

Uppskot
til
samtyktar.

Álagt verður landsstýrinum at taka upp samráðingar við danska stjórnarmyndugleikarnar um at gera málið «Føroya undirgrund» til føroyskt sermál.

Viðmerkingar:

Fleiri ferðir undanfarnu tingsetur hevur hetta mál verið til viðgerðar á Føroya løgtingi, men eingin broyting er gjørd í fyriskipan nr. 259 frá 1963 «vedrørende udøvelse af dansk højesteret over kontinentat sokkel», sum varð samtykt av løgtinginum 14. mai 1966.

Í hesi samtykt stendur millum annað: «Råstoffer i kongeriget Danmarks undergrund, som ikke den 23. febr. 1932 har været undergivet privatøkonomisk udnyttelse her i landet, tilhører den danske stat. Efterforskning og indvinding af sådanne råstoffer forbeholdes staten».

Sambært heimastýrislógina eru ráevnini í undirgrundini B-mál. Longu í 1948 varð samtykt á løgtingi at taka upp samráðingar við donsku stjórnina um hetta mál, men enn er ikki meira hent, og tá hetta mál seinni fleiri ferðir er felt, má samtyktin frá 1948 roknast at vera burtur, og er tí nýggj samtykt neyðug.

Tey síðstu árini er støðan broytt, so tað er átroðkandi neyðugt at fáa hesi viðurskifti broytt nú.

Líkt er til, at semja fæst í næstu framtíð um eitt vítt figgjarligt øki, sum strandalondini ráða yvir. Miðað eigur at verða ímóti, at markið á Føroya undirgrund verður hálv leiðin til næsta bygda land.

Í meira enn túsund ár hava føroyingar livað á hesum klettum, og ikki hava teir mist seg burtur sum tjóð. Skuldi tað hent, at olja verður funnin á hesum leiðum, og ikki verður fyristilað við skili, so kunnu vit eftir stuttari tíð fullkomiliga hvørva sum tjóð.

Hyggja vit uttan um okkum, so síggja vit árinið, oljan longu hevur havt á Hetlandi, og sjálvt í Noregi eru menn álvarsliga bangnir fyri avleiðingunum.

Tað er avgerandi neyðugt, at ikki verður loyvt nøkrum at leita eftir olju uttan um hesar oyggjar, fyrr enn Føroya løgting hevur avgerðarrættin í hesum máli, so fyrst verður hugsað um, hvat er best fyri Føroya fólk sum tjóð, áðrenn hugsað verður um peningaligan vinning.

Vísandi til tað, sum her er fort fram, verður uppskotið til samtyktar: Føroya undirgrund lagt fyri tingið.

Á Føroya løgtingi, 24. mars 1975

Vegna Sjálvstýrisflokkin

Hilmar Kass Ásbjørn Joensen

1. viðgerð 7. apríl. Málið beint í marknaðarnevndina, sum 18. apríl legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð við skrivi frá 24. mars 1975 lagt fyri tingið av sjálvstýrisflokkinum og varð við fyrstu viðgerð beint í marknaðarnevndina.

Hin 11. januar 1975 kunngjørdi løgmaður fyri tinginum, at landsstýrið fór at taka upp samráðingar við donsku rikisstjórnina um yvirtøku av undirgrundini (her undir havbotninum). Fyrsta umfar í hesum samráðingum hevur verið og á fundi í nevndini greiddi løgmaður frá teimum.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

So statt setur meiriluta í nevndini (Erlendur Patursson, J. Fr. Øregaard, Poul J. Olsen, Hákun Djurhuus, Jógvan Sundstein og Hilmar Kass) fram soljóðandi:

Uppskot
til samtyktar

Føroya løgting samtykkir, at málsokið undirgrund Føroya og havbotnurin verður yvirtikið sum føroyskt sermál.

Løgtingið tekur til eftirtektar, at landsstýrið hevur havt samráðingar við donsku ríkisstjórnina um hesa yvirtøku og áleggur landsstýrinum at halda fram við hesum samráðingum hagar til málið er greitt.

Minniluta (Pauli Ellefsen) setur fram soljóðandi:

Uppskot
til samtyktar

Føroya Løgting áleggur landsstýrinum at kanna til fulnar hvorjar avleiðingar kunnu standast av einari yvirtøku av føroysku undirgrundini.

Úrslitið av hesi kanning, sum eisini skal lýsa føroysku rættindini til undirgrundina í hinum partinum av ríkinum aftaná eina møguliga yvirtøku verður at leggja fyri løgtingið, sum tá tekur støðu til, um samráðingar um yvirtøku skulu fara fram ella ikki.

MARKNAÐARNEVNDIN, 17. april 1975

Erlendur Patursson	J. Fr. Øregaard	Poul J. Olsen
Hákun Djurhuus	Jógvan Sundstein	Hilmar Kass
	Pauli Ellefsen	

2. viðgerð sama dag á seinni fundi. Frávik frá tíðarfrestini.

Broytingaruppskot frá minniluta í nevndini (Paula Ellefsen) fall við 6—0. Uppskot til samtyktar frá meiriluta í nevndini samtykt við 19—0. Uppruna uppskotið sostatt burturdottið og málið avgreitt.

32. Veðhald fyri láni til L/f. Grønlandsfelagið

Ár 1975, týsdagin 25. mars, legði Demmus Hentze, landsstýrismaður fram

Uppskot
til

løgtingslóg um veðhald fyri láni til l/f Grønlandsfelagið.

§ 1.

Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at veðhalda fyri láni upp til 6 milj. kr. til L/f Grønlandsfelagið til keyp av partapeninginum hjá A/S Utrustning í A/S Nordafar, til rindan av kreditorum hjá A/S Nordafar og til rakstrarpening hjá hesum felag.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

lagtingslov om garanti for lån til l/f Grønlandsfelagið.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at garantere for et lån indtil 6 mill. kr. til L/f Grønlandsfelagið til køb af A/S Utrustnings aktier i A/S Nordafar til betaling af kreditorer for A/S Nordafar og til driftskapital for dette selskab.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Í 1950 var L/f Grønlandsfelagið sett á stovn við tí endamáli at stovna og umsita slík virki í Grønlandi (bryggjur, goymsludum, oljugoymslur, vatnveiting, frystihús, bedingar, verkstaðir o.a.m.), sum tørvur er á hjá føroyskum skipum, sum fiska við Grønland, so eisini at útvega fiskiførum útgerð, taka veiðu frá teimum og inna allan handil í Grønlandi.

Í endamálsgrein felagsins stendur eisini, at felagið kann tekna partapening í ella á annan hátt seta pening í onnur felag, hvørs endamál eru tey sonnu sum Grønlandsfelagsins.

Grønlandsfelagið hevur ein lutapening upp á kr. 1.650.000 og eru lutaeigararnir hesir:

Landið	kr. 550.000
L/f Føroya Fiskasøla	kr. 550.000
Føroya Reiðarafelag	kr. 150.000
Føroya Fiskimannafelag	kr. 100.000
Føroya skipara- og navigatørfelag	kr. 100.000

F.L. j. nr. 1408-4-3. — Sí eisini LI. 11/1975.

Tey fyrstu árini hevði Grønlandsfelagið støð og virki sitt í ytru Føroyingahavnini.

Í 1949 vóru norska felagið A/S Udrustning og danska felagið A/S Grønlands Industri- og handelskompagni (Astriko) í felag farin undir at virka í Føroyingahavnini og fingu sær støð í innaru Føroyingahavnini, har sum Nordafar nú er.

Í 1953 tóku tey 3 feløgini upp eitt vist samarbeiði, so sum samsigling við salti, saltfiski o.ø. Sama ár um heystið varð Nordafar A/S stovnað við hesum partapeningi:

Grønlandsfelagið	kr.	800.000,—
Udrustning	kr.	800.000,—
Astriko	kr.	400.000,—
tilsamans	kr.	2.000.000,—

Í 1960 fór Astriko burtur úr felagsskapinum og vóru partabrøvini seld til Grønlandsfelagið og Udrustning við helvtini til hvørt.

Virksemið hjá Nordafar í 1950 árunum var serliga móttøka av saltfiski, søla av salti og annar handil, so sum útgerð til skipini og tørvandi umvælingararbeiði, men somu ár minkaðu saltfiskalandingarnar í Grønlandi og byrjaði Nordafar tí í 1959 eisini flakavirki. Hetta virksemi gjørdist so umfatandi, at t.d. í 1966 var landingin av ráfiski frá útróðrarbátunum ca. 9.000 tons og umsetninguriu gott 30 milj. kr., og hesi árini róðu út og arheiddu í Grønlandi yvir 500 mans.

Í seinna helmingi av 1960 árunum gjørdist tað meira trupult at fáa flakaframleiðsluna at bera seg. Tað var minkandi veiðimongd og nógv fallandi prísir.

Frá 1970 gjørdust tey figgjarligu viðurskiftini hjá Nordafar so vánalig, at støðin í Føroyingahavn ikki kundi halda fram, uttan at felagið fekk figgjan uttanífrá. A/S Utrustning átók sær nú raksturin og figgjaði samstundis Nordafar við tí tørvandi peningi. Støðan hjá Nordafar bert versnaði ár um ár, og við árslok 1974 hevði Udrustning tilgóðar hjá Nordafar kr. 4,6 milj.

Í vetur hava samráðingar verið millum feløgini bæði um framhald av felagsrakstri, men hvørki Udrustning ella Grønlandsfelagið sá seg fært fyri at fáa til vega rakstrarpening, og Nordafar kundi ikki greiða sínar figgjarligu skyldur. Nordafar var sostatt komið í tu støðu, at tað máttli fara í likvidatión, og støðin í Føroyingahavnini leggjast niður. Spurningurin kom tá fram um møguleikan hjá Grønlandsfelagnum at fáa til vega pening til at keypa Udrustnings part í Nordafar, og Grønlandsfelagið so-

leiðis gerast einaeigari av Nordafar. Udrustnings tilboð kom at vera, at tað vildi avskriva sín ágóða hjá Nordafar upp á kr. 4,6 milj. móti at avhenda sín partapening til kr. 1,8 milj.

Sum eitt lið í hesi nýskipan var eisini treytað, at tað fekst ein akkord við Nordafar kreditorar upp á 50%.

Tá Grønlandsfelagið helt, tað mátti haldast hava alstóran týdning fyri føroyska fiskivinnu at halda fram við stoðini í Foroyingahavnini, vendi tað sær til landsstýrið við málinum, og hevur landsstýrið havt fund við allar floksformenninar á tingi og hava hesir givið sítt viðmæli til at leggja málið fyri tingið við uppskoti um eina veðhaldslóg fyri at Grønlandsfelagið kann fíggja keypið av Nordafars lutapeningi og framhaldi av stoðini í Føroyingahavnini.

Síðani er semja gjørd millum Grønlandsfelagið og Udrustning. Eitt eintak av sáttmálanum er viðlagt.

Tað skal upplýsast, at Nordafar hevði loyvi til støð í Føroyingahavnini til 1994, og er hesin støðrættur tryggjaður, um Grønlandsfelagið gerst einaeigari av Nordafar.

Tann tørvandi fíggjanin er henda:

Keyp av Udrustnings partapeningi	kr. 1,800,000
Kreditorar og møgulig yvirtøka av saltlagri í Føroyingahavnini	kr. 2,700,000
Rakstrarpeningur	kr. 1,500,000
Tilsamans	kr. 6,000,000

Annars sær Nordafars status uppgjørdur pr. 25. oktober 1974 soleiðis út:

Aktiv	
Kassin/Bankar	kr. 575,000
Debitorar	kr. 1,153,000
Vørur á goymslu	kr. 2,520,000
Ymist	kr. 85,000
Bygningar	kr. 2,345,000
Maskinur	kr. 572,000
	kr. 7,250,000
Undirskot	kr. 6,977,000

Passiv

Udrustning	kr.	1.560.000
Grønlandsfelagið	kr.	705.000
Kreditorar	kr.	3.227.000
Bikuben, pant	kr.	1.615.000
Sunmøre Kreditbank	kr.	1.620.000
Partapeningur	kr.	2.000.000
Tiltaksgrunnur	kr.	100.000
	kr.	14.227.000

Dennnus Hentze
landsstýrismaður

/ J. Djurhuus

Imellem Utrustning A/S, Aalesund, i det følgende kaldet U, på den ene side og L/f Grønlandsfelagið, i det følgende kaldet G, på den anden side, er der i dag vedrørende Nordafar A/S, København, ingået følgende

AFTALE

1.

Af Nordafar A/S's aktiekapital, stor kr. 2.000.000,00 ejer G og U hver kr. 1.000.000,00 og G køber den U tilhørende aktiekapital for d. kr. 1.800.000,—, hvilket beløb erlægges kontant senest den 10/3 1975.

2.

Handelen er fra købers side betinget af, at U afskriver sit tilgodehavende i Nordafar A/S, stort ca. d. kr. 4.500.000,00 samt at denne afskrivning finder sted med tilbagevirkende kraft til december 1974.

U har herefter ingen krav mod Nordafar A/S, og den gensidige selvskyldnerkaution mellem U og G bortfalder. Nordafar A/S har intet krav mod U, bortset fra eventuelle faktureringer efter 1. november 1974.

3.

Handelen er fra købers side endvidere betinget af, at Nordafar A/S med selskabets øvrige simple kreditorer kan opnå en akkord gående ud

på, at nævnte kreditorer imod kontant betaling af 50% af deres tilgodehavende meddeler Nordafar saldokvittering. Der levnes køber den fornødne og rimelige tid til at forhandle med Nordafar A/S's kreditorer om denne akkordordning.

4.

Yderligere er handelen fra kebers side betinget af, at de danske myndigheder, herunder valutamyndighederne, godkender handelen samt specielt at akticoverdragelse som anført ikke medfører indskrænkninger i de Nordafar A/S tilkommende rettigheder i Færingehavn, Grønland, i henhold til koncessioner. Der levnes ligeledes køber den fornødne og rimelige tid til at opnå endelige erklæringer herom samt myndighederne, herunder i det væsentlige valutamyndigheder og Grønlandsministeriet.

5.

Såfremt en endelig ordning med kreditorer og myndigheder ikke er etableret inden den i § 1 fastsatte betalingsfrist skal køber senest denne dato deponere pågældende beløb i en af parterne i fællesskab valgt bank i Danmark og deponeringen skal ske med den klausul, at beløbet kan fritstilles Udrustning A/S eller ordre, når vilkårene i denne kontrakt overfor banken er dokumenteret at være opfyldt. Renten af det deponerede beløb tilkommer sælgeren, såfremt handelen endeligt kan opfyldes. Kan handelen ikke endeligt opfyldes er banken, hvori beløbet er deponeret, pligtig til at returnere beløbet incl. renter til deponenten.

Til brug for bankens vurdering af om handelen er endeligt opfyldt udkræves forelagt for banken en erklæring underskrevet af såvel G's som U tilkendegivende, at denne aftales vilkår er opfyldt.

6.

Såfremt en enkelt eller flere kreditorer vil modsætte sig en akkordordning som skitseret, men kræver en større procent, eventuelt fuld dækning, og de øvrige simple kreditorer i Nordafar A/S måtte acceptere sådanne eventuelle individuelle krav som et led i en akkordordning, er G berettiget til at efterkomme sådanne krav uden at U skal kunne påberåbe sig bristende forudsætninger for kontraktens indgåelse, ligesom G skal vere berettiget til af praktiske grunde i forbindelse med akkordforhandlinger at medvirke til at en række mindre betydningsfulde kreditorer i Nordafar A/S udbetales med 100% af disses tilgodehavende.

7.

Fra G's side er handelen endvidere betinget af, at Nordafar A/S med de kreditorer, der har faste prioriteter i anlæggene i Færingehavn, d.v.s.

Sunmøre Kreditbank A/S, Aalesund, m.fl. samt Bikuben, København, opnår tilladelse til at prioriteterne indestår med forrentning samt med tidligere aftalte afdragsvilkår.

8.

Såfremt handelen gennemføres er U forpligtet til at kvittere de ejerpantebreve Nordafar A/S har udstedt og overgivet U, samt at udlevere de pågældende ejerpantebreve i kvitteret stand til landsretssagfører Konig, således at ejerpantebrevene kan blive aflyst.

9.

Omkostningerne i forbindelse med denne handels gennemførelse hvorved forstås stempelomkostninger og honorar til landsretssagfører Konig, der herigtiger handelen, deles med halvdelen til hver af parterne.

Øvrige vilkaar for handelens gennemførelse:

Et yderligere vilkår for ovennævnte aftale er fra Gs side af den aftalte købesum jfr. pkt. 1 kan financieres via norske banker mod Lagtingets eller anden garanti og med en løbetid på 5 år med lige store halv- eller helårlige afdrag.

Fra Us side er aftalen betinget af, at en ekstraordinær generalforsamling i U, der indkaldes mandag den 17. februar 1975 med 8 dages varsel, tiltræder aftalen.

Fra Gs side er aftalen yderligere betinget af, at G fra de færøske myndigheder får tilsagn om tilfredsstillende financiering og / eller garanti herfor.

De ovennævnte «Øvrige vilkår» skal være afklaret senest onsdag den 26. februar 1975 kl. 17.00, og der gives Konigs kontor telexmeddelelse herom inden dette tidspunkt.

Grupperne er indforstået med at kreditorerne i Nordafar A/S orienteres om forhandlingernes forløb og nærværende aftales indhold i hovedtræk.

Fra Us side er aftalen betinget af at de norske myndigheder ikke inden den 25. februar 1975 fremkommer med endeligt tilbud om financieringshjælp til Nordafar A/S i forbindelse med en rekonstruktion af selskabet.

Såfremt denne aftale gennemføres forpligter Nordafar A/S sig til at yde samme service overfor de norske skibe, der anløber Færingehavn, som den der ydes de færøske skibe og på samme vilkår alt indenfor den til enhver tid bestående lovgivning. Endvidere tilsiger G at den i Færingehavn etablerede velfærdstjeneste fortsat kan bestå på vilkår som hidtil. Sidstnævnte tilsagn indeholder ikke at Nordafar eller G paatager sig økonomiske forpligtelser.

Ålesund, den 14. februar 1975.

L/f Grønlandsfelagi — Utrustning

Tiltrædes af:

Nordafar A/S

Sjóvinnubankin

Sunmøre Kreditbank A/S

Privatbanken A/S har intet at bemærke til aftalen.

NORDAFAR og GRØNLANDSFELAGIÐ

Rakstrarætlan fyri 1975

Inntøkur

Søla av provianti, krambavørum og materialum, vinningur	515.000,00
Saltsekking	40.000,00
Vinningur av fiski	800.000,00
Vinningur av laksi	100.000,00
	1.455.000,00

Útreiðslur		
Verkstaður	25.000,00	
Havnaavgreiðslur	65.000,00	
Frystari og kraftstøð	500.000,00	
Statiónsleiðari og skrivstovumaður	135.000,00	
Trygging	165.000,00	
Viðlikahald	100.000,00	
Aðrar felagsútreiðslur	220.000,00	
Skrivstova í København	150.000,00	
Skrivstova í Tórshavn	160.000,00	
Nevnd, revisión b.l. útreiðslur	75.000,00	1.595.000,00
Rakstrarhall		140.000,00

Yvirlit yvir kapital- og rentuútreiðslur		
Rentur av rakstrarkreditti	1.500.000,00	210.000,00
Rentur av prioritetslánum	3.220.000,00	350.000,00
Rentur av nýggjum lánum	4.500.000,00	630.000,00
Avdráttir (5 og 10 ár)		1.240.000,00
Rakstrarhall		140.000,00
		2.570.000,00

1. viðgerð 26. mars. Frávik frá tíðarfrestioi. Framlagt varð broytingaruppskot, dagsett á Føroya Løgtingi 26. mars

I § 1 verður skoytt uppí sum 2. stk.:	I § 1 tilføjes som stk. 2:
«Onki veðhald verður givið fyrr enn allar treytir, landsstýrið og figgjarnevndin seta, eru loknar.»	«Ingen garanti afgives før alle betingelser, landsstyret og finansudvalget måtte stille, er opfyldt.»

— og málið beint í figgjarnevndina, sum sama dag á seinni fundi legði fram soljóðandi

Álit

Málið: Veðhald fyri láni til L/f Grønlandsfelagið sum løgtingsmál nr. 32/1974 er lagt fyri løgtingið av landsstýrinum 25. mars 1975.

Figgjarnevndin er samd um at taka undir við landsstýrisins uppskoti

og tí broytingaruppskoti, ið varð framlagt undir 1. viðgerð av málinum 26. mars 1975.

2. viðgerð á sama fundi.
Broytingaruppskot til gr. 1 samtykt við 20—0, gr. 1 so broytt samtykt 20—0. — Alt málið og at fara til 3. viðgerð samtykt 20—0.

3. viðgerð sama dag á seinni fundi. Uppskotið, sum samtykt við 2. viðgerð, nú endaliga samtykt 20—0.

---

33. Happadráttarloyvi til Útvarp Føroya

Ár 1975, týsdagin 8. apríl, legði Jákup Lindenskov, landsstýrismaður, fram

Uppskot
til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um happadráttarloyvi til Útvarp Føroya.

§ 1.
Í § 3 í løgtingslóg nr. 71 frá 20. november 1969 um happadráttarloyvi til Útvarp Føroya við seinni broytingum verða orðini «30. apríl 1975» broytt til «30. apríl 1976».

§ 2.
Henda lóg fær gildi frá 30. apríl 1975.

lagtingslov om ændring af lagtingslov om lotteritilladelse til Útvarp Føroya.

§ 1.
I § 3 i lagtingslov nr. 71 af 20. november 1969 om lotteritilladelse til Útvarp Føroya med senere ændringer ændres ordene «30. april 1975» til «30. april 1976».

§ 2.
Denne lov træder i kraft den 30. april 1975.

F.L. j. nr. 512-90. — Sí eisini Ll. nr. 23/1975.

Viðmerkingar:

Útvarp Føroya hevur søkt um, at lógin um happadráttarloyvi, ið gongur út 30. apríl 1975 verður endurnýggjað.

Í sambend við at útvarpið søkir um endurnýgging av loyvinum, er gjord fylgjandi uppstilling yvir, hvussu býtið hevur verið av peninginum, sum inn er komin við 190 dráttum.

Inngoldnar eru 1.495.207 seðlar á kr. 5,50		8.223.638,50
Harav er farið í porto til postverkið	747.603,50	
Í vinningum er goldið	2.257.863,00	
Skattur til landskassan	359.563,00	
Umsitingarútreiðslur	279.836,00	
Samlaðar útgjaldingar í samband við spælið ..		3.644.865,50
Útvarpsins partur		4.578.773,00

Útvarpið hevur fingið grundøki frá Tórshavnar býráð ovaliga í Gundadali til bygging av nýggjum útvarpshúsum og farið er undir detailprojektering.

Tá útvarpinum eru lørvar pening til nevndu bygging, skal landsstýrið mæla til, at lógin verður framlongd eitt ár.

J. Lindenskov
landsstýrismaður

/ J. Djurhuus

1. viðgerð 9. apríl. Frávik frá tíðarfrest.

Málið beint til 2. viðgerð uttan nevndarviðgerð.

2. viðgerð 11. apríl. Gr. 1 samtykt 22—0. — Gr. 2 samtykt u. atkvgr. 22—0. — Soleiðis samtykt at fara til 3. viðgerð 23—0.

3. viðgerð 15. apríl. — Uppskotið, sum samtykt við 2. viðgerð, nú endaliga samtykt 20—0.

34. Veðhald fyri lánum til sildamjøl v.m. á goymslu

Ár 1975, týsdagin 8. april, legði Jákup Lindenskov, landsstýrismaður, fram

Uppskot
til
løgtingslóg um veðhald fyri lánum til sildamjøl og sildaolju v.m. á goymslu.

§ 1.

Landsstýrinum er heimilt landskassans vegna í fíggjarárinum 1975/76 at veita veðhald fyri lánum til sildamjøl, fiskamjøl, sildaolju og matsild á goymslu. Veðhaldið verður givið fyri lánum ikki upp um 70% av lánivirðinum.

§ 2.

Henda lóg kemur beinan vegin í gildi.

lagtingslov om garanti for lån til sildemel og sildeolie m.v. på lager.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne i finansåret 1975/76 at garantere for lån til sildemel, fiskemel, sildeolie og konsumsild på lager. Garantien ydes for lån, der ikke må overstige 70% af låneværdien.

§ 2.

Denne lov træder straks i kraft.

Viðmerkingar:

Frá og við fíggjarárinum 1963/64 hevur landsstýrið havt heimild at veðhalda fyri lánum til sildamjøl og sildaolju á goymslu, seinni er heimildin víðkað til eisini at umfata goymslulán til fiskamjøl og matsild. Lógirnar hava bert verið galdandi fyri eitt fíggjarár, og málið hevur tí verið til viðgerðar í hvørjari løgtingssetu.

Undir viðgerðini av heimildarlógini fyri 1974/75 sigur fíggjarnevndin í álitinum, jbr. løgtingsmál nr. 38/1973:

«Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið og tekur undir við uppskotinum og mælir løgtinginum til at samtykkja tað.

Men viðvíkjandi viðmerkingunum um, at nevnda lóg framvegis er neyðug vildi fíggjarnevndin, at landsstýrið hevði havt kannað henda spurning nærri. Fíggjarnevndin hevur fyrr gjøt vart við, at henda ábyrgd ikki skuldi verið neyðug longur.

Tá lógin av fyrsta sinni varð sett í gildi, vóru umstøðurnar heilt aðrar.

F.L. j. nr. 1408-5-2. Sí eisini Ll. nr. 22/1975.

Bæði hesin fiskiskapur og viðgerðin av sildini vóru tá nakað, ið litið var roynt áður, heldur ikki var sildin, mjølið ella lýsið selt frammanundan, og tí høvdu lángevararnir onga trygd fyri, hvat virði nevnda vøra hevði, ið pantur varð givin í. Nú er støðan ein heilt onnur. Í flestu førum er vøran seld frammanundan, vrakaváttan givin um, at vøran er til, og at hon lýkur allar treytir sambært sølusátlmála. Tað skuldi tí verið heilt náttúrligt fyri vanligar bankar, ið læna til driftsfinansiering, at lænt upp til 70% av sølunvirðinum við at fingið pant í vøruni, uttan at tað aftaná at hava pant í vøruni, eisini at krevja landskassaábyrgd.

Fíggjarnevndin vil tí heita á landsstýrið um at taka upp samráðingar við avvarðandi bankar um at frávella kravið um landskassaábyrgd í slíkum føri, har lánini mugu ætlast at koma inn undir vanligt bankayrki.»

Samráðingar hava verið við bankarnar, sum báðir siga, at landskassaveðhald eru neyðug.

Bankarnir vísa á, at teimum kunnugt fáa allar danskar verksmiðjur, ið framleiða olju og mjøl úr fiski til útflutnings almennt tapsveðhald fyri goymshulán eftir lóg nr. 145 frá 21. apríl 1965 «om Danmarks erhvervsfond». Lógin røkkur ikki til útflutning úr Føroyum til Danmark. Eisini verður vist til, at l/f Føroya Fiskasøla og i/s Havsbrún hava so mikið saman fíggjarliga, at bankaeftirlitið metir, at lán til Havsbrún vil skerja lánimøguleikarnar hjá Føroya Fiskasølu um ikki veðhildið verður fyri lán til fyrra felagið, jbr. § 12 í bankalógini. At enda verður ført fram ótryggleikin í løtuni um prísin á framleiðsluni.

Landsstýrið hevur eina ongantíð lagt út sum veðhaldari fyri hesi lán, og bankarnir meta, at tað heldur ikki verður aktuelt fyri lán, landsstýrið nú veðheldur fyri.

Jákup Lindenskov
landsstýrismaður

/ J. Djurhuus

1. viðgerð 9. apríl. Frávik frá tíðarfrest. Málið beint í fíggjarnevndina, sum 10. apríl legði fram soljóðandi.

Álit

Málið var av landsstýrinum framlagt 8. apríl og undir 1. viðgerðini 9. apríl beint í fíggjarnevndina.

Undir 1. viðgerð varð tann spurningur reistur, um ikki navnið á hesi lóggávu átti at verið broytt soleiðis, at hon sum rammulóg kom at roynast rúmari á tann hátt, at vit nýttu gamla føroyska orðið lýsi, í staðin fyri

orðið olju av tí og tí fiski, og orðið fiskamjøl í staðin fyri mjøl av tí og tí fiski.

Fíggjarnevndin tekur einmælt undir við at broytt verður samsvarandi framførdu sjónarmiðunum og vil seta broytingaruppskot hesum viðvíkjandi til landsstýrisins uppskot.

At hildið verður áfram við hesi lóggávu, er fíggjarnevndin samd um.

Undir 1. viðgerð vóru eisini havdir á lofti spurningarnir:

1. um tørvurin hjá bankunum at krevja landskassaveðhald fyri slíkar vørur á goymslu.
2. um eitt fast provisiónsgjald fyri landskassaveðhald og nevnt varð ½—1 prosent.

Fyri at fáa lýst hesar spurningar betur, varð Rasmus Olsen, bankastjóri, boðsendur at koma á fíggjarnevndarfundin.

Hann vísti á, at stóð ikki landskassaveðhald aftanfyri lániveitingar til slíkar vørur á goymslu, sum her var talan um, vildi tað í vissum førum hava ta avleiðing, at virkir komu at verða skerd viðvíkjandi teirra finansieringsmøguleikum sambært hesi lóggávu.

Eisini gjørdi hann vart við, at eitt møguligt provisiónsgjald fyri landskassaveðhald vildi hann koma at gjalda, ið gjørdi brúk av landskassaveðhaldinum.

Fíggjarnevndin var tí samd um at lata 1. og 2. hvíla í hesari syftu, men mæla landsstýrinum til at arbeiða víðari við hesum hugskotum.

Samsvarandi tí, ið her er greitt frá mælir fíggjarnevndin til at samtykkja landsstýrisins uppskot við soljóðandi broytingaruppskoti til landsstýrisins uppskot.

Broytingaruppskot

Navnið á lógini verður broytt til:

løgtingslóg um veðhald fyri lánum til fiskamjøl og lýsi v.m. á goymslu.	**lagtingslov om garanti for lån til fiskemel og animalsk olie m.v. på lager.**

og í § 1 í 5'tu reglu aftaná til:

«fiskamjøl og lýsi»	«fiskemel og animalsk olie»

(ístaðin fyri sildamjøl, fiskamjøl, sildaolju).

(i staðin fyri sildemel, fiskemel, sildeolie).

FIGGJARNEVNDIN, 10. april 1975.

Hákun Djurhuus	Poul J. Olsen	Hilmar Beck
Jógvan Durhuus	Signar Hansen	Asbjørn Joensen
	Pauli Ellefsen	

2. viðgerð 11. apríl. Frávik frá tíðarfrest.

Broytingaruppskot frá nevndini samtykt við 23—0.

Navnið á lógini og gr. 1 soleiðis broytt samtykt við 24—0. Alt lógaruppskotið og at fara til 3. viðgerð samtykt við 23—0.

3. viðgerð 15. apríl.

Lógaruppskotið sum samtykt við 2. viðgerð, nú endaliga samtykt við 21—0 atkv.

---

35. Veðhald fyri lánum til smærri ídnaðarvirki

Ár 1975, týsdagin 8. apríl, legði Jákup Lindenskov, landsstýrismaður, fram

Uppskot
til

lagtingslóg um veðhald fyri lánum til smærri ídnaðarvirkir.	**lagtingslov om garanti for lån til mindre industrivirksomheder.**
§ 1.	§ 1.
Landsstýrinum er heimilað landskassans vegna í fíggjarárinum 1975/76 at veðhalda fyri lán-	Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne i finansåret 1975/76 at garantere for lån ind-

F.L.j. nr. 1427-2. — Sí eisini L.l. nr. 21/1975.

um upp til 1 milj. kr. til smærri idnaðarvirkir.

§ 2.

Hesi lán verða at nýta til stovnan av nýggjum virkjum, viðkan og nútímansgerð av gomlum o.t.

2. stk. Lánini mugu ikki fara upp um 70% av tí virði, sum nýggju fløgurnar hava eftir meting og skulu verða tryggjað við panti innanfyri 70% av tí virði, pantsettu lutirnir hava.

§ 3.

Henda lóg fær gildi beinanvegin.

til 1 mill. kr. til mindre industrivirksomheder.

§ 2.

Disse lån skal anvendes til nyetablering af virksomheder, udvidelse og modernisering af ældre o.l.

Stk. 2. Lånene må ikke overstige 70% af nyinvesteringernes værdi i henhold til vurdering og skal sikres ved pant indenfor 70% af de pantsatte genstandes værdi.

§ 3.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Síðani Idnaðargrunnurin og Menningargrunnurin eru stovnaðir, hevur talið á umsóknum um landskassaveðhald fyri lánum til idnaðarvirki verið minkandi. Landsstýrið hevur tó í fíggjarárinum 1974/75 givið tilsøgn um veðhald fyri sløktum kr. 600.000, og merkir hetta, at tørvur framvegis er á tílíkari fíggjan. Landsstýrið heldur tað ti vera rættast at endurnýggja lógina um veðhald fyri lánum til smærri idnaðarvirki í enn eitt ár.

Jákup Lindenskov
landsstýrismaður

/ J. Djurhuus

1. viðgerð 9. apríl. Frávik frá tíðarfrest. — Málið beint í fíggjarnevndina, sum 10. apríl legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð av landsstýrinum framlagt 8. apríl 1975 og mælir **1.** viðgerð beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin tekur undir við uppskoti landsstýrisins, men heldur seg skilja av viðmerkingunum, at her er bert talan um eitt ár.

Skuldi henda lóggáva verið framlongd, vil figgjarnevndin fegin hava, at reglur verða gjørdar, sum hesar veðhaldsveitingar verða játtaðar samsvarandi.

FIGGJARNEVNDIN, 10. apríl 1975.

Hákun Djurhuus	Poul J. Olsen	Hilmar Bech
Jógvan Durhuus	Signar Hansen	Asbjørn Joensen
	Pauli Ellefsen	

2. viðgerð 11. apríl. Frávik frá tíðarfrest.
Gr. 1 og 2, málið alt og at fara til 3. viðgerð, samtykt við 23– 0 atkv.

3. viðgerð 15. apríl.
Lógaruppskotið sum samtykt við 2. viðgerð nú endaliga samtykt við 21—0.

---

36. Broyting í lóg um viðarlundir

Ár 1975, mikudagin 9. apríl, legði Dennnus Hentze, landsstýrismaður, fram

Uppskot
til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um viðarlundir.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 53 frá 27. november 1952 um viðarlundir verður § 2, 2. stk., orðað soleiðis:

«Í nevndini sita landbúnaðar-

lagtingslov om ændring i lagtingslov om plantager.

§ 1.

I lagtingslov nr. 53 af 27. november 1952 om plantager affattes § 2, stk. 2, således:

«Nævnet består af landbrugs-

F.L.j. nr. 1710-7.

ráðgevarin, formaður Tórshavnar býráðs og tríggir limir, sum landsstýrið velur fyri trý ár. Landsstýrið velur formannin.»

konsulenten, formanden for Tórshavn byråd samt tre af landsstyret for tre år valgte medlemmer. Landsstyret beskikker formanden.»

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Í skógfriðingarnevndini, ið hevur fimm limir, eru tríggir føddir limir, nevniliga sorinskrivarin, ið er formaður, landbúnaðarráðgevarin og formaður Tórshavnar býráðs. Hinir tveir limirnir velur landsstýrið fyri trý ár.

Í skrivi til landsstýrið hevur sorinskrivarin biðið um at sleppa undan at vera føddur formaður í skógfriðingarnevndini, og førir m.a. fram, at hetta gevur honum væl av arbeiði, at fleiri støv eru knýtt til sorinskrivaraembætið, sum ikki náttúrliga hoyra undir hetta, og at hann ikki heldur seg hava neyðugan kunnleika til starvið.

Landsstýrið mælir til, at lógin verður broytt soleiðis, at sorinskrivarin kann sleppa undan at vera limur í nevndini.

1. viðgerð 11. apríl og málið beint í lógarnevndina, sum sama dag á seinni fundi legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð av landsstýrinum lagt fyri løgtingið 9. apríl og varð við 1. viðgerð 11. apríl beint í lógarnevndina.

Nevndin hevur býtt seg í ein meirilutu og ein minniluta.

Meirilutin í nevndini (Heðin M. Klein, J. Fr. Øregaard, Tórálvur Olsen og Agnar Nielsen) setur fram hetta

Broytingaruppskot

§ 1 í uppskoti landsstýrisins verður broytt soleiðis:

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 53 frá 27. november 1952 um viðarlundir verður § 2, 2. stk., orðað soleiðis:

«Í nevndini sita landbúnaðarráðgevarin og fýra limir, sum løgtingið velur fyri fýra ár. Landsstýrið velur formannin.»

§ 1.

I lagtingslov nr. 53 af 27. november 1952 om plantager affattes § 2, stk. 2, således:

«Nævnet består af landbrugskonsulenten samt fire af lagtinget for fire år valgte medlemmer. Landsstyret beskikker formanden.»

Minnilutin í nevndini (Eliesar Arge) mælir til at samtykkja landsstýrisuppskotið.

LÓGARNEVNDIN, 11. apríl 1975.

Heðin M. Klein J. Fr. Øregaard Agnar Nielsen
Tórálvur Olsen Eliesar Arge

2. viðgerð 15. apríl.

Broytingaruppskot til landsstýrisuppskotið gr. 1 frá meiriluta í nevndini (Heðin Klein, J. Fr. Øregaard, Tórálv Olsen og Agnar Nielsen) varð samtykt við 15—0.

Alt lógaruppskotið og at fara til 3. viðgerð samtykt við 16—0.

Minnilutauppskotið (Eliesar Arge) um at samtykkja upprunauppskot landsstýrisins burturfallið.

3. viðgerð 16. apríl. Frávik frá tíðarfrest.

Broytingaruppskot frá meiriluta í nevndini (J. Fr. Øregaard, Tórálvur Olsen, Heðin Klein og Agnar Nielsen), soljóðandi:

Í løgtingslóg nr. 53 frá 27. november 1952 um viðalundir verður § 2, 2. stk., orðað soleiðis:

«Í nevndini sita 5 limir, harav 1 valdur av landsstýrinum og 4 av løgtinginum. Nevndin skipar seg sjálv.»

Frá meiriluta í lógarnevndini (J. Fr. Øregaard, Tórálv Olsen, Heðin Klein og Agnar Nielsen) varð framlagt. Eingin donsk tekst til broytingruppskotið. Viðari viðgerð útsett til ein seinni fund.

17. apríl helt viðgerðin fram.

Broytingaruppskotið til gr. 1 samtykt við 19—0.

Lógaruppskotið soleiðis broytt, endaliga samtykt við 19—0.

37. Donsk kunngerð frá 28. mars 1963 av konsularkonventión frá 27. juni 1962 við Bretland

Ár 1975, týsdagin 11. mars, var við viðmæli framlagt skriv frá ríkisumboðsmanninum, har spurt verður um heimastýrið hevur nakað at viðmerkja til, at kunngerð frá 28. mars 1963 av konsularkonventión frá 27. juni 1962 við Bretland verður kunngjørd at galda í Føroyum. Málið beint í lógarnevndina.

9. apríl varð framlagt álit frá lógarnevndini, soljóðandi:

Ríkisstýrið hevur spurt heimastýrið, antin tað hevur okkurt at viðmerkja til, at kunngerð frá 28. mars 1963 um konslarakonventión frá 27. juni 1962 millum danska kongaríkið øðrumegin og sameinda kongaríkið Stórabretland og Norður-Írland hinumegin verður lýst at galda fyri Føroyar.

Málið hevur fingið landsstýrisins viðmæli og varð beint til viðgerðar í lógarnevndini.

Í kunngerðini verður í 39 lógargreinum, ískoyti, 3 undirritingarprotokollum og tulkingarleiðirskrift gjøllíga greinað, hvørji rettindi og hvørjar skyldur danskir og bretskir konsular hava hvør hjá øðrum. Í føroyskum sambandi verða tað helst greinarnar 24 til og við 31 um sjóferðslu, sum kunnu fáa størsta týdningin.

Lógarnevndin, sum hevur gingið um kunngerðina, ynskir eisini at viðmerkja, at tær fyriskipanir, sum har verða skrásettar, koma ikki í mótstríð við grundleggjandi lóggávuna, hvørki í sendara- ella í móttøkulandinum.

Ein samd lógarnevnd mælir tí tinginum til at samtykkja fyriliggjandi kunngerð.

LÓGARNEVNDIN, 8. apríl 1975.

Heðin M. Klein Tórálvur Olsen Eliesar Arge
J. Fr. Øregaard Agnar Nielsen

2. viðgerð 10. apríl.

Uppskotið frá nevndini samtykt við 23 -0.

F.L. j. nr. 9-1-9. — Sí eisini frammanfyrinevndu kunngerð og konventión

38. Fyrispurningur til landsstýrið um skatt av tingmannalønum

Ár 1975, týsdagin 8. apríl, las formaðurin upp fyrispurning frá J. P. Sørensen, løgtingsmanni, til landsstýrið, soljóðandi:

I seinastu tingsetu varð uppskot sett fram um, at tingmenn rinda fullan skatt av løgtingslønini. Hetta uppskot varð latið landsstýrinum at fremja.

Eg loyvi mær sostatt at spyrja, hvat hent er í hesum máli, og nær landsstýrið ætlar at leggja uppskot fyri tingið. Hetta hevur alstóran týdning at frætta nakað um, tí tað kann ikki bera til, at tingmenn sum teir einastu ikki skulu rinda fullan skatt av síni løn (tingmannalønini).

A FØROYA LØGTINGI, 8. apríl 1975.

J. P. Sørensen.

18. apríl svaraði løgmaður fyrispurninginum frá J. P. Sørensen.

Landsstýrið ætlar í næstu tingsetu at leggja fram uppskot um aðrar tingmannalønir og skatling av teim.

39. Donsk kunngerð frá 1. juni 1973 av sáttmála frá 3. februar 1972 við Spania um straffidómar

Ár 1975, fríggjadagin 7. mars, las formaðurin upp skriv frá landsstýrinum, soljóðandi:

Ríkisumboðið hevur spurt, um heimastýrið hevur nakað at viðmerkja til, at kunngerð frá 1. juni 1973 av sáttmála frá 3. februar 1972 við Spanien um fremjan av straffidómum verður lýst at galda í Føroyum.

Eftir § 55 kann sáttmálin víðkast til eisini at umfata Føroyar, um boðað verður frá hesum.

Sáttmálin millum Danmark og Spanien svarar í høvuðsheitum til Europeiska sáttmálan um europeiskar straffidómar, sum eru lýstir at galda í Føroyum. Til síðstnevnda sáttmála knýtir seg lóg nr. 522 frá 23. december 1970 um fremjan av europeiskum straffidómum og lóg nr. 519 frá somu dato um broyting í borgarligari straffilóg (Fremmede straffedommes retskraft), sum báðar eru settar í gildi í Føroyum 1. oktober 1972.

Landfútin, ið hevur havt málið til ummælis, hevur onki at viðmerkja til at konventiónin verður víðkað til eisini at galda fyri Føroyar.

Landsstýrið loyvir sær at leggja málið fyri tingið við viðmæli.

Beint í lógarnevndina, sum 9. apríl legði fram soljóðandi

Álit

Ríkisumboðið hevur spurt heimastýrið, antin það hevur akkurt at viðmerkja til, at kunngerð frá 1. juni 1973 um sáttmála frá 3. februar árið fyri við Spania um fremjan av straffidómum verður lýst at galda fyri Føroyar. Landsstýrið hevur givið sítt viðmæli, og hevur málið tingið viðgerð sína í lógarnevndini.

Eftir § 55 í sáttmálanum er hann ikki galdandi fyri Føroyar. Men sáttmálin kemur eftir 2. petti í somu lógargrein at umfata eisini okkum, um spousku stjórnini frá kompetentum myndugleikum verður boðað frá hesum.

F.L. j. nr. 501-2-1. — Si eisini Lovtidende C 1973 nr. IV, Bek. af 1. juni 1973, nr. 56 .... af traktat af 3. februar 1972 med Spanien om fuldbyrdelse af Straffedomme.

Verður danskur ríkisborgari, sum ikki er búsitandi í Føroyum ella Grønlandi, ákærdur í Spania av sponskum myndugleikum, skal Spania sambært núgaldandi sáttmála senda umsókn til Danmark — tann umsøkta statin — áðrenn dómur móti viðkomandi persóni verður fullførdur. Og Danmark kann tá nokta tílíkari umsókn, um fullføran dómsins stríðir m.a. móti grundleggjandi rættarlóggáva í landinum, um meint verður, at dómurin hevur politiskan dám — ella tann umsøkti staturin metir seg at hava grund undir, at dómurin botnar í ella er skerptur av húðarliti, trúgv, tjóðskapi ella politiskari áskoðan. — Mannagongdin er tann sama, tá ið Danmark er tann umsøkjandi og Spania tann umsøkti staturin.

Er talan um bót, konfiskatión av pengavirði ella virðislutum upp til 600 kr. ella mótvirði í sponskum peningi, kann avgerð verða tikin uttan dómsviðgerð. Tílík avgerð kann um neyðugt verða skotin inn fyri dómstólarnar.

Landfútin hevur havt sáttmálan til ummælis og hevur einki at viðmerkja til, at hann eisini kemur at umfata Føroyar.

Í inngangínum til sáttmálan verður nevnt, at hann er framskundaður av tí økta samskifti millum danska og spanska fólkið. Lógarnevndin meinar, at sáttmálin — verður hann eisini galdandi fyri Føroyar — kemur at økja um rættartrygdina hjá føroyingum, sum eru á ferð ella fyribils halda til í Spania og øvugt. Mælir tí ein samd lógarnevnd løglinginum til at samtykkja sáttmálan.

2. viðgerð 11. apríl.

Samtykt við 22 — 0 atkvøðum og málið sostatt avgreitt.

---

40. Fyrispurningur frá Kjartan Mohr til løgmanns

Ár 1975, 6. februar, boðaði løgtingsformaðurin frá fyrispurningi frá Kjartan Mohr til løgmanns.

Fyrispurningurin var soljóðandi:

«Nú marknaðarnevndin er vald og allir flokkar uttan framburðsflokkurin eru umboðaðir í hesi fyri Føroyar so átroðkandi nevnd til at samráðast við onnur lond, serstakliga um fiskimark og fiskirettindi, fari eg at spyrja háttvirda løgmann:

Nú dómurin er fallin í sakarmálinum millum Zacharias Wang og Erlendur Patursson, løgtingsmann og fólkatingsmann og fleiri, hvar Erlendur Patursson fekk dóm til 14 daga hefti, kann hann so verða limur av marknaðarnevndini, og eftá sum nevndarformaður, nú 5 mans fara til Íslands at samráðast.»

27. februar við 19–0 atkvøðum samtykt at fyrispurningurin skuldi svarast.

Fyrispurningurin varð svaraður 7. mars.

Svarið, sum í fyrsta umfari var skrivligt, verður endurgivið her:

Harri formaður,

Tingmaður Kjartan Mohr hevur sett mær fyrispurning, um Erlendur Patursson, sum hevur fingið dóm í sivilum sakarmáli lagt av harra Zacharias Wang, kann verða sitandi sum formaður í marknaðarnevndini.

Gjørdi, tá hesin spurningur kom á ting, vart við, at hann nokk ikki áttí at vera settur til mín, tí tað er tingið sjálvt, sum eigur avgerð í slíkum máli, men lovaði kortini at siga mína hugsan.

Sambært galdandi reglur, sum tingið ikki hevur tikið stig til at broyta, skal dómur, ið kann frátaka tinglimi valbæri, vera fýra mánaðar fongsil; hetta fyriliggur ikki í hesum føri, og heldur tí Erlendur Patursson setti sitt á tingi.

Maður, sum situr á tingi, kann veljast í nevndir og í nevndum verða valdur til formann.

Tá revsing er farin aftur um bak, eru revsaðir menn her á tingi sostatt teir sonnu sum áður, so leingi revsingin ikki er 4 mánaðar fongsil.

Skuldi tað hent, at tingmaður t.d. fekk 14 daga ella 3 vikur hefti fyri at hava koyrt ávirkaður av rúsdrekka, hevði hann ikki mist sæti sitt á tingi ella í nevndum; hetta er øvugt í Danmark, har nevndin til «valgs prøvelse» tekur avgerð og í einstøkum førum hevur mett fólkatingslimir ikki førar fyri at halda fram; hetta er ikki í Føroyum, her galda okkara reglur, og tað er tingið, sum ræður fyri, hvussu hesar reglur skulu vera.

---

41. Valrættur og valbari til løgtingi

Ár 1975, fríggjadagin 11. apríl, legði Kjartan Mohr, løgtingsmaður, fram

Uppskot
til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um stýrisskipan Føroya í sermálum.

§ 1.

§ 12 í løgtingslóg nr. 1 frá 13. mai 1948 um stýrisskipan Føroya í sermálum verður orðað soleiðis:

«Valrætt til løgtingið hevur tann, sum hevur heimarætt í kongarikinum, er 20 ár og hevur fastan bústað í Føroyum. Tey, ið eru sett í tænastu landsins og eru send í tænastu uttanfyri Føroyar, og hjúmnfelagar teirra hava í hesum sambandi fastan bústað í Føroyum. Eingin kann inna valrætt, um hann ikki stendur á vallista.

2. stk. Valbæri til løgtingið hava tey, sum eftir reglunum í 1. stk.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om Færøernes styrelsesordning i særanliggender.

§ 1.

§ 12 i lagtingslov nr. 1 af 13. maj 1948 om Færøernes styrelses ordning i særanliggender formuleres således:

«Valgret til lagtinget har enenhver, som har indfødsret i kongeriget, er fyldt 20 år og har fast bopæl på Færøerne. Personer, der er ansat i landets tjeneste og beordres til tjeneste udenfor Færøerne og de med disse personer samlevende ægtefæller anses at have fast bopæl på Færøerne. Ingen kan udøve valgret uden at være optaget på valglisten.

Stk. 2. Valgbar til lagtinget er enhver, som i henhold til bestem-

luva valrætt til løgtingið, uttan so, at viðkomandi er straffaður fyri gerð, sum í almennari meting ger hann óverdigan at sita sum løgtingsmaður.

3. stk. Løgtingið ger av valgildi løgtingsmanna og spurningar, um løgtingsmaður hevur mist valbæri.»

meldelse i stk. 1 har valgret til dette, medmindre vedkommende er straffet for en handling, der i almindeligt omdømme gør ham uværdig til at være medlem af lagtinget.

Stk. 3. Lagtinget afgør selv gyldigheden af sine medlemmers valg samt spørgsmål om, hvorvidt et medlem har mistet sin valgbarhed.»

§ 2.

Henda lóg fær gildi beinan vegin.

§ 2.

Denne lov træder straks i kraft.

Viðmerkingar:

7. februar 1975 setti eg fyri Føroya Framburðsflokk soljóðandi fyrispurning til løgmann:

«Nú marknaðarnevndin er vald og allir flokkar uttan framburðsflokkurin eru umboðaðir í hesi fyri Føroyar so áðroðkandi nevnd til at samráðast við onnur lond, serstakliga um fiskimark og fiskirettindi, fari eg at spyrja háttvirda løgmann:

Nú dómurin er fallin í sakarmálinum millum Zacharias Wang og Erlendur Paturssson, løgtingsmann og fólkatingsmann og fleiri, hvar Erlendur fekk dóm til 14 daga hefti, kann hann so verða limur av marknaðarnevndini, og eintá sum nevndarformaður, nú 5 mans fara til Íslands at samráðast.»

Løgmaður svaraði mær aftur 7. mars 1975 soleiðis:

«Tingmaður Kjartan Mohr hevur sett mær fyrispurning, um Erlendur Paturssson, sum hevur fingið dóm í sivilum sakarmáli, lagt av harra Zacharias Wang, kann verða sitandi sum formaður í marknaðarnevndini.

Gjørdi, tá hesin spurningur kom á ting, vart við, at hann nokk ikki átti at vera settur til mín, tí tað er tingið sjálvt, sum eigur avgerð í slíkum máli, men lovaði kortini at siga mína hugsan.

Sambært galdandi reglur, sum tingið ikki hevur líkið stig til at broyta, skal dómur, ið kann frátaka tinglimi valbæri, vera fýra mánaðar longsul; hetta fyriliggur ikki í hesum føri, og heldur tí Erlendur Paturssson sæti sitt á tingi.

Maður, sum situr á tingi, kann veljast í nevndir og í nevndum verða valdur til formann.

Tá revsing er farin aftur um bak, eru revsaðir menn her á tingi sostatt teir somu sum áður, so leingi revsingin ikki er 4 mánaðar fongsul.

Skuldi tað hent, at tingmaður t.d. fekk 14 daga ella 3 vikur hefti fyri at hava koyrt ávirkaður av rúsdrekka, hevði hann ikki mist sæti sítt á tingi ella í nevndum; hetta er øvugt í Danmark, har nevndin til «valgs prøvelse» tekur avgerð og í einstøkum førum hevur mett fólkatingslimir ikki førar fyri at halda fram; hetta er ikki í Føroyum, her galda okkara reglur, og tað er tingið, sum ræður fyri, hvussu hesar reglur skulu vera.»

Á Føroya løgtingi, 11. apríl 1975.

FØROYA FRAMBURÐSFLOKKUR

Kjartan Mohr.

1. viðgerð 15. apríl og málið heint í lógarnevndina, sum 30. apríl (kl. 17.00) legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð av framburðsflokkinum lagt fyri tingið tann 11. apríl 1975 og varð undir 1. viðgerð 15. apríl heint í lógarnevndina.

Nevndin hevur býtt seg í ein meirilutu og ein minnilutu.

Meirilutin (Poul J. Olsen, sum møtti fyri J. Fr. Øregaard, Eliesar Arge, Tórálvur Olsen og Heðin M. Klein) førir fram hetta.

Í uppskoti framburðsfloksins eru nakrar broytingar í valrætti og valføri til løgtingið.

Meirilutin heldur, at reglurnar fyri valbæri áttu at verið skerptar, men ivast í, um uppskot framburðsfloksins er rætta leiðin at ganga. Men broytan í stýrisskipanini eigur at verða væl umhugsað, og tá hetta mál er so seint komið til tingið, at tað ikki verða stundir til gjølliga viðgerð, mælir meirilutin til, at málið verður sent landsstýrinum til nærri kannan, sum, tá hesar kanningar eru loknar, aftur leggur málið fyri tingið.

Minnilutin (Agnar Nielsen) mælir til at samtykkja uppskotið.

LÓGARNEVNDIN, tann 30. apríl 1975

Heðin M. Klein Poul J. Olsen Tórálvur Olsen
Eliesar Arge Agnar Nielsen

2. viðgerð 30. apríl (kl. 19.45).

Lógaruppskotið frá frambúrðsflokkinum fall 8—0.

Eftir tilmæli frá meirihluta í nevndini varð málið beint til landsstýrið.

---

42. Fyrispurningur frá Hilmar Kass til løgmann

Ár 1975 las formaðurin upp fyrispurning frá Hilmar Kass til Petur Reinert, landsstýrismann, um norskan garnafiskiskap á Norðhavinum, soljóðandi:

Hvat hevur landsstýrið gjørt fyri at steðga ti garnaveiðu, norðmenn driva á Norðhavinum móti galdandi sáttmála?

Viðmerkingar:

Í sáttmálanum viðvíkjandi fiskiskapi undir Føroyum, sum kom í gildi 1. januar 1974, binda norðmenn seg saman við øðrum londum ikki at reka fiskiskap munandi øðrvísi undir Føroyum enn í árunum 1968 til 1972 og ikki at fiska eftir toski og hýsu.

Tað er øllum áhugaðum kunnugt, at norðmenn í stórum tali hava royndt við gørnum á Norðhavinum í vár á leiðum, teir ikki hava fiskað í árunum 1968 til 1972, og meginparturin av veiðuni kann illa vera minnað enn toskur.

Tað er fyrr nevndi sáttmáli, sum ger garnaveiðu møguliga á hesum leiðum, tí sambært sáttmála hava hvørki føroyingar ella útlendingar loyvi at trola her í vártíðini. So mikið størri er tí sáttmálabrotið, og verður tí hesin spurningur settur landsstýrismanninum, sum hevur fiskivinnumál um hendur.

Hilmar Kass

10. apríl var við 23—0 atkvøðum avgjørt at fyrispurninguriu skuldi svarast.

Petur Reinert, landsstýrismaður, svaraði fyrispurninginum 18. apríl.

Svarið, sum í fyrra umfari var skrivligt, verður tikið við her, soljóðandi:

Landsstýrið hevur kannað veiðuna hjá norðmonnum øll árini frá 1968 til 1974 undir Føroyum. Veiðutølini eru hesi: í 1968 7.810 tons, av teimum 686 tons toskur ella 8,8% av totalveiðuni, í 1959 5.093 tons, av teimum 476 tons toskur ella 9,3%, í 1970 7.739 tons, av teimum 238 tons toskur ella 3,2%, í 1971 8.244 tons, av teimum 881 tons toskur ella 10,7%, í 1972 8.473 tons, av teimum 266 tons toskur, ella 3,2%, í 1973 11.255 tons, av teimum 115 tons toskur, ella 1%, í 1974 5.703 tons, av teimum 446 tons toskur ella 7,8%. Totalveiðan fyri árini er 54.317 tons, av teimum 3.108 tons toskur ella 5,7%.

Fyrispurningur er settur til fiskeridirektøren í Noregi, um hvussu veiðan hevur verið í 1975, og er svarið heita, at fyri 1974 var tað, sum fiskað varð í gørnum fiskað í mánaðunum februar/mars, og tá luttóku tilsamans o.u. 24 garnabátar. Luttøkan higartil í 1975 hevur verið munandi minni enn í 1974, men tøl fyriliggja ikki enn.

Harumfrámt hevur landsstýrið spurt hjá Færøernes Kommando um hvussu nógvir norskir bátar hava luttikið í garnafiskiskapinum við Føroyar, og er svarið, at í februar mánaða eru observeraðir tveir bátar, í mars mánaða 17 bátar, og í apríl mánaða 4 bátar. Av teimum, sum hava verið í februar, ganga báðir aftur í mars, og teir, sum hava fiskað í apríl, hava ið hvussu er teir teiggir av teimum fiskað í mars, um mars er annars tað at siga, at 7 av teimum 17 bátunum hava tá fiskað í kassa 1 á Norðlavinum, men tað er ikki møguligt at fáa tilskilað í hvørjum parti av kassanum.

Tað kann soleiðis einki við vissu sigast um, um veiða norðmanna í ár er broytt nakað munandi til árini frammanundan. Tolini frá 1968 til 1974 eru soleiðis háttað, at tað ikki kann sigast, at stórvegis broyting hevur verið í veiðiháttí norðmanna, tí hyggja vit at árinum 1974, síggja vit, at tá er fiskað vel minni enn okkurt ár frammanundan, og at veiða av toski hetta árið ikki er hægri enn ofta fyrr í hesum tíðarskeiði.

Landsstýrið kann sostatt ikki av hesum tølum síggja, at tað í 1974 er gjørt nakað brot á kunngerð nr. 61 frá 18. juni 1974 § 2, 2. stk. Landsstýrið heldur ikki, at orðalagið í viðmerkingunum er beint, tá skrivað verður, at norðmenn binda seg til ikki at fiska eftir toski og hýsu, tí í nevndu kunngerð stendur í § 2, 2. stk. «**árliga veiðan hjá luttakarunum, sum koma undir 1. pettl, og hvørs fiskifloti einans veiðir við línu og**

gørnum á økinum, má í mesta lagi vera 25% meir enn størsta veiðunøgdin í árinum 1968 til 1972, fráboðað til ICES», og brot á hesi reglu sæst ikki at vera gjørt sbrt. tey til dags dato fyriliggjandi hagtøl.

Petur Reinert
landsstýrismaður

---

43. Fyrispurningur frá Kjartan Mohr til løgmanns

Ár 1975, 11. apríl las formaðurin upp fyrispurning frá Kjartan Mohr til løgmans, um siglingarmøguleikarnar í Hvannasundi, soljóðandi:

Vísandi til hjálagda bræv frá Hvannasunds bygdaráð v/ Absalon í Bið um at siglingarmøguleikarnir ikki verða tiptir í Hvannasundi. Brævið sigur eisini frá, hvussu fram er farið.

Eg vil tí biðja løgmannin um at lýsa, hvussu málið liggur fyri upp til í dag.

Á løgtingi, 11. apríl 1975.

Kjartan Mohr
løgtingsmaður

Viðvíkjandi uppfyllan av Hvannasundi

Sum nývalda løgting og landsstýri kunnugt, varð undir síðsta 4 ára skeiðinum, fari undir at fylla grót í Hvannasund.

Samráðingar vóru mangar um helta mál, men tað vísti seg ógjørligt, at fáa tu loysn bygdaráðið vildi, nevniliga at siglingarmøguleikin norður gjøgnum sundi, ikki varð tiptur.

Fyri møguliga at leggja plástur á sár, var ráðnum játtað, at farast skuldi undir at gera bátahavn norðanfyri hyrgingina.

Fráfarandi bygdaráð tók eisini við hesum tilboðið, og sum skilst, hevur verkfrøðinga «staburin» arbeitt við hesum.

Nú er bæði nýtt bygdaráð og landsstýrið valt.

Nývalda bygdaráð hevur á fundi 20/1 1975 havt málið til viðgerðar:

Tosað varð gjølla um málið. Niðurstøðan varð, at **ráðið dugir onga meining at siggja í, at leggja grótkast norðanfyri byrgingina, um ikki samstundis møguleiki verður, at sigla íggjøgnum Hvannasund.**

Samtykt var: at bygdaráðið krevur, at siglingarrenna (tó uttan streym), verður gjørd í byrgingina.

Um myndugleikarnir nokta, so **krevja** vit, at ongin havn verður gjørd norðanfyri. **Tí hóast hana, kemur helst øll produktiv vinna at doyggja út á hesum plássum,** og plássini verða bert ein gjøgnumkoyring fyri hinar okkara landsmenn, (kanska gott í sær sjálvum, men eftir okkara metan ikki nóg gott).

Hesi sjónarmið ráðsins, verða dyggiliga undirtikin av øllum bátaeigarunum og formonnum, vit hava havt til vegleiðing. (teir siga ja! **krevja** siglingarrennu uttan streym).

Sonuleiðis eru vit yvirbevistir um, at nærum 100% av fólkinum við Sundi býr, krevja siglingarop í Hvannasund.

Vit viðleggja okkara uppskot til loysn.

Eru altíð til reiðar, at samráðast um loysn.

Nú krevja vit nakað hendir.

v. Hvannasunds bygdaráð
Absalon í Buð

Samtykt at svara 12. apríl.

Hin 18. apríl 1975 svaraði løgmaður, at landsstýrið hevði játtað at lata landsverkfrøðingin kanna, hvussu siglingarrenna kann gerast og hvat kostnaðurin av hesum verður. Hesar kanningar fara fram.

44. Veðhald fyri láni til SEV.

Ár 1975, fríggjadagin 11. apríl, legði Petur Reinert, landsstýrismaður, fram

Uppskot
til

løgtingslóg um veðhald fyri láni til SEV.

§ 1.
Landsstýrinum er heimilt landskassans vegna at veðhalda fyri láni stórt 2 milj. kr. til el-felagið SEV.

§ 2.
Henda lóg fer gildi beinan vegin.

lagtingslov om garanti for lån til SEV.

§ 1.
Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at garantere for et lån på 2 mill. kr. til el-selskabet SEV.

§ 2.
Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Við løgtingslóg nr. 76 frá 26. september 1974 (løgtingsmál nr. 4/1974) fekk landsstýrið heimild at veðhalda fyri einum láni uppá 9 milj. kr., sum SEV fekk frá Investeringsfonden for Færøerne.

Hetta lánið varð játtað felagnum í figgjarárinum 1974/75. Sum upplýst í viðmerkingunum til uppskotið til fyrnevndu lóg, hevur grunnurin játtað felagnum eitt lán uppá 2 milj. kr. í figgjarárinum 1975/76 og leggur landsstýrið sostatt fram uppskot um heimild at veðhalda fyri hesum láninum.

1. viðgerð 16. apríl og málið beint í figgjarnevndina, sum 18. apríl legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð av landsstýrinum framlagt 11. apríl 1975 og undir 1. viðgerð 16. apríl beint í figgjarnevndina.

Í viðmerkingunum frá landsstýrinum verður í stuttum sagt, at henda veðhaldsheimild uppá 2 milj. kr. er til eina rest av einum størri láni, ið av

Investeringsfonden for Færøerne varð játtað felagum í fíggjarárinum 1974/75 til útgjaldingar í fíggjarárinum 1975/76.

Samlaða játtanin frá grunninum í 1972 var annars 28 milj. kr.

Tær 26 milj. kr. eru útgoldnar, hetta eru tær síðstu tvær.

Samlaða veðhald landskassans fyri SEV var 31. december 1973 kr. 61.676.111,00.

Fíggjarnevndin mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

FÍGGJARNEVNDIN, 18. april 1975.

Hákun Djurhuus — Poul J. Olsen — Hilmar Beck
Jógvan Durhuus — Asbjørn Joensen — Pauli Ellefsen
Signar Hansen

2. viðgerð 18. april.

Gr. 1 samtykt 21—0. Alt uppskotið og at fara til 3. viðgerð samtykt 21—0.

3. viðgerð 21. april.

Uppskotið sum samtykt við 2. viðgerð nú endaliga samtykt við 20—0.

45. Veðhald fyri láni til Runavíkar kommunu

Ár 1975, friggjadagin 11. april, legði Petur Reinert, landsstýrismaður, fram

Uppskot
til

løgtingslóg um veðhald fyri láni til Runavíkar kommunu.

§ 1.

Landsstýrinum er heimilt landskassans vegna at veðhalda fyri láni upp til kr. 5.000.000 til Runavíkar kommunu.

§ 2.

Henda lóg fær gildi beinnavegin.

lagtingslov om garanti for lån til Runavík kommune.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at garantere for lån indtil kr. 5.000.000 til Runavík kommune.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Runavíkar kommuna hevur søkt landsstýrið um veðhald fyri einum láni, sum ætlanin er at taka í Kreditforeningen af kommuner i Danmark. Lánsupphæddin verður nominelt kr. 5.000.000 og gevur hetta væntandi eina netto úrtøku uppá kr. 3.500.000, sum ætlanin er at nýta soleiðis:

havnabygging	kr. 1.000.000
skúlabygging	kr. 900.000
keyp av jørð	kr. 700.000
vegagerð	kr. 900.000
	kr. 3.500.000

F.L.j. nr. 809-51-16. — Sí eisini LI. nr. 34/1975.

1. viðgerð 16. apríl og málið beint í fíggjarnevndina, sum 18. apríl legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð 11. apríl 1975 framlagt av landsstýrinum og undir 1. viðgerð 16. apríl beint í fíggjarnevndina.

Tað er Runavíkar kommuna, ið biður um 5 miljóna landskassaveðhald til lán, ið ætlanin er at taka í Kreditforeningen af kommuner í Danmark. Úrtøkan í peningi hjá kommununi av hesum láni verður umleið kr. 3.500.000, og verður í viðmerkingunum sagt, hvat hesin peningur skal verða nýttur til.

Álíkningin hjá kommununi var í 1973/74 kr. 2.762.163, og lán kr. 7.375.558,96.

Veðhaldsskylda hjá kommununi er kr. 787.500.

Ársrokniskapurin fyri 1973/74 vísir, at skattaeftirstøðurnar fyri 1973/74, 1972/73, 1971/72 og eldri vóru 684.674,13 kr., og at kommunan í tøkum banka og kassapeningi átti kr. 543.764,89.

Fíggjarnevndin mælir til at samtykkja landsstýrisins uppskot.

FÍGGJARNEVNDIN, 18. apríl 1975.

Hákun Djurhuus	Poul J. Olsen	Hilmar Bech
Asbjørn Joensen	Pauli Ellefsen	Jógvan Durhuus
	Signar Hansen	

2. viðgerð 18. apríl.

Gr. 1 samtykt 21—0. Alt uppskotið og at fara til 3. viðgerð samtykt 21—0.

3. viðgerð 21. apríl.

Uppskotið sum samtykt við 2. viðgerð nú endaliga samtykt 20—0.

46. Veðhald fyri láni til Fuglafjarðar kommunu

Ár 1975, fríggjadagin 11. apríl, legði Petur Reinert landsstýrismaður, fram

Uppskot
til

løgtingslóg um veðhald fyri láni til Fuglafjarðar kommunu.

§ 1.

Landsstýrinum er heimilt landskassans vegna at veðhalda fyri láni upp til 3.000.000 kr. til Fuglafjarðar kommunu.

§ 2.

Henda lóg fær gildi beinanvegin.

lagtingslov om garanti for lån til Fuglafjarðar kommune.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at garantere for lån indtil 3.000.000 kr. til Fuglafjarðar kommune.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Fuglafjarðar kommuna hevur søkt landsstýrið um veðhald fyri láni, sum ætlanin er at taka í Kreditforeningen af kommuner í Danmark. Ætlaða lánið er nominelt kr. 3.000.000, og útrøkan, sum væntandi verður umleið kr. 2.000.000 verður at nýta soleiðis:

keyp av lendi til havnabygging	kr. 350.000,–
vegagerð	kr. 1.250.000,–
vatnveiting	kr. 400.000,–
	kr. 2.000.000,–

Petur Reinert
landsstýrismaður

/ J. Djurhuus

F.L.j. nr. 809-11-39. — Sí eisini Ll. nr. 33/1975.

1. viðgerð 16. apríl og málið beint í figgjarnevndina, sum 18. apríl legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð av landsstýrinum framlagt 11. apríl 1975 og undir 1. viðgerð 16. apríl beint í figgjarnevndina.

Tað er Fuglafjarðar kommuna, ið biður um 3 miljóna landskassaveðhald fyri láni í Kreditforeningen af kommuner i Danmark.

Úrtøkan hjá kommununi í peningi verður umleið kr. 2.000.000,-, ið sagt verður frá í landsstýrisins viðmerkingum, hvussu tær skulu verða brúktar.

Álíkningin hjá kommununi var í 1973/74 kr. 2.201.891 og lán kr. 7.710.867,55.

Sambært ársroknskapin eru skattaeftirstøðurnar fyri 1973/74, 1972/73, 1971/72 og eldri kr. 550.230,69.

Í kassa- og bankapeningi hevur kommunan kr. 255.488,37 tøkar.

Figgjarnevndin mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

FIGGJARNEVNDIN, 18. apríl 1975.

Hákun Djurhuus	Poul J. Olsen	Hilmar Bech
Jógvan Durhuus	Asbjørn Joensen	Pauli Ellefsen
	Signar Hansen	

2. viðgerð 18. apríl.

Gr. 1 samtykt 21—0. Alt málið og at fara til 3. viðgerð samtykt 21—0.

3. viðgerð 21 apríl.

Uppskotið sum samtykt við 2. viðgerð nú endaliga samtykt 20—0.

47. Veðhald fyri láni til Skála kommunu

Ár 1975, fríggjadagin 11. apríl, legði Petur Reinert, landsstýrismaður, fram

Uppskot
til

løgtingslóg um veðhald fyri láni til Skála kommunu.

§ 1.
Landsstýrinum er heimilt landskassans vegna at veðhalda fyri láni upp til 2.500.000 kr. til Skála kommunu.

§ 2.
Henda lóg fær gildi beinan vegin.

lagtingslov om garanti for lån til Skála kommune.

§ 1.
Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at garantere for lån indtil 2.500.000 kr. til Skála kommune.

§ 2.
Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Skála kommuna hevur søkt landsstýrið um veðhald fyri láni, sum ætlanin er at taka í Kreditforeningen af kommuner i Danmark. Ætlaða lánið er nominelt kr. 2.500.000 og skal kommunan nýta lánúrtøkuna til vegagerð í samband við útstykking og møguligt keyp av jørð. Ein partur av lánínum verður møguliga nýttur til latvísa figgjan av eini skúlatannlæknastovu.

Petur Reinert
landsstýrismaður

/ J. Djurhuus

1. viðgerð 16. apríl og málið beint í figgjarnevndina, sum 18. apríl legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð 11. apríl 1975 av landsstýrinum framlagt og undir 1. viðgerð 16. apríl beint í figgjarnevndina.

F.L. j. nr. 809-15-11. — Sí eisini Ll. nr. 32/1975.

Tað er Skála kommuna, ið biður um eitt 2,5 miljóna landskassaveðhald fyri lání frá Kreditforeningen af kommuner í Danmark. Lánúrtøkan skal verða nýtt til vegagerð í sambandi við útstykking og møguligt keyp av jørð. Eisini er skúlatannlæknastova upp á tal.

Ársrokniskapurin fyri 1973/74 vísir, at álíkningin hevur givið 781.205,48 kr. og at tey føstu lánini eru kr. 1.774.130,69.

Eftirstøðurnar 1973/74, 1972/73, 1971/72 og eldri 138.395,29 kr. og banka, sparikassa og kassapeningur 345.352,40 kr.

Fíggjarnevndin mælir til at samtykkja landsstýrisins uppskot.

FÍGGJARNEVNDIN, 18. apríl 1975.

Hákun Djurhuus	Poul J. Olsen	Hilmar Beck
Jógvan Durhuus	Asbjørn Joensen	Pauli Ellefsen
	Signar Hansen	

2. viðgerð 18. apríl.

Gr. 1 samtykt 22—0. Alt uppskotið og at fara til 3. viðgerð samtykt 22—0.

3. viðgerð 21. apríl.

Uppskotið sum samtykt við 2. viðgerð nú endaliga samtykt 20—0.

48. Veðhald fyri láni til uttanbýggja kommunu

Ár 1975, friggjadagin 11. apríl, legði Petur Reinert, landsstýrismaður, fram

Uppskot
til

løgtingslóg um veðhald fyri láni til Tórshavnar uttanbíggja kommunu.

§ 1.
Landsstýrinum verður heimilt landskassans vegna at veðhalda fyri láni upp til kr. 12.000.000,- til Tórshavnar uttanbíggja kommunu.

§ 2.
Henda lóg fær gildi beinanveggin.

lagtingslov om garanti for lån til Tórshavnar uttanbíggja kommune.

§ 1.
Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at garantere for lån på indtil kr. 12.000.000,- til Tórshavnar uttanbíggja kommune.

§ 2.
Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Tórshavnar uttanbíggja kommuna hevur søkt landsstýrið um veðhald fyri einum láni, sum ætlanin er at taka í Kreditforeningen af kommuner i Danmark. Líniupplæddin verður nominelt kr. 12.000.000,-, og gevur hetta væntandi eina netto árløku uppá umleið kr. 8.500.000,-, sum ætlanin er at nýta soleiðis:

Skúlabygging á Argjum og í Hoydølum	7.125.000,-
Felagsgerð av kloakk- og reinsiverki við Sandá saman við Tórshavnar kommunu	690.000,—
Viðkan av vatnverki á Argjum	465.000,-
Kloakk á Argjum til reinsiverkið	115.000,—
Vatnleiðing frá útstykkingini í Hoydølum til Hvítanes bygd	105.000,
	8.500.000,—

Petur Reinert
landsstýrismaður

/ J. Djurhuus

F.L. j. nr. 809-29-9. — Sí eisini LI. nr. 31/1975.

1. viðgerð 16. apríl og málið beint í fíggjarnevndina, sum 18. apríl legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð framlagt av landsstýrinum 11. apríl og undir 1. viðgerð 16. apríl beint í fíggjarnevndina.

Uppskot landsstýrisins mælir til at veita kommununi landskassaveðhald fyri láni upp til kr. 12.000.000, men í umsókn sini dagfest 10. apríl biður kommunan um veðhald fyri einum láni uppá kr. 8 miljónir frá Kommunekreditforeningen. Sambært skjøl frá umsøkjaranum skuldi hesin peningur nýtast soleiðis:

Skúlabygging á Argjum og í Hoydølum	7.125.000,—
Felagsgerð av kloakk- og reinsiverki við Sandá saman við Tórshavnar kommunu	690.000,—
Viðkan av vatnverki á Argjum	465.000,—
Kloakk á Argjum til reinsiverkið	115.000,—
Vatnveiting frá útstykkingini í Hoydølum til Hvítanes bygd	105.000,—
	8.500.000,—

Hesir upplýsingar vóru sostatt lagdir til grund fyri viðmerkingarnar í lógaruppskotinum hjá landsstýrinum, dagf. tann 11. apríl 1975, og sæst tað av skjølunum, at hesir upplýsingar eru skrásettir á landsskrivstovuni tann 9. apríl 1975.

Síðani er tað heot, at umsøkjarin hevur sent annað brev til landsstýrið, ið er skrásett í landsstýrinum tann 14. apríl 1975, og eru samlaðu útreiðslutølini her tilsamans kr. 8 milj. Hetta brev frá umsøkjaranum er dagfest tann 10. apríl 1975 og verður har søkt um landskassaveðhald fyri einum láni uppá 11.150.000 kr. frá Kommunekreditforeningen. Ortøkan 8 milj. kr. av hesum láni verður at nýta soleiðis:

Skúli á Argjum	7.250.000,—
Skúli í Hoydølum	7.000.000,—
	14.250.000,—
Partur hjá kommununi	7.347.500,—
viðvíkjandi skúlabyggingini	640.000,—
	7.987.500,—

Partur í útreiðslunum viðvíkjandi kloakk- og reinsianleggi við Sandá á kommunumarkinum til Tórshavnar kommunu	690.000,-
Viðkan av vatnverki á Argjum	465.000,-
Kloakk á Argjum til reinsiverkið	115.000,—
Vatnveiting frá útstykkingini í Hoydølum til Hvítanes bygd	105.000,-
	9.362.500,—
Egið kapitalimskot	1.362.500,-
Føggjanartørvur	8.000.000,—

Sostatt má upphæddin kr. 12 milj. í § 1 í lógaruppskotinum broytast til kr. 11.150.000.

Ársrokniskapurin fyri 1973/74 vísir, at álíkningin gav kr. 1.500.000 og at tey føstu lánini eru pr. 31. mars 1974 kr. 1.311.000.

Eftirstøðurnar frá 1973/74, 1972/73 og eldri eru tilsamans kr. 318.486,96.

Banka-, Sparikassa- og kassapeningur eru tó kr. 188.631,23.

Føggjarnevndin mælir soslatt til, at uppskot landsstýrisins verður samtykt við tí broyting, at veðhaldið verður fyri 11.150.000 kr.

FIGGJARNEVNDIN, 18. apríl 1975.

Håkun Djurhuus
Jógvan Durhuus

Poul J. Olsen
Asbjørn Joensen
Signar Hansen

Hilmar Bech
Pauli Ellefsen

2. viðgerð 18. apríl.

Gr. 1 samtykt 23—0. — Alt uppskotið og at fara til 3. viðgerð samtykt 23—0.

3. viðgerð 21. apríl.

Uppskotið sum samtykt við 2. viðgerð, nú endaliga samtykt 18—0.

49. Danskar kunngerðir um broytingar í postlógini

Ár 1975, 14. mars, var fraumlagt skriv frá landsstýrinum, soljóðandi:

Ríkisumboðið hevur spurt, um heimastýrið hevur nakað at viðmerkja til, at lög nr. 274 frá 6. juni 1974 og lög nr. 313 frá 19. juni 1974 um broyting av postlógini verða kunngjørdar at galda í Føroyum eftir lög nr. 51 frá 1. apríl 1896 um kunngerð av lógum og fyriskipanum í Føroyum.

Landsstýrið loyvir sær at leggja málið fyri løgtingið við viðmæli.

+ serprent.

Beint í lógarnevndina, sum 11. apríl legði fram soljóðandi

Álit

Ríkisumboðið hevur spurt, antin heimastýrið hevur nakað at viðmerkja til, at lög nr. 274 frá 6. juni 1974 og lög nr. 313 frá 19. juni 1974 um broyting í postlógini verða kunngjørdar at galda í Føroyum eftir lög nr. 51 frá 1. apríl 1896 um kunngerð av lógum og fyriskipanum í Føroyum.

Landsstýrið hevur lagt málið fyri løgtingið við viðmæli, og hevur málið fingið viðgerð sína í lógarnevndini.

Tað er her talan um at taka til eftirtektar ajourføringar í postlógini, sum longu eru virkandi í Føroyum.

Ein samd lógarnevnd mælir tí tinginum til at samtykkja fyriliggjandi broytingar í postlógini.

Samtykt við 22—0 atkv. og sostatt avgreitt.

F.L. j. nr. 1907-1. — Sí eisini avvarandi ríkislógir.

50. Donsk lóg um broytingar í ymsum arvalógum

Ár 1974, 25. februar var framlagt skriv frá landsstýrinum soljóðandi:

Ríkisumboðið hevur spurt, um heimastýrið hevur nakað at viðmerkja til at lóg nr. 259 frá 22. mai 1974, um broytingar í ymsum arvalógum verður kunngjørd at galda fyri Føroyar. Eftir lógini fær ríkisstýrið heimild at gera sáttmálar við fremmand lond um reglur fyri, nær testamenti skulu roknast at vera gyldug. Eisini kann ríkisstýrið gera millumlandasáttmálar við norðanlond um arvaspurningar.

Landsstýrið loyvir sær at leggja málið fyri løgtingið við viðmæli.

+ 3 serprent.

Beint í lógarnevndina, sum 11. apríl legði fram soljóðandi

Álit

Ríkisstýrið hevur spurt heimastýrið, antin tað hevur okkurt at viðmerkja til, at lóg nr. 259 frá 22. mai 1974 um broytingar í ymsum arvalógum verður kunngjørd at galda fyri Føroyar.

Tað snýr seg um uppiskoytisgrein í arvalóg nr. 215 frá 31. mai 1963 við ymsum seinni broytingum. Hetta sama uppiskoyti er eisini í fyriskipan frá 21. mai 1845, sum bar í sær nakrar broytingar í arvalóggávuni, og sum er fleiri ferðir broytt síðani. Og henda uppiskoytisgrein verður so í triðja lagi sett í arvalóg fyri Grønland nr. 154 frá 27. mai 1964.

Sambært hesa lógargrein fær ríkisstýrið heimild at gera sáttmálar við onnur lond, sum seta reglur fyri, nær testamenti skulu roknast at vera gildug. Eisini kann ríkisstýrið gera millumlandasáttmálar við norðanlond um arvaspurningar.

Málið, ið fær landsstýrisins viðmæli, varð beint í lógarnevndina, sum hevur viðgjørt hetta iskoytið í arvalógunum og mælir tinginum til at samtykkja tað.

2. viðgerð 15. apríl.

Samtykt við 18—0 atkv. og sostatt avgreitt.

F.L. j. nr. 613-1. — Sí eisini avvarandi ríkislóg.

51. Fyrispurningur til landsstýrið frá Jákup Mortensen

Ár 1975, fríggjadagin 11. apríl, boðaði formaðurin frá fyrispurningi til landsstýrið frá Jákup Mortensen, løgtingsmanni, um helikoptaralendipláss, soljóðandi:

Undir seinasta landsstýri varð sum lið innan bjargingartænastuna gjørt kanningararbeiði viðvíkjandi møguleikunum fyri at gera helikoptaralendingarpláss á ávísum støðum í landinum. Skrivað varð til 38 kommunur um hetta mál, og tóku tær allar væl undir við uppskotinum.

Marinustøðin hevði boðað frá, at tá hesi pláss vóru gjørd, skuldi helikoptari teirra verða tøkur, tá tað gjørdist neyðugt (skaðatilburður, sjúka o.a.).

Eg loyvi mær við hesum at spyrja, hvat víðari er hent í hesum máli, hví tað hevur ligið so leingi á lánu, og nær ætlanin er at fremja hetta neyðturviliga mál.

Á FØROYA LØGTINGI, 11. apríl 1975.

Jákup Mortensen

15. apríl var við 21—0 atkvøðum samtykt, at fyrispurningurin skuldi svarast.

Hin 18. apríl svaraði løgmaður, at málið liggur hjá landsverkfrøðingsskrivstovuni til víðari kanning og viðgerð, tá hesar eru lidnar, verður støða tikin til, hvussu tað figgjarliga grundarlagið fyri at fremja hesar byggingar kann fáast til vega.

52. Lán til Telefonverkið

Ár 1975, hósdagin 17. april legði Finnbogi Isaksen, landsstýrismaður, fram

Uppskot
til

løgtingslóg um lán ella veðhald til Telefonverk Føroya Løgtings.

§ 1.

Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at taka upp lán til, ella veðhalda fyri láni til Telefonverk Føroya Løgtings uppá 15 mill. kr.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

lagtingslov om lån eller garanti for lån til Telefonverk Føroya Løgtings

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til landskassens vegne at optage lån til, eller garantere for lån til Telefonverk Føroya Løgtings på 15 mill. kr.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Sambært løgtingslóg nr. 56, 24. mai 1974 varð telefonverkinum heimilað at læna upp til 25 milj. kr. til viðari fremjingar av teknisku útbyggingini.

Sambært hesa heimild eru lántar 22 milj. kr., og eru sostatt 3 milj. kr. eftir. Heimildin varð mett at røkka fram til 31. mars 1975. Rokuskapurin fyri fíggjarárið 1974/75 er enn ikki liðugur, men metanin tykist at hava verið rætt.

Íløgurnar fyri fíggjarárið 1975/76 verða mettar til 10 milj. kr. og fyri 1976/77 til 8 milj. kr. Á skjali 1 eru settar upp mettar inntøkur og út reiðslur fyri 1974/75, 1975/76 og 1976/77.

Sambært metanina verður telefonverkið fært fyri sjálvt at fíggja 3 milj. kr. í tíðarskeiðinum 1975/76 og 1976/77. Tá ið íløgutørvurin er 18 milj. kr. og eginfíggjanin er 3 milj. kr., er lánitørvurin fyri tíðarskeiðið 15 milj. kr. Harumfram eru 3 milj. kr. eftir av telefonverksins heimild frá 1974, ið eru neyðugar at læna, fyri at fáa javnvág í rokuskapin fyri 1974/75. Sostatt mugu lánast tilsamans 18 milj. kr. fyri at ganga tørvinum á møti.

Samlaða telefonfelagatalið táttar í 10.000. Av hesum hava 8.500 auto-

Sí eisini Ll. nr. 46/1975.

mattelefon og 1.500 eru undir magnetostøðum. Talið av magnetostøðum var 31. mars 1972 48, men er sum úrslit av automatiseringini minkað. 1. januar 1975 var talið 23.

Á skjali 2 er eitt yvirlit, ið greiðir frá, nær tær ymisku automatstøðirnar eru tiknar í nýtslu, og hvørjar eru í gerð. Arbeiðsskráin fyri 1975 og 1976 er henda:

Vestmanna: Nýggja automatstøðin verður tikin í nýtslu í september 1975. Sjálv automatstøðin er liðug. Nýggir felagakaðalar eru lagdir; men enn restar at gera felagainnstallatiónir. Nýggjur kaðal frá Havnini til Kollafjarðar, Vestmanna og Streymnes er lagdur, men er enn ikki klárur at taka í nýtslu, tí forsterkarar skulu setast inn á kaðalin fyri hvørjar 4 km. Hetta arbeiðið byrjar í apríl og er væntandi liðugt í juli.

Hvalvík: Henda automatstøðin, ið umfatar bygdirnar við Sundalagið, verður tikin í nýtslu í november 1975. Húsið er liðugt bygt og klárt til montasju. Ein partur av felagakaðalinum er lagdur.

Eiði: Støðin verður væntandi tikin í nýtslu februar 1976. Bygdirnar Gjógv, Funningur, Haldórsvík og Tjørnuvík koma undir automatstøðina á Eiði. Húsið til nýggju støðina er í ger og verður liðugt í mai mánað.

Vágarnar: Støðin, ið umfatar alla Vágoynna, væntast liðugt í mai mánað 1976. Ein týðandi partur av nýggjum felagakaðalum er lagdur í øllum bygdunum, og arbeiðið við at fáa í lag nýtt radiosamband til Vágarnar er byrjað.

Sandoy: Í Sandoynni er lítið arbeiði gjørt í sambandi við automatiseringina; men alt tilfarið er í ordra og er yvirhøvur liðugt leverað í seinnu helvt av 1975. Har verður ein automatstøð fyri alla oynna heima á Sandi. Arbeiðið væntast liðugt og støðin tikin í nýtslu í november 1976.

Frammanfyri eru í høvuðsheitum nevnd ley arbeiði, ið ætlanin er at fremja í 1975 og 1976. Umframt er eitt javnt útbyggingararbeiði — serliga á teim størru plássunum — í samband við vanliga felagatilgongd og nýbyggjan bæði av einstøkum húsum og byggibúnan av økjum. Í 1973 vóru

meira enn 1200 nýggir felagar settir til. Í 1974 var talið umleið 1400 og talið av nýggjum umsóknum er støðugt vaksandi.

Samlaða iløgan fyri figgjarárið 1975/76 er mett til 10 milj. kr. og fyri figgjarárið 1976/77 umleið 8 milj. kr.

Fyri tíðina aftaná 1976/77, tá ið landsautomatiseringin er liðug, verður ein framhaldandi útbygging, sum kann býtast í tvey. Annað er ein jøvn øking av tí nýggja, ið er gjørt uttan fyri Havnina. Hesin partur verður ikki so kapitalkrevjandi, serliga tí allir bygningar og nýggja kaðalnetið er ført fyri at lofta eini felagatilgongd tey næstu 20-25 árini uttan týðandi iløgur. — Hin parturin er útbyggingin í Havnini, og hesin er meira tvørligur. Automatstøðin í Havn er 22 ára gomul. Tekniskt kann hon halda fleiri ár afturat; men støðin er ikki før fyri at taka tann vaksandi trafikkin frá hvørjum einstøkum felaga. Fyri eina og hvørja automatstøð er tað eitt ávíst tal av feløgum, sum í mesta lagi kunnu tosa í senn. Síðan støðin í Havn varð projekterað og tikin í nýtslu og til dagin í dag, er hetta talið fyri Havnina meira enn tvífaldað. Tað er ikki gjørligt at økja kapacitetin av gomlu støðini.

Í iløgutørvinum fyri 1976/77, sum er 8 milj. kr., er roknað við at nýta umleið 3 milj. kr. til at útvega høli til nýggja automatstøð í Havn.

Á skjali 1 eru sett upp mettar inntøkur og útreiðslur telefonverksins fyri árini 1974/75, 1975/76 og 1976/77. Í hesum metingum eru íroknaðar taksthækkingar. Meirinntøka orsakað av taksthækkingum er sett til 5 milj. kr. Í sær sjálvum hevur automatiseringin givið hækkandi inntøkur uttan takstbroytingar. Figgjarárið 1971/72 var inntøkan kr. 8.824.542,00, og fyri árið 1974/75 er inntøkan mett til 16.000.000,00 kr. Tað vil siga, at inntøkan eftir 3 árum er næstan tvífaldað. Komandi figgjarár 1975/76 er inntøknvøksturin orsakað av automatiseringini mettur at geva 3 milj. kr. Tað vil siga, at inntøkan 1975/76 uttan takstbroytingar er mett til 19 milj. kr. og við taksthækkingum 24 milj. kr. Á skjali 1 eru avskrivingarnar, ið eru mettar til 6,7 milj. kr. í 1975/76 og 1976/77, settar javnt við veruligar avdráttir fyri tey fostu lánini. Hesi eru sett upp á skjal 3. Fyri komandi tvey árini eru avdráttirnir av hesum lánunum 6,7 milj. kr. pr. ár. Seinastu lán telefonverksins eru stuttfreistað. Tí er neyðugt við storri avskrivingum og sostatt størri inntøkum.

Í mettu rakstrartølunum á skjali 1 eru rentur við fyri nýggja láni, sum her verður søkt um.

Í hesum uppskoti verður mælt til, at landsstýrið antin kann taka upp lán fyri telefonverkið ella at telefonverkið sjálvt kann taka upp lán við landskassaveðhaldi.

Finnbogi Isaksen
landsstýrismaður

/ J. Djurhuus

Samandráttur av rakstrarrokuskapi

fyri 1973/74 og mett tøl fyri 1974/75 — 1975/76 og 1976/77.

	1973/74	1974/75	1975/76	1976/77
Inntokur	12.750.127	16.000.000	24.000.000	29.000.000
÷ Rentuútreiðslur	2.932.712	3.500.000	6.200.000	7.800.000
Samlaðar inntokur	9.817.415	12.500.000	17.800.000	21.200.000
Kostnaður:				
Umsiting etc.	2.162.008	3.500.000	3.800.000	4.000.000
Rakstur av stoðum	3.654.783	3.500.000	3.000.000	2.500.000
Rakstur av linjudeildum	1.106.507	1.500.000	2.000.000	2.500.000
Aðrar útreiðslur	655.160	1.300.000	1.800.000	2.500.000
	7.578.458	9.800.000	10.600.000	11.500.000
Yvirskot áðreinn avskrivingar	2.238.957	2.700.000	7.200.000	9.700.000
Avskrivingar	2.008.437	2.500.000	6.700.000	6.700.000
Yvirskot	230.520	200.000	500.000	3.000.000

Skjal 2.

Telefonautomatiseran í Føroyum.

Plass	Støð	Nýb.	viðkan	Byrja	Liðugt	Í gongd
Tórshavn	AGF	1500		6/ 1-52	20/12-52	1/ 5-53
Tórshavn	AGF		500	1/ 2-59		1/ 6-59
Runavík	AGF	500		10/ 6-59		15/11-59
Klaksvík	AGF	500		2/ 7-59		29/11-59
Tórshavn	AGF		500	5/ 9-64		4/ 6-65
Klaksvík	AGF		500	30/11-64		17/12-65
Tórshavn	AGF		500	2/ 1-68		14/ 6-68
Tórshavn	ARM	1C1-2		3/ 1-69		11/12-71
Klaksvík	ARM	2×40		10/11-70		11/12-71
Tvøroyri	ARM	2×40		14/ 9-71	27/ 4-72	10/ 6-72
Tvøroyri	ARK	400		14/ 9-71	27/ 4-72	10/ 6-72
Klaksvík	ARF	2000		7/ 3-72		22/ 8-72
Vág	ARK	400		2/ 5-72	1/ 7-72	16/12-72
Tórshavn	AGF		1000	30/10-72		1/ 2-73
Tórshavn	ARM		1C3	1/ 2-73	30/ 3-73	23/ 6-73
Runavík	ARK	800		22/ 1-73		23/ 6-73
Norðdepli	ARK	60		3/ 8-72	(19/12-72)	3/ 7-73
Hvalba	ARK	200		26/ 3-73	1/ 6-73	4/ 8-73
Viðareiði	ARK	60		2/10-72		20/12-73
Vág	ARK		200	1/ 9-73		10/12-73
Fuglafjørð	ARK	600		1/10-73	20/12-73	3/11-74
Lorvík	ARK	200		7/ 1-74	14/ 3-74	5/10-74
Tvøroyri	ARK		300	3/ 1-73	9/ 4-74	9/ 4-74
Søldarfjørð	ARK	500		6/ 6-73	1/ 2-74	25/ 5-74
Søldarfjørð	ARM	3×40		6/ 6-73	1/ 2-74	25/ 5-74
Kollafjørð	ARK	300		22/ 4-74	31/ 7-74	26/ 9-74
Tvøroyri	ARM		1C2	15/12-74		
Tórshavn	ARM		1C4	6/11-74		
Tórshavn	ARM		R2	6/11-74		
Vestmanna	ARK	500		1/ 8-74	5/11-74	
Vágarnar	ARK	800				
Hvalvík	ARK	300				
Sand	ARK	500				
Eiði	ARK	400				
Nólsoy	ARK	100				
Oyndarfj.	AKL	50		1/ 7-74	2/11-74	2/11-74
Sumba	AKL	50		26/ 8-74	6/11-74	
Lopra	AKL	50		26/ 8-74		6/11-74

Oversigt over Telefonverk Føroya Løgtings' lån pr. 31. marts 1974

Skjal 3

Låneinstitution	Optaget	Term. ialt	Tilbage betalt	Størrelse i 1000 kr.	Rente i %	Afdrag hver term.	Lånestørrelse pr. 31/3-74
Obligationslån 1960	1/10-60	15	1/10-75	450	6,5	30.000,00	60.000,00
Obligationslån 1966	1/ 4-66	8	1/ 4-74	800	8,0	100.000,00	100.000,00
Obligationslån 1968	1/10-68	15	1/ 4-83	1.000	10,0	70.000,00	675.000,00
Obligationslån 1966/81	1/11-66	15	1/11-81	2.050	10,0	137.000,00	1.094.000,00
Obligationslån 1969	28/11-69	15	1/12-84	3.000	10,0	200.000,00	2.200.000,00
Obligationslån 1972	19/12-72	15	1/12-88	5.000	9,0	333.333,33	5.000.000,00
Investeringsfonden LK 80	1/ 7-66	30	11/ 6-83	1.850	6,5	61.666,67	1.171.666,63
Investeringsfonden LK 81		30	11/ 6-87	1.600	6,5	53.333,33	1.386.666,67
Investeringsfonden LK 82	24/ 6-71	30	11/12-87	7.600	6,5	253.333,33	7.093.334,34
Investeringsfonden LK 84	24/ 6-71	30	11/ 6-85	1.750	6,5	58.333,33	1.458.333,34
Investeringsfonden	1/ 4-73	30	11/12-88	5.000	6,5	166.666,67	4.666.666,66
Investeringsfonden	1/ 4-74	30	11/12-89	5.000	6,5	166.666,67	
Sweitz. lån —	1/ 6-73	8	11/12-77	11.000	var.	137.500,00 6.133,00	11.000.000,00
Føroya Sparikassi	4/11-57	40	11/ 6-77	200	10,0	5.000,00	84.689,00
Búagrunnur Føroya	22/10-68	20	11/12-78	300	8,5	15.000,00	150.000,00
						1.793.966,00	36.140.356,64
4 mill. $, Orion Term Bank	11/ 2-75	10		22.000	var.	2.200.000,00	22.000.000,00 pr. 31/3-75
						3.993.966,00	58.140.356,64 pr. 31/3-75

1. viðgerð 21. apríl og málið beint í fíggjarnevndina, sum 22. apríl legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð av landsstýrinum framlagt 17. apríl 1975 og undir 1. viðgerð 21. apríl beint í fíggjarnevndina.

Landsstýrið biður um eina 15 miljónna veðhaldsheimild fyri láni til Telefonverk Føroya Løgtings og gevur í viðmerkingunum og fylgiskjolum eina frágreiðing um støðuna hjá telefonverkinum, útbyggingarliga, fíggjarliga og á annan hátt.

Í høvuðsheitum eru tey arbeiði, ið ættanin er at fremja í 1975 og 1976 viðvíkjandi automatisering av hesum økjum: Vestmanna, Hvalvík, Eiði, Vágunum og Sandoynni.

Tað er millum annað fyri at kunna liðugtgera hesi øki, at telefonverkinum tørvar umsøkta veðhaldslániheild.

Í viðmerkingum frá landsgrannskoðaranum til rokuskap telefonverksins hevur verið gjørt vart við, at eginfíggjan telefonverksins hevur verið ov veik. Bøtt er um hetta við takstbroytingum og nú eisini við hesu lántøku.

Rokuskaparligt ólag hevur verið í á telefonverkinum, tí teir ikki hava fingið ársrokuskapirnar frá hondini fyrr enn í úrtlið, men svaraði telefonverkstjóri Sólbjørn Jacobsen á fundi í fíggjarnevndini 22. apríl beinleiðis spurdur, at ársrokuskapurin fyri 74/75 kom at verða liðugur um miðjan mai.

Samlaða lániskuld telefonverksins, tá 15 miljónna lánið er tikið, verður umleið 73 miljónir, og avdrøgini hvørja termin, tá 15 miljónna lánið ikki er við, slakar 4 miljónir.

Samlaða inntøkan fyri 1974/75 verður mett til 16.000.000 kr. uttan nakran frádrátt.

Yvirskotið fyri 1974/75 verður mett til 200.000 kr., tá rentur, kostnaður (umsiting, rekstur av støðum, rekstur av linjudeildum, aðrar útreiðslur) og avskrivingar — avdráttir eru frá.

Fíggjarnevndin mælir til at samtykkja landsstýrisins uppskot, men út frá teirri føstu trúgv, at hetta 15 miljónna lán verður nýtt til at liðugtgera automatiseringina av teimum í viðmerkingunum frá landsstýrinum nevndu økjum.

FÍGGJARNEVNDIN, 22. apríl 1975.

Hákun Djurhuus	Poul J. Olsen	Hilmar Beck
Jógvan Durhuus	Asbjørn Joensen	Pauli Ellefson
	Signar Hansen	

2. viðgerð 23. apríl (kl. 10.00).

Gr. 1 samtykt við 25—0. Alt lógaruppskotið og at fara til 3. viðgerð samtykt við 23—0.

3. viðgerð 23. apríl (kl. 16.30).

Uppskotið sum samtykt við 2. viðgerð nú endaliga samtykt við 21—0.

---

53. Vegir og lendingar

Ár 1975, hósdagin 17. apríl, var frá Vega- og havnanevndini lagt fram soljóðandi

Álit

Havna- og veganevndin hevur viðgjørt lær um 70 umsóknir um stuðning, sum innkomnar eru.

I. Vegir.

Uppskot

A. Á figgjarløgtingslógini eru settar av 33,2 mill. kr. til vegabyggingar og umsitingina av landsvegum v.m.

Av hesum peningi kann verða nýttur til smærri kommunalar vegagerðir o.t. hesar upphæddir:

Kommuna	Arbeiði	Stuðningur ¾ av kr.
Svínoyar		
	Abøtur á vegin til Eiðið	20.000,-

Viðareiðis	
Dyrkingarveg eystur við Egg	60.000,—
Leirvíkar	
Veg út á Vík	60.000,—
Nes	
Veg millum Nes og Toftir	60.000,—
Kirkjubøur	
Ábøtur á vegin oman í bygdina á Velbastað	50.000,—
Framhald av vegnum norður í Fossdal	60.000,—
Kvívíkar	
Veg í Kvívík	50.000,—
Miðvágs	
Brúgv um Hýsisá	50.000,—
Brúgv um Lambá	50.000,—
Sørvágs	
Framhald av vegi gjøgnum Úttriðingsbø	60.000,—
Dyrkingarvegir	80.000,—
Bíggjar	
Veg vestur frá Bø	60.000,—
Húsavíkar	
Meirstudning til veg í Húsavík	60.000,—
Porkeris	
Framhald av vegi frá Gjónni Stóru	60.000,—
Sumbiar	
Vegagerð í Víkarbyrgi	60.000,—
Tilsamans ¾ av kr.	840.000,—
= kr.	630.000,—

II. Lændingar

Játtanir fyri fíggjarárið 1975/76, sum samtyktar eru áður, eru hesar:

Kommuna	til	Studningur ¾ av kr.
Svínoyar		
	Lending við Svínoyareiði	
	(5. ársgjald av 6 ára játtan) í gerð	50.000,-
	(3. ársgjald av 4 ára játtan) í gerð	60.000,-
Hvannasunds		
	Lendibrúgv við flakavirkið (Viðareiðis og Hvannasunds kommunur í felag)	
	(4. ársgjald av 8 ára játtan) bygt	180.000,-
Klakksvíkar		
	Bátahavn í Klakksvík	
	(6. ársgjald av 10 ára játtan) bygt	100.000,-
	Lendibrúgv í Arnafirði	
	(4. ársgjald av 6 ára játtan) ikki bygt	50.000,-
	Lending á Norðoyri	
	(3. ársgjald av 3 ára játtan) ikki bygt	30.000,
	(2. ársgjald av 3 ára játtan) ikki bygt	45.000,-
Kunoyar		
	Lendibrúgv í Haraldssundi	
	(3. ársgjald av 4 ára játtan) ikki bygt	50.000,-
	(1. ársgjald av 2 ára játtan) ikki bygt	25.000,-
Oyndarfjarðar		
	Leingjan av lendibrúgv	
	(3. ársgjald av 6 ára játtan) ikki bygt	60.000,-
Elduvíkar		
	Bryggju í Funningsfirði	
	(5. ársgjald av 6 ára játtan) ikki bygt	80.000, -

Fuglafjarðar

Bryggju vestanfyri
(6. ársgjald av 8 ára játtan) bygt ..... 70.000,—

Bátahavn í Fuglafirði
(5. ársgjald av 6 ára játtan) í gerð ..... 60.000,—

Gøtu

Uppfylling fyri byggjøki í Norðrugøtu bygt
(5. ársgjald av 5 ára játtan) bygt ..... 80.000,—

Bátahylnr undir Gøtuciði
(4. ársgjald av 4 ára játtan) bygt ..... 20.000,—

Bátadráttur í Syðrugøtu
(3. ársgjald av 4 ára játtan) bygt ..... 50.000,—

Nes

Leinging av pieri við Toftagjógv
(3. ársgjald av 5 ára játtan) bygt ..... 150.000,—

Bátahavn í Oyrunum
(1. ársgjald av 3 ára játtan) bygt ..... 80.000,—

Leinging av pieri við Toftagjógv
(2. ársgjald av 5 ára játtan) bygt ..... 100.000,—

Runavíkar

Bátahavn á Glyvrum
(6. ársgjald av 6 ára játtan) bygt ..... 70.000,—

Bátahavn í Søldarfirði
(6. ársgjald av 6 ára játtan) bygt ..... 35.000,—

Skála

Leinging og breiðkan av lendibr. í Skálabotni
(6. ársgjald av 9 ára játtan) bygt ..... 50.000,—

Bátahyl á Skála
(4. ársgjald av 5 ára játtan) bygt ..... 80.000,—

Sjóar

Bátahyl við Sjógv
(4. ársgjald av 4 ára játtan) bygt ..... 20.000,—

Útbygging av Heygsstøð til bilflutnings
(4. ársgjald av 6 ára játtan) bygt ..... 80.000,—

Útbygging av Heygsstøð
(3. ársgjald av 5 ára játtan) bygt ..... 60.000,—

Útbygging av Heygsstøð
(2. ársgjald av 5 ára játtan) bygt ..... 100.000,—
Bátahavnir
Bátahyl innan fyri Høgan við Sjógv
(1. ársgjald av 2 ára játtan) 60.000,

Sunda
Lendibrúgv á Norðskála
(6. ársgjald av 6 ára játtan) bygt ..... 45.000,—
Bátahyl á Oyrabakka
(4. ársgjald av 6 ára játtan) bygt ..... 50.000,—

Eiðis
Lendibrúgv í Svínáum
(4. ársgjald av 6 ára játtan) bygt ..... 80.000,—
Tryggingartiltøk
(2. ársgjald av 3 ára játtan) ..... 75.000,—

Haldórsvíkar
Bátahavn
(3. ársgjald av 4 ára játtan) ikki bygt ..... 50.000,—
Bátahavn
(2. ársgjald av 4 ára játtan) ikki bygt ..... 100.000,—

Hvalvíkar
Styrking av bryggju í Hvalvík
(6. ársgjald av 6 ára játtan) ..... 50.000,—

Hósvíkar
Leingjan av lendibrúgv í Hósvík
(5. ársgjald av 5 ára játtan) bygt ..... 100.000,—
Lendibrúgv í Hósvík
(3. ársgjald av 3 ára játtan) bygt ..... 50.000,—

Kollafjarðar
Bátahyl innanvert Sjógv
(6. ársgjald av 8 ára játtan) bygt ..... 60.000,—

Kvívíkar
Umvæling av brimgarði og breiðkan av hyli í Kvívík
(4. ársgjald av 4 ára játtan) í gerð ..... 50.000,—

Kaldbaks
Bátalyrlur við Biggjarstøð
(3. ársgjald av 4 ára játtan) bygt ..... 60.000,—

Tórshavnar uttanbýggjar
Lendingarábøtur í Hoyvík
(6. ársgjald av 6 ára játtan) bygt ..... 25.000,—

Kirkjubøar
Lendingarábøtur
(2. ársgjald av 2 ára játtan) ..... 25.000,—

Hests
Bryggja niðri á Hellu
(4. ársgjald av 6 ára játtan) bygt ..... 150.000,—

Sandavágs
Bátahavn
(6. ársgjald av 8 ára játtan) í gerð ..... 120.000,—
Bátahavn
(4. ársgjald av 6 ára játtan ..... 80.000,—

Sørvágs
Bátahavn
(6. ársgjald av 8 ára játtan) ..... 80.000,—

Sands
Nýggjur vegur til havnina
(2. ársgjald av 2 ára játtan) ..... 65.000,—

Húsavíkar
Skarvasker
(3. ársgjald av 5 ára játtan) bygt ..... 40.000,—
Lendingina í Dali
(3. ársgjald av 4 ára játtan) í gerð ..... 50.000,—

Skúvoyar
Leinging av atløgubryggju v.m. í Skúvoy
(1. ársgjald av 3 ára játtan) ..... 50.000,—

Hvalbiar
Leinging av lendibrúgv í Sandvík
(4. ársgjald av 6 ára játtan) ..... 70.000,—

Bátahavn við Býggjargarð		
(4. ársgjald av 4 ára játtan) bygt		70.000,—
Tryggingartiltøk á Hvalbiar eiði		
(2. ársgjald av 2 ára játtan)		20.000,—
Froðbiar		
Bátahavn í Trongisvági		
(6. ársgjald av 8 ára játtan) í gerð		80.000,—
Sumbiar		
Bryggju í Lopra		
(8. ársgjald av 10 ára játtan) bygt		250.000,—
Bátabrúgv í Oyrnavík		
(5. ársgjald av 6 ára játtan) ikki bygt		60.000,—
Dýping við bryggjuna í Lopra		
(3. ársgjald av 4 ára játtan) bygt		50.000,—
Verju av bakkanum undir bygdini		
(2. ársgjald av 2 ára játtan) 1 gerð		25.000,—
Styrking av vegnum frá lendingini í Vikarbyrgi		
(2. ársgjald av 2 ára játtan)		40.000,—
Tilsamans ¾ av kr.		4.095.000,—
= kr.		3.069.750,—
Játtað fyri 1975/76 sambært løgtingslóg nr. 52 frá 24. mai 1974	kr.	2.302.500,—
Ikki nýttar gjaldkomnar játtanir pr. 31/3 1974	kr.	3.316.150,—
av vanligum lendingarjáttanum		
Av játtanini sambært løgtingslóg nr. 52 frá 24/5-74	kr.	1.302.500,—
	kr.	9.990.900,—
Í grunninum pr 1/4 1975 kr. 3.916.800,—		
Játtað fyri 1975/76 kr. 6.000.000,—	kr.	9.916.800,—
Hall	kr.	74.100,—

Viðvikjandi nýjáttanum skal nevndin loyva sær at seta fram soljóðandi

Uppskot

A.	Arbeiði	Studningur ¾ av kr.
Fugloyar		
	Bátaspæl	45.000,—
	Lendingarábøtur í Skarðsvík	10.000,—
Svínoyar		
	Leinging av bryggju við Eiðið ¾ av 80.000 kr./árið í 5 ár	80.000,—
Viðareiðis og Hvannasunds		
	Bátahyl norðan fyri byrgingina um Hvannasund ¾ av 80.000 kr./árið í 5 ár	80.000,—
Klaksvíkar		
	Lendibrúgv í Árnafirði ¾ av 75.000 kr./árið í 4 ár	75.000,—
	Lendibrúgv í Borðoyarvík (á Flesjunum)	60.000,—
Mikladals		
	Lending á Trøllanesi ¾ av 50.000 kr./árið í 3 ár	50.000,—
Húsa		
	Rennistrong á Húsum (cykajáttan)	50.000,—
Fuglafjarðar		
	Støðið fyri egningarskúri ¾ av 75.000 kr./árið í 2 ár	75.000,—
Leirvíkar		
	Atløgubryggja fyri bátar ¾ av 60.000 kr./árið í 5 ár	60.000,—
Runavíkar		
	Lendingarábøtur í Æðuvík	20.000,—
Nes		
	Grótkast sunnan fyri pierin við Toftagjógv	150.000,—

Abøtur á bátahavnina í Oyrunum
¾ av 100.000 kr./árið í 5 ár ..... 100.000,—
Støði undir turkihúsi í Oyrunum
¾ av 100.000 kr./árið í 4 ár ..... 100.000,—

Eiðis
Eykajáttan til lendibrúgv í Svínáum
¾ av 60.000 kr./árið í 2 ár ..... 60.000,—

Hvalvíkar
Bátahyl í Hvalvík
¾ av 50.000 kr./árið í 6 ár ..... 50.000,—
Støði fyri netavirki
¾ av 75.000 kr./árið í 6 ár ..... 75.000,—

Hósvíkar
Bátahyl í Hósvík
¾ av 50.000 kr./árið í 4 ár ..... 50.000,—

Kirkjubøar
Bakkaverja í Kirkjubø ..... 25.000,—

Hests
Eykajáttan til lendingarábøtur í Koltri ..... 20.000,—
Eykajáttan til lendingarábøtur í Hesti ..... 30.000,—

Nólsoyar
Leinging av lendibrúnni
¾ av 100.000 kr./árið í 2 ár ..... 100.000,—

Miðvágs
Vegagerð út til brimgarðin,ið gerast skal
útfrá prestlandinum
(¾ av 100.000 kr./árið í 6 ár) ..... 100.000,—

Sørvágs
Betonlegging uttan um flakavirkið ..... 50.000,—

Biggjar
Lendingarábøtur í Gásadali ..... 10.000,—

Mykines
Lendingarábøtur ..... 20.000,—

Sands

Støðl fyri fiskavirki
(¾ av 150.000 kr./ársið í 4 ár) 150.000,--

Skúvoyar

Leinging av atløgusiðu í Skúvoy
(¾ av 80.000 kr./ársið í 4 ár) 80.000,--
Spæl í Stóru Dímun 40.000,--

Fámjin

Brimskaða v.m. niðri við lendingina 50.000,--

Sumbiar

Brimverjutiltøk vestan fyri dráttin á Pollinum
(¾ av 50.000 kr./ársið í 3 ár) 50.000,--
Verja uppundir Kirkjugarðsbakkan (cykajáttan)
¾ av 40.000 kr./ársið í 3 ár ..... 40.000,—

Tilsamans ¾ av kr. 1.955.000,--

= kr. 1.466.250,--

B. **Tokulúður í Akrabergi.**

Í álitinum í løgtingsmáli nr. 78/1973: Vegir og lendingar setti havna- og veganevndin fram fylgjandi uppskot til samtyktar:

«Tokulúður í Akrabergi.

Løgtingið áleggur landsstýrinum at taka upp samráðingar við avvarðandi myndugleikar um at fáa tokulúður settan upp í Akrabergi.».

Hetta uppskot varð samtykt, og varð í mai mánaði 1974 send áheitán til Farvandsdirektoratet um hetta.

Til hetta svaraði Farvandsdirektoratet, at hildið var hóskiligt at slovna tokulúður í Akrabergi, men við tað at tokulúðurin einans er til frama fyri fiskifør á staðnum, verður hetta ikki roknað sum verkevni hjá ríkinum.

Farvandsdirektoratet skjýtir tí upp, at tokulúðurin verður uppsettur fyri rokning landskassans, meðan tann dagliga røktin ókeypis verður í hondum á starvsfólkinum á Akrabergsvitanum. Útreiðslurnar av at seta vitan upp verða mettar til 100.000 kr.

Um vitin einaferð skal fara at virka uttan manning, kann tokulúðurin verða útgjørdur við einum automatiskum tokutdetektori, sum í dag kostar einar 50.000 kr.

Nevndin hevur viðgjørt málið, sum tað liggur fyri nú og heldur, at tiltakið eigur at verða framt og loyvir sær ti at seta fram soljóðandi

Uppskot

Heimilað verður landsstýrinum at seta upp tokulúður í Akrabergi, og at rinda kostnaðin úr landskassanum.

III. Í álitinum í løgtingsmáli nr. 78/1973: Vegir og lendingar, setti havna- og veganevndin fram fylgjandi uppskot til samtyktar:

«Løgtingið áleggur landsstýrinum at seta seg í samband við Fyr- og vagervæsenet um at fáa vita ella í minsta lagi radarreflex á Flesjarnar við Skálafjørðin.».

Hetta uppskot varð samtykt og varð í august mánaði í 1973 áheitan send Farvandsdirektoratet um hetta.

Farvandsdirektoratet svaraði — aftaná at kanning var farin fram á staðnum — at ein tílíkur viti fór at kosta millióunir av krónum, meðan ein radar reflex kann verða gjørd fyri o.u. 250.000 kr.

Hesin peningur er lagdur av á figgjarlógini fyri 1975/76, og arbeiðið verður framt tíðliga á sumri 1975.

HAVNA- OG VEGANEVNDIN, 17. apríl 1975.

Óli Breckmann	Haldor Hansen formaður	Signar Hansen
Heðin Klein	Kj. Mohr Jógvan Olsen	Vilhelm Nielsen

2. viðgerð 21. apríl.

Framlagt broytingaruppskot frá Agnar Nielsen til bátahyl í Haldórsvík soljóðandi

Uppskot II.

arbeiðir.

Aftan á Hósvíkar, Bátahyl í Hósvík. ¾ av 50.000 kr./árið 4 ár.

Verður innskotið

Haldórsvíkar. Fykajáttan til Havnaøki anugangandi Bátahyl í Haldórsvík. ¾ av 100.000 kr./árið í 3 ár.

Uppskot frá nevndini I: Vegir, samtykt við 22—0.
Broytingaruppskot frá Agnar Nielsen fall við 10—0.
Uppskot frá nevndini A -nýjáttan lendingar, samtykt við 22—0.
Uppskot til samtyktar frá nevndini samtykt við 22—0.
Málið sostatt avgreitt.

---

54. Troling á landleiðini

Ár 1975, hósdagin 17. apríl var frá Fiskivinnunevndini lagt fram soljóðandi

Álit

Við brævi dagfest februar 1975 hava bátaeigarar og flakavirkir heitt á løgtingið um at geva loyvi til troling á landleiðini komandi summar. Og við brævi til løgtingsins fiskivinnunevnd dagfest 22. mars hava eigarar

F.L.j. nr. 1501-2-3. — Sí eisini L. nr. 25/1975.

av útróðrarbátum omanfyri 55 tons søkt um serloyvi fyri bátastødd millum 55 og 80 tons til troling á sonn leiðum. Hetta eru eldri bátar, sum hava rikið línufiskiskap undir Føroyum í mong ár.

Teir bátar, sum nú í fleiri ár hava trolað á landleiðini á sumri, føra fram eins og teir hava vist á í undanfarnu árum tann týðning, tað hevur fyri rakstrarúrslitið hjá hesum bátum, at loyvi til troling verður givið, tí annars er tað ikki møguligt at fáa endarnar at røkka sannan. Flakavirkini gera eisini vart við, at tað uppiskoyti sum trolfiskiskapurin á sumri hevur givið teimum, hevur havt týðning fyri raksturin hjá hesum virkjum. Eisini verður vist til, at ein stórur partur av heimafólkinum í fleiri bygdum nærum einki hava at takast við hesa tiðina á árinum, um hesin fiskiskapur fellur burtur.

Í umsóknini frá teim størru bátunum verður vist til, hvussu torfort tað er at manna hesar bátar, nú fiskaprísirnir eru so nógv lækkaðir, og øll útgerð so nógv hækkað, eisini verður vist á, at línuveiðan er so arbeiðskrevjandi, at til hesa veiðu krevst nógv manning, og at tað av teirri orsøk verður so lítið í part, at um ikki hesir bátar fáa trolloyvi á landleiðini, verður ikki møguligt at manna teir framyvir.

Fiskivinnunevndin hevur viðgjørt báðar hesar umsóknir og ásamar, at so sum útviklingurin hevur verið innan heimafiskiskap, so gevur línuróðurin, soleiðis sum framført í umsóknunum, ov lítið bæði til bátar og manning, og tí er at bera ótta fyri, at um ikki annað býðst, at so verða nógvir av hesum bátum annaðhvørt at liggja fyri teymin ella seldir, um keyparar eru til teir.

Stórur partur av fiskiveiðuflotanum er í løtuni í álvarsligari kreppustøðu og má tí verða umhugsað, hvørji ráð eru at taka fyri, at fiskimenn okkara, tá einaferð broyting kemur í, ikki standa á berum. Við teimum nógv hækkaðu útreiðslum til allan fiskiskap er tað skilligt, at bátar og skip, sum ikki kunnu verða í vinnu meira enn helmingin av árinum ongan møguleika hava fyri at greiða skyldur sínar.

Tvey tey seinastu árini hevur trolloyvi verið givið fyri nøkur nærri ávíst økir, sum í flestum føri hava fylgt eini linju 6 fjórðingar innanfyri 12 mílamarkið, tó við nøkrum undantøkum, og hevur hetta loyvi verið galdandi frá 1. juni til seinasta august. Nú verður søkt um, at loyvi til troling verður frá 1. mai til seinasta september, og at markið verður 6 fjórðingar frá grundlinjuni.

Nevndin ásamar, at við at fylgt grundlinjuni, tá hon var drigin nes úr nesi vildi økt munandi um veiðuøkið hjá trolbátum, men hetta mark vildi verið nærum ómøguligt at vart, og mælir tí til, at her ongar broytingar verða gjørdar. Meirilutin heldur, at tiðin, har loyvt verður at trola, kundi verið longd við einum mánað, so byrjað var 15. mai og endað 15. septem-

ber. Royndirnar hesi seinastu árini hava vist, at teir bátar sum fyrstir hava byrjað trolingina, hava fingið góðan fiskiskap, eins og seinastu dagarnir av august summi ár hava givið nógv.

Nevndin heldur ikki, at flótitrol og partroling eigur at verða loyvd á hesum økjum.

Við hesum viðmerkingum setur nevndin, ið hevur býtt seg í fleiri minnilutar, fram fylgjandi høvuðsuppskot (svarandi til gomlu lógina) við broytingaruppskotum:

1)

Uppskot
til

Løgtingslóg um trolveiðu á landleiðini.

§ 1.

Hóast reglurnar í § 3 í løgtingslóg nr. 12 frá 12. mars 1964 um forboð móti trolveiðu á landleiðini verður landsstýrinum heimilað at geva fiskiførum 55 br. reg. t. til støddar og minni loyvi til trolveiðu á landleiðini í tíðarskeiðinum 1. juni til 31. august báðir dagar íroknaðir á hesum pørtum av landleiðini:

1. Uttanfyri 6 fjórðingar úr landi millum tvær linjur, onnur drigin úr Norðberg 62° 21,5' N. 6° 18,5' W. rættvísandi norðan og hin úr Bispinum 62° 20,5' N. 6° 14,0' W rættvísandi 68°.
2. Uttanfyri 6 fjórðingar úr landi millum tvær linjur, onnur drigin úr Skorini (Syðritangi) 62° 10,5' N. 6° 26,5' W rættvísandi eystan og hin úr Borðini (vitanum) 61° 56,8' N. 6° 37,5' W rættvísandi 117°.
3. Uttanfyri 6 fjórðingar úr landi millum tvær linjur, onnur drigin úr Akrabergi 61° 23,8' N. 6° 40,0' W rættvísandi 230° og hin úr Kobbatanga 61° 36,2' N. 6° 59,0' W. rættvísandi 230°.

lagtingslov om fiskeri med trawl på fiskeriterritoriet.

§ 1.

Uanset bestemmelserne i § 3 i lagtingslov nr. 12 af 12. marts 1964 om forbud mod fiskeri med trawl på fiskeriterritoriet bemyndiges landsstyret til at meddele fiskefartøjer på 55 br. reg. t. og mindre tilladelse til fiskeri med trawl på fiskeriterritoriet i tiden fra 1. juni til 15. august begge dage medregnet på disse områder af fiskeriterritoriet:

1. Udenfor 6 sømil fra land mellem to linier, den ene trækkes fra Norðberg 62° 21,5' N. 6° 18,5' W retvisende nord og den anden fra Bispinum 62° 20,5' N 6° 14,0' W retvisende 68°.
2. Udenfor 6 sømil fra land mellem to linier den ene trækkes fra Skorini (Syðritangi) 62° 10,5' N. 6° 26,5' W. retvisende øst og den anden fra Borðini (fyret) 61° 56,8' N. 6° 37,5' W. retvisende 117°.
3. Udenfor 6 sømil fra land mellem to linier, den ene trækkes fra Akrabergi 61° 23,8' N 6° 40,0' W. retvisende 230° den anden fra Kobbatanga 61° 36,2' N. 6° 59,0' W. retvisende 230°.

4. Uttanfyri grundlinjuni millum tvær linjur onnur drigin úr Trøllhøvda 61° 55,0' N 6° 57,0' W. rættvísandi 230° og hin úr Dragasundi (Vágoy) 62° 04,5' N. 7° 24,3' W. rættvísandi 230°.

5. Uttanfyri 8 fjórðingar úr landi millum tvær linjur onnur drigin úr Málanum 62° 10,5' N. 7° 15,0' W. rættvísandi 315° og hin úr Mykineshólmi (vitanum) 62° 06,0' N. 7° 40,5' W. rættvísandi 315°.

4. Udenfor basislinjen mellem to linier den ene trækkes fra Trøllhøvda 61° 55,0' N. 6° 57,0' W. retvisende 230° den anden fra Dragasundi (Vágoy) 62° 04,5' N. 7° 24,3' W. retvisende 230°.

5. Udenfor 8 sømil fra land mellem to linier den ene trækkes fra Málanum 62° 10,5' N. 7° 15,0' W retvisende 315° den anden fra Mykineshólmi (fyret) 62° 06,0' N. 7° 40,5' W. retvisende 315°.



§ 2.

Studningur eftir løgtingslóg nr. 1 frá 31. januar 1969 um minstuløn og annan stuðul til fiskivinnuna verður ikki latin til fiskimenn á ella eigarar av fiskiskipum, hvørjum fiskað verður við trolloyvi.

§ 3.

Um trolað verður á ikki loyvdari leið, fellur trolloyvið burtur, og verður tað ikki givið aftur til tað fiskifarið. Hann, sum ikki heldur treytir landsstýrisins fyri trolloyvi kemur undir sekt.

2. stk. Hesar reglur broyta ikki straffireglurnar annars í lóggávuni um ólógliga trolveiðu.

§ 4.

Henda lóg hevur gildi í árunum 1975 og 1976.

§ 2.

Tilskud i henhold til lagtingslov nr. 1 af 31. januar 1969 om mindsteløn og anden støtte til fiskerierhvervet ydes ikke til fiskere om bord på eller ejere af fiskefartøjer, hvorfra der fiskes med trawltilladelse.

§ 3.

Såfremt der trawles på et ikke tilladt område, bortfalder trawltilladelsen, denne gives ikke igen til det fiskefartøj. Den, som ikke overholder landsstyrets betingelser for trawltilladelse, straffes med bøde.

Stk. 2. Foranstående bestemmelser ændrer ikke straffebestemmelserne i lovgivningen iøvrigt om ulovligt trawlfiskeri.

§ 4.

Denne lov har gyldighed i årene 1975 og 1976.

Minnilutin (Poul Jacob Olsen og Sigurð Hansen) seta fram fylgjandi uppskot til broyting í løgtingsuppskotinum viðvíkjandi loyvdu veiðuloyvunum:

1. Í § 1 nr. 1 verða orðini «Norðberg 62° 21,5' N. 6° 18,5' W.» broytt til «Settorvu 62° 23,6' N. 6° 33,0' W.»

2. Í § 1 nr. 3 verða orðini «Kobbatanga 61° 36,2' N. 6° 59,0' W.» broytt til: «Ørnanípan 61° 38,7' N. 6° 58,2' W.»

3. I § 1, nr. 5, verða orðini «Múlanum 62° 10,5' N. 7° 15,0' W.» broytt til: «Snoppan 62° 15,1' N. 7° 13,7' W.»

1. I § 1, nr. 1, ændres ordene «Norðberg 62° 21,5' N. 6° 18,5' W.» til: «Settorvu 62° 23,6' N. 6° 33,0' W.»

2. I § 1, nr. 3, ændres ordene «Kobbatanga 61° 36,2' N. 6° 59,0' W.» til: «Ørnanípan 61° 38,7' N. 6° 58,2' W.»

3. I § 1, nr. 5, ændres ordene «Múlanum 62° 10,5' N. 7° 15,0' W.» til: «Snoppan 62° 15,1' N. 7° 13,7' W.»

3) Minnilutin (Ove Mikkelsen) setur fram fylgjandi broytingaruppskot viðvíkjandi loyvdu veiðuøkjunum:

Í § 1 verður skoytt uppí sum nr. 6: «Landsstýrið saman við Fiskirannsóknarstovuni verður heimilað at flyta tey undir 1-5 tilskilaðu økir, sjálvt um tey koma inn um 6 fjórðingar, men tó uttan at broyta samlaðu viddina.»	I § 1 tilføjes som nr. 6: «Landsstyret sammen med Fiskeriforsøgskontoret bemyndiges til at flytte de i nr. 1-5 nævnte områder, uanset de måtte komme til at ligge indenfor 6 sømil, men dog uden at ændre det samlede areal.»

4) Viðvíkjandi loyvdu troltíðini setur meirilutin (Poul J. Olsen, Vilh. Nielsen, Signar Hansen og Ove Mikkelsen) fram fylgjandi broytingaruppskot til høvuðsuppskotið:

Í § 1 verða orðini: «1. juni til 31. august» broytt til: «15. mai til 15. september.»	I § 1 ændres ordene: «1. juni til 31. august» til: «15. maj til 15. september.»

5) Minnilutin (Poul Jacob Olsen) setur fram fylgjandi broytingaruppskot til høvuðsuppskotið viðvíkjandi støddini á trolbátunum:

Í § 1 verður «55 br. reg t.» broytt til «80 br. reg. t.»	I § 1 ændres «55 br. reg. t.» til «80 br. reg. t.»

6) Minnilutin (Poul Jacob Olsen og Signar Hansen) setur fram fylgjandi uppskot til høvuðsuppskotið viðvíkjandi prísstudningi:

§ 2 dettur burtur og §§ 3 og 4 verða §§ 2 og 3.	§ 2 udgår og §§ 3 og 4 bliver herefter §§ 2 og 3.

7) Minnilutin (Ove Mikkelsen) setur fram fylgjandi broytingaruppskot viðvíkjandi prísstudningi:

§ 2 verður orðað soleiðis: «Vanligur prísstudningur verður latin til flatan fisk og bert til henda.»	§ 2 affattes således: «Sædvanligt pristilskud ydes til fladfisk og kun til denne.»

8) Minnilutin (Ove Mikkelsen) setur fram fylgjandi broytingaruppskot til høvuðsuppskotið:

§ 4 verður orðað soleiðis:
«Henda lóg kemur í gildi beinanvegin og skal leggjast fyri løgtingið í januar mánaða á hvørjum ári til endurskoðan »

§ 4 affattes således:
«Denne lov træder i kraft straks og skal hvert år i januar måned forelægges lagtinget til revision.»

Minnilutin (Ove Mikkelsen) setur fram fylgjandi

Uppskot
til
samtyktar.

1. Trolbátar, sum fáa loyvi at trola innan fyri mark, skulu ikki fáa loyvi at landa meiri enn eitt ásett procenttal av rundum fiski: hýsu og toski undir 45 cm,
2. og at hóskandi prísstuðningur verður latin til veiddan flatfisk, men ikki fyri tosk og hýsu.

2. viðgerð 18. apríl.
Framlagt var broytingaruppskot frá Jákup Mortensen, soljóðandi:

Í § 1 verður «55 br. reg. t.» broytt til «85 br. reg. t.», og aftaná «og minni» verður innskotið: «tó fyri bátastøddina millum 55 og 85 br. reg. t. bert galdandi fyri teir, sum í løtuni eru skrásettir í Føroyum».

Viðgerðin útsett til seinni fund og uppafturtikin sama dag á fundi kl. 14.00.
Atkvøðugreiðslan fór soleiðis fram:
Broytingaruppskot frá Ove Mikkelsen til gr. 1 fall við 5—0. — Broytingaruppskot frá Poul J. Olsen og Signar Hansen til gr. 1 samtykt 17—0. — Broytingaruppskot frá Jákup Mortensen til gr. 1 fall 8—0. — Broytingaruppskot frá Poul J. Olsen til gr. 1 fall við 8—0. — Broytingaruppskot frá Poul J. Olsen, Signar Hansen, Vilhelm Nielsen og Ove Mikkelsen til gr. 1 samtykt við 18—0.

Gr. 1 soleiðis broytt samtykt við 18—0.

Broytingaruppskot frá Poul J. Olsen og Signar Hansen til gr. 2 fall við 11—0. Broytingaruppskot frá Ove Mikkelsen til gr. 2 fall 10—0.

Gr. 2 samtykt við 19—0.

Gr. 3, 1. stk. samtykt við 15—0.

Gr. 2, 2. stk. samtykt u. atkvgr.

Broytingaruppskot til gr. 4 frá Ove Mikkelsen fall við 1—0.

Gr. 4 samtykt u. atkvgr.

At lógin soleiðis broytt og samtykt skal fara til 3. viðgerð samtykt við 18—0.

Uppskot til samtyktar frá Ove Mikkelsen fall við 5—0.

21. apríl var framlagt broytingaruppskot frá fiskivinnunevndini soljóðandi:

§ 3 verður orðað soleiðis:

«Fyri troling á ikki loyvdari leið galda straffireglurnar í løgtingslóg nr. 12 frá 10. mars 1964 um fiskiveiðu á landleiðini.»

§ 3 affattes således:

«For trawling på et ikke tilladt område gælder straffebestemmelserne i lagtingslov nr. 12 af 10. marts 1964 om fiskeri på fiskeriterritoriet.»

3. viðgerð 21. apríl.

Broytingaruppskot frá nevndini til gr. 3 samtykt við 15—0.

Lógaruppskotið soleiðis broytt endaligu samtykt við at 18 atkvøddu fyri og 1 ímóti.



1: úr Norðbergi rv. N úr Bispinum rv. 68° inn á 6 fj. úr landi
2: úr Skorðuni rv. E úr Borðuni rv. 117° inn á 6 fj. úr landi
3: úr Akrabergi rv. 230° úr Kolbatanga rv. 230° inn á 6 fj. úr landi
4: úr Trøllhøvda rv. 230° úr Dragasundi rv. 230° inn á grundlinjuna
5: úr Mykinesvita rv. 315° úr Múlanum rv. 315° inn á 8 fj. úr landi.

LOYVDAR TROLLEIDIR 1973 og 1974 fyri fiskifor undir 55 br. reg. t. samlaerl løgtingslóg 1. mai 1973.

1. juni — 31. august.

55. Lán til landskassan

Ár 1975, hósdagin 17. apríl legði Demmus Hentze, landsstýrismaður, fram

Uppskot
til

løgtingslóg um upptøku av landsláni.

§ 1.

Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at taka upp í 50 milj. kr. í láni til tryggjan av rakstrinum.

§ 2.

Henda lóg fær gildi beinanvegin.

lagtingslov om optagelse af et landslån.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at optage indtil 50 mill. kr. i lån til sikring af driften.

§ 2.

Denne lov træder straks i kraft.

Viðmerkingar:

Sambært løgtingslóg nr. 18 frá 11. mai 1970 um upptøku av landsláni fekk landsstýrið landskassans vegna heimild at taka upp í láni 20 milj. kr. til tryggjan av rakstrinum. Henda lántaka var hildin neyðug til tryggjan av rakstrinum, so landið hevði ein forsvarligan likvidan kassabeholdning. Landsstýrið hevði tá ongan kassakredit, og var tí neyðugt at hava rettiliga stóran likviditetsreserva, tá hugsað verður um, at inntøkur og útreiðslur falla heldur ójavnt teir ymsu mánaðarnar í árinum. Samráðst var við føroysku bankarnar og ríkisstýrið um at skipað verð so fyri, at landsstýrið kundi trekkja uppá báðar bankarnar 10 milj. kr. hjá hvorjum, og soleiðis at bankarnir høvdu rætt til um neyðugt at læna aftur frá Nationalbankanum tað, teir til eina og hvorja tíð hava lænt landsstýrinum.

Allir trýggir bankarnir góvu tilsogn um nevndu skipan við tí treyt, at kreditturin í minsta lagi eina ferð um árið er niðri á 0 kr. Beinfan til Nationalbankan var diskonto hansara. Á fundi tann 22. februar 1973 við danska figgjar- og budgetráðharran og umboð fyri Nationalbankan var fingin semja um, at treytin at kreditturin einaferð árliga skuldi niður á 0 verð strikað.

Landsstýrið hevur til ávísar tíðir nýtt umrodda kredit, t.d. 15 milj. kr.

í december 1974. Kreditrammen uppá 20 milj. kr. varð løgd í 1968/69 út frá eini meting um tørv landskassans fyri likviditeti, serliga í vetrarhálvárinum.

Síðani 1968 er farin fram ein sterkur vøkstur máldur í krónum fyri viðurskifti av avgerandi týdningi fyri likviditetstørv landskassans. Sum dømi kann nevnast, at figgjarætlan landskassans fyri figgjarárið 1968/69 er vaksin frá 79 milj. kr. til figgjarárið 1975/76 til 270 milj. kr., t.v.s. meir enn trífaldað. Umframt kann viðmerkjast, at inmflutningur og útflutningur í 1968 vóru ávikavist 154 milj. kr. og 211 milj. kr., meðan tey tilsvarandi tølini í 1974 vóru 486 milj. kr. og 623 milj. kr., t.v.s. um leið trífaldað.

Hesin nevndi vøkstur í figgjarjavnvág landskassans og í utanríkishandlinum hevur fört tað við sær, at broytingarnar í likviditetstørvi landskassans eru nógv størri nú enn í 1968/69. Aftrat hesum kemur, at tann síðani miðjuna av 1974 komna afturgongd í heimsmarknaðinum fyri fisk og fiskavørur hevur fört við sær eitt týðiligt konjunkturafturstig fyri føroyska búskapin. Hesi viðurskifti kunna í tíðarbilinum vøntast at avmergja likviditetsstøðu landskassans so mikið, at tann núgaldandi kreditramma ikki verður nóg stór sum trygdarmargin.

Landsstýrið hevur tí í skrivi frá 26. febr. 1975 heitt á ríkisstýrið um at útvega møguleikar fyri, at ovanfyri nevnda kreditramma verður hækkað til 50 milj. kr. Í skrivi frá 26. mars 1975 hevur ríkisumboðsmaðurin svarað landsstýrinum aftur, at danski tjóðbankin hevur játtað at umsókn landsstýrisins um hækkan av rammuni frá 20 til 50 milj. kr. verður gingin á møti.

Dennus Hentze
landsstýrismaður

/ Jóhan Djurhuus

1. viðgerð 21. apríl og málið beint í figgjarnevndina, sum 22. apríl legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð av landsstýrinum framlagt 17. apríl 1975 og undir 1. viðgerð 21. apríl beint í figgjarnevndina.

Landsstýrið biður um 50 miljóna lániheimild til at tryggja, at landið kemur at hava ein forsvarligan likvidan kassabeholdning.

Slík lántøka er ikki nýggj. Sambært løgtingslóg nr. 18 frá 11. mai 1970 gav løgtingið eina 20 miljóna lániheimild til sama endamál.

Í sínum viðmerkingum vísir landsstýrið á, at tá heuda kreditramma varð løgd í 1968/69, var figgjarætlan landskassans 79 milj. kr. Nú er hon út móti 270 milj. kr.

Innflutnings- og útflutningstølini vóru tá ávikavist 154 milj. kr. og 211 milj. kr., meðan tilsvarandi tølini í 1974 vóru 486 milj. kr. og 623 milj. kr.

Viðurskiftini hava gjørt landskassans likviditets tørv nógv størri.

Tað er í skrívi frá 26. februar 1975, at landsstýrið hevur søkt ríkisstýrið um, at fyrr nevnda kreditramma verður hækkað frá 20 miljónum til 50 miljónir, og hevur ríkisumboðsmaðurin í skrívi frá 26. mars 1975 sagt frá, at umsóknin er játtað.

Annars vísir landsstýrið á, at á fundi tann 22. februar 1973 við danska fíggjar- og budgettráðharran og umboð fyri Nationalbankan var semja um, at fyrrverandi treytin fyri, at slík lántøka einaferð árliga skuldi niður á 0, varð strikað.

Landskassans lánihædd er í dag slakar 145 miljónir kr. (144.971.000), ið gevur eina rentubyrðu uppá umleið 11,5 milj. kr. við 8 procentsrentu í meðal. Á fíggjarlógini eru rentuútreiðslurnar í § 5-0450 settar til 10.880.000 kr., so hesi tøl geva okkum eina ávarðing um, at hesin postur á nýggju fíggjarlógini, ið vit fyri sløkum mánaða síðani hava sett á, ikki kemur at røkka, og samstundis vísa tølini, hvussu dýrt tað er at lána.

Tørvur er á, at neyðugt varsemi verður vístí lántøkum framyvir.

Annars mælir fíggjarnevndin til, tá hetta er sagt, at samtykkja landsstýrisins uppskot, men við hesi broyting:

I § 2 aftaná «heimanvegin» verður sett:	I § 2 indsættes efter «i kraft.»:
«Samstundis fer løgtingslóg nr. 18 frá 11. mai 1970 úr gildi.»	«Samtidig ophæves lagtingslov nr. 18 af 11. maj 1970.»

FÍGGJARNEVNDIN, 22. apríl 1975.

Hákun Djurhuus	Poul J. Olsen	Hilmar Bech
Jógvan Durhuus	Asbjørn Joensen	Pauli Ellefsen
	Signar Hansen	

2. viðgerð 23. apríl.

Gr. 1 samtykt við 23—0.

Broytingaruppskot frá nevndini til gr. 2 samtykt 23—0. Gr. 2 so broytt samtykt 23—0.

Lógaruppskotið so samtykt at fara til 3. viðgerð samtykt við 23—0.

3. viðgerð 23. apríl.

Lógaruppskotið, sum samtykt við 2. viðgerð, nú endaliga samtykt við 22—0.

56. Nýtt prístalsgrundarlag

Ár 1975, fríggjadagin 18. apríl, legði Dúnjal Pauli Danielsen, landsstýrismaður, fram

Uppskot
til

løgtingslóg um prístal.

§ 1.

Við smásøluprísum á vørum, tænastum og bústaðarútreiðslum sum grundarlag, útroknar hagdeildin undir eftirliti av prístalsnevndini eitt prístal, sum hevur juli 1975 = 100.

§ 2.

Prístalsnevndin hevur 5 limir. Sorinskrivarin útnevnir formannin og hinir 4 limirnir verða valdir av landsstýrinum eftir tilmæli frá arbeiðsgevara- og løntakarafeløgum.

2. stk. Nevndin verður vald fyri 4 ár.

3. stk. Landsstýrið fyrisetur samsýningina til nevndarlimirnar.

§ 3.

Prístalið verður útroknað fýra ferðir árliga pr. 1. í hvørjum ársfjórðingi eftir teimum vørumøgdum v.m., sum til eina og hvørja tið eru løggildar av landsstýrinum sum prístalsgrundarlag.

§ 4.

Prísráð Føroya útvegar upplýsingar um smásøluprísin á teimum

lagtingslov om pristal.

§ 1.

På grundlag af oplysninger om om detailpriser på varer, tjenesteydelser og boligudgifter, udregner statistiske afdeling under pristalsudvalgets tilsyn et pristal, som har juli 1975 = 100.

§ 2.

Pristalsudvalget har 5 medlemmer. Sorenskriveren udpeger formanden, medens landsstyret vælger de 4 andre medlemmer efter indstilling af arbejdsgiver- og lønmodtager organisationer.

Stk. 2. Udvalget vælges for 4 år.

Stk. 3. Landsstyret fastsætter vederlaget til udvalgsmedlemmerne.

§ 3.

Pristallet beregnes fire gange om året pr. 1. i hvert kvartal efter de varemængder m.v., som til enhver tid af landsstyret er autoriseret som pristalsbudget.

§ 4.

Færøernes Prisråd indhenter oplysninger om detailpriser på de i

í prístalsgrundarlagnum tilskilaðn vørum v.m.

2. stk. Prísirnir verða settir eftir prísuppgávum frá søluburðum v.m. í mánaðunum februar, mai, august og november. Landsstýrið kann áseta nærri reglur um innsavnan av vøruprísum v.m.

pristalsbudgettet anførte varer m.v.

Stk. 2. Priserne fastsættes efter prisopgaver fra handlende m.v. i månederne februar, maj, august og november. Landsstyret kan fastsætte nærmere bestemmelser om tilvejebringelse af vareprisser m.v.

§ 5.

Ein og hvør, sum eftir § 4, stk. 2, verður kravdur at geva upp prísir á vørum v.m. hevur skyldu at geva hesar upplýsingar innan ásetta tíðarfreist.

2. stk. Hann, sum ikki rættstundis gevur tær upplýsingar, sum kravdar verða eftir 1. stk., ella sum við vilja ella av grovum óskotni gevur skeivar upplýsingar, verður revsaður við bót.

3. stk. Er lógarbrotið gjørt av einum partafelag, lutafelag ella tílíkum, kann felagið sum slíkt fáa bót.

§ 5.

Enhver, der i henhold til § 4, stk. 2, afkræves oplysninger om varepriser m.v. er pligtig at afgive disse oplysninger inden den fastsatte tidsfrist.

Stk. 2. Den, der undlader rettidigt at meddele de oplysninger, der kræves efter stk. 1, eller forsætligt eller ved grov uagtsomhed afgiver urigtige oplysninger, straffes med bøde.

Stk. 3. Er overtrædelsen begået af et aktieselskab, andelsselskab eller lignende, kan der pålægges selskabet som sådant bødeansvar.

§ 6.

Útroknningin av prístalinum skal vera liðugt, áðrenn hvør ársfjórðingur byrjar.

2. stk. Prístalið verður kunngjørt við einum decimali.

3. stk. Prístalið verður nýtt til prístalsjavning, har hetta er ásett í lóg.

§ 6.

Beregninger af pristallet skal være tilendebragt senest ved hvert kvartals begyndelse.

Stk. 2. Pristallet offentliggøres med én decimal.

Stk. 3. Pristallet anvendes ved pristalsreguleringer, hvor sådanne er fastsat ved lov.

§ 7.

Henda lóg kemur í gildi 1. juli 1975. Samstundis fer úr gildi løgtingslóg nr. 28 frá 24. april 1952 um prístal.

2. stk. Prístalið eftir higartíl galdandi lóg verður útroknað seinastu ferð pr. 1. juli 1975.

§ 7.

Denne lov træder i kraft 1. juli 1975. Samtidig ophæves lagtingslov nr. 28 af 24. april 1952 om pristal.

Stk. 2. Pristallet efter hidtil gældende lov beregnes sidste gang pr. 1. juli 1975.

Viðmerkingar:

Eftir løgtingslóg nr. 80 frá 28. november 1963 setti løgtingið 5-manna milluntinganevnd at kanna prístalsgrundarlagið v.m. og geva álit og møgulig uppskot til broytingar. Nevndin gevur sítt álit til landsstýrið, sum so leggur málið fyri løgtingið.

Tann 25. juli 1968 gav nevndin frá sær álit, sum landsstýrið tann 5. februar 1969 legði fyri løgtingið, sbr. løgtingsmál nr. 33/1968 og skjal 3 til løgtingstíðindi 1968.

Nevndin setti fram fógaruppskot um útroknan av prístali, men onki uppskot um nakað nýtt prístalsgrundarlag. Løgtingið samtykti, at nevndin skuldi halda fram við arbeiði sínum og gera uppskot til nýtt prístalsgrundarlag, sum skuldi byggja á kanningar av Løntakarahúsarhaldum í Tórshavn og bygdum og sum gjørdar vóru yvir í mínsta lagi 4 fylgjandi fjórðingsár.

Hesar kanningar fóru fram í tíðarskeiðinum 1. september 1971 til 15. juni 1972 og byggja á húsarhaldsroknskap yvir nýtsluna hjá 47 húsarhaldum.

Innkomna tilfarið hevur hagdeildin hjá Búskaparráðnum viðgjørt og er úrslitið uppgjørt í viðlagda skjali nr. 1.

Síðani 1972, tá húsarhaldsroknskapirnir vóru innsavnaðir, er lutfallsliga nýtslan av onkrum vørusløgum broytt, og her er tað serliga talan um oljuna, sum fór nógv upp seinasta ár.

I nýggja prístalsgrundarlagnum, sum fylgir hjálagt sum skjal 2, eru gjørdar korrigeringar fyri hækkingina í oljuprísinum.

Í skjali 3 og 4 eru gjørdar frágreiðingar um nýggja grundarlagið og uppstillingar yvir procentvísu nýtsluna av ymiskum vørusløgum eftir núgaldandi prístalsgrundarlagi og eftir uppskotinum til nýtt prístalsgrundarlag.

Galdandi lóg um prístal er løgtingslóg nr. 28 frá 24. februar 1972. Eftir hesi lóg verður prístalið útroknað av prísráðnum (3 limir) viðkað við 5 limum, harav ein verður valdur av Føroya Arbeiðarafelag, ein av Havnar Arbeiðsmannafelag og ein av Føroya Fiskimannafelag, Føroya Skipara- og Navigatørfelag og Føroya Motorpassarafelag, ein av Føroya Arbeiðsgevarafelag og Handilsfeløgunum og ein av Føroya Búnaðarfelag. Prístalsgrundarlagið frá 1952 varð lagt eftir 15 húsarhaldsroknskapum frá 1948, sum prísráðið hevði stilað fyri. Ein yntskti framvegis at nýta prístalið pr. 1. juli 1939 = 100 sum basis og vórðu prísirnir tí umroknaðir til 1939 prísir.

Prístalið er nú komið uppá 949 og kemur, áðrenn árið er úti, at nærkast 1.000, ella 10 ferðir 1939 prísir. Hóskandi er tí at nýta 1975 sum skiftiár av prístalinum.

Uppskotið og tey uppskot, sum eru knýtt at hesum uppskoti, hava

verið løgd fyri yrkisfeløgini til ummælis, og eru einstakar broytingar gjørdar í uppskotinum aftaná móttøku av ummælinum.

4 ummæli frá yrkisfeløgum fylgja hjálagt sum skjøl.

Dánjal Pauli Danielsen
landsstýrismaður

/ J. Djurhuus

Sí Skjal 15.

1. viðgerð 18. apríl og málið beint í fíggjarnevndina, sum 22. apríl legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð av landsstýrinum framlagt 18. apríl 1975 og undir 1. viðgerð sama dag beint í fíggjarnevndina.

Landsstýrið gevur í sínum viðmerkingum eina frágreiðing um gongdina í hesum máli og vísir á, at longu 28. november 1963 varð samþykt løgtingslóg nr. 80 sett 5-manna millumtinganevnd til at kanna prístalsgrundarlagið v.m. og geva álit og møgulig uppskot til broytingar.

Hetta álit gevur nevndin frá sær 25. juli 1968 og 5. februar 1969 legði landsstýrið hetta tilfar fyri løgtingið, ið samtykti, at nevndin skuldi halda fram við sínum arbeiði og gera fleiri kanningar.

Nú metir landsstýrið, at komið er so langt á leið við hesum kanningum, at uppskot teimum samsvarandi kann verða framlagt, men nú eru eisini runnin 11-12 ár, síðani løgtingið fór undir at loysa hetta mál.

Upprunaliga varð prístalið sett í byrjanini við prísunum 1. juli 1939 sum grundstøðið = 100.

Nú er prístalið komið upp á 949, og mælir landsstýrið til, at 1975 verður skiftiár, so nýggja lógin kemur í gildi 1. juli 1975, og at løgtingslógin nr. 28 frá 24. apríl 1952 um prístal fer úr gildi.

Prístalið verður av nýggjum sett niður á 100.

Við í mátinum er sum skjal 1: roknskapur prístúsarhaldsins 1. januar 1972 — 5,8 fólk í húsi.

Sum skjal 2: uppskot til nýtt prístalsgrundarlag.

Sum skjal 3: frágreiðing til prístalsgrundarlagið og ein samanburður av uppskotinum og nýtsluprístalinum í Danmark, Íslandi og Noregi.

Sum skjal 4: procentvís nýtsla av ymsum vørusløgum eftir galdandi prístalsgrundarlagi og eftir uppskotinum til nýtt grundarlag.

Og harafturat 4 ummæli frá yrkisfeløgum. Eitt ummæli frá Føroya arbeiðarafelag, Havnar Arbeiðsmannafelag, Føroya Handverkarafelag, S & K, Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag, Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag og Havnar Arbeiðskvinnufelag.

Eitt ummæli frá: Meginfelag Starvs- og tenastumanna.

Eitt ummæli frá: Føroya Arbeiðsgevarafelag og

eitt ummæli frá Føroya Fiskimannafelag.

Í skjali 3: frágreiðing til prístalsgrundarlagið verður á síðu 3 ásannað, at grundarlagið ikki er tað besta, men verður víst til, hvat «Statistisk Departement» sigur um prístalið frá 1948, at teir hildu tá fyriliggjandi roknskapartilfar vera veikt, og vísa tørvin til nýggjar brúkarakannningar, men hildu tilfarið tó sum grundstøðið fyri prístalsútrokningum vera betri enn tað, ið hevði verið frammanundan.

Á sama hátt verður mett um av landsstýrinum, at talfar frá 47 húsarhaldum er betri enn tilfarið frá 15 húsarhaldum, ið higartil hevur verið nýtt.

Fíggjarnevndin tekur undir við, at fyriliggjandi varunøgdargrundarlag til útrokning av prístalinum nú verður samtykt, men at nýggja mannagongdin viðvíkjandi útrokningini, ið yrkisfeløg hava funnist at, verður óhroytt á tann hátt, at yrkisfeløgini sum higartil eru við til at útrokna prístalið, og at nýggja prísráðið møguliga verður økt, so fleiri feløg verða umboðað.

At tørvurin er fyri hesum, júst tá tað verður ásannað, at prístalsútrokningargrundarlagið enn er heldur ófullfíggjað, sigur seg sjálvt.

Samstundis sum hetta verður gjørt, eiga limirnir í prístalsútrokningarnevndini sínámillum at velja einar 3-4 limir, ið beinleiðis eru við til at gera sjálva útrokningina.

Útrokningin við øllum skjølum verður so at leggja fyri samlaðu prístalsútrokningarnevndina til samtyktar.

Eisini hevur fíggjarnevndin ta áskoðan, at umhugsaðar eiga at verða nærri reglur fyri ajourføring av prístalsgrundarlagnum.

Ein fullsamd prístalsútrokningarnevnd hevur heimild til at gera uppskot, til neyðugar broytingar til ajourføring, ið landsstýrið skuldi hava heimild at góðkenna, men væl at merkja, í ongum fari tá talan kann vera um priusiphroytingar, ið altíð eiga at fáa løgtingsviðgerð.

Vísandi hertil verður til uppskot landsstýrisins av meirilutanum (Hákun Djurhuus, Poul Jacob Olsen, Paula Ellefsen, Hilmar Beck og Asbjørn Joensen) sett fram fylgjandi

Broytingaruppskot

1) Í § 1 verða orðini «útroknar hagdeildin undir eftirliti av prístalsnevndini» broytt til: «útroknar prístalsnevndin við neyðugari hjálp frá hagdeildini.»

2) § 2, 1. stk., verður orðað soleiðis: «Í prístalsnevndini situr prísausingarráðið, viðkað við 5 limum, harav 1 verður valdur av Føroya Arbeiðarafelag, 1 av Havnar Arbeiðsmannafelag, 1 av Føroya Fiskimannafelag, Føroya Skiparafelag og Føroya Motorpassarafelag, 1 av Føroya Arbeiðsgevarafelag og Handilsfeløgunum og 1 av Føroya Búnaðarfelag.»

3) § 2, 2. stk., gongur út og núverandi 3. stk. verður 2. stk.

1) I § 1 ændres ordene «udregner statistisk afdeling under prisudvalgets tilsyn» til: «udregner pristalsudvalget med nødvendig assistance af statistisk afdeling.»

2) § 2, stk. 1, affattes således: «Pristalsudvalget består af priskontrolrådet, udvidet med 5 medlemmer, hvoraf 1 medlem vælges af Føroya Arbeiðarafelag, 1 af Havnar Arbeiðsmannafelag, 1 medlem af Føroya Fiskimannafelag, Føroya Skipara- og Navigatørfelag og Føroya Motorpassarafelag, 1 medlem af Føroya Arbeiðsgevarafelag og de handlendes forening og 1 medlem af Føroya Búnaðarfelag.»

3) § 2, stk. 2, udgår og nuværende stk. 3 bliver stk. 2.

Minnilutin (Jógvan Durhuus og Signar Hansen) mælir til at samtykkja landsstýrisins uppskot.

FÍGGJARNEVNDIN, 22. apríl 1975.

Hákun Djurhuus
Jógvan Durhuus
Poul Jacob Olsen
Signar Hansen
Asbjørn Joensen
Pauli Ellefsen
Hilmar Beck

2. viðgerð 23. apríl. Málið beint aftur í fíggjarnevndina, ið 23. apríl legði fram soljóðandi

Broytingaruppskot

Undir umrøðuni við 2. viðgerð av málinum, beindi formaðurin í fíggjarnevndini málið aftur í nevnd av tí, at ein misskiljing var komin í.

Fíggjarnevndin hevur av nýggjum umhugsað málið, og mælir meirilutin (Hákun Djurhuus, Poul J. Olsen, Hilmar Beck, Asbjørn Joensen og

Pauli Ellefsen) til, at § 1 í landsstýrisins uppskoti verður broytt, sum av meirilutanum í nevndini mælt til, og at § 2 í landsstýrisins uppskoti verður broytt á tann hátt, talið 5 í fyrstu regla í 1. stk. verður sett til 7 og talið 4 í triðju reglu í sama stykki verður sett til 6.

2. stk. í landsstýrisins uppskoti undir § 2 verður óbroytt og somuleiðis 3. stk.

2) punkt og 3) punkt í fíggjarnevndarinnar broytingaruppskoti verða afturtikin, men sum nýtt 2) punkt verður sett: 2) í § 2, 1. stk. verða tølini í fyrstu reglu og triðju reglu broytt til 7 í staðin fyri 5 og 6 í staðin fyri 4.

Vísandi hertil setur meirilutin fram fylgjandi

Broytingaruppskot
til uppskot landsstýrisins

í § 2, 1. stk. verður «5 limir» og «4 limir» broytt til ávikavist «7 limir» og «6 limir».	I § 2, stk. 1, ændres «5 medlemmer» og «4 andre medlemmer» til henholdsvis «7 medlemmer» og «6 andre medlemmer».

Minnilutin (Jógvan Durhuus og Signar Hansen) mælir til at samtykkja landsstýrisins uppskot óbroytt.

FIGGJARNEVNDIN, 23. apríl 1975.

Hákun Djurhuus	Poul J. Olsen	Hilmar Beck
Jógvan Durhuus	Asbjørn Joensen	Pauli Ellefsen
	Signar Hansen	

Framhald av 2. viðgerð 23. apríl (kl. 16.30).

Broytingaruppskot (álit II) frá meirihluta í fíggjarnevndini í áliti I til gr. 1 samtykt við 14—0.

Gr. 1 soleiðis broytt samtykt við 22—0.

Broytingaruppskot til gr. 2 fall við 13—0.

Gr. 2-3-4-5-6-7 samtyktar við 23—0.

At lógin í hesum liki kann fara til 3. viðgerð varð samtykt við 24—0.

3. viðgerð 24. apríl.

Lógin sum samtykt við 2. viðgerð nú endaliga samtykt við 25—0.

57. Broyting í lóg um samsýning løgtingsmanna

Ár 1975, friggjadagin 18. apríl, legði Atli Dam, løgmaður, fram

Uppskot
til

løgtingslóg um broytingar í løgtingslóg um samsýning løgtingsmanna.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 38 frá 5. august 1971 um samsýning løgtingsmanna verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 7, 1. stk. verður orðað soleiðis:
«Fyri hvørji 3 stig, prístalið hækkar í mun til prístalið 100, verður tann pr. 30. september 1975 galdandi samsýning eftir § 1, 1. stk. hækkað ella lækkað við 1.260 kr. Biðipeningurin (viðbøtur viðroknaðar) verður hækkaður ella lækkaður við 3% fyri hvørji 3 stig, prístalið broytist í mun til prístalið 100.»
2) § 6, stk. 3 verður orðað soleiðis:
«Dýrtíðarviðgerðin fer fram hvønn ársfjórðing eftir prístalinum 1. í ársfjórðinginum.»

§ 2.

Hendan lóg kemur í gildi 1. oktober 1975.

lagtingslov om ændringer i lagtingslov om vederlag til lagtingsmænd.

§ 1.

I lagtingslov nr. 38 af 5. august 1971 om vederlag til lagtingsmænd, foretages følgende ændringer:

1) § 7, stk. 1 affattes således:

«For hver 3 points stigning i pristallet ud over 100, forhøjes eller nedsættes de pr. 30. september 1975 gældende vederlag efter § 1, stk. 1 med 1.260 kr. Ventepengene (incl. tillæg) forhøjes eller nedsættes med 3% for hver 3 points udsving i pristallet ud over 100.»

2) § 6, stk. 3 affattes således:

«Dyrtidsreguleringen foretages hvert kvartal efter pristallet den 1. i kvartalet.»

§ 2.

Denne lov træder i kraft 1. oktober 1975.

Viðmerkingar:

Fyriliggjandi uppskot til broyting í lóg um samsýning løgtingsmanna

F.L. j. nr. 103-1-4. — Sí eisini løgtingslóg nr. 40/1975.

er ein fylgja av lógaruppskotum, ið samstundis eru løgd fyri tingið um nýtt pristalsgrundarlag og eins dýrtíðarviðbót í krónum og øyrum av øllum lønum.

1. viðgerð 18. apríl og málið beint í fíggjarnevndina, sum 22. apríl legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð av landsstýrinum framlagt 18. apríl 1975 og undir 1. viðgerð sama dag beint í fíggjarnevndina.

Ein samd fíggjarnevnd mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

FÍGGJARNEVNDIN, 22. apríl 1975.

2. viðgerð 23. apríl.

Gr. 1 samtykt 23—0.

Alt lógaruppskotið og at fara til 3. viðgerð samt. 23—0.

3. viðgerð 24. apríl.

Fraulagt broytingaruppskot frá fíggjarnevndini soljóðandi:

Í staðin fyri § 1, nr. 1 verður sett:

1) § 7, 1. stk. verður orðað soleiðis:

«Fyri hvørji 3 stig, pristalið er omanfyri 100, verður taum pr. 30. september 1975 galdandi samsýning eftir § 1, 1. stk. hækkað við 1260 kr. Biðipeningurin (viðbøtur viðroknaður) verður hækkaður við 3% fyri hvørji 3 stig, pristalið broytist í mun til pristalið 100. Fellur pristalið niður um 100, verður ongin pristalsviðgerð.»

I stedet for § 1, nr. 1 sættes:

1) § 7, stk. 1 affattes således:

«For hver 3 point pristallet overstiger 100, forhøjes de pr. 30. september 1975 gældende vederlag efter § 1, stk. 1 med 1.260 kr. Ventepengene (incl. tillæg) forhøjes eller nedsættes med 3% for hver 3 points udsving i pristallet ud over 100. Falder pristallet ned under 100, finder ingen pristalsbehandling sted.»

Framlagt broytingaruppskot frá Hilmar Kass o.fl. soljóðandi:

Í § 1, nr. 1, verður «hvørji 3 stig» í báðum støðum broytt til «hvørt stig», «1.260 kr.» broytt til «420 kr.» og «3%» broytt til «1%».	I § 1, nr. 1, ændres «hver 3 points» til «hvert points» begge steder, «1.260 kr.» til «420 kr.» og «3%» til «1%».

Broytingaruppskotið frá nevndini samtykt við 25--0.
Broytingaruppskotið frá Hilmar Kass o.f. fall 8--0.
Lógin soleiðis broytt endaliga samtykt við 26--0.

---

58. Kannan av lóggávuni um príseftirlit

Ár 1975, fríggjadagin 18. apríl legði Dánjal Pauli Danielsen, landsstýrismaður, fram

Uppskot
til

løgtingslóg um nevnd til kannan av lóggávuni um príseftirlit.	**lagtingslov om udvalg til revision af lovgivningen om priskontrol.**
§ 1.	§ 1.
Landsstýrið verður heimilað at seta 5-mannanevnd til kanningar av lóggávuni um príseftirlit.	Landsstyret bemyndiges til at nedsætte et udvalg med 5 medlemmer til revision af lovgivningen om priskontrol.
2. stk. Nevndin gevur frágreiðing og tilmæli til landsstýrið og skal hava lokið arbeiði sítt innan 1. oktober 1975.	**Stk. 2.** Udvalget afgiver betænkning og indstilling til landsstyret senest 1. oktober 1975.
§ 2.	§ 2.
Tær útreiðslur, ið standast av	Udgifterne i forbindelse med

F.L. j. nr. 1115-22. - Sí eisini Ll. nr. 39/1975.

nevndararbeiðinum, verða goldnar úr landskassanum.

§ 3.

Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

udvalgsarbejdet afholdes af landskassen.

§ 3.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Galdandi lóg um eftirlit við prísum og prísviðurskiftum er løgtingslóg nr. 25 frá 24. april 1952 um valuta og prísir. Lógin verður umsitin av Valuta- og prísráðnum. Ráðið hevur tríggjar limir. Landsstýrið velur formannin og hinar tveir eftir tilnæli frá fíggjarnevndini. Aðrenn avgerðir um m.a. hámarksprísir, hámarksgjøld og aðrar týdningarmiklar avgerðir verða tiknar, eigur ráðið at søkja sær ráð hjá umboðum fyri nøkrum nærri tilskiluðum yrkisfeløgum.

Í skrivum frá januar í ár hava arbeiðsmannafeløg, hondverkarafeløg og fiskimannafeløg søkt um at fáa umboðan í prísráðnum.

Lógin frá 1952 avloysir tær skipanir, sum vóru galdandi undir og beint aftaná seinna heimsbardaga, har óvanlig viðurskifti ráddu. Í endamálsgreinini verður sagt, at dentur eigur at verða lagdur á so normal prísviðurskifti sum gjørligt fyri at nærkast aftur til vanligar tíðir.

Eingin ivi er um, at ráðið hevur havt sín týdning at fyribyrgja órimiligar prísir, men eingin ivi er heldur um, at okkara lógargrundarlag at arbeiða eftir á hesum øki ikki kann sigast at vera tíðarhóskandi longur, tá hugsað verður um, hvussu hesi viðurskifti vera umsitin í okkara grannaloundum. Í Danmark er t.d. galdandi lóg um monopolir, lóg um prísir og vinningar, lógir um marknaðarføring, sum gevur heimild til at seta ein forbrúkaraumboðsmann, eins og stovnað eru forbrúkararáð við almennum stuðuli.

Vísandi hertil og tá tað má haldast at vera rætt, at umboð fyri yrkisfeløg og forbrúkarar verða umboðað í prísráðnum, heldur landsstýrið tað verða tørv á einari kanning av galdandi lóg.

Í nevndina kundi landsstýrið hugsað sær at valt umboð fyri lønmóttakarar, forbrúkarar (kvinnufelagsskipanin), arbeiðsgevarar og handil.

1. viðgerð 18. april og málið beint í fíggjarnevndina, sum 22. april legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð av landsstýrinum framlagt 18. april 1975 og undir 1. viðgerð sama dag beint í fíggjarnevndina.

Tað er kanningar av lóggávuni um priseftirlit, ið landsstýrið heldur tørva eina endurskoðan, so vit fáa eina nýggja lóggávu á hesum øki, ið betur samsvarar við tíðarinnar krøv.

Landsstýrið vísir á tilsvarandi lóggávu í okkara grannalondum, har galdandi eru lógir um monopolir, prísir og vinningar og lógir um marknaðarføring, sum gevur heimild til at seta eitt forbrúkaraumboðsmann, eins og stovnað eru har forbrúkararáð við almennum stuðli.

Nú má ásannast, at mangt, ið miljónsamfeløgini hava, ikki jást er lívið um at gera fyri okkara lítla samfelag at taka undir við eftir sama mynstri. Helst eiga vit at skapa tað, ið skal verða okkara eftir okkara tørvi og fíggjarligu beriorkan.

At okkara lóggáva frá 1952 hesum øki viðvikjandi hevur fyri neyðini at verða endurskoðað, tekur fíggjarnevndin fult undir við landsstýrinum í, men mælir til, at tann 5-manna millumtinganevnd, ið landsstýrið hevur í uppskoti at seta, verður vald soleiðis, at landsstýrið velur 2 av limunum, har av annar er nevndarformaður og løgtingið hinar tríggjar limirnar.

At henda lóggáva verður tilevnað soleiðis, at hon verður eitt vælegnað tól í hondunum á yrkisfeløgum og forbrúkarum, so prístegan kann verða hildin í rímiligari hædd, sigur seg sjálvt.

Fíggjarnevndin mælir til at samtykkja landsstýrisins uppskot við hesum uppiskoyti til § 1, 1. stk.:

Aftaná priseftirlit verður sett:

«Landsstýrið setur 2 av nevndarlimunum, harav annar er formaður, og 3 eftir tilmæli frá løgtinginum.»

2. viðgerð 23. apríl.

Broytingaruppskot til gr. 1 samtykt við 21 - 0.
Gr. 2. og 3 samtyktar u. atkvgr.
At lógin í hesum líki kann fara til 3. viðgerð samtykt við 21– 0.

3. viðgerð 24. apríl.

Lógaruppskotið sum samtykt við 2. viðgerð, nú endaliga samtykt 25- 0.

---

59. Broyting í lóg um samsýning landsstýrismanna

Ár 1975, friggjadagin 18. apríl, legði Atli Dam, løgmaður, fram

Uppskot
til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um samsýning landsstýrismanna.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 39 frá 5. august 1971 um samsýning landsstýrismanna verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 4, 1. stk. verður orðað soleiðis:

«Samsýningin (dýrtíðarviðbót viðroknað) verður hækkað við kr. 1.260,00 fyri byørji 3 stig prístalið hækkar í mun til prístalið 100. Biðipeningur verður dýrtíðarviðgjørdur á sama hátt, tó soleiðis, at her einstøku dýrtíðarviðbøturnar hægst kunnu vera 3% av grundpeninginum.»

2) § 4, 3. stk. verður orðað soleiðis:

«Dýrtíðarviðgerðin fer fram hvønn ársfjórðing eftir prístalinum 1. í ársfjórðinginum.»

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi 1. oktober 1975.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om vederlag til landsstyresmænd.

§ 1.

I lagtingslov nr. 39 af 5. august 1971 om vederlag til landsstyresmænd foretages følgende ændringer:

1) § 1, stk. 1 affattes således:

«Vederlaget (inclusive dyrtidstillæg) forhøjes med kr. 1.260,- for hver 3 points stigning i pristallet ud over 100. Ventepengene dyrtidsreguleres på samme måde, dog således, at de enkelte dyrtidsportioner højest kan andrage 3% af grundbeløbet.»

2) § 4, stk. 3 affattes således:

«Dyrtidsreguleringen foretages hvert kvartal efter pristallet den 1. i kvartalet.»

§ 2.

Denne lov træder i kraft 1. oktober 1975.

Viðmerkingar:

Fyriliggjandi uppskot til broyting í lóg um samsýning landsstýrismanna er ein fylgja av lógaruppskotum ið samstundis eru løgd fyri tingið um nýtt

pristalsgrundarlag og eins dýrtíðarviðbót í krónum og oyrum av øllum løntum.

1. viðgerð 18. april og málið beint í fíggjarnevndina, sum 22. april legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð framlagt av landsstýrinum 18. april 1975 og undir 1. viðgerð sama dag beint í fíggjarnevndina.

Ein samd fíggjarnevnd mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 23. april.

Gr. 1 í lógaruppskotinum samtykt 23—0. Øll lógin og at fara til 3. viðgerð samtykt 23—0.

3. viðgerð 24. april.

Framlagt broytingaruppskot frá fíggjarnevndini, soljóðandi:

Í staðin fyri § 1, nr. 1 verður sett:	I stedet for § 1, nr. 1 sættes:
«1) § 4, 1. stk. verður orðað soleiðis: «Samsýningin (dýrtíðarviðbót viðroknað) verður hækkað við kr. 1.260,00 fyri hvørji 3 stig, pristalið er onnanfyri 100. Biðipenimgur verður dýrtíðarviðgjørdur á sama hátt, tó soleiðis, at tær einstøku dýrtíðarviðbøturnar hægst kunnu verða 3% av grundpeninginum. Fellur pristalið niður um 100, verður ongin pristalsviðgerð.»	«1) § 4, stk. 1 affattes således: «Vederlaget (inclusive dyrtidstillæg) forhøjes med kr. 1.260,00 for hver 3 point, pristallet overstiger 100. Ventepengene dyrtidsreguleres på samme måde, dog således, at de enkelte dyrtidsportioner højst kan andrage 3% af grundbeløbet. Falder pristallet ned under 100, finder ingen pristalsbehandling sted.»

Framlagt broytingaruppskot frá Hilmar Kass o.fl., soljóðandi:

Í § 1, nr. 1, verður «kr. 1.260,00» **broytt til «kr. 420,00»,** «hvørji 3 stig» broytt til «hvort stig» og «3%» broytt til «1%».	I § 1, nr. 1, ændres «kr. 1.260,00» til «kr. 420,00», «hver 3 points» til «hvert points» og «3%» til «1%».

Broytingaruppskotið frá fíggjarnevndini samtykt við 25—0.
Broytingaruppskotið frá Hilmar Kass o.fl. fall 7—0.
Lógaruppskotið soleiðis broytt samtykt við 26—0.

---

60. Broyting í lóg um tænastumannalønir v.m. og flokking av tænastumannastørvum

Ár 1975, fríggjadagin 18. apríl legði Atli Dam, løgmaður, fram

Uppskot
til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um tænastumannalønir v.m. og flokking av tænastumannastørvum.	**lagtingslov om ændring i lagtingslov om tjenestemandsløninger og klassificering af tjenestemandsstillinger.**
§ 1.	§ 1.
Í løgtingslóg nr. 37 frá 5. august 1971 um tænastumannalønir v.m. og flokking av tænastumanna-	I lagtingslov nr. 37 af 5. august 1971 om tjenestemandsløninger og klassificering af tjenestemands-

F.L.j. nr. 390-3-1. — Sí eisini Ll. nr. 40/1975.

størvum verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 4 verður orðað soleiðis:
«Fyri hvørji 3 stig, prístalið hækkar í mun til prístalið 100, verða lær pr. 30. september 1975 galdandi ársløgur hækkaðar við kr. 1.260,00.»

2) § 5 verður orðað soleiðis:
«Løgurnar verða dýrtíðarviðgjørdar hvønn ársfjórðing eftir prístalinum 1. í ársfjórðinginum.»

3) § 12 verður orðað soleiðis:
«Tær í § 11 galdandi viðbøtur — dýrtíðarviðbót pr. 30. september 1975 viðroknað — verða javnaðar eftir avtalu, sbr. § 31 í løgtingslóg um tænastumenn landsins.»

4) § 12, 2. stk. gongur út.

§ 2.
Henda lóg kemur í gildi 1. oktober 1975.

stillinger foretages følgende ændringer:

1) § 4 affattes således:
«For hver 3 points stigning i pristallet ud over 100 forhøjes de pr. 30. september med kr. 1.260,00.»

2) § 5 affattes således:
«Løningerne dyrtidsreguleres hvert kvartal efter pristallet den 1. i kvartalet.»

3) § 12 affattes således:
«De i § 11 gældende tillæg — dyrtidstillæg pr. 30. september 1975 medregnet — reguleres efter aftale, jfr. § 31 i lagtingslov om landets tjenestemænd.»

4) § 12, stk. 2 udgår.

§ 2.
Denne lov træder i kraft 1. oktober 1975.

Viðmerkingar:

Tænastumannaløgur og starvsmannaløgur verða dýrtíðarviðgjørdar procentvís, soleiðis at fyri hvørji 12 stig prístalið broytist verða løgurnar hækkaðar ella lækkaðar við 3% av grundløgini. Ein sum t.d. hevur 3 ferðir so stóra grundløn sum ein annar fær sostatt 3 ferðir so stóra dýrtíðarviðbót í krónum og oyrum.

Eftir § 7 í samgongusáttmálanum millum landsstýrisflokkarnar skal prístalsskipanin broytast soleiðis, at prísjavningin gevur løgarslattunum sama endurgjald í krónum fyri prishækking, sum stundis sum nýtt prístalsgrundarlag verður at taka í nýtslu í 1975 við grundtali 100.

Í uppskoti til nýggja lóg um dýrtíðarviðgerð av arbeiðsløn, er hvør dýrtíðarviðbót sett til 60 oyru og tá árstímatalið hjá tænastumonnum og starvsmonnum vanliga verður sett til 2100, er hvør dýrtíðarviðbót sett til kr. 1,260,- . Við procentvísari dýrtíðarviðgerð hevði hvør dýrtíðarviðbót

givið frá kr. 1.838,— til kr. 5.744,— til ávikavist hægst- og lægstløntu tænastumenn.

1. viðgerð 18. apríl og málið beint í fíggjarnevndina, sum 22. apríl legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð 18. apríl 1975 framlagt av landsstýrinum og undir 1. viðgerð sama dag beint í fíggjarnevndina.

Ein samd fíggjarnevnd mælir løgtingimum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

FÍGGJARNEVNDIN, 22. apríl 1975.

Hákun Djurhuus	Poul J. Olsen	Hilmar Beck
Jógvan Durhuus	Signar Hansen	Asbjørn Joensen
	Pauli Ellefsen	

2. viðgerð 23. apríl.

Gr. 1 samtykt 22—0. Alt lógaruppskotið og at fara til 3. viðgerð samtykt 22—0.

3. viðgerð 24. apríl.

Framlagt varð broytingaruppskot frá fíggjarnevndini til gr. 1, soljóðandi:

Í staðin fyri § 1, nr. 1 verður sett:	I stedet for § 1, nr. 1 sættes:
1) § 4 verður orðað soleiðis: «Fyri hvørji 3 stig, prístalið er omanfyri 100, verða fær pr. 30. september 1975 galdandi árslønir hækkaðar við kr. 1.260,00. Fellur prístalið niður um 100, verður ongin prístalsviðgerð.»	1) § 4 affattes således: «For hver 3 point pristallet overstiger 100, forhøjes de pr. 30. september 1975 gældende årslønninger med kr. 1.260,00. Falder pristallet ned under 100, finder ingen pristalsbehandling sted.»

Á FØROYA LØGTINGI, 24. apríl 1975.

Framlagt var broytingaruppskot frá Hilmar Kass o.fl. til gr. 1, soljóðandi:

I § 1, nr. 1, verður «hvørji 3 stig» broytt til «hvørt stig» og «kr. 1.260,00» broytt til «kr. 420,00».	I § 1, nr. 1, ændres «hver 3 points» til «hver points» og «kr. 1,260,00» til «kr. 420,00».

Broytingaruppskotið frá figgjarnevndini samtykt við 25—0.

Broytingaruppskot frá Hilmar Kass o.fl. fall 7—0.

Lógaruppskotið soleiðis broytt samtykt 26—0.

---

61. Broyting í lóg um tænastumannalønir

Ár 1975, fríggjadagin 18. apríl legði Atli Dam, løgmaður, fram

Uppskot
til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um tænastumannaeftirlønir.	**lagtingslov om ændring i lagtingslov om tjenestemandspensioner.**
§ 1.	§ 1.
I løgtingslóg nr. 32 frá 5. juli 1971 um tænastumannaeftirlønir verður gjørd hetta broyting:	I lagtingslov nr. 32 af 5. juli 1971 om tjenestemandspensioner foretages følgende ændringer:
I § 26, 1. stk. verður aftaná «tænastumannalønir» sett:	I § 26, stk. 1 indsættes efter «tjenestemandslønninger»:
«— tó soleiðis, at tær einsløku	«— dog således at de enkelte

F.L. j. nr. 390-3-11. — Sí eisini løgtingslóg nr. 35/1975.

dýrtíðarviðbøturnar hægst kunnu vera 3% av grundeftirlønini.»

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi 1. oktober 1975.

dyrtindsportioner højest kan andrage 3% af grundpensionen.»

§ 2.

Denne lov træder i kraft 1. oktober 1975.

Viðmerkingar:

Eftir § 26 í løgtingslóg nr. 32 frá 5. juli 1971 um tænastumannaeftirlønir verða eftirlønir og eftirsitulønir dýrtíðarjavnaðar eftir sonnu reglum, sum tænastumannalønir, t.v.s. við procentvísari dýrtíðarjavning.

Nú uppskotið er sett fram um eins dýrtíðarjavning av øllum tænastumannalønum við sama krónutali, vil dýrtíðarjavningin av eftirlønum og eftirsitulønum fara fram á sama hátt, men tá tað finnast tænastumannaeftirlønir við so lítlari grundløn, at tann broytta dýrtíðarviðgerðin (fast krónutal) vil geva eina hægri dýrtíðarviðhót enn eftir higartil galdandi procentvísari dýrtíðarjavning, verður skotið upp, at broyta lógina soleiðis, at dýrtíðarviðgerðin ikki kann vera hægri enn 3% av grundeftirlønini (grundeftirløn + dýrtíðarviðbót pr. 1. apríl 1975).

1. viðgerð 18. apríl og málið beint í fíggjarnevndina, sum 22. apríl legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð av landsstýrinum framlagt 18. apríl 1975 og undir 1. viðgerð sama dag beint í fíggjarnevndina.

Ein samd fíggjarnevnd mælir løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 23. apríl.

Gr. 1 samtykt 23—0. Alt lógaruppskotið og lógin at fara til 3. viðgerð, samtykt 23—0.

3. viðgerð 24. apríl.

Framlagt varð broytingaruppskot frá Hilmar Kass o.fl. soljóðandi:

Í § 1 verður «3%» broytt til «1%».	I § 1 ændres «3%» til «1%».

Broytingaruppskotið frá Hilmar Kass o.fl. til gr. 1 fall við 6—0.

Lógaruppskotið sum samtykt við 2. viðgerð nú samtykt við 25—0.

62. Løgtingslóg um prístalsviðgerð av arbeiðsløn

Ár 1975, friggjadagin 18. apríl legði Jákup Lindenskov, landsstýrismaður, fram

Uppskot
til

løgtingslóg um prístalsviðgerð av arbeiðsløn.

§ 1.

Í øllum arbeiðsviðurskiftum har arbeiðsløn eftir siðvenju, sáttmála ella gerðardómi verður dýrtíðarviðgjørd eftir prístalinum, verður tann pr. 30. september 1975 galdandi tímaløn at hækka við 60 oyrum fyri hvørji full 3 stig prístalið hækkar í mun til prístalið 100. Fellur prístalið niður um 100, verður ongin prístalsviðgerð.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi 1. oktober 1975 og samstundis fer úr gildi løgtingslóg nr. 21 frá 16. mai 1961 við seinni broytingum av prístalsviðgerð av arbeiðsløn.

lagtingslov om pristalsbehandlinger af arbejdslønninger.

§ 1.

I alle arbejdsforhold, hvor arbejdslønnen i henhold til sædvane, kontrakt eller voldgiftsdom bliver dyrtidsreguleret efter pristallet, bliver den pr. 30. september 1975 gældende timeløn at forhøje med 60 øre for hver fulde 3 points stigning i pristallet ud over 100. Falder pristallet ned under 100, finder ingen pristalsbehandling sted.

§ 2.

Denne lov træder i kraft 1. oktober 1975 og samtidig ophæves lagtingslov nr. 21 af 16. mai 1961 med senere ændringer om pristalsbehandling af arbejdslønninger.

Viðmerkingar:

Fyriliggjandi uppskot til nýggja lóg um prístalsviðgerð av arbeiðsløn er eitt fylgja av lógaruppskoti, ið samstundis er lagt fyri tingið, um nýtt prístalsgrundarlag, har prístalið pr. 1. juli 1975 verður sett til 100.

Eftir galdandi lóg nr. 21 frá 16. mai 1961 við seinni broytingum um prístalsviðgerð av arbeiðsløn, verða tímalønir hjá verkafólki hækkaðar ella lækkaðar við 1,30 oyrum fyri hvørt prístalsstig. Hevði prístalið, sum

F.L. j. nr. 1300-6-3. — Sí eisini Lí. nr. 36/1975.

nú er 949 verið sett aftur til 100, uttan at broyta prístalsgrundarlagið, skuldi hvørt stig givið 13,8 oyru í prístalsviðbót. Tímalønin hjá arbeiðsmonnum fyri hvørt vanligt arbeiði er í dag 19,57 kr. um tíman. Skuldi dýrtíðarviðbótin svara til prosentvísu hækkingina av prístalinum, skuldi hvørt stig givið 19,57 oyru.

Landsstýrið hevur samtykt at skjóta upp, at seta hvørja dýrtíðarviðbót til 60 oyru fyri hvørji 3 stig. Fellur prístalið niður um 100, dettur dýrtíðarviðgerðin burtur.

1. viðgerð 18. apríl og málið beint í lógarnevndina, sum 23. apríl (kl. 10.00) legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð av landsstýrinum lagt fyri løgtingið 18. apríl 1975 og varð undir fyrstu viðgerð sama dag beint í lógarnevndina.

Lógin, sum nú er í gildi viðvíkjandi prístalsviðgerð av arbeiðsløn er frá 16. mai 1961 við seinni broytingum. Henda lógin fellur burtur, tá ið landsstýrisins lógaruppskot kemur í gildi 1. oktober 1975.

Lógaruppskot landsstýrisins umfatar arbeiðsmannalønir, handverkaralønir, lærlingalønir og yvirhøvur løn, sum latnar verða eftir siðvenju, sáttmála ella gerðadómi. Hesar lønir verða dýrtíðarviðgjørdar eftir prístalinum soleiðis, at eftir tann 30. september í ár fer tann tá galdandi timalønin at hækka 60 oyru fyri hvørji full 3 stig, ið prístalið fer upp um 100. Fer prístalið niður um 100 stig, verður eingin dýrtíðarviðbót latin.

Sum er, við núverandi prístalsviðger og núverandi prístalsgrundarlag, fylgir hin prístalsviðgjørdi lønarvøkstur arbeiðsmanna ikki við í tí procentvísa prísvøkstrinum. Prístalsviðgerð sum skotin upp av landsstýrinum skuldi komið at bøtt um hetta.

Tí mælir lógarnevndin løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 23. august (kl. 16.30).

Gr. 1 og 2 samtyktar 23—0. At lógin í hesum líki kann fara til 3. viðgerð samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

3. viðgerð 24. apríl.

Framlagt broytingaruppskot frá lógarnevndini, soljóðandi:

I § 1 verður orðið «hækkar» broytt til «broytist».	I § 1 ændres ordet «stigning» til «udsving».

Framlagt broytingaruppskot frá Hilmar Kass, Kj. Mohr, Agnar Nielsen og Jákup Mortensen til gr. 1, soljóðandi:

I § 1 verður «60 oyru» broytt til «20 oyru» og «hvørji full 3 stig» broytt til «hvørt stig».	I § 1 ændres «60 øre» til «20 øre» og «hver fulde 3 points» til «hver points».

Broytingaruppskotið frá lógarnevndini samtykt við 26—0.

Um broytingaruppskot frá Hilmar Kass v.fl. varð atkvøtt við navnakall, soleiðis:

Ja atkvøddu: Agnar Nielsen, Hilmar Kass, Asbjørn Joensen, Jákup Mortensen, Jógvan Olsen, Johs. Olsen, Sverri Midjord, Kj. Mohr = 8.

Atkvøddu ikki: Hilmar Bech, Heðin Klein, Signar Hansen, Jona Henriksen, Jógvan Sundstein, Óli Breckmann, E. Arge, H. Djurhuus, V. Nielsen, Pauli Ellefsen, Tórálvur Olsen, Poul J. Olsen, Haldor Hansen, E. Paturssen, J. Durhuus, Ove Mikkelsen, Johan Simonsen, J. Fr. Øregaard = 18.

Uppskotið soleiðis burturdottið 8—0.

Lógaruppskotið so broytt endaliga samtykt 26—0.

63. Broyting í lóg um minstuløn v.m.

Ár 1975, friggjadagin 18. apríl legði Petur Reinert, landsstýrsmaður, fram

Uppskot
til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um minstuløn og annan stuðul til fiskivinnuna.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 69 frá 26. september 1974 um minstuløn og annan stuðul til fiskivinnuna verður í § 3 gjørt hetta uppiskoyti:

«Minstalønin (dýrtíðarviðbót viðroknað) verður frá 1. oktober 1975 at hækka við 105 kr. um mánaðin fyri hvørji 3 stig, prístalið hækkar í mun til prístalið 100. Dýrtíðarviðgerðin fer fram hvønn ársfjórðing eftir prístalinum 1. í ársfjórðinginum.»

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi 1. oktober 1975.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om mindsteløn og anden støtte til fiskerierhvervet.

§ 1.

I lagtingslov nr. 69 af 26. september 1974 om mindsteløn og anden støtte til fiskerierhvervet foretages følgende tilføjelse til § 3, stk. 1:

«Mindstelønnen (incl. dyrtidstillæg) forhøjes fra 1. oktober 1975 med 105 kr. om måneden for hver 3 points stigning i prístallet ud over 100. Dyrtidsreguleringen finder sted hvert kvartal efter prístallet den 1. i kvartalet.»

§ 2.

Denne lov træder i kraft 1. oktober 1975.

Viðmerkingar:

Fyriliggjandi uppskot til broyting í lóg um minstuløn og annan stuðul til fiskivinnuna er ein fylgja av lógaruppskotum, ið samstundis eru lagd fyri tingið um nýtt prístalsgrundarlag og eins dýrtíðarviðbót í krónum og oyrum av øllum lønum. Hjá mánaðarlønfum er hvør dýrtíðarviðbót sett til 1.260 kr. árliga, ella 105 kr. um mánaðin.

F.L.j. nr. 1517-2-1. — Sí eisini Ll. nr. 37/1975.

1. viðgerð 18. apríl og málið beint í fiskivinnunevndina, sum 22. apríl (kl. 10) legði fram soljóðandi

Álit

Hetta mál var framlagt av landsstýrinum 18. apríl og varð sama dag við fyrstu viðgerð beint í fiskivinnunevndina.

Í viðmerkingunum hjá landsstýrinum verður sagt, at hetta mál er ein fylgja av lógaruppskotum, ið samsfundis eru løgd fyri tinglið um nýtt prístalsgrundarlag og eins dýrtíðarviðbót í krónum og oyrum av øllum lønum.

Nevndin hevur viðgjørt málið og er samd um at mæla tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins óbroytt.

FISKIVINNUNEVNDIN, 22. apríl 1975.

2. viðgerð 22. apríl (kl. 19.30).

Gr. 1. samtykt 20—0, alt málið og at fara til 3. viðgerð samtykt við 20—0.

3. viðgerð 24. apríl.

Framlagt broytingaruppskot frá fiskivinnunevndini soljóðandi:

§ 1 verður orðað soleiðis:

«Í løgtingslóg nr. 69 frá 26. september 1974 um minstaløn og annan stuðul til fiskivinnuna verður í § 3 gjørt hetta uppískoyti:

«Minstaløn (dýrtíðarviðbót viðroknað) verður frá 1. oktober 1975 at hækka við 105 kr. um mánaðin fyri hvørji 3 stig, prístalið er omanfyri 100. Fellur prístalið niður um 100, verður ongin prístalsviðgerð. Dýrtíðarviðgerðin fer fram hvønn ársfjórðing eftir prístalinum 1. í ársfjórðinginum.»

§ 1 affattes således:

«I lagtingslov nr. 69 af 26. september 1974 om mindsteløn og anden støtte til fiskererhvervet foretages følgende tilføjelse til § 3, stk. 1:

«Mindstelønnen (incl. dyrtidstillæg) forhøjes fra 1. oktober 1975 med 105 kr. om måneden for hver 3 point, pristallet overstiger 100. Falder pristallet ned under 100, finder ingen pristalsbehandling sted. Dyrtidsreguleringen finder sted hvert kvartal efter pristallet den 1. i kvartalet.»

Framlagt broytingaruppskot frá Hilmar Kas o.fl. soljóðandi:

I § 1 verður «105 kr.» broytt til «35 kr.» og «hvørji 3 stig» broytt til «hvørt stig».	I § 1 ændres «105 kr.» til «35 kr.» og «hver 3 points» til «hvert points».

Broytingaruppskotið frá fiskivinnunevndini samtykt við 23—0.
Broytingaruppskotið frá Hilmar Kas o.fl. fall 8—0.
Lógaruppskotið so broytt samtykt við 26—0.

---

64. Betri sjókort av Føroya landgrunni

Ár 1975, fríggjadagin 18. apríl, legði Pauli Ellefsen, løgtingsmaður, fram soljóðandi

Uppskot
til samtyktar

Løgtingið áleggur landsstýrinum at syrgja fyri, at nýggj og betri sjókort yvir føroyska landgrunnin verða gjørd so skjótt sum gjørligt.

Viðmerkingar:

Tey sjókort, sum í dag eru galdandi fyri sjógvin um okkara leiðir eru gomul og vánalig, mett út frá nútíðar krøvum.

Tí heldur Sambandsflokkurin tað vera neyðugt, at nýggj og betri sjókort verða gjørd yvir føroyska landgrunnin, og setur flokkurin hetta uppskot fram.

SAMBANDSFLOKKURIN

1. viðgerð 21. apríl og málið beint til 2. viðgerð uttan nevndarviðgerð.

F.L.j. nr. 1500-1-3.

2. viðgerð 22. apríl.

Atkvøtt varð við navnakalli og varð uppskotið samtykt við tað at 16 atkvøddu ja og eingin nei.

Atkvøtt varð soleiðis:

Ja atkvøddu: Signar Hansen, Jona Henriksen, Hilmar Kass, Jógvan Sundstein, Asbjørn Joensen, Pauli Ellefsen, Jákup Mortensen, Jógvan Olsen, Jobs. Olsen, Sverri Midjord, Tórálvur Olsen, Poul J. Olsen, Kjartan Mohr, Johan Simonsen, E. Paturssen, J. Fr. Øregaard = 16.

Atkvøddu ikki: Hilmar Bech, Heðin Klein, Vilhelm Nielsen, Haldor Hansen, Jógvan Durhuus = 5.

Burturstaddir: Agnar Nielsen, Óli Breckmann, Eliesar Arge, Hákun Djurhuus, Ove Mikkelsen = 5.

Málið sostatt avgreitt.

---

65. Leiga av línuskipi til fiskiroyndir

Ár 1975, týsdagin 22. apríl, legði Jákup Mortensen, løgtingsmaður, fram

Uppskot
til samtyktar

Løgtingið áleggur landsstýrinum at leiga línuskip, tvey ella fleiri, til at gera praktiskar fiskiroyndir á tí landgrunnakantinum, sum strekkir seg úr einum landnyrðingi úr Hellandi suður við vesturstrond Bretlands og Íslands suður ímóti Biscaya víkini.

F.L.j. nr. 1524-26.

Viðmerkingar:

Sambandsflokkurin heitir við hesum á Føroya Løgting um at skipa so fyri, at lað almenna heinanvegin leigar linuskip, tvey ella fleiri, til at gera praktiskar fiskiroyndir á ti landgrunnakantinum, sum strekkir seg úr einum landnyrðingi úr Hetlandi, suður við vesturstroud Bretlands og Íslands og suður ímóti Biscaya-vikini, ein grunnakantur, sum er meira enn 1000 fjórðingar langur.

Føroyingar hava lítið og onki roynl á hesi leið, men vit vita, at t.d. norðmenn og sviar veiða har við línu. Sum okkara vanligu fjarleiðir trongjast hevði hetta stóra øki bøtt um møguleikarnar fyri okkara fiskivinnu. Tað er eisini av stórum týdningi, at vit kenna økið tann dag, vit møguliga skulu til samráðingar við bretar um veiðirættindi.

Á Føroya Løgtingi, 22. april 1975.

SAMBANDSFLOKKURIN

1. viðgerð 23. april og málið beint í fiskivinnunevndina, sum sama dag (kl. 22.00) legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð framlagt av sambandsflokkinum 22. april, og var við fyrstu viðgerð 23. april beint í fiskivinnunevndina.

Í uppskotinum til figgjarløgtingslóg vórðu avsettar 500.000 kr. til praktiskar fiskiroyndir og í viðmerkingunum verður sagt:

Landsstýrið er av ti áskoðan, at farast má undir at stuðla royndir um okkara leiðir eftir øðrum enn teimum fiskasløgum, sum vit higartil hava veitt.

Hesa upphædd broytti figgjarnevndin til 1.000.000 kr.

Meirilutin (Signar Hansen, Ove Mikkelsen, Vilhelm Nielsen og Poul J. Olsen) heldur tí, at landsstýrið saman við fiskirannsóknarstovuni eigur at skipa fyri, hvussu fiskiroyndir eiga at fara fram, og setur sostatt einki uppskot fram.

Minnilutin (Jógvan Olsen) mælir til at samtykkja uppskot sambandsfloksins.

2. viðgerð 24. april.

Uppskotið til samtyktar fall við 7 - 0.

66. Broyting í læraralønarlógini

Ár 1975, 23. april, legði Petur Reinert, landsstýrismaður fram

Uppskot
til samtyktar

Løgtingið heitir á ríkisstýrið um at broyta § 35, stk. 5 í lóg um tænastumenn í fólkaskúlanum í Føroyum, soleiðis, at lønirnar verða dýrtíðargjørdar eftir somu reglum sum lønirnar hjá landsins tænastumonnum.

Viðmerkingar:

Vísandi til uppskot landsstýrisins um nýggja dýrtíðarviðgerð av ymsum lønum verður skotið upp at beita á ríkismyndugleikarnar um at broyta lønarlógina hjá fólkaskúlalærarum soleiðis, at læraralønirnar verða dýrtíðarviðgjørdar eins og lønirnar hjá landsins tænastumonnum og øðrum.

1. viðgerð 23. april (kl. 22.00) og málið beint til 2. viðgerð utan nevndarviðgerð.

2. viðgerð 24. april. Uppskotið til samtyktar frá landsstýrinum samtykt við 22—0 atkv. Málið sostatt avgreitt.

F.L.j. nr. 2112-2-1.

67. Ráfiskagrunnurin

Ár 1975, mikudagin 23. apríl, legði Petur Reinert, landsstýrismaður fram

Uppskot
til

løgtingslóg um ráfiskagrunn

§ 1.

Settur verður á stovn grunnur nevndur Ráfiskagrunnurin.

2. stk. Ráfiskagrunnurin hevur til endamáls at tryggja lí partinum av føroyska fiskiflotanum, ið avreiðir feskan fisk til fiskavirkir í Føroyum rímiligan og javnan avreiðingarpris fyri longri tíðarskeið.

3. stk. Eisini hevur grunnurin til endamáls at tryggja fiskavirkjum rímiligan avrokningarpris.

§ 2.

At gera grunnin føran at búka uppgávurnar eftir § 1 veitir landskassin honum studning á figgjarløgtingslógunum. Í figgjarárinum 1975/76 er studningurin 11.000.000 kr.

§ 3.

At sita fyri grunninum, at ásetta ráfiskaprísin og at ásetta avrokningarpris millum fiskaútflytarar og fiskavirkir verður sett 6-mannanevnd, vald soleiðis:

lagtingslov om et råfiskefond.

§ 1.

Der etableres et fond kaldet råfiskagrunnurin.

Stk. 2. Råfiskagrunnurin har til formål at sikre den del af den færøske fiskerflåde, der indhandler frisk fisk til fiskevirksomheder på Færøerne en rimelig og stabil indhandlingspris for et længere tidsrum.

Stk. 3. Fondet har tillige til formål at sikre virksomheder til tilvirkning af fisk en rimelig afregningspris.

§ 2.

Til at gøre fondet i stand til at opfylde sine opgaver i henhold til § 1 yder landskassen denne tilskud over finanslagtingslovene. I finansåret 1975/76 andrager tilskudet 11.000.000 kr.

§ 3.

Til at administrere fondet, til at fastsætte råfiskeprisen og til at fastsætte afregningsprisen mellem fiskeeksportører og virksomheder til tilvirkning af fisk nedsættes et 6-mands udvalg, der bliver valgt således:

F.L.j. nr. 1539-2. — Sí eisini L.l. nr. 15/1975.

1) Útróðrarfeløg velja 1 lim og 1 varamann

2) Føroya Fiskimannafelag velur 1 lim og 1 varamann.
3) Ráfiskakeyparar velja 1 lim og 1 varamann.
4) Útflutningsfeløg velja 1 lim og 1 varamann.
5) Landsstýrið tilnevnir 2 limir og 2 varamenn, allir 4 óheftir av fiskivinnuni. Annan av teimum tveimum limunum velur landsstýrið til formann, hin limurin er tiltaksmaður í formanssessinum. Í førum, har atkvøðurnar undir nevndarviðgerð standa ájøvnum, ger formansins atkvøða av.

2. s t k. Dagliga fyrisiting grunsins verður hjá Lønjavningargrunni Skipsfiskimanna.
3. s t k. Nevndin setur í reglugerð tær gjøllari reglurnar fyri virki grunsins. Reglugerðin verður at góðkenna av landsstýrinum.

§ 4.

Nevndin ásetur ráfiskaprísin.
2. s t k. Nevndin ásetur avrokningarprísin frá útflytara til fiskavirkir, soleiðis at avrokningarprísurin heldur framleiðsluútreiðslur og fullnaðargjald, tó við tølum, nevndin ásetur.

§ 5.

Fyri hvørja søluu til útflutnings ger útflytarin upp søluna soleiðis, at frá sølupeninginum verður drigið avrokningarprísur til fiskavirki og søluútreiðslur útflytarans váttaðar av grannskoðara hansara og síðani góðkendar av nevndini. Tað,

1) Foreninger af hjemmefiskere vælger 1 medlem og 1 suppleant.
2) Føroya Fiskimannafelag vælger 1 medlem og 1 suppleant.
3) Råfiskekøbere vælger 1 medlem og 1 suppleant.
4) Eksportforeninger vælger 1 medlem og 1 suppleant.
5) Landsstyret udpeger 2 medlemmer og 2 suppleanter, alle 4 uafhængige af fiskerierhvervet. Den ene af de to medlemmer udpeger landsstyret til formand, det andet medlem er suppleant for formanden. I tilfælde af stemmelighed i udvalgsbehandlingen er det formandens stemme, der er afgørende.

S t k. 2. Den daglige administration af fondet udføres af Lønjavningsgrunni Skipsfiskimanna.
S t k. 3. Udvalget fastsætter i et reglement de nærmere regler for fondets virksomhed. Reglementet skal godkendes af landsstyret.

§ 4.

Udvalget fastsætter råfiskeprisen.
S t k. 2. Udvalget fastsætter afregningsprisen fra eksportør til virksomheder til tilvirkning af fisk, således at afregningsprisen dækker produktionsudgifter og dækningsbidrag, dog med beløb, som udvalget fastsætter.

§ 5.

For hvert salg til eksport opgør eksportøren salget således, at der fra salgsbeløbet trækkes afregningsprisen til virksomheder til tilvirkning af fisk og eksportørens salgsudgifter attesteret af eksportørens revisor og derefter god-

ið tá óestar ella er í avlop, verður ávikavist goldið úr grunninum til útflytaran ella goldið til grunnin frá útflytaranum.

2. stk. Goymslur hjá fiskavirkjum verða at gera upp við endan av hvørjum tíðarskeiði, jbr. § 6, og verða tær við frádrátti av møguligum goymslum frá tíðarskeiðum frammanundan til sína tíð, tá selt verður, at avrokna við tí avroknningarprísi, ið galdandi er fyri tíðarskeiðið.

3. stk. Peningur, ið stendur ímillum grunnin og útflytara er fallin til gjaldingar 14 dagar aftaná, at søluágóðin er fluttur útflytaranum.

§ 6.

Ráfiskaprísur og avroknningarprísur eftir § 4 verður at seta fyrstu ferð fyri tíðarskeiðið 15. juni 1975 til 31. juli 1975, síðani frá 1. august 1975 til 30. september 1975, og viðari fyri 4 mánaðar í senn.

2. stk. Nevndin hevur skyldu at áseta prísirnar ikki seinri enn 10. í mánaðanum, áðrenn nýtt tíðarskeið byrjar, fyrstu ferð tó ikki seinri enn 25. mai 1975. Prísirnir verða skjótast gjørligt at kunngera í Útvarp Føroya og í føroysku bløðunum.

§ 7.

Tær av nevndini tiknu prísavgerðir kunnu innan eina viku frá fyrstu almannakunngerð skjótast inn fyri eina kærunevnd, sum verður vald soleiðis:

1) Útróðrarfeløg og Føroya Fiski-

kendt af udvalget. Det beløb, som herefter er i underskud eller i overskud, bliver henholdsvis betalt fra fondet til eksportøren eller betalt til fondet af eksportøren.

Stk. 2. Lagre hos virksomheder til tilvirkning af fisk opgøres ved afslutning af hver periode, jfr. § 6, disse bliver med fradrag af eventuelle lagre fra foregående perioder til sin tid, når der sælges, at afregne med den afregningspris, der er gældende for perioden.

Stk. 3. Beløb til afregning mellem fondet og eksportør er forfalden til betaling 14 dage efter, at salgsprovenuet er overført til eksportøren.

§ 6.

Råfiskepris og afregningspris i henhold til § 4 fastsættes første gang for perioden 15. juni 1975 til 31. juli 1975, derefter fra 1. august 1975 til 30. september 1975 og derefter for 4 måneder ad gangen.

Stk. 2. Udvalget skal fastsætte priserne ikke senere end den 10. i måneden, inden påbegyndelse af en ny periode, første gang dog ikke senere end 25. maj 1975. De fastsatte priser offentliggøres snarest i Útvarp Føroya og de færøske aviser.

§ 7.

De af udvalget trufne prisafgørelser kan inden en uge efter første offentliggørelse indbringes for et ankenævn, der sammensættes således:

1) Foreninger af hjemmefiskere

mannafelag velja í felag 1 lim og 1 varamann.

2) Ráfiskakeyparar og útfhutningsfeløg velja í felag 1 lim og 1 varamann.

3) Landsstýrið uppnevnir 2 limir og 2 varamenn. Annar limurin og varamaður hansara verða um gjørligt valdir millum limirnar í tí í løgtingslóg nr. 42 frá 30. mai 1963 nevnda búskaparráð. Hin limurin og varamaður hansara skal verða statsautoriseraður grannskoðari ella hava aðra hægri útbúgving í rokuskapi.

4) Nevndarformaðurin og varamaður hansara, ið háðir skulu vera løgfrøðingar, verða uppnevndir av sorinskrivaranum.

2. s t k. Kærunevndin ger bindandi av, um prísásetingin byggir á fullgott grundarlag. Kemur hon til tað úrslit, at so er ikki, hevur nevndin eftir § 3 skyldu til beinanvegin at taka prísásetingina til nýggja viðgerð og taka avgerð.

3. s t k. Kærunevndarinnar avgerðir eru endaligar og kunnu ikki skjótast inn fyri dómstólarnar.

§ 8.

Fylgjandi persónar kunnu krevja seg fritiknar fyri starvið sum limur ella varamaður fyri ein lim í nevnd og kærunevnd:

1) Limir av landsstýri, løgtingi og fólkatingi.
2) Persónar, sum fylt hava 60 ár.
3) Persónar, sum vegna heilsu ella vinnulig og húslig viður-

sammen med Færøya Fiskimannafelag vælger 1 medlem og 1 suppleant.

2) Råfiskekøbere sammen med eksportforeninger vælger 1 medlem og 1 suppleant.

3) Landsstyret udnævner 2 medlemmer og 2 suppleanter. Det ene medlem og dettes suppleant udpeges så vidt muligt blandt medlemmerne af det i lagtingslov nr. 42 af 30. mai 1963 omhandlede økonomiske råd. Det andet medlem og dettes suppleant skal være statsautoriseret revisor eller have anden højere regnskabsmæssig uddannelse.

4) Nævnets formand og en suppleant for denne, der begge skal være jurister, udnævnes af sorenskriveren.

S t k. 2. Ankenævnet afgør med bindende virkning, om prisfastsættelsen bygger på forsvarligt grundlag. Kommer udvalget til det resultat, at dette ikke er tilfældet, er nævnet i henhold til § 3 forpligtet til straks at tage prisfastsættelsen op til ny behandling og træffe afgørelse.

S t k. 3. Ankenævnets afgørelser er endelig og kan ikke indbringes for domstolene.

§ 8.

Følgende personer kan begære sig fritaget for hvervet som medlem eller suppleant for et medlem af nævn og ankenævn:

1) Landsstyrets, lagtingets og folketingets medlemmer.
2) Personer, der er fyldt 60 år.
3) Personer, som på grund af deres helbredstilstand eller er-

skifti ikki uttan vanda fyri vælferð sína kunnu røkja starvið.

4) Persónar, sum ikki búgva í Føroyum.
5) Persónar, sum starvast undir vrakarastovninum.

2. stk. Eisini kann hann, sum í 5 ár hevur verið formaður í ti í § 3 nevndu nevnd, krevja at sleppa undan formansstarvinum.

3. stk. Ráfiskakeyparar, fiskaútflytarar og limir í útróðrarfelag kunnu ikki uppnevnast til lim í kærunevndini, smbr. § 7, 1. stk., nr. 3 og 4.

4. stk. Sorinskrivarin ger endaliga av, um tær í 1. stk. 1-3 nevndu grundir til at verða frítikin ella avskorin frá nevndarstarvi fyriliggja.

§ 9.

Øll val og útnevningar eru galdandi fyri 3 ár í senn. Verður limur frítikin ella avskorin frá at virka í starvstíðini ella hann vegna sjúku, burturferð ella øðrum lógligum forfalli ikki fyribils kann røkja starvið, tekur varamaðurin við. Er varamaðurin eisini forðaður í at røkja starvið verður varamaður valdur ella uppnevndur fyri henda.

§ 10.

Ásettu ráfiskaprísirnir eru minstuprísir fyri fyrstafloks fullblóðgaðan fisk.

2. stk. Keyp og sølu av tílíkum fiski fyri lægri prísir er forboðin. Brot á forboðið verður revsað við sekt.

hvervs- og familieforhold ikke uden fare for deres velfærd kan bestride hvervet.

4) Personer, der bor udenfor Færøerne.
5) Personer, der er ansat under vragerinstitutionen.

Stk. 2. Endvidere kan den, der i 5 år har været ansat som formand for det i § 3 omhandlede nævn, begære sig fritaget for formandshvervet.

Stk. 3. Opkøbere af råfisk og medlemmer af en forening af hjemmefiskere kan ikke udnævnes til medlem af ankenævnet, jfr. § 7, stk. 1, nr. 3 og 4.

Stk. 4. Sorenskriveren afgør endeligt, hvorvidt de i stk. 1-3 omhandlede fritagelses- eller udelukkelsesgrunde foreligger.

§ 9.

Alle valg og udnævnelser sker for 3 år ad gangen. Indtræder fritagelses- eller udelukkelsesgrunde i funktionsperioden, eller bliver et medlem på grund af sygdom, bortrejse eller andet lovligt forfald midlertidig forhindret i at udøve sit hverv, indtræder suppleanten i medlemmets sted. I tilfælde, hvor også suppleanten er forhindret i at beklæde hvervet, vælges eller udnævnes stedfortræder for denne.

§ 10.

De fastsatte råfiskepriser er minimalpriser for strubeskåret fisk af første sortering.

Stk. 2. Køb og salg af sådan fisk til lavere priser er forbudt. Overtrædelser af forbudet straffes med bøde.

§ 11.

Allir, sum hava við útflytan av fiskavørum úr Føroyum at gera, hava eftir kravi frá nevndini ella kærunevndini skyldu til at geva allar upplýsingar prísviðurskiftunum, eksportvørum og framleiðslukostnaðum viðvíkjandi.

2. stk. Tann, sum ikki ger hetta, kemur undir sekt, um ikki harðari revsing er uppiborin.

§ 12.

Útreiðslurnar av nevndar- og kærunevndararbeiðinum verða at rinda úr Ráfiskagrunninum.

§ 13.

Henda lóg kemur í gildi beinanveg. Løgtingslóg nr. 21 frá 8. mai 1969 um ráfiskaprísir fer úr gildi 15. juni 1975.

§ 11.

Enhver, som medvirker ved eksport af fisk fra Færøerne, har pligt til på begæring af nævnet eller ankenævnet at meddele alle oplysninger vedrørende prisforhold, eksportvarer og produktionsomkostninger.

Stk. 2. Undladelse heraf straffes med bøde, om ikke højere straf er forskyldt.

§ 12.

Udgifterne ved nævnets og ankenævnets virksomhed afholdes af Råfiskagrunninum.

§ 13.

Denne lov træder i kraft straks. Lagtingslov nr. 21 af 8. maj 1969 om råfiskepriser ophæves 15. juni 1975.

Viðmerkingar:

Landsstýrið leggur við hesum fram fleiri lógaruppskot, sum miða inóli at lætta um ta trongstøðu, sum fiskivinnan er komin í av ymiskum orsøkum.

I. Tann hækkaði oljuprísur, sum hevur gjørt seg galdandi í 1973 og 1974, og sum í minni mun hevur gjørt seg galdandi í 1975, hevur fyri ein part ført við sær, at skipaflotin hevur haft ilt við at bera seg.

Fyri at lætta um hetta setur landsstýrið fram uppskot um at geva studning til oljukeyp.

II. Til landingar av saltfiski setur landsstýrið fram uppskot um at hækka prísiskoytið og samstundis at hækka flakastudningin.

III. Í februar mánaða lækkaðu prísirnir á ídnaðarfiski so mikið, at ídnaðartrolararnir góvust við hesi veiðu aftaná hálvan februar í ár. Nakrir av teimum løgdu um til at fiska ísfisk til fiskavirkini í Føroyum, meðan aðrir ikki hava verið í vinnu síðani tá. Prísurin á fiskamjøli og lýsi hava síðan verið hækkandi, og fyri at fáa hesa vinnu aftur í gongd setur lands-

stýrið fram uppskot um at veita hesum parti av veiðuflotanum studning til landingar av idnaðarfiski. Hesin studningur tekur við, tá ið prísurin er komin upp á slíka legu, at tað kann roknast við, at partur av hesum flota kann fara í vinnuna aftur.

IV. Viðvíkjandi feskfiskaveiðuni er tað at siga, at teir lækkandi ráfiskaprísirnir tilsamans við teimum hækkandi útreiðslunum til bátarnar, hava gjørt, at bæði bátar og manning nú fáa væl minni ítøku uppá seg enn teir fingu tað, tá ið dýrtíðin verunliga byrjaði í endanum av árinum 1973. Hetta stendst av tveimum orsøkum, av teirri orsøk, at prísirnir fyri søluvørur hava verið ógvuliga nógv lækkandi og av teirri orsøk, at hesir søluprísir tilsamans við teimum hækkandi framleiðslukostnaðinum hava haft stóra ávirkan á ráfiskaprísirnar. Kanna vit tey fyriliggjandi rakstrartøl, síggja vit, at við teimum núverandi ráfiskaprísunum uttan prísískoyti ella prísviðbót av nøkrum slagi hava hesir bátar ógvuliga ilt við at standa seg, og tað sæst at manningapartanir eru ógvuliga smáir fyri vanligan útróður. Tað hevur framgingið týðuliga av teimum samrøðum, sum verið hava við útróðrarmenn og umboð fyri útróðrarfeløg og onnur virkisfeløg við, at tað, sum serliga hevur nívt útróðurin og gjørt útróðrarmannin ónøgdan við viðurskiftini, hevur verið tann ótryggleiki, sum hevur verið í arbeiði teirra, ein ótryggleiki, sum hevur vist seg á tann hátt, at prísirnir hava verið so ógvuliga svingandi upp og niður, ein ónøgd við, at teir ongo trygd hava haft undir sjúku og vanlukku og ein ónøgd við, at eingin trygd hevur verið, tá teir hava haft miseydnaðar túrar. Við í uppskoti, sum her verður lagt fram til eina loysn av hesum spurningum, er royni at fáa burtur tey viðurskiftini, sum í mesta lagi hava skapað trupulleikar og misnøgd. Loysnin er í stuttum laun, at fastur prísur verður lagdur fyri eitt longri tíðarskeið í senn á tann hátt, at stovnaður verður ein grunnur, sum tryggjar javnari prislegur. Hesin grunnur skal virka í soluliðinum soleiðis, at bátar og manning minni koma út fyri teir svingningar, sum altíð vilja vera í marknaðarprísinum. Samstundis miðar hetta uppskot ímóti at geva virkjunum eina trygd fyri, at fall í goymsluprísunum ikki skal koma teimum ov nógv til skaða, soleiðis sum ofta hevur verið áður.

Samstundis við hesum skjýtur landsstýrið upp, at lógin um bráðfengis stuðul til útróðurin v.m., løgtingslóg nr. 2 frá 13. februar í ár, verður framlongd og fær gildi til 14. juni 1975.

V. Afturat hesum framleggur landsstýrið lóg um broyting í lógini um minstuløn og annan studning til fiskivinnuna. Harvið fær minstalonin eina viðbót uppá 200 kr. afturat um mánaðin, og fyri manningar á deksførum til útróður verður skapt ein forvinningstrygd uppá 125 kr. pr.

mann pr. útróðrardag knýtt at avreiðingini. Harumfram fær manningin 20 oyru pr. kg av veiðuni í prísviðbót, bátar við benzinmotori fáa 7 oyru cyka pr. kg, og opnir bátar harumfram 5 oyru fyri kg. Fyri at hjálpa teimum útróðrarmonnum, sum noyðast at koyra veiðuna til nærmasta flakavirkið, setur landsstýrið fram uppskot um at veita teimum flutningsviðbót uppá 3 oyru pr. kg.

Tað er meting landsstýrisins, at samlaðu útreiðslur landskassans í samband við hesar lógir verða umleið 36-38.000.000 kr.

Á figgjarlógini 1975/76 eru avsettar kr. 25.000.000, og nýtslan á avvarðandi konti í figgjarárinum 1973/74 var umleið kr. 13.000.000.

Sí eisini skjal 14.

1. viðgerð 24. apríl. Uppskot frá P. Ellefsen um at beina málið til landsstýrið fall 6—0, og síðan málið beint í figgjarnevndina, sum 30. apríl legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð av landsstýrinum framlagt 23. apríl 1975 og undir 1. viðgerð 24. apríl beint í figgjarnevndina.

Í viðmerkingum sínum til lógaruppskotið ger landsstýrið vart við, aftaná at hava kannað fyriliggjandi rakstrartøl hjá feskfiskaveiðuni, at við teimum núverandi ráfiskaprísum utlan prísiskoyti ella prísviðbót hava bátarnir ógvuliga ilt við at standa seg, og manningarpartarnir eru ógvuliga smáir.

Hetta stendst av tveimum orsøkum, nevniliga at prísirnir fyri søluvørunna hava verið nógv lækkandi meðan framleiðslukostnaðurin hevur verið hækkandi.

Prislegan hevur verið ógvuliga skiftandi næstan frá dag til dag og hevur hetta skapt ein ótryggleika og eina misnøgd innan hetta vinnuøki, ið royndur verður við landsstýrisins uppskoti at veita ein bata.

Landsstýrisins tilmæli er at royndur verður at tryggja eina javnari prislegu við føstum prísum fyri eitt longri tíðarskeið í senn, og at hetta verður gjørt við at stovna ein ráfiskagrunn, ið verður umsitin á tann hátt, at hann skal kunna vaksa seg so peningaliga sterkan gjøgnum árini, at

hann veruliga verður eitt tryggjandi grundstøði undir ætlunini at fáa eina javnari prislegu við føstum prísum.

Ein slík skipan vildi eisini verið fiskavirkjunum at gagni.

Peningurin, ið ætlaður er at nýta til ávegis at loysa hesa uppgávu er sambært § 2 í landsstýrisins uppskoti 11.000.000 kr.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt hetta mál og kann meirilutin (Hákun Djurhuus, Poul J. Olsen, Hilmar Bech, Jógvan Durhuus og Sigurd Hansen) taka undir við landsstýrisins uppskoti men við hesum broytingum:

Í § 1, 1. stk. ganga orðini «rítmiligan og» út, og somuleiðis 3. stk.

Í § 2 verður í 1. stk. «11.000.000 kr.» broytt til «10.000.000 kr.»

Og sum nýtt 2. stk. í § 2 verður ásett, at í fíggjarárinum 1975/76 veitir landskassin 2.000.000 kr. í tiltaksgrunn.

Í § 3, 1. stk. verður orðið «ráfiskaprísur» broytt til «avreiðingarprís» og «fiskaútflytarar» broytt til «grunnin».

Í § 3, 1. stk. 5) ganga út 2. og 3. punktum og í sama § og sama stk. verður sett sum nýtt 6): «Hesir 6 limirnir velja ein formann og ein varamann, báðir óheftir av fiskivinnuni. Fæst ikki fleirtal fyri vali, verða teir uppnevndir av sorinksrivaranum.»

Í § 4, stk. 1 verður orðið «ráfiskaprísur» broytt til «avreiðingarprísur».

§ 4, 2. stk. fær hetta orðalag:

«2. stk. Grundað á upplýsingar frá fiskaútflytarum um søluprísir v.m. og metan av framleiðslukostnaði og fullnaðargjaldi ásetur nevndin regluliga og í minsta lagi 14. hvørm dag ein avrokningarprís millum fiskavirki og grunnin.»

§ 5 fær hetta orðalag:

«Ráfiskakeyparar avrokna til ráfiskaseljarar avreiðingarprísin ið nevndin ásetur sambært § 4, 1. stk.»

2. stk. Um avrokningarprísurin sambært § 4, 2. stk. er lægri enn avreiðingarprísurin, verður munurin at rinda ráfiskakeypara úr grunnum.

3. stk. Um avrokningarprísurin sambært § 4, 2. stk. er hægri enn avreiðingarprísurin, verður munurin at rinda frá ráfiskakeypara til grunnin.

4. stk. Lutfallið millum ráfiskavekt og tilvirkaða vøru verður ásett av nevndini.

5. stk. Ráfiskakeypari ger upp lann 1. og 15. í hvørjum mánaði hvussu nógv, ið rindast skal úr ella í grunnin. Upphæddin forfellur til gjaldingar eftir reglum fyrisettar í reglugerðini. Fiskaútflytari hevur skyldu at notera transportar til grunnin uppá ágóða hjá fiskaútflytara.»

Í § 6 ganga út orðini: «Ráfiskaprísur .... § 4» og í staðin verður sett: «Avreiðingarprísurin eftir § 4, 1. stk.»

Sum nýtt 3. stk. verður sett í § 6.

«Undir serliga umanndi broytingum í gjaldoyris- ella søluviðurskift-

unum kann nevndin, treylað av góðkenning landsstýrisins, taka teir lýstu prísirnar upp til nýggja viðgerð, sjálvt um tíðarskeiðið ikki er úti, og áseta nýggjar prísir fyri tað, sum eftir er av tíðarskeiðinum.»

I § 10, 1. stk. verður í staðin fyri «ráðfiskaprísirnir» sett «avreiðingarprísirnir» og í § 11 verður sett sum nýtt 3. stk.:

«Limirnir í nevnd og kærunevnd eru undir løgnarskylda við tí teir fáa at vita undir nevndararbeiðinum og sum eftir sínt náttúru ikki eigur at vera borið víðari.»

Tær fíggjarligu metingar, ið liggja sum grund undir teimum lógaruppskotum, ið standa í sambandi við tað, ið nevnt verður «heildarloysuin» eru hesar:

	milj. kr.
1. Ráfiskagrunnurin v.m.	12
2. Prísískoyti	8
3. Iðnaðarvinnan	4,5
4. Saltfiskastuðningur	3,5
5. Minstaløn	3,5
6. Oljustuðningur	6,0
tilsamans	37,5
Á fíggjarlógini eru	25,0
	12,5
Við meirtolli	7,0
	5,5

Hesar 5,5 milj. kr. hevur landsstýrið givið tilsøgn um partvís at spara unsitingarliga, og roknað verður eisini við, at skatturin komur at geva nakað meir enn mett.

Samsvarandi tí, ið er framført í álitinum mælir meirilutin (Háknn Djurhuus, Poul J. Olsen, Hilmar Beck, Jógvan Durhuus og Signar Hansen) tinginum til at samtykkja landsstýrisins uppskot við hesum broytingaruppskotum:

Broytingar í løgtingsmáli nr. 67/1974 (vetrarting): Ráfiskagrunnur.

1. Í § 1, 1. stk. ganga út orðini «rímilignn og».

«rimelig og»

2. § 1, 3. stk. gongur út.
3. Í § 2, 1. stk. verður «11.000.000 kr.» broytt til «10.000.000 kr.»
4. Sum nýtt 2. stk. í § 2 verður sett:

«Í fíggjarárinum 1975/76 veitir landskassin grunninum at seta í ein tiltaksgrunn 2.000.000 kr. Tiltaksgrunnurin stendur órørdur, til hann er komin uppá ávísa hædd, ásett í reglugerðini. Í reglugerðini verður eisini at áseta, hvussu stórur partur av árliga avlopi ráfiskagrunnsins verður at leggja í tiltaksgrunnin. Í reglugerðini verður at tilskila, hvussu tiltaksgrunnurin verður at nýta.»

4.

«I finansåret 1975/76 ydes der fondet af landskassen 2.000.000 kr. at henlægge i reservefond. Der kan ikke disponeres over reservefondet før end dette er kommet på et beløb, hvis størrelse fastsættes i reglementet. I reglementet fastsættes også, hvor stor en del af det årlige overskud i råfiskefondet, der skal henlægges til reservefondet. I reglementet fastsættes, hvorledes reservefondet skal anvendes.»

5. Í § 3, 1. stk. verður í staðin fyri «ráfiskaprísin» sett «avreiðingarpris» og í staðin fyri «fiskaútflytarar» sett «grunnin.»

5. I § 3, 1. stk. verður «råfiskepris» broytt til «indhandlingspris» og «fiskeeksportører» broytt til «fondet».

6. Í § 3, 1. stk. 5) ganga út 2. og 3. punktum.
7. Í § 3, 1. stk. verður sett sum nýtt 6):

«Hesir 6 limirnir í felag velja 1 formann og 1 varamann, báðir óheftir av fiskivinnuni. Fæst ikki fleirtal fyri vali, verða teir uppnevndir av sorinskrivaranum.»

7.

«De nævnte 6 medlemmer vælger i fællesskab en formand og en suppleant, begge uafhængige af fiskerierhvervet. Opnås der ikke flertal for valg udnævnes disse af sorenskriveren.»

8. Í § 4, 1. stk. verður í staðin fyri «ráfiskaprísin» sett «avreiðingarprísin».

8. I § 4, 1. stk. verður «råfiskeprisen» broytt til «indhandlingsprisen».

9. § 4, 2. stk. verður orðað soleiðis:

«2. stk. Grundað á upplýsingar frá fiskaútflytarum um

9.

«Stk. 2. Med basis i oplysninger fra fiskeeksportører om

søluprísir v.m. og metan av framleiðsluútreiðslum, sølukostnað og fullnaðargjaldi ásetur nevndin regluliga og í minsta lagi 14. hvønn dag ein avrokningarprís millum fiskavirki og grunnin.»

10. § 5 verður orðað soleiðis:
«Ráfiskakeyparar avrokna til ráfiskaseljarar avreiðingarprísin, ið nevndin ásetur sambært § 4, 1. stk.
2. stk. Um avrokningarprísurin sambært § 4, 2. stk. er lægri enn avreiðingarprísurin, verður munurin at rinda ráfiskakeypara úr grunninum.
3. stk. Um avrokningarprísurin sambært § 4, 2. stk. er hægri enn avreiðingarprísurin, verður munurin at rinda frá ráfiskakeypara til grunnin.
4. stk. Lutfallið millum ráfiskavekt og tilvirkaða vørn verður ásett av nevndini.
5. stk. Ráfiskakeypari ger upp tann 1. og 15. í hvørjum mánaða hvussu nógv, ið rindast skal úr ella í grunnin. Upphæddin forfellur til gjaldingar eftir reglum fyrisettar í reglugerðini. Fiskaútflytari hevur skyldu at notera transportar til grunnin uppá ágóða hjá fiskaútflytara.

11. Í § 6 ganga út orðini:
«Ráfiskaprísur .... § 4» og í staðin verður sett: «Avreiðingarprísurin eftir § 4, 1. stk.»

12. Í § 6 verður sett sum nýtt 3. stk.:
«Undir serliga munandi broytingum í gjaldoyris- ella søluviðurskiftunum kann nevndin,

salgspriser m.v. og skøn over produktionsomkostninger, salgsomkostninger og dækningsbidrag fastsætter udvalget regelmæssigt og mindst hver 14. dag en afregningspris mellem virksomheder til tilvirkning af fisk og fondet.»

10.
«Købere af råfisk afregner til råfiskesælgere indhandlingsprisen, som udvalget fastsætter i henhold til § 4, stk. 1.
Stk. 2. Såfremt afregningsprisen i henhold til § 4, stk. 2 er lavere end indhandlingsprisen, betaler fondet råfiskekøberen forskellen.
Stk. 3. Såfremt afregningsprisen i henhold til § 4, stk. 2 er højere end indhandlingsprisen, betaler råfiskekøberen fondet forskellen.
Stk. 4. Forholdet mellem råfiskevægt og behandlet vare fastsættes af udvalget.
Stk. 5. Råfiskekøber opgør hver den 1. og den 15. i måneden, hvor meget der skal betales af fondet eller til fondet. Betøbet forfalder til betaling efter regler fastsat i reglementet. Fiskeeksportør har pligt at notere transporter til fondet på tilgodehavende hos fiskeeksportør.

11.
«Råfiskepris .... § 4» gongur út, í staðin verður sett: «Indhandlingsprisen i henhold til § 4, stk. 1».

12.
«I tilfælde af indtrufne særlige store ændringer i valutaforholdene og salgsbetingelserne,

treytað av góðkenning landsstýrisins, taka teir lýstu prísirnir upp til nýggja viðgerð, sjálvt um tíðarskeiðið ikki er úti, og áseta nýggjar prísir fyri tað, sum eftir er av tíðarskeiðinum.»

13. Í § 10, 1. stk. verður í staðin fyri «råfiskaprísirnir» sett «avreiðingarprísirnir».

14. Í § 11 verður sett sum nýtt 3. stk.:

«Limirnir í nevnd og kærunevnd eru undir tagnarskyldu við tí teir fáa at vita undir nevndararbeiðinum og sum eftir síni náttúru ikki eigur at verða horið viðari.»

kan udvalget under forudsætning af landsstyrets godkendelse tage de offentliggjorte priser til ny behandling, selv om perioden ikke er udløbet, og fastsætte nye priser for den resterende del af perioden.»

13. I § 10, 1. stk. verður «råfiskepriser» broytt til «indhandlingspriser».

«Medlemmer af udvalg og ankenævn er underkastet tavshedspligt med hensyn til forhold, de bliver bekendt med under udførelsen af hvervet, og som efter sin natur bør hemmeligholdes.»

Minnilutin (Pauli Ellefsen og Hilmar Kass) fekur undir við, at neyðugt er við studli orsakað av feinum frupulleikum, vinnan er komin í.

Vit taka har aftur ímóti ikki undir við ætlanini um at seta á stovn ein grunn, sum skal virka fram yvir í óavmarkaða tíð.

Broytingaruppskot minnilutans skal tí takast sum eitt krepputiltak, sum bert skal virka í so stórau mun og í so langa tíð, sum vinnan hevur fyri neyðini.

Sambært minnilutauppskotið skal fíggjarnevndin fyri løgtingið taka avgerðirnar og hava eftirlit við studningsveitanini. Minst 2 ferðir um árið skal skipanin við teimum av fíggjarnevndini ásettu studningum leggjast fyri løgtingið til eftirteknar — tað sum heut er — og til endurskoðan — tað sum eigur at gerast fram yvir.

Eftir hesum fær løgtingið sjálvt best møguliga ávirkan á, hvussu fram verður farið.

Minnilutin setur fram fylgjandi

Uppskot
til

løgtingslóg um stuðul til feskfiskavinnuna.

§ 1.

At tryggja tí partinum av føroyska fiskiskipaflotanum, sum av-

lagtingslov om støtte til fiskeri-erhvervet.

§ 1.

Med det formål at sikre den del af den færøske fiskerflåde, der ind-

reiðir feskan fisk til fiskavirkir í Føroyum, neyðugan stuðul at vinna á verandi og í nærmastu tíð væntaðu trupulleikum, verður fíggjarnevnd løgtingsins heimilað at útgjalda upp til 12.000.000 kr. í fíggjarárinum 1975/76. Peningurin verður játtaður á konto § 16, 2490, 3301: Minstaløn og annar stuðul til fiskivinnuna.

§ 2.

Sum ráðgevandi stovnur hjá fíggjarnevndini í inningini av játtanini verður sett 5-mannanevnd vald soleiðis:

1) Útróðrafeløg velja 1 lim og 1 varamann
2) Føroya Fiskimannafelag velur 1 lim og 1 varamann
3) Ráfiskakeyparar velja 1 lim og 1 varamann
4) Útflutningsfeløg velja 1 lim og 1 varamann
5) Hesir 4 limirnir í felag velja 1 formann og 1 varamann, báðir óheftir av fiskivinnuni. Fæst ikki fleirtal fyri vali, verða teir uppnevndir av sorinskrivaranum.»

§ 3.

Fíggjarnevndin saman við ráðgevandi nevndini seta reglur fyri, hvussu fram verður finnið til neyðugan stuðul.

2. stk. Tann av fíggjarnevndini ásetti stuðulin verður at gjalda av ráfiskakeyparanum samstundis sum avreitt verður.

3. stk. Stuðulin, sum ráfiskakeypari hevur goldið, verður at

handler frisk fisk til fiskevirksomheder på Færøerne, nødvendig støtte til at overvinde de nuværende og de i den nærmeste fremtid forventede vanskeligheder, bemyndiges lagtingets finansudvalg at udbetale indtil 12.000.000 kr. i finansåret 1975/76. Beløbet bevilges over konto § 16, 2490, 3301: Mindsteløn og anden støtte til fiskerierhvervet.

§ 2.

Som rådgivende organ for finansudvalget i administrationen af bevillingen nedsættes et 5-mands udvalg valgt således:

1) Foreninger af hjemmefiskere vælger 1 medlem og 1 suppleant
2) Føroya Fiskimannafelag vælger 1 medlem og 1 suppleant
3) Råfiskekøbere vælger 1 medlem og 1 suppleant
4) Eksportforeninger vælger 1 medlem og 1 suppleant
5) Disse 4 medlemmer vælger i fællesskab 1 medlem og 1 suppleant. Opnås der ikke flertal, udnævnes disse af sorenskriveren.

§ 3.

Finansudvalget sammen med det rådgivende udvalg fastsætter regler for, hvordan den nødvendige støtte beregnes.

Stk. 2. Den af finansudvalget fastsatte støtte betales af råfiskekøberen samtidig med indhandling.

Stk. 3. Støtten, som råfiskekøberen har betalt, refunderes af

endurgjalda av Lønjavningargrunni Skipsfiskimanna eina ferð um vikuna.

§ 4.

Stuðnlin eftir § 3 verður av fíggjarnevndini at seta fyrstu ferð fyri tíðarskeiðið 15. juni til 31. juli 1975 og síðani fyri 2 mánaðar í senn.

2. stk. Stuðnlin verður at ásetta ikki seinni enn 1 viku, áðrenn nýtt tíðarskeið byrjar, og verður hann skjótast gjørligt at kunngera í Ótvarpi Føroya og í føroysku blaðunum.

§ 5.

Fylgjandi persónar kunnu krevja seg frítikuar fyri starvið sum limur ella varamaður fyri ein lim í nevndini:

1) Limir av landsstýri, løgtingi og fólkatingi.
2) Persónar, sum fylt hava 60 ár.
3) Persónar, sum vegna heilsu ella vinnulig og húslig viðurskifti ikki uttan vanda fyri vælferð sína kunnu røkja starvið.
4) Persónar, sum ikki búgva í Føroyum.
5) Persónar, sum starvast undir vrakarastovninum.

2. stk. Sorinskrivarin ger endaliga av, um tær í 1. stk. nevndu grundir til at verða frítikin ella avskorin frá nevndarstarvi fyriliggja.

§ 6.

Øll val og útnevningar eru galdandi fyri 1 ár í senn. Verður limur frítikin ella avskorin frá at virka í starvstíðini ella hann vegna

Lønjavningargrunni Skipsfiskimanna en gang ugentlig.

§ 4.

Støtten i henhold til § 3 fastsættes af finansudvalget første gang for perioden 15. juni til 31. juli 1975 og derefter for 2 måneder ad gangen.

Stk. 2. Støtten fastsættes ikke senere end 1 uge forinden en ny periode begynder og offentliggøres derefter snarest i Ótvarp Føroya og de færøske aviser.

§ 5.

Følgende personer kan begære sig fritaget for hvervet som medlem eller suppleant for et medlem af nævn:

1) Landsstyrets, lagtingets og folketingets medlemmer.
2) Personer, der er fyldt 60 år.
3) Personer, som på grund af deres helbredstilstand eller erhverv og familieforhold ikke uden fare for deres velfærd kan bestride hvervet.
4) Personer, der bor udenfor Færøerne.
5) Personer, der er ansat under vrageinstitutionen.

Stk. 2. Sorenskriveren afgør endeligt, hvorvidt de i stk. 1 omhandlede fritagelses- eller udelukkelsesgrunde foreligger.

§ 6.

Alle valg og udnævnelser sker for 1 år ad gangen. Indtræder fritagelses- eller udelukkelsesgrunde i funktionsperioden, eller bliver et

sjúku, burturferð ella øðrum lógligum forfalli ikki fyribils kann røkja starvið, tekur varamaðurin við. Er varamaðurin eisini forðaður í at røkja starvið, verður varamaður valdur ella uppnevndur fyri henda.

§ 7.

Stuðulin saman við ásetta ráfiskaprísinum, jbr. løgtingslóg nr. 21. frá 28. mai 1969 um ráfiskaprísir, eru minstugjøld fyri fyrstafloks fullblóðgaðan fisk.

2. s t k. Keyp og søla av tilfkum fiski fyri minni enn stuðul og ráfiskapris er forboðin. Brot á forboðið verður revsað við sekt.

§ 8.

Undir serliga munandi broytingum í gjaldoyris- ella søluviðurskiftunum kann tíggjarnevndin taka tann lýsta stuðulin upp til nýggja viðgerð, sjálvt um tíðarskeiðið ikki er úti, og ásetta nýggjan stuðul fyri tað, sum eftir er av tíðarskeiðinum.

§ 9.

Allir, ið hava við útflytan av fiskavørum úr Føroyum at gera, hava eftir kravi frá nevndini skyldu til at geva allar upplýsingar prisviðurskiftunum, eksportvørum og framleiðsluútreiðslum viðvíkjandi.

2. s t k. Tann, sum ikki ger hetta, kemur undir sekt, um ikki harðari revsing er uppiborin.

medlem på grund af sygdom, bortrejse eller andet lovligt forfald midlertidig forhindret i at udøve sit hverv, indtræder suppleanten i medlemmets sted. I tilfælde, hvor også suppleanten er forhindret i at beklæde hvervet vælges eller udnævnes stedfortræder for denne.

§ 7.

Støtten sammen med de fastsatte råfiskepriser, jfr. lagtingslov nr. 21 af 28. maj 1969 om råfiskepriser, er mindste betaling for strubeskåret fisk af første sortering.

Stk. 2. Køb og salg af sådan fisk for et lavere beløb end støtte og råfiskepris er forbudt. Overtrædelse af forbudet straffes med bøde.

§ 8.

I tilfælde af indtrufne særlig store ændringer i valutaforholdene og salgsbetingelserne kan udvalget under forudsætning af finansudvalgets godkendelse tage den offentliggjorte støtte til ny behandling selv om perioden ikke er udløbet og fastsætte ny støtte for den resterende del af perioden.

§ 9.

Enhver, som medvirker ved eksport af fisk fra Færøerne, har pligt til på begæring af udvalget at meddele alle oplysninger vedrørende prisforhold, eksportvarer og produktionsomkostninger.

Stk. 2. Undladelse heraf straffes med bøde, om ikke højere straf er forskyldt.

§ 10.

Ríðreiðslurnar av nevndararbeiðinum verða at riuda úr landskassanum.

§ 10.

Udgifterne ved udvalgets virksomhed afholdes af landskassen.

§ 11.

Henda lóg kemur í gildi beinanveg.

2. stk. Figgjarnevndin leggur í minsta lagi 2 ferðir um árið, fyrstu ferð ikki seinni enn 31. december 1975, frágreiðing fyri lagtingið um, hvussu stuðulskipanin er framd, og verður lógin samstundis endurskoða.

§ 11.

Denne lov træder i kraft straks.

Stk. 2. Finansudvalget forelægger mindst 2 gange om året, første gang ikke senere end 31. december 1975, en redegørelse for lagtinget om, hvordan støtteordningen er praktiseret, samtidig bliver loven at underkaste revision.

2. viðgerð 30. apríl (kl. 19.45).

Um broytingaruppskot frá P. Ellefsen og H. Kass var atkvøtt við navnakalli:

Ja atkvøddu: Agnar Nielsen, Hilmar Kass, Asbjørn Joensen, Pauli Ellefsen, Jákup Mortensen, Jógvan Olsen, Johs. Olsen, Kjartan Mohr = 8.

Nei atkvøddi: Heðin Klein.

Atkvøddu ikki: Signar Hansen, Jona Henriksen, Jógvan Sundstein, Óli Breckmann, E. Arge, H. Djurhuus, V. Nielsen, H. Beck, Sveeri Midjord, Tórálvur Olsen, Poul J. Olsen, Haldor Hansen, Johan Simonsen, E. Paturssen, J. Djurhuus, Ove Mikkelsen = 16.

Burturstaddur: J. Fr. Øregaard.

Uppskotið sostatt burturfallið 8 1.

Broytingaruppskot frá meiriluta 1 nevndini til landsstýrisuppskotið samtykt 17—0.

Landsstýrisuppskotið so broytt samtykt við 17 0

Lógaruppskotið so broytt at fara til 3. viðgerð samtykt við 17 0.

30. apríl (kl. 22.30) var framlagt broytingaruppskot frá meiriluta í fíggjarnevndini soljóðandi:

Í landsstýrisuppskotinum verða gjordar hesar broytingar:

I. Í § 3, 1. stk. 3) verður «1 lim» broytt til «2 limir» og «1 varamann» broytt til «2 varamenn».	«1 medlem» broytt til «2 medlemmer» og «1 suppleant» broytt til «2 suppleanter».
5) verður 4) og 6) verður 5)	
II. Í § 8, 3. stk. verður skotið inn aftaná «útróðrarfelag» «ella Føroya Fiskimannafelag».	«hjemmefiskere» «eller Føroya Fiskimannafelag».

3. viðgerð á sama fundi.
Broytingaruppskotið til gr. 3 og gr. 8 samtykt við 16 0.

Lógaruppskotið so broytt endaliga samtykt við 16- -0.

---

68. Broyting í lógini um minstuløn og annan stuðul til fiskivinnuna

Ár 1975, mikudagin 23. apríl, legði Petur Reinert, landsstýrismaður, fram

Uppskot
til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um minstuløn og annan stuðul til fiskivinnuna.	**lagtingslov om ændring i lagtingslov om mindsteløn og anden støtte til fiskerierhvervet.**
§ 1.	§ 1.
Í løgtingslóg nr. 69 frá 26. sep-	I lagtingslov nr. 69 af 26. sep-

F.L. j. nr. 1517-2-1. — Sí eisini Ll. nr. 28/1975.

tember 1974 um minstuløn og annan stuðul til fiskivinnuna verða gjørdar hesar broytingar:

1. Imillum 1. og 2. punktum í § 3, 1. stk. verður sum nýtt punktum skoytt uppí:
«Afturat minstulønini verður veitt í viðbót kr. 200 um mánaðan, viðbótin verður ikki prístalsviðgjørd.»
2. Sum nýggj § 4 A verður sett:
«Minstivinningur útróðrarmanna.
Manningini á føroyskum deksfiskiførum undir 100 brutto skrásett tous í útróðri innanfyri 100 sjómíl úr landi í Føroyum verður, um hon ikki er undir minstulønarskipan, tryggjað í forvinningi 125 kr. fyri hvønn útróðradagin. Treyt fyri skipanini er, at fiskifarið hevur avreitl, og at manningin verður avroknað, og at fiskifarið er mannað, í háðum førum sum vanligt er á staðnum.»
3. § 4, 1. stk. verður orðað soleiðis:
«Tá ið føroyskt fiskifar avreiðir feskan fisk í Føroyum verður latið í studningi til manningina 20 oyru fyri kg av veiðuni av øllum rundum, kruvdum fiski við høvdi, men hvørja ferð teir av landingarprísnevndini eftir løgtingslóg nr. 21 frá 8. mai 1969 seinast áðrenn 15. juni 1975 lýstu prísir hækka við 10 oyrum í meðal, lækkar prísviðbótin við 1 oyra. Umfram verða hesir eykastudningar veittir til manningina:
a. Bátar við benzinmotori 7 oyru fyri kg.

tember 1974 om mindsteløn og anden støtte til fiskerierhvervet foretages følgende ændringer:

1. Imellem 1. og 2. punktum i § 3, stk. 1, indsættes som nyt punktum:
«Til mindstelønnen ydes som tillæg 200 kr. om måneden. Tillægget pristalsreguleres ikke.»
2. Som ny § 4 A indsættes:
«Hjemmefiskeres mindsteindtægt.
Der sikres mandskabet på færøske dæksfiskerfartøjer under 100 brutto reg. tons i hjemmefiskeri indenfor 100 sømil fra land af Færøerne, såfremt mandskabet ikke er under mindsteløsordning, i indtægt 125 kr. for hver fiskedag. Forudsætning for ordningen er, at fiskerfartøjet indhandler, og at mandskabet afregnes, og at fiskerfartøjet er bemandet, i begge tilfælde som det er sædvanligt på stedet.»
3. § 4, stk. 1 formuleres således:
«Ved indhandling på Færøerne af frisk fisk fra færøske fiskerfartøjer, ydes der mandskabet 20 øre pr. kg i tilskud af fangsten af al rund fisk med hoved uden indvolde, men for hver gang de af landingsprisnævnet i henhold til lagtingslov nr. 21 af 8. maj 1969 senest inden 15. juni 1975 offentliggjorte priser forhøjes med 10 øre i gennemsnit, formindskes pristilskudet med 1 øre. Desuden ydes følgende ekstratilskud til mandskabet:
a. Både med benzinmotor 7 øre pr. kg.

b. Opnir bátar 5 oyru fyri kg.
c. Fyri veiðu avreidd á plássum, har møguleikar ikki eru at virka veiðuna, og veiðan beinanvegin verður flutt til nærmasta fiskavirki, 3 oyru fyri kg.

4. Í § 6 verða «19 oyru» og «14 oyru» broytt til ávikavist «24 oyru» og «19 oyru».
5. Í § 7, 1. stk. verða «28 oyru», «22 oyru» og «13 oyru» broytt til ávikavist «35 oyru», «32 oyru» og «18 oyru».
6. 1 § 8 gongur punkt a út.

§ 2.

Henda lóg fær gildi 15. juni 1975.

b. Åbne både 5 øre pr. kg.
c. For fangst indhandlet på steder, hvor der ikke er muligheder for at tilvirke fangsten, og fangsten straks føres til nærmest virksomhed til tilvirkning af fisk: 3 øre pr. kg.»

4. I § 6 ændres «19 øre» og «14 øre» til henholdsvis «24 øre» og «19 øre».
5. I § 7, stk. 1 ændres «28 øre», «22 øre» og «13 øre» til henholdvis «35 øre», «32 øre» og «18 øre».
6. I § 8 udgår punkt a.

§ 2.

Denne lov træder i kraft 15. juni 1975.

Viðmerkingar:

Vist verður til viðmerkingarnar í løgtingsmáli nr. 67/1974 (vetrarting): Ráfiskagrunnur.

Petur Reinert
landsstýrismaður

/ J. Djurhuus

1. viðgerð 24. apríl og málið beint í fíggjarnevndina, sum 30. apríl legði fram soljóðandi

Álit

Landsstýrið legði hetta mál fram 23. apríl 1975 og varð tað undir 1. viðgerð beint í fíggjarnevndina.

Uppskot landsstýrisins er ein broytingargrein við 6 punktum til galdandi lóggávu á hesum øki, nevniliga løgtingslógin nr. 69 frá 26. september 1974 um minstuløn og annan stuðul til fiskivinnuna.

1. broytingartilmælið er, at kr. 200,-- verða veittar aftrat í viðbót um mánaðin, men viðbótin verður ikki pristalsviðgjørd.

2. broytingartilmælið er, at sum nýggj § 4 A verður veitt útróðrarmonnum við dekksførum minstavinning 125 kr. fyri hvønn útróðrardag.

3. broytingartilmælið er, at 20 oyru verða latin í studningi fyri kg. av øllum rundum kruvdum fiski við høvdi, men tá seinast lýstu prísirnir áðrenn 15. juni 1975 í meðal hækka við 10 oyrum, lækkar prísviðbótin við 1 oyra.

Hetaftrat verður mælt til, at bátar við benzinmotori fáa 7 oyru fyri kg. eyka, opnir bátar 5 oyru fyri kg. og at fluttningsstudningur 3 oyru fyri kg. verður latin undir vissum umstøðum.

4. broytingartilmælið er, at oyrahæddin í § 6 í galdandi lóg «19 oyru» og «14 oyru» verður broytt til «24 oyru» og «19 oyru».

5. broytingartilmælið er, at í § 7, 1. stk. verða oyrahæddirnar «28 oyru», «22 oyru» og «13 oyru» broytt ávikavist til «35 oyru», 32 oyru» og «18 oyru».

6. broytingartilmælið er, at í § 8 fer punkt a út. Hetta punkt sigur at studningurin til eigarar av fiskifari er 5 oyru fyri kg., fyri opnan bát 3 oyru fyri kg.

Viðvíkjandi summum av hesum broytingartilmælum tekur fíggjarnevndin samd undir við og er samd um, at studningurin til benzinmotorar undir 3. broytingartilmæli verður hækkað við 9 oyrum eyka.

Fíggjarnevndin setur fram hetta

Broytingaruppskot

Í § 1, punkt 3 a. verður talið 7 broytt til 9.

2. viðgerð 30. apríl (kl. 19.45).

Gr. 1, punkt 1 samtykt 25—0.
Gr. 1, punkt 2, samtykt 15—0.
Broytingaruppskot til gr. 1, punkt 3 a, samtykt 25—0.
Gr. 1 punkt 3 soleiðis broytt samtykt 25—0.
Gr. 1 punkt 4 samtykt við 25—0.
Gr. 1, punkt 5 samtykt 25—0.
Gr. 1, punkt 6, samtykt 23—0.
Lógaruppskotið soleiðis broytt samtykt við 25—0.
Lógin at fara til 3. viðgerð samt. við 25—0.

3. viðgerð 30. apríl (22.30).

Lógin sum hon var samtykt við 2. viðgerð, nú samtykt við 25—0.

69. Brennioljustudningur til fiskivinnuna

Ár 1975, mikudagin 23. apríl, legði Petur Reinert, landsstýrismaður, fram

Uppskot
til

Løgtingslóg um brennioljustudning til fiskiskip.

§ 1.

At lækka um prísin á brennolju til føroysk deksfiskifør í fiskiveiðu verða úr landskassanum latin 12 oyru í studningi fyri hvønn litur brennolju.

2. stk. Fær skip brennolju fyri lægri prís enn 67,5 oyru fyri liturin, lækkar studningurin við 1 oyra fyri hvørt oyra, prísurin á brennolju er niðanfyri 67,5 oyru fyri liturin.

§ 2.

Studningsskipanin verður umsitin av Lønjavningargrunni Skipsfiskimanna.

§ 3.

Henda lóg fer gildi frá 1. mai 1975 og fer úr gildi 31. mars 1976.

Lagtingslov om brændselsolietilskud til fiskerskibe.

§ 1.

Til nedbringelse af prisen på brændselsolie til færøske fiskerskibe i fiskeri ydes af landskassen 12 øre i tilskud for hver liter brændselsolie.

Stk. 2. Såfremt et skib får brændselsolie til en lavere pris end 67,5 øre pr. liter, formindskes tilskudet med 1 øre for hver øre, prisen for brændselsolie er under 67,5 øre pr. liter.

§ 2.

Tilskudsordningen administreres af Lønjavningargrunni Skipsfiskimanna.

§ 3.

Denne lov træder i kraft 1. maj 1975 og træder ud af kraft 31. marts 1976.

Viðmerkingar:

Víst verður til viðmerkingarnar í løgtingsmáli nr. 67/1974 (veiðarting): Ráfiskagrunnur.

1. viðgerð 30. apríl og málið beint í figgjarnevndina, sum 30. apríl legði fram soljóðandi

Sí eisini Ll. nr. 27/1975.

Álit

Málið varð av landsstýrinum framlagt 23. apríl 1975 og undir 1. viðgerð beint í figgjarnevndina.

Landsstýrið vísir í hesum máli til viðmerkingar sínar í løgtingsmáli nr. 67/1974 (vetrarting): Ráfiskagrunnur, har sagt verður undir

I: Tann hækkaði oljuprísur, sum hevur gjørt seg galdandi í 1973 og 1974, og sum í minni mun hevur gjørt seg galdandi í 1975, hevur fyri ein part ført við sær, at skipaflotin hevur havt ilt við at bera seg.

Fyri at lætta um hetta setur landsstýrið fram uppskot um at geva studning til oljukeyp.

Tá hetta orðalag, ið landsstýrið her nýtir um hækkandi oljuprísir í 1973 og 1974, sum í minni mun hevur gjørt seg galdandi í 1975, kann misskiljast á tann hátt, at hækkingin hevur verið minni í 1975 enn í tíðarskeiðinum frammanundan, verður hervið vist á, at ultimo 1974 var gassoljuprísurin 72 oyru fyri liturin. Primo februar fall gassoljan við 2 oyrum til 70 oyru fyri liturin, og medio mars fall prísurin við 2,5 oyrum fyri liturin.

Í dag er prísurin 67,5 oyru fyri liturin, og er tað eisini hesin prísur, landsstýrið nýtir í sínum lógaruppskoti í § 1 í sjk. 2.

Landsstýrið mælir til, at 12 oyru verða latin úr landskassanum sum studningur fyri hvørm litur av brennolju føroysk deksfiskifør í fiskiveiðu brúka, og at studningurin lækkar við 1 oyra fyri hvørt oyra, prísurin á brennolju er niðanfyri 67,5 oyru fyri liturin.

Hvussu stórt samlaða oljuforbrúkið á okkara veiðuflota verður uppá liturin fyri árið, er sjálvandi ógjørligt at siga, men frá landsstýrinum hevur figgjarnevndin fingið upplýst, at teir út frá tølum, teir hava fingið frá oljufeløgunum meta, at talið kemur at tátta upp móti 50.000 m³, tá tey nýggju skipini verða íroknaði, ið standa fyri at koma.

Verður hetta tal lagt til grund undir oljuársforbrúkinum hjá veiðuflotanum, er her talan um hægst ein studning til okkara veiðuflota uppá 6 milj. kr., ið óbeinleiðis koma at lætta um ta trongstøðu, fiskivinnan er komin í.

Figgjarnevndin tekur undir við uppskoti landsstýrisins og mælir til, at tað verður samtykt.

FIGGJARNEVNDIN, 26. apríl 1975.

2. viðgerð 30. apríl.

Gr. 1 samtykt við 24—0.
Gr. 2 og 3, samtykt u. atkvgr.
Lógin soleiðis samtykt at fara til 3. viðgerð 24—0.

3. viðgerð 30. apríl (kl. 22.30).

Lógaruppskotið, sum tað varð samtykt við 2. viðgerð nú samtykt 24—0.

---

70. Studningur til veiðu av ídnaðarfiski

Ár 1975, mikudagin 23. apríl, legði Petur Reinert, landsstýrismaður, fram

Uppskot
til

løgtingslóg um studning til veiðu av ídnaðarfiski.

§ 1.

Til landingar av ídnaðarfiski frá føroyskum fiskifari verður eftir reglunum niðanfyri latin studningur úr landskassanum at býta mill-

lagtingslov om tilskud til fangst af industrifisk.

§ 1.

Til landing af industrifisk fra færøske fiskefartøjer ydes der efter nedenstående regler tilskud af landskassen at fordele mellem

F.L.j. nr. 1501-15-2. — Sí eisini LL. nr. 14/1975.

um manning og fiskifar, sum søla av veiðu verður býtt.

§ 2.

Í studningsveitingini verður fylgjandi talva at nýta:

mandskab og fiskefartøj på samme måde, som salg af fangst fordeles.

§ 2.

Ved ydelsen af tilskud anvendes følgende tavle:

Mánaður Måned	Nebba-síld Tobis	Hvítings-bróður Sperling	Brislingur Brisling	Síld og makrelur Sild og makrel	Rossa-makrelur Heste-makrel	Svartkjaftur Blåhvilling	Annar fiskur Anden fisk
Maj Maj	b	b	—	a	b	b	b
Juni	a	b	—	a	b	b	b
Juli	a	a	—	a	b	b	b
August	a	a	—	a	b	b	b
Septembur September	—	a	—	a	b	b	b
Oktobur Oktober		15. a b	a	a	b	b	b
Novembur November	—	b	a	a	b	b	b
Decembur December	—	b	a	a	b	b	b
Januar	—	b	a	a	b	b	b
Februar	—	b	a	a	b	b	b
Mars Marts	—	b	—	a	b	b	b
April April	—	b	—	a	b	b	b

2. stk. Tá ið a-fiskur verður landaður til ídnað í Føroyum til 20 oyru fyri kg í avreiðingarprísi, verður latið í studningi 10 oyru fyri kg. Studningurin lækkar við ½ oyra fyri hvørt oyra, avreiðingarprísurin er hægri enn 25 oyru.

3. stk. Tá ið b-fiskur verður landaður til ídnað í Føroyum til 12 oyru fyri kg í avreiðingarprísi, verður latið í studningi 10 oyru fyri kg. Studningurin lækkar ½ oyra fyri hvørt oyra, avreiðingarprísurin er hægri enn 15 oyru.

4. stk. Um teir í 2. og 3. stk. nevndu avreiðingarprísir eru lækkaðir orsakað av góðskuni, verða studningarnir at lækka í sama mun.

5. stk. Verður ídnaðarfiskur avreiddur í havn uttanfyri Føroyar, verður hálvur studningur latin av tí studningi, sum hevði verið latin, um sama lastin var avreidd í Føroyum, tó so at avreiðingarprísur og studningur samanlagt ikki fer upp um avreiðingarpris og studning fyri somu last landað í Føroyum á plássi, har avreiðingarprísurin er hægstur. Við uttanlanda landingar er ásetanin í 4. stk. ikki galdandi.

§ 3.

Studningsskipanin verður fyrisitin av Lønjavningargrunni Skipsfiskimanna.

§ 4.

At fylgja við og hava eftirlit við ásetanini av avreiðingarprísinum á fiski til ídnað verður sett 6-mannanevnd vald soleiðis:

Stk. 2. Ved landing af a-fisk til industri på Færøerne til en indhandlingspris på 20 øre pr. kg ydes i tilskud 10 øre pr. kg. Tilskudet formindsker med ½ øre for hver øre, indhandlingsprisen er højere end 25 øre.

Stk. 3. Ved landing af b-fisk til industri på Færøerne til en indhandlingspris på 12 øre pr. kg ydes i tilskud 10 øre pr. kg. Tilskudet formindsker med ½ øre for hver øre, indhandlingsprisen er højere end 15 øre.

Stk. 4. Såfremt de i stk. 2 og 3 omhandlede indhandlingspriser er reduceret af kvalitetsmæssige grunde, reduceres tilskudene i samme forhold.

Stk. 5. Ved landing af industrifisk i en havn udenfor Færøerne, ydes der halvt tilskud af det tilskud, som ville være ydet, såfremt samme last var indhandlet på Færøerne, dog således at indhandlingspris og tilskud sammenlagt ikke overstiger indhandlingspris og tilskud for samme last landet på Færøerne på det sted, hvor indhandlingsprisen er højest. Ved landinger udenfor Færøerne gælder bestemmelsen i stk. 4 ikke.

§ 3.

Tilskudsordningen administreres af Lønjavningargrunnur Skipsfiskimanna.

§ 4.

Til at følge og at have tilsyn med fastsættelsen af indhandlingspriser for fisk til industri nedsættes et 6-mands udvalg således sammensat:

1) Felagið Nótaskip velur 1 lim og 1 varamann.
2) Felagið Idnaðarskip velur 1 lim og 1 varamann.
3) Fiskiidnaðarvirkini velja 2 limir og 2 varamenn.
4) Landsstýrið tilnevnir 2 limir og 2 varamenn, allir 4 óheftir av fiskiidnaðinum. Annan av teimum 2 limunum tilnevnir landsstýrið til formann, hin limurin er varamaður í formanssessinum.

§ 5.

Fylgjandi persónar kunnu krevja seg frítiknar fyri starvið sum limur ella varamaður fyri ein lim í nevndini:

1) Limir av landsstýri, løgtingi og fólkatingi.
2) Persónar, sum fylt hava 60 ár.
3) Persónar, sum vegna heilsu ella vinnulig og húslig viðurskifti ikki uttan vanda fyri vælferð kunnu røkja starvið.
4) Persónar, sum ikki búgva í Føroyum.
5) Persónar, ið starvast undir vrakarastovninum.

2. stk. Eisini kann hann, sum í 5 ár hevur verið formaður í nevndini, krevja at sleppa undan formansstarvinum.

3. stk. Sorinskrivarin ger endaliga av, um tær í stk. 1-3 nevndu grundir til at verða fritikin ella avskorin frá nevndarstarvi fyriliggja.

§ 6.

Øll val og útnevningar eru gald-

1) Foreningen Nótaskip vælger 1 medlem og 1 suppleant.
2) Foreningen Idnaðarskip vælger 1 medlem og 1 suppleant.
3) Fiskeindustrivirksomhederne vælger 2 medlemmer og 2 suppleanter.
4) Landsstyret udpeger 2 medlemmer og 2 suppleanter, alle 4 uafhængige af fiskeriindustrien. Den ene af de 2 medlemmer udpeges som formand, det andet medlem er suppleant for formanden.

§ 5.

Følgende personer kan begære sig fritaget for hvervet som medlem eller suppleant for et medlem af nævnet:

1) Landsstyrets, lagtingets og folketingets medlemmer.
2) Personer, der er fyldt 60 år.
3) Personer, som på grund af deres helbredstilstand eller erhvervs- og familieforhold ikke uden fare for deres velfærd kan bestride hvervet.
4) Personer, der bor udenfor Færøerne.
5) Personer, der er ansat under vragerinstitutionen.

Stk. 2. Endvidere kan den, der i 5 år har været ansat som formand for nævnet, begære sig fritaget for formandshvervet.

Stk. 3. Sorenskriveren afgør endeligt, hvorvidt de i stk. 1-3 omhandlede fritagelses- eller udelukkelsesgrunde foreligger.

§ 6.

Alle valg og udnævnelser sker

andi fyri 3 ár í senn. Verður linur fritikin ella avskorin frá at virka í starvstíðini, ella hann vegna sjúku, burturferð ella øðrum lógligum forfalli ikki fyribils kann røkja starvið, tekur varamaðurin við. Er varamaðurin eisini forðaður í at røkja starvið, verður varamaður valdur ella uppnevndur fyri henda.

2. s t k. Nevndin ásetur nærri reglur fyri virki sínum. Hesar reglur skulu góðkennast av landsstýrinum aftaná ummæli frá sorinskrivaranum.

for 3 år ad gangen. Indtræder fritagelses- eller udelukkelsesgrunde i funktionsperioden, eller bliver et medlem på grund af sygdom, bortrejse eller andet lovligt forfald midlertidigt forhindret i at udøve sit hverv, indtræder suppleanten i medlemmets sted. I tilfælde, hvor også suppleanten er forhindret i at beklæde hvervet, vælges eller udnævnes stedfortræder for denne.

S t k. 2. Nævnet fastsætter nærmere regler for sin virksomhed. Disse regler skal godkendes af landsstyret efter indhentet udtalelse fra sorenskriveren.

§ 7.

Allir, sum hava við framleiðslu og útflytan av fiskalýsi og fiskamjøli úr Føroyum at gera, hava eftir kravi frá nevndini skyldu til at geva allar upplýsingar prísviðurskiftunum, eksportvørum og framleiðslukostnaðinum viðvíkjandi.

2. s t k. Tann, sum ikki ger hetta, kemur undir sekt, um ikki harðari revsing er uppiborin.

§ 7.

Enhver, som medvirker ved eksport af fiskeolie og fiskemel fra Færøerne, har pligt til på begæring af nævnet at meddele alle oplysninger vedrørende prisforhold, eksportvarer og produktionsomkostninger.

S t k. 2. Undladelse heraf straffes med bøde, om ikke højere straf er forskyldt.

§ 8.

Útreiðslurnar av nevndararbeiðinum verða at rinda úr landskassanum.

§ 8.

Udgifterne ved nævnets virksomhed afholdes af landskassen.

§ 9.

Henda lóg kemur í gildi beinanvegin og verður at endurskoða ímman 1. desember 1975.

§ 9.

Denne lov træder i kraft straks og underkastes revision senest 1. december 1975.

Víst verður til viðmerkingarnar í løgtingsmáli nr. 67/1974 (vetrarting): Ráfiskagrunnur.

Petur Reinert
landsstýrismaður

/ J. Djurhuus

1. viðgerð 24. apríl og málið beint í fíggjarnevndina, sum 30. apríl legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð av landsstýrinum framlagt 23. apríl 1975 og undir 1. viðgerð 24. apríl beint í fíggjarnevndina.

Í viðmerkingum sínum til lógaruppskot sítt sigur landsstýrið, at prísirnir á idnaðarfiski lækkaðu so nógv í februar, at idnaðartrolararnir góvust við hesi veiðu aftaná hálvan februar í ár. Nakrir løgdu um til aðra veiðu, meðan aðrir ikki hava verið í veiðu síðani. Tað er fyri at fáa hesa vinnu aftur í gongd, at landsstýrið setur uppskot fram um studning til landingar av idnaðarfiski.

Frá felagnum Idnaðarskip hevur Føroya løgting fingið brev dagfest 26. apríl, har felagið ger vart við, at tað ikki er nøgt við landsstýrisins uppskot sum tað fyriliggur, og vísir felagið á hvat í uppskotinum, tað er misnøgt við.

Fíggjarnevndin tekur undir við áskoðan landsstýrisins, at tað er neyðugt at studningur verður latin, fyri at fáa hesa vinnu aftur í gongd.

Semja er um at lata oljustudning samhært uppskot landsstýrisins í løgtingsmáli nr. 69, men hevur fíggjarnevndin í hesum máli hesar broytingar at tilmæla í uppskoti landsstýrisins.

Í § 2, 2. stk. verður í síðstu reglu at seta 22 oyru í staðin fyri 25 oyru.

Í § 2, 3. stk. verða í triðju reglu 12 oyru at broyta til 15 oyru og í síðstu reglu 15 oyru at broyta til 17 oyru.

Í § 2, 5. stk. verður tann orðalagsbroyting, at tá avreiðingarprísur og studningur í Føroyum samanlagt er komin uppá 34 oyru, verður ongin studningur latin til avreiðing uttanlands, og verður gjørt vart við, at við uttanlandsavreiðing verður hert latið so mikið í studningi, at studningur og avreiðingarprísur ikki fara upp um 34 oyru.

Og at í § 2 verður seft sum 6. stk., ið sigur, at í tíðarskeiðinum 1. mai - 10. juni verður latið við landingum í Føroyum eyka 5 oyru í studningi fyri kg, og at reglan í 5. stk. um hálvan studning ikki er galdandi, men verða latin 10 oyru í studningi fyri kg.

Eisini verður gjørt vart við, at føroysk skip, sum binda seg ella hava bundið seg at landa uttanlanda, ikki fáa studning samhært hesa lóg.

Hesar broytingar, ið fíggjarnevndin tilmælir, eru eftir okkara metan ábøtur viðvikjandi tí, landsstýrið ætlar við sínum lógaruppskoti, nevnliga at fáa hjólini á hesum øki aftur at mala.

Uppskot

Løgtingið samtykkir uppskot landsstýrisins við hesum broytingum:

1. Í § 2, 2. stk. verður «25 oyru» broytt til «22 oyru».

2. Í § 2, 3. stk. verður «12 oyru» broytt til «15 oyru» og «15 oyru» til «17 oyru».

3. § 2, 5. stk. verður orðað soleiðis:
   «Verður iðnaðarfiskur avreiddur í havn uttanfyri Føroyar, verður hálvur studningur latin av tí studningi, sum hevði verið latin, um sama lastin varð avreidd í Føroyum. Er avreiðingarprísur og studningur samanlagt, tá avreitt verður í Føroyum, komin uppá 34 oyru fyri kg, verður ongin studningur latin til avreiðing uttanlands. Við uttanlands avreiðing verður bert latið so mikið í studningi, at avreiðingarprísur og studningur ikki koma upp um 34 oyru fyri kg. samanlagt. Skip, ið hava bundið seg til at landa í havn uttanfyri Føroyar, koma ikki undir studningsskipanina. Við uttanlanda landingar er ásetarin í 4. stk. ikki galdandi.

4. Sum nýtt 6. stk. verður sett:
   «Í tíðarskeiðinum 1. mai til 10. juni verður latið í eykastudningi 5 oyru fyri kg til studningarnar eftir 2. og 3. stk., jbr. eisini 4. stk. Í sama tíðarskeiði verður, tá ið 5-oyra eykastudningurin er undantikin, heilur studningur latin eftir 5. stk., tó við teimum avmarkingum, sum har eru tilskilaðar.»

1. I § 2, 2. stk. er «25 øre» broyt til «22 øre».
2. I § 2, 3. stk. er «12 øre» broyt til «15 øre» og «15 øre» til «17 øre».

3. § 2, 5. stk. er orðað soleiðis:
   «Ved landing af industrifisk i en havn udenfor Færøerne, ydes der halvt tilskud af det tilskud, som ville være ydet, såfremt lasten var indhandlet på Færøerne. Såfremt indhandlingspris og tilskud sammenlagt ved indhandling på Færøerne er 34 øre pr. kg eller mere, ydes intet tilskud til indhandling udenfor Færøerne. Ved indhandling udenfor Færøerne ydes der kun så meget i tilskud, at indhandlingspris og tilskud ikke overstiger 34 øre pr. kg. sammenlagt. Skibe, der har forpligtet sig eller forpligter sig til at lande i havn udenfor Færøerne, kommer ikke under tilskudsordningen. Ved landinger udenfor Færøerne gælder bestemmelsen i stk. 4 ikke.

4. Sum nýtt 6. stk. verður sett:

«I perioden 1. maj til 10. juni ydes der et ekstratilskud på 5 øre pr. kg. til tilskudene i henhold til stk. 2 og 3, jfr. også stk. 4. I samme periode ydes der med undtagelse af ekstratilskudet på 5 øre fuldt tilskud i henhold til stk. 5, dog med de indskrænkninger, der er fastsat der.»

Minnilutin (Pauli Ellefsen og Hilmar Kass) setur fram fylgjandi:

Broytingaruppskot

1. Í § 2, 2. stk. ganga út orðini:

til 20 oyru fyri kg. í avreiðingarprísi».	«til en indhandlingspris på 20 øre pr. kg».

2. Í § 2, 3. stk. ganga út orðini:

«til 12 oyru fyri kg í avreiðingarprísi».	«til en indhandlingspris på 12 øre pr. kg».

Minnilutin (Hilmar Kass) setur fram fylgjandi:

Undirbroytingaruppskot.

Í punkt 3 at § 2, 5. stk. gongur út næstseinasta punktum í báðum tekstum.

FIGGJARNEVNDIN, 30. apríl 1975.

Hákun Djurhuus	Poul J. Olsen	Hilmar Bech
Ashjørn Joensen	Pauli Ellefsen	Jógvan Durhuus
	Signar Hansen	

2. viðgerð 30. april.

Gr. 1 samtykt við 23—0.

Gr. 2, stk. 1 samtykt við 23—0.

Broytingaruppskot frá H. Kass og P. Ellefsen til gr. 2, stk. 2, fall við 8—0.

Broytingaruppskot frá meiriluta í nevndini (H. Djurhuus, P. J. Olsen, H. Beck, Signar Hansen og Jógvan Durhuus) til gr. 2, stk. 2, samtykt 16—0.

Broytingaruppskot frá H. Kass og P. Ellefsen til gr. 2, stk. 3, fall 7—0.

Broytingaruppskot frá meiriluta í nevndini til gr. 2, stk. 3, samtykt við 16—0.

Undirbroytingaruppskot frá H. Kass til gr. 2, stk. 5, fall 3—0.

Broytingaruppskot frá meiriluta í nevndini til gr. 2, stk. 5, samtykt við 18—0.

Uppskot frá meiriluta í nevndini til gr. 2, sum nýtt stk 6, samtykt 20—0.

Gr. 2, stk. 2, 3, 4 og 5 soleiðis broytt samtykt við 23—0.

Gr. 2 soleiðis broytt samtykt við 23—0.

Gr. 3, 4, 5, 6, 7, 8 og 9 samtyktar við 23—0.

Øll lógin soleiðis broytt at fara til 3. viðgerð samtykt við 23—0.

3. viðgerð 30. april (kl. 22.30).

Lógaruppskotið, sum tað var samtykt við 2. viðgerð nú samtykt 25—0.

71. Framleingjan av lógini um bráfongis studning til fiskivinnuna

Ár 1975, mikudagin 23. apríl, legði Petur Reinert, landsstýrismaður, fram

Uppskot
til

løgtingslóg um bráðfongis stuðul til útróðurin v.m.

§ 1.
Løgtingslóg nr. 2 frá 13. februar 1975 um bráðfongis stuðul til útróðurin v.m. farin úr gildi 31. mars 1975 verður endurnýggjað.

§ 2.
Henda lóg fær gildi frá 1. apríl 1975 og fer úr gildi 14. juni 1975.

lagtingslov om midlertidig støtte til hjemmefiskeriet m.v.

§ 1.
Lagtingslov nr. 2 af 13. februar 1975 om midlertidig støtte til hjemmefiskeriet m.v. trådt ud af kraft 31. marts 1975 fornyes.

§ 2.
Denne lov har gyldighed fra 1. april 1975 og træder ud af kraft 14. juni 1975.

Vísst verður til viðmerkingarnar í løgtingsmáli nr. 67/1974 (vetrarting): Rúfiskagrunnur.

1. viðgerð 24. apríl og málið beint í fíggjarnevndina, sum 30. apríl legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð framlagt av landsstýrinum 23. apríl 1975 og beint í fíggjarnevndina undir 1. viðgerð 24. apríl.

Tað er løgtingslóg nr. 2 frá 13. februar 1975 um bráðfongis stuðul til útróðurin v.m., ið fór úr gildi 31. mars 1975, ið landsstýrið mælir til verður endurnýggjað og fær gildi aftur frá 1. apríl til 14. juni 1975.

Meirlutin í fíggjarnevndini (Hákun Djurhuus, Poul J. Olsen, Hilmar Beck, Jógvan Durhuus, Signar Hansen) mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

F.L. j. nr. 1510-1-6. - Sí eisini Lt. nr. 29/1975.

Minnilutin (Pauli Ellefsen og Hilmar Kass) tekur undir við at framlongja bráðfongis skipanina tó við hesum broytingum:

Í § 1 verða ordini:	I § 1 ændres ordene:
«Tá ið føroysk fiskifør av línu-, snellu- og snørisveiðu avreiða feskan fisk í Føroyum» broytt til:	«Ved indhandling på Færøerne af frisk fisk fra færøske fiskerfartøjer i fiskeri med langline, snelle eller håndsnøre» til
«Tá ið føroyskt fiskifar avreiðir feskan fisk í Føroyum».	«Ved indhandling på Færøerne af frisk fisk fra færøske fiskerfartøjer.»
Ordini «toskur yvir 70 cm tó undantikin» verða strikað.	Ordene «torsk over 70 cm dog undtaget» udelades.

2. viðgerð 30. apríl.

Broytingaruppskot frá H. Kass og P. Ellefsen til gr. 1

punkt 1 fall 8—0.

punkt 2 fall 9—0.

Gr. 1 samtykt 23—0.

Gr. 2 samt. u. atkvgr.

Lógin soleiðis samtykt at fara til 3. viðgerð samtykt við 24—0.

3. viðgerð 30. apríl (kl. 22.30).

Lógaruppskotið, sum tað var samtykt við 2. viðgerð nú samtykt 25—0.

72. Veðhald fyri láni til p/f Kyrruvík

Ár 1975, hósdagin 24. apríl, legði Jákup Lindenskov, landsstýrismaður, fram

Uppskot
til

løgtingslóg um veðhald fyri láni til p/f Kyrruvík.

§ 1.

Skoytt kann verða uppí, at viðmerkingarnar frá setursskrivstovuni, bls. 3, 4 og 5, vórðu á fundinum settar fram munnliga, men verða samsfundis við hesum sendar limunum í setursráðnum til góðkenningar. Um so skuldi verið, at teir hava okkurt at siga ella leggja aftrat, fara vit at loyva okkum at koma afturum aftur við hesum, sjálvsagt sum allarskjótast.

Fróðskaparsetur Føroya
Academia Færoensis

3800 Tórshavn, juni 1974 J.nr. 3.1-2-74

Uppskot til fíggjarætlan 1975/76, konto 15.9: Fróðskaparsetur Føroya

	Rokniskapur 1973/74	Játtan 1974/75	Uppskot 1975/76	Viðm.
1. Fastlønnir lærarar				
Máldeildin: deildarstjóri	x	110.000	122.000	
amanuensis	x	110.000	129.000	
bóknmentalærari		75.000	123.000	
málfræðingur		75.000	123.000	
Stoðisútb.: deildarstjóri	x	110.000	134.000	
lærari/ulisfræði	x	110.000	123.000	
lærari/støddfræði		75.000	123.000	
lærari/lívfræði		75.000	123.000	
	433.265,73	740.000	1.000.000	1)

2. Aðrar læraralønir				
Máldeild: eykalærarar	13.502,40	17.000	25.000	2)
gestafyrilesarar v.m. ..		25.000	25.000	
Støðisútb.: serfrøðingahjálp	53.246,72	61.000	50.000	3)
Setrið: náttúrufrøði	6.400,36	12.000	12.000	4)
fyrireik. lestur	6.945,60	7.500	7.500	
kvøldundirvising	33.566,76	26.000	35.000	5)
kvøldfyrilestrar	4.104,37	3.500	5.000	
	117.766,21	152.000	159.500	
3. Skrivstovufólk				
Máldeild: skrivari	42.769,95	46.000	48.000	
næmingur el. ½ fólk ..	0,00	14.000	22.000	5)
útskrivingarfólk	4.512,77	5.000	10.000	7)
teknisk hjálp	0,00	10.000	10.000	
Støðisútb.: skrivari	39.215,67	45.000	45.000	
Setrið: avgreiðsluskrivari	28.155,97	60.000	80.000	8)
næmingur-skrivari	17.130,83	20.000	40.000	9)
	131.785,19	200.000	255.000	
4. Húsaútreiðslur				
Máldeild: hús- og tólbúnaður	0,00	30.000	117.000	10)
annað	0,00	12.000	0	11)
Støðisútb.: húsaleiga	12.000,00	6.000	0	
umv., ljós, hiti, reingerð í serl. húsum	0,00	40.000	20.000	12)
hús- og tólbúnaður	0,00	300.000	194.000	13)
Setrið: rentur, avdráttur av starvsstovuhúsum	0,00	85.800	85.000	
húsbúnaður til do.	0,00	0	70.000	14)

Felags: reingerð	28.956,67	22.000	30.000	
ljós, hiti ÷ innt. fyri búrum	1.066,20	4.000	8.000	
smærri umvælingar	2.602,45	2.500	3.000	
lúsavørður/umsjón ..	1.678,34	38.700	40.000	
	46.303,66	541.000	567.000	

5. Skrivstovuhald

Støðisútb.: pappír, tlf. o.t.	10.798,10	15.000	15.000	
Felags: máldeild/setrið	17.853,32	20.000	22.000	
ljósprent, duplikering ÷ luntøkur	8.935,20	12.000	12.000	
	37.586,62	47.000	49.000	

6. Bókakeyp/undirvísingartilfar

Máldeild: bøkur/orðasavning	0,00	8.000	12.000	15)
Støðisútb.: bøkur/projekttilfar ..	32.031,04	51.000	45.000	16)
røkt av søvnum, data ..	0,00	58.800	58.800	17)
	32.031,04	117.800	115.800	

7. Aðrar útreiðslur

Máldeild: innsavning	4.442,60	23.000	20.000	18)
sams./sálarfrøði	10.000,00	3.500	0	19)
Støðisútb.: eykaviðbót/ymist	5.000,00	9.250	8.000	20)
kanningarferðir og eftirlitsvitjan	6.701,35	20.000	20.000	
Setrið innsavning	8.619,50	11.00	5.000	21)
fyrilestrasamsýning ..	15.737,95	2.000	4.000	
fyrireiking av kom. hægri útbúgving	0,00	169.750	0	22)

Felags: ferðaútreiðslur ÷				
støðisútbúgving	2.829,70	19.000	20.000	23)
ymist ÷ do.	1.065,12	2.500	4.000	
	55.296,52	260.000	81.000	

8. Húsastudningur

Setrið: húsaútreiðslur ÷				
leiguinntøkur	12.000,00	12.000	20.000	24)
Tilsamans	866.034,97	2.069.800	2.247.300	

Føroyamálsdeild, tilsamans	563.500	786.000
Støðisútbúgving, tilsamans	976.050	958.800
Setrið, tilsamans	409.550	363.500
Felags, tilsamans	120.700	139.000
Tilsamans	2.069.800	2.247.300

1974/75	Rakstur	Høgur	Tilsamans
Føroyamálsdeildin	533.500	30.000	563.500
Støðisútbúgvingin	676.050	300.000	976.050
Setrið	409.550	0	409.550
Felags	120.700	0	120.700
	1.739.800	330.000	2.069.800

1975/76			
Føroyamálsdeildin	669.000	117.000	786.000
Støðisútbúgvingin	764.800	194.000	958.800
Setrið	293.500	70.000	363.500
Felags	139.000	0	139.000
	1.866.300	381.000	2.247.300

Uppskot til fíggjarætlan 1975/76 (konto 15.9):

Fróðskaparsetur Føroya

Viðmerkingar:

1. **Fastløntir lærarar**

   1) Sum er, hevur Fróðskaparsetrið 4 lærarar í fastum starvi; kerarin í alisfrøði fer tó pr. 1. august 1974. Teir, ið tá eru eftir, fáa í løtuni, sbr. upplýsingum frá Føroya gjaldstovu, í ársløn — heruppí eru tøld 10%, ið landskassin letur í eftirlønargjaldi — uml.:

deildarstjóri á máldeild	121.000,—
umanmensis á máldeild	129.000,—
deildarstjóri á stoðisútbúgving	133.000,—

   Fyri hini starvini, 5 í tali, er fyribils sett miðaltal. 3 av teimum eru sett pr. 1.8.1974, men lønarspurningurin er ikki greiddur viðv. viðbótum.

2. **Aðrar læraralønir**

   2) Roknað verður við einum vokstri í tímalønini upp á eini 50%. Tímalønin hevur verið óbroytt í 2 ár (60 kr.), haraftrat er ein ávisur lønarójavni í undirvísingini, ið ætlanin er at fáa greiddan í næstum, tá ið tímalønarspurningurin sum heild verður tikin upp til kanningar. Samsýning/súlafrøðiundirv. flutt higar av kt. 15.9.

   3) Talið stavar frá Samandrátti av «Planskitse til fortsættelse af den naturvidenskabelige - filosofiske basisuddannelse ved Fróðskaparsetur Føroya», bls. 14 niðust (viðlagt skjal). Til fastløntar kerarar og ráðgevarar hava løgtingið og fíggjarnevndin játtað tilsamans 431.000 kr., harav 370.000 kr. standa á konto 15.9.1.

   4) Ársskeiðið í náttúrusogu fyri lærarar er avlýst í ár vegna av lítla undirtøku, men ætlanin er at nýta játtaða peningin til undirvísingartilfar og -tól, ið tørvur er á til komandi skeið, og annars lýsa nýtt skeið í 1975.

   5) Eisini í kvøldundirvísingini við óbroyttari tímaløn í 2 ár (60 kr.) fara lønarútreiðslurnar vøntandi upp, sbr. viðm. 2). Haraftrat er hugsandi, at vaksið verður um undirvísingina. Annars kann her verða skoytt uppí, at frá komandi heysti verður kravt tilmeldingargjald 50 kr. frá hvørjum luttakara. Hetta minskar sjálvsagt nakað um samlaðu útreiðslurnar.

3. **Skrivstovufólk**

6) Ætlanin viðv. nømingi er broytt til, at starvið skal verða skipað sum hálvdagsstarv fyri útbúgvið fólk.

7) Føroyamálsdeildin søkir um 5.000 kr. meira enn seinast, av tí at komið er nakað væl í afturhond við útskriving, og tannar hetta orðabókarbeiðinum.

8) Ætlanin er, at núverandi fulltrúastarv skal verða skipað sum tannastumaunastarv; enn er tó ógreitt í hvørjum lønarflokki.

9) Nømingurin hevur staðið lærutíð sína 1.4.1975, og starvið verður skipað sum skrivstovustarv fyri útbúgvið fólk.

4. **Húsaútreiðslur**

10) Peningurin, her verður søkt um, er til húshúnað vegna flyting í (væntandi) tóu holi (núverandi Fiskiídnaðarstovu), meira húshúnað (eisini endurnýggging) í verandi hølum og tørvandi tólbúnað, íð áður eingin játtan er fingin til, sí skjal frá Føroyamálsdeildini, íð er viðlagt, bls. 6, 7, 8, 10 og 11.

11) 12.000 kr. á játtan 1974/75 eru kanska peningur, søkt hevur verið um til keyp av flogmyndum í sambandi við staðarnavnaavmerking. Søkt verður um 8.000 kr. í 1975/76, og er tað talið talt upp í innsavningarpeningin til máldeildina á konto 15.9.7.

12) Munurin kemst av, at ikki er roknað við umvælingum í 1975/76. Her má tó fyrivarni verða tikið, soleingi sum húsaspurningurin hjá støðisútbúgvingini er ógreiður.

13) Sí viðlagda Samandrátt av «Planskitse til fortsættelse af den naturvidenskabelige - filosofiske basisuddannelse ved Fróðskaparsetur Føroya», bls. 13 niðast.

14) Sum kunnugt fær Fróðskaparsetrið loftið á nýggja starvsstovubygninginum. Vit hava mett fyribils tørvin á húsbúnað í hesum hølum til 70.000 kr., sí viðlagda skjal frá setursskrivstovuni, bls. 21.

5. **Skrivstovuhald** hevur ongar viðmerkingar.

6. **Bókakeyp/undirvisingartilfar**

15) Handbøkur og bøkur til útskrivingar eru mettar til 10.000 kr., seðlar og kassar til orðasavning til 2.000 kr.

16) Sí viðlagda Samandrátt av «Planskifte .....».

17) Sí viðlagda Samandrátt av «Planskifte .....», bar samlaða talið fyri eitt undirvísingarár er 76.580 kr. Landsstýrið hevur í skrivi dagf. 7.5. 1974 minkað hetta tal niður í 58.800 fyri 3 ársfjórðingar av fíggjarárinum 1974/75. Fyribils verður bert sokt um sonn upphædd fyri fíggjarárið 1975/76, men støðisútbúgvingin fer at loyva sær at venda aftur til málið, um neyðugt gerst.

7. **Aðrar útreiðslur**

18) Henda upphædd umfatar keyp av myndum og kortum til staðanøvn, kvæðasavning, aðrar innsavningar og ymist innsavning viðvíkjandi, sí skjal frá Føroyamálsdeild.

19) Samsýning fyri undirvísing í sálarfroði á ársskeiðum fyri lærarar verður frá komandi heysti at fara av konto 15.9.2: eykalærarar við máldeild.

20) Her kann verða nevnt, at deildarstjórin hevur sokt um hækking í viðbótini fyri leiðslu av støðisútbúgving. Hiðani er støða ikki tikin til hetta enn, og fyribils standa tískil á fíggjarætlan 1975/76 tær galdandi 5.000 kr. + 3.000 kr. til ymist.

21) Setrið hevur gjørt av ikki at sokja um meira pening til arbeiðið við andligum visusongi enn lær 11.000 kr. á núverandi fíggjarlóg, men loyvir sær at biðja um 5.000 kr. í 1975/76 til serligar uppgávur, t.d. ritgerða- ella savningarkapping.

22) Játtanin í hesum fíggjarári verður at nýta til kanningar og fyrireikingar av komandi hægri útbúgving við Fróðskaparsetur Føroya. Til hetta arbeiði verða settar nevndir, ið væntundi kunnu leggja fram álit á vári 1975.

23) Upphæddin er samansett av: 4.000 kr. til heimspekideild, 8.000 kr. til Føroyamálsdeild 4.000 kr. til summarskeið í Norðurlondum fyri føroyskar studentar, 4.000 kr. til setrið sjálvt.

8. **Húsastudningar**

24) Upphæddin er hækkað, av tí at munurin millum avdráttar- og rentuútreiðslur øðrumegin og húsaleiguinntøkur hinumegin veksur stórliga, tá ið Fiskiidnaðarstovan flytur úr setursbúsunum.

Um uppskotið sum heild kann verðu sagt, at veksturin í mun til nógaldandi figgjarlóg er bert 177.500 kr. Tá ið herafturat verður tagt, at bara fostu lærarainnan (ið setrið onga ávirkan hevur á) eru mettar at fura upp við 260.000 kr. og 384.000 av samlaðu upphæddint er Hogukostnaður (330.000 kr. í lutum figgjaráriner), kann valla sigast annað, enn at uppskotið er sett fram við størsta sparsemi í huga.

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

Setúrsskrivstovan

FØROYAMÁLSDEILDIN

tann 18.6.1974

Avgreiðslunevndin

Setúrsráðið

her.

Viðmerkingar til figgjarløgtingslóg 1975/76:

Konto 15.9.1.

Sómu størv sum 1974/75 í sambandi við nýtt prógv í føroyskum, pristalsviðgjørdá.

Konto 15.9.2.

Sama nøgd 1974/75 verður sett á hetta uppskotið til gestafyrilestrar og ymiskt annað til akademiskan lestur, tó við pristalsviðgerð.

Konto 15.9.3.

Skrivarastarvið verður tað sama við pristalsviðgerð. Hjálparfólkið, ið verður sett frá 1. september í ár at rokna, verður tønt smb. starvsmannasátímálan sum skrivstovufólk við upphering á fyrsta ári (pr. 1.4.1974 verður hetta kr. 21.099,-) við tað at starvið bert er hálvan dag, hvar pristalsviðgjørt verður talið helst størri enn tað, sum nevnt er omanfyri.

Til útskrivingarfólk søkja vit um kr. 10.000,-.

Konto 15.9.4.

Um lestsalur skal verð, er neyðugt at fáa hesa útgerð. Hillar til bøkur fram við bróstinum. Borð at sita við, og her hevur verið hugsað um at fingið tvey stór borð, sum síðani við básum kunnu skilast av, so at hvør næmingur hevur sitt. Til hvønn básin er neyðugt at hava eina lampu. Um seks fólk fáa sitið við hvørt borðið, er nóg mikið at fáa einar tólv stólar, sama slag, sum verður nýtt til skúlastovuna.

[illegible] ljóðbeiðsqintið í neðri er neyðugt at hava [illegible]

[illegible] Fuchsline til makacintøk av ljóðbonddum. Stálskáp til makacintøk av [illegible] hundritum oktskjølum. Mappur svarandi til skápinn. Tvey skrivi- ella [illegible] borð. Tríggjar skrivstovustólar, ein til hvørt borðið og eitt til [illegible] lýst skrivimaskinubørð ella til bókmerkta fræðingin.

Viðvíkjandi skrivimaskinum hevur vit hugsað okkum, at tað [illegible] til undirvisingarbrúk hjá námsfólkum er hentari at hava eina manu- [illegible] ella stóra maskinu í dálkherinos, sum er lætt at flyta aftur og fram, [illegible] millum tað er tríaviskriving av bontum og annað tílíkt arbeiði krevst [illegible] eina IBM maskina, sum hevur útskiftiligt kúlutovd, so at lætt kann [illegible] skriva t.d. ljóðskift á [illegible]

Viðtaðat Faldberg bandupptakarin á Fordyrmátsdeildini er upp- slitin av at vera nýttur til avskriving av tónleikabondum við and- [illegible] sum misusangi, er neyðugt at fáa eitt hýggjan av hakað sama slagi, [illegible] kann nýtast til avskriving av bondum. Revox ikki er til taks [illegible] í ella fjardygdin á bandinum ikki skal vera so góð, er neyðugt er at [illegible] nýtt Revox, ella um bond skulu nýtast í undirvisingini t.d. við at [illegible] útlendingar tala. Til hettaseinastu nuvirði søkja vit eisini um [illegible] at Faldberg bandupptakarin eisini kann nýtast til inn- [illegible] sayningaruppgávur.

[illegible] tekniki stóvuhá verður neyðugt at hava eitt bandupptakara — [illegible] kann nýtast til innsávning av sangi, tónleiki, kvæðum og tílíkum, tá krevur eitt gott upptøkutól, sum eisini er 100% [illegible] altánkandi. Hetta fingst vit um at fáa eitt Nagra IV S (stereo), sum vit [illegible] sínum sokt um í fjor, men ikki kunnu fáa. Við tað at pristalið er farið nógv upp eru hesir bandupptakarnir farnir upp í dupult so [illegible] hagan prísur er í dag 40.000,- í fjor til kr. 30.000,- í ár. Ber ikki til at [illegible] Revox upptøkutól, [illegible] Nagra, hvat ið upptøkan viðvíkur, men er lett- ari og minni, tá ber við sær, at tað ikki er eins sterkt í longdini og [illegible] tað [illegible]. Eitt Stellavox bandupptakari er í prísi í dag umr. [illegible] 20.000,- kr. Til tekniska rúmið verður eisini neyðugt at fáa lurtitól [illegible] og avspælingar netta ljóðið [illegible] Til [illegible] netta er neyðugt at hava eina ella tvær eyka [illegible] sum mikrofonir til Nagra ella [illegible] Stellavox. Eisini er nógsamt, at ein lutur nýtist við mikrofon- [illegible] Revox. Eisini er kostnaður fyri hesi tólini netto- [illegible] uppgivið.

[illegible] er neyðugt at hava bond, leidningar o.a. tilfar til tekn- iska rúmið. Fyri at tólini kunnu standa vel og avspælingar verða góðar krevjast góð borð, tum í brúsið ella gólvið. Eitt skrivstovustól er eisini neyðugt at hava í hesum rúminum.

Í eldvarda rúminum eru trehillurnar til upprunatjóðbond um at vera fyltar við tí tilfarinum, ið var. Sostatt verður neyðugt at keypa nakrar aftrat. Somuleiðis er neyðugt at fáa tvey stálskáp aftrat við tilsvarandi mappum til handrit, sagnir, staðanavnatilfar, skaldskap o.a. Til goymslu av myndum søkja vit um eitt myndaskáp við fotorammu og 10 skuffum, ið verður hildið vera nóg mikið fyri fyrst.
Í skúlastovuni verður helst neyðugt at seta hillar upp til bøkur, ið nýtast skulu til undirvísingar, tí inni á Føroyamálsdeildini gerst hillarúmið alt trongri og trongri. Borðini, ið nýtt hava verið dagligu í undirvísingini, eru ov illa farin at nýta uppaftur eitt annað ár. Frá Karl Hansen, snikkara í Klaksvík hava vit fingið tilboð at gera sterkari borð, ið kunnu leggjast saman til ein kostnað, ið er uml. 450,- kr. fyri hvørt.
Á Føroyamálsdeildini er avgjort neyðugt at hava eina IBM maskinu, við útskiftiligum kúluhøvdi, so at ljóðskrift og onnur málslig tekn kunnu skrivast á maskinu. Harumfram verða vit eisini í ár at søkja um játtan til tvær el.-skrivimaskinur ella manuellar við eins góðari dygd til málfrøðingin og bókmentafrøðingin. Á seinastu figgjarlóg søktu vit um kr. 5000,- til hetta endamál. Tað var játtað, men av tí at fulltrúin hevur biðið um eina IBM maskinu til setursskrivstovuna fyri kr. 6.000,- er einki eftir av játtanini til Føroyamálsdeildina, sostatt verður neyðugt at biðja um henda pening uppaftur í ár.

Konto 15.9.6.

Til arbeiði við orðatilfari er neyðugt at keypa fleiri kassar til orðaseðlar og eisini seðlar til orðabókaarbeiði, og ymist annað bæði til undirvísing og granskingararbeiði.
Til Bókakeyp er neyðugt at hækka talið, bæði tí at prístalið er farið so nógv upp, og tí at undirvísingin verður økt. Av somu orsøkum er eisini neyðugt at seta talið upp til undirvísingartilfar.

Konto 15.9.7.

Staðanavnasavningin kemur at halda fram, og neyðugt verður at keypa fleiri myndir, kort o.a. til hetta endamál. Innsavning og gransking av andligum vísusangi er eisini ætlað at halda fram við eina tíð enn, sostatt søkja vit um játtan til tað aftur í ár. Til kvæðasavning er eisini neyðugt at fáa játtan bæði til fullfíggjan av byrjaðum savningum frá einstaklingum og til framhaldandi savnan frá dansifeløgum og øðrum dansiringum, t.d. er ætlanin at savna dansispøl. Umfram hesar innsavningar er eisini ætlað at hava aðrar innsavningar fyri eitt nú skaldskap av mannamunni (sagnir, gátur o.t.), pátrúgv og siðir.
Til ymist annað søkja vit um kr. 1.200,-.

Hetta eru umsóknir, ið ikki verða uppafturtiknar, hvat ið viðvíkur tólum og innbúgvi so vael sum summum av innsavningunum, og vóna vit tíð at Avgreiðslunevndin gongur umsókuini á moti, so at deildin kann átaka sær átroðkandi uppgávur og avgreiða tær vael. Kann peningur ikki verða játtaður, sum søkt er um, verða ætlanir at detta niðurfyri bæði innan innsavning, undirvísing og gransking, vónandi verður hetta uppskot tí viðgjørt við vælvild.

Við heitsan

Jóhan Hendrik W. Poulsen
deildarstjóri.

tann 11.6.1974

Setursskrivstovan her

Av tí at vit ikki hava fingið tilboð á borð og stólar, verður figgjaruppskot okkara ófullfiggjað. Vit noyðast tí at lata tykkum seta talið á, tá vit siga hvussu nógv borð og hvussu mangar stólar okkum tørvar. Lønir lata vit eisini til tykkum at seta á, men skulu viðmerkja, at vit søkja um løn til hjálparfólk hálvan dag við upplæring (á fyrsta ári) smb. starvsmannasáttmálan pr. 1.04.1974 verður hetta kr. 21.099,00; og til útskrivingarfólk kr. 10.000,00.

Á konto 15.9.4. søkja vit um:		Tilsamans:	kr. 117.000,--
1) lesisalur:	kr. 2.500,—	til hillar	
	kr. 1.200,—	— lampur 12 stk.	
	kr. 2.250,—	— 12 — 15 stólar	
	kr. 2.000,—	2 stór borð avskilað við básum til hvønn næmning	
2) arbeiðisrúm:	kr. 2.500,—	til trælillar,	
	kr. 10.000,—	— stálskáp	
	kr. 1.800,—	— mappur	
	kr. 3.000,—	— skrivilborð 2 stk.	
	kr. 1.500,—	— skrivstovustólar 3 stk.	
	kr. 7.500,—	— 1 IBM skrivimaskin og 1 manuella	
	kr. 3.000,—	— 2 kasettubandupptakarar (Sony)	
	kr. 4.500,—	— Tandberg bandupptakara til avskriving el. Philips	

3) tekn.rúm:	kr. 30.000,—	til 1 Nagra IVS ella Stellavox (20.000,—)
	kr. 10.000,—	— mikrofonir, bond, leiðningar o.a. tilf.
	kr. 2.000,—	— føst borð
	kr. 500,—	— skrivstovustól
4) eldvarda rúmið:	kr. 2.000,	til træhillar
	kr. 3.000,—	— stálskáp
	kr. 650,—	— mappur
	kr. 3.000,—	— myndaskáp v. fotorammu + 10 skuffur
5) skúlastovan:	kr. 2.000,—	til hillar
	kr. 5.000,—	— 30 stólar
	kr. 4.500,—	— borð (annaðhvort 10 ella 12)
skrivstovuútgerð:	kr. 6.000,—	til IBM skrivimaskinu
	kr. 5.000,—	— 2 el.-skrivimaskinur

A konto 15.9.6. søkja vit um: Tilsamans: kr. 12.000,—

	kr. 10.000,—	til bókakeyp og undirvísingartilfar
arbeiðstilfar:	kr. 900,—	til 30 pappkassar til orðasavnið
	kr. 400,—	— seðlar til orðasavnið
	kr. 700,—	— annað arbeiðstilfar

A konto 15.9.7 søkja vit um: Tilsamans: kr. 20.000,—

kr. 8.000,—	til myndir kort o.a. til staðanøvn
kr. 2.000,—	— andligan vísusang
kr. 3.000,—	— kvæðasavning
kr. 5.000,—	— aðrar innsavningar
kr. 2.000,—	— ymist annað

Fróðskaparsetur Føroya
Academia Færoensis
Føroyamálsdeildin

STØÐISÚTBÚGVINGIN

Samanfrattur.

Hjálagda «Planskitse til fortsættelse af den naturvidenskabelige filosofiske basisuddannelse ved Fróðskaparsetur Føroya» er við vilja skrivað við teirri fortreyt, at støðisútbúgvingin skal vera sjálvbjargin stovningarliga og figgjarliga, tí á tann hátt verður tað greitt hvussu mikran tarv støðisútbúgvingin sjálv hevur á hesum økjum. Men í høvuðsdráttum fer eitt náið samarbeiði við aðrar landsstovnar at gera tað lætt at fremja sparnað og skeiðis tilfar um ávisar útreiðslur sum t.d. útreiðsluna til fólkamanningina. Vit tar samráðingar, sum vit vona at fáa við landsstýrið, fyri at vísa á møguleikar tilfar sparnaðarelnum.

Sum nevnt fyri, skal eg dugna samanfatningina í innleiðandi «Planskitse».

Samanfatningin hevur 3 høvuðsdeildir, nevnligar:

1. Endamál við føroyskari støðisútbúgving.
2. Fyrigjar- og húsatørvur hjá støðisútbúgvingini.
3. Metingar av royndum, ið hingartil hava verið gjørdar, og møguleikunum fyri framhaldi av støðisútbúgvingini.

1. Endamál við føroyskari støðisútbúgving.

Við støðisútbúgving er at skilja eina heildarútbúgving hjá sínum nemingum ognar sær kunnleika og hattalag, ið eru fólksligir og støðisligar fyri fleiri námsgreinir. Námið av hesum kunnleika og hattalagum fer fram bæði við eginligari námsgreinakensla, lutvist við felagsarbeiði um fyrireiking og lutvist við projekt-arbeiði við leiðbeining frá ymiskum vísindaligum serfrøðingum. Í verandi støðisútbúgvingini hevur soleiðis verið givin kensla í námsgreinunum: livfrøði og livevnafrøði, heilsuspeki, alis- og evnafrøði, støðd- og hagfrøði og frálærusálarfrøði. Eftir fyrstu lestrarhálvu, sum øll eru saman inn, velur nemingurin tað námsevni, sum hann vil troyta til lítar, og sum hann vil siggja samanhangin frá við líttar námsgreinirnar. Hetta samheingið verður í verki viðgjørt í hinum tvørfrøðiligu projekt-arbeiðinum, har sum projektspurningarnir verða valdir á henda hátt:

1. spurningur, ið lýsir hattalag, anboð og úrslit hjá fleiri ymiskum frøðigreinum,
2. spurningur, ið hava rót í føroyskum málsøkjum.

Í núverandi støðisútbúgvingini hevur verið arbeitt fyrst og fremst við 3 projekt, ið eru:

1. Kanning av livyrkisfrøðiligum og sálarfrøðiligum árinum av rúsdrekka og bagtalslig kanning av drykkjusiðum í Føroyum. (Úrslitið av hesum projekti kemur út í ár undir titlinum: «Støðisrit um rúsdrekka», 72 bls.)
2. Dátufrøðilig viðgerð av teimum dátum, ið havrannsóknarskipið Jens Chr. Svabo savnaði saman í sambandi við miðlumtjóða havrannsóknatiltakið «Overflow».

3. Kanning av geislavirkni (serstukliga CS - 137) í ymsum føroyskum matvørum. Her verður dentur lagdur á mátingarlag og at finna á orsakir til møguliga óraettvorðið høgt innihald við hesum isotopi.

Av hesum projektum og eisini teirri sanuroynd, at í sambandi við alt stoðisútbúgvingararbeiðið verður í heilum fraurleitt føroyskt námsbókatilfar sæst fyri ein part, hvat mentanarligt gagn føroyska samfelagið kann hava av tilíkari 2-ára grundvallarútbúgving. Men harumfram skal úr samfelagssjónarmiði verða givið gætur eftir tí, at stoðisútbúgvingin, tí at hon er ikki hátt sergreind men víðgrundað, gevur møguleika fyri millumteknikaraútbúgvingum skapaðnu eftir føroyskum viðurskiftum. Tað er tí fremsta mið hjá stoðisútbúgvingini at vera grundarlag undir eini rað av millumteknikaraútbúgvingum kappingarførum í góðsku og við serstøkum dentli lagdum á tann kunnleika, ið er av týdningi í teimum viðurskiftum, vit liva undir her í Føroyum. Tað er annað miðið hjá stoðisútbúgvingini at geva atgongd at 2. parts universitetsnámi í hinum norðurlondum. Seinna liði viðvíkjandi hava sum kunnugt avtalur verið gjørdur við Odense Universitet og Roskilde Universitetscenter. Fleiri avtalur við aðrar lærdar háskúlar verða fyrireikaðar, meðan ikki kann verða farið undir at loysa spurningin um føroyska millumteknikaraútbúgving fyrr enn stjórnarmyndugleikarnir hava stilað ein politikk á hesum øki. Á 2. bls. eru nevnd nøkur uppskot, ið kunnu verða greiniligari umrødd við møguligar samráðingar okkara millum.

2. Figgjar- og húsatørvurin hjá stoðisútbúgvingini.

Námslagið í stoðisútbúgvingini stendur í høvuðsheitum á felags tillag teirra lesandi undir konari leiðbeining í kenslu og projektum. Soleiðis fer tað at bera til at halda talinum av føstum vísindaligum starvsliði lágum og sostatt eisini rakstrarkostnaði lutfalsliga lágum, meðan tað so afturfyri verða sett storri krav til høli og fyrstuíløgur í tólbúnað til venjingar og projektarbeiði. 1 «Planskitse» verður roknað við í mesta lagi 21 lesandi hvønn árgangin, t.e. í mesta lagi 42 lesandi í senn. Til at fáa hesum 42 lesandi til vegar arbeiðspláss, raunsóknarstøðupláss og tólbúnað krevjast í lestrarárinum 1974/75 og 1975/76 hesar íløgur:

Íløgukostnaður 1974/75:

Húsbúnaður:	2 starvsbólkar	kr.	36.000
	3 kensluhøli	kr.	9.900
	1 fyrilestrarsalur	kr.	19.200
	A. V. - nýtsla (lurt-sjóntól)	kr.	5.410
	dýra- og plantufrøðisavn	kr.	3.500
	fundarhøli	kr.	3.600
	handbókasavn	kr.	15.000
	2 skrivstovur	kr.	12.000
	Tilsamans	kr.	104.610

Tólbúnaður:

livfrøði	kr.	102.700
alisfrøði	kr.	79.400
evnafrøði	kr.	61.500
støddfrøði	kr.	13.000
Tilsamans:	kr.	255.900
Húsbúnaður og tólbúnaður tilsamans:	kr.	360.510

Íløgukostnaður 1975/76:

Húsbúnaður:	2 starvsbólkar:	kr.	36.000
	3 kensluhøli:	kr.	9.900
	Tilsamans	kr.	45.900

Tólbúnaður:

lívfrøði	kr.	20.000
alisfrøði	kr.	58.337
evnafrøði	kr.	61.500
støddfrøði	kr.	8.000
Tilsamans	kr.	147.837
Húsbúnaður og tólbúnaður tilsamans:	kr.	193.737

Viðvíkjandi íløgunum til tólbúnað skal verða viðmerkt, at dentur verður lagdur á tilroyndarútgerð og ikki sýnisútgerð eins og á studenta- og læraraskúlanum. Í tann mun, sum tað tykist hent, ætla vit til sýningar at nýta tey søvn, sum til eru á studenta- og læraraskúlanum, meðan útgerðin hjá stødisútbúgvingini eykar hesi søvn, soleiðis at vísindaligar rannsóknir av virði kunnu verða framdar á frøðiokjunum livfrøði-ltvevnafrøði og alisfrøði-evnafrøði. Tað kemur sostatt ikki til máls at keypa inn útgerðarsavn, ið longu er at finna fullfíggjað á fleiri stødum í Tórshavn. Í tann mun, sum stødisútbúgvingin kann hava tólbúnað í felag við t.d. nýggju evna- og bakteriufrøðistarvsstovuna, landssjúkrahúsið og apotekið kann verða minkað um útreiðslur okkara. Viðvíkjandi samanburði av útreiðslum skal verða nevnt, at bert alisfrøðisavnið hjá læraraskúlanum í 1967-prísi hevur kostað kr. 180.000.

Tað skal eisini verða tikið fram, at nevndi íløgukostnaður ikki fevnir um naglfasta útgerð og innleggingar í starvstovunum og kenslulølunum. Hesar útreiðslur kunnu tíverri vera rættiliga stórar, sjálvt um leigað verður í vanligum nútíðarhóskandi húsum. Við tað at tørvurin á gólvvídd til 42 lesandi og starvslið er slakar 1000 m² ella um 20 m² á fólkið, munnu eisini útreiðslur til húsaleigu vera stórar. Verður roknað við kr. 200 fyri m² um ársið, verður húsaleigan sostatt um kr. 200.000 um ársið. Tað hevði tí spart munandi um útreiðslurnar, um tað bar til at finna eini landshús í Tórshavn av hóskandi stødd og við neyðugum innrættingum til rannsóknarstovu — og arbeiðsplass. Tílík hús er Tjaldurs apotekið, sum eftir tí vit hava fingið upplýst verður flutt í nýggj høli heystið 1975. Við atliti av tí at nýta Tjaldurs apotekið havi eg kannað húsini gjølla. Úrslitið av hesi kanning er, at húsini kunnu nýtast næstan óbroytt innan, og at tey tykjast sera vælhóskandi til endamálið mong ár fram í tíðina. Eg skal tí loyva mær at skjóta upp fyri myndugleikunum, at teir hugsa um hesa stakgóðu loysn á einum annars óloysandi vandamáli.

Rakstrarkostnaðurin hjá stødisútbúgvingini mun, húsaleigan undantikin, vera nakað tann sami fyri 21 sum fyri 42 lesandi. Hetta er ein avleiðing av tí denti námshátturin leggur á felagsarbeiði við leiðbeining í staðin fyri vanliga flokkafrálæring, ið vanliga krevja fleiri lærarar í sama grein til samtíðis at kenna í ymsum flokkum.

Rakstrarkostnaðurin um ársið er:

1. Húsaleiga
2. Lønir til vísindaligt starvsfólk (lærarar)
3. Felagsútreiðslur, við fyrisiting
4. Livfrøði
5. Heimspeki - sálarfrøði
6. Alisfrøði
7. Evnafrøði - livevnafrøði
8. Støddfrøði - hagfrøði

Til 1. Upphæddin kann verða lækkað í 1974/75, tá plásstørvurin er ikki fult so stórur sum í 1975/76. Tað hevur tó fyrimun, at stødisútbúgvingin longu frá september 1974 kann hava tøk hús, ið hýsa kunnu øllum 42 lesandi. Innrættingin kann soleiðis

fara fram undir einum og á tann hátt verða ódýrari. Um Tjaldurs apotekið fæst, verður kostnaðurin munandi minni.

Til 2. Her verður roknað við einum deildarstjóra fyri hvørt høvuðsgreinaøki í støðisútlúgvinginl. Sostatt skulu til tey frøðigreinaøki, ið vit nú fevna um, verða: ein deildarstjóri í lívfrøði, ein í alis- og evnafrøði, ein í stødd- og lagfrøði, ein í heinspeki - sálarfrøði. Lønirnar til hesi størv metast at vera kr. 400.000. Hinar 50.000, ið av leypa, eru lønir til ráðgevar, ið verða boðsendir til ymiskyns serkenslu.

Til 3. Upphæddin kemur soleiðis fram:

1 skrivstovuhjálparfólk við upplæring
1 fyristøðuviðbót
1 skrivstovuhaldskonto
1 konto til fjølritan av projekt-tilfari o.ø.
1 ósundurliðað konto til vanligt kenslutilfar
1 bóka- og tíðarritakonto
1 konto til kanningarferðir og prøvdómarar
1 konto til borðfæ
1 konto til reingerð og húsvørð

Til 4. Upphæddin fevnir um umsiting av søvnum og afturkeyp av tilbúninguin, so hvørt teir verða uppi.

Til 5. Upphæddin fevnir um umsiting av bókaogn og keyp av sálarfrøðiligum royndartilfari.

Til 6 og 7. Upphæddin fevnir um umsiting av tólbúnaði, keyp av eykatilfari, ið forðar fyri at tólbúnaðarognin fyrnist. Harumfram fevnir upphæddin um eykakeyp av evnafrøðievnum, glasvorum o.ø. Serliga verður viðmerkt, at lívevnafrøðiligir tilúningur halda stutt, hóast teir verða goymdir í køliskápi, og tí er neyðugt at keypa teir inn í heilum.

Til 8. Upphæddin fevnir um leigu av dátutólstíð í 2 vikur um árið. Tað er neyðugt, at nærningar okkara eins og við aðrar hægri útbúgvingar fáa høvi til at læra verkliga dátuviðgerð í samband við náttúrufrøðiligar rannsóknir. Royndir okkara við projektinum «Svabodata» hava staðfest okkum tað rætta í hesum. Upphæddin minkar, um landsstýrið, tá tað møguliga fær sær dátutól, vil hugsa um at veita føroyskari útbúgving tíð burturav. Sí annars «Planskitse» bls. 46.

Til samanburðar rakstrarkostnaði viðvíkjandi skal verða upplýst, at ein miðalstovnur fyri eina einstaka frøðigrein við danskar lærdar háskúlar hevur rakstrarkostnað upp á um leið kr. 1,5 mill.

Kostnaður tilsamans fyri lestrarárið 1974/75:

Høga	kr.	360.510
Rakstur	kr.	882.580
Tilsamans	kr.	1.243.090

1975/76 (lestrarár)

Høga	kr.	193.737
Rakstur	kr.	882.580
Tilsamans	kr.	1.076.317

Eftir hesum útrokningum kann sostatt verða mett, at útreiðslur til hægri útbúgving við frágongustigi til bæði millumtekniara- og háskúlaútbúgvingar koma í fasta legu upp á um leið kr. 1 mill. um árið.

3. Metingar av royndum, ið higartil hava verið gjørdar, og av møguleikunum fyri framhaldi av støðisútbúgvingini.

Frá núverandi støðisútbúgvingini verða fyrstu kandidatarnir útskrivaðir summarið 1974, tá ið 2-ára royndartíðin endar. Tær royndir, ið higartil hava verið gjørdar við arbeiðinum, eru sera játtandi, bæði viðvikjandi trivnaði næmingarna og lærdómsstigi. Frá tí samanburðarstøði, eg havi sum fyrverandi fyristøðumaður fyri Det Filosofiske Institut við Odense Universitet, kann eg avgjort mæla til at støðisútbúgvingin heldur fram. Mær er eingin ivi um tað mikla virði, tað er fyri ungdómin í eimm landi, og harvið fyri landsins framtíð, at byrjandi hægri nám kann fara fram í heimligum umhvørvi, har sum stoðið er tey náttúrufrøðiligu, andligu og málsligu virði, sum eru eyðkend fyri júst hetta umhvørvið. Tá ið haraftarat kemur, at støðisútbúgvingin í okkara sniði miðar serliga móti at loysa millumteknikaraspurningin í Føroyum við møguleika fyri framhaldsnámi uttanlandis í øðrum lagi, haldi eg at útreiðslurnar upp á um leið kr. 1 mill. um árið eru samlærligar. **Tí vil eg mæla til, at alt verður gjørt til tess at tryggja framhald av náttúrufrøðiligu-heimspekiligu støðisútbúgvingini.**

Høkillga merkir hetta, at húsaspurningurin fær fulnaðarloysn og at neyðugi peningurin verður játtaður.

Hinvegin er tað greitt, at tilfarsligu umstøðurnar eru neyðugar, men als ikki nóg miklar fyritreytir fyri framhaldi. «Mergurin» í støðisútbúgvingini eru teir persónar, ið eru við í verki, bæði lesandi og vísindaligt starvsfólk. Viðvikjandi afgongul av lesandi er, sum er, eingin orsøk til at halda ,at hon ikki verður nóg mikil. Tá sýnast møguleikarnir fyri at fáa hóskandi hararakreftir ikki javngóðir. Eg haldi tað ikki

hóska á hesum stað at unuroða stakpersónar ella endurgeva samrøður, eg havi havt við møgulig læraraevni, men eg vil fegin draga hetta fram:

Tann arbeiðsháttur, ið er sermerktur fyri støðisútbúgvingina við neyvum sambandi millum lesandi og lærarar og við tvørfrøðiligum arbeiði, setur stór krøv ikki bert til frøðiligan dugnaskap, men í stóran mun til ávisar lyndiseginleikar, ið ikki altíð eru at finna saman við frøðiligum dugnaskapi. Læraraliðið má tí vera samansett av fólki, ið hevur naknð av sjálvstøðugum rannsóknarstarvi aftan bak, við munagóðum frálæringarevnum og við lyndiseginleikum har liðiligleiki og fastleiki eru soleiðis sameindir, at samstarvið verður hvorki leysligt ella stirvið. Til fyristøðuna krevjast sonn eginleikar saman við dugnaskapi í fyrisiting innan hægri námsøki, samráðingarevni, samskipanarevni og evni til at eggja bæði lesandi og lærarum til gott úrslit bæði frøðisliga og læruliga.

Um eitt tílíkt lið, ið hevur í viðfari fyritreytirnar fyri at skilja føroysk viðurskifti og skilning fyri at tað er ymiskt í livinum, ið er týdningarmeiri enn lívið sjálvt, fæst savnað, eri eg ikki førur fyri at siga nakað um, sum er. Kanningar mínar sýna, at møguleikarnir eru smáir, men smáir møguleikar eru tó eisini møguleikar. Og møguleikarnir kunnu nørast, tá tað liggur greitt fyri, um løgting og landsstýri sum heild ynskja, at arbeiði okkara heldur fram og verður rúmkað.

Klaus H. Jacobsen, mag. art.
fyristøðumaður fyri støðisútbúgvingini.

Viðv. Játtan á fíggjarlogtingslóg 1974/75, konto 15.9. til støðisútbúgvingina í tíðarskeiðinum 1.7.74 - 31.3.75.

Vísandi til skriv landsstýrislns dagf. 7. mai 1974 hava vit (sum tíverri ongi onnur skjøl hava at halda okkum til og tískil ikki vita reiðiliga, á hvørm hátt útreiðslurnar fyri akademiska árið 1974/75 eru skornar niður til fíggjarárið 1974/75 ella rettari tíðarskeiðið juli 74 til mars 75) eftir besta førimuni býtt játtanirnar, tilsamans kr. 840.800,-, soleiðis út á undirkonti setursins:

1. Tænastumenn

	Játtan apr./juni	Játtan aftrat	Til-samans
Deildarstjóri/heimspeki	32.500	77.500	110.000
— /alisfrøði	33.500	76.500	110.000
— /støddfrøði	0	75.000	75.000
— /djórafrøði	0	75.000	75.000
	66.000	304.000	370.000

2. Aðrar læraralønir			
Serfrøðingahjálp	25.000	36.000	61.000
3. Skrivstovufólk			
Skrivari	12.000	33.000	45.000
4. Húsaútreiðslur			
Húsalelga	6.000	0	6.000
Umv., ljós, hiti og reingerð í nýggjum høluni	0	40.000	40.000
Hús- og tólbúnaður, íløga	0	300.000	300.000
	6.000	340.000	346.000
5. Skrivstovuhald			
Pappir, tlf. o.t.	4.000	11.000	15.000
6. Bókakeyp/Undirv.tilfar			
Bøkur, tíðarrit, projekt- og kenslutilfar	15.000	36.000	51.000
Rakstur, unsiting av søvnum, data osfr.	0	58.800	58.800
	15.000	94.800	109.800
7. Aðrar útreiðslur			
Ymist	1.250	8.000	9.250
Kanningarferðir og eftirlitsvitjanir	6.000	14.000	20.000
	7.250	22.000	29.250
Tilsamans	135.250	840.800	976.050

FØROYA LANDSSTÝRI
7. mai 1974

Landsstýrið søkir um góðkenning fíggjarnevndarinnar til, at støðisútbúgvingin við Fróðskaparsetur Føroya heldur fram frá heystsemestrinum 1974.

Í fylgiskjølum til uppskot landsstýrisins til fíggjarlogtingslóg 1974/75, jbr. bls. 73, verður frá fróðskaparsetrinum sagt frá, at eingin avgerð tá var tikin um framhald av støðisútbúgvingini, setrið vildi venda aftur til málið seinri, tá ið deildin hevði umhugsað, hvørjar framtíðaretlanir, hon hevði við hesum undirvísingarhátti nú aftaná 2-ára royndartíðin er úti í summar.

3. mars 1974 hevði setursráðið fund og samtykti einmælt at stoðga við at taka upp nýggjar næmingar til støðisútbúgvingina í eitt ár samstundis, sum hugsað verður um og avmarkaða verða, hvørjar undirvísingaruppgávur setrið í framtíðini eigur at taka uppá seg. Hugsað verður um tær undirvísingaruppgávur, setrið longu frammanundan hevur, aðra útbúgving, sum stórur tørvur er á í føroyska samfelagnum, t.d. fyrisiting og víðari útbúgving av lærarum, spurningar í samband við støðisútbúgvingina (eisini spurningar um lærarar og høli) og um framhald av henni til t.d. teknikarar á millumstigi til eftirlitsarbeiði á fiskavirkjum, ramsóknararbeiði, elektronikk og dataviðgerð.

Setursráðið søkti tí ikki um játtan til framhald av støðisútbúgvingini heystsemestrið 1974 men um at fáa eina játtan uppá 170.000 kr. at nýta í samráð við landsstýrið og kanna hvørjar uppgávur setrið í framtíðini eigur at taka uppá seg og leggja til rættis.

Landsstýrið hevði ta áskoðan, at støðisútbúgvingin var byrjanin til eina hægri útbúgving, eina útbúgving, sum bæði kundi nýtast í framhaldandi læru á øðrum lærustovnum og eisini við ymsum yvirbygningum til prøvtøku á ymsum økjum, har tørvur var á lærdum fólki í føroyska samfelagnum. Landsstýrið vildi tó helst, at henda útbúgvingin helt fram, men ásannaði samstundis, at framhald ikki var gjørligt um setursráðið ikki helt seg kunna taka undir.

Fíggjarnevndin og síðani løgtingið tóku til eftirtektar støðu setursráðsins til støðisútbúgvingina og játtaði 170.000 kr. til fróðskaparsetrið til kanningar um, hvørjar undirvísingaruppgávur setrið skal taka uppá seg, jbr. álitið til fíggjarlogtingslógina bls. 8.

Síðani hevur landsstýrið út frá tí støðu, tað hevur havt og enn hevur í hesum máli, at føroyska ungdóminum eigur at standa í boði heima tann útbúgving, vit fíggjarliga og yrkisliga forsvarligt kunna geva honum, heitt á setursráðið um at umhugsa støðisútbúgvingina enn einaferð. Kanningararbeiðið eigur at kunna verða gjørt, eisini um støðisútbúgvingin heldur fram.

2. mai 1974 hevur eitt ikki sameint setursráð tikið ta støðu at taka undir í áheitan landsstýrisins um framhald aftaná summarfrítíðina, og soleiðis at eingin broyting

verður í støðisútbúgvingini hvorki í innihaldi ella í strukturi, eftir tí, landsstýrið hevur fingið upplýst, er tað eitt meirilutí í ráðnum, sum er fyri hesi støðu.

Kostnaðurin verður metur soleiðis fyri ávikavist akademiska árið 1974/75 og fíggjarárið 1974/75:

	akadem. árið	fíggjarárið
Ílagur	360.510	300.000
Rakstur:		
Lønir	450.000	340.000
Fyrisiting	136.000	102.000
Biologi	6.000	4.500
Filosofi - psykologi	5.000	3.800
Fysikk	23.120	18.000
Kemi - biokemi	22.460	17.500
Matematikk - statistikk	20.000	15.000
	1.023.090	800.800

Her er roknað við næmingatalinum 21, verður talið minni, minka útreiðslurnar, men ikki intfallsliga.

Aftaná hesum tølum eru húsaútreiðslurnar. Um landsstýrið keypir húsini hjá Ninnu Zachariasen, jbr. onnur umsókn d.d. frá landsstýrinum til fíggjarnevndina, og húsið fyri fyrst verður latið støðisútbúgvingini kunnu útreiðslurnar metast soleiðis:

Umvælingar v.m.	25.000 kr.
Hiti, ljós og reingerð	15.000 kr.
	40.000 kr.

ella í fíggjarárinum 1974/75 30.000 kr.

Vísandi til tað, sum her er fert fram søkir landsstýrið um fíggjarnevndarinnar góðkenning til í fíggjarárinum 1974/75 yvir fíggjarlógarkonto § 15-9: Fróðskaparsetur Føroya at nýta 840.800 kr. til framhald av støðisútbúgvingini frá heystsemestrinum 1974.

Uppskot til fíggjarætlan 1975/76 fyri konto 15.9.

Í sambandi við innflyting á loftið í starvsstovuhúsunum metir setursskrivstovan, at tørvur verður á hesi játtan

á konto 15.9.4: Húsaútreiðslur

Stólar til fyrilestrasal og undirvísingarrúm	kr.	22.000,—
Borð til undirvísingarrúm	—	9.000,—
Innbúgv og útgerð til skrivstovurúm, heruppí diktafon og skrivimaskina	—	16.000,—
Innbúgv til smáu lestrarrúmini	—	15.000,—
Talvur	—	2.000,—
Bókhillar	—	4.000,—
Arkívskáp	—	2.000,—
Tilsamans	kr.	70.000,—

f. setursskrivstovuna
Maud Heinesen

Ad § 15-2380: Fynafrøðisalig starvsstova.

Konto	R. 1973/74	J. 1974/75	Umsókn 1975/76	Uppskot 1975/76
2590 Aðrar útreiðslur	—	509.0		
	153.1	509.0		509.0

Viðm. frá landsstýrinum:

Uppskot til fíggjarætlan er ikki komið frá stovninum. Játtanin í 1974/75 er tí tikin við óbroytt í uppskotið. Fyrivarni verður tikið um at broyta uppskotið, tá ið tilfar er komið frá stovninum.

Ad § 2390 Ymiskir studningar.

Konto	R. 1973/74	J. 1974/75	Umsókn 1975/76	Uppskot 1975/76
3201 Barnabløð	0.8	5.0	8.0	9.0
3202 Tónleikur og sangur		200.0		200.0
3203 Sjónleikur	85.0	70.0		70.0
3204 Mentu. stovnsfeld	10.0	20.0		20.0
3205 Mentun. bókaútr.	45.0	90.0	100.0	115.0
3206 Fo. listasavn		80.0	25.0	70.0
3207 Útgáva av tingbókum	24.0	5.0	—	—
3208 Sømdarp. skald og listam...	59.3	36.0		36.0
3209 Doyvan av radioótjóði	100.0	120.0		120.0
3210 Lánigr. til bókaútgávu	169.0	100.0		100.0
3211 Skúlabókaútgáva	12.5	184.0	496.0	399.0
3212 Útgáva av orðabókum	75.0	12.5	—	—
3213 Sjónleikarhús [1])	350.0	75.0		75.0
3214 Landsbóka- og landsskjalas. [2])	250.0	500.0		500.0
3215 Sjónvarp í grunn [3])	—	250.0		250.0
3216 Mentun. við Grønland	—	25.0		25.0
3730 Landsst. at ráða yvir	66.5	60.0		60.0
	1.247.1	1.822.5		2.049.0

[1]) Í grunninum pr. 17. juli 1974 vóru 493.000 kr.
[2]) Í grunninum pr. 17. juli 1974 vóru 2.261.000 kr.
[3]) Í grunninum pr. 17. juli 1974 vóru 801.700 kr.

Viðmerking frá landsstýrinum:

ad 3202 Barnabløð: Umsókn fyri Barnatíðindi er ikki send landsstýrinum.

ad 3205 Mentunargr. bókútgáva: Umsókn frá mentunnargrunninum er ikki send landsstýrinum. Skotið verður upp at hækka studningin til útgávu av barnabókum við 15.000 kr. til 80.000 kr.

ad 3206 Føroya Listasavn v.m.: Umsókn frá listaskálanum er ikki send landsstýrinum.

Skotið verður upp at býta studningin soleiðis:

Listasavnið	25.000 kr.
Listaskálin	45.000 kr.

ad 3207: Útgáva av tingbókini. Umsókn er ikki send landsstýrinum. Landsstýrið setur onki uppskot fram.

ad 3211: Skúlabókaútgáva.

Sum tað framgongur av skjølunum frá skúlabókagrunninum, so hevur hann seinasta fíggjarár luvt eitt rakstrarhall uppá um 183.000 kr. við einum landskassastudningi uppá 120.000 kr.

Grunnurin hevur 2 lán, annað úr Sjóvinnubankanum, pr. 31. mars 1974 um 13.800 kr., og hitt úr Føroya Sparikassa pr. 31. mars 1974 um 113.800 kr. Landskassin hevur fíggjað meginpartin av bókaútgávuni, millumrokningin við landskassan var pr. 31. mars 1974 um 740.800 kr. Av hesum úttáni verður renta ikki kravd, her liggur eisini ein studningur.

Spurningurin er um grunnurin, ið hevur tørvandi heimild, í staðin fyri at trekkja uppá landskassan heldur skal upplaka lán. Um so verður, og grunnurin ikki roknar sær størri vinning enn hann ger av bókaútgávu, verður fylgjan, at hin beinleiðis landskassastudningurin má hækkast.

Landsstýrið heldur ikki tað vera ráðiligt at dýrka skúlabøkur og setur tí uppskot um at játta grunninum henda studning.

Til afturrinding av lánum í banka og sparikassa	127.600 kr.
Til minkan av millumrokningini við landskassan	222.400 kr.
	350.000 kr.

Til umsóknina frá bókamiðsølunni er at siga, at landsstýrið heldur, at miðsølan við beinleiðis søla til skúlar uttanum bókhandlarnar hevði kunnað forvunnið meira. Skotið verður tí upp ikki at hækka studningin.

ad 3212: Útgáva av orðabókum. Ongin umsókn er send landsstýrinum. Landsstýrið setur onki uppskot fram.

Ad § 16-2401 Vrakarastovnurin.

Konto	R. 1973/74	J. 1974/75	Umsókn 1975/76	Uppskot 1975/76
1004 Løn/tænastumenn	544.4	594.0		665.0
1120 Ferða- og dagpeningur	87.2	95.0		95.0
	631.6	689.0		760.0

Ad § 16-2410: Nautiskt royndarkamar

Konto	R. 1973/74	J. 1974/75	Umsókn 1975/76	Uppskot 1975/76
1050 Samsýningar	5.4	5.0	5.3	5.3
2590 Aðrar útreiðslur		5.0	5.7	5.7
0790 Ymiskar inntøkur		÷ 1.0	÷ 1.0	÷ 1.0
	5.4	9.0	10.0	10.0

Smbrt. skriv dagf. 2. juli 1974:

.....

skal hervið sigast frá, at útreiðslurnar fyri Nautisk Royndarkamar nakað sum seinasta ár kunnu setast til:

Reiðskaps- og húsaútreiðslur	2.500 kr.
Skrivstovuhald o.t.	1.200 kr.
Ymiskt viðlikahald av kumpasshúsi	2.000 kr.
Umfram samsýning til fyristøðumann	5.300 kr.
	11.000 kr.
Harfrá gongur væntað prógvgjald	1.000 kr.
	10.000 kr.

Ad § 16-2420 Sjómansheim.

Konto	R. 1973/74	J. 1974/75	Umsókn 1975/76	Uppskot 1975/76
3710 Rakstrarstuðningur	79.0	61.0	50.5	50.5
3790 Ymiskir studningar			75.0	65.0
	79.0	61.0	125.5	115.5

Viðm. frá landsstýrinum:

ad 3790 Keyp av grundstykki til sjómansheimið í Reykjavík. Peningurin, sum er játtaður á farnum figgjarlógum, má endurjáttast.

Sbrt. skriv dagf. 29. juni 1974:

Vit takka mikið fyri studningarnar, vit fingu á figgjarløgtingslógini 1974/75 til sjómansheimið í Reykjavík, arbeiðið í Grimsby og sjómansheimið í Føroyingahavnini.

Til komandi figgjarløgtingslóg 1975/76 loyva vit okkum at biðja um hesar studningar:

1. Til raksturin av sjómh. í Reykjavík og arbeiðið í Grimsby: ..... kr. 10.500,--
2. Til ætlandi rakstrarhall 1974 á sjómh. «Lívd» í Føroyingah. ..... kr. 40.000,--
3. Til keyp av grundstykki í Reykjavík, eina peningalutdd, sum saman við tí játtan, ið er framman undan á figgjarløgtingslógini yvir fleiri ár, til falt ..... kr. 75.000,--

Viðmerkingar:

ad. 1. Roknskapur fyri 1973 er innsendur 26/4 - 74.

ad. 2. Roknskapur fyri 1974 er innsendur 26/4 - 74. Hann vísti eitt hall uppá kr. 34.208,48. Í ár meta vit hallið fara at liggja omanfyri kr. 40.000, tó halda vit tað er neyðsýut at opna sjómansheimið í vón um nýggjan gróður í Føroyingahavnini.

ad 3. Sjómansheimið í Reykjavík stendur á leigaðum økl. Fyri fleiri árum síðan fingu vit at vita frá býarstjórnini har yvirl, at sjómansheimið má flytast — við stuttari ávaring — tí ein høvuðsvegur skal leggjast tvørtur um grundøkið. Við hesum veruleika fyri eyga fóru vit tí heinanvegin at royna eftir øðrum byggiøki, og hava vit samstundis síðan 1965 søkt um studning til keyp av

grundstykki. Á hvørji fíggjarløgtingslóg hava okkum verið játtaðar kr. 10.000,—, síðan 1965.

I 1972 høvdu vit eitt upp á hondlna, og var tá givið grønt ljós fyri kr. 60.000, - í studningsveitan, men eydnaðist okkum tíverri ikki at fáa tað.

Nú hava vit so umsíðir fingið fatur í einum 2356 m² stórum grundstykki, sum liggur nærindis við verandi sjómannaheim, har byggjast kann hús 18×18 m. í tveimum hæddum.

Grundstykkjaprísurin er umr. 150.000,— f. kr. Umr. helmingin av prísinum hava vit goldið, og loyva okkum at biðja háttvirda løgting og landsstýri um hesar 75.000,— kr.

Tann partur av hesum peningi sum samlaðar tær fyrru fíggjarløgtingslógir kann verða tokur, biðja vit mikið um at fáa útgoldnan skjótast tilber.

Ad § 16-2430 Vaktar- og bjargingarskip.

Konto	R. 1973/74	J. 1974/75	Umsókn 1975/76	Uppskot 1975/76
0790 Ymiskar inntøkur	+ 100.0	+ 230.0		+ 200.0
2590 Ymiskar rakstrarútl.	838.7	1.000.0		2.067.0
	738.7	770.0		1.867.0

Viðm. frá landsstýrinum:

Nýggja vaktarskipið verður eftir sáttmálanum liðugt frá skipasmiðjuni í 3. ársfjórðingi 1975. Ongin verulig rakstrarætlan er enn gjørd fyri skipið, men verða rakstrarútreiðslurnar mettar til 2,5 - 3 mió. kr. um árið.

At hava eftirlit við trolveiðuni á landleiðini hevur landsstýrið leiga tvey smærri fiskifør og herafturat hevur m/s Dagstjørnan verið í hesi vaktartænastu.

Yvirlit.

Nýggja vaktarskipið ½ ár	1.500.000 kr.
2 smærri skip í 3 mánaðar 2×57.000×3 = ...	342.000 kr.
M/s «Dagstjørnan» í 90 dagar á 2.500 kr.	225.000 kr.
	2.067.000 kr.

I grunninum til bygging av vakturskipi eru pr. 17. juli 1974 8.724.400 kr.

Ad § 16-2490: Fiskivinna, sigling o.t.

Konto	R. 1973/74	J. 1974/75	Umsókn 1975/76	Uppskot 1975/76
3301 Minstaløn til fiskivinnu	13.209.9	14.000.0	10.927.0	1.200.0
3302 Studn. grunn. t. endurn.	9.500.0	9.500.0		1.200.0
3303 Grindir	1.5	8.0		5.0
3304 Prísáset. av salt og ráfiski..	86.5	80.0		90.0
3305 Laksaaling	65.0	550.0		50.0
3306 Havrannsóknars. í grunn ..	250.0	1.000.0		[1]1.000.0
3730 Landst. at ráða yvir	135.7	110.0		150.0
	23.248.6	25.248.0		3.695.0

[1]) Í grunninum eru pr. 17. juli 1974 1.540.000 kr.

Viðmerking frá landsstýrinum:

ad 3301: Minstaløn v.m.

Landsstýrið umhugsar málið um ymsar broytingar í skipanini, við hesum í hyggju og roknskaparløtunum frá 1973/74 verður stuðulin mettur til 12 mió. kr.

ad 3302: Studningur til grunnin til endurnýgging av fiskisklpaflotanum.

Ogn grunnsins pr. 15. juli 1974 aftaná avskrivingar uppá

studningslán	62.544.006,51
útlæntar eru	34.925.294,41
	27.618.712,10
av hesum standa á bók	13.737.797,57
og í likviditetinum	13.880.914,53

Viðmerking frá landsstýrinum:

Bygglætlan 1975/76.

	Bygglpeningur	Studningur
Skála Skipasmiðja	24.000.000	6.000.000
Smærri skip	1.250.000	312.500
Bygging í Noreg	67.994.000	13.600.000
— í Onglandi	5.050.000	1.010.000
— í Týsklandi	4.590.000	918.000
— í Polen	15.200.000	3.040.000
Tekniskar innleggingar		1.000.000
Bátar		400.000
	118.084.000	26.280.500

frestandi partur av 1973/74 verður mettur til 14 - 15 mió. kr.

ad 3305: Sílaaling.

Studningurin 500.000 kr. til p/f Fiskaaling til útbygging av hyljunum norður við Streym og umbøting av hyljunum í Skálabotni var ætlaður sum studningur einaferð. Kostnaðurin av arbeiðinum verður tó nógv hægri, um 1 mió. kr., talan er um at útvega meirkostnaðan í lán.

ad 3730: Landsstýrinum at ráða yvir.

Dmk/Føroyar eru frá 1. juli 1974 limir í einari undirnevnd afturat í ICNAF-kommissiónini. Síðani tað bert eru føroysk skip, ið fiska á hesum øki, verður tað heimastýrið, ið kemur at gjalda nevndargjaldið, mett til 25 — 30.000 kr. árl.

Sbrt. skriv frá Lønjavningargrunninum dagf. 18. juni 1974:

Lønarviðbót		2.077.337,68
Prísískoti, heimalandað	1.270.020,25	
— útlandið	96.038,70	1.366.058,95
Landingarstudningur, mynstraði skip, feskfiskur		1.688.312,81
Útróðrastudningur		3.501.978,04
Eigarastundingur til skip og bátar		1.349.857,35
Studningur til Grønlandsútróður		76.223,25
Fritiðarløn		367.766,26
Jákupskelstudningur (rest)		3.282,90
Fyrisæti		496.228,43
		10.927.045,67

Ad § 17-2501: Landsdjóralæknin.

Konto	R. 1973/74	J. 1974/75	Umsókn 1975/76	Uppskot 1975/76
1006 Løn/læknar		271.0	324.0	324.0
1120 Ferða- og dagpeningur		23.0	22.0	22.0
2180 Leigutreiðslur		3.0	3.0	3.0
2335 Telefon/telex		2.0	3.0	3.0
2590 Aðrar útreiðslur		1.0	1.0	1.0
	133.4	300.0	353.0	353.0

Sbrt. skriv dagf. 30. juni 1974:

Rokskapur 1973/74	Játtan 1974/75	Uppskot 1975/76
133.402,56	300.000	353.000

Uppskotið er soleiðis sundurliðað eftir bestu metan:

1. lønir	324.000
2. ferðaútreiðslur	22.000
3. húsaleiga	3.000
4. telefon, lýsingar, skrivstovulutir	3.000
5. rannsóknir, royndir	1.000
	353.000

Viðmerkingar:

ad. 1. 1 uppskotinum er roknað við meltinum pristali 988 1/7-75. Eingin deildarleiðari er enn settur á deildini fyri reinsemi og bakteriufrøði á starvsstovuni á Dobessartrøð, men søkt verður nú eftir djóralækna við serútbúgving til hetta starv og at taka sær av heilsumálum fyri hitt almenna. Lønin til slíkan serfrøðing velst um tænastufíð og kvalifikatiónir. 1 uppskotinum er mett kr. 156.000.

I overensstemmelse med landsstyrets skrivelse af 13. juni 1974 (F.L.j. nr. 434-1) har man optaget 200.000,— kr. til nye kirker. Udgiften til almindelig vedligeholdelser kan endnu ikke anslås, og man skal derfor foreslå, at der indtil videre uændret optages 300.000,— kr.

Det kan ikke forventes, at der findes disponibel kapital i kirkefonden den 1. april 1975.

Nærværende vil også kunne anvendes som budget for kirkefonden.

Ad § 24-2930 Burturleggingar til avdráttir av lánum.

Konto	R. 1973/74	J. 1974/75	Umsókn 1975/76	Uppskot 1975/76
3825 Avdráttir av lánum	6.448.0	7.500.0	6.125.2	7.000.0

Viðmerkingar frá landsstýrinum:

I figgjarárinum er ætlanin at upptaka 1 nýggjum lánum 15-20 mió. kr. m.a. til vegabygging og bygging av vaktarskipi.

Avdráttirnir verða mettir til 7 mió. kr.

Sbrt. skriv frá gjaldstovuni dagf. 18. juli 1974:

Gjaldstovan metir avdráttirnar av láninum í 1975/76 til kr. 6.125.254,67, samstundis sum víst verður til specifikatión í yvirlitinum viðvíkjandi avdráttum og rentum av upptikoum lánum í 1975/76, sum hjálagt verður sent í fotokopi.

Ad § 25-2940: Avskrivingar.

Konto	R. 1973/74	J. 1974/75	Umsókn 1975/76	Uppskot 1975/76
3850 Avskrivingar	1.712.0	1.670.0	1.712.0	1.712.0

Viðm. frá landsstýrinum:

Síðani budgetterað er við lurturleggingum til avdráttir av lánum, verða avskrivingar av íleggingum figgjaðar við lánum ikki tiknar við her.

Sbrt. skriv frá gjaldstovuni dagf. 18/7 1974:

Vísandi til F.L.J. nr. 400-1988 um uppskot til figgjarløgtingslóg 1975/76 viðvíkjandi **AVSKRIVINGUM**, skal verða sagt frá, at avskrivingarnar í 1973/74 eru hesar:

Avskriving av landsins ognum:

Sethús og grundøki	kr.	8.939,00
Hús í almennari nýtslu	kr.	596.039,00
Anlegg v.m.	kr.	971.278,38
Skip	kr.	135.722,92
	kr.	1.711.979,30

10% avskriving av íleggingum fíggjaðar við lánum:

Úr ymsum stovnum:

Ríkiskassin til Landssjúkrahúsið	kr.	140.707,62
Ríkiskassin til Klakksvíkar sjúkrahús	kr.	89.644,00
Tryggingarsambandið — part av Oyggjarvegnum	kr.	50.000,00
Tryggingarsambandið — Pútaklett — Oyragjógv	kr.	50.000,00
	kr.	330.351,62

Úr 60 mill. grunninum:

Til berghol, brýr & vegagerð	kr.	2.606.333,33
	kr.	2.606.333,33

Hetta verður tilsamans kr. 4.648.664,25, men umfram hetta hevur landskassin í 1973/74 upptikið lán til vega- og brúgvagerð fyri tilsamans kr. 12.527.500,00, og verður avskrivingin av hesum lánum kr. 1.252.750,00.

Eftir hesum kann avskrivingin í 1975/76 metast til kr. 5.901.400,00.

Viðmerkt verður, at lánini úr 20 mill. grunninum nú eru fullt afturgoldin.

ad § 34-4-2 og § 44-5-2: Játtan til ymsar grunnar.

		Játtan kr.
§ 10-510	Løgtingshús	1.500.000
§ 11-1240	Tollpakkhús	500.000
§ 13-2	Havnagerð	10.500.000
§ 13-3	Leadingar	7.000.000
§ 13-4	Flogferðsla	500.000
§ 13-5	Strandferðskip	1.000.000
§ 13-6	Berghols- og brúgvagerð	8.000.000
§ 14-2290	Fimleikur	400.000
§ 14-2295-3115-3117	Lestrargrunnar	330.000
§ 14-2295-3130	Skúlabygging	3.500.000
§ 14-2295-3143	Lærlingaheim	200.000
§ 15-2390-3204	Mentunargrunnur	115.000
§ 15-2390-3210	Lánigrunnur til bókaútgávu	100.000
§ 15-2390-3211	Skúlabókagrunnur	390.000
§ 15-2390-3213	Sjónleikarhús	75.000

§ 15-2390-3214	Landsbóka- og landsskjalasavn	500.000
§ 15-2390-3215	Sjónvarp	250.000
§ 16-3306	Havrannsóknarskip	1.000.000
§ 18-2705	Smærri elverk	204.000
§ 18-2790-3503	Gistingarhús	300.000
§ 18-2790-3504	Menningargrunnur	2.000.000
§ 19-2890-3693	Føroya Spesialskúli	1.250.000
§ 19-2890-3694	Ansingar- og røktingarheim	1.000.000
§ 21	Effektivar veðhaldsbindingar	4.000.000
		44.623.000

ad § 34-4-4 og § 44-5-3: Nýtsla úr grunnum.

Løgtingshús	500.000
Tollpakkhús	500.000
Havnagerð	10.500.000
Lendingar	7.000.000
Flogferðsla	500.000
Strandfaraskip	1.000.000
Berghols- og brúgvagerð	8.000.000
Fimleikur	400.000
Lestrargrunnar	100.000
Skúlabygging	3.500.000
Lærlingaheim	00
Mentunnargrunnur	100.000
Skúlabókagrunnur	399.000
Orðabókagrunnur	12.000
Sjómleikarhús	100.000
Landsbókasavn	500.000
Sjónvarp	100.000
Havrannsóknarskip	1.000.000
Smærri og sekunder el-verk	200.000
Gistingarhús	300.000
Føroya Specialskúli	2.000.000
Ansingar- og røktingarheim	1.000.000
Effektivar veðhaldsbindingar, avskrivingar	3.000.000
Høli til motorsakkøna	100.000
Vaktarskip	2.500.000
Eftirlønargrunnur landsins	100.000
Eftirlønargrunnur sjúkrahúsanna	100.000
kr.	43.511.000

NEVNDARÁLIT
til
FÍGGJARLØGTINGSLÓG 1975/76

Nevndarálit til figgjarløgtingslóg 1975/76

6. februar 1975 endurnýggjaði sitandi landsstýri á tingi tað figgjarløgtingslógaruppskotið, ið fráfarna landsstýrið legði fyri løgtingið 6. august 1974, men við uppískoytingum og broytingum.

Samlaðu meirútreiðslur av hesum uppískoytingum og broytingum vóru slakar 21,5 milj. kr., so figgjarløgtingslógaruppskotið frá landsstýrisins hond kom at verða slívar 271,1 milj. kr.

Undir 1. viðgerð av málinum 11. og 12. februar gjørdu løgtingsmenn vart við upphæddir, ið teir hildu, vóru settar ov lágt, og málsøki, har meira rívan burdi verið tikið til. Tó vóru tað eisini røddir, ið manaðu til varsemi, sum figgjarútlitini vóru júst nú.

1. viðgerðin endaði við, at málið varð beint í figgjarnevndina.

Vanligt hevur verið, at stór tøl eru komin aftrat undir figgjarnevndarviðgerðunum, og var tað figgjarnevndini greitt, at slík tøl eisini undir hesi figgjarnevndarviðgerð vildu gera vart við seg, men var tað ein samd figgjarnevnd, ið hevði ta áskoðan, at sum tiðirnar vóru, var tað neyðugt, at figgjarnevndin «stakk fingurin í jørðina» viðvikjandi figgjarútlitinum í nærmastu framtíð og fekk sær vissar upplýsingar av týdningi frá kønum monnum, ið skulda havt føling av «pulsinum» í vinnu- og figgjarmálum, áðrenn nevndin fór undir nakra endaliga talviðgerð, men aftaná at øll tøl, skjøl og fylgisskjøl viðv. figgjarløgtingslógaruppskotinum vóru gjøgnumgingin.

Sambært áðurnevnda sjónarmið vóru hesir fundir hildnir:

1. fundurin saman við Johan K. Joensen, Sólbjørn Jacobsen og Sofus Olsen, limir í búskaparráðnum,
2. fundurin saman við Birgir Danielsen, stjóra á Føroya Fiskasølu,
3. fundurin saman við bankastjórunum Rasmus Olsen, Sjóvinnubankanum, og Esbern Simonsen, Føroya banka.

4. fundurin saman við statsaut. grannskoðara Carl Vilhelm Weihe og skipara Fjler Jacobsen.
5. fundurin saman við Demmus Hentze, landsstýrismanna í fíggjarmálum og Nicodemus Rasmussen, stjóra á Føroya gjaldstovu,
6. fundurin saman við Demmus Hentze og statsaut. grannskoðara Carl Vilhelm Weihe.
7. fundurin saman við Jógvan Sundstein, landsgrannskoðara.

Tað, fíggjarnevndin vildi hava at vita var:

Hvussu menn sóu upp á fíggjarvánirnar fyri føroyska búskapin í komandi fíggjarári og teirra meting av fíggjarligu beriorku okkara í komandi fíggjarári viðvíkjandi skatti og tolli.

Niðurstøðan av tí,ið sagt varð, var í stuttum hendu:

Vit koma at standa munandi fíggjarliga veikari í komandi fíggjarárinum,ið vit nú fara inní, enn í tí, vit fara útúr.

Útlit er fyri fallandi exporti, bæði í bruttomongd og krónum.

Útlit er ikki bara fyri trongstøðu, hjá vinnuni, men trongstøðan er longu ein veruleiki hjá parti av henni.

Livreinin hjá tí almenna og einstaka í forbrúki má tí spennast inn, samstundis sum tørvur verður fyri kapitali, um ikki ólag og bráðsteðgur skal koma í hjól í samfelagsgongunverki okkara við óhugnaligum avleiðingum.

Sum væntað komu stór miljóntøl at gera vart við seg undir fíggjarnevndarviðgerðini, miljóntøl,ið skuldu verða tikin við men tá fíggjarnevndin metti fíggjarligu støðuna so hættisliga, var ikki rúm fyri slíkum følum á fíggjarløgtingslógaruppskotinum, uttan so, at nógvastaðni mátti skarvast burturav, og varð hetta gjørt av eini samdari fíggjarnevnd.

Meirilutin í fíggjarnevndini (Hákun Djurhuus, Hilmar Beck, Poul J. Olsen, Jógvan Durhuus og Signar Hansen) metir aftaná, at fíggjarnevndin hevur havt samráðing við likningarráðið og gjaldstovuna:

at **samlaðu inntøkurnar** á landsstýrisins fíggjarløgtingslógaruppskoti kunnu verða settar til kr. 269.843.000,ið geva kr. 716.275 í vinningi.

Tá er í landsstýrisins inntøkuuppskoti:

§ 1/0010: Vanligur landsskattur mettur at geva 1 milj. kr. meira.
§ 1/0070: Sjómansskattur mettur at geva 1,6 milj. kr. meira.
§ 1/0095: Fólkapensjónsskattur mettur at geva 1,8 milj. kr. meira
§ 2/0100: Tollgjøld mett at geva 5,05 milj. kr. minni, og
§ 7/0501: Partur av avlopi danska tjóðarbankans mett at geva 1,5 milj. kr. meira.

Sum gjørt vart við, máttu stór miljónbeløb inn á útreiðslustøðuna í

landsstýrisins fíggjarløgtingslógarnppskoti, ið vístu eina útreiðsluupphædd uppá um 271,1 milj. kr. uttan hesi miljónbeløb.

Neyðugt hevur tí verið at gjørt broytingar í útreiðslugreinunum fyri at fáa hesar miljónupphæddir inn uttan at hækka samlaðu útreiðsluupphæddina uppá kr. 269.126.785, sum er stív miljón kr. minni enn uppskot landsstýrisins.

Broytingarnar á útreiðslusíðuni í mun til landsstýrisins uppskot eru hesar:

§ 10. Løgtingið.
Greinin sett til 2.884.000 kr., er lækkað við 265.000 kr.
Broytingarnar eru hesar:

501 Løgtingið lækkað við 250.000 kr.
525 nýggj konto: indeksyvirlit (løgtingstíðindi) 35.000 kr.

Ætlanin er at gera indeksyvirlit viðvíkjandi løgtingstíðindum fyribils aftur til 1947.
530 grannskoðan lækkað við kr. 50.000.

Jógvan Sundstein, landsgrannskoðari metir ta eksterna grannskoðanina at kosta umleið kr. 40.000 og ta innterna til 230.000 kr.

§ 11. Landsfyrisitingin:
Greinin sett til 17.251.000 kr. er lækkað við 971.000 kr.
Broytingarnar eru hesar:

1001: Upphæddin økt við 152.000 kr. Talið á landsstýrismonnum í uppskoti landsstýrisins var bara 5.
1150: Upphæddin lækkað við 100.000 kr. Setan av fólki verður steðgað.
1240: Upphæddin lækkað við 347.000 kr. Kontoin sett í fasta rammu.
1301: Kontoin lækkað við 479.000 kr. og sett í fasta rammu.
1270: Kontoin lækkað við 51.000 kr. og sett í fasta rammu.
1280: Kontoin lækkað við 100.000 kr. og sett í fasta rammu.
1295: Kontoin lækkað við 46.000 kr. og sett í fasta rammu.

Orðalagið «sett í fasta rammu» merkir her og aðrastaðni, har tað er nýtt, at stovnarnir ikki í sínum peningabrúki kunnu fara út um hesa rammu.

§ 12. Heilsumál:
Greinin sett til kr. 22.655.725 er hækkað við kr. 1.716.725.
Broytingarnar eru hesar:

2010: Landssjúkrahúsið er hækkað við kr. 1.303.750.
2020: Klaksvíkar sjúkrahús hækkað við kr. 288.000. *)

*) Til keyp av røntgentølum soleiðis, at sjómenn kunnu verða lungnakannaðir á sjúkrahúsunum í Klaksvík og á Tvøroyri, eru settar kr. 175.000 til hvørt sjúkrahúsið.

2030: Suðuroyar sjúkrahús hækkað við kr. 324.975.

Sambært upplýsingar frá sjúkrahússtjóra J. Djurhuus eru hesi tølini **normalbudget.** Herí eru sostatt ikki roknaðar ætlanir frá yvirlæknunum um serstakar íleggingar og rakstrarkostnaðir til ávísar deildir, men ein øyrnalækni er tikin við. Í normalbudget er íroknað prístalshækking + kr. 400.000 til røntgentól (ein gjalding uppá kr. 400.000 av samlaðum keypi kr. 1.200.000).

2050: Lækuar, hækkað við kr. 200.000.

§ 13. Samferðslumál:
Greinin sett til kr. 67.200.000, lækkað við kr. 2.600.000.
Broytingarnar eru hesar:
1. Nýggir vegir og brýr, breiðkan av brúm og umsiting av vegum (viðm.) er lækkað við kr. 4.600.000.
2. Havnagerð í grunn er lækkað við kr. 1.500.000.
3. Lendingar í grunn er lækkað við kr. 1.000.000.
5. Strandfaraskip í grunn er hækkað við kr. 6.000.000.
6. Berghols- og brúgvagerð er lækkað við kr. 2.000.000.
7. Studningur til kommunur til asfaltering er hækkað við kr. 500.000.

Sambært keypssáttmála viðvíkjandi nýggjum strandfaraskipi um fallstíðir fyri rentur og avdráttir í figgjarárinum 1975/76 eru tølini hesi:

Rentukostnaður kr. 1.380.000 verður settur undir § 5, lániskuld kr. 20.100.000 verður sett undir § 41. Avskrivingar 2,8 milj. kr. verða settar undir § 25, avdráttur kr. 4.020.000 ÷ avskriving 2.800.000 kr. = 1.220.000 kr. verða settar undir § 24.

Berghols- og brúgvagerð fær lut av rakstraryvirskoti landskassans, tá figgjarársuppgerðin er lokin.

Løgmaður hevur upplýst á fundi, at yvirskotið 1974/75 verður 40/50 milj. kr.

Fíggjarnevndin metir talið til 30 milj. kr., í lut til § 13 sostatt ein triðing harav.

§ 14. Skúlamál:
Greinin sett til kr. 32.755.000 er lækkað við 702.000 kr.
Broytingarnar eru hesar:

2220: er lækkað við kr. 152.000.
3116: er strokið.
3130: er lækkað við kr. 500.000.
3132: er strokið.
3145: er strokið.

Í sambandi við hesa grein kann verða upplýst, at til dømis næmingarnir í Høydølunn í fjør fingu umleið 1,7 milj. kr. frá Statens Uddannelsesstøtte.

§ 15. Vísind, bókmentir og list:
Greinin sett til kr. 8.632.000, er lækkað við kr. 349.000.
Broytingarnar eru hesar:

2310: lækkað við kr. 50.000.
2340: lækkað við kr. 99.000.
2375: lækkað við kr. 200.000.

§ 16. Fiskivinna, sigling o.t.:
Greinin sett til kr. 37.548.000, er lækkað við kr. 4.250.000.
Broytingarnar eru hesar:

2430: Vaktar- og bjargingarskip, er lækkað við 250.000 kr.
3302: Studningur til grunnin til endurnýgging av skipaflotanum, er lækkað við kr. 4.000.000.
3306: Havrannsóknarskip í grunn, lækkað við kr. 500.000.
3307: Praktiskar fiskiroyndir, er lækkað við kr. 500.000.

Løgmaður hevur upplýst á fundi, at yvirskotið 1974/75 verður 40/50 milj. kr.

Fíggjarnevndin metir talið til 30 milj. kr.; í lut til § 16 sostatt ein triðing harav.

§ 17. Landbúnaður og matrikulering:
Greinin sett til kr. 4.386.000 er lækkað við kr. 275.000.
Broytingarnar eru hesar:

2510: er lækkað við 150.000 kr.
2520: er lækkað við 30.000 kr.
3403: er hækkað við 80.000 kr.
3404: er lækkað við 300.000 kr.
3405: er hækkað við 200.000 kr.
3407: er lækkað við 50.000 kr.
3408: er lækkað við 25.000 kr.

§ 18. Handil, ídnaður o.t.:
Greinin sett til kr. 5.457.000 er lækkað við kr. 1.272.000.
Broytingarnar eru hesar:

2705: er strokin við kr. 228.000.
3504: er hækkað við kr. 1.500.000.

§ 19. Almenn forsorg:
Greinin sett til kr. 50.116.000, er hækkað við kr. 3.540.000.
Broytingarnar eru hesar:

2815: avsett til hækking av fólkapensjón og avlanispensjón kr. 3.500.000, løgt. nr. 22/1974.
3684: er hækkað við kr. 40.000.

§§ 20, 21, 22 og 23 eru óbroyttar.

§ 24. Burturleggingar til avdráttir av lánum:

Greinin er sett til kr. 8.220.000.
2930: er hækkað við kr. 1.220.000.

Aftrat uppskotinum 7 milj. kr. kemur viðvíkjandi nýggjum strandfaraskipi munur millum avdrátt ..... kr. 4.020.000 og
avskriving ..... kr. 2.800.000

kr. 1.220.000

§ 25. Avskrivingar:
Greinin er sett til kr. 4.512.000, er hækkað við kr. 2.800.000.
Broytingin er hendan:

2940: er hækkað við avskriving 10% av nýggjum strandfaraskipi við kr. 2.800.000.

§ 26. Ymsar ognarútreiðslur, er óbroytt.

Sum tølini vísa, er nógv skarvað burturav innan vissar greinir, men tøl eru komin aftrat, ið hava eitið upp fyri ein part burturavskarvingina.

Eitt stendur tó fast, og tað er, at samlaða talið ikki er vaksið undir figgjarnevndarviðgerðini, men minkað.

Henda «skrift» á veggimum merkir, at figgjarnevndin ikki heldur, at figgjarvánir okkara kunnu bera sama vøkstur í figgjarligum niðurgangstíðum sum í uppgangstíðum og roknar figgjarnevndin við, at landsstýrið syrgir fyri, at leiðslurnar á teimum ymisku stovnum húsast so:

1. at tølini á figgjarløgtingslógini verða hildin.
2. at arbeiðið verður gjørt fyri tær játtaðu upphæddir, ið samsvara við hvørt annað. (effektivisering).

Figgjarnevndin er vorðin var við í fleiri førum útreiðsluupphæddir, ið verða nevndar úrtíðarløn.

Tað er figgjarnevndarinnar áskoðan, at arbeiðið eigur at verða gjørt í arbeiðstíðini.

Samsvarandi tí, ið er fært fram í álitinum, mælir meirilutin (Hákun Djurhuus, Hilmar Bech, Poul J. Olsen, Jógvan Durhnus og Signur Hansen) løgtinginum at samtykkja viðlagda uppskot til figgjarløgtingslóg fyri 1975/76.

Minnilutin (Pauli Ellefsen umboðandi Sambandsflokkin og Asbjørn Jonsen umboðandi Sjálvstýrisflokkin) ynskir at gera hesar viðmerkingar:

Uppskot meirilutans til figgjarlóg 1975/76 vísir kr. 269.843.000 og er sostatt hækkað við kr. 20.220.000 í mun til tað upprinnaliga uppskotið, sum fráfarna landsstýrið legði fram 6. august 1974. Hetta er ein hækking uppá 8%.

Serliga trý høvuðsmál hava almenman áluga, nevniliga tollinntøkur, landsskattur og útreiðslur til loysn av tí kreppu, sum høvuðsvinna okkara er komin og sum útlit eru til fer at versna.

Tollinntøkur.

Figgjarnevndin hevur havt drúgvar samráðingar við menn umboðandi ymiskar stovnar og virkisøkir fyri frá teimum at fáa upplýsingar og metanir um figgjarligu útlitini fyri nærmastu framtíð.

Av samráðingunum framgekk heilt greitt, at allir hesir menn eru stúrnir okkara figgjarviðurskiftum viðvíkjandi.

Nýtslan fer at minka og førir hetta við sær fallandi tollinntøkur til landskassan.

Landsskattur.

Alíknaði landsskatturin fer væntandi at vera hampuliga stórur orsakað av, at hesin verður roknaður út frá inntøkunum í 1974. Allir kunnu tó vera samdir um, at tær inntøkur, sum skatturin skal gjaldast av — nevniliga inntøkan fyri 1975/76 hjá nógvum fer at verða væl lægri enn tilsvarandi inntøkur fyri 1974. Hetta vil bera í sær, at ein partur av skattinum ikki verður inngoldin rættstundis — at skattaeftirstøðurnar, sum longu nú eru nógv ov høgar, verða enn hægri.

Minnilutin er fegin yvir at hava luttikið í nevndu samráðingum við menn, sum, kønir hvør á sínum øki, hava givið virðismiklar upplýsingar, sum vátta, at orsøk er til at vera varin.

Tað er tí serliga hugstoytt, at meirilutin ikki í størri mun hevur vist umhugsni, tá endalig støða var tikin til inntøkuupphæddirnar tollur og landsskattur.

Tollurin skuldi verið lægri og skuldi verið avsett ein upphædd undir útreiðslum til figgjan av vøkstrinum í skattaeftirstøðum.

ÚTREIÐSLURNAR:

Minstaløn v.m.

Tann útreiðsluupphæddin, sum — javnber frammanfyri — hevur størstan áhuga, er innihildin í § 16: Minstaløn og annar stuðnl til fiskivinnuna.

Núsitandi landsstýri økti hesa upphædd við kr. 13.000.000 í mun til upprunaliga uppskotið til figgjarlógina 1975/76, og er hetta tal ikki broytt undir figgjarnevndarviðgerðini. Hetta er eisini tann upphædd sum í minsta mun er viðgjørd. Minnilutin hevur einki fingið at vitað um, hvussu menn eru komnir til vøksturin uppá kr. 13.000.000 og heldur einki um, hvussu tann fráboðaða heildarloysnin kemur at síggja út, ella hvat hon kemur at kosta.

Ferjan til Suðuroyar og millumlandasiglingina.

Í uppskoti meirilutans er innihildið undir útreiðslum kr. 13.400.000 viðvíkjandi ferjuni. Upphæddin er útreiðsluførd undir greinunum 6 landsins stovnar, § 13 samferðslumál, § 24 avdráttir av lánum og § 25 avskrivingar. Meirilutin roknar í hesum við, at ferjan gevur positivt úrslit, áðrenn rentur og avskrivingar. Minnilutin roknar við, at skipið gevur hall og heldur sostatt, at ov lítið er útreiðsluført.

P/f Nordafar.

Allir flokkar á tingi hava givið tilsøgn um, at tað almenna stuðlar keypinum av tí parti av partapeninginum í p/f Nordafar, sum higartil hevur verið á útlendskum hondum. Í sambond við viðgerðina av málinum legði landsstýrið fram kalkulatión, sum vísir, at tað almenna fær veruligar útreiðslur uppá stívliga kr. 2.000.000 árliga. Minnilutin heldur, at hesa útreiðsla átti at verið tikin við í fíggjarlógina.

Um útreiðslurnar

kann annars sigast, at viðgerðin hevur verið drúgv og fyri summar konti eisini gjøllig.

Aðrar konti, einstakar av heilt stórum týdningi hava lítla og onga viðgerð fingið.

Í fleiri førum hava verið framdir stórir niðurskurðir, og er kontoin, sum tað eitur í viðmerkingunum, sett í fasta rammu.

Summir av hesum niðurskurðum eru gjørdir uttan samráðingar við teir leiðarar, sum dagliga disponera yvir útreiðslunum, og hevur minnilutin varhugan av, at ikki allir hesir niðurskurðir í veruleikanum koma at halda.

Minnilutin hevur fört fram, at tað er neyðugt at skera niður almennu útreiðslurnar og er sostatt samdur við meirilutanum í flestu av teimum sparitiltøkum, sum innihildin í uppskoti meirilutans.

Sum tað framgongur av tí, sum frammanfyri er nevnt, er minnilutin sannførdur um, at inntøkuupphæddirnar í uppskoti meirilutans eru ov stórar og meðan fleiri týðandi útreiðsluupphæddir eru ov lágar.

Hóast uppskot meirilutans á pappirinum vísir eitt yvirskot uppá kr. 716.275, er talan eftir meting minnilutans um eitt veruligt hall.

Minnilutin hevur tí í fyrstu syftu kravt, at arbeitt varð víðari við tí fyri eyga at fáa veruliga javnvág á fíggjarlógina og í aðru syftu at broyta uppskotið, soleiðis at veruliga hallið framgongur av fíggjarlógaruppskotinum.

Samantikið kann sigast, at við teimum útlitum, sum eru fyri framman bendir á, at tað áðrenn langt frálíður verður neyðugt at gera eina cyka-figgjarlóg við munandi broytingum í mun til fyriliggjandi uppskot meirilutans.

Teir trupulleikar, sum samfelag okkara stendur yvir fyri verða torførir at loysa.

Tað vil altíð vera mark fyri, hvussu stórar og knappligar broytingar ein kann fremja í einum samfelag. Nevndu trupulleikar kunnu neyvan loysast eftir einum figgjarári.

Tað er neyðugt at gera loysnir við eitt sindur longur sikti. Á hesum øki átti meirilutin eftir hugsan Sambandsfloksins at broytt hugsunarhátt og tikið undir við ætlanini um gerð av ti langtíðarætlan, sum Sambandsflokkurin kravdi.

Umframt tær viðmerkingar, sum gjørdar eru frammanfyri, skal minnilutin gera viðmerkingar til nøkur serstøk mál, og hevur minnilutin nøkur broytingaruppskot til fyriliggjandi uppskot frá meirilutanum.

Í uppskotinum er sett av til hall av føroyskum postverki kr. 1.000.000. Fyri tað fyrsta er henda upphædd nógv ov lág, um postverkið verður yvirtikið. Pauli Ellefsen leggur aftrat, at Sambandsflokkurin ikki er fyri at fremja yvirtøkur, sum merkja stórar figgjarligar byrðar fyri okkara samfelag.

Eisini er í uppskotinum avsett kr. 150.000 til kannan av, hvussu ein landshanki skal setast á stovn. Hesum er Sambandsflokkurin ikki fyri.

Í nógvum plássum her á landi eru umstøðurnar hjá børnum vánaligar spæliplássum viðvíkjandi. Tey hava bert høvuðsvegir við stórari ferðslu at spæla á. Eftir tykki minnilutans er neyðugt at gera nakað á hesum øki.

Sum sagt fleiri ferðir fyrr verða stórir trupulleikar at vinna á innan vinnulívið. Tað er eftir okkara tykki neyðugt at avseta meira pening til stuðul til idnaðarfyritøkur v.m.

Í sambandi við viðgerðina av sosiallógini hevur minnilutin fört fram, at neyðugt er at geva fyrst og fremst einkjum meiri hjálp. Her eigur at verða avsett ein upphædd longu í fyriliggjandi figgjarlóg.

Byggingin av sethúsum er nærum steðgað orsakað av tørvandi financiering. Neyðugt verður at fáa pening uttanfrá. Tílík financiering er væntandi dýrari rentu viðvíkjandi enn vanlig føroysk financiering. Minnilutin heldur tað vera neyðugt at seta pening av til rentustuðning til figgjan av sethúsum. Reglur eiga at verða gjørdar, sum tryggja, at hesin stuðul er so sosialt rættvísur sum gjørligt.

Í uppskoti meirilutans er avsett ein upphædd til kanningar av dálkan. Henda upphædd er ætlað til ávísa uppgávu, av hesum gjalda danir helmingin. Vit halda tað verða neyðugt at avseta naknð afturat til dálkingarspurningin í sínl heild.

Út frá tí, sum frammanfyri er sagt, setur minnilutin (Pauli Ellefsen og Asbjørn Joensen) fram fylgjandi

B r o y t i n g a r u p p s k o t
til
meirilutans uppskot.

1.	ad § 12/3008	Dálkingarkanning	kr.	60.000
		Forureningsundersøgelse verður broytt til	kr.	100.000
2.	ad § 13/8	Sum nýtt punkt Studningur til kommunur til gerð av frítíðarøkjum (spæliplássum) Tilskud til oprettelse af fritidsarealer (legepladser)	kr.	300.000
3.	ad § 18/3504	Til menningargrunn	kr.	3.500.000
		Til udviklingsfond verður broytt til	kr.	4.000.000
4.	ad § 19/3684	Fráhaldsfeløg	kr.	100.000
		Afholdsforeninger verður broytt til	kr.	200.000
5.	ad § 19/2851	Sum nýtt punkt verður sett: Meirhjálp til einkjur v.m. Yderligere understøttelse til enker m.v.	kr.	300.000
6.	ad § 19/3695	Sum nýtt punkt verður sett: Rentustudningur til figgjau av selhúsum Rentetilskud til finauciering af beboelseshuse	kr.	500.000

Herumfram setur minnilutin fram fylgjandi:

B r o y t i u g a r u p p s k o t

til

meirilutans uppskot.

1. ad § 6/0145 Postverkið
Postvæsenet ..... ÷ kr. 1.000.000
verður strikað.

2. ad § 11/1101 Landsskrivstovan
Landskontor ..... kr. 2.468.000
verður broytt til ..... kr. 2.318.000

FÍGGJARNEVNDIN, 24. mars 1975.

Håkun Djurhuus **Hilmar Bech** **Poul J. Olsen**

Jógvan Durhuus **Signar Hansen** **Pauli Ellefsen**

Asbjørn Joensen

Frágreiðing frá løgmanni 1974

Frágreiðing frá løgmanni 1974

Um stutta tíð leggur tingmanningin virki sítt í fýra ára valskeiðnum til metingar.

Andstøðuflokkar og samgonguflokkar hava róð ein drúgvan og ofta tungan róður, men sjálvt júst áðrenn at landi verður lagt veit eingin um róð varð borð um borð, ella um nakrir rúmu fram um seinasta strekkið. Tá dómararnir hava talað — og gera teir tað í seinasta lagi 7. novemberár — ber til at gita sær hvørm part av forninginum teir einstaku flokkarnir skulu flyta viðari.

Ivaleyst hava allir tingmenn gott treysti, tí teir hvør sær eru samførdir um, at støðutakanir teirra hava verið í tráð við, hvat rætt og skilagott er í samfelagsviðurskiftum.

Kor demokratisins, at veljarin í minsta lagi fjórða hvørt ár skal samtykkja ella vraka hesar støðutakanir, góðtaka vit, og vilja vit verja hesa skipan, sum uttan mun til valúrslitið veitir rætt til framvegis at virka fyri undirtøku við ymsu hugsanunum um samfelagsins skipan, vit hvør sær umboða.

Samgonguflokkarnir meta, at búgvið, teir lata frá sær ella taka aftur, er munandi styrkt og konsoliderað á øllum teim mongu økjum, sum hitt almenna hevur at umsita, at fyriskipa á, ella kemur í samband við.

Framd er útbygging í eitt mát, vit ongatíð fyrr hava sað, og á so nógvum økjum í senn eru broytingar og ábøtur hendar, at valla kann leggjast meira fyri, uttan at tað fær óhepnar avleiðingar innan vinnulívið.

Neyvan fæst semja um, at útbyggingin er framd í rættari røð ella at tær loysnir, valdar eru, eru tær skilabestu, og hóast samgongan í førum,

har ikki stórur meiriluti av tingmonnum hevur verið samdur, einsamøll hevur tikið ábyrgd av nýtta gongdini, so má ivaleysl eisini hon sama, at á onkrum øki var ikki rokkið tað, ætlað var, og at onkur fyriskipan ella lóggáva ikki royndist sum væntað.

Men hóast mangur situr við hugsanum um, at júst hansara áhugamál áttu at ligið fremri í røðini, mugu vit oll stórt sæð verða nøgd við úrslitini, og nøgd við, at tey tøk, sum undanfarnu ár — í verri tíðum — vórðu tikin fyri at fáa hóskilig vinnuamboð til vega, ikki vórðu til fánýtis, men gjørdu tað møguligt at nýta prísliga viðrákið innan fiskivinnuna til at røkka longri, enn mangur droymdi um fyri fáum árum síðani.

Nevndi ífjør, at óvissan um, um vit framhaldandi vildu eiga sonn inntøgumøguleikar at byggja á, var vorðin størri, og sum fráleið komu eisini ymsir avlagandi tættir inn í myndina. Umfram ótryggleikan í gjaldoyrisviðurskiftum og vaksandi avmarkingar í virkismøguleikum á fjarleiðum komu vit undir mein høgg av tiltøkum, tey oljuframleiðandi londini settu í verk undir kreppuni í Miðeystri.

Hóast hetta so munar framda útbyggingin og fjøltáttanin av vinnulivinum so mikið, at árið 1973 royndist okkum hitt avgjørt besta til skurð, og at fyrra helvt av 1974 sýnir vøkstur í útflutningsvirðinum av slíkari støðd, at tað ber til at rokna við, at hann væl vegur móti oljunótreiðslunum. Víst minka tær rakstrarúrslitini, men møguleiki skuldi verið fyri hampuligum rentabiliteti eisini fór.

Gjaldjavnin í 1973 sýnir 90 mill. kr. í yvirskoti, og er árið sostatt triðja í røðini við yvirskoti, har øll omnur — burtursæð frá 1967 — hava sýnt halli.

Útflutningurin vaks við 163 mill. kr. til 471 mill kr., og er hesin vøkstur av sonnu støðd sum samlaði útflutningurin í 1967 — tað árið hesir triggir flokkar myndaðu landsstýri. Tað skal tó sigast, at vøksturin eisini stavar frá, at seld vóru gomul skip fyri 37 mill. kr.

Økingin í útflutningsvirðinum fyrra hálvár 1974 er umleið 70 mill. kr. í mun til fyrra hálvár 1973, og er summlagt útflutt fyri góðar 250 mill. kr. fram til 1. juli íár.

Hvat viðvíkur flogum og uppsparing hjá einstaklingi og í almenna, einstaklingaúrtøku og bruttotjóðarúrtøku, kann ikki sigast annað, enn at vit kunnu vera eintir við okingina. Men ivaleyst eru øll ikki samd um, at hýtið millum manna av hesi øking hevur verið nøktandi.

Tó er hon í vissan mun komin øllum tilgóðar í realinntøkuni, men tað verður ein uppgáva politikarnna — saman við ymsu feløgum og stovnum — framyvir at skipa fyri best møguligum javna í hýtinum av meirinntøkum so væl sum av hyrðum.

Bruttotjóðarúrtøkan, sum fyri átta árum síðani var umleið 450 mill.

kr., man ár rivuliga fara um 1 milliard krónur, meðan bruttosparingin, sum tá var 138 mill. kr., í 1973 lá omanfyri 400 milliónir.

Hesin talligi vøkstur sigur tó ikki alt, tí tølini broytast eisini av prísvøkstri og øðrum fyribrigdum. Sambærlig tøl finnast tí ikki, men arbeiðið við at fáa tey til vega er væl áleiðis komið, og kunnu vit vænta at hava tey tøk í komandi ári.

Tó kann sigast um tey skjøl, sum hjáløgd eru løgmannsrøðuni ár, at í øllum tølunum, sum búskapinum viðvíkja, er goyndur ein realøkonomiskur vøkstur. Tað er torført at lýsa hann í procentum — hóast menn summi ár hava skotið uppá 6% — men fleiri av sekstiárunum og sjeytiárini hevur hann ivaleyst verið heldur størri í Føroyum enn t.d. í Danmark.

At so er hevur ymsar orsøkir, eitt nú at vit frammanandan ikki lógu á hædd við hini norðanlondini, men serliga eru tað tær stóru løgurnar, sum innan nærum øll øki hava ávirkað eina mumandi effektivitetsøking.

Iløgan uppá fólkið í vinnu er í dag so stór — og serliga innan fiskivinnuna — at tann arbeiðsmongd og virðisøking, hvør einstakur kann avrika, er fleirfaldað.

Hetta sæst innan skiparekstur, har tey best útgjørdu skipini geva fraegastu úrtøkuna. Innan byggiídnaðin greiða menn við maskinum byggingar og entreprenørarbeiði av góðsku og stórleika, vit ikki hava kent fyrr, og handverk og ídnaður framleiða við nýggjum ravmagnsríkum tólum vørur, ið áður vóru torgjørdar, í slíkum tali, at tær eru týðandi í búskapinum.

Men samfelag okkara hevur altíð verið fyri broytingum í umstøðum og innløgumøguleikum, og er tí at hava sær fyri eyga, at vit eisini skulu gjøgnumliva versnandi tíðir, og at tær broytingar verða gjørdar í vinnugrundarlagnum, sum gerast neyðugar, um vit skulu liggja á tryggari kós.

Vit mugu tí frammvegis tryggja javnvág ímillum útbygging av verandi vinnuøkjum og av økjum, vit eru ikki hava troytt, ella sum lítið eru troytt.

Ein ávisur trekleiki í at broyta fær lagaligu umstøður, skaptar eru tí verandi, vil altíð vera, soleiðis at vandi er fyri, at meira enn gott er fer í annan leypin, soleiðis at hann dettur av, tí broytingar koma ov seint.

At hava so skilagóða samfelagsplanlegging, at vit kenna neyðugu tiltøkini, og at fora at fremja tey nóg tíðliga, verða meginuppgáva politikaranna í komandi árum, har samfelagsspurningar gerast alt meira torgreiddir (kompliseraðir), og har viðskiftið við umheimin, kunnleiki til viðnrskiftini har og samvinnan við umheimin alt meir og meir gerast fortreyt fyri jøvnum lag í eini framhaldandi útbygging.

Í Føroyum verður tosað so nógv um áfrælsar støður og um eyðræning útlendinga. Men hvat er frælsi í okkara verð í dag? Danska skaldið H. C. Branner sigur:

«Absolut frælsi er
absolut meiningsloysi,
lí maður er berl maður gjøgnum
eina rúgvu av høftum og bundnum viðurskiftum.»

Skiparakstur — Endurnýggjan.

At útvega sær nóg stórt veiðuøki, til at økta skipatalið kann veiða nærum sonu uøgd sum áður, søgdu vit í fjør vera fortreytina fyri framhaldandi útbygging og menning innan skiparaksturin.

Hagtølini, flýggjaði eru tingmonnum viðvíkjandi manningarportum og rakstrarúrslitum hjá veiðuflota okkara, vísa, at hóast vit ídag veiða á fleiri leiðum enn fyrr, við størri skipatali og fleiri skipasløgum eftir einum vaksandi tali av fiskasløgum, so eru úrslitini innan allar lættir góð. Serliga er at gleðast yvir vøksturin í fiskimannainntøkunum í teim ymsu veiðuhættunum. Nevnast kann serliga linuveiðumenn, sum fyri fáum árum síðani høvdu heldur lakar inntøkur, teir liggja nú ájavnt við aðrar.

Til lýsingar av broytingunum í vinnuni eru uppsett tøl fyri veiðunøgd, fiskasløg og veiðuøki ymisk ár innan fyri eitt tíðarskeið uppá 14 ár. Tey sýna, at meðan økið vestanfyri Kappan fyrr var høvuðsálitið, eru í dag fleiri øki, sum hava avgjørdan týdning, men serliga eru tað Norðsjóarleiðirnar, sum nú føða okkum.

Føroyaleiðirnar fáa vaksandi týdning, og vil hesin óivað økjast, so hvørt vit læra at troyta tær á ymsan hátt, moguleikarnir eru nú bøttir eftir samráðingar við aðrar, sum her veiða.

Teir mongu skipasáttmálar gjordir eru - - talan er um einar 35 byggingar - - henda á, at menn hava álit á, at tað fer at eydnast at halda fast um flestu av møguleikunum, vit eiga ídag, og frøast vit um hetta álit.

Men tá hetta álit saman við góðum møguleikum fyri at fáa úlsetan við skattgjaldan og fyri at javna skattin á tey ár, tað hóskar einum best at gjalda, elva til eitt slikt trýst á landskassa, grunnar og slovnar eins væl og felagsskrásetting, at vit kenna á okkum, at tað er ivasamt, um ikki útbyggingin fer út um tað, vit orka, og tað, vit hava manning til, eiga vit væl at tátta eitt sindur í. Einstaklingurin ger tað ikki, og uppgáva okkara er - lá vit ikki sjálvir mongu fyriskipa byggingunum - at samskipa einstaklingavirksemið á ein slíkan hátt, at tað samrímar við samlaða lørv samfelagsins.

Amboðini, vit hava at stýra hesi gongd við, eru:

Studningslógir
Avskrivingarlógir
Skattalógir og
Veiðustudningslógir.

Hesar skulu ikki broytast ov tíðum, men hert í tanu mun neyðugt er at avmarka ella eva til skipaløgur, tí broytingarnar bera í sær ójavnar møguleikar fyri borgararnar, teir sum hava ilagt áðrenn og aftaná eina broyting, og teir, sum ikki ileggja, men ígjøgnum skattafiggjaðu studningsveitingina stuðla fyritakssemið og vaksa um egnu og annara innløgumøguleikar.

Grundregluni, at allir borgarar skulu eiga javnar møguleikar og luttøku í byrðunum, mugu vit liggja so nær sum gjørligt.

Landsstýrið metti longu í 1971, at áhugin fyri at endurnýggja skipaflotan var stórur, og at ikki var neyðugt við ov stórum skattligum fyrimunum fyri at fremja hetta. Uppskot til tryggjan av einum javnum lag í skipabyggingini og til tryggjan av, at nóg mikið bleiv bygt í Føroyum, vórðu løgd á tingborð bæði í 1971, 1972 og 1973.

Tingið tók ikki undir við landsstýrinum í øllum. Í hvussu er ikki í avmarkingaruppskotinum til avskrivingarlógina og studningsskipanarlógina.

Meðan landsstýrið mælti til at broyta nakað av studninginum til lagalig lán, men at varðveita figgjarmøguleikan, sum liggur í studningsskipanini, so hækkaði tingið studningin til summar byggingar, og meðan landsstýrið mælti til avmarking í forhondsavskrivinguntun, men lagaligar rakstraravskrivingar, viðkaði tingið møguleikarnar fyri avskrivingum uppá skipasáttmálar.

Tað er nú vorðið eyðgreitt, at landskassin og kommununnar koma at geva so munandi fyribilstilskot ikki einans til skiparaksturin, men eisini til nýtslu einstaklingsins, at vandi er fyri, at aðrar uppgávur í virkinum fyri at skapa fortreytir fyri virkseni vinnulívsins og tað ríkast møguliga einstaklingalív koma at liggja á láni. Landsstýrið leggur tí fyrst í tingsetuni fram uppskot, sum miða inóti at taka burtur mesta partin av teirri likviditetsvíðkan hjá einstaklingum, sum liggur í forskotsavskrivingarmøguleikunum.

Hesar reglur verða gjørdar so, at tær virka eins fyri allar einstaklingar og teir samtukshæltir innan vinnulívið, sum vanligir eru.

Landsstýrið hevur altíð mett, at vinnulívið átti at tingið møguleika til at latið nakað av endurnýggingarstudninginum fløtt aftur í grunnin, soleiðis at skattgjaldarin, sum studlað hevur, sum fráleið slapp undan at leggja heinleiðis í grunnin. Saman við tí lati, hann fær burtur úr ekta virkseminum og tí skatti, sum hitt almenna fær av hesum, so skuldi javn-

vág tá verið endurstovnað ímillum tann ágóða hesin skattgjaldari fær, teir lættar hann kann fáa og tey tøk, hann hevur tikið.

Uppskot um slíka broyting verður lagt fram aftur.

Vinningur við skipasølu út um upprunakeypsvirðið hevur ikki verið skattaður; landsstýrið vil mæla tinginum til at leggja ávíst avgjald á slíkan vinning, tá hann ikki verður nýttur til at niðurskriva nýggj raksturargøgn.

Arbeitt hevur eisini verið við serligari lóggávu viðvikjandi partafelagsskatting, har menn vilja vera við, at ein ávís dupultskatting er framd, men henda fevnandi lóggáva verður valla liðug í byrjanini av tingsetuni, men verður tikin við í tí stóra endurskoðingararbeiði, øll skattalóggávan stendur fyri. Landsstýrið vil tó beinanvegin leggja nakað av tí grundtilfari, skattanevndin hevur savnað til kunnleika tingsins. Hetta nevndararbeiði koni eg aftur til.

Føroyskt skipasmíð, sum fyri tveimum árum síðani kom í álvarsliga kreppu, er nú við at menna seg aftur.

Tann byggigrunnur, fingin varð til vega við 30 millióna láninum úr Luxembourg, veitir helvtina av fíggjanini til 3 krafthlokkafør á Skála, og er fyrsta av hesum farið úr barkastokki í juni íár.

Skála skipasmiðja tykist vera endurreist á einum hollum grundarlagi, og er arbeiðið komið í javna gongd.

Í Vestmanna hevur landsstýrið latið gera ymisk projekt til útbyggingar, sum skuldu gjørt tað møguligt at farið aftur undir bygging. Hesi eru latin felagnum til metingar. Tað vil so taka støðu til, um farast skal undir nýgerð, ella um høvuðsdenturin eina tíð skal leggjast á tað mikla umvælingararbeiði, økta skipatalið ber í sær.

Skipasmiðjan eigur annars sannhert støðu tingsins sonn møguleikar, sum veittir vóru Skála við endurreisingina.

Enn vita vit einki um byggingar verða framdar í Tórshavn, tá ferjurnar eru liðnar, men vóna vit, at bæði her og aðrastaðni í Føroyum verða umstøðurnar so, at byggjast kann, tí tað má kennast okkum náttúrligt, at sum mest verður smíðað heima hjá okkum sjálvum. Tað arbeiðið kenna vit sum valasmíð.

Hitt mikla trýstið á útlendskar smiðjur, sum seinnu árini hevur dýrkað okkum endurnýggingina av skipaflotanum, skuldi menn kappingarførið hjá okkara virkjum, tí partur av dýrkanini stendst av øktum virksemi innan aðrar ídnaðargreinir í londum, sum vanliga byggja fyri føroyingar. Landsstýrið vil vakið fylgja útbyggingini innan fiskivinnuna og framvegis stuðla, so vinnugrundarlagið gerst so breitt sum gjørligt, soleiðis at vit hava hóskandi skipasløg til øll tey øki, har okkum lutast rættindi til.

Gongdin í seksti- og sjeytiárunum hevur givið tað treysti, at neyðugar løgur framvegis verða framdar.

Idnaðurin

væntuðu vit fór at taka dik á seg í sjeytiárunum, og áðrenn skeiðið er hálvrunnið kunnu vit meta um, at útbyggingin innan henda fátt kemur at roynast.

Umfram lær stóru broytingar, hendar eru í virkismøguleikunum á landi við øktu landingunum heima av saltfiski, ísfiski, idnaðarfiski og sild, og av viðgerðini og eksportpakkingini av hesum, eru fleiri og fleiri komin í vinnu innan idnað, sum ikki beinleiðis hevur við fiskaúrdrátt at gera. Hesin er høvuðsstólpin, men framleiðsla á mongum øðrum økjum ger seg eisini galdandi.

Verandi fiskavirkir eru nærum øll útbygd mumandi seinastu áriui ella eru í løtuni undir útbygging, samstundis sum fleiri nýggj standa í gerð ella eru undir fyrireiking. Hetta er fylgjan av leirri broyting, at meira kemur uppá land og í størri nøgdum tsenn enn fyrr. Fiskavirkini hava notið gott av bøttu figgjarmøguleikunum, og í prísligum uppgongutíðum verða tey eisini av og á fyri at fáa konjunkturvinningar í sín lut, og eru tey flestu tíídag útgjørd við nýggjum amboðum fyri tey gomlu slitnu, og hava sostatt møguleika fyri at arbeiða meira rationelt. Gott er hetta, tí í løtuni gongur hektur strilfið við søluni av onkrari framleiðslu, t.d. frystum fløkum og er tá umráðandi, at framleiðslukostnaðurin fyri eindina gerst minni uppá seg.

Konjunkturmissurin í prísligum niðurgongutíðum kann einans rationaliserast burtur, skal sleppast undan almennari studningsveitan til virkini.

Tann handilssáttmáli, sum nú er undir landi við felagsmarknaðin, og sum minkar tollin komandi árini, skuldi eisini bøtt um her, og gjørt tað møguligt at farið undir framleiðslu av meira viðgjørdum vørum, soleiðis at størri partur av virðisøkingini kemur at liggja heima hjá okkum sjálvum.

Hesin sáttmáli, sum eg vendi aftur til, undantekur eisini aðrar idnaðarvørur frá tolli og skuldi tí tey ár, hann er í gildi, fingið ómetaligan týðning fyri uppbyggingina av idnaði uttan fyri fiskivinnuøkið.

Egusútviklingargrunnurin saman við idnaðargrunni, menningargrunni, landsstýrisins veðhaldum og studningum, bankafiggjanini og Luxembourglánunum hava ta stuttu tíð, tey hava virkað saman, lagt støðið til fleiri nýggj virkir. Skal hert nevna byggielementvirki, byggitilfarsvirki, sildaflakavirki, fiskamjølsvirki, mekaniskt virki til skipaútgerð, trolvirkir, virki til seymframleiðslu, plastvirki, framleiðslu úr glastægratilfari og onnur.

Arbeitt verður við ætlanum um cementblandivirki, pakkitilfarsframleiðslu, køkselementvirkjum, radiatorframleiðslu, kaðalframleiðslu, cementpakkivirki, hermetikvirki og fleiri øðrum .

Hetta bleiv ikki nevnt, fyri at vit skulu vænta okkum, at nu fá ár standa

ídnaðarvirki á hvørjum tanga. Longu fyri trinum árum síðani nevndi eg, at vit ikki skuldu gykla okkum, at ídnaðarvirkini stigu upp sum fuglar Føniks víða hvar um landið, men arbeiðið við øllum hesum ætlanum ger okkum meira búnar at meta um livilíkindini og at finna rættar loysnir.

Vit vilja fevna so víða sum gjørligt í sakkønari viðgerð og stuðlan og vilja royna at fáa framt neyðuga samskipan av øllum møguligum á hesum øki.

«Hann ið hevur nógv jørn í eldinum í senn, tá m áokkurt brennast», og í samband við ídnaðarútbyggingina eru fleiri brend og verða tað framyvir, men júst fyri at fækka hetta talið, gerst beinrakin stýring neyðug.

Tað ber ikki til, at allir teir mangu grunnar virka uttan at vita hvør av øðrum, og tað ber ikki til, at privatu og almennu virkisdeildirnar arbeiða hvør í sína ætt. Kanningarorkan, serfrøðingahjálpin og fíggjarorkan mugu arbeiða hond í hond, so ætlanir við livilíkindum kunnu fremjast.

Havi fyrr sagt, at á ídnaðarøkinum er truplasti spurningurin at fáa haldgóð projektir til vega.

Vandamálini umrødd vóru tfjør viðvíkjandi ósemjum millum faktigu felagsskapirnar í hesi tíð, har mong framleiðslan verður mekaniserað, mugu eisini loysast, skal ídnaðarútbyggingin veruliga røkka meginuppgávu síni, nevniliga at veita møguleikar fyri vaksandi ættartiðum at støðast heima, og at skapa møguleika fyri tann hóp, sum hug hevur at koma heim. At skipa hetta samfelagið soleiðis, at øll kunnu sessast, sum vilja eiga lut í tí lívshátti, føroyingar hava skapt, og sum vit meta sum tann, ið okkum frægast veitir nøgd, lukku og lívsinnihald. Hetta má semja vera um.

Landbúnaðurin

Kann tað sigast at í sekstiárunum fekkst loysn á mongum spurningum í samband við fiskivinnuna, so sum endurnýggjan av veiðuflotanum og bygging av fiskiídnaðinum, og kann tað sigast, at verandi valskeið bleiv støðið lagt undir ídnaðarútbyggingina, so má virki búnaðarmannsins í komandi valskeiði og eftirfylgjandi standa fremst í røðini at fáa skapt aðrar fortreytir innan landbúnaðarøkið.

Vit kenna nakrar av orsøkunum til, at hin tørvandi nýskapan av búnaðarlóggávuni ikki er framd. Ognarviðurskifti, tørvandi samarbeiðs- og samskipanarvilji, kappingin uttaneftir frá londum við ríkari náttúrumøguleikum, trekleiki í at taka eftir á økjum, sum kundi átt nýskapan í sær, tørvandi útbúgvingarmøguleikar og mangt annað hevur ligið í buktini.

At skapa ein karm, har ein vælskipað, rationaliserað búnaðarvinna sleppur at framleiða tað hon orkar, og tað, sum landið ber, verður tí eitt av málunum í komandi árum, soleiðis at hesin samfelagsríkandi og mentunnarvarðveitandi vinnuvegur fær hóskandi sess á okkara rók.

Um grundbroytingin, neyðug er, ikki bleiv framd, so kann tó sigast, at mangar ábotur eru gjørdar, um eina langt frá er rokkið hagartil, at tey húski, sum skulu hava ársvinnu sína av búnaðarskapi, viðvíkjandi arbeiðsviðurskiftum, arbeiðstíð og úrkomu hava umstøður, ið kunnu líknast við tær, aðrir verkaslattir hava. Nú verða hesar umstøður ongantíð sambærligar við aðrar, tað er náttúran av hesum arbeiði, og hon er vart eisini ein av orsøkunum til, at menn taka við í hesi vinnu. Men at rationalisera so, at fragast møguliga úrtøkan fæst í mun til arbeiðsorkuna, løgd er í, mugu vit í felag við búnaðarstáttin rokka til.

Almenni stuðulin hevur verið munandi, og eg vænti ikki, at vilji til framhaldandi stuðul verður at tørva, men givið er, at búnaðarmenn sjálvir kunnu gera munandi, taka teir hendur saman og sýna vilja til broytingar, og fáa teir framt broytingar, ið sýna, at framleiðsla teirra fær vaksandi týdning í samfelagsbúskapinum, at hon økist og mennist í góðsku, og at hon lætt og hent gerst tøk hjá brúkarnum, tá vil stuðulin koma meira til nyttu og vil væl lættari kunna økjast í útbyggingartíðini.

Skipanin við mjólkastudningi var nakað broytt fár, soleiðis at eitt partur verður latin sum útjavningargjald í teirri tíðini, vanliga fæst lítil mjólk, og á fíggjarlógini í ár og næsta ár hækka studningarnar til mjólkaflutning og framleiðslu.

Tær royndir til at bøta um distributiónshóttin við, at brúkarin fær mjólkina liðugt pakkaða, og við at hon verður viðgjørd øðrvísi, eru raktar av ymsum byrjunartrupulleikum, men skuldu annars verið stig á leiðini.

Framleiðarin eigur tó at koma meira inn í myndina, eisini fyri at betri eftirlit kann verða á framleiðsluplássinum. Her sær út, sum teir nú ætla at taka sær um reiggj fyri at fáa loyst mjólkaspurningin. Menningargrunnurin hevur játtað peningur til neyðugt kanningararbeiði, og serfrøðingar úr Noregi eru farnir undir kanningina. Í Noregi hava teir loyst spurningin.

Tiltakið vil vónandi bera í sær, at neyðuga samgongan í andeilsfeløg, sum skipa fyri innkeypi, framleiðslu, viðgerð, distribution og sølu, verður framd. Tað skuldi verið eyðgreitt at eitt samtak, sum væðnr yvir neyðugum kuldagoymslum, og sum kann flyta mjólkina niðurkølda til stórt tal av søluhúðum um alt landið, roynist so frægt, at tað vinnur kappingina við útlendska niðursjóðaða mjólk.

Í Sandoynni verður arbeitt fyri at bøta umstøðurnar. Mett hevur verið, at hvanda oyggj kann føða 600 mjólkineyt, og er hetta so stórur partur av samlaða neytatalinum, at um hetta eydnast, vildi framleiðslumøgdin vaksið við risalopi.

Fyrst í hesi øld føddu hesar oyggjar meira enn 4000 neyt, nú liggja vit

niðri á miðleið 1500. Við hesum tali verður tó framleitt meira í nøgd enn nakrantíð, so framstig eru hend, men henda sammanbering sigur nakað um møguleikarnar, ið her goymast.

Seyðaroyndir í størri mát er farið undir og verður forvitnisligt at fáa úrslitini av hesum.

Vakstrarhúsið, landið bygdi á royndarstøðini, hevur roynst avbera væl, góðskan av grønmetisframleiðslumi har er munandi betri enn á tí, innflytast kann, og framleiðslan tykist kappingarfør.

Tóku menn nú eftir, var møguleiki fyri týðandi nýskapan búskaparliga.

Eggjaframleiðsla í størri mát er byrjað, og vóna vit, at tað ber til at kappast við útlendska framleiðslu. Hetta gerst kanska torførari, tí mong lond á meginlandinum hava stóra yvirskotsframleiðslu.

Í øllum tí arbeiði, fremjast skal á búnaðarøkinum, er møguligt at virkið á nýggju starvsstovumi (bakteriologiskt), sum byrjar ár, kann gerast dyggur stuðul. Hjá hesmi ber til at leita fram nýggjar framleiðslur og at finna burturúr, hvør viðgerðarháttur er bestur til einstøku vørurnar.

Øll búnaðarframleiðslan í 1972 er metti til 16 mill. kr. í tjóðarroknskapinum og er væntuliga nakað hægri í 1973, tá prísirnir m.a. á kjoti og mjólk hækkaðu. Ilt er kortini at meta um hetta, tí hækkandi prísirnir á fóðri draga frá aftur.

Fíggjarmøguleikar

Fíggjarviðurskifti landskassans hava verið rúmlig hesi ár, og er fíggjarlógin vaksin munandi. Nýggja uppskotið her í sær hækking við 10 - 12%'-un, og metir landsstýrið, at økta virksemið gevur samsvarandi hækking í inntøkunum.

Tøki peningurin – likviditeturin – hevur verið og er framvegis góður.

Lánimøguleikarnir hava verið hampuligir mesta partin av tíðmi, bóast teir í seinastuni eru nakað avmarkaðir, nú renta er farin í topp, men lánitørvur okkara er í løtuni ikki storri enn at biðast kann.

Nokur lán eru tikin, m.a. Luxembourglánið uppá 30 mill. kr. og eitt 12 milliona lán til telefonverkið. Í hesum sambandi havi eg hug at gera vart við, at í sitandi landsstýri er hitt fyrsta ið sjálvstøðugt er farið út á alheimslánimarknaðin fyri at taka upp stórri lán sum vit nýta eftir egnari fyriskipan heima. Eingi statsveðhald ella uppílegging, so út er enn ein søgnur burtur úr politiska leiki okkara.

Bankarnir hava hesi ár haft sonnu møguleikar, men eftir mínum lykki ikki troytt teir so skilagott, sum ein kundi ynskt.

Í røðu míni á ólavsøku 1972 ávísti eg vandan, sum lá í, at peningaslovnarnir løgdu alla yvirskotsorku sína í útlendsk virðisbrøv við høgari rentu,

ístaðin fyri at avsela ein part til virðisføst, men ikki so høgt renlaði føroysk lánsbrev, sum hitt almenna kundi útvega.

Men framvegis blivu øll eggini løgd í sama flat, og eru vit nú í teirri støðu, at hølvist hetta, verður skaðin rættuliga stórur.

Í seinastuni er vorðið heldur striltið at fáa peningin fyri útflutning okkara nóg skjótt heim, og er tí storri rakstrarfíggjan neyðug, hesa skuldu lættseldu útlendsku eggini útvega, men tey eru ímeðan fallin í prísi og er tí ikki skilagott at selja, um tey kunnu goymast, til virðið aftur er hitt sama, ella til tey eru klækt og komin í pari.

Úrslitið er, at tátlast nú í innan aðra rakstrarfíggjan og gerst tí truplari hjá vinnuni at arbeiða.

Vist eru vit ikki í kreppustøðu, og trupulleikarnar loysa vit nokk í felag, hóast vit ikki vóru hildnir góðir nokk at vera í ráðum undanfarnu ár, men hesir trupulleikar vísa týðuliga, hvussu neyðugt tað er, at tí almenna verða útvegaðir møguleikar fyri rímutigari samfelagsstýring og medávirkan, serliga av innlendis peningamarknaðinum.

Sosialmálini

Vit hava verið fegnir um ta sosialu lóggávu, upplýgd er seinastu 15 árini, og hildið hana verið góða, men

«Tú sá aldri so hvitan ein kat,
hann var ikki gráur um halan»,

tí eigur sosiala trygdarskipanin altíð at vera til viðgerðar í samfelag okkara, har broytingar í vinnuafstøðum og livsumstøðum seta krøv til broyttar skipanir.

Í flestu førum veksur tørvurin og kann loysast við øktari samfelagsorku, í øðrum, kann hann, sum sat í andglettinum finna sær annan og hóskandi sess í fjøltáttaða vinnumynstrinum.

Men skal eingin sita óljálptur, men fleiri og fleiri fjálguri, mugu vit liggja á takinum at finna hentastu amboðini at lyfta byrðarnar lvør hjá øðrum.

Fólka-, avlamis- og einkjupensiónin hækkar við pristalinum. Umfram vóru cykalhækkanir uppá 15% fyri 1½ ári síðani, men landsstýrið metir, at viðurskiftini, nú oljuprísir og annað er farið so nógv upp, hava fært við sær, at pensiónirnar koma ikki at muna nóg mikið. Tí bleiv málið um generellar reallønarhækkingar reist í vár, og er nú eftir samráðingar við ríkisstýrið avgjørt at leggja uppskot fram samsvarandi.

Semja er um, at hækkingarnar — ið óivað vera eini 10 - 15% — kunnu

koma í gildi 1. apríl 1975, men royni verður at fáa her at galda frá 1. januar 1975.

Tær skattafríu viðbøturnar til pensiónirnar koma eisini at hækka, og hækka tær hutfallsliga meir enn pensiónirnar sjálvar.

Forsorgin av andsveikum, sum frammanundan fyri stóran part lá í Danmørk, skal nú heilt og fult flytast heim. Umsitingin hevur ligið undir Rødbygård miðdeplinum, men landsstýrið hevur skotið upp, at Føroyar gerast serstakt umsitingarligt øki við umsitingardeild í Føroyum. Málsokið statsins og verður tað eisini framvegis, um dagliga umsitingin verður flutt. Men øll tey, sum vara av evnaveikum, vita, hvønn týdning tað vil fáa, at forsorgararbeiðið kann skipast í tættari samvinnu millum avvarandi og umsiting, tí er flytingin eitt framstig.

Talið av evnaveikum, vit framyvir kunnu hava undir forsorg herheima, vil økjast munandi í komandi árum við útbygging statshospitalsins. Hon var steðgað, men bleiv tað eitt av høvuðsmálum sitandi landsstýris at fáa hana igongd aftur. Hetta eydnaðist.

Í øllum arbeiðinum hevur felagið til fram fyri evnaveik so vel sum starvsfólkið, ið dagliga hevur tey undir hond, verið landsstýrinum hollur stuðul.

Heilsuverjan er hett við sjúkrahúsbyggingunum, og vilja afturbyggingar við røktarheimum og byrjan á nýggjum sjúkrahúsdeildum, so hvørt umstøður eru til tess gera hana enn tryggari. Her hendir munandi útbygging, men mugu vit inn á hetta økið fáa okkum umsitingarorku og eftirlitsorku, sum tryggjar, at ikki íløgur verða gjørdar, sum kundu verið hentari nýttar. Við øðrum øðrum má hetta økið – sum øll ommur – eisini koma undir prioritering (sum tað nú kallast ídag).

Í Suðuroy er byggingin av røktarheimi byrjað, í Norðoyum verður hakin setur í í hesi tingsetu, og í Eysturoy so skjótt, menn eru lidnir við fyrireikingarnar. Trygd er fyri, at grunnurin til hesi endamál kann loysa uppgávurnar í stevi við praktisku byggimøguleikarnar.

Serlæknaviðgerðin innan ávís øki verður ikki rokt so vel, sum hon kundi verið, um fastir læknar fingust í størvini, men arbeitt verður fyri hesum.

Fyribyrgjandi læknarøktina leggur landsstýrið stóran dent á, og ber álitið um nýggja kommunulæknaskipan á hendan bógvin. Tingið fekk ikki stundir at viðgera málið, men avgreiðir tað vónandi í hesi setu.

Tær heilsurøktandi miðstøðir, talan er um, vilja fáa stóran týdning og óivað lætta trýstið á sjúkrahúsini. Men skulu kommunurnar orka at byggja tær, steppst óivað ikki undan hiltøku landskassans.

Í heimarøktini virka nú umleið 80 fólk, og er henda skipan, har treingjandi fáa hjálp í egnum heimi, ein hin forvituisligasta nýskipanin. Hugrøktandi (mentalhygiejniskt) mun hetta hava týdning, tí tað er ikki altið lystuligt at verða flutur burtur úr dagligu umverum.

Specialskúlin er nú útboðin, og er alt greitt til byggingar.

Dagpeningaskipanin er í dag, har øll eru undir peningahúsarhaldinum, vorðin ein neyðlurviligheit. Tann verumleiki, at tey, sum ikki eru í mánaðarlontum starvi, missa fyri hvørm sjúkratíma, ger ójavna millum stættir.

Landsstýrið er í samráðingum við ríkisstýrið um at fáa burturbeint hetta órættvísi. Gøtan, slættast skal, krevur tó nakað meira av arbeiði, tí vinnulivið skal óivað inn í myndina.

Landsstýrið hevur leingi samráðst við skiftandi stjórnir í Danmark um at seta í gildi **barnatilskotsskipanina,** sum framl er undir sosialtlóggávumi. Semja er um, at meginreglurnar eiga at vera tær sonn í Føroyum og í Danmark, og hava vit tí vónir um næsta ár at fáa sett í gildi eina skipan, sum er munandi betri, enn tann vit ídag hava í samband við skattalóggávu okkara.

Umsitingin av sosialmálum skal sum kunnugt á føroyskar hendur 1. apríl 1975. Mangar misskiljingar hava verið frammi í hesum sambandi. Tí vil eg endurtaka, at talan bert er um yvirtøku av helvtini av umsitingarútreiðslunum -- ella umleið 450.000 kr. -- og at eingin broyting fer fram í býtinum av sosialu útreiðslunum, sum nú samanlagt liggja omanfyri 70 mill. kr.

Røddir hava verið frammi um, at skipanin gerst meira ófullkomin, tá vit sjálvir skulu fyriskipa, tí sum nú er verða av sær sjálvum ábøtur, sum framdar eru í Danmark, settar í gildi í Føroyum. Hetta er skeivt, tí ongar fyriskipanir koma í gildi uttan samtykt løgtingsins ella uttan áheitan úr Føroyum. Fyri okkum og fyri dønum við vildi tað eisini kenst løgið, um fyriskipanir kundu verið trýstar inn á okkum uttan okkara vilandi og vilja.

Gaddandi skipan, har føroyska umsitingin, sum hóast alt fær til viðgerðar øll brekini, er í fjarstøðu frá umsitingini av sosialu málunum, ger tvørturímóti, at vit av og á verða ov seinir á sjóvarfallinum, tá ábøtur skulu gerast.

Ein føroysk umsiting á hesum øki vil tí gera, at skipanin verður meira til frama fyri brúkaran, sum vit í mongum førum hava neyvari samband við. Sum fyrr ávíst verða vit á ongan hátt skerdir í at fáa lut í tein framstigum, sum henda í Danmark.

Verða til dømis barnatilskotsskipanin og dagpeningaskipanin framdar, týðir tað hækkan av statsins parti av sosialu útreiðslunum, sum er tiggju fald av okkara parti av umsitingarútreiðslunum.

Men, sum í so mongum øðrum føri, hetta er ikki ein peningaspurningur, men bert spurningur um at finna ta hentastu, liðiligastu og skilabestu skipan.

Framyvir at røkka út í ytstu liðir samfelagsins á hesum øki verður skylda okkara, og er spurningurin, um vit ikki best røkka hesum við at útbyggja í smærri eindum, har viðgerð, sosialráðgeving og røkt verða framd í økinum, har hann, sum tørvin hevur, hevur bústað sín .

Undir sosiala tátinum er eisini at nevna skyldur okkara mótvegis foroyingum, sum stytri ella longri tíð búgva í Danmark.

Eina miðstøð, har foroysk umboðsstova, føst ráðgeving í sosialum og øðrum spurningum, bókasavn, matstova og felagsvirksemi í vissan mun, kunnu hava hølir, er fyri neyðini.

Ognin í St. Kongensgade gjørdist tíverri ikki tann verunliga ogn, ætlað var, tí má broyting koma í. Landsstýrið hevur haft samráðingar við feløgini og einstaklingar í Keypmannahavn um spurningin, og hevur landsstýrið tað álit á tinginum, at tá greið uppskot liggja fyri, vil tingsins partur ikki liggja fetir.

Samferðslumál

Útbygging, sum farnu fýra árini er hend á samferðslunøkinum, er nógv umrødd, og skal eg tí bert gera fáar viðmerkingar.

Tað er einki øki í landinum, har ikki stórbyggingar eru framdar, men kortini er tað eins og menn í teim ymsu økjunum hava lyndi til at fýlast á, at ikki allir átroðkandi spurningar júst um teirra leiðir vórðu loystir.

Hann, sum veit, at hetta kundi bert verið hent, um virksemið í øllum øðrum økjum varð niðurlagt, má sanna enska orðatakið:

«Atfinningin er amboðið,
ið virkar betri, meira
úhvast tað gerst».

Kortini hugsi eg, at flestu mugu ásanna, at valla kundi meira verið framt ísenn, og at tað er rímuligt at útbyggja um alt landið heldur enn at loysa spurningarnar øki fyri øki.

Landsstýrið hevur verið fyri atfinningum fyri ovnýtslu í samband við allar tær byggingar, farið er undir sambært ynski og krav tingsins, og

serliga fyri, at peningurin er fingin av likviditeti landskassans heldur enn av dýrum lánum.

Um hetta er at siga, at kanningar, sum seinasta árið eru gjørdar viðvíkjandi virksemi landsverkfrøðingsstovnsins, sýna, at ov lítið av peningi hevur verið játtað til tey mongu arbeiðu, yuski hevur verið um. Tørvandi projekteringsorka og prishækkanir eins vel og øll ávisingarskipanin viðvíkjandi útgjaldingum hava gjørt, at ikki hevur verið møguligt fyrr enn fíggjarárið leið mót endanum at fáa kunnleika um hesi yvirtrekk.

Stig eru nú tikin til at broyta mannagongdina, so varskó verða givin í góðari tíð, áðrenn ællaninar eru útfyltar, og betri stýring tí kann fáast á útbyggingina, men kanningin hevur samstundis víst, at skulu hesi mongu arbeiði halda fram í sama mun sum nú, má nunandi meira játtast, ella lánheimildirnar økjast.

Mær kemur fyri, at tað er skilagott, um orkan kann fáast til vega, at loysa so mikið av uppgávum, sum møguligt er uttan at nerva vinnulívið annars, tí eitt minkað peningavirði ger tað truplari framyvir at fara undir stórverk, og mong arbeiði liggja enn á lánu til komandi tíðir.

Men útbyggingarrøðin og skjótleikin er so ein politiskur spurningur.

Sambindingin av bygdum, oyggjum og økjum heldur annars fram sambært vegaætlanina, kend var longu í 1969, og harútyvir eru stórarbeiðini við tunnil í Eysturoy og sambandið um Hvannasund tikin við.

Undir seinastu fíggjarlógarviðgerð verða arbeiðini gjølla umrødd, og skal eg tí ikki taka tey hvørt sær, berl nevna, at við øktu bilferðslunni gerast krøvini til góðskuna, breiddina, uppmerkingina og ferðslutrygdartiltøk munandi størri, eins og neyðugt verður við fleiri ferjulegum. Alt hetta ger samlaðu útbyggingina munandi dýrari.

Stórleikin av byggingunum setur eisini krav til grólbrot, maskinumboð, verkstaðir og asfaltverk.

Í farnu tingsetu var samlykt fimm ára ællan fyri útbygging av smærri bygdahavnum. Hugsi hendan kemur at loysa ein verunligan tørv, og hugsi upphæddin svarar rætfuliga vel til tørvin, koma ikki prishækkanir at kollvelta metingar á so mongum samfelagsøki.

Iskoytið til størru havnaætlanina var nokk í tepra lagi, so sum tey projektir, talan er um at byggja, síggja út, og soleiðis sum prishækkingarnar hava verið, men upphæddin uppá 36 mill. kr. var so tað, ein helt seg kunna fara undir við tí býti, byrðarnar hava nú.

Beri ótta fyri, at vit um nøkur ár eitaferð enn koma at taka hesa 5 ára ællan til viðgerðar.

Strandferðslan hevur støðugt vuksið um virksemið sítt, og rokkur hon oftari og longri enn fyrr. Vaksandi ferðastreymurin hevur borið í sær, at hetta hevur verið gjørligt uttan týðandi hækkingar av rakstrarhallinum.

Havi hug at viðmerkja, at tað er harmuligt, tá leysasøgur ganga, tær eru jú sum eggið. Klakt fær tað veingir.

Tað skuldi verið óneyðugt at sagt, at óheftur stovnur borgar fyri trygdini innan allan skiparekstur, tí hava sjálvandi eisini øll skip strandferðslunnar góðan stabilitet.

Skrivað hevur verið um iva hesum viðvíkjandi, her kann eingin ivi vera, tí slíkt roknar ein seg fram til.

Sum aðrir landsstovnar, so hevur strandferðslan verið kannað til tess at finna fram til ein rakstur, sum meira svarar til nútíðina, og har tolulig javnvág er ímillum teir fyrimunir borgarunum bjóðast og kostnaðin av hesum. Tingmenn kenna nú hetta tilfar, og vænti eg teir meta kanningina og tilfarið skilagott at vera.

Ein útbygging eftir 6 árum uppá 50-60 mill. kr. — ella tað sama, sum ílagt verður eftir einum/tveimum árum í vegasambandið — má haldast vera rímulig til tess at skapa fortreytir fyri jøvnum búskaparligum vøkstri av samfelagnum øllum heldur enn av einstøkum okjum. Tað er hetta seinasta endamálið, landsstýrið leggur størsta dentin á, og vil tað tí beinnvegin leggja uppskot fram samsvarandi.

Telefonautomatiseringin ber á sama borðið, og kunnu vit nú frøða okkum yvir, at meginparturin av landinum fár hevur fingið automatiskt samband. Tað, sum freslar, verður fyri mesta partin loyst í 1975 og ein heilt lítil partur í 1976.

Tann fyrihilsbata, miðað verður móti í flúgvingini við leingjan av **flogvøllinum í Vágum,** hevur verið samráðst við ríkisstýrið um. Samráðingarnar eru ikki loknar enn, men vóni eg, at vit um heilt fáar dagar kunnu fáa neyðtarvaligt grundarlag fram til at meta um, um landskassin skal luttaka í hesi bygging. Verður ynski um tað, leggur landsstýrið eisini í tí málinum uppskot fram, áðrenn tingið fer heim.

Ein bøtan av viðurskiftunum í Vágum gerst alt meira neyðug, sum ferðslan økist.

Misnøgdin við, at ikki er rokkið á mál í spurninginum um at koma

føroyingum uppi flúgving hevur verið rætluliga stór, og er hon skiljandi. Sum kunnugt slitnaðu samráðingarnar millum SAS og Flogsamband fyri tveimum/trimum árum síðani, og tað at stjórnirnar í Danmark hava skift so tíðum hevur ikki gjørt tað lættari at koma í bolt við spurningin, men nú er so avtalað, at samráðingar skulu tokast upp av nýggjum í august, hesa ferð undir fyrisæti av landsstýrinum og stjórnini og við beinleiðis luttøku av umboðum fyri landsstýri og stjórn.

Tann veldugi framburður verið hevur á samferðslumøkinum, hevur ikki bert borið fyrimunir við sær. Hann ger eisini, at vit meir og meir mugu hyggja at teim vansum, nútíðarsamfelagið dregur inn á seg. Vit hava fár sett eitt syrgiligt met fyri ferðsluvanlukkum, harav 11 hava borið deyðan við í ferðini.

Hetta varskó eigur at læra okkum øll, at bøtu møguleikarnir skulu troytast við hógv og skynsemi, og eigur at fáa myndugleikarnar til at fremja frægast møguligu ferðslutryggdartiltøk.

Skólamál — Ungdómsarbeiði — Mentunarvirksemi.

Nýggir skúlar av ymsum slag eru bygdir og afturatbyggingar til verandi framdar víða hvar um landið. Bert í hesum ári eru fleiri skúlar vígdir.

Í valskeiðinum er studningsveitan landskassans til hesar byggingar hækkað úr 20%'um upp í 30%, og hevur hann verið goldin kommununum munandi skjótari enn fyrr, ja, í vissan mun so hvørt sum byggingin er framd.

Landið rekur nú eisini sjómannasskúlan í Klaksvík og stendur í boði fjølbroyttari útbúgving innan sjóvinnumøkið enn fyrr.

Skipað er fyri framhaldi av hægri undirvísing á Fróðskaparsetrinum við støðisútbúgvingini, og í løtuni situr nevnd, sum kannar tørvin á útbúgving innan ymisk føroysk samfelagsøki, so henda hægra undirvísing kann koma mest møguligt í samsvar við, hvat gagnar samfelagnum og vinnuni best, tað veri seg innan umsiting, dataviðgerð, virkisleiðslu o.s.fr.

Útbúgving á hædd við studentaskúlans stendur nú í boði fyri onnur enn júst tey, sum ganga á Føroya Studentaskúla. HF skeið verða skipaði í Hoydølum, í Suðuroy og í Norðoyum, og væntandi verður henda skipan útbygd eftir fáum árum til eisini at røkka onnur øki í landinum. Forvitnisligt verður at siggja, hvussu hesi tilboð koma at ávirka sosialu samansetingina av teim fólkum, sum fáa sær hægri útbúgving.

Útbúgvingarútreiðslurnar á fíggjarlógini eru óvanliga nógv vaksnar hesi fýra ár, men hevur tingið tikið undir í hesum, sannandi, at ein fortreytin fyri menning er vel útbúgvin unglingafjøld. Serliga gerst hetta neyðugt, skal vinnugrundarlagið fjøltáttast og skal vinnast á vansum, sum avmarkingar í verandi vinnugrundarlagi møguliga koma at seta.

Fyri at kunna bjóða ungum og eldri eitt ríkari mentunnar-, ítróttar- og frítíðarliv er nógv flagt í ítróttarhallir og samkomuhús, soleiðis bygd, at tey eisini hóska til mentunnarligt virksemi innan tón- og leiklist, upplestrarvirksemi og møgdómsarbeiði av ymsum slag. Studningurin til hesi tiltøk er munandi bøttur, og ískoytislán veitt úr fimleikargrunni løgtingsins. Eisini hevur landsstýrið latið projekt gera til slík hús.

Ein nýskipanin er tónleikagrunnurin ætlaður at hjálpa kommununum ígongd við frítíðararbeiði innan tónlist.

Frítíðarlógini er arbeitt við, og kann hon koma fyri tingið í hesi setu, tó helst ikki fyrr enn í vetur.

Hjálp til útbúgving av frítíðarleiðarum og skeiðvirksemi á hendu bógvin er eisini fyri stavn í ætlanum landsstýrisins til stuðlan av ungdómsarbeiðinum.

Bókasavnsbyggingin í Havn er undir landi, og verður arbeitt fyri at farast kann ígongd innan alt ov langa tíð.

Lærlingalæran er broytt munandi, men læratíðin er kostnaðarmikil fyri tey ungu og foreldur teirra. Verið hava 500.000 kr. á okkara fíggjarlóg, men annars eingin møguleiki fyri stuðli. Landsstýrið hevur nú útvirkað, at lærlingar fáa studning frá Statens Uddannelsesstøtte, og kemur hetta at týða, at lærlingar ístaðin fyri fáar hundrað til eitt túsund krónur kunnu fáa úr 4.000 upp í 6-8.000 kr. árliga í studningi.

Hugsan landsstýrisins er so, at tær 500.000 kr. á fíggjarlógini kunnu nýtast til stuðul til ferðingar millum heim og skúla, tí treytin fyri stuðli frá S.U. er, at eingin annar stuðul er fokur.

Henda broyting ger, at møguleikar lærlinga viðkast úr 500.000 kr. upp í kanska 3 mill. kr. árliga.

Húsabyggispurningin

at loysa, soleiðis at láginntøkufólk fekk lagaligar atstøður til býti, hevur verið nógv arbeitt við.

Almenni stuðulin veittur sum íloga í húsalánsgrunnin er øktur so mikið, at hann nú hevur heilt stóra kapitalorku at virka við. Lánihæddin er tvífaldað, avdráttartíðin longd, og rentan er framvegis ógvuliga lág, samstundis sum lánini eru verðin avdráttarfrí fyrstu 3 árini; men kortini hevur prísvøksturin á jørð, byggitilfari og bygging skarvað so mikið

burturavaftur, at hjá honum, ið ikki hevur meguleika at leggja sær munondi eginpening av, er eru trupult at byggja.

Byggivirksemið hevur annars verið ógvuliga høgt hesi fýra ár, har umleið 200 hús eru bygd um árið, og trýstið á byggimarknaðin er ikki linkandi, heldur tvørturímóti.

Fyri at fáa fram útboð av byggigrundum varð eftir uppskoti landsstýrisins kommunalur lánigrunnur uppá 5 mill. kr. samtyktur.

Hópin av kommunum hava longu sokt lán úr honum, og verður óivað neyðugt at økja hann beinan vegin, t.d. soleiðis at lánimøguleikarnir til byggibúnan kommununna eisini verða víðkaðir. Skapt eigur so at verða reglugerð, sum freylar, at partur av hesum lánum verður nýttur á tann hátt, at kommununnar lata grundøki til leigu. Hetta vildi verið inflatiónsdoyvandi tiltak. I Íslandi, har kommununnar eiga byggijørðina og lata hana til leigu, roynist slík skipan væl.

Á fíggjarlógaruppskotinum, sum framlagt verður fyrsta dagin, hevur landsstýrið til húsalánsgrunnin sett av 1 mill. kr. meira enn grunnsins stýri metir tørvur er á. Ætlanin er at lata grunnin umsita hendu pening eftir serligum reglum lágimtøkufólki at gagni. Sjálvandi verður reglugerðin so, at ikki bert skattskylduga imtøkan — sum av so mongum grundum kann liggja í botni — verður avgerandi fyri, hvussu hesin peningur skal nýtast.

Nevndu tiltøk og teir hatar, frammanundan eru veittir, muna sjálvsagt væl, men taka kortini ikki burtur møguleikan fyri arbeiðsfrium og øðrum órímuligum vinningi innan byggiøkið. Men politikkur er jú fyri ein part ósemja um, hvussu umfarið við tilfari, vinningur við bygging og ognarmøguleikarnir viðvíkjandi byggijørð skulu skipast.

Lønir — Skattir — Prísir

I fýra ára skeiðinum 1. januar 1971 til 1. januar 1974 er lønarvøksturin hesin:

arbeiðsmenn	74%
arbeiðskvinnur	110%
starvsfólk 1. stigi	75%
handverkarar	70%

meðan prísvøksturin samhaert prístalið í tíðarskeiðinum var 44%.

Her hevur so verið talan um ein reallønarvøkstur, men tá prístalsgrundarlagið ikki er rættvísandi, er ikki møguligt at nýta munin millum hesi tøl sum mát fyri vøkstrinum, har kemur annað inn í myndina m.a., hvar á skattastiganum ein liggur, og hvørjar almennar veitingar ein troytir.

Hækkingarnar í fiskimannainntøkunum eru at siggja í talvu búskaparráðsins, tær eru í øllum førum størri, bæði í procentum — burtursað frá nótaskipum, har inntøkurnar frammanundan vóru høgar og í krónum.

Hægri løntu stættirnir eins væl og tey í sokallaðu fríu vinnuni hava sum øllum kunnugt eisini fingið munandi inntøkubata.

So talan um, at hesi ár inntøkuliga hava kenst summum stattum svanglig, er ikki bein, heldur kann sigast, at luturin í vøkstrinum ikki hevur verið hin sami hjá øllum.

Vinnufeløgini settu herfyri fram ynski um luttøku í arbeiðinum við nýggja prístalsgrundarlagnum. Hetta tók landsstýrið sum eitt tilboð, og fara nú samráðingar fram viðvíkjandi hesum grundarlagi. Tað ber í sær, at framløgan verður nakað seinkað, men betri er at royna at fáa semju ella neyðsemju um ta skipan, vil skulu virka undir, enn at partarnir í forhond birta í sær sjálvum ónøgd.

Tímaløntu stættirnar fáa løn sína javnaða við 1,15 oyrum fyri prístalsstigið.

Henda skipan kom í gildi í 1959, men sum fráliður gevur hon ikki sonu prísjavning sum hin procentliga. Ynski er um hækking til 1,5 oyra fyri stigið. Landsstýrið kannar málið, og vil sela fram uppskot, sum vil halda kann samtykkjast, møguliga kann eisini her røkkast lutvísari semju.

Vil annars loyva mær at minna á teir bátar, eydnast er at vinna lønarstættunum seinnu árini bvat fríttið, sjúkragrunni, arbeiðsloysisgrunni, prístalsviðgerð av kvinnulønum, stytting av arbeiðstíð uttan lønarmiss og øðrum viðvíkur.

Stoesti vinningur hesum stættum hevur verið fyri er tó, at arbeiði fyri allar hendur nærum er vorðin veruleiki allastaðni í landinum. Ja, í summum økjum eru ikki nóg nógvar hendur, til at arbeiðini kunnu fremjast.

Eisini á **skattliga økinum** eru munandi broytingar hendar, m.a.:

Markið fyri skatting til løgtingið hækkað,

Skattastigin javnaður, so inntøkurnar frá markinum og upp í 60.000 kr. hava fingið lætta.

Løntakarafrádráttur komin,

Barnafrádráttur hækkaður so væl sum fiskinannafrádráttur og frádráttur fyri konu í vinnu.

Hartil aðrir fyrimunir.

Sagt verður, at øll hetta eru smáábøtur, men so leingi vit ikki hava vunnið tað grundbroytandi skattalagið, eru tað hesar ábøtur, sum gera tað liviligari.

Okkara skattaskipan er gomul, men tað er órættur ikki at upplýsa, at undir henni er trýstið minnandi mimi eru í grannaloundum okkara.

Landsstýrið leggur í næsta mánaða kanningarverk skattanevndarinnar fram. Tað er drúgt og fevnandi og sigur frá mongum ymsum skattaskipanum, beinleiðis og óbeinleiðis, bruttoskatti, frádráttarskipanum, hjúnarlagsskatti, felagsskatti, hvussu skattagrundarlagið kundi verið breiðkað, hvørji rættvisiskrøv eru setur til skatting og mangt annað.

Í tilfarinum verður ikki vísl á nakra serstaka loysn, men skuldu tingmenn, tá verkið er kannað, verið betri búnir at viðgjørt eina nútimansgerð av allari skattalóggávu okkara.

EF-sáttmáli

Í felagsmarknaðarmálinum var sum kunnugt politikkur landsstýrisins at samráðast fyri bestu sømdum, so langt vit rukku uttan at binda okkum, og at nýta alla ta tíð, vit høvdu ráð til til at royna at broyta lugsunarhátt EF's viðvíkjandi fiskivinnupolitikki, fiskimarkspolitikki og fiskaristrukturpolitikki, soleiðis at skapt varð fatan fyri okkara serliga tørvi.

Initiativið við sokallaða EF-memorandumminum var dømi um hetta, og er tað metan mín, at hesar samráðingar hava haft týðning fyri úrslitið av samráðingunum um handilssáttmálan.

Memorandummálið var orsøkin til, at EF lovaði at umhuga teir tættir, sum hava avgerandi búskaparligan og sosialan týðning fyri Føroyar av nýggjum, tá úrslitini av havrættarstevnuni fara at sýna seg.

Hetta og tað, at vit eru partan av Danmørk vil vera gott støði í samráðingunum um framtíðarhandilsskipanir.

Seint á heysti 1973 metti landsstýrið, at tíðin var komin at fáa viðskiftið við EF í fasta legu, og fingu vit álugamál okkara til viðgerðar á hægsta stigi í EF við forsætisráðharrafundin í Keypmannahavn.

25. januar 1974 samtykti tingið so einnælt uppskot landsstýrisins, at Føroyar ikki gerast luttakari í EF, men at skipan fekst fyri samhandilin.

Eftir henda dag hevur málið nærum ikki verið framuni í politiska tjakinum, hóast viðskifti okkara við EF er eins stórt mál nú sum fyrr.

Tað er mær ein gleði at kunna siga, at okkara handilsviðurskifti við EF nú eru loyst á ein hátt, sum eg trúgvi allir føroyingar hava grund til at vera nøgdir við.

Støðutakan løgtingsins førdi í fyrstu syftu við sær, at EF-ráðið 4. februar íár gjørdi eina samtykt um karmin av teirri skipan, galda skuldi fyri innflutning av føroyskum vørum.

Út frá hesum grundarlagi hevur landsstýrið í samvinnu við danska uttanríkisráðið tingast við myndugleikar EF's um innihaldið. Grundsjónarmið landsstýrisins hevur verið at royna at fáa í lag eina skipan, sum gevur føroyskum útflutningi flestu tollsømdir, men samstundis at fyribyrgja

slíkar søndir frá føroyskari síðu afturfyri, at ungi idnaður okkara kemur í vanda.

Uttan at gera av kann eg siga, at úrslitið av samráðingunum er gott. Tey flestu, men ikki øll av okkara yvskjum um tollsømdir, vunnu frama. Afturfyri skulu vit minka innflutningsgjaldið fyri grønmeti og frukt.

Skal í stuttum nevna høvuðstættirnar í skipanini, sum kemur igildi 1. september í ár.

Teir eru:

Fyri tað fyrsta, at tey upprunaligu EF-londini og Irland lækka tollin fyri føroyskar vørur við 40% 1. september íár, 20%1. januar 1975 og 20% 1. januar 1976. Um tey restandi 20%'ini av verandi tolli skulu fella burtur 1. juli 1977 skal støða takast til seinni.

Fyri tað annað, at galdandi tollfrælsi í Danmark fyri innflutning úr Føroyum heldur fram.

Fyri tað triðja tollfrælsi í Bretlandi frá 1. september íár fyri flestu fiskavørur.

Fyri tað fjórða, at tollsøndirnar galda allar idnaðarvørur og flestu fiskavørur, sum í løtuni hava, og kunnu lugsast at fáa lýdning fyri føroyska útflutningin sum til dømis frýst fløk, súrgaði sildafløk og meira viðgjørdar fiskavørur (vørur at koyra í pottin).

Fyri tað fimta, at Føroyar afturfyri nevndu fyrimunir skulu seta innflutningsgjaldið niður við 10%'um 1. september íár, 20% 1. januar 1975 og 10% 1. januar 1976 — — ialt 40% lækking — fyri grønmeti, blómur og frukt innflutt frá EF-londunum.

Landsstýrið metir, at skipanin ber í sær eitt gott støði undir útbyggingini av føroyskum útflutningi framyvir, ikki minst fyri øktari viðgerð av fiskinum. Higartil hevur tað verið torført vegna tollgarðar.

Byrðarnar, sum vil átaka okkum við skipanini eru smáar samanborið við fyrimunirnar, sum vil fáa av henni. Landsstýrið vil tí ein av fyrstu døgunum leggja fyri tingið lógaruppskot um lækking av innflutningsgjaldinum fyri ávísar vørur.

Føroyar eru landið, sum meira enn nakað annað hava brúk fyri samvinnu við aðrar. Uppá fólkið hevur eingin størri uttanríkishandil enn vit, eingin meira brúk fyri, at gjaldoyra og búskapur okkara eigur álit, so lánveitingar uttaneftir ikki koma í vanda. Tí eru bestu handilssømdir lívsmeyðugar.

Mær tykir, at teir menn, sum gera hesi viðurskifti lítisverd, og sum gykla sær, at bert vit girða okkum inni og gera samtyktir á okkara lítla tingi, leypa onnur lond á leistum at vera okkum til vildar, eru sum hanin, sum trúði, at sólin reis, bert fyri at hoyra hann gala.

Uttan miðvist arbeiði, taktiska framferð og samráðingar so langt til ber, verða úrslit ikki rokkin.

Føroya undirgrund

«Lítið lot úr hanakjaftí» hevur verið viðvikjandi endurgeving av onkrum, eg havi sagt við danskt blað um oljuspuruingin.

Broytingar eru ongar hendar her. Í løgmannsrøðuni 1971 varð sagt, at hóast undirgrundsrættindini vóru B-mál í heimastýrislóginí, vóru avgerðirnar teinnum viðvíkjandi latnar heimastýrinum at taka, og at møguligur ágóði kom at vera Føroyum til góðar. Afturat var lagt, at vit ongan hast høvdu í hesum máli.

Seinni er givin tingmonnum frágreiðing um, hvar málið stendur ídag.

Landsstýrið hevur ongan kunnleika til, hvat fyribilstilmæli undirgrundsnevndarinnar verður, men mett hevur verið, at í mesta lagi vóru loyvi til fyribilskanningar (seismografiskar) givin.

Henda meting er grundað á, at hóast vit ikki skulu skunda okkum og gera annara mistøk um aftur, so er neyðugt skjótast at taka stig til at fáa viðurkenning annara av, at henda ogn er okkara, og í fólkarættindum vilja føroyskar kanningar ella kanningarloyvi grunda okkara ognarrætt.

Skilji ikki, at menn leypa uppá tjóðlegg í hesum máli, har tað bert snýr seg um at fyribyrgja, at leitað verður aðrar vegir eftir loyvinum. At knýta serrættindi til slík hugsar vel eingin um, men bert um skyldu til at lata okkum úrslitini.

Kann ikki hugsa mær annað, enn at onkur dettur niður á langlegg nú hetta er sagt.

Í hesum máli mugu vit framvegis verða á varðhaldi, hóast eingin hevur snevil av, um møguleikar goymast, eisini mugu vit sleppa okkum undan vanligum kegli og seinjast um ikki at leypa framav.

Skal samfelag okkara koma undir ávirkan av fepri viðvíkjandi undirgrundsmøguleikum, so lat okkum nýta orku okkara til sjálvir skilagott at stýra gongdini.

Veiðurættindi

Jørðin var býtt, men rætturin til sjógvin fríur.

Nú er býtið byrjað á ymsan hátt, og rætturin at fiska ikki sjálvsagdur longur.

Útflytingar aðrastaðni, avmarkingar innan altjóðasamtøk sum ICNAF fyri havið vestan Kappan og NEAFC fyri havið eystan Kappan skerja møguleikar okkara. Vandastøðan hjá mongum fiskastovni verður nýtt sum grundgeving fyri, at lond kanna sær strandøkini einsamøll.

Á havrættarstevnuni í Caracas er uppskot um 200 fjórðunga búskapurlig øki, har strandalondini hava rætt at veiða í mun til orku teirra, meðan restin verður býtt ímillum teir, søguligan rætt eiga.

Vinna hesi sjónarmið, koma vit undir avmarkingar í Norðsjónum, Noregi, Íslandi, Canada og Grønlandi, og lítið kann sigast um, hvussu stór rættindi ið eftir bliva til okkara.

Vit hava á hesi stevnu umboð við, sum ikki eru observatørar, men fullir limir av dansku sendinevndini og tí kunnu tala fyri áhugamálum okkara og verja tey.

Samantikið hevur landsstýrið í øllum hesum álvars- og lagnuspurningum fört lann politikk at vinna mest møgulig rættindi á heimasjógvi og samstundis missa minst møguligt á fjarleiðum.

Hendan grundhugsan byggir á, at okkara egni heimasjógvur gevur ov lítið sum støði undir føroyskum fiskiskapi og vøkstri í føroyska samfelagnum.

Teir allarflestu, sum kenna til fiskiskap undir Føroyum, eru saunførdir um, at vit hava tørv fyri rættindi til fiskiskap á fjarleiðum uttan mun til, um vit hava eitt fiskimark uppá 12, 30, 50 ella 200 mil.

Við hesum útgangsstøði hevur landsstýrið í semju við meiriluta tingsins ikki valt lættvunna útflytingarpolitikkin, men samráðingarleiðina, tí hon gagnar føroyskum fiskiskapi sum heild. Tað ger einvísa og lítið undirbygda útflytingartalan ikki. Sonikið meir sum tómar tingsamtyktir ikki vóru aktaðar av øðrum.

Landsstýrið hevur alla staðni, har høvi hevur verið til tess, stríðst við samráðingarborðið fyri flest møguligum rættindum í heimasjógvi og á fjarleiðum og fyri at vinna frama fyri sjónarmiðinum um serrættindi til lond bundin av fiskivinnuni.

Eitt av úrslitinum er «svikasáttmálin» -- navnið spillir ongan - - um fiskiskap undir Føroyum, sum hevur verið í gildi síðan 1. januar í ár. Henda skipanin við stongdum økjum uttan fyri fiskimarkið fyri útlendskar trolarar hevur roynst væl, hvat útróðrarmenn yvirhøvur eru samdir um. Serliga kann nevnast várróðurin á Norðhavinum, sum eydnaðist avbera væl. Allir fiskimenn eru samdir um, at kassaskipanin er ein týdningarmikil vinningur fyri útróðurin undir Føroyum.

Ein fiskimaður segði undir várróðrinum, meðan skrivingin um «svikasáttmálan» stóð uppá:

«Ongantíð er so nógv komið uppá land av várfiski, løgið, at teir ikki skriva um tað».

Ein annar segði frá, at vestanfyri fekst fiskur á leiðum, har fyrr ikki var dripið livandi.

Og allir eru á einum máli um, at skipanin hevur verið væl hildin av útlendingum, hetta var annars tað, teir atfinningarsomu mettu sum tað veikasta liðið.

Ei heldur er ivi um, at høvdu Føroyar samtykt einvíst at flyta fiskimarkið út, var eingin skipan fingin, og hevði heldur ikki handilsskipanin við EF verið so góð, sum hon er nú, um vit yvirhøvur høvdu fingið nakra skipan.

Hetta lýsir týðuliga eina positiva avleiðing av samráðingarpolitikki landsstýrisins.

Vit mugu sjálvsagt ikki vænta, at útlendingar framyvir akta sáttmálan, uttan at vaktarhaldið verður bøtt.

Landsstýrið hevur tí gjørt sáttmála um bygging av tí verjuskipi, innrøtt hevur verið síðan 1960, og er ætlan landsstýrisins framyvir at bøla føroyska partin av sjóverjuni t.d. við helikoptaratænastu, soleiðis at danska sjóverjan og føroyska í felag skipa fyri effektivum vaktarhaldi.

Enn hava samráðingar bjargað okkum rættindi, sum tryggja úrkomuni, hóast í Grønlandi bert verður veiddur ein tiggjundapartur av tí, bestu árini varð veitt, og hóast kvoterað er undir New Foundlandi og í Norðsjónum, og hóast vil standa fyri at taka støðu til kvotu við Norðurnoreg og vestan fyri 4° í Norðsjónum, og hóast avmarkingar í rættindum eru gjørdar í Islandi.

Vit lita á, at vit framvegis kunnu telva so, at okkum er liv lagað sum fiskivinnutjóð.

Leika vit ikki sjálvir hesar leikir, torført verður hjá øðrum at gera tað fyri okkum, hóast vit í felag við aðrar kunnu røkka langt.

Í hesum skeiði hevur landsstýrið royndt at geva Føroyum andlit úteftir.

Vit fingu í lut at skula hava eitt margfaldað viðskifti við aðrar og samráðingar við aðrar í størri mun enn fyrr, og vit valdu at fyriskipa hesum sjálvir, so langt gjørligt at møta sjálvir og at tala okkara sak sjálvir.

Okkara ásannan er, at tað ber ikki til, at vit smæða okkum burtur, og hava vit ta royndl, at aðrir til fulnaðar fata hetta.

Nú er stutt skeið eftiri at virka í hjá sitandi tingi, og loyvi eg mær tí at takka tingmonnum fyri samstarvið á hesum sinni. Yuski mítt fyri komandi ting skal vera, at tí má eydnast at finna skilagóðar loysnir í øllum vandamálum tjóðarinnar.

HAGDEILDIN
Tinganes

Útflutningur Føroya januar - juni 1974

(Export from the Faroe Island January - June 1974)

BTN		tons	1000 kr.
03.01	MATSILD	15.764	35.479
	Danmark		
03.01	KALVI, ÍSAÐUR	7	84
	Danmark		
03.01	ÍSFISKUR	24	107
	Danmark		
03.01	MAKRELUR	4.201	5.219
	Danmark		
03.01	R O G N, FRYST	183	681
	Danmark		
03.01.	KALVI, FRYSTUR	91	815
	Danmark	83	709
	Bretland	8	106
03.01	SVARTKALVI, FRYSTUR	14	104
	U S A		
03.01	H E M A R I, FRYSTUR	1	11
	Danmark		
03.01	FISKAFLAK, FRYST	4.348	37.882
	Danmark	54	423
	Svíarlki	54	316
	Frakland	1.138	11.469
	Italia	7	88
	Bretland	1.120	7.835
	U S A	1.975	17.751

03.01	AÐRAR FISKAVØRUR, fr.	260	1.839
	Danmark	43	143
	Frakland	34	226
	Italia	10	56
	Bretland	80	512
	U S A	93	902
03.02	SALTSILD	2.513	8.289
	Pólland		
03.02	SALTFISKUR	8.786	76.235
	Danmark	46	257
	Noreg	2,024	15.865
	Sviariki	1	10
	Frakland	482	4.803
	Grikkaland	650	4.864
	Italia	1.353	11.462
	Portugal	791	8.050
	Spania	3.439	30.924
03.02	SALTFISKAFLAK	757	6.013
	Sviariki	6	55
	Italia	751	5.958
03.02	SALTSILDAFLAK	68	346
	Sviariki	53	275
	U S A	15	71
03.03	RÆKJA	153	1.838
	Danmark	10	62
	Sviariki	44	568
	Belgia	19	227
	Bretland	80	981
03.03	HUMMARI	0	9
	Danmark		
03.03	JAKUPSSKEL	36	779
	U S A		
05.05	SLÓGV	1.173	604
	Noreg		

05.15	IDNAÐARSILD	3.356	1.623
	Danmark	2.515	1.266
	Noreg	225	103
	Bretland	616	254
15.04	SILDALÝSI	1.301	2.887
	Bretland		
15.04	FISKALÝSI	960	2.678
	Háland		
16.04	KRYDDSILD	73	276
	Danmark	50	214
	Svíariki	23	62
16.04	SILD, SUKURSALTAÐ	113	486
	Danmark	15	67
	Finland	98	419
16.04	SÍRSILDAFLAK	139	881
	Danmark	113	785
	Vesturtýskland	26	96
23.01	SILDAMJØL	11.437	43.035
	Danmark	510	2.249
	Belgia	400	1.260
	Tjekkoslovakiið	1.627	7.307
	Bretland	3.675	13.129
	Ungarn	2.605	9.433
	Vesturtýskland	2.620	9.657
23.01	FISKAMJØL	1.443	4.097
	Danmark	610	1.761
	Finland	220	733
	Bretland	298	907
	Vesturtýskland	315	696
39.07	PLASTIKKRØR	130stk.	2
	Ísland		
41.01	NEYTAHÚÐIR	305stk.	14
	Danmark		

43.01	SKINN, SALTAÐ	4.469stk.	112
	Danmark		
43.02	SKINN, GARVAÐ	59stk.	4
	Danmark	16stk.	1
	Grønland	43stk.	3
53.10	TÓGV	16	803
	Danmark	15	772
	Noreg	0	6
	Svíarríki	0	0
	Sveits	0	3
	Vesturtýskland	0	1
	Grønland	0	3
	Onnur lond	1	18
60.05	BUNDNAR VØRUR	4.394stk.	300
	Danmark	4.146stk.	280
	Noreg	3stk.	0
	Svíarríki	2stk.	0
	Háland	6stk.	1
	Sveits	6stk.	0
	Bretland	149stk.	12
	Vesturtýskland	51stk.	4
	U S A	12stk.	1
	Grønland	9stk.	1
	Onnur lond	10stk.	1
61.01	OLJUKLÆÐIR	0	9
	Danmark		
89.01	SKIP (gumul — 6) 1688 brt.reg.		12.542
	Danmark (5) 659 brt.reg.		5.542
	Canada (1) 1029 brt.reg.		7.000
		—	246.083

KEYPSLOND:	1.000 kr.
Danmark	56.256
Finland	1.152
Island	2
Noreg	16.578
Sviariki	1.286
Belgia	1.487
Tjekkoslovakiið	7.307
Frakland	16.498
Grikkaland	4.864
Háland	2.679
Italia	17.564
Pólland	8.289
Portugal	8.050
Sweits	3
Spania	30.924
Bretland	26.623
Ungarn	9.433
Vesturtýskland	10.454
U S A	19.608
Canada	7.000
Grønland	7
Onnur lond	19
	246.083

Januar-juni 1974:	246.083
Januar-juni 1973:	179.416

FISKIVEIÐAN 1. HÁLVÁR 1974.

(tonn hvandi vekt)

Útróður	31.684
Saltfiskaveiða	10.795
Síld og Iðnaðarfiskur	63.819
Onnur veiða	4.450
Til samans	110.748
1. hálvár 1973	99.120
1. hálvár 1972	93.190
1. hálvár 1971	96.200

FISKILEIÐIR
(tons livandi vekt)

Ár	Til samans	Føroyar	Ísland	Norðsjógvarin	aðrar leiðir
1973	246.408	31.187	21.547	161.253	32.421
1972	207.805	31.458	16.232	125.491	34.624
1971	207.121	34.660	15.118	115.793	41.550
1970	207.831	33.632	12.226	107.742	54.231
1960	109.427	15.952	14.397	45	79.033

VIÐGERÐ
(tons livandi vekt)

Ár	Til samans	Selt fekst	Fryst	Saltað	Til mjøl	Slógv
1973	246.408	38.289	35.796	56.556	115.767	16.957
1972	207.805	45.337	30.778	61.716	69.974	10.065
1971	207.121	36.811	39.044	53.128	78.138	8.148
1970	207.831	33.286	47.190	53.075	75.331	10.518
1960	109.427	24.264	4.909	79.809	445	2.961

FISKIVEIÐA, FISKILEIÐ, 1973
(tons livandi vekt)

	Til samans	Ísland	Føroyar	New Foundland	V. Grønland	E. Grønland	Noreg	Norðsjógvurin	Ókent
Til samans	246.408	21.547	31.192	19.934	6.238	219	3.636	161.253	2.389
Laksur	199		28		171				
Kalvi	346	48	256		4	4		5	29
Reyðsprøka	6		5					1	
Svartkalvi	1.138	188		950					
Lálla	1		1						
Sandsprøka	179	2	177						
Tunga	1.193	3	1.190						
Brosma	7.348	3.363	3.402		2	16		52	513
Toskur	53.569	14.207	13.276	16.981	4.499	167	1.916	1.069	1.454
Lýsingur	1							1	
Longa	2.608	984	1.428			1		124	71
Blálonga	125	74	51						
Hýsa	9.378	813	6.018			4	1.212	1.203	128
Upsi	5.053	1.467	2.973				7	556	50
Hvitingsbr.	53.630							53.630	
Svkjaftur	4.669		168					4.701	
Hvitingur	1.846	4	384					1.458	
Langasporl	14					14			
Steinbítur	249	39	201		1				8
Liri	30	9		5	12				4
Nebbasild	1.413							1.413	
Kongafiskur	501	243	121	84		13	32		8
Havtaska	579	6	535					35	3
Rognkelsi	13		2		11				
Rossamakrelur	5.370							5.370	
Síld	76.370							76.370	
Bristingur	84		59					25	
Makrelur	11.837							11.837	
Hemari	274		4	269				1	
Hávur	132		3					122	7
Skøta	371	80	150	2				132	7
Hummari	43		43						
Rækja	1.379				1.371				
Jákupsskol	708		708						
Ókent	5.552	17	9	1.643	159		469	3.148	107

Framleiðsla av virkaðum fiskavørum til útflutning

tons BTN		1970	1971	1972	1973
03.01	Matsild	29.650	31.119	33.399	31.528
	Kalvi, ísaður	136	132	95	63
	Ísfiskur	1.798	940	815	658
	Laksur	238	232	145	182
	Makrelur	2.134	3.603	6.407	4.408
	Kalvi, frystur	125	103	67	120
	Svartkalvi	2.916	1.239	1.392	789
	Hemari	190	215	240	253
	Fiskaflak, fryst	11.064	12.349	8.946	9.230
	Aðrar fiskavørur, fr.	413	1.776	1.546	2.415
	Rogn, fryst	235	198	271	137
03.02	Saltsild	3.284	2.447	7.439	4.019
	Saltfiskur	22.513	18.546	20.743	16.586
	Saltfiskaflak	167	438	733	2.058
	Saltsildaflak	399	297	131	2.051
03.03	Reyður (rækja)	177	471	775	1.352
	Hummari	3	10	8	10
	Jákupskel	- -	86	35	69
05.05	Fiskaslógv	5.225	3.488	4.141	4.757
05.15	Idnaðarfiskur	12.356	16.921	15.349	22.604
15.04	Sildalýsi	5.821	5.033	2.480	5.336
	Fiskalýsi	63	20	—	785
16.04	Kryddsild	211	158	751	624
	Súrsild	6	4	—	25
	Kryddsildaflak	40	29	38	44
	Súrsildaflak	1.227	914	326	728
23.01	Sildamjøl	13.730	14.379	9.783	20.995
	Fiskamjøl	1.106	1.492	3.622	2.175
	Tilsamans	115.227	116.639	119.727	134.001

Útflutningur Føroya januar - juni 1973 og 1974

BTN		tons	1.000 kr.	tons	1.000 kr.
03.01	Matsild	15.474	29.782	15.764	35.479
	Kalvi, ísaður	30	665	7	84
	Ísfiskur	102	244	24	107
	Laksur	3	80	—	—
	Makrelur	2.397	2.163	4.201	5.219
	Rogn, frystur	129	254	183	681
	Kalvi, frystur	28	241	91	815
	Svartkalvi	—	—	14	104
	Hemari	71	557	1	11
	Fiskaflak, frystur	3.326	24.814	4.348	37.882
	Aðrar fiskavørur	688	4.053	260	1.839
03.02	Saltsild	4.036	10.411	2.513	8.289
	Saltfiskur	7.872	43.866	8.786	76.235
	Saltfiskaflak	1.239	7.801	757	6.019
	Saltsildaflak	637	3.143	68	346
03.03	Rækja	183	2.162	153	1.838
	Hummari	0	15	0	9
	Jákupsskel	51	1.195	36	779
05.05	Slógv	2.024	809	1.173	604
05.15.	Iðnaðarfiskur	12.257	5.316	3.356	1.623
15.04	Sildalýsi	1.000	1.325	1.301	2.887
	Fiskalýsi	—	-	960	2.678
16.04	Kryddsild	263	813	73	276
	Súrsild	25	121		. .
	Sild, sukursaltað	28	166	113	486
	Súrsildaflak	613	3.079	139	881
23.01	Sildamjøl	6.843	19.471	11.437	43.035
	Fiskamjøl	1.507	4.611	1.443	4.097
25.01	Salt		90	—	—
39.07	Plastikkrør	—	—		2
41.01	Neylahúðir		24		14
	Skinn, saltað		347		112
	Skinn, garvað		7		4
53.10	Tógv	7	233	16	803
60.05	Bundnar vørur		622		300
61.01	Oljuklæði	—	—		9
89.01	Skip, nýggj		6.536		—
	Skip, gomul		4.400		12.542
	Tilsamans		179.416		246.083

ÚTFLUTNINGUR EFTIR LONDUM í 1.000 kr. og prosentum.

	1970	1971	1972	1973	1. hálvár 1973	1974
EEC-lond						
Danmark	151.152	155.899	161.756	240.614	83.716	
Onnur lond	99.864	122.809	160.300	230.743	95.700	
Noreg	3.316	5.787	3.311	16.779	2.294	
Sveriki	6.670	9.856	12.341	13.964	4.944	
Grikkaland	10.614	8.038	11.382	14.321	3.177	
Pólland	6.372	11.153	24.803	24.268	15.140	
Portugal	17.186	11.040	14.517	7.015	3.748	
Spania	17.067	26.326	34.799	41.156	25.995	
U S A.....	29.485	45.686	52.469	63.032	24.729	
Ymisk lond	12.530	10.710	9.989	50.208	15.673	
Tilsamans	251.016	278.708	322.056	471.357	179.416	
í prosentum:						
EEC	60,2	55,9	50,2	51,0	46,7	
Danmark	24,3	21,6	22,9	22,4	26,1	
Onnur lond	39,8	44,1	49,8	49,0	53,3	
Tilsamans	100,0	100,0	100,0	100,0	100,0	

Sambært skipaskrásetingina eru hesi skip komin aftrat síðan seinastu ólavsøku:

Fiskifar størri enn 20 brt.	BRT	
MØLISTINDUR	47	
GORPUR	410	
GRÆLINGUR	410	
MUNKUR	410	
SKARVUR	410	
SKRAPUR	410	
SKUGVUR	410	
STELKUR	410	
TRAUSTUR	410	
HAVHESTUR	410	
STJØRNAN	185	
VESTFINN	119	
NORÐFINNUR	119	
HALLARKLETTUR	465	
SUNDABERG	857	
GØTUNES	326	
LOGOS	228	
ATLANTIS	153	6.189
Bátar minni enn 20 brt.		67
Sandbátar		
SANDGREFSTUR	134	
MØLLENÆS	95	
SANDBORG	99	328
Farmaskip		
KROSSTINDUR	300	
NESTINDUR	500	
BLIKUR	1337	2.137
		8.721

Nýkomdn	30 skip	8721
Strikað	29 skip	6830
Vøkstur	1 skip	1891

FØROYA GJALDSTOVA,
Tórshavn, 26/7 - 1974.

		kr.
Inntøkur:		
Inngoldin skattur (kommunu- og landsskattur)		
Gamal skattur	7.333.809,92	
Nýggjur skattur	36.212.421,22	
	43.546.231,14	
Herav eigur landskassin umf. og kommunurnar restina.		24.500.000,00
Inngoldin tollur og framleiðslugjøld		33.898.553,26
Onnur gjøld		354.782,40
		58.753.335,66
Rentuinntøkur og rentuútreiðslur		805.694,93
Landsstovnar (asfalteringsverk v.m.)		1.614.962,70
		57.873.067,89
Inntøkur tilsamans		57.873.067,89

Landskassin apr. ársfj. 1974/75.

		kr.
Útreiðslur:		
§ 10	Løgtingið	2.026.668,61
§ 11	Landsumsitingin	5.114.380,39
§ 12	Heilsumál (apr. ársfj. studningur frádr.)	5.442.005,38
§ 13	Samferðslumál	24.942.592,31
§ 14	Skúlamál	10.653.728,48
§ 15	Vísind, bókment og list	2.055.814,63
§ 16	Fiskivinna, sigling o.t.	11.277.566,76
§ 17	Landbúnaður v.m. (Incl. Matrikulst.)	543.076,81
§ 18	Handil, ídnaður o.t.	5.085.719,10
§ 19	Almenn forsorg	20.564.430,41
§ 20	Eftirlønarútreiðslur	150.775,07
§ 21	Útlagt fyri veðhald (játtan 4 mill.)	286.184,28
§ 22	Aðrar og óvissar útreiðslur	252.904,91
§ 23	Tit kirkjugrunnin	670.000,00
§ 24	Avdráttarburturleggingar og avskrivingar (ætlað fyri apr. ársfj. — Játtan 7,5 ml.)	2.000.000,00
§ 26	Ymsar ognarútreiðslur	1.463,16
		105.484.591,20
	Í hesum útreiðslutølum eru allar játtanirnar til grunnar bókaðar fyri fullt ár við umleið 53,4 mill., og kunnu ¾ av 53,4 mill. dragast frá, ella tilsamans	40.036.875,00
		65.447.716,20
	Uppi í hesum útreiðslum eru eisini útgoldnar lønir, pensiónir og soslalar útreiðslur fyri juli mánaða við umleið	6.850.000,00
		58.597.716,20
	Útreiðslur tilsamans	58.597.716,20

VEIÐIHÆTTIR
(tons, lívandi vekt)

Ár	Tilsamans	Ótróður	Nótaskip	Iðnaðartrolarar	Annað
1973	246.408	45.565	93.661	65.925	41.257
1972	207.805	38.747	60.653	57.778	51.627
1971	207.121	39.748	66.500	47.238	53.635

FISKIMANNAINNTØKUR
(í heilum 1.000 kr.)

	1968	1969	1970	1971	1972	1973
LINUSKIP						
Miðal	18,0	21,2	23,4	35,9	39,3	51,5
Hægst	23,9	33,1	35,8	62,7	68,4	72,3
Lægst	12,3	14,0	15,4	21,9	21,6	31,4
LINUSKIP — bert á Ísfiskaveiði						
Miðal						47,6
Hægst						58,3
Lægst						32,6
NÓTASKIP						
Miðal	34,9	33,7	64,8	53,0	54,0	91,4
Hægst	46,3	74,1	138,5	90,4	103,9	151,1
Lægst	26,3	20,6	35,5	29,8	27,9	36,5
FRYSTISKIP						
Miðal	28,2	22,8	30,0	46,9	53,8	78,7
Hægst	37,8	29,0	41,7	57,1	109,1	121,4
Lægst	22,2	17,8	25,3	33,8	35,1	42,2
SALTFISKATROLARAR						
Miðal	25,9	28,4	32,5	34,2	45,4	56,0
Hægst	32,9	34,8	48,6	47,4	78,4	96,8
Lægst	13,6	21,2	22,1	26,0	31,9	44,7
FLAKATROLARAR						
Miðal	26,5	33,8	45,2	46,4	42,2	....
Hægst		38,7	49,8	54,8	46,9	....
Lægst		30,4	37,4	37,8	34,9	....
IDNAÐARFISKISKIP						
Miðal		30,5	38,6	38,3	44,0	83,8
Hægst		32,7	58,0	52,9	60,9	125,4
Lægst		28,9	18,1	23,7	31,2	35,3

Viðmerking:

Flakatrolarar eru fyri 1973 taldir saman við saltfiskatrolarunum av tí at bert 2 av 4 vóru í regluligari vinnu.

Avlop til ventur, avdrátt og fyrisatt
(í heilum 1.000 kr.)

	1968	1969	1970	1971	1972	1973
LÍNUSKIP						
Miðal	30,5	86,6	106,3	232,5	186,7	406,1
Hægst	236,4	295,5	323,2	762,1	760,6	1.090,3
Lægst	÷ 103,6	÷ 290,0	÷ 317,0	÷ 62,2	+ 203,4	÷ 161,2
LÍNUSKIP — bert á ísfiskaveiði						
Miðal						75,2
Hægst						330,4
Lægst						÷ 394,0
NÓTASKIP						
Miðal	340,9	354,6	1.043,3	630,9	645,3	1.312,9
Hægst	591,1	1.188,7	3.037,8	1.648,3	1.725,2	2.981,3
Lægst	49,8	43,9	241,2	÷ 167,1	÷ 152,7	102,9
FRYSTISKIP						
Miðal	325,7	114,9	187,7	420,5	476,7	700,3
Hægst	553,1	294,1	418,4	834,1	1.193,4	1.388,0
Lægst	195,9	÷ 52,3	73,7	165,4	83,3	137,9
SALTFISKATROLARAR						
Miðal	335,0	342,6	447,1	410,2	553,0	1.173,9
Hægst	604,0	756,2	1.108,0	1.068,0	1.555,0	2.892,0
Lægst	÷ 78,2	÷ 137,7	÷ 349,5	÷ 241,4	+ 317,1	181,9
FLAKATROLARAR						
Miðal	503,4	1.009,7	1.950,0	1.702,0	1.121,3	....
Hægst		1.237,8	2.612,3	2.567,5	1.873,4	....
Lægst		756,2	1.238,8	1.052,4	414,1	....
IÐNAÐARFISKISKIP						
Miðal		109,9	183,9	61,6	133,5	298,1
Hægst		212,3	349,6	218,7	271,5	627,9
Lægst		÷ 82,0	13,5	÷ 70,0	÷ 37,6	÷ 32,2

Viðmerking:

Flakatrolarar eru fyri 1973 taldir saman við saltfiskatrolarunum av ti at bert 2 av 4 vóru í regluligari vinnu.

Talva 1. **Almennar iløgur í árunum 1969 - 73 og iløguætlanir fyri árini 1974 - 76**

Milj. kr.	1969	1970	1971	1972	1973	1974	1975	1976
1. Vegir	15,2	13,9	17,2	29,0	32,6	58,4	53,3	38,2
2. Havnir	6,0	6,6	17,5	19,9	17,4	18,2	23,7	10,1
3. Lendingar	1,9	3,8	3,4	3,3	6,5	7,0	7,0	7,0
4. Flogvollur	.	1,0	1,2	1,0	0,7	0,7	1,0	4,0
5. Elverk	2,7	2,0	6,3	7,5	11,1	24,4	6,5	6,9
6. Post og telegraf	...	0,1	..	...	...	.	0,6	1,8
7. Telefonverkið	2,0	4,0	9,5[1])	11,4[2])	15,0[3])	13,0	10,0	10,0
8. Útvarp og sjónv.	1,3	2,0	0,1	0,2	—	—	—	0,1
9. a) Fólkaskúlin og ítróttur	5,8	7,7	7,9	7,7	15,2	9,0	15,4	19,0
b) Hægri undirvísing	1,1	—	—	0,6	—	—	—	—
c) Teknisk undirvísing	—	0,5	0,9	2,0	3,5	5,4	6,7	6,6
10. Sjúkrahús o.t. ..	11,6	13,2	7,1	3,2	2,5	3,8	3,4	3,3
11. Sosial bygging	0,7	2,4	2,4	2,9	0,8	5,7	8,6	9,1
12. Rættar- og løgreglumál ..	0,2	0,1	—	0,3	—	—	0,9	1,3
13. Vitaverk	0,8	0,5	0,5	0,5	0,4	—	0,1	0,1
14. Vaktar- og bjargingarskip	—	—	—	—	—	5,0	8,0	—
15. Aðrar iløgur í Tórshavnar kom.[4])	3,9	3,0	3,9	5,5	7,1	9,3	9,4	8,0
16. Aðrar almennar iløgur	2,1	2,2	4,0	4,6	5,9	5,8	6,8	6,7
Ialt	55,3	63,0	81,9	99,6	118,7	165,7	161,4	132,2

Tølini 1969-73 eru í ársins prísum. 1974-76 eru í 1973-prísum.

[1]) Nýtt tal uppgivið í 1974: 12,7

[2]) Nýtt tal uppgivið í 1974: 15,0

[3]) Ætlað tal.

[4]) Ølt tølini eru frá 1972.

Talva 2. **Vinnulívs- og sethúsaíløgur í árunum 1969-73 og íløgusetlanir fyri árini 1974-76**

Milj. kr.	1969	1970	1971	1972	1973	1974	1975	1976
a) nýíløgur								
1. Fiskiveiðifør	63,5	11,0	38,6	22,7	13,9	100,0	100,0	100,0
b) ÷ seld						÷ 13,0	÷ 5,0	÷ 5,0
2. Fiskiídnaðarvirki	2,5	4,1	7,5	11,6	22,6	23,0	26,0	28,0
3. Aðrar ídnaðarbyggingar	1,2	2,5	8,3	7,3	19,5	22,8	25,0	25,0
4. Landbúnaðarbyggingar- og maskinur	2,0	2,0	2,3	2,5	2,8	3,0	3,0	3,2
5. Byggimeistarar o.t.	1,0	2,0	2,5	2,7	3,0	3,0	3,3	3,3
6. Akfør (til arbeiðsnýtslu)	4,0	4,5	6,0	6,2	6,8	7,0	7,5	8,0
7. Ferða- og farmaskip[1])	1,7	10,1	9,0	11,0	6,4	13,7	11,5	25,5
8. Skrivstovu- og handilsbygningar	8,0	7,5	8,3	8,1	9,7	11,0	11,0	12,0
Alt vinnulívsíløgur	83,9	43,7	82,5	72,1	84,7	170,5	182,3	200,0
9. Sethúsabygg. o.t.	21,0	23,0	28,0	29,6	40,0	45,0	50,0	50,0
Alt einstaklingsíløgur	104,9	66,7	110,5	101,7	124,7	215,5	232,3	250,0
Alt — skip ikki viðroknað	39,7	45,6	62,9	68,0	104,4	114,8	125,8	129,5

Tølini 1969-73 eru í ársins prísum. 1974-76 eru í 1973-prísum.
Í tølunum fyri fiskiveiðifør 1969-73 eru seld skip frádrigin.
[1]) Viðroknað flogfør, ferðamannaskip o.t.

Talva 3.

Samlaðar nýíløgur í árunum 1969-73 og íløguætlanir fyri árini 1974-76

Milj. kr.	1969	1970	1971	1972	1973	1974	1975	1976
a) nýíløgur 1. Fiskiveiðifør b) ÷ seld	63,5	11,0	38,6	22,7	13,9	100,0 ÷ 13,0	100,0 ÷ 5,0	100,0 ÷ 5,0
2. Fiskiidnaðarvirki	2,5	4,1	7,5	11,6	22,6	23,0	26,0	28,0
3. Ferða- og farmaskip	1,7	10,1	9,0	11,0	6,4	4,3	11,5	25,5
4. Aðrar vinnulívsíløgur	16,2	18,5	27,4	26,8	41,8	46,8	49,8	51,5
5. Sethúsabygg. o.t.	21,0	23,0	28,0	29,6	40,0	45,0	50,0	50,0
Ialt einstaklingsíløgur	104,9	66,7	110,5	101,7	124,7	206,1	232,3	250,0
6. Vegir, havnir og flogvøllur	23,1	25,3	39,3	53,2	57,2	84,3	85,0	59,3
7. SEV, telefon, útvarp, sjónvarp, post og telegraf	6,0	8,1	15,9	19,1	26,1	37,4	17,1	18,8
8. Undirvising ..	6,9	8,2	8,8	10,3	18,7	14,4	22,1	25,6
9. Sjúkrahús o.t. ..	11,6	13,2	7,1	3,2	2,5	3,8	3,4	3,3
10. Aðrar almennar íløgur	7,7	8,2	10,8	13,8	14,2	25,8	33,8	25,2
Ialt almennar íløgur	55,3	63,0	81,9	99,6	118,7	165,7	161,4	132,2
Samlaðar fastar nýíløgur	160,2	129,7	192,4	201,3	243,4	371,8	393,7	382,2
11. Øking í fiskagoymslum ..	÷ 6,3	÷ 0,3	17,2	0,6	14,3	....	....	....
12. Øking í øðrum goymslum	—	3,8	0,5	—	....	....	....	....
Ialt	153,9	133,2	210,1	201,9				

Tølini 1969-73 eru í ársins prísum. 1974-76 eru í 1973-prísum.
I tølunum fyri fiskiveiðifør 1969-73 eru seld skip frádrigin.

FRÁGREIÐING

viðv. endurgjaldskravi frá føroyskum laksaskipum vegna forboð fyri laksafiskiskapi undir Grønlandi

Framlagt á Løgtingi 16. august 1974.

(F.L.j. nr. 1509-3-/74)

Frágreiðing viðvíkjandi endurgjaldskravi frá føroyskum laksaskipum vegna forboð fyri laksafiskiskapi undir Grønlandi.

1. Tann 18. december 1972 samtykti løgtingið forboð fyri laksaveiðu undir Grønlandi (Løgtingsmál nr. 26/1972). Samtyktin álegði eisini landsstýrinum at umhugsa tær fíggjarligu avleiðingar, ið kunnu standast av slíkum forboðum og á rættum staði at gera vart við tær.

Tær vørur og tænastur, ið framleiddar verða hjá ti almenna verða fyri tað mesta ikki seldar fyri kostpris, men verða heilt ella lutvist latnar brúkarunum frítt. Sum dømi um tænastur, ið verða latnar brúkarunum heilt frítt, kann verða nevnt slíkt sum undirvísing ella almenn koppseting, og sum dømi um tænastur, ið verða latnar brúkarum fyri minni enn kostpris, kann nevnast slíkt sum ferðing við Strandfaraskipum landsins ella bústaður á kostdeildini í Hoydølum.

Tær framleiðslukreftir, ið brúktar verða til at framleiða hesar vørur og tænastur, verða, ávikavist heilt og lutvist, goldnar ígjøgnum skattin.

Tað, at ein partur av framleiðslukreftunum er bundin til framleiðslu av felagsnýtsluni er ein samfelagsøkonomisk byrði. **Høvuðsuppgávan hjá skattinum er at býta hesa byrði sum best.**

b) **Liður í inntøkubýtinum.**
Tað inntøkubýti, ið ein marknaðarstýrdur búskapur førir við sær, samsvarar sjáldan við tað politiskt ynskiliga býtið. Hitt almenna

skipar tí fyri eini umfordeiling við at krevja upp skatt og gjalda út studningar (transfereringar).

Skatturin skal sostatt eisini tæna hesum umfordeilingarendamáli.

c) **Figgjarpolitisk endamál.**
Harumfraunt skal skatturin tæna hæði almennum og serstøkum figgjarligum endamálum.

Í fyrsta umfari skal skatturin tilsamans tæna til at minka um privata eftirspurningin til nýtslu og fløgur, so nóg mikið verður eftir av framleiðslukreftum til hitt almenna. Henda stýring av samlaða eftirspurninginum verður oftast framd við tí fyri eyga at fáa allar framleiðslukreftir í landinum nýttar fult út - - hvørki meira ella minni, tí annars førir tað til ávikavist prísbólgnan og arbeiðsloysi.

Skatturin ávirkar búskaparligu atferð borgaranna. Við skattareglunum ber til at fáa teir at arbeiða, vinna, brúka, spara ella fleggja meira ella minni. Hinvegin kunnu myndugleikarnir eisini leggja seg eftir at leggja skattin soleiðis til rættis, at hann er uttanveltaður (neutralur), t.e. ávirkar atferð borgaranna minst møguligt. Út frá einari liberalistiskari áskoðan, ið byggir á, at borgararnir sjálvir hava best skil á, hvat ið gagnar teimum sjálvum best, og at tað, sum gagnar tí einstaka, sum oftast eisini gagnar samfelagnum, verður neuptralitetskravið rætiliga týdningarmikið.

2. **Treytir fyri eini góðari skattaskipan.**

Meginkrøvini til eina góða og væl virkandi skattaskipan eru hesi:

Hon skal vera
a) Rættvís
b) Greið
c) Løtt og kostnaðarlítil at umsita
d) Samsvara við búskaparpolitisk endamál.

a) **Rættvís:**

Høvuðsuppgávan við skattinum er sum nevnt at býta byrðarnar av tí almenna virkseminum millum borgararnar. Var onki krav um, at hesar byrðar skuldu býtast rættvíst, var ikki brúk fyri eini skattaskipan. Hitt almenna kundi tá bert lagt hesar byrðar tilvildarliga

á einstakar borgarar. Skattaskipanin eigur ti at veita borgarunum trygd fyri, at byrðarnar verða býttar rættvíst.

Rættvísiskravið skal verða uppfylt tveir vegir: Vatnrætt, t.e. at borgarar í somu umstøðum skulu bera somu skattabyrði **(mannamunur má ikki gerast)** og loddrætt, t.e. at borgarar í ymiskum umstøðum skulu bera tilsvarandi ymiska skattabyrði **(skatturin skal latast eftir førimuni).**

Spurningurin er síðani, hvussu sambandið imillum betri umstøður og størri skatt skal vera.

Hetta velst nógv um politiskar metingar, men tann grundhugsan, ið býr aftanfyri tær flestu skattaskipanir um okkara leiðir, er at tað er avlopsfíggjarmegin hjá borgarunum, ið eigur at avgera, hvussu stóran part av byrðini, ið tað er rætt og rímiligt at leggja á teir.

Við avlopsfíggjarmegina hjá einum húsarhaldi verður meint við teir møguleikar fyri nýtslu ella uppsparing, ið húsarhaldið hevur út yvir tað, sum skal til fyri at uppfylla tey grundleggjandi lívskrøvini. Meinhagin er, at trupult er at avgera, hvussu stór hesi grundleggjandi lívskrøv eru.

Var tað gjørligt at gera av, hvussu nógvar krónur, ið hetta lívsminimum er, so var lætt at máta avlopsmegina. Var lívsminimum 20.000 kr., hevði maður við 40.000 kr. í inntøku eina avlopsmegi uppá 20.000 kr. Vaks inntøkan so við 50% til 60.000 kr., vaks avlopið við 100% til 40.000 kr.

Taldømið vísir prinsippið: avlopsmegin veksur skjótari enn inntøkan.

Siga vit, at skattur, fyri at vera rættvísur, skal vaksa í mun sum avlopsmegin, og tað ljóðar rímiligt, so fylgir av hesum, **at ein rættvís skatting skal vera progrosiv, t.e. vaksa skjótari enn inntøkan.** Hetta er galdandi, uttan mun til um miðað verður imóti eini umfordeiling gjøgnum skatt og stuðning ella ei. Hetda grundhugsan, at tað er avlopsfíggjarmegin, antin hon verður nýtt til at fíggja nýtslu ella uppsparing, sum tehur, førir eisini fram til, at tað, sið úr rættvísissjónarmiði, **er skeivt at viðgera ymisk sløg av inntøku ymiskt ella at skatta tey hvørt fyri seg.** Fært tú 10.000 kr. er fíggjarmegin vaksin við hesi upplædd, annaðhvørt peningurin stavar frá lønar-

arbeiði, arbeiði í egnum virki, rentu av úttáni, vinningsbýti av partabrøvum, søluvinningi av jørð, húsum ella virðisbrøvum, nýtslu av egnari framleiðslu, arvi, gávu o.s.fr. Og hevur tú inntøku frá fleiri keldum, eiga hesar inntøkur at verða samanlagdar, so ein eykainntøka uppá 10.000 kr. verður skattað harðari, um tú hevði 100.000 kr. frammanundan, enn um tú bert hevði 20.000 kr.

Rættvísissjónarmiðið talar sostatt fyri einum víðfevndum skattagrundarlagi («comprehensive tax base»).

b) **Greið.**
Ein skattaskipan eigur at vera so **greið** sum gjørligt.

Í einum fólkastýrdum samfelag hevur borgarin krav uppá, at skattingin er uppbygd eftir greiðum prinsippum, ið vanligi borgarin kann skilja og góðtaka, og at reglurnar eru so greiðar, at møguligt er hjá borgaranum at rokna út, hvørjar skattaavleiðingar, ið hansara figgjarligu avgerðir føra við sær. Eisini teir myndugleikar, ið skulu umsita skattaskipanina, hava krav uppá, at hon er greið.

c) **Løtt at umsita.**
At **umsita** eina skattaskipan krevur framleiðslukreftir, ið kundu verið nýttar til okkurt annað, bæði hjá tí almenna, hjá fyritøkunum og hjá húsarhaldunum. Ein skattaskipan skal tí vera løtt og hilig í umsiting. Hetta gerst m.a. við at gera greiðar høvuðsreglur við fáum undantøkum, við at minka um tørvin fyri almennum eftirliti við at gera skipanina so, at virki og persónar sjálvkravdir hava eftirlit við hvørjum øðrum, og við at gera uppkrevjingina einfalda.

d) **Tænir búskaparligum endamálum.**
Okkara liberalistiski marknaðarstýrdi búskapur byggir sum kunnugt á ta grunduppfatan, at mest kemur burtur úr fyri heildina, tá ið einstaklingar sjálvir sleppa at taka flest møguligar figgjarligar avgerðir uttan uppílegging omanifrá. Húsarhaldini eru best fyri, tá ið tey sjálvi óheft sleppa at gera av, hvussu nógv tey skulu arbeiða, vinna, brúka og spara, hvussu nýtslan skal verða samanselt og í hvørjar ognir uppsparingin skal setast.

Á sama hátt verða framleiðslukreftirnar nýttar á hentasta hátt, um virkini sjálvi óheft sleppa at avgera, hvat ið tey skulu framleiða, hvussu nógv og á hvønn hátt.

Bert í ávísum førum er hetta ikki so, og tá ber til hjá tí almenna við boðum, forboðum ella fíggjarligum stuðlum ella byrðum at ávirka atburðin hjá húsarhaldum og virkjum so, at hann kemur í samsvar við heildina.

Øll skattlegging ávirkar avgerðirnar hjá borgarum í størri ella minni mun. Jú hægri skattirnir eru, jú størri verður ávirkanin. Sum dømi kann nevnast, at skattur á arbeiðsinntøku minkar um arbeiðslugin, at skattur á nýtslu heldur enn uppsparing minkar um nýtslna og økir um sparsemið, at gjøld á arbeiðsmegi minka um nýtslna av arbeiðsmegi og fremja rationalisering, at serliga løtt skatting av passivari uppsparing fremur hana og tí kanska minkar um hugin at gera aktívar íløgur o.s.fr.

Út frá tí, sum her er nevnt, kemur ein til ta niðurstøðu, at ein skattaskipan so vítt gjørligt eigur at vera uttanveltað, t.e. ávirka atferð borgaranna minst møguligt uttan so er, at myndugleikarnir vilja brúka skattareglurnar til at náa ávísum búskaparligum ella øðrum málum, t.d. at fáa fólk at arbeiða og spara meira, gera fleiri íløgur og brúka minni o.s.fr.

Kunnu tey 4 krøvini sameinast?

Skilligt er, at summar av teimum treytum, ið her eru umrøddar, styðja hvørja aðra, meðan aðrar stríða ímóti hvørji aðrari.
T.d. kann kravið um, at skipanin skal vera greið, eisini uppfatast sum eitt rættvísiskrav um at tey, ið ikki duga at lesa lógartekst og ikki hava ráð at brúka serfrøðingar, ikki verða verri stødd enn hini.

Hinvegin er greitt, at jú størri ómakur, ið gjørdur verður fyri, at ein og hvør munur í umstøðum skal ávirka skattin, jú fløktari verður skipanin. Og samstundis eisini dýrari at umsita.

Sum nevnt omanfyri talar rættvísiskravið fyri, at øll inntøkusløg verða skattað eins og undir einum. Hetta ger eisini skattingina greiða. Hinvegin kunnu umsitingarligar grundir tala fyri at skatta inntøku frá ymsum heldur ymiskt ella hvørja fyri seg.

Størsta stríðið verður tó ímillum rættvísiskravið og ynskið um at stuðla búskaparliga framburðinum.

Allar skattareglur, ið miða ímóti at stuðla borgarunum til at spara

upp, gera íløgur o.s.fr. hava lyndi til at koma teimum til góðar, ið hava flestar møguleikar frammanundan, og verða tí órættvísar.

Leggjast skal tó alfurat, at tann framburður, ið stendst av, at reglurnar verða brúktar, helst í longdini skuldi fært við sær, at eisini tey minni mentu fara at fáa meira burturúr.

Illvildin manna millum ímóti at nýta skattleggingina til at fremja uppsparing og íløgur stendst fyri tað mesta av, at tað ikki er gjørligt at síga í hvørm mun tey minni mentu veruliga fáa nakað burturúr, og at avleiðingarnar av slíkum skattreglum oftast eru ógreiðar fyri almenninginum.

Tá ið krøvini soleiðis koma í stríð hvørt við annað, er trupult hjá eini nevnd av fakmonnum at velja hvørji krøv, ið skulu vinna og hvørji mugu dvína, tí hetta er eitt **politiskt** val.

Spurningurin, ið fyrst eigur at verða svaraður, er hvat ið ein — uttan at taka dagar ímillum politiskar áskoðanir — kann loyva sær at kalla «gott» og «best» í hesum sambandinum.

Tá ið óheftar tilráðingar skulu gerast um skattleggingina er eyðskilt, at eitt tiltak, ið samsvarar við tær omanfyri nevndu treytirnar er betri enn eitt tiltak, ið ikki lýkur eina ella fleiri av hesum treytum. Stendur valið ímillum tvey tiltøk, ið hvørki uppfyllir allar treytirnar, má ein ópolitisk tilráðing vera at ráða til tað tiltakið, ið sum heild víkir minst frá treytunum.

At enda eigur at vera undirstrikað, at tær nevndu treytirnar til skattaskipanina bert eru partar av einum meira umfatandi kravi til alla samfelagsstýringina og til alt alment virksemi yvirhøvur um **skynsemi** ella **rationalitet.**

Við **skynsemi** ella **rationalitet** verður ikki bert hugsað um, at umsitingin ella framleiðslan av almennum tænastum, sum t.d. undirvísing og sjúkrarøkt, eigur at verða fromd við so lágum kostnaði í mun til framleiðsluna sum gjørligt, men uppaftur meira verður hugsað um, **at tey tiltøk, ið hitt almenna setur í verk til tess at ávirka samfelagsbúskapin, ikki koma í stríð hvørt við annað, men tvørturímóti samvirka, so tey tæna sama endamáli.**

Skulu broytingaruppskot gerast er neyðugt í eitt ávist mát at velja

og seta nøkur krøv fremri enn onnur. Í hesum vali hevur nevndin roynt at fylgja nøkrum meginreglum.

Tað er greitt, at neyðugt er at virða rættvísiskravið høgt, serstakliga, tá ið talan er um inntøkuskattin, ið júst verður hildin at hóska serliga væl til at uppfylla hetta krav. Skattaskipanin byggir jú í ógvuliga stóran mun á eina loyala meðvirkan frá borgarunum. Henda loyala meðvirkan kann bert væntast av borgarum, ið sjálvir eru sannførdir um, at skipanin er so rættvís, sum hon kann verða.

Í teimum metingum av ymiskum skattatiltøkum, ið gjørdar verða í hesi frágreiðing, **verður kravið um rættvíst skattabýti sett fremst.** Hetta rættvísiskrav merkir, at skattabyrðin fyri eitt tíðarskeið verður býtt millum borgararnar í mun til vøksturin í avlopsfíggjarmegi teirra í hesum tíðarskeiði og sostatt brýtur sum minst av frá eini progressívari skatting av einum víðfevndum skattagrundarlagi.

3. Eru summi sløg av skatti betri enn onnur?
Sum nærri verður umrøtt í III kapitli eru nógv sløg av skatti: 1) vørugjøld, 2) inntøkuskattur, 3) sosialgjøld, 4) arbeiðsgevaragjald, 5) ogn-arskattur og 6) kapitalflutningsgjøld o.t., o.s.fr.

Spurningurin er um nakað einstakt av hesum skattasløgum er betri enn øll hini, og tí kanska átti at verðið nýtt burturav.

Til hetta er at siga, at alla hesa øldina hava menn hildið, at vanligur inntøkuskattur hóskaði eina best til at uppfylla tey høvuðskrøv, ið áður eru umrødd, serliga kravið um skatt eftir førimuni (máld sum avlopsfíggjarmegi).

Jú størri, ið samlaða skattatrýstið verður, jú sjónskari verða tó vansarnir við at leggja ov stóran dent á hetta eina slagið av skatti.

Tað tykist vera trupult at skapa eitt inntøkuhugtak, ið er eitt heilt álitandi mark fyri skattaorkuni. Tá ið markskatturin (skatturin av seinastu vunnu krónuni) fer ov langt upp, virkar skatturin avbronglandi inn á búskaparliga atburðin hjá virkjum og húsarhaldum o.s.fr. Onnur

sløg av skatti uppfylla nøkur av hinum endamálunum betur, eru t.d. lætturi at umsita ella hava ynskiligari búskaparligar avleiðingar. Úrslitið er, at londini alt meira royna at leggja seg eftir at fáa **eitt fjølbroytt skattalag** (skattastruktur), so onki serstakt skattalag verður nýtt so harðliga, at vansarnir av tí verða ov sjónskir.

4. **Skattafyrimunir ella studningar.**

At samband ímillum skatt og studning er eyðsvið. Studningar verða fíggjaðir við skatti. Jú meira almennur ein studningur er, jú størri líkindi eru fyri, at tað er studningsmóttakarin sjálvur, ið fíggjar sín egna studning við øktum skatti.

Her skal ikki verða gjørt meira við henda týdningarmikla spurning, og ongin gjøgnumgongd av føroyskum studningsskipanum (ella skipanum, ið føra við sær, at almennar tænastur, ið goldið kundi verið fyri, verða latnar frítt) verður gjørt í hesi syftu. Vit venda okkum heldur til ein annan prinsippspurning: Um so er, at hitt almenna ynskir at stuðla borgarum til at gera eitthvørt, eigur stuðulin so at verða latin sum studningur ella sum skattafyrimunur?

Sum longu nevnt, hava nógvar skattareglur til endamáls at ávirka búskaparliga atburð borgaranna, soleiðis at teir fáa skattalætta við at gera sum myndugleikarnir ynskja og skattabyrðar, um teir gera tað, ið myndugleikarnir ikki ynskja.

Summar av hesum skattareglum eru almennar (generellar), t.d. virka vørugjøldini sum heild sum skattur á nýtslu, soleiðis at uppsparingin sleppur undan. Aðrar skattareglur virka úrveljandi (selektivt), t.d. eru serliga høg gjøld á sumunum vørum, ið skulu fáa fólk at brúka minni av hesum vørum. Dømi um hetta er avgjaldið av rúsdrekka og onnur sløg av «eiturskatti».

Á virkisøkinum kunnu nevnast avskrivingarreglur, sum við at geva skattafyrimunir sum skattalætta og skattaútseting, stuðla fólki til at gera fløgur, og lágur skattur á rentu, ið skal fáa fólk at spara upp á bankabók.

Tá ið myndugleikarnir skulu ávirka borgararnar, hava teir sum oftast tvinnar høvuðsmøguleikar:

1) boð ella forboð og
2) fíggjarlig tilskot ella avgjøld.

Hin fyrri høvuðsmøguleikin er ofta trupul at umsita, vekir kanska eisini mótstøðu og kann á tí húskaparliga økinum ofta gera skaða við at virka órationelt, soleiðis at minni fæst burturúr fyri samfelagið sum heild. Hin seinri møguleikin er ofta lettari at fáa at rima við tann marknaðarstýrda húskapin og er tí tikin fram um.

Tann spurningurin, sum hevur áhuga okkara her, er hvørji sløg av fíggjarligum stuðli, ið best eru, skattafyrimunir ella beinleiðis studningar.

Til tess at meta um hetta eigur fyrst at verða spurt hvat, ið samsvarar betur við tey krøv, ið ommanfyri eru sett til eina góða skattlegging, og síðani, hvat ið er skynsamasti hátturin at skipa almenna virksemið sum heild, soleiðis at teir ymsu partarnir av tí ikki koma í stríð hvør við annan, men tæna sama endamáli.

Av tí, sum í 2. petti er sagt um krøvini til eina góða skattaskipan skilst, at skattafyrimunir við ymsum endamálum kunnu føra til, at skattaskipanin verður minni rættvís og grejð og hartil forførari at umsita. **Frá einum skattleggingar-sjónarmiði eigur grundreglan tí at vera, at skattafyrimunir ikki eiga at verða nyttir, tá ið beinleiðis studningur kundi verið brúktur við sama úrsliti.** Bert tá ið skattafyrimunirnir uppfylla sjálvt endamálið betur, t.d. lí at endamálið er rættiliga alment, kann verða rátt til at nýta teir.

Eisini frá einum landsfíggjarligum sjónarmiði kemur ein til tað úrslit, at skattafyrimunir eiga at verða brúktir við varðsemi, sjálvt tá ið teir uppfylla endamálið eins gott ella betur enn studningar.

Í fíggjarpolitikkinum skulu teir, ið stýra, alla tíðina royna at náa teimum málum, ið teir hava sett sær fyri, við so lítlum kostnaði sum tilber. Skal valið millum mál og meðal verða rationelt, so krevst, at møguligt er hjá teim stýrandi at fáa at vita, hvussu nógv tað kostar at nýta eitt ávíst meðal til at náa einum ávísum máli.

Til hetta er tað, at budgettið, fíggjarætlanin, skal nýtast.

Er tað nú so, at kostnaðurin av nøkrum tiltøkum ikki kemur til sjóndar á útreiðslusíðuni í fíggjarætlanini, men krógvar seg við einum ókeindum tali á inntøkusíðuni sum mistur skattur, so fáa teir, ið avgerðirnar skulu taka, eina falska mynd, ið ikki ger teir førar fyri at vega møguleikarnar skynsamliga av hvør móti øðrum.

Afturat hesum kemur, at útreiðslurnar á fíggjarlógini skulu endurskoðast á hvørjum ári, og dømast skal um, hvørt brúk er fyri teimum longur ella ikki, men einki slíkt árligt eftirlit er við skattalóggávuni.

So kann verða spurt, hví skattafyrimunir so verða brúktir.

Hartil er at siga, at teir í summum førum, sum áður nevnt, uppfylla málið betur enn nakar studningur.

Viðhvørt verður hildið, at hóast tað sambært skynsamari hugsunarhátt skuldi gjørt mannum tað sama, um teir fingu eina millión sum skattalætta ella sum studning, so er «psykologiskur» munur á, sum ger, at skattalættin virkar sterkari.

Í øðrum førum eru skattalættarnir kanska lættari at umsita. Viðhvørt verður tað kanska eisini hildið at vera positivt, at tað ikki sæst, hvussu nógv, ið eitt tiltak veruliga kostar, og at tað slepst undan at taka støðu til tað á hvørjum ári.

Sæð frá vinnulívsins síðu er júst tað, at ein skipan ikki verður endurskoðað á hvørjum ári, gott, tí tað gevur trygd, ið ger tað møguligt at taka avgerðir, ið røkka fleiri ár fram í tíðina.

Eitt annað, ið ger, at menn halda skattafyrimunir vera betri enn studning er, er at tann fortreytin, ið nevnd varð omanfyri, nevniliga, at studningsskipanirnar verða endurskoðaðar við skynsemi í samband við hvørja fíggjarlóg, ikki verður hildin at vera uppfylt.

Teir sum finnast at studningsskipanum vísa á, at oftast er rættiliga trupult politiskt at minka um ella avtaka studningar, hóast rationellar grundir skuldu verið fyri tí.

Lagt kann verða afturat, at út frá einari liberalistiskari áskoðan verða skattafyrimunir ofta hildnir at vera betri enn studningar, tí at studningarnir ofta verða latnir á ein slíkan hátt, at tað merkir eina uppílegging í avgerðir vinnulívsins, meðan skattareglurnar oftast eru meira almennar og tískil geva vinnulívsmonnum fríari hendur. Hinvegin er tó prinsipielt onki til hindurs fyri, at ein studningsskipan er so almenn, at hon ikki skerjir frælsi móttakarans, og at ein skattafyrimunur verður latin undir so strongum treytum, at tað merkir eina munandi uppílegging. Tað er bert sjáldan, at hetta hendir.

At enda skal verða nertið við ein annan trupulleika, ið stendst av, at studningsveitingar og skattur verða tengd saman.

Sosialar veitingar verða ofta treytaðar av, at skattainntøkan liggur niðanfyri eitt ávist mark. Dømi um hetta eru m.a. fólkapensión áðrenn 67 ára aldur, sjúkrakassalimaskapur, gjøld fyri barnagarðar, studningur til næmingar o.t. Við at geva skattalættar á tann hátt, at minkað verður um skattskyldugu inntøkuna (t.d. við avskrivingum, ella við at t.d. rentuinntøkan ikki verður tald við), verður hitt almenna ofta eisini at veita móttakaranum størri sosialveitingar enn upprunaliga ætlað.

Ein breiðking av skattainntøkuhugtakinum hevði tí eisini bøtt um teir trupulleikar, sum í dag standast av at nýta skattskyldugu inntøkuna sum grundarlag undir **sosialum veitingum.**

Verður ikki hildið politiskt gjørligt at breiðka sjálvt skattainntøkuhugtakið og minka um ta ávirkan, ið t.d. órealistiskar avskrivingar hava á inntøkuna, er ein gongd leið at skapa eitt serligt sosialinntøkuhugtak, ið er meira bruttokent enn skattskylduga inntøka, og er reinsað fyri áðurnevndu avskrivingar.

Niðurstøðan má tí vera, at bæði yvskið um eina góða skattaskipan og um eina skynsama stýring av búskaparpolitikki hins almenna tala fyri at nýta studning heldur enn skattafyrimunir, men at onnur sjónarmið, einahelst yvskið um ikki at leggja upp í avgerðir vinnulívsins ofta føra til, at skattalættar kortini verða nýttir.

III SAMANBERING MILLUM SKATTATRÝST OG SKATTALAG Í FØROYUM OG ØÐRUM LONDUM

1. Inngangur.

a. **Skattatrýstið er eitt mát fyri, hvussu stórur skatturin í einum landi er, sammett við landsins inntøkur.**
Orðið skattatrýst ella skattabyrði ljóðar heldur negativt. Tað gevur varhuga av, at skatturin er peningur, ið fer fyri skeyli, tí ouki fæst burtur úr honum. Menn eru tí nú so smátt farnir at nýta meira uttanveltaða heitið skattapartur («tax ratio»), út frá teirri áskoðan, at tá ið skatturin í einum landi er ein størri partur av tjóðariuntøkuni enn í øðrum landi, er hetta helst bara tí, at fólk í tí fyrra landinum ynskja eina luttalsvist størri sammýtslu og minni einstaklinganýtslu enn í tí seinna landinum. Í summum londum vilja fólk t.d. heldur hava fleiri barnagarðar, skúlar og sjúkrahús enn fleiri bilar. Hesi fólk høvdu sostatt verið verri fyri um tey eru nú, um skatturin varð minkaður og sammýtslan við honum.

Við skattalag (skattastruktur) **verður meint við samansetingina av skattinum eftir slagi.** Fyrst og fremst verður hugsað um býtið millum inntøkuskatt, ognarskatt, vørugjøld, løntakara- og arbeiðsgevaragjøld o.s.fr.

Skattalagið er ójavnt frá einum landið til annað. Hetta stendst sjálvsagt av, at politisku málini við skattleggingini kunnu vera so ymisk, men er eisini eitt úrslit av, at summi lond eru komin longur ávegis búskaparliga enn onnur, og at londini hava ymsar skattatraditióuir.

b. Tá ið hugt verður at ávísum pørtum av skattalóggávuni er altið vandi fyri, at heildin verður gloymd. Tað er tí umráðandi fyrst at gera sær eina heildarmynd av føroysku skattaskipanini, harímillum eisini av skattatrýsti og skattalagi, so til ber at síggja á hvønn hógvin, ið møguligt og ynskiligt er at broyta skipanina sum heild. Harvið skuldi betri trygd fingist fyri, at tær broytingar, ið skotnar verða upp, hóska ímu í ta heildarmyndina, ið føroyingar halda, at teir eiga at arbeiða fram ímóti.

2. Føroyska skattatrýstið, samanborið við onnur lond.

Á talvu 1 á næstu síðu er føroyska skattatrýstið summett við OECD-lond [1]).

Sum tað sæst á talvuni, so liggja Føroyar í niðara endanum. Norðurlond sum heild liggja høgl. Sama er um tey stóru væl framkomnu londini í Vestur-Europa at siga. Schweitz er tó eitt undantak. Annars sæst, at tað er ley stýst á leið komnu londini, ið liggja á botninum. USA brýtur tó av.

Í flestum londum hevur skattatrýstið verið vaksandi alla hesa øldina, og serliga síðani 2. heimsbardaga, og so hevur eisini verið í Føroyum. Talini tykjust tó ikki benda á, at skattatrýstið í Føroyum er vaksið stórvegis hesi seinastu árini.

Tað rættiliga lága føroyska skattatrýstið stendst tó ikki av, at almenni parturin av búskapinum er lítil, sum hann t.d. er tað í USA, Schweitz, Japan ella Portugal. Í øðrum londum svara almennu útreiðslurnar sum procent av tjóðarinntøkuni umleið til skattatrýstið. Í Føroyum í 1968-70 svaraðu tær til 42% av bruttotjóðarinntøkuni, og vóru sostatt uppá seg størri enn í Danmark og næstan líka so stórar sum í Svøriki.

---

[1]) OECD: Organisation for Economic Cooperation and Development (Felagsskapurin fyri Búskaparligt samarbeiði og framburð) umfatar øll tey meira framkomnu londini í Vestureuropa og Norðuramerika og Japan, Australia og New Zealand.

Talva 1.

SAMANBURÐUR IMILLUM SKATTATRÝST Í FØROYUM OG ÚTLONDUM

(1968—1970)

Allur skattur í Pct. av bruttatjóðarinntøkum í marknaðarprísum

1.	Føroyar	28
2.	Danmark	39
3.	Noreg	38
4.	Svøríki	43
5.	Finnland	33
6.	Ísland	29
7.	Frankaríki	36
8.	U.K.	37
9.	Vesturtýskland	34
10.	Holland	40
11.	Italia	30
12.	Írland	30
13.	Sveitz	22
14.	Portugal	21
15.	Spania	19
16.	U. S. A.	28
17.	Japan	19

Keldur: Viðvíkjandi Føroyum, Tjóðarrokn skapur 1968, 1969, 1970 og Rigsombudsmandens beretning 1969, 1970, 1971.
Viðvíkjandi OECD londum: Sí bókayvirlitið nr. II.1.

3. Føroyska skattalagið, samanborið við onnur lond.

Sum umrøtt varð í kapitli II, so royna menn í flestum londum at gera skattalagið fjølbroytt við at nýla ymisk sløg av skatti og gjøldum. Tað er áhugavert at vita, hvørji skattasløg, ið nýtt verða í ymsum londum, og hvussu stóran dent londini leggja á ymis sløg av skatti.

Torført er at samanbera skattalagið landanna millum, men tað hevur nú

eydnast OECD at gera ein millumlanda góðkendan upplýtingarhátt, ið umfatar hesar bólkar:

1) Skattur á vørum og tænastum.
2) Skattur á inntøku (hjá einstaklingum og felagum).
3) Gjøld til sosialar tryggingar.
4) Arbeiðsgevaragjøld á arbeiðsløn o.t.
5) Ognarskattir.
6) Skattir á figgjarligum transaktiónum.
7) Aðrir skattir.

Í Føroyum er býtið millum hesar skattahættir sammett við nøkur onnur OECD-lond í talvu 2, á síðu III, 6.

Sum tað sæst á talvuni er skattalagið ógvuliga ójavnt í hesum londum. Vørugjald og inntøkuskattir eru tó teir týdningarmestu skattirnir í flestu londunum. Í einstøkum londum, t.d. Frankaríki og Italia sæst, at inntøkuskatturin hevur lítlan týdning, meðan sosialgjøldini, mest løntakaragjøld, eru ógvuliga stór.

Nýtslan av sosialgjøldum er annars ógvuliga ójøvn.

Á Vestureuropeiska meginlandinum verða tey ógvuliga nógv brúkt, minni í Bretlandi, Írlandi og Norðurlondum.

Eisini er nýtslan av «øðrum skattum», ið mest eru ognarskattir, ógvuliga ójøvn, við serligum týdningi í enskttalandi londunum og Schweitz og Japan.

Taka vit hini Norðurlondini fyri seg, sæst, at tey leggja rættiliga lítlan dent á ognarskatt, nakað størri dent á socialgjøld, men tó rættiliga ójavnt. Norðmenn tykjast nýta tey til at lætta um inntøkuskattin, sviar til at lætta um vøruskattin. Ísland skilir seg burtur úr við at lita lutfalsliga meira á vørugjald enn nakað annað OECD-land og rættiliga lítið á inntøkuskattin.

Føroyar líkjast burtur úr øllum hinum við at hava eitt ógvuliga eintáttað skattalag. Bæði sosialgjøld og ognarskattir telja væl minni enn í nøkrum av hinum londunum. Tískil verður onki annað land at lita lutfalsliga so nógv á inntøkuskattin sum Føroyar. Svøríki togar tó upp í móti. Men eisini vøruskatturin verður at telja lutfalsliga meira enn í londum við meira javnhýttum skattalagi. Bert Ísland og Írland, ið bæði hava heldur lítlan dent á inntøkuskattinum, krevja ein størri part av skatti sínum upp sum vørugjøld.

Talva 2.

SAMANBURÐUR ÍMILLUM SKATTALAGIÐ Í FØROYUM OG ÚTLONDUM

(1968—1970)

Høvuðsskattabólkar í pct. av samlaða skattinum.

	1. Vørugjald	2. Inntoku-skattir	3. Sosial-gjald	4. Aðrir skattir[1]
1. Føroyar [2]	45[3]	51[4]	4[5]	0,4[6]
2. Danmark	40	45	8	7
3. Noreg	37	33	24	6
4. Svøríki	30	49	19	2
5. Finnland	43	42	13	2
6. Ísland	60	25	7	9
7. Frankarikl	36	16	40	8
8. U.K.	30	39	14	18
9. Vesturtýskland	31	32	32	6
10. Holland	27	34	36	4
11. Italia	38	18	36	8
12. Írland	53	26	8	13
13. Schweitz	27	40	15	18
14. Portugal	42	26	22	10
15. Spania	36	20	38	6
16. U.S.A.	19	48	19	14
17. Japan	24	42	19	15

[1]) Mest ognarskattir

[2]) Fíggjarárini 1968/69, 1969/70, 1970/71, Kelda: Rigsombudsmandens beretning 1969, 1970 og 1971.

[3]) Innflutningsgjøld (tollur) og framleiðslugjøld v.m.

[4]) Lands- og kommunuskattur, fólkapensiónsgjøld, sjómansskattur.

[5]) Sjúkrakassi og vanlukkutrygging.

[6]) Húsaskattur (bert í Tórshavn, nú avtikin).

Kelda við. OECD: Bókayvirlit nr. II.1.

IV FØROYSKA SKATTASKIPANIN Í HØVUÐSDRATTUM

1. Inngangur.

Tað, sum eyðkennir føroyska skattalagið er, sum vístá í kapitli III, at so gott sum allur skattur hvílir á teimum báðum høvuðsbólkunum: vørugjaldi og inntøkuskatti. Sosialgjøld hava ógvuliga lítlan og ognarskattir als ongan týðning.

Um so er, at menn halda vøruskattin og inntøkuskattin hava nátt ta hædd hesir skattir kunnu bera, so er møguleiki fyri deils at fíggja komandi úthyggingar av sosialu trygdini ígjøgnum gjøld frá pørtunum á arbeiðsmarknaðinum, deils at leggja skatt annaðhvørt á nettoogn (formúgu) ella á fasta ogn (jørð og bygningar).

Tær hugsanir, ið hava verið frammi viðvíkjandi partafelagsskattinum miða ímóti at lætta um dupultskattingina av hesum feløgum og soleiðis minka um tann skattamismun, ið menn halda vera aktivum vinnulívsinntøkum fyri.

Tær hugsanir, ið hava verið frammi um skatt av hjúnum, bera á sama horðið.

Tilráðingar, sum heilt ella lutvist skulu koma hesum ynskjum til møtis, fara at føra til størri ella minni skattamiss fyri landskassan og kommununurnar.

Um so er, at útreiðslurnar og avlopini hjá landskassanum og kommununum verða hildin at hava eina hóskandi støðl, kann skattamissurin bert verða uppvegaður við øðrum skattahækkingum.

Fyri at fáa eitt yvirlit yvir føroysku skattaskipanina í dag er niðanfyri stutt greitt frá, hvussu tann føroyska skattaskipanin er, býtt í tein skattabólkar, sum umrøddir eru frammanfyri.

Í hesum yvirliti er føroyska skattaskipanin fyrst og fremst mett út frá einum skattleggingarsjónarmiði. Tey serligu krøv ,ið búskaparliga støðan í Føroyum í dag kann hugsast at seta til skattingina, verða viðgjørd í kapitli V.

Frágreiðingin skuldi eisini givið eina hylling á, hvørjir møguleikar eru fyri at breiðka skattagrundarlagið til at viga upp møguligar skattamissir,

ið standast av broytingaruppskotum. I høvuðsheitum verða fyrimunir og vansar viðgjørdir fyri hvønn skattabólkin sær. Hvussu stór tølini eru fyri tey ymsu skattasløgini í Føroyum verður vístí skjaltalvu IV, A.

2. Gjøgnumgongd av teimum einstøku skattabólkunum.

1) Vøruskattir.

a. Innflutningsgjøld.

Vøruskattirnir í Føroyum eru fyrst og fremst **innflutningsgjøld.** Vanliga 13% innflutningsgjaldið umfatar at kalla allar vørur. Harumframt koma onnur innflutningsgjøld á rættiliga umfatandi vørubólkum, framleiðslugjald á sukur- og drykkjuvørum, bensin- og bilgjald o.s.fr. Tey góva í 1971/72 um 91 miljónir kr. tilsamans.

Tvinnir møguleikar eru, um so er, at ynski er um at leggja enn størri deut á hesi gjøld í skattleggingini enn higartil: at hækka gjøldini ella breiðka grundarlagið undir teimum.

At hækka gjøldini er tekniskt lætt.

Vandamálini eru m.a., at vøruskattur vanliga hevur lyndi til at venda «tyngra endanum niðureftir» og taka tann minni menta meinast. Jú hægri gjøldini eru, jú størri er hugurin at sleppa sær undan við at keypa í útlondum o.s.fr.

Skal grundarlagið breiðkast, so kann hetta m.a. gerast við at fara frá innflutningsgjaldinum til meirvirðisskatt, sum umfatar alla virðisøkingina, eisini ta, sum fer fram eftir at vøran er komin til Føroya, og sum eisini umfatar tænastur. Virðisøkingarskattur (VØS) ella «meirvirðisskattur» (MVS) verður meira og meira brúktur. Hann er á ein hátt lættur at fáast við, og hann er það sum økonomarnir rópa «neutralur», t.e. hann liggur við sonna tyngd á øllum forbrúki og fær tí onga bronglandi ávirkan á forbrúkssamansetingina. Eisini er skatturin tann sami, um vøran er farin ígjøgnum færri ella fleiri lið á vegnum til keyparan.

Skal VØS setast í verk í Føroyum, fer hetta at krevja rættiliga stórar tekniskar fyrireikingar, tí hesin skattur verður væl truplari og dýrari at umsita enn hitt núverandi innflutningsgjaldið.

Umframt vanliga innflutningsgjaldið, ið umfatar nestsum allar vørur, er sum nevnt eisini serligt innflutningsgjald á rættiliga nógv-

um vørum, við ymiskum satsum á ymiskum vørum, t.d. 20+13% á klæðum, 15+13% á el-hentleikum og 100+13% á silvurlutum.

Ætlingin við hesum ymisku satsum hevur helst verið at skatta »luksusvørur» harðast, og sostatt gera innflutningsgjøldini progressiv.

So hvørt sum vælstandurin veksur, flytist markið ímillum neyðsynjarvørur og luksusvørur. Tað hevði tí verið vert at tikið hesar ymisku satsirnar til umhugsunnar og hugt eftir, um luksus-hugtakið í hesi lóggávu framvegis er tíðarlróskandi, og um satsirnir kundu verið samskipaðir, so tað bert varð talan um ein ella tveir satsir umfram vanliga inntøkugjaldið.

b. **Útflutningsgjøld.**
Útflutningsgjøld hava ongan týdning í føroyska landshúsarhaldinum í dag, men fyri 10 árum síðan høvdu tey rættiliga stóran týdning.

Útflutningsgjøld verða mest brúkt í teim ávøruframbeiðandi londunum. Serliga í teim stytri áleið komnu londunum er innlendski peningabúskapurin so stutt áleiðis komin, at útflutningsinntøkurnar eru at kalla tær einastu peningainntøkur, ið eru at fáa hendur á hjá myndugleikunum. Útflutningsgjøldini skulu tá virka í staðin fyri vanliga inntøkuskattin. Onki av OECD-londunum hevur útflutningsgjøld av týdningi.

Samhært IMF[1])-frágreiðingina frá 1967 um íslendsku skattaskipanina høvdu íslendingar tá framvegis rættiliga høg útflutningsgjøld á fiskavørum.

Útflutningsgjøld eru lett at umsita. Hvussu tey samsvara við rættvísiskravið er ójavnt. Frá búskaparligum sjónarmiði er tað at finnast at útflutningsgjøldum, at tey eins og øll onnur bruttovirðisgjøld, straffa fyritakssemi og raka framleiðslu við lutfalsliga lítlari virðisøking hart. Verður sama prosent lagt á allar fiskavørur, verður harvið eisini lagt gjald á meirvirðið, ið stavar frá tilvirking á landi. Hesum slepst tó undan við at leggja landingarvirðið til grund.

---

[1]) IMF: International Monetary Fund (Alljóðagjaldoyrirgrunnurin). Sí bókayvirlitið nr. 1. 3.

Bæði íslendsku og føroysku útflutningsgjøldini vórðu nýtt til at figgja studnings- og útjavningarskipanir fyri fiskivinnuna sjálva.

Føroyskn gjøldini vórðu avlikin í sambond við eina kreppu hjá fiskivinnuni í fyrru helvt av 60-árunum.

Út frá rættvisissjónarmiði fellur tað náttúrligt at útjavningarskipanir, bæði millum fiskimenn innan fyri eitt ár, og pris- ella konjunkturútjavningartiltøk yvir longri tíðarskeið, verða figgjað við slikum gjøldum, ið hvussu er í tíðum, tá ið vinnan verður hildin før fyri at bera tað. Konjunkturpolitisk sjónarmið tala fyri hesum sama.

2) Inntøkuskattir.

Fyrst er at viðmerkja, at føroyski inntøkuskatturin sambært galdandi lóg er uppbygdur á umleið sama látt sum í øðrum londum. Lóggávan byggir á tað høvuðssjónarmið, at skatturin skal latast eftir førinuni, og at fólk í somu umstøðum skulu lata sama skatt, og miðað verður fmóti, at skatturin skal roknast progressivt av samlaðu inntøkuni. Sum tað skilst av hesi kanning, so eru rættiliga munandi avvik frá hesum høvuðssjónarmiðum. Hetta verður lýst í tølum í skjali IV G. Haglrøðislig kanning av sjálvuppgávum fyri 1972.

Á skjaltalvu IV B eru tøl, ið visa gongdina í skattskyldugari inntøku og álíknaðum skatti 1960/61 - 1973/74. Soleiðis sum landsskattastigin 1) sær út — ovasta skattastig er 77% — sær út sum, at hann er rættiliga harður.

Hyggja vit heldur at tí sonevnda javnvágarskattinum 2) (t.e. skatturin av eini inntøku, ið ikki broytist, tá ið reglan um frádrátt av goldnum skatti sleppur at virka), so sæst, at hin sonevndi markskatturin, skatturin av seinast vunnu krónuni, í longdini ongantíð fer upp um 48 - 49%. Hetta «skattaloft» er meira at kalla lágt, sammett við grannaland okkara.

Sum ávist í kapitli III er føroyska meðalskattatrýstið lágt, samanborið við grannalondini, men inntøkuskatturin her ein størri part av hesum trýsti enn í grannalondunum. **Hetta, og so nevnda «skattaloft» er helst atvoldin til, at skattatrýstið á láginntøkum í Føroyum helst kenst rættiliga hart.**

1) Sí skjaltalvu nr. IV C.
2) Sí skjaltalvu nr. IV D.

A skjattalvu IV 5 er vist, hvussu skattainntøkur og -upphæddir eru býttar millum inntøkujaðrini.

Menn eiga tí helst at vera varðnir við at økja um inntøknskattaupphæddina við at hækka skattaprosentini. Spurningurin er so, hvørjir møguleikar, ið eru fyri at viðka um skattagrundarlagið.

Skattagrundarlagið kemur sum kunnugt fram á tann hátt, at fyrst verður uppgjørt, hvussu stór inntøkan er, síðani verða frádráttir loyvdir og so verður henda skattskyldugu inntøkan skattløgd sambært skattastigan. Kommunuskatturin verður tó útroknaður soleiðis, at skattskyldugu inntøkan verður hækkað ella lækkað, áðrenn skattaprosentið verður brúkt.

Tað, sum sermerkir føroysku **inntøkudefinitiónina**, samanborið við onnur lond, er at að í Føroyum mestsum bara eru lønarinntøkur, inntøkur av aktivari luttøku í vinnu og pensiónsinntøka o.t., ið verða roknaðar sum skattskyldug inntøka. Inntøkan av passivari kapitalogn verður mett ójavnt. Renturinntøka av lánsbrøvum (obligatiónum) er vanlig skattskyldug inntøka, renta av bankabók í Føroyum er ikki vanlig skattskyldug inntøka, men verður skattað við serliga lágum endaligum keldurskatti uppá ½% av innistandandi. Er rentan 8% verður skatturin sostatt bert $^1/_{16}$ = 6,25 av renturinntøkuni.

Hetta er ein munandi studningur til renturinntøkur, og ein studningur, ið er størri, jú størri skattskyldugu inntøkan er. Hjá persóni við einum markskatti uppá 30% er studningurin umleið 24%, men er markskatturin 48%, so er studningurin umleið 42%.

Nátúraliuinntøkan av bústaði í egnum sethúsum verður ikki tald við sum kapitalavkast.

Kapitalvinningur, t.e. vinningur av at selja ognir dýrari enn tær vórðu keyptar, ið summastaðni verður roknaður uppí skattskyldugu inntøkuna og aðrastaðni verður skattaður við serligum kapitalvinningsskatti, verður ikki roknaður sum skattskyldug inntøka í Føroyum.

Um rentuskattin kann verða lagt afturat, at renta íntil 1953 varð roknað upp í skattskyldugu inntøkuna. Tað vísti seg tó, at tann renturinntøka, ið uppgivin varð, var munandi minni enn renturútreiðslurnar hjá peningastovnunum. Gjørt var tí av at taka rentu av bankabók burtur úr vanligu skattainntøkuni og heldur leggja ein endaligan keldurskatt á hana uppá ½% av innistandandi, sum tá svaraði til umleið 14% av rentuni á banka-

bók uttan uppsogn, ið tá var vanligasti innskotshátturin. Seinri er rentan hækkað munandi, og størri partur av innskotunum eru á uppsogn. Rentuskatturin hevur tí verið eitt minkandi prosent av rentuinntøkuni, meðan skattaprosentið av vanligari inntøku er vaksin frá umleið 13% í 1953 til umleið 28% í 1971.

Mismunurin ímillum skatt av rentu og aðrari inntøku er tí vaksin munandi, og ein ajourføring ella munandi broyting tykist tí neyðug.

Roknast kann við, at skattamissurin hjá landskassa og kommununum við at skatta rentuinntøku við í meðal 9 - 10%, heldur enn við í meðal 30% sum aðrar inntøkur man liggja um einar 4 mill. kr. árliga.

Í kapitli V verður vent aftur til teir búskaparligu spurningarnar í sambandi við rentuskattin.

Síðani eru tað frádráttirnir.

Allastaðni er loyvt at draga útreiðslur frá, ið neyðugar eru fyri at vinna inntøkuna. Tær flestu av hesum útreiðslum ern vanligar rekstrarútreiðslur, ið ikki volda serligar trupulleikar.

Í sumunum førum kann tíðarfestingin av slíkum kostnaði vera nakað torfør. Her verður serliga hugsað um frádráttin fyri slit o.t. á realfæfeingi, **avskrivingarnar.**

Eftir danskari fyrimynd er nú innført 30% saldoavskriving av yrkisgøgnum, herundir eisini av skipum. Atgongd er eisini til at forskotsavskriva skip upp í 45%. Hesir avskrivingarmøguleikar eru rættiliga rúnir.

Frí atgongd er til at draga tap, volt av avskriving av skipum, frá í inntøku, ið stavar frá øðrum vinnum. Hetta kann í einum skeiði við stórum fløgum geva landskassa og kommunum stóran inntøkumiss.

Um avskrivingarreglurnar av hesi orsøk skulu broytast, er ein annar spurningur, ið má síggjast í sambandi við tann vinnustuðlingarpolitikk, ið menn annars hálda tørv vera fyri. Vent verður aftur til hetta spurning í kapitali V og skjali A til kap. V.

Ein onnur útreiðsla, ið ofta er neyðug fyri at vinna inntøku, er **renta** av lánum.

Ofta er torført at siggja á einum láni, um tað er ætlað at fíggja vinnu ella nýtslu, og tí hava mong lond, harímillum Danmark, hildið tað vera ógjørligt at skilja ímillum og hava tí givið loyvi til at draga alla rentu frá í skattskyldugu inntøkuni. Tann størsta rentutreiðslan til nýtsluendamál viðvíkir oftast egnum bústaði. Teir hava tí roynt at fingið javnvág í aftur við at rokna eina ella nøra rentu av húsavirðinum upp í inntøkuna.

Ein onnur orsøk til, at nógv lond loyva frádrátt fyri alla rentu er, at rentutreiðslur frá gamlari tíð hava verið hildnar at vera eitt tekin um fátækt. Í okkara døgnum, tá ið prísbólgunin ger, at tað loysir seg at læna, eru stórar rentutreiðslur lika so ofta dømi um, at persónur er múgvandi og hevur ráð at læna.

Í summum londum, t.d. Týsklandi, halda teir seg til at skilja ímillum vinnulán og brúkslán, og sostatt verða hvørki rentur av húsalánum ella inntøka av egnum bústaði tikin við.

Í Føroyum er øll renta loyvdur frádráttur, men ongin inntøka verður roknað av egnum húsum. **Hesin skeivleiki er til størstan fyrimun fyri tey, sum eru best fyri frammanundan og er serliga til mismun fyri tey, ið búgva til leigu.**

Orsøkin til, at hesar reglur kortini galda, er helst, at fólk flest hava egin hús. Sað frá sjónarmiði hins einstaka er henda skipan ein fyrimunur, men hyggja vit at heildini, siggja vit, at hesar reglur máa burtur av skattagrundarlagnum, við øllum teimum vansum, ið av hesum standast.

Heldur ikki kapitalmarknaðarsjónarmið tala fyri at uppihalda hesum reglum.

Viðhvørt hevur verið tosað um at royna at skapa betri **javnvág í millum húsaeigarar og leigarar** við at geva leigarunum loyvi at **draga leiguna** ella ein part av henni frá. Ein slíkur frádráttur hevði givið betri javnvág ímillum hesar báðar bólkar, men eins og allir frádráttir í skattskyldugu inntøkuni hevði hann verið til størstan fyrimun fyri háinntøkurnar (tey, ið hava høgan markskatt og ráð at gjalda stóra húsaleigu) og hevði eisini máað burtur av skattagrundarlagnum. Prísurin fyri javnvágina millum eigarar og leigarar er sostatt ein økt avlaging av skattaskipanini.

Eisini kann hugsast, at politiska ynskið er ikki at skapa javnvág imillum eigarar og leigarar, men júst at royna at stuðla fólki til at fáa sær egin hús. Undir so er, er gjørligt at finna skynsamari leiðir enn at geva skattafyrimunir, ið sum nevnt eru til størstan fyrimun fyri tey, sum eru best fyri frammanundan, og sum kunnu elva til oysl við húsarúmd og óskynsama nýtslu av teim knøppu framleiðslukreftunum innan byggiidnaðin.

Annars verður vent aftur til rentuspurningin í kapitli V.

Aðrir spurningar í samband við frádrátt fyri útreiðslur, ið eru neyðugar fyri at vinna inntøkuna viðvikja útreiðslum, har ivi er um hvar, ið markið imillum einstaklinganýtslu og kostnað gongur, eitt nú útreiðslur til ferðing, bil, telefon, representatión o.t.

Verða møguleikarnir fyri at draga slíkar útreiðslur frá alt ov rúmligar, so førir hetta ikki bert til skattamiss, men eisini til, at álitið hjá almenninginum á rættvisið í skattaskipanini minkar.

Nevndin hevur ikki kannað, hvørjir møguleikar fyri størri skattanpphædd, ið eru á hesum økinum. Hetta er mest ein spurningur um, hvussu gott eftirlit, ið skattamyndugleikarnir vilja ofra.

Tá ið nettoinntøkan, t.e. bruttoinntøkan ÷ neyðugar útreiðslur av at vinna inntøkuna, er uppgjørd, eru eisini størri og smærri **frádráttir.** Størstur er **skattafrádrátturin,** t.e. frádráttur av goldnum, forfaldnum kommunu- og landsskatti.

At allur goldin skattur kann dragast frá hevur verið sernerkt fyri Danmark og tey lond, hvørs skattalóggáva hevur havt danska fyrimynd, t.e. Ísland og Føroyar. Í Danmark var henda regla avtikin í 1967.

Í einstøkum øðrum londum, t.d. USA, hevur verið loyvt at draga goldnan kommunuskatt frá. Hetta hevur hjálpt til at útjevna munin á skattatrýstinum í ymsum kommunum.

Frádráttur fyri allan goldnan skatt hevur fyrst og fremst ta ávirkan, at skattagrundarlagið minkar, og at skattaprosentið tí — alt annað likt — má setast hægri.

Mett er, at í inntøkunum, ið vóru uppvignar í 1972 umleið 382 milj. kr., var gjørdur ein skattafrádráttur (verulígur og roknaður) uppá tilsamans umleið 130 milj. kr. svarandi til umleið 25% av bruttoinntøkuni áðrenn

skattafrádrátt, ið hevur verið umleið 512 milj. kr. Tann inntøkuskattur, sum í 1973/74 varð líknaður á 1972 inntøkuna var 154 milj. kr. svarandi til 30% av bruttoinntøkuni og 40% av nettoinntøkuni.

Skattafrádráttarreglan, har goldin skattur kann dragast frá í skattskyldugu inntøkuni, er serliga til misnum fyri fólk við ójavnari inntøku. Fólk við vaksandi inntøku fáa heldur ikki so nógv burtur úr frádráttinum.

Seinastu árini eru tí fleiri og fleiri farnir at draga **útroknaðan** skattafrádrátt í ársins inntøku. Ein slíkur roknaður skattafrádráttur sigur onki um, hvussu stórar skattaútreiðslur, skattgjaldarin hevur havt, men er eitt teoretiskt tal.

Skattafrádráttarreglan førir við sær, at tann veruligi skatturin, bæði miðalskatturin og markskatturin, í longdini verður væl lægri enn hann er sambært skattastigan. So hvørt sum markskattaprosentið nærkast 100%, nærkast javnvágarskatturin av seinastu krónuni 50%.

Um so er at ein heldur, at lóggevarar hveppa seg við at gera ein skattastiga, ið røkkur upp um tey 100 prosentini, so førir hetta við sær, at markskatturin ikki fer upp um 50%.

Reglan kann tá sigast at vera ein verja fyri teir persónar, hvørs markskattur annars hevði nátt upp um 50%.

Varð gjørd ein regla um, at seinasta krónan í mesta lagi kundi skattast við 50%, høvdu heldur ikki áður nevndu fólk havt tørv fyri skattafrádráttinum.

Tað er ein stórur spurningur, um vansarnir av, at eitt ásett skattaloft møguliga verður førkað uppeftir eru verri enn teir vansar, ið standast av at dragast við skattafrádráttarreglina.

Ein onnur fylgja av skattafrádráttinum er, sum víst er á í kapitli III, at veruligi skattastigin (t.e. javnvágarstigin) verður «bogin» á ein slíkan hátt, at ein rættiliga skjótt kemur uppá t.d. 40% av seinastu krónuni, men síðani er rættiliga drúgt upp til tey umleið 48%, sum í løtuni er hægsti javnvágarskatturin á seinastu krónuni. [1])

---

[1]) Sí skjaltalvu IV D.

Metingin av skattafrádráttarrættinum kann tí samanfatast so:

1) **Hann ger skattaskipanina ógreiða,** tí hann ger tað truplari hjá vanligum fólki at rokna út, hvørjar skattaavleiðingar, ið ein inntøkubroyting fær.

2) **Hann ger tað neyðugt at arbeiða við nógv bægri skattastiga.** Um so er, at høgur skattur á seinastu krónuni minkar um hugin hjá fólki at arbeiða og vinna meira, so førir hetta «optiska bedrag» til at skatturin styggir uppaftur meira av arbeiðskraft burtur enn neyðugt hevði verið.

3) So leingi sum tann skattastigin, ið lóggávuvaldið skal taka støðu til, ikki er tað, sum matematikararnir kalla «transformeraður» til ein javnvágarstiga, avlagar roknaði skattafrádrátturin **skattastigan** soleiðis, at progressiónin helst er størri í fyrra enda og minni í seinra enda enn ætlað.

Venda vit nú aftur til høvuðskrøvini til eina góða skattaskipan, sum greitt er frá í kapitli II, so er greitt, at høvuðstreytin fyri eini rættvisari skatting, nevniliga ein viðfevnd inntøkudefinition, ið umfatar allan vøkstur í fíggjarmegi, ikki er uppfylt við tí inntøkuskatting, ið er galdandi í Føroyum í dag.

Orsøkin til hetta kann vera tradition ella ynskið um heldur at uppfylla onnur krøv, sum t.d. lættari umsiting ella búskaparlig endamál.

Í hvønn mun tað er niðiligt at halda fram við hesum avvikum frá tí viðfevnda skattagrundarlagnum verður umrøtt seinni undir viðgerðini av teimum einstøku inntøkubólkunum.

Møguleikarnir fyri at breiðka um skattagrundarlagið við í fyrsta lagi at viðka sjálva inntøkudefinitiónina, so hon umfatar ein størri part av øllum realiseraðum vøkstri í fíggjarmegi, t.d. so at ognarinntøkur verða viðgjørdar á sama hátt sum arbeiðsinntøkur og í øðrum lagi við at seta strangari krøv til, hvørjar útreiðslur, ið kunnu geva skattafrádrátt, skuldu verið til steðar.

Ein slík breiðking av skattagrundarlagnum ger ikki bert skattleggingina rættvísari og greiðari, men gevur eisini møguleika fyri at seta skattaprosentini niður og sostatt sleppa undan nøkrum av teimum vansum, ið høg skattaprosent kunnu geva.

Her eigur at verða lagt aftrat, at ein breiðking av hugtakinum «Skattskyldug inntøka» eisini hevði hjálpt til tað í kap. II uttalaða vandamálið, at hetta hugtak sum nú er, er illa nýtiligt sum met fyri sosialum tørvi.

Skal skattainntøkuhugtakið gerast nýtiligt til hetta endamál, eigur tað í fyrsta lagi at umfata alla inntøku (t.d. eisini rentur), í øðrum lagi má krevjast at allar inntøkur, eisini náturaliuinntøkur eru mettar realistiskt, og í seinasta lagi mugu frádráttirnir geva eina sanna mynd av standinum. Hetta er ikki minst galdandi fyri avskrivingarnar, ið sambært galdandi reglur ofta eru væl størri enn veruliga virðisminkingin á framleiðslutólunum.

Verður hildið ógjørligt at reinsa skattainntøkuhugtakið, so tað lýkur hesi krøv, eru ráðini helst at gera eitt serstakt «sosialinntøkuhugtak», ið uppfyllir hesar treytir og møguliga eisini kundi fingist at upplýst nakað av tí, sum nú verður farið eftir, tá ið kommunalu líkningarvøldini hækka ella lækka landsskattainntøkuna fyri at finna fram til kommunuskattainntøkuna.

Í skjali V A er nortið við, at avskrivingarnar mest tykjast vera til figgjarligan ampa fyri kommunurnar. Hetta talar kanska fyri at lata ta «realistisku» inntøkudefinitiónina verða lagda til grund fyri bæði sosialveitingum og kommunuskatti, so at tað bert varð landsskatturin, og ikki kommunurnar og sosialu kassarnir, ið vóru raktir av skattafyrimunarveitingum løgtingsins.

Eitt objektivt inntøkuhugtak til brúk fyri bæði sosialveitingar og kommunuskattaálikning hevði eisini kunnað gjørt kommunuskattin betri enn hann er nú við hækkingum og lækkingum út frá meira subjektivum grundum.

Sum er verður inntøkuskatturin í Føroyum roknaður av inntøkuni frá árinum frammanundan. Í eini tíð við vaksandi inntøkum merkir hetta, at veruliga inntøkuskattaprosentið, t.e. skatturin í álmanakkaárinum 1972 í % av inntøkuni sama ár er minni enn tey áður nevndu skattaprosentini. **Skattur av gamlari inntøku** hevur umsitingarligar fyrimunir fram um samtíðarskatt, við tað at skattagrundarlagið er eitt kent tal, tá ið skatturin skal roknast út og krevjast upp. **Samtíðarskattur** gevur borgaranum tann fyrimun, at meginparturin av skattinum av ársins inntøku er goldin, tá ið árið er farið, og at broytingar í inntøkuni ávirka skattgjaldingina við tað sama. Í eini tíð við javnt vaksandi inntøku ger samtíðarskatturin skattagrundarlagið størri, og hetta ger tað møguligt at brúka lægri skatta-

prosent til tess at krevja eina ávísa upphædd inn. Tað, at skatturin broytist við inntøkuni, er eisini ein konjunkturpolitiskur fyrimunur.

Tað, at flestu grannalondini nýta samtiðarskatt, skapir eisini **eftirlitstrupulleikar.** Hevur maður eina óvanliga stóra inntøku í 1971, skal hann ikki skatta av henni fyrrenn í 1972/73. Hann kann tá sleppa undan hesum skatti við at flyta uttanlands (ella koma undir dansk sjómansskatt) í 1972/73, og síðan venda heimaftur.

Hetta er eitt **álvarsligt «hol» í galdandi skattaskipan,** sum til her at tippa, t.d. við at áseta eina regln um, at inntøkuskatturin leir seinastu 12 ella 15 mánaðarnar áðrenn persónur flytir av landinum (ella fer undir sjómansskatt) minst skal svara til alla tu skattskyldugu inntøkuna í hesum tíðarskeiði. Av umsitingarligum orsøkum kundi reglan verið so, at um munurin er minni enn t.d. 10.000 kr. verður ongin broyting frá núgaldandi skipan.

Halda menn hesa leið vera ov torføra, átti í minsta lagi okkurt at verið gjørt við endurvunnar avskrivingar. Hetta kann gerast við at samtykkja, at slík inntøka skal skattast við fráflyting. Ein slík regla virkar órlmilig, um maður flytir heimaftur, áðrenn freistin fyri at inntøkuføra negativa saldo er útrunnin. Bøtast kann um hetta við at loyva, at skatturin í slíkum føri kann verða afturgoldin eftir umsókn.

3) — 1) Sosialgjøld og arbeiðsgevaragjøld.

Sum tað sæst av talvu 2 í kapitli III, ið samanber skattalagið í ymsum londum, so hava Norðanlond og Bretland lagt lítlan dent á slík gjøld, meðan londini á meginlandinum hava figgjað meginpartin av sosialu trygdini við gjøldum, serliga slíkum sum **arbeiðsgevarar og løntakarar** lata hvønn sín part av.

Faknenn hava verið rættiliga ósamdir um, hvør sum í seinasta umfari ber byrðina av hesum gjøldum: virkini, løntakararnir ella forbrúkararnir. Ongin ívi er um, at løntakararnir sjálvir noyðast at bera ein stóran part av hesum gjøldum, á tann hátt at løntirnar verða tilsvarandi lægri. Hetta er serstakliga galdandi í teim vinnum, ið kappast við útlond.

Hjá teimum vinnum, ið hava ein vardan heimamarknaða ber betur til at seta prísirnar upp og soleiðis skúgva byrðina yvir á forbrúkararnar.

Fyrimunurin við hesum gjoldum er m.a., at grundarlagið er breitt og at tey eru hampuliga løtt at útrokna og gjalda. Eisini má haldast vera náttúrligt, at ávísar trygdarskipanir, sum t.d. arbeiðsloysistrygd, sjúkraløn, vanlukkutrygging, uppiskoytiseftirlønartryggingar o.t. verða goldnar á henda hátt.

Tað, at ein partur av útreiðslunum verður figgjaður á henda hátt, minkar um trýstið á høvuðssakttakeldunum og teimum bronglandi avleiðingum, ið ov stór skattaprosent á vørum ella inntøku hava.

Vansarnir eru m.a. at nakað av umsitingarútreiðslum fylgir við bæði hjá virkjum og tí almenna.

Í einum tiðarskeiði við arbeiðsloysi kann ein slíkur skattur á arbeiðsorku koma illa við. Undir øðrum umstøðum má ein skattur, ið fær arbeiðsgevararnar at spara um brúkið av arbeiðskraft tykjast rationaliseringsfremjandi og tí gagnligum í longdini.

Ein skattaumlegging á hetta borðið kemur helst bert upp á tal í sambandi við útbygging av teim sosialu skipaunum, serliga fyri løntakararnar.

Um **sjúkrakassagjaldið** er at viðmerkja, at hetta er ein skattur, ið lagdur verður á allar persónar við umleið sonnu tyngd uttan mun til inntøku teirra. Ein slíkur skattur er degressivur og sostatt í strið við kravið um eitt rættvíst skattabýti. Tí var rættari at latið hesa byrði hvílt á tí vanliga inntøkuskattinum.

5) Ognarskattir.

Hesin bólkur kann býtast í tveir høvuðsbólkar: vanligan ognarskatt (formúguskatt) og fastognarskatt, t.e. skatt á jørð og bygningum.

Øll OECD lond uttan Grikkaland nýta ognarskatt av onkrum slag.

Av teimum 23 londunum eru tó 13, ið ikki nýta vanligan ognarskatt, men bert 2, ið ikki nýta fastognarskatt (Finland og Grikkaland).

Øll Norðanlond uttan Ísland nýta tann vanliga ognarskattin.

Í summum londum hava ognarskattirnir tilsamans stóran figgjarligan týdning. Í Canada, USA, Írlandi og Bretlandi geva teir meira enn 10% av samlaðu skattingini í Danmark umleið 5%.

a. **Vanliga ognarskattin,** t.e. skattur á nettoformúgunni hjá fólki skuldi, sæð úr tekniskum sjónarmiði, borið til at brúkt í Føroyum. Tær ognaruppgerðir, ið skuldu verið grundarlagið, verða longu sum er latnar inn.

Ivasamt er tó, um tað hevði loyst seg at lagt slíkan skatt á. Tær stóru ognirnar eru so fáar, at skatturin hevði givið lítið av sær.

b. **Við fastognarskattinum** liggur annarsleiðis fyri. Brúkur við máta samsvarar hann við rættvísiskravið.

Tó kann likviditeturin gerast eitt problem, við tað at vøkstur í virði av fastogn bert kann gerast til pening við sølu ella lántøku. Hetta problem verður oftast loyst við at láta skattin standa sum lán. Burtursað frá spurninginum um eina beina virðismeting er skatturin greiður at skilja og lættur at hava eftirlit við. At byrja við slíkum skatti krevur nakað av kostnaði til metingar. Annars er hann rættiliga einfaldur at umsita.

Frá einum húskaparligum sjónarmiði hevur fastognarskatturin fleiri fyrimunir, smbr. kapitul V. M.a. er hesin skattur ikki bundin til persónligu inntøkuna og tarnar ti ikki fyritakseminum.

Fastognarskattur er best hóskandi sum lokalur skattur, í Føroyum sostatt sum kommunuskattur.

Serliga avtoftingarbygdir við littum inntøkugrundarlagi og nógvari fastogn á uttanbíggja bondum, og vakstrarpláss við stórum figgjarførvi og tí høgum persónskattatrýsti, men við skjótt vaksandi fastognarvirðum og tí breiðum grundarlagi undir fastognarskatti, kundu lætt um inntøkuskattatrýstið við fastognarskatti.

Spurningurin um eina skattaumlegging á henda bógvin velst tí lutvist um áhugi er fyri at lætta um inntøkuskattatrýstið í áðurnevndu kommunu, lutvíst um áhugi er fyri at føra ein jarðar- og býarúthyggingarpolitikk, ið miðar ímóti einari meiru rationellari nýtslu av jørðini.

6. Skattur á kapitalflutningum og tílíkum transaktiónum.

Her verður nest hugsað um skatt á arvi og gávum og stempulgjøld á skjeytum, sáttmálum o.t.

Frá einum rættvísissjónarmiðið má haldast at bæði arvur og gáva eru inntøka, sum øll onnur inntøka, og tí sjálvsagt eiga at verða tald upp í vanligu skattskyldigu inntøkurnar, tó kanska skattað við kapitalinntøkuskatti, um slíkur finst. Hetta eigur tó ikki at galda fyri arv og gávu millum fólk, ið verða samskattað sum limir í sama húsarhaldi.

Politiskar orsøkir kundu eisini funnist til at skatta serliga arv uppaftur harðari, nevniliga ynskið um størri ognar- og harvið eisini inntøkujavning.

Hesi sjónarmið verða tó sjáldan gjøgnumført konsekvent.

Í Føroyum er arvaskatturin rættiliga lágur, og til ber at sleppa sær undan honum við at geva gávur, við tað at gávur ikki verða skattaðar sum arvur.

Figgjarligi týdningurin av arvaskattinum er í dag lítil.

Stempulskattur (ið er eitt slag av umsetningsgjaldi á ognum) er ongin í Føroyum. Hann hevði neyvan verið serliga trupul at umsitið, men hevði valla givið nógv av sær.

3. Niðurstøða.

Tann gjøgnumgongd av føroyska skattalagnum, ið gjørd er frammanfyri fram til hesa niðurstøðu:

A. Sum heild:

i) Hóast grundhugsanin undir føroysku skattaskipanini samsvarar við tey krøv, sum í kapitli II vórðu setl til eina góða skattaskipan, so má ásannast, at hon ikki í sínum núverandi líki uppfyllir hesi krøv nóg væl. Serstakliga stendur á at lúka kravið til inntøkuskattingina um, at skattabyrðin eigur at vera býtt millum borgararnar eftir føimuni í samsvari við inntøkubýtið eftir tí viðgongdu inntøkudefinitiónini. Hagfrøðisligu kanningar nevndarinnar benda á, at frádráttirnir máa

so nógv burlur av skattagrundarlagnum, at skatturin hóast progressivan skattastiga er at kalla proportionalur fyri allar inntøkur uttan tær lægstu.

ii) at ikki skuldi verið torført at funnið inntøkukeldur, ið kunnu uppvega tann skattamiss, ið kann standast av teimum møguligu tilráðingum, ið gjørdar verða við hesi frágreiðing sum grundarlag.

B. **Viðvíkjandi teimum trimum spurningunum, ið hildið hevur verið neyðugt at gera vart við:** i) Húsaleigufrádráttur ii) nýtslan av skattainntøku sum grundarlag undir sosialum veitingum og iii) skatting við fráflyting er fyribilsniðurstøðan:

Viðv. i) Tað er gjørligt at fáa betri javnvág imillum eigara og leigarar við at geva leigarunum frádrátt, men tað hevði verið betri fyri skattaskipanina sum heild at farið hinvegin og heldur avmarkað frádráttin hjá húsaeigarunum.
viðv. ii) Við at breiðka skattainntøkuhugtakið og nýta studningar heldur enn skattafyrimunir, verður skattainntøkuhugtakið at geva eina sannari mynd av figgjarorku borgarans ov harvið eisini sosiala tørvi hansara. Ber hetta ikki til, er møguligt at gera eitt serligt «sosialinntøku»-hugtak. Vert hevði verið at umhugsa eisini at útrokna kommunuskattin eftir ti.
viðv. iii) Hesin skeivleiki eigur at verða rættaður sum skjótast.

C) **Aðrir spurningar, ið verdir eru at geva gætur:**

1) **Vørugjøld:** i) endurskoðan og einfalding av innflutningsgjøldum, ii) umhugsan av almennum vørugjaldi, sum t.d. meirvirðisgjaldi, iii) figgjan av konjunkturútjevningarskipanum við útflutningsgjøldum.

2) **Inntøkuskattur:** i) inntøkudefinatiónin er trong, ii) ognarinntøkur verða viðgjørdar ójavnt, iii) skattafrádráttarreglan virkar órationelt, iv) rentufrádrátturin er ikki so sjálvsagdur sum fyrr, iv) Skattastigin er helst ov brattur fyri smá- og meðalinntøkurnar, v) hækkingar- og lækkingarskipanin viðvikjandi kommunuskattinum er neyvan rationel.

3 - 4) **Sosial gjøld og arbeiðsgevaragjøld:** i) Sjúkrakassagjaldið er ein degressivur skattur, ii) Hesi gjøld kunnu avlasta høvuðsskattakeldurnar.

5) Ognarskattir: i) kunnu avlasta kommunala inntøkuskattin, ii) kunnu fremja rationella jarðarnýtslu.

6) **Transaktiónsgjøld:** i) Arvaskattur uttan gávuskatt er inkonsekventur, ii) Stempulskattur kundi verðið umhugsaður.

SKJAL IV A

YVIRLIT YVIR YMISK SLØG AV SKATTI FYRI SKATTAARINI 1969/70, 1970/71 og 1971/72

Skattur v.m. í 1969/70, 1970/71 og 1971/72, býttur eftir slag og uppkrevjandi stovni.

(milj. kr.)

	[1]) Landskassin				Kommununnar			Sosialgjold [3])			
mill. kr.	Inntokuskattur	Varugjold v.m.	Aðrar inntokur	Tilsamans	Inntokuskattur	Lísa- [2]) skattur	Tilsamans	Sjúkra- [4]) kassar	Vanfukku trygging	Tilsamans	Skattur v.m. í alt
1969/70	41,5	62.2	0,8	104,6	30,5	0,6	31,1	4,3	1,7	6,0	138,7
1970/71	43,3	74.5	1,1	118,9	34,4	0,6	35,0	3,8	1,9	5,7	159.6
1971/72	57,1	90,7	5,3	153,1	43,1	1.5	44.6	5,3	2.2	7.5	205,2

Kelda: Rigsombudsmandens beretning 1970, 1971, 1972.

[1]) Fólkapensjónsgjald er iroknað.

[2]) Bert í Tórshavn. Avtikin frá og við 1972/73.

[3]) Útreiðslutolini eru nýtt (t.e. roknað er við javnvág).

[4]) Flutningskassar iroknaðir. Almannakkaárið 1969.

SKJAL IV B

YVIRLIT YVIR SKATTSKYLDUGU INNTØKUNA FYRI ÁLMANAKKAÁRINI 1959, 1968, 1969, 1970, 1971 og 1972

(milj. kr.)

Talvan, ið vísir, hvussu stór skattskylduga inntøkan var í skattaárunum 1960/61, 1969/70, 1970/71, 1971/72, 1972/73 og 1973/74, t.e. í álmanakkaárinum 1959, 1968, 1969, 1970, 1971 og 1972, og hvussu nógv, ið varð útskrivað í skatti til landskassan og kommunurnar hesi fíggjarár.

Mill. kr.	Skattskyldug inntøka tilsamans [1]	Kommunuskattur av inntøku	Landsskattur	Fólkapensiónsgjald	Inntøkuskattur tilsamans	Inntøkuskattur í % av inntøku
1960/61	87,6	9,0	6,5	0,8	15,3	17,5
1969/70	236,9	30,5	39,0	4,3	73,8	31,2
1970/71	255,8	34,4	36,4	4,8	76,2	29,8
1971/72	299,1	43,1	52,2	5,7	101,0	33,8
1972/73	233,7	53,9	63,0	6,7	123,5	32,3
1973/74	382,1	62,4	82,8	8,4	153,6	40,2

Kelda: 1960/61 - 1972/73 Rigsombudmandens beretning 1972.

Kelda: 1973/74: Føroya Likningarráð.

[1]) Viðmerkjast skal, at her er skattur (goldin ella roknaður) frádrigin.

SKJAL IV C. 1.

LANDSSKATTASTIGIN [1])

A. Fyri støk.

Er stigainntøkan minni enn 6.000 kr. verður ongin skattur at gjalda.

Er inntøkan kr.	men minni enn kr.	verður goldið kr.	av kr.	og av hinum %
6.000	7.000	75	6.000	8
7.000	8.000	155	7.000	10
8.000	10.000	255	8.000	15
10.000	15.000	555	10.000	18
15.000	20.000	1.455	15.000	26
20.000	30.000	2.755	20.000	33,6
30.000	40.000	6.115	30.000	40
40.000	50.000	10.115	40.000	57
50.000	75.000	15.815	50.000	61
75.000	100.000	31.065	75.000	66
100.000	200.000	47.565	100.000	68
200.000	400.000	115.565	200.000	70
meira enn	400.000	255.565	400.000	73

B. Fyri uppihaldarar.

Er stigainntokan minni enn 10.000 kr., verður ongin skattur at gjalda.

Er inntokan kr.	men minni enn kr.	verður goldið kr.	av kr.	og av hinum %
10.000	15.000	100	10.000	20
15.000	20.000	1.100	15.000	26,3
20.000	30.000	2.415	20.000	37
30.000	40.000	6.115	30.000	40
40.000	50.000	10.115	40.000	57
50.000	75.000	15.815	50.000	61
75.000	100.000	31.065	75.000	66
100.000	200.000	47.565	100.000	68
200.000	400.000	115.565	200.000	70
meiru enn	400.000	255.565	400.000	73

[1]) Hetta er stigin, sum hann sá út áðrenn broytingina, ið gjørd varð í januar 1974. Umrøðan av skattastiganum í hesi frágreiðing viðger sjálvsagt tann stigan, ið galt, tá ið farið varð undir kanningina. Til samanberingar verður tann broytti stigin vístur á næstu síðu.

SKJAL IV C. 2.

Er inntokan Er indtægten kr.	men minni enn men mindre end kr.	verður goldið erlægges kr.	av af kr.	og av hinum og af resten
8.000	10.000	0	8.000	10 %
10.000	15.000	200	10.000	20 %
15.000	20.000	1.200	15.000	27 %
20.000	30.000	2.550	20.000	35 %
30.000	40.000	6.050	30.000	41 %
40.000	50.000	10.150	40.000	57 %
50.000	75.000	15.850	50.000	63 %
75.000	100.000	31.600	75.000	68 %
100.000	200.000	48.600	100.000	70 %
200.000	400.000	118.600	200.000	72 %
400.000	500.000	262.600	400.000	74 %
meira enn mere end	500.000	336.600	500.000	76 %

Er inntøkan Er indtægten kr.	men minni enn men mindre end kr.	verður goldið erlægges kr.	av af kr.	og av hinum og af resten
10.000	15.000	0	10.000	10 %
15.000	20.000	500	15.000	25 %
20.000	30.000	1.750	20.000	40 %
30.000	40.000	5.750	30.000	44 %
40.000	50.000	10.150	40.000	57 %
50.000	75.000	15.850	50.000	63 %
75.000	100.000	31.600	75.000	68 %
100.000	200.000	48.600	100.000	70 %
200.000	400.000	118.600	200.000	72 %
400.000	500.000	262.600	400.000	74 %
meira enn over	500.000	336.600	500.000	76 %

2) Hetta er stigin, sum hann varð broyttur í januar 1974.

SKJAL IV D

YVIRLIT, IÐ VISIR SAMBANDIÐ IMILLUM FYRSTAARSMARKSKATT OG JAVNVÁGARMARKSKATT (FYRI UPPHALDARAR). [1])

Tá ið inntokan fer upp um	Verður 1. árs markskatturin (landsskattur)	og javnvágar markskatturin	1. árs markskatturin til landið + 15% í kommunu og folkapensjónsgjaldi	Javnvágar-markskattur
10.000	20 %	16,7%	35 %	29,9%
15.000	26,3%	20,8%	41,6%	29,4%
20.000	37 %	27,0%	52 %	34,2%
30.000	40 %	28,6%	55 %	35,5%
40.000	57 %	36,6%	72 %	41,9%
50.000	61 %	37,9%	76 %	43,2%
75.000	66 %	39,8%	81 %	44,8%
100.000	68 %	40,5%	83 %	45,4%
200.000	70 %	41,2%	85 %	45,9%
400.000	73 %	42,2%	88 %	46,8%

[1]) Byggir á skattastigan, sum hann sá út áðrenn broylingina í januar 1974.

SKJAL IV E

YVIRLIT YVIR SKATT OG INNTØKU FYRI SKATTAARIÐ 1973/74

1. Inntøkujaðar	2. Tal á skattgjaldarum	3. Meðal inntøka	4. Samanl. inntøka	5. Skattur til samans í hvørjum inntøkujaðri	6. Skattlutfrýst í %	7. Inntøka + javnvágarskatt	8. Skattur í % av inntøku u/sktfrádr. [2]
Undir 4.000	1.695	3.000	5.085.500	406.800	8,0	5.491.800	7.407
4.000— 5.000	342	4.400	1.504.800	123.120	8,0	1.627.920	7.563
5.000— 6.000	368	5.400	1.987.200	220.800	11,1	2.208.000	10,0
6.000— 7.000	503	6.400	3.219.200	387.310	12,0	3.606.510	10,74
7.000— 10.000	2.350	8.200	19.270.000	3.372.250	17.5	22.642.250	14,89
10.000— 15.000	2.485	12.000	29.820.000	7.010.185	23,5	36.830.185	19.03
15.000— 20.000	2.026	18.000	36.468.000	11.258.482	30,87	47.726.482	23,59
20.000— 30.000	4.410	24.500	108.045.000	39.667.950	36,71	147.712.950	26,85
30.000— 40.000	2.074	34.000	70.516.000	29.610.498	42,0	100.126.498	29,57
40.000— 50.000	871	45.000	39.195.000	18.857.150	48,11	58.052.150	32,48
50.000— 75.000	592	61.000	36.112.000	20.304.416	56,22	56.416.416	35,99
75.000—100.000	135	85.000	11.475.000	7.299.450	63,61	18.774.450	38,88
100.000—200.000	76	140.000	10.640.000	7.735.660	72,7	18.375.660	42,1
200.000—300.000	12	240.000	2.880.000	2.278.620	79,11	5.158.620	44,17
yvir 300.000	6		5.853.600	5.036.438	86,04	10.890.038	46,25
			382.070.800	153.569.129	40,21	535.639.929	28,64

Kelda: Líkningarráðið.

[1]) Hetta tal er sosiatt størri enn tann uppgivna 1972-inntokan uttan skattafrádrátt (goldnan og roknaðan).

[2]) T.e. javnvágarskattafrádrátt.

Skjal IV F.

YVIRLIT YVIR SKATTATRÝST FYRI YMSAR INNTØKUBÓLKAR

Inntøka uttan skattafrádrátt	skattur tilsamans	Javnvágar-skattur i %
3.240 kr.	240 kr.	7,4
4.760 kr.	360 kr.	7,5
6.000 kr.	600 kr.	10
7.170 kr.	770 kr.	10,7
9.635 kr.	1.435 kr.	14,9
14.820 kr.	2.820 kr.	19
23.557 kr.	5.557 kr.	23,6
33.495 kr.	8.995 kr.	26,8
48.277 kr.	14.277 kr.	29,5
66.650 kr.	21.650 kr.	32,5
95.298 kr.	34.298 kr.	36
139.070 kr.	54.070 kr.	38,9
241.785 kr.	101.785 kr.	42
429.885 kr.	189.885 kr.	44,2

IV. G.

HAGFRØÐISLIG KANNING AV SJÁLVUPPGÁVUM FYRI 1972.

1. Inngangur.

Sum lið í kanningararbeiðinum hevur nevndin latið gera eina hagfrøðisliga kanning av einum úrskurði av sjálvuppgávum fyri persónar í 1972. (Ein kanning viðvíkjandi sjálvuppgávum hjá partafeløgum fyri 1972 er umrødd í skjali VII A).

2. Endamál.

Endamálið við eini slíkari hagtalslýsing er at fáa eina mynd av upphýtingini av inntøkum og frádráttum eftir slagi, so til ber at meta um hvørjar fylgjur, ið umhugsaðar ella uppskotnar broytingar fara at fáa á samlaðu skattaupphæddina hjá tí almenna og á skattaupphæddina hjá skattaborgarum í ymiskum umstøðum.

3. Kanningarháttur.

Tá farast skuldi undir innsavnan av hagtølum m.a. til stuðlau av hesum nevndararbeiði var greitt, at ein heildarkanning umfatandi allar teir uml. 17.000 persónar í Føroyum, ið vóru undir skattskyldu í 1972, ikki kundi setast í verk.

Tí var neyðugt at finna fram til eitt minni tal av skattgjaldarum úttiknar á tilíkan hátt, at teir hagfrøðisliga forsvarliga umboðaðu heildina.

Hetta var gjørt á tann hátt, at føðingardagurin hjá tí einstaka skattaborgaranum var nýttur sum útveljingar kriterium. Hetta er ein háttur, sum vanliga verður nýttur til slíkar kanningar.

Innsavnanin fór fram á tann hátt, at allir skattaborgarar føddir í september mánað blivu kannaðir. Hetta er ein stórur burðarmáni í Føroyum umfatandi uml. 10% av heildini. Í hesum sambandi er vert at nevna, at tá giftur maður stendur sum skattaborgarin í familjuni, varð farið eftir føðingardegnum hjá honum.

Bert teir skattaborgarar, sum høvdu latið sjálvuppgávu inn vóru kannaðir, t.v.s. har skattskylduga inntøkan varð ásett eftir metan líkningarvaldsins, varð viðkomandi ikki tikin við í kanningina. Hetta kemst av, at í tilíkum føri er tað ofla ógjørligt at greina út inntøku- og frádráttarsíðina til fulnar.

Rettingar eru gjørdar av líkningarvaldinum á sjálvuppgávur við ófullfíggjaðum ella skeivum upplýsingum vóru tó tiknar við.

Vert er at gera vart við, at einhvør úrdráttur av einari hagfrøðisligari heild má takast við fyrivarni, sjálvt um úrtøkuhátturin er hagfrøðisliga

forsvarligur. Tað er torført orsakað av førvandi upplýsingum at geva eina heilt greiða mynd av representivitetin í gjørdu kanning, men her skal bert setast upp ein sammeting millum funna og faktiska meðalinntøku fyri kalendarárið;

	Úrvalið	fall	Úrvalið í %
1. Tal av skattgjaldarum	1.698	17.945	9,5
2. Meðalinntøkan (skattskyldug)	35.115	382.070,8	
	1.698	17.945	
=	20.680	21.291	

Meðalinntøkan sambart kanning samsvarar sostatt heilt gott (97,1 %) faktisku meðalinntøkuni.

4. Kanningarúrslit.

Úrslitið í høvuðsdráttum er vist í talvu nr. 1 aftast í hesum skjali. Í teim teknisku viðmerkingunum til talvuna verður greitt frá, hvussu ið hon eigur at verða lisin. Her verður bert greitt frá nøkrum høvuðsúrslitum, sjálvt innsavningar- og útrokningararbeiðið hevur verið so tiðarkrevjandi, at tað ikki síðan tað varð lokið hava verið stundir til at kanna tølini út í æsir og troyta serliga nógvar av teimum fjølbroyttu møguleikum, ið tølini geva. Úrslitini vóru m.a. nýtt sum grundarlag undir metingum um skattamissirnar av teim uppskotum, ið løgtingið viðgjørdi í januar. Mælt verður til at meira nágreinilig viðgerð av tí tilfari, sum er komið burtur úr kanningini verður gjørd.

Á inntøkusíðuni er vert at geva gætur, at stívliga ¾ av samlaðu persónligu bruttoinntøkuni er lønarinntøka («egin- og barnainntøka»), at konuinntøkurnar bert vóru umleið 7%, at inntøka av egnum virki (útróður og landbúnaður íroknaðir) telur lítið meira enn fólka- og avlamispensiónsinntøkurnar. Einans í bólkinum omanfyri 100.000 kr. hava inntøkurnar av sjálvstøðugum virki munandi týdning.

At konuinntøkurnar hava støri vekt í bólkunum við høgari húskjinntøku er væl skiljandi. Sum tað sæst av leim niðastu reglunum í talvuni so eru lutvís fleiri hjún og lutfalsliga fleiri av konunum í vinnu, jú hægri húskisinntøkan er.

Viðvíkjandi inntøkubýtinum sæst, at 71 % av sjálvuppgávunum vístu eina bruttoinntøku niðanfyri 40.000 kr. og vóru hesar inntøkur 42 % av bruttoinntøkunum, men 48 % av skattskyldugu inntøkunum. Bólkurin millum 40.000 kr. og 60.000 kr. varð 17 % av borgarunum, sum høvdu 26 % bæði av bruttoinntøkunum og skattskyldugu inntøkunum. Bólkurin omanfyri 80.000 kr. umfatøði 5 % av borgarunum, sum høvdu ikki færri

enn 18 % av bruttoinntøkunum, men bert 13 % av skattskyldugu inntøkunum.

Orsøkin til, at lágintøkurnar hava ein størri part av skattskyldugu inntøkunum enn av bruttoinntøkunum, meðan luttallið er øvugt fyri háintøkurnar er at finna á **frádráttarsíðuni.**

Tey 71 prosentini av borgarum, sum høvdu eina bruttoinntøku niðanfyri 40.000 kr. høvdu 34 % av frádráttunum, meðan tey 5 % omanfyri 80.000 kr. høvdu 26 %.

Frádráttirnir vaksa sostatt progressivt við inntøkuni (sb. prosenttølini í talvu nr. 1 útfyri regluni «frádráttur tilsamans», so at stigainntøkan veksur degressivt.

Hetta ger tað neyðugt at fara eitt sindur longur og kanna hvussu, ið teir progressivt vaksandi frádráttirnir virka saman við tí progressiva skattastiganum.

Hetta er gjørt í talvu nr. 2, sum vísir, at úrslitið verður tað, ið fryktandi var fyri, nevniliga at so skjótt, ið bruttoinntøkan nær upp um 20.000 kr. miukar progressiónin nett eftir skattinum í prosentum av bruttoinntøkuni burtur í at kalla onki.

Frádráttirnir uppvega sostatt ta ætlaðu progressiónina, so heildarúrslitið verður at kalla tað sama sum ein hevði fingið burtur úr einum umleið 25 prosent proportionalskatti av bruttoinntøkuni.

Um **teir einstøku frádráttirnar** er at viðmerkja, at tann størsti av teimum, sum væntandi var er **skattafrádrátturin,** 3/5 av honum er goldin skattur og 2/5 roknaður. Vert er at geva gætur, at inntøkurnar niðan fyri 60.000 kr. meira uýta frádrátt av goldnum skatti, meðan inntøkurnar omanfyri 60.000 kr. meira nýta roknaðan frádrátt.

Næststørsti frádrátturin er **hall av fastari ogn** (húsum). Hallið veksur eitt sindur skjótari enn inntøkan, inntil nátt verður uppá 80.000 kr., síðan veksur tað eitt sindur spakuligari enn inntøkan. Frádrátturin av **avskriving** hjá partreiðarum v.fl. telur helst minni í heildini, enn menn høvdu roknað við (6,3 % av samlaðu frádráttunum), men vert er at peika á, at hesin frádráttur er ógvuliga ójavnt býttur. 5 % av borgarunum høvdu 61 % av avskrivingunum.

5. Samandráttur.

Tey kanningarúrslit, ið her eru drigin fram, og sum sjálvsagt eiga at verða lisin við tí varðsemi, ið mælt verður til í petti 3 omanfyri geva eina talmynd, ið undirbyggir tað sum sagt verður í kapitli IV um inntøkuskatt. Sum nevnt er tørvur á, at tað tilfarið, ið fingið er til vega, verður viðgjørt gjølligari eins og ynskiligt er, at hagtøl av hesum slag støðugt verða hildin á jour.

Talva 1.

Skattahagtøl fyri inntokuárið 1972.	0-10.999 i 1000	%	20.000-30.999 i 1000	%	40.000-59.999 i 1000	%	60.000-79.999 i 1000	%	80.000-99.999 i 1000	%	100.000- og meira i 1000	%	Samtals i 1000	%
1. Samlað inntoka	7.051	100,0	16.042	100,0	14.133	100,0	7.222	100,0	4.311	100,0	5.328	100,0	54.086	100,0
2. Egin- og barnainntoka	3.675	52,1	12,980	80,9	11.911	84,3	5.771	79,9	3.284	76,2	3.396	63,7	41,017	75,8
3. Konuinntoka	38	0,6	395	2,5	936	6,6	720	10,0	798	18,5	822	15,4	3.709	6,9
4. Ctr. og landbúnaður ..	268	3,8	536	3,3	143	1,0	55	0,8	2	0,1	176	3,3	1,181	2,2
5. Inntoka av egnum virki	162	2,3	1.157	7,2	776	5,5	476	6,6	176	4,0	852	16,0	3.599	6,7
6. Fólka- og avlipensión	2.834	40,2	827	5,2	236	1,7	126	1,7					4.023	7,4
7. Onnur inntoka	73	1,0	147	0,9	131	0,9	74	1,0	51	1,2	82	1,6	557	1,0
8. Goldin skattur	620	8,8	2.114	13,2	1.842	13,0	783	10,8	394	9,1	767	14,4	6.521	12,0
9. Roknaður skattur	35	0,5	495	3,1	1.193	8,4	1.010	14,0	744	17,3	935	17,5	4,411	8,2
10. Helvt av tv. uppsparing	5	0,0	36	0,2	6	0,1							47	0,1
11. Persónligar tryggingar	181	2,6	261	1,6	200	1,4	124	1,7	100	2,3	116	2,2	981	1,8
12. Konufrádráttur	13	0,2	126	0,8	169	1,2	70	1,0	56	1,3	40	0,8	473	0,9
13. Renlufrádráttur	11	0,2	79	0,5	115	0,8	39	0,5	21	0,5	29	0,5	294	0,5
14. Hall samb. roknskap ..	24	0,3	108	0,7	71	0,5	75	1,0	124	2,9	77	1,5	480	0,9
15. Hall av fastari ogn	285	4,0	592	3,7	688	4,9	411	5,7	231	5,4	242	4,5	2.449	4,5
16. Avskr. P/R og SL/F			25	0,1	153	1,1	294	4,1	217	5,0	519	9,7	1.208	2,2
17. Aðrir frádráttir	378	5,4	753	4,7	542	3,8	194	2,7	109	2,5	131	2,5	2.107	3,9
18. Frádráttir tilsamans ..	1.553	22,0	4.589	28,6	4.979	35,2	2.998	41,5	1.996	46,3	2.856	53,6	18.971	35,0
19. Skattskyldug inntøka..	5.498	78,0	11.453	71,4	9.154	64,8	4.224	58,5	2.315	53,7	2.472	46,4	35.115	65,0
20. Skattaborgarar	676	39,8	537	31,6	294	17,4	107	16,3	48	2,8	36	2,1	1.698	100,0
21. Hjún	124	18,3	305	56,8	233	79,2	93	86,9	46	95,8	35	97,2	836	49,2
22. Konur í vinnu	11	8,0	76	24,9	94	40,3	40	43,0	28	60,8	21	60,0	270	32,2

Viðmerkingar til talvu 1.

Vatnrætt býtir talvan skattaborgararnar upp í inntøkubólkar eftir bruttoinntøkuni.

Loddrætt er inntøku- og frádráttarsíðan greina sundur. Harumframt eru upplýsingar av serligum áhuga tiknir við í talvuna, t.v.s. teigirnir 20, 21 og 22, ið vísa talið á skattaborgarum, kanningin fevnir yvir, hvussu nógv av hesum vóru hjún og talið á konum við sjálvstøðugari vinnuinntøku.

Sundurbýtingin av inntøku- og frádráttarsíðuni byggir í hovuðsheitinum á la uppbygging, sjálvuppgávan 1972 hevur, men størri frávik eru tó gjørd. Í niðanfyristandandi viðmerkingum til teir einstøku teigarnar í talvuni er nummarið á avvarðandi teigi í sjálvuppgávuni sett við í klombrum.

I. Inntøkusíðan.

1. Samlað inntøka
   Inntøkur tilsamans.
2. Egin- og baruainntøka (partur av 1)
   Hjá húski við meira enn einum persóni: Lønarinntøka hjá manni og samskattaðum børnum.
3. Konuinntøka (partur av 1)
   Lønarinntøka hjá giftari konu.
4. Útr. og landbúnaður (2 og 3)
   Lønarinntøkur hjá útróðrarmonnum og landbúnaðarinntøkur.
5. Inntøka av egnum virki (4)
6. Fólka- og avl. pens. v.m. (partur av 5).
7. Onnur inntøka (partur av 5, 6, 7, 8 og 9).
   Ymsar rentuinntøkur, vinningsbýti, vinningur av fastari ogn, uppihaldspeningur v.m.

II. Frádráttarsíðan.

8. Goldin skattur (10 a).
   Skattur goldin í inntøkuárinum.
9. Roknaður skattur.
   Javuvágsskattafrádráttur (ístaðin fyri frádrátt fyri goldnan skatt).
10. Helvt av tvungnari uppsparing (10 b).
    Bert galdandi fyri ungfólk millum 16 og 21 ár.
11. Persónligar tryggingar (11 a og b).
    Allir frádráttir fyri pers. tryggingar bæði við óavmarkaðum og avmarkaðum frádráttarrætti.

12. Konufrádráttur (14)
    Frádráttur í inntøku hjá konu í sjálvstøðugum virki.
13. Rentufrádráttur (17).
    Frádráttur fyri rentur, ikki tiknar við í húsa- ella øðrum roknskapi.
14. Hall samb. roknskap (18).
15. Hall av fastari ogn (19).
    Rentútreiðstur í sambund við veðskuld í húsum, trygging og umsiting av fastari ogn.
16. Avskriving í P/R og K/F.
    Persónlig avskriving í partreiðarfum og kommanditfeløgum (einamest forskotsavskriving).
17. Aðrir frádráttir (12, 13, 15, 16, 20 og 21).
    Limagjald til vinnufelag, uppihaldspeningur, løntakarafrádráttur v.m.
18. Frádráttir tilsamans.
19. Skattskyldug inntøka.
    Samlað inntøka (1) − Frádráttir (18).

Talva 2.

Taldømi til lýsing av bruttoskattatrýstinum sum úrslit av samspælinum ímillum frádráttir og skattastiga.

Bruttoinntokujaður (1)	Meðalbruttoinntoka (2)	Meðalbruttofrádráttarprosent (3)	Meðalbruttofrádráttarupphæð (4) = (2) × (3)	Meðalskattskyldug inntoka (5) = (2) ÷ (4)	Meðalskattaprosent av skattsk. inntoku (6)	Meðalskattaupphæð (7) = (5) × (6)	Meðalbruttoskattatrýst (7) : (2)
0-19.999	13.000	22%	2.860	10.140	21%	2.129	16,4%
20-39.999	29.000	28%	8.120	20.880	33%	6.890	23,8%
40-59.999	48.000	35%	16.800	31.200	39%	12.168	25,4%
60-79.999	67.000	41%	27.470	39.530	44%	17.393	26,0%
80-99.999	86.000	46%	39.560	46.440	49%	22.756	26,5%
100-	140.000	53%	74.200	65.800	58%	38.164	27,3%

Viðmerkingar til súlurnar:

(2) Mett út frá upplýsingum í skjali IV E (súlu 1 - 3).

(3) Tikið úr skjaltalvu (reglu 18).

(6) Mett út frá skjali IV E (súlu 6) (umfatar bæði landsskatt, fólkapensjónsgjald og kommunuskatt).

V. FØROYSKI SAMFELAGSBÚSKAPURIN OG SKATTURIN

1. Inngangur.

Sum aðrastaðni umrætt, so er ynskiligt, at skattaskipanin í einum landi samsvarar við búskaparpolitisk endamál.

Her verður roynt at vísa á, hvørjar búskaparpolitiskar — og her serliga vinnupolitiskar — avleiðingar ið galdandi skattaskipan hevur, og hvussu hon kundi hugsast at fingist til at samríma betur við vanliga góðtikin búskaparlig endamál. Her verður fyrst og fremst hugsað um skatt av partafeløgum, vinningsbýti og rentu, men eisini av øðrum ognar- og vinnulívsinntøkum. Løntakaraskatt og óbeinleiðis skattir verður eisini neyðugt at tríva í.

Skal hetta verða gjørt, er fyrst neyðugt at vísa á, hvørjir búskaparligir spurningar, ið hava størstan týdning í Føroyum í dag og sum eru mest viðkomandi út frá skattleggingarsjónarmiði. Síðani verður vist á, í hvørjum førum skattaskipanin, sum er, fremur ella taruar tí ynskiligu gongdini, og at enda verður gjørd ein meting av møguleikunum fyri broytingum, ið kundu fáa skattalagið at ríma betur saman við teimum búskaparpolitisku málunum uttan at koma í stríð við grundkrøvini til skattaskipanina.

2. Búskaparligir høvuðsspurningar.

Føroyska samfelagið er lítið og landið liggur langt frá teimum búskaparligu miðdeplunum í Europa. Hetta og mangt annað ger tað torført og kostnaðarmikið at fáa tær vørur og lænastur til vega, ið tørvur er á.

Hóast búskaparliga framgongd seinru árini, so er bruttotjóðarúrtøkan (BTÚ) pr. íbúgva, ið er tað mest nýtta mátið fyri framleiðsluorku og vælstand, framvegis væl lægri enn í teimum londum, vit hava mest samband við. BTÚ pr. íbúgva í Føroyum var í 1971 kr. 18.200,00, meðan BTÚ pr. íbúgva í Danmørk var kr. 26.000,00, altso 43% størri (ella tann føroyska 30% minni).

Á skjaltalvu V.C. er BTÚ pr. íbúgva fyri Føroyar og nøkur onnur lond.

Náttúrligi fólkavøksturin uppá umleið 1,3% árliga (burðaravlopið) verður skorin niður í helvt av burturflyting, so at veruligi fólkavøksturin síðan 1970 hevur ligið niðri á 0,6%. Burturflytingin úr Føroyum ger ikki bert eina fámenta tjóð enn fámentari men hon broytir samstundis fólkasamansetingina, so at vinnuføri parturin av fólkinum minkar. Aftrat

hesum koma so ójavnarnir í fólkasamansetingini innanoyggja. Nakrir landspartar eru í ferð við at verða avfólkaðir, meðan aðrir hava stóra tilflyting.

Vinnulívið er framvegis eintáttað. Fiskivinnan umboðar ein fjórðing av vinnandi fólkinum, ein triðing av bruttofaktorinutøkuni og umleið helvtina av øllum vinnulívsíløgum. 97% av útflutninginum er fiskur og fiskavørur. Harafturat kemur, at meginparturin av tí ídnað, ið er, annaðhvørt er fiskiidnaður, ið tilvirkar rávørurnar hjá fiskivinnuni (flakavirkir, mjølvirkir) ella selur framleiðslu sína til fiskivinnuna (skipasmiðjur, tog- og snørisvirki o.t.).

Krøvini hjá fólki, bæði til privata og almenna nýtslu, eru størri enn orkan at framleiða tað, ið kravt verður. Munurin kemur partvís til sjóndar sum tilskot uttanífrá. **Tilskotið frá danska ríkinum var í 1970 uppá 88 milj. kr., svarandi til 14% av bruttotjóðarúrtøkuni (hetta prosent hevur staðið við seinastu árini).**

Hóast hetta tilskot er munurin ímillum realinutøkuna í Føroyum og í Danmark tó framvegis rættiliga stórur, og hetta saman við teimum eintáttaðu vinnumøguleikunum er helst tann **búskaparliga** høvuðsatvoldin til burturflytingina til Danmarkar og teir vausar, ið av henni standast.

3. Búskaparpolitiski høvuðsendamálini.

Teir frammnafyri nevndu trupuleikarnir eru avgerandi fyri, hvørji búskaparpolitisk endamál, ið verða sett fremst.

Mest umráðandi er at skapa ein **búskaparligan framburð**, ið kann minka um inntøkumunin millum Føroyar og grannalondini, gera tað meira liviligt at búgva í Føroyum og gera Føroyar minni bundnar av tilskotum uttanífrá.

Samstundis eigur **vinnulívið** at gerast meira **fjølbroytt**, lutvist fyri at minka um vandan av baksiátri í høvuðsvinnuni, men serliga fyri at gera landið ført fyri at bjóða fólki eitt størri úrval av størvum enn higartil.

Eitt annað krav er, at vinnulívsútbyggingin **umfatar alt landið**, so at betri javnvág millum landspartarnar fæst til vega.

Eisini má krevjast, at búskaparliga framgongdin kemur **flest møguligum føroyingum til góðar.**

Hesi mál styðja lutvist hvørt annað, men stríð teirra millum er tó ikki óhugsandi. Sum dømi kann verða nevnt, at ein kelda til búskaparligan vøkstur er, at framleiðslukreftirnar: arbeiði, realkapitalur og jørð leita úr vinnum við líflum produktiviteti til vinnu við størri produktiviteti.

Tað er neyvan nakað at ivast í, at í løtuni eru bæði føroysk arbeiðskraft og kapitalur mest produktiv í fiskivinnuni. Ynskið um skjótan vøkstur talar tí fyri at veita bæði meira av arbeiðsmegi og av kapitali til hesa vinnu. Hinvegin talar ynskið um fjølbroyttari úrval av arbeiðsplássum fyri at leiða arbeiðsmegi og kapital inn í aðrar vinnur, sum í løtuni ikki eru kappingarførar við fiskivinnuna.

Á sama hátt kann sigast, at ynskið um eina spjaðing av vinnulívinum út um landið er í stríð við ynskið um bráðan vøkstur, ið sum oftast hevur gagn av miðsavning. Aftur her má sigast, at lata vit summar landspartar, vegna vána vinnumøguleikar, hava eina stóra fólkaútflyting, er ongin trygd fyri, at henda burturflyting júst leitar til teir partarnar av Føroyum, ið hava trot á arbeiðsmegi. Hon kann eins vel leita aðrastaðni, tí eisini í útlandinum er lætt at fáa arbeiði.

At enda kann verða lagt aftrat, at eisini ynskið um at vøksturin skal vera flestum føroyingum at gagni, kann føra til, at vøksturin verður minni enn annars. Fyri tað fyrsta kann hetta krav føra til at útlendsk vinnulig tiltøk í Føroyum verða steðgað, tí at tey verða hildin at vera til mest gagn fyri útlendingar. Harnæst kann ynskið um at flest møgulig skulu sleppa upp í part at lýta, altso inntøkujavningarynskið, føra til minni uppsparing og færri íløgur.

4. Búskaparpolitisku møguleikarnir.

Tað at Føroyar hava so álvarsamar trupuleikar at berjast við, sum víst er á frammanfyri, skapir stóran tørv fyri búskaparpolitiskum tiltøkum frá tí almenna, ið miða ímóti grundleggjandi strukturbroytingum uppá longri sikt.

Eisini tað, at føroyski búskapurin er so opin, t.e. hevur so nógv samband við umheimin (Inn- og útflutningurin svarnði í 1971 til ávikavist 57% og 46% av BFI) skapar tørv fyri búskaparpolitiskum tiltøkum, ið miða ímóti konjunkturútjavning.

Tað at búskapurin er so nær tengdur at utanlandshandlinum ger búskaparpolitikkin torførari. Tað, at Føroyar eru partur av eini størri ríkiseind

førir í fleiri førum við sær, at teir stovnar, ið skulu fremja tey búskaparpolitisku tiltøkini, ikki finnast, ella eru máttleysir.

Búskaparpolitisk tiltøk, ið aðvustaðni verða metti munagóð kunnu tí vera ónýtilig í Føroyum. Hetta ger tað so mikið meira umráðandi, at teir møguleikar, ið eru, verða nýttir til fulnar og á rættan hátt.

Møguleikarnir fyri at føra almennan (generellan) figgjarpolitikk eru avmarkaðir og møguleikarnir fyri at reka generellan peningapolitikk eru at kalla ongir.

Teir møguleikar, ið finnast, eru fyrst og fremst at nýta skattleggingina og tær útreiðslurnar, ið stýrdar verða íggjøgnum løgtingsins figgjarlóg, og at lóggeva t.d. í vinnumálum.

Niðanfyri verður fyrst og fremst greitt frá møguleikunum fyri at nýta skattleggingina sum búskaparpolitiskt amboð, men tó verður eisini hildið neyðugt í støðum at peika á, hvørjir aðrir møguleikar, ið finnast og sum kanska eru betur nýtiligir enn skattatiltøk.

5. Skatturin og búskaparligi vøksturin.

a. Vøksturin og framleiðslukreftirnar.

Tað sum lil eina og hvørja tíð setur mark fyri frameiðslumøguleikunum er hvussu nógv, ið finst av framleiðslukreftum.

Hesar kreftir kunnu skipast í 3 høvuðsbólkar:

1) náttúruríkidømi.
2) arbeiðsmegi.
3) framleiðslutól (realfæ).

Ofta vísir tað seg tó, at hesar framleiðslukreftir ikki verða nýttar til fulnar:

Viðvíkjandi **náttúruríkidømunum** kann hugsast, at fiskigrunnar verða ikki royndir, fiskasløg verða ikki nýtt, jørð liggur í órøkt ella verður nýtt óhent.

Viðvíkjandi **arbeiðsmegi** kann hugsast, at arbeiðsloysi er. Tað kann vera

árstíðararbeiðsloysi á summri ella vetri, konjunkturarbeiðsloysi í vánaligum tíðum ella strukturorbeiðsloysi í ávísum bygdum, fyri ávísar aldursbólkar (t.d. eldri), fyri kvinnur, fyri fólk við realprógvi, fyri tey, ið ikki tola stræviðarbeiði o.s.fr. Eisini kann hugsast, at arbeiðsmøguleikar eru, men at fólk ikki hava hug at arbeiða so nógv sum tey annars kunnu.

Viðvíkjandi **framleiðslutólum** kann eisini hugsast, at virkir liggja ónýtt eina tíð av árinum ella at skip verða lagd vegna manningartrot, fiskaloysi o.s.fr.

Vilja vit hava búskaparligan framburð ræður ti um

1) at nýta framleiðslukreftirnar betur,
2) at økja um framleiðslukreftirnar við at gera tær fleiri og betri.

Spurningurin er síðan, hvussu ið skattapolitikkurin kann hugsast at fremja eina slíka gongd.

b. Skatturin og nýtslan av framleiðslukreftunum.

Her verður hugsað um, hvussu skattingin kann ávirka atburðin hjá einstaklingum og vickjum soleiðis, at meira verður fingið burtur úr teimum framleiðslukreftum, ið finnast.

Til hetta kann fyrst verða viðmerkt, sum ein alment galdandi regla, at skattur á inntøku minkar um úrtøkuna av øktum virksemi, og tí hevur lyndi til at minka um virksemið. Vørugjøld minka keypiorkuna av úrtøkuni og sostatt um veruligu úrtøkuna. Tey skuldu tí av røttum verið eins darvandi og inntøkuskatturin, men við tað at tey virka minni beinleiðis verður hildið, at tey virka veikari.

Eisini kann hugsast, at tey við at gera tað dýrari at liva noyða fólk at vinna meir fyri ikki at minka um livifótin. Hetta sjónarmið kann tó eisini við vissum rætti verða brúkt uppá inntøkuskattin, og tí eigur ein ikki at yvirmeta tað virksemisdarvandi ávirkanina hjá skattinum.

Hesi sjónarmið tala fyri at gera skattin óheftan av inntøkuni (og nýtsluni), men hetta er torført at sameina við rættvísiskravið. Kundu vit hugsað okkum, at møguleiki varð fyri at meta neyvt um **inntøkumøguleikarnar** hjá persónum, heldur enn veruligu inntøku teirra; so kundi ein hugsað sær ein skatt, ið varð álagdur eftir hesum møguleikum og ikki eftir tí veruligu inntøkuni. Slíkur skattur hevði sum tað sæst ikki tarnað virkishug-

inum og verið rættvísur samstandis. Ongin hevur higartil tornð í holt við at seta eina slíka persónskattaskipan í verk.

Galdandi føroyski skattastigin er, sum nevnt í kapitli IV rættiliga brattur. Skattafrádráttarreglan ger tó at javnvágarmarkskatturin ongantíð nær upp á 50%.

Sum nevnt so er tað markskatturin, sum er avgerandi fyri lugin at vinna inntøku. Til ber at minka um markskattin við at viðka um skattleggingargrundarlagið, fyrst og fremst definitiónina av, hvat ið er skattskyldug inntøka, men eisini við at skerja frádráttirnar.

Hjá partafelagum kann tað, at inntøkan lutvíst verður dupultskattað, minka um lugin hjá leiðslunni til at stevna móti størst møguligum yvirskoti. Hetta er óheppið, við tað at yvirskotið er tann «succes-indikator», ið skal vísa, at virkið arbeiðir rationelt.

Tað kann tí sigast heilt alment, at **tiltøk ið við at breiðka skattagrundarlagið minka um markskattin á inntøkum, oftast fremja virksemi og búskaparligan framburð.**

Um tær einstøku framleiðslukreftirnar kann leggjast aftrat:

Viðvíkjandi 1. Náttúruríkidømi.
Her kann verða mint aftur á tað, ið varð nevnt í kapitli IV um fastognarskatt. Hesin skattur liggur á t.d. einum jarðarteigi uttan mun til, um hann verður væl, illa ella kanska slættis ikki nýttur.

Skatturin ger, at tað ikki er kostnaðarleyst at lata hann liggja ónýttan og skuldi sostatt Ingt eitt ávist trýst á eigaran til annaðhvørt sjálvur at nýta hann betur, ella lata onkran annan, ið hevur lug og hegni at nýta hann betri, fáa høvi til tess.

Tá ið talan er um náttúruríkidømi, ið er felagsogn, t.d. oljan undir ella fiskurin á landgrunninum, kann tað eisini vera bæði rættvíst og effektivitetsfremjandi at leggja avgjøld á teir, ið uppnáa tann fyrimun fram um onnur at fáa loyvi (oljuboringarkonsession, trolloyvi) til at troysta hesa felagsogn.

Viðvíkjandi 2. Arbeiðsmegi.
Tað, ið nevnt er í inngangunum um skatt og virksemi er eisini galdandi fyri arbeiðshugin hjá løntakarum. Spurninguriu, um tað er møguligt við

skattatiltøkum at frenja hugin hjá løntakarum at átaka sær yvirtíðararbeiði er vorðiu reistur fleiri staðni, t.d. hæði í Danmørk og í Føroyum. Løgtingið samtykti hin 12. november 1973 at heita á landsstýrið um at áleggja nevndini at viðgera hetta spurning. Hesin spurningur hoyrir saman við øllum persónskattinum sum heild, men verður tó viðgjørdur nærri í hesi syftu, sí skjal V.B. Arbeiðsloysinum viðvíkjandi er at nevna, at til less at basa ti er fyrst og fremst brúk fyri arbeiðsplássum, harímillum eisini arbeiðsplássum, ið eru serliga hóskandi til nakrar av teimum bólkum, ið nevndir vóru, tí at teir hevdu serliga trupult við at finna arbeiði sum nú er. Hetta verður tí fyrst og fremst ein spurningur um at økja um nøgdina og nýtsluna av framleiðslutólum.

Avgerandi fyri framleiðslustøddina er eisini dygdin á arbeiðsmegini hjá løntakarum og virkiseigarum. Hesa dygd verður fyrst og fremst nørt um við útbúgving, ið er eitt øki, har skattleggingin neyvan hevur nakran avgerandi týdning.

Viðvíkjandi 3. Framleiðslutól (realkapitalur).

Um ávirkanina hjá skattinum á hugin hjá eigarunum til at gera nýtslu av teimum framleiðslugøgnum, ið finnast, kann vísast til tað sum frammanfyri er sagt. Meira áhugavert er at kanna ávirkanina á tilgongdina av framleiðslutólum, altso fløgurnar í viðlíkahald, útbygging og endurnýggjing av realfæfeinginum.

c. Skatturin og tilgongdin av framleiðslugøgnum.

Her eigur fyrst og fremst at verða hugsað um framleiðslugøgn í orðsins viðastu merking, t.e. eisini umfatandi fløgur hins almenna hæði í tey tól, ið neyðug eru til framleiðsluna av teimum almennu tænastunum: sjúkrahús, skúlar, hókasøvn o.l. og grundiløgurnar í vegir, havnir, elverk, telefonverk, strandferðslu, ið eru ein avgerandi fyritreyt fyri, at tey almennu og privatu framleiðslutólini kunnu virka.

Avgerandi fyri, hvussu stórar ið íløgurnar verða er

1) íløguhugurin ávikavist hjá tí almenna og hjá fyritøkunum,
2) møguleikarnir, fyri at figgja hesar íløgur, t.e. tilgongdin av eginpeningi og lánifæi úr inn- og útlandinum.

1) fløgurnar.
   i) Almennu íløgurnar.
   Hvussu stórar tær almennu grund- ella framleiðshuíløgurnar skulu vera, er ein politisk avgerð. Tað er tó greitt, at henda avgerð er ávirkað av, hvørjir figgjarmøguleikar ið eru:

   a) rakstraryvirskot á figgjarætlanini,
   b) lán frá privata sektoriuum (banklán ella brævlán) og
   c) lán úr útlandinum.

   ii) Vinnulívsfløgurnar.
   fløguhugurin í vinnulívinum er fyrst og fremst treytaður av, at tað finnast møguleikar fyri íløgum, ið kunnu bera seg. Aftrat hesum er neyðugt, at figging fæst, antin við eginkapitali ella lánum, og at lánitreytirnar eru slíkar, at nakað av tí, ið íløgan kastar av sær, verður eftir til eigaran. Tað almenna kann sostatt ávirka íløgurnar hjá vinnulívinum við at ávirka

   a) íløguhugin og
   b) figgjarmøguleikarnar og treytirnar.

   Sunnmi tiltøk kunnu ávirka bæði íløguhug og figgjarmøguleikarnar samstundis. Her skal fyrst viðmerkjast, at hitt almenna kann royna at laga sínar egnu íløgur eftir tørvinum á vinnulívsíløgum. Í summum førum eru almennar íløgur og vinnuíløgur í kapping um arbeiðsmegi ella figgjarkeldur, í øðrum førum eru almennar íløgur ein treyt fyri at privatar vinnuíløgur kunnu virka. (T.d. eru havnir ein treyt fyri skipadrift og fiskavirkjum).

6. Tiltøk, ið stimbra íløguhugin hjá vinnulívinum.

At royna at ávirka **íløguhugin** hjá vinnulívinum kann t.d. verða gjort við tiltøkum, ið skulu tryggja søluna av framleiðsluni. Dømi: sáttmálar um sølu til hitt almenna, verju ímóti útfeindskari kapping, prisútjevningarskipanir fyri rávørur o.t. ella við at gera íløgukostnaðin minni (t.d. studningur til íløgur).

Skattatiltøk, ið **bert** stíla ímóti at økja um íløguhugin og **ikki** samstundis

miða imóti at rímka um figgjarmoguleikarnar íggjognum skattatútseting o.t. eru ikki nógv brúkt.

Tað, ið ofta tarnar **fløguhugianum** hjá tí einstaka er óttin fyri tí tapi (risiko), ið kann standast av eini fløgu. Skattareglur ið loyva **frádrátt av tapi**, o.l. geva loyvi til at flyla tapsavdráttin aftureftir ella frameftir til fey ár, tá ið ein innløka er, sum tapið kann verða drigið frá, minka um kostnaðin av tapinum hjá tí sum gjørdi fløguna og harvið um ræðsluna fyri tapi, og eru sostatt fløgufremjandi.

Tær galdandi føroysku reglurnar loyva flyting av tapi 2 ár frameftir, men ikki aftureftir. Í summum londum er t.d. loyvt at flyta eitt tap frameftir í upp til 20 ár og aftureftir í 5 ár. Tann serliga føroyska reglan um frádrátt av tapi, ið stendst av ábyrgd av lánum hjá virkjum fremur lugin at taka risiko.

Inntøkur hjá **partafeløgum** verða sum nevnt í stóran mun brúktar til sjálvfigging av fløgum, og ein partafelagsskatting við mildari skatting av burturavleggingunum og harðari skatting av vinningsbýti út um eina ávisa støddi, skuldi eisini verið fløgufremjandi.

Tiltøk, ið miða imóti at fáa fólk at seta pening í partafeløg kunnu eisini hugsast at vera fløgufremjandi. Millum slík tiltøk kunnu hugsast mild skatting av vinningsbýti (í hvussu er ikki harðari enn av øðrum kapitalinntøkum), loyvi til at draga tap frá, ið stendst av, at partabrøv við sølu ella avtøku felagsins eru fallin í virði o.s.fr.

Eitt annað tillak, ið kundi hugsast at økt um hugin hjá fólki at ogna sær partabrøv, er at loyva frádrátt fyri pening, ið verður nýttur til keyp av partabrøvum. Ein slík skipan hevur sonnu veikleikar sum tær frádráttarskipanir fyri uppsparing, ið innøddar eru í 10. petti í hesum kapitli, men afturat hesum verður tað, at uppsparingin skal setast í partabræv at skapa serligan vanda fyri óynsktum avleiðingum.

Partafeløgum viðvíkjandi er tó vert at minna á, at næstan alt vinnuligt virksemi kann skipast sum partafeløg; men **ikki** ber til at **lita** á, at **øll** partafeløg hava tann fløgulug, ið umtalaður er omanfyri.

7. Tiltøk, ið víðka um figgjarmøguleikarnar hjá tí einstøku fyritøkuni. Tiltøk, ið miða imóti at rímka um figgjarmøguleikarnar kunnu býtast í tveir høvuðsbólkar: Tiltøk, ið miða ímóti at figgja fløgurnar hjá tí einstøku fyritøkuni, og tilløk ið miða ímóti at økja um figgjarmøguleikarnar hjá vinnulivinum ella samfelagnum sum heild. Her verður fyrst trivið í

tey tiltøk, ið miða ímóti figging av íløgum í tí **einstøku fyritøkuni.** Slík tiltøk kunnu lutvíst verða av **kreditpolitiskum** slag. Í Føroyum, har møguleikar ikki eru fyri generellum kreditpolitikki, verður roynt at bøta um hetta við serstøkum «úrveljandi» («selektivum») kreditpolitiskum tiltøkum, sum t.d. almennum veðhaldum fyri lánum, almennum studningi til lækkan av rentum (t.d. keyp nationalbankans av realkredittlánshrøvum til parikurs), rentufrímu lánum ella tí sum brúkt hevur verið í fiskivinnuni í nøkur ár: studningslánum, ið eru rentufrí, avdráttarfrí og verða niðurskrivaði í ankí eftir 20 árum og tí í seinasta umfari eru næstan reinur studningur.

Skattaskipanin verður eisini nýtt, t.d. á tann hátt, at møguligt er at seta 20% av vimingunum skattafrítt í ein íløgugrunn, og bøtir hetta um møguleikarnar hjá fyritøkum til sjálvfigging. Ein slík skipan svarar til eitt rentufrítt lán frá skattamyndugleikunum.

Størri týdning hava tó skattligu **avskrivingarmøguleikarnir.** Tað, at tað finnast møguleikar fyri at avskriva kostnaðin av framleiðslutólum, so hvørt sum hesi slítast ella av øðrum grundum, t.d. tekniskum framstigum, gerast minni verd, er sum nevnt í IV kapitli ongin studningur í sjálvum sær, men bert ein fylgja av, at tær útreiðslur, ið eru neyðugar til tess at vinna inntøkuna, eru loyvdir frádráttur. Stuðulin kemur fyrst upp á tal, tá ið loyvt er at draga eina avskriving frá, ið er størri enn tað sum framleiðslutólið er fallið í virði.

Tær føroysku reglurnar geva loyvi at avskriva 30% av bókaðum virði, sbr. niðanfyristandandi taldømi:

Tólið koslar 100.000 kr. og verður t.d. keypt í oktober 1973.

Dagur	Bókað virði (í 1000 kr.)	Loyvd avskriving í árinum
1/10 - 73	100	30
1/ 1 - 74	70	21
1/ 1 - 75	49	15
1/ 1 - 76	34	10
1/ 1 - 77	24	7
1/1 - 78	17	5

Hóast tekniski framburðurin ger, at nógv framleiðslutól eldast skjótari enn tey slítast, so eru helst tey fægstu, ið falla so skjótt í virði, at virðisfallið svarar til avskrivingarnar.

Hugsa vit okkum, at framleiðslutólið í laldømunum omanfyri verður selt 2/1 1977 fyri 74.000 kr., kemur undan kavi, at henda ognin er virðin nett 50.000 kr. ov lágt og at nettoinntøkurnar í undanfarnu árunum hava verið 50.000 kr. størri enn bókað. Tær 50.000 kr. verða í tiknar við sum skattainntøka í 1977.

Av hesum sæst, at avskrivingarnar kunnu geva ein skattafyrimun, ið svarar til eitt rentufrítt lán frá tí almenna.

Fyri skip er ikki bert atgongd til at avskriva eftir omanfyrinevndu reglum, men harumframt eisini atgongd til at sáttmáluavskriva 15% árliga upp til 3 ár, frá tí at skipið er umbiðið og til tað verður latið eigaranum.

Av tí at skip hava størri líkindi til at halda virðið, enn t.d. maskinur, m.a. tí at tey eru lætt flytilig og tí kunnu avhendast lættliga, so verður møguliga rentufría láuið íggjøgnum avskrivingar enn størri til skip enn til onnur framleiðslutól. Tá ið so figgingin av skipun er sera lagalig við realkreditt-, fiskaríbanka-, studnings- og kurstapslánum, verður úrslitið, at veruliga gjaldorkukravið (likviditetskravið), ið ein skipsløga setur til teir, sum løguna gera, verður rættiliga nógv minni enn til aðrar løgur.

Lagaligar avskrivingarreglur er helst tann mest brúkti hátturin at stuðla løguvirksemið hjá vinnulívinum.

Orsøkin er m.a., at tær bæði stimbra løguhugin og sjálvfiggingarevnini hjá vinnulívinum í senn. Við tí, ið nevnt var í kapitli II um brúk av skattafyrimunum ella beinleiðis studningum í huga, kann verða nevnt, at skattufyrimunurin av skattaútseting við avskriving helst virkar meira stimbrandi fyri **løguhugin** enn ein tilsvarandi studningur, sum t.d. rentufrítt lán. Tað tykist sum menn halda tað vera meira umráðandi at sleppa undan eini skattaútreiðslu enn at fáa part í eini studningsskipan av tilsvarandi stødd.

Við at vera skattafyrimunur gevur avskriving mest til teirra, sum vinna mest. Sæð úr einum skattligum rættvisissjónarmiði er hetta óynskiligt, men frá einum reint búskaparligum sjónarmiði má tað sigast at vera ynskiligt at ein skipan er til størstan fyrimun fyri tann, ið við at vinna mest, vísir at hann er mest effektivur.

Teir vansar av prinsipiellum slag, ið avskrivingarfyrimunir føra við sær eru umrøddir í kapitli II og IV. Harumframt er eisini í hvussu er ein vansi av búskaparligum slag, nevniliga, at jú størri inntøkan hjá eini fyritøku

er, jú meira ræður um at sleppa undan skatti við avskrivingum. Tey árini ið vinnan gevur serliga nógv av sær, verða íløgurnar tí serliga stórar. Serliga innan vinnur við stórum konjunktursskiftum sum fiskivinnuni verða tær lagaligu avskrivingarnar, serliga sáttmálaavskrivingar, at skapa eitt alt ov ójavnt íløgulag. Sum áður nevnt er tað júst íløgur í skip, ið verða studlaðar mest av føroyskum avskrivingarreglum og tí «selektiva» kredittpolitikkinum.

Nakrir av teim spurningum, ið slatudast av avskrivingarreglunum eru viðgjørdir í skjali V.A.

8. Tiltøk ið miða ímóti at økja um figgjarmøguleikarnar hjá vinnulívinum ella samfelagnum sum heild.

Eydnast tað at stimbra íløgulutgin nóg væl, kemur samfelagið fyrr ella seinni í ta støðu, at figgjarmøguleikarnir seta eitt mark fyri samlaðu íløgum samfelagsins. Ein íløgufrenjandi politikkur eigur tí eisini at stimbra samlaðu tilgongdina av figgjum, annaðhvørt sum uppsparing hjá tí almenna, virkjunum ella peningastovnunum, eins og útlendsk figgjan eisini má umhugsast.

a. Uppsparing hins almenna.

Hitt almenna kann, við øktum skatti, ella við at minka um rakstrarútreiðslurnar, spara upp, og á henda hátt figgja sínar egnu íløgur og við áflánni eisini íløgurnar hjá privata sektorinum. Á henda hátt kann eitt økt skattatrýst sostatt økja um uppsparingina í samfelagnum.

Um henda leið eigur at verða fylgd, er í stórt mát ein politiskur spurningur.

b. Figgjan uttanífrá.

Slík figgjan kann annaðhvørt vera

1) passiv, t.e. sum lán, ella
2) aktiv, t.e. sum íløga í ella keyp av føroyskum fyritøkum ella við keypi av føroyskum partabrøvum.

1) Passivur kapitalinnflutningur.

Higartil hevur tað mest verið hitt almenna, sum hevur skipað fyri tilgongd av útlendskum lánifæi, fyrst og fremst til figging av almennum íløgum, men eisini í ein vissan mun til privatar íløgur (Realkreditstovnurin, Fiskaríbankin, «Fígnsudviklingslán», Idnaðargrunnurin, «Norsk» figging av fiskiskipum o.s.fr.).

Lagaligi rentuskatturin tykist ikki at hava drigið útlendskt fæ til føroyskar peningastovnar, ei heldur hevur útlendski áhugin fyri føroyskum lánsbrøvum verið stórur. Ein føroyskur kupongskattur á reint føroyskum lánsbrøvum fær tí neyvan heldur nakra ávirkan í so máta. Roknast má við, at almenn føroysk brævalán á alheimsmarknaðinum ikki skulu bera kupongskatt.

2) Aktivur kapitalinnflutningur.

Ikki er heilt greitt, hvussu støðan hjá føroysku myndugleikunum er mótvegis beinleiðis útlendskum íløgum.

Øðrumegin standa **fyrimunirnir** av tí vitan og kunnleika, ið ofta fylgja við útlendskum nýíløgum, hinumegin **vandin** fyri tí valdi, ið stórar og kapitalsterkar útlendskar fyritøkur kunnu fáa í einum so lítlum samfelagi sum tí føroyska. Útlendsk keyp av føroyskum fyritøkum geva helst færri fyrimunir enn nýíløgur, men sonnu vansarnar, og mugu tí haldast at vera lítið ynskilig.

Hetta talar fyri so vítt gjørligt at gera skattingina av føroyskum fyritøkum neutrala viðvikjandi ávikavist føroyskari ella útlendskari ogn, og í hvussu er at ansa eftir, at skatturin **ikki** fremur hugin at selja virkir, ið ganga væl, til útlendingar.

Royndir, t.d. hjá íslendingum, vísa, at er serligt ynski um at fáa útlendskar fyritøkur at seta virkir á stovn, krevja tey ofta serligar skattafyrimunir. Einstøk lond bjóða frammanundan fyritøkum generellan skattalætta. Til dømis bjóðar Irland útlendskum fyritøkum upp til 20 árs skattafrælsi á útflutningsinntøkum, um tær seta virkir á stovn í ávísum landspørtum.

Slíkur mismunur á inn- og útlendingum er eitt rættiliga álvarsligt avvik frá vanliga rættvísiskravinum.

Summi smálond hava lagt seg eftir at vinna inntøkur við at skatta t.d. partafeløg ógvuliga lagaligu og draga á tann hátt útlendsk feløg til sín og fáa ley at leggja stóran part av inntøku teirra har. Um henda leið eignir at verða gingin er ein politiskur spurningur, og verður ikki komið nærri inn á hann í hesi frágreiðing.

c. Uppsparingin hjá privatum fyritøkum og húsarhaldum.

Hitt almenna kann á ymsan hátt royna at leggja viðurskiftini so til rættis, at privati sektorurin fær hug og vilja til at spara meira upp. Henda uppsparing kann koma til sjóndar sum sjálvfíggjan av virkjum og t.d. sethúsum, ella hon kann verða sett á bankabók ella í virðisbrøv, sum láns- ella partabrøv. Eisini kann uppsparingin koma til sjóndar sum minkað skuld, v.ø.o. verða nýtt til avdrátt. Tey tiltøk, ið hitt almenna kann seta í verk til at stimbra sparingina hjá ávikavist fyritøkum og húsarhaldum verða viðgjørd í teim næstfylgjandi pettunum.

9. Tiltøk, ið miða ímóti at fremja uppsparing hjá privatum fyritøkum.

Tað sum ger av, um einstaklingar ella feløg, ið eiga virkir, spara upp av virkisinntøkuni, er sjálvsagt fyrst og fremst støddin á avlopinum. Fyri feløgini er tó eisini avgerandi, hvussu stóran part av avlopinum partaeigararnir vilja hava út sum vinningsbýti. Vanliga hugsanin er, at tað er avlopið hjá virkjunum, ið ger av, hvussu nógv, ið tey spara upp, og teir sjálvfíggjarmøguleikar, ið hervið skapast, gera sunnan við lánimøguleikunum av, hvussu stórar íløgur, ið tey halda seg tora í holt við.

Ávirkanin hinvegin: at góðir íløgumøguleikar og vantandi ella dýr lán skapa størri uppsparing í feløgunum er nógv veikari.

Um tað almenna við kreditskantan og høgari rentu royndir at skerja lánimøguleikarnar hjá fyritøkum er tí ikki vist, at tað førir til stórvegis vøkstur í uppsparingini hjá fyritøkunum, men trúligari er, at tað so verða nýiløgurnar, ið minka.

Tað er tí forført at hugsa sær **kredittpolitisk** tiltøk, ið fremja uppsparingina hjá fyritøkum **uttan** at farna íløgunum. Frægast kann hetta helst verða gjørt við at herða avdráttartreytirnar á almennum lánum til virkini, ella við hækkandi rentu á teim lánum, ið nú lítla og onga rentu bera, so at rentan eftir eitt ávíst áramál fór upp á ella upp um marknaðarrentuna og harvið gav monnum hug at gjalda lánini aftur áðrenn tiðina, um váð vóru til tess.

Konjunkturbundnar rentur og avdráltir hevdu kunnað gjort, at luttfalsliga nógv varð avdrigið, tá ið ráðini vóru til tað.

Tað sum mesta áhugan hevur er tó, **hvørjir skattamøguleikar, ið eru fyri at fremja uppsparingina hjá fyritøkunum.**

Avskrivingarreglurnar, ið gera møguleika fyri fjaldari uppsparing og **íløgugrunnarnir,** ið geva møguleika fyri opinberari uppsparing eru nevnd áður. Somuleiðis møguleikarnir fyri **lágari skatting** av **tí fyritøkuiuntøku,** ið uppspard verður, t.d. í partafeløgum.

Fyritøkur hava vanliga litlan hug at seta uppsparing sína í annað enn egin virkisgøgn.

Skattafyrimunir til **pensións- og aðrar trygdarskipanir,** ið virkini gera fyri meðarbeiðarar kann fáa tey at seta pening í uppsparingarskipanir og harvið í tryggingar- og peningastovnar. **Konjunkturútjavningargrunnar** fyri tær mest viðbreknu vinnurnar, autin við almennari luttøku ella við skattafrádráttarmøguleikum, hevdu eisini framt eina peningauppsparing hjá fyritøkunum í góðum tíðum, men sjálvsagt eina tilsvarandi negativa sparing í vána tíðum.

Lagt eigur at verða aftrat, at ein týðandi táttur í avgerðini hjá virkjunum um, hvussu stórar íløgur tey skulu gera, og hvussu tær skulu figgjast við ávikavist lánum og eginpeningi, altso uppsparing, er prísvøksturin inflatiónin.

Ein **prísbólgnan,** sum tann, ið verið hevur seinru árini, fremur hugin til íløgur og ger fánifigging ynskiliga, tí at prísvøksturin fær tey keyptu **tólini** at vaksa í peningavirði og skuldina at minka í veruligum virði (keypiorku). Nakað av hesum skeivleika verður rættað við at rentan hækkar, soleiðis at hon gevur útlánaranum nakað av eudurgjaldi fyri minkandi keypiorku á útláni hansara og minkar tilsvarandi um fyrimunin hjá skuldaranum.

Ein politikkur, ið kundi steðga prísbólgnanini, hevði tí skapt betri javnvág imillum íløgur og figgjarmøguleikar. Í Føroyum er sum áður nevnt ikki hugsingur um at gjøgnumføra slík tiltøk, og føroyski politikkurin má tí vera at royna at laga seg sum frægast eftir tí prísvøkstri, ið innfluttur verður uttanifrá.

10. Tiltøk, ið miða ímóti at fremja uppsparing hjá privatum húsarhaldum.

Avgerðandi fyri støddina á húsarhaldssparingini er inntøkan hjá húsarhaldinum. Jú størri inntøka, lutfalsvís størri kann uppsparingin vera.

Tað at stórinntøkufólk tí spara ein størri part av inntøku sínu enn smáinntøkufólk, ger at ein inntøkunútjevningarpolitikkur, t.d. við progressivum skatti og sosialum tilskotum, flytir inntøku frá teimum, ið spara til teirra, ið brúka, og minkar sostatt um samlaðu uppsparingina.

Eisini tey ymsu uppsparingarendamálini hava týðning. Spart kann verða upp til serstøk endamál: hús, bil, møblar, eina uttanlandsferð, eina útbúgving, stovnseting av egnum virki o.s.fr. Tá er talan um útseting av nýtslu (ella fløgu) fyri eitt stytri tíðarskeið. Spart kann eisini verða upp til «ringar tíðir» ella til ellisár. Tá er talan um útseting av nýtslu í rættiliga langa tíð. Nakað væl verður spart upp við at avdraga skuld, nakað verður spart upp íggjøgnum lívstryggingar- og pensiónsskipanir og so er nakað eftir av avlopssparing, ið kemur fram við, at nýtslan av eini ella aðrari orsøk ikki verður rættiliga so stór sum inntøkan. Í hesum føri kann partvís vera talan um eina vanasparing. Fólk hava kanska vant seg til bert at brúka 80 ella 90% av tí, ið tey hava at ráða yvir, ella seta kanska so smá materiel krøv til tilveruna, at meginparturin av inntøkuni verður standandi óbrúktur.

At **prísbólgnanin** ávirkar uppsparingina til nøkur av hesum endamálum er eyðsæð. Uppsparing til at keypa eitthvørt, t.d. hús, bil o.t. verður ávirkað tveir vegir. Útlitið til prísvokstur ger tað átroðkandi at keypa skjótt, og tí er neyðugt at spara tann neyðuga peningin upp sum skjótast. Prísvøksturin ger tað hinvegin lønandi at sjálvfiggja so lítið sum gjørligt og læna so nógv sum gjørligt til keypið. Henda seinna ávirkanin er oftast sterkari og ger uppsparingina hjá húsarhaldunum minni og fremur nýtsluna.

Fyri uppsparingina til ellisár hevur prísbólgnanin rættiliga stóran týðning, tí hon ger fólk hangin fyri, at peningavirðið skal minka so nógv, at keypiorkan av tí, ið tey fáa út tá, er minni enn av tí, ið tey seta inn nú, hóast rentuna.

Rentan ávirkar neyvan støddina á tí stuttfreistaðu endamálsuppsparingini stórvegis. Tann langfreistaða endamálssparingin er meira ávirkað av rentuni. Vanasparingin verður neyvan ávirka stórvegis, hvørki av prísvokstri ella rentu.

Tað sum rentan og prísbólgunnin hava týðning fyri er ikki endiliga, hvussu stór ið uppsparingin sum heild verður, men meira, hvat ið hon verður sett í. Lág renta og bráður prísvøkstur gera tað minni lønandi at seta uppsparingina í peningakrøv (fordringar), sum t.d. banka- ella sparikassabøkur og lánsbrøv, og meira lønandi at seta hana í jørð, bygningar ella framleiðslutól (antin persónliga ella við at keypa partabrøv) ella varandi brúkslutir.

Spurningurin er síðan, hvussu skatturin kann hugsast at ávirka uppsparingina og hvat, ið hon verður sett í. Her kann serliga verða hugsað um

a) inntøkuskattin yvirhøvur,
b) skattin av tí partinum av inntøkuni, ið uppspard verður,
c) skattin av inntøkuni av uppsparingini (ognarinntøkuni) og
d) skattligu avleiðingarnar av skuld.

viðv. a) Inntøkuskatturin yvirhøvur.

Sum áður nevnt gongur ein progressivur skattur mest út yvir tær inntøkur, ið mest kann verða spart av, og minkar tí um sparingina.

viðv. b) Skatturin av tí partinum av inntøkuni, ið uppspardur verður.

Sum heild kann sigast, at **vørugjøldini** raka bert tann partin av inntøkuni, ið fer til nýtslu, og eina tí uppsparingini. Sum áður umtalað, so skerja gjøldini kortini keypiorkuna hjá allari inntøkuni og gera, at fólk fáa verri ráð enn áður til at spara upp. Uppsparingin sleppur tí kortini ikki heilt óskalað undan vøruskattinum.

Í inntøkuskattleggingini er møguligt at gera **frádrátt í skattleggjandi inntøkuni fyri einstøk sløg av uppsparing**, t.d. gjøld til pensiónsskipanir og lívstryggingar. Í ymsum londun hava leir eisini roynt ymsar aðrar skipanir, t.d. soleiðis, at persónar skattafrítt kunnu seta eina upphædd inn á eina bankkonto, lata hana slanda í 5 ár og so fáa hana útaftur antin við einum ógvuliga lágum avgjaldi ella heilt skattafrítt. Serskipanir hava eisini verið gjørdar t.d. fyri hørn, fyri ungfólk, ið vilja spara upp til bústað, ella til stovnseting av virkjum o.t. Tær donsku «indexkontraktirnar» kunnu eisini verða nevndar. Til teirra gav hitt almenna ikki bert skattafrádrátt, men garanteraði eisini fyri keypiorkuni við at geva serligar prístalsviðbøtur, tá ið peningurin á ellisárum skal takast útaftur.

Um allar hesar skipanir er at siga, at tær eru við til at gera skattingina

minni rættvísa, eru oftast tungar at umsita, og trupult er at vísa á, at tær veruliga hava fört til eina nettouppsparing og ikki bert eru verðnar fíggjaðar við flyting frá øðrum slogum av uppsparing, ella enntá við lántøku.

Í Danmark hava teir roynt rættiliga nógvar slíkar skipanir, men av omanfyri nevndu grundum hava tær oftast havt stokkuta livitið.

viðv. c) Skatturin av ognarinntøkum.

Sum nevnt í kapitli IV, verða kapitalinntøkur í Føroyum skattaðar ójavnt.

Nakrar fáar, t.d. renta av lánsbrøvum og vinningsbýti av partabrøvum verða, eins og inntøkur av sjálvstøðugari vinnu, skattaðar full út. Aðrar, sum, t.d. vinningur við sølu av fastogn og virðisbrøvum verða als ikki skattaðar.

Inntøka av egnum bústaði, sum í nógvum londum er skattskyldug inntøka, er tað ikki í Føroyum.

Renta av banka- og sparikassabók fáa serviðgerð, við tað at tær verða skattaðar serliga lágt.

Inntøka av kapitalogn verður sostatt sum heild skattað ógvuliga milt, og skuldi hetta í eitt ávist mát kunna økt um uppsparingslugin, men við lí lítlu vitan, ið er tøk viðvíkjandi teimum faktorum, ið ávirka uppsparingina í Føroyum, er tað ógjørligt at siga nakað um, hvussu stór henda ávirkan er. Tað skilst tó greitt av tí, sum frammanundan er sagt, at henda skatting hert er ein av mongum faktorum, ið ávirka uppsparingina, og at hon tí neyvan hevur avgerandi týdning.

Við størri vissu má haldast, at tann **ójavna skattingin av ymsum ognarinntøkum, hevur ávirkan á hvat, ið uppsparingin verður sett í.** Hesir skattaójavnar kunnu fáa sparifeið at leita burtur frá láns og partabrøvum (og sjálvfíggjan av vinnu) og yvir á banka- og sparikassabókurnar, ella heldur í jørð, sethús og varandi brúkslutir. Ein slík gongd fær eftirspurningin, serliga eftir fastogn at vaksa uppaftur meira, sum so aftur førir til prisvøkstur á jørð, gomlum húsum og nýbyggdum húsum, sum síðan førir til uppaftur størri kapitalvinning á hesum lutum, hækkandi lønir og vinning innan byggingina o.s.fr.

Sostatt kann hugsast, at skattingin kann birta upp undir prisvøksturin

á hesum øki, Føroyski búskapurin yvirhøvur er somikið opin, at prísbroytingarnar í Føroyum yvirhøvur verða lær sonn sum í útlondum.

Tað, at hann parturin av føroyska búskapinum, ið hevur við bygging og faslogn at gera, er ein av teim fáu, ið er eitt sindur avstongdur frá umverðini, ger tað møguligt at hava størri ella minni prisvøkstur á hesum øki enn útlandið.

Menn eru ójavnir á máli um, hvussu stóran týdning ið hesin inflatiónsvandi hevur havt í Føroyum higartil. Greitt er, at so hvørt sum innflutti prísvøksturin, inntøkuvøksturin og fólkamiðsavningin vinda uppá seg, verður alsamt størri vandi fyri, at hesir vansar gerast alt sjónskarí.

Hvat ið serliga **rentuskattinum** viðvíkur er vert at minna á, at hann sb. kap. IV í sínum tíð bert varð innførdur av eftirlits og umsitingarligum grundum, og ikki var ætlaður sum nakar serligur studningur til rentuinntøkurnar.

Í orðaskiftinum rentuskattinum viðvíkjandi, sær tað tó út sum at tað eru tær búskaparligu avleiðingarnar av hesum skatti, ið størstur dentur verður lagdur á í dag.

Serliga verður dentur lagdur á hesi sjónarmið:

1) Rentuskatturin fremur uppsparing í Føroyum.
2) Realrentusjónarmiðið.
3) Rentuskatturin førir til lægri láuirentu hjá vinnulívinum.
   Hesir spurningar verða nærri viðgjordir í 11. pátti. Har verður komið til tu niðurstøðu, at tann núverandi ógvuliga lági rentuskatturin, ið sæddur frá vanligum skattleggingarsjónarmiðum er órættvísur, ikki í sínum núverandi líki tykist hava búskaparligar fyrimunir, ið ikki kunnu verða uppnáddir á annan hátt, ið stríðir minni ímóti góðum skattleggingarsiði.

viðv. iv) Skattligu avleiðingarnar av skuld.

Sum nú er, er øll renta av skuld loyvdur frádráttur í skattainntøkuni.

At renta av vinnuskuld er loyvdur frádráttur er í samsvar við aðalregluna um, at allar útreiðslur, ið neyðugar eru til tess at vinna inntøkuna, kunnu dragast frá.

At renta av privatskuld er loyvdur frádráttur kann antin standast av, at torført er at seta mark millum privatskuld og vinnuskuld, ella at hildið hevur verið, at maður við skuld hevði minni skattaføri enn hin skuldarfrii, og tí skuldi gjalda minni.

Hetta seinri nevnda sjónarmiðið var helst vael grundað í eldri tíð, tá ið lænt varð av armóð, og hevur óivað framvegis gildi fyri ávís sløg av skuld, ið mugu haldast at verða neyðug í einum ávisum skeiði í livinum, t.d. lán til keyp av bústaði ella til at fíggja eina útbúgving.

Sum áður nevnt hevur prísbólgnanin síðan seinra heimsbardaga gjørt tað lønandi at seta seg í skuld. Í dag er gongdin tí tann, at tey, sum í dag hava stóra privata skuld ikki eru neyðardýrini, men heldur tey, sum í kraft av ognum, stórari inntøku, ella enn betur, tryggari framtiðarinntøku, eru før fyri at fáa nóg stór lán.

Tann sosiala grundin til at geva skattafyrimunir til fólk við privataari skuld heldur sostatt ikki longur, sum heild, men bert í undantaksførum sum teim áðurnevndu.

Umsitingarliga grundin finst framvegis, men í fleiri londum verður skilt ímillum privatskuld og vinnuskuld, og eisini er møguligt at leita millumleiðir, ið geva lutvísan skattafyrimun, og tí ikki gera vanlukkuna so stóra, um fullur rentufrádráttur ikki fæst, og tí gera kravið til eina heilt neyva upphýting minni átroðkandi.

Grund er til at halda, at **rentufrádráttirnir** hava **óynskiligar búskaparligar avleiðingar** og at tað hevði verið **gagnligt at avmarkað teir.**

11. Búskaparligu avleiðingarnar av rentuskattinum.

Tann ójavna skatting av ognarinntøkum í Føroyum ið áður er umrødd, stendst ikki minst av tí serviðgerð, ið renta av innskoti á banka- og sparikassabók hevur havt síðan 1953. Tá ið talað verður um broytingar av skattinum á ávísum ognarinntøkum, t.d .partafelagsinntøku, kemur undan kavi, at ein samskipan av allari ognarinntøkuskatting er ynskilig. Spurningurin er tá, um tað er rentuskatturin (og onnur avvik, t.d. at sumum sløg av ognarinntøkum eru skattafrí), ið skal broytast, ella um tað eru allar hinar ognarinntøkurnar, ið eiga at fáa viðferð sum renturnar. Sum umrøtt í kapitli II og aðrastaðni er ongin ivi um, hvat ið rættast er út frá einum vanligum skattarættferðarsjónarmiði: at skatta øll sløg av inntøku

eins og undir einum. Spurningurin er síðan, um tað finnast nóg sterkar búskaparligar (ella umsitingarligar) grundir til at skatta rentur (og kanska eisini aðrar ognarinntøkur) so mildliga sum nú verður gjørt.

Búskaparligu grundirnar fyri at uppihalda núgaldandi rentuskattaskipan verða sagdar at vera hesar:

1) Rentuskatturin fremur uppsparing í Føroyum.
2) Realrentusjónarmiðið.
3) Rentuskatturin førir til lægri rentu hjá føroyska vinnulívinum.

Niðanfyri verður royndt at geva hesum sjónarmiðum eina gjølliga viðgerð.

viðv. 1) Rentuskatturin fremur uppsparing í Føroyum.

Menn bera ótta fyri, at verður rentuskatturin hækkaður, so hann samsvarar betur við skatt av aðrari inntøku, so fer hetta lutvist at føra til, at uppsparingin minkar, lutvist at eitt partur av ti, sum nú stendur inni í føroyskum peningastovnum, verður flutur av landinum og settur í peningastovnar ella lánsbrøv í Danmørk, har tað er fruplari hjá føroysku skattamyndugleikunum at hava eftirlit við, at rentuinntøkan verður skattað.

Í báðum førum verður úrstitið, at minni verður av útlánspeningi til føroyska vinnulívið.

Til hesa hugsan skulu hesar viðmerkingar verða gjørdar:

a) Ein **skattaumlegging** ið førir við sær at markskatturin á lønararbeiði og fyritaksemi verð settur niður, likaleiðis markskatturin av sparipeting, ið verður settur í føroysk partabrøv og lánsbrøv, meðan skatturin á bankabókauppsparing verð hækkaður nakað, men ikki upp á fulla hædd við vanliga inntøku, skatturin á ognarinntøku úr útlondum frumvegis verð sum á aðrari inntøku, og kapitalvinningur t.d. á fastogn verð skattaður, kann ikki sum heild sigast at verða uppsparingarfordandi. Hinvegin skuldi ein slík umlegging helst fört til eina **uppsparingarumlegging**, soleiðis at fólk fingu hug at flyta uppsparing sína frá passivari ogn, sum t.d. fastogn og bankainnskotum, og til aktiva ogn í egnari fyritøku ella í partafelagi.

b) Ein hækking av føroyska rentuskattinum t.d. til eini 30% (svarandi til meðalskattatrýstið) meðan inntokur av bankainnskotum ella lánsbrøvum í Danmark verða skattað fullt út, kann møguliga gera, at tað í ein vissan mun fer at loysa seg hjá føroyskum privatfólki at flyta pening til Danmarkar. Bankarentan í Danmørk hevur ikki í seinnu árum verið nevnivert hægri enn í Føroyum, men síðan danska rentuavtalan fór úr gildi fyrst í 1973, er innlánsrentan hjá douskum peningastovnum hækkað munandi, meðan føroyska innlánsrentan hevur staðið við. Lánshrævarentan hevur leingi verið so log, at hon kann uppvega munin millum 30% og ley 40-48%, ið svara til javnvágarskattin á føroyskum háinntøkum.

Hartil er at viðmerkja, at nakað av hesum peningi undir øllum umstøðum hevði endað í donskum lánsbrøvum við tað, at føroysku bankarnir høvdu nýtt ein part av innskotum sínum til at keypt slík lánsbrøv fyri.

Verður henda flytting ov stór, verður neyðugt at taka avleiðingarnar av, at tá ið Føroyar eru partur av danska kapitalmarknaðinum slepst ikki undan at bjóða føroyskum spararum føroysk lánsbrøv við rentu, ið er kappingarfør við dansku tánibrævsrentuna, um peningurin skal verða verandi í Føroyum.

Onkur óttast kanska fyri, at ein føroyskur kelduskattur á rentu kann fáa fólk til at seta peningin í danskar bankar ella lánsbrøv til tess at skáka sær undan hesum skatti.

Til hetta er at viðmerkja, at tað neyvan er grund til at halda, at ein stórur partur av føroyskum spararum hava lug at gera seg sekan í skattasviki.

Lánsbrøvunum viðvíkjandi er vandin neyvan stórur, tí rokna menn við, at ein kupongskattur á lánsbrævarentu verður innførdur í Danmørk.

Annars er bæði fyri lánsbrøv og bankainnskot at peika á tvir eftirlitsmøguleikar, ið finnast, t.d. í ognarupptgerðunum. Fáa menn varðhugan av, at misbrúk í størri stíl fer fram, ber til at taka upp samvinnu við danska skattaverkið um hetta.

Eitt argument ímóti einum rentuskatti, ið svarar til meðalskatt, er at hann er órættvísur við tað at hann ikki er progressivur.

Hetta er sum aðrastaðni ávíst, ein álvarsom atfinning, ið má vegast upp ímóti teimum umsitingarligu fyrimunum og ti studningi til banku- og sparikassauppsparing, ið politiskt ynski er um. Í hesum førinum er helst lættari at bera í bøtuflaka fyri órættvísina ímóti teimum, hvørs markskattur liggur omanfyri meðal enn ímóti teimum, hvørs inntøkur liggja niðanfyri meðal, t.d. fólkapensiónistum.

Til tess at geva ein lætta til hesi fólk og til at geva ein serligan studning til ta uppsparing, ið er mest ávirkað av rentuhæddini: ellisuppsparingina, er helst neyðugt at gera onkra serskipan, t.d. soleiðis at fólkapensiónistar (ella fólk oman fyri 60 ár t.d.) fáa loyvi at flytu eina nærri ásetta upphædd av sínu uppsparing yvir á eina skattafría konto, soleiðis sum í dag verður gjørt við skattafríar stovnar. Um tað verður hildið umsitingarliga gjørligt kundi hugsast, at øll fólk t.d. fingu atgongd til at hava 20 - 25.000 kr. standandi á eini skattafríari uppsagnarbók, soleiðis at tær fyrstu 1.600 - 2.000 kr. av rentuinntøkuni vóru skattafríar. Hesar upphæddir kundu síðan verið hækkaðar, tá ið fólk náddu pensiónsaldurin.

Tilsvarandi skipanir fyri virðisbrøv verða helst tuplur at umsita.

Viðv. 2) Realsjónarmiðið.

Nakrir forsprákarar fyri tí núverandi lága rentuskattinum leggja dent á tað sonevnda realrentusjónarmiðið.

Henda hugsan byggir á, at í eini tíð við prisbólgnan er meginparturin av tí rentu, ið spararin fær, bert samsýning fyri ta minkandi keypiorkuna hjá sparipeninginum. Bert tey prosentini, ið fara upp um prisvøksturin eru verulig inntøka: realrenta. Er rentan t.d. 8% og prísvøksturin 6%, so er realrentan bert 2%, og tí skuldi bert hon verið skattað. Ein 40% skattur á totalrentuni fær tøku totalrentuna at falla til 4,8%, so løkn realrentan verður 4,8% ÷ 6% = ÷ 1,2%, so spararin hevur hall. Ein 40% skattur á realrentuni skuldi bert verið 40% av 2% = 0,8%, so tøka realrentan gjørdist 1,2% — ikki serliga nógv, men tó frægari enn onki.

Sambært hesa hugsan er vanlig skatting av totalrentuni ikki bert til skaða fyri sparsemið og sostatt óøkonomiskt, men beint fram órættvís.

Til hetta er at viðmerkja, at hóast tað, at vandamikið er at fara at innføra

mun ímillum peningainntøku og realinntøku í skattainntokuhugtakið, so má viðgangast, at júst viðvíkjandi rentu er munurin ímillum hesar báðar støddir serliga týdningarmikil.

Spurningurin er tó, um tað serliga hvílir á tí almenna íggjøgnum skattalættar at bera so í hand, at spararin fær fulla samsýning fyri uppsparing sína. Meira rímuligt hevði verið at álagt lántakaranum hesa byrði, t.d. íggjøgnum eina hægri útlánsrentu, ið gav møguleika fyri eini hægri innlánsrentu.

Sum áður nevnt, er lánilnguin góður í eini tíð við prishólgnum, tí hon gevur lántakaranum fyrimun. Tað at renturnar geva rætt til skattafrádrátt ber á sama borðið. Hugsa vit okkum eina ferð enn, at skattaprosentið er 40 og prísvøksturin 6%, so sæst, at av eini útlánsrentu upp á 10% uppvegar skattafrádráttur in fey 4 prosentini og prísvøksturin hini 6, so at realrentan aftaná skatt verður 0! Hetta hendir á, at lántakarin veruliga hevur ráð at geva spararanum eina fulla samsýning fyri prísvøksturin, so betri javnvág fæst ímillum lán og sparibug í samfelagnum.

Náttúrligasti mátin at gera hetta er at hækka renturnar.

Ein slík realrentuhækking hevði gjørt Føroyar til eitt rættligt hárentuland. Hetta hevði helst gjørt, at mimi av føroyskum spariperningi hevði leitað til Danmarkar sum langfreistað lánsbrævakeyp hjá føroyskum bankunum, og at lánifæ heldur hevði leitað hígar, so at Føroyar gjørdist nettoinnflytari av privatum lánifæ og ikki nettoútflytari sum nú. Einum slíkum innflutningi av lánifæi er tó bert tørvur á, um ilguhugurin er nóg stórur.

Vansin við hárentupolitikkinum hevði verið, at ilguhugurin kanska hevði minkað. Hitt almenna hevði tí helst verið noyt at brúkt ein part av meirskattainntøkuni av rentunum til rentutilskot til tær ilgur, sum annaðhvørt eru mest ávirkaðar av rentuhæddini, t.d. í bygningar, ella av øðrum grundum verða hildnar at hava serliga stóran týdning.

Forbrúkslánuni hevdu hinvegin fingið at kent sviðan av tí meira realistisku realrentuni, og hevði hetta helst økt um nettosparingina hjá húsarhaldum.

Halda menn hárentuleiðina vera ógongda, so ber eisini tit at gera skattareglurnar so, at tann skattafyrimunur, ið ein skatting einans av realrentuni gevur spararanum heilt ella lutvíst verður goldin av lántakaranum og ikki av sakleysum skattaborgarum.

Hetta gerst við at avmarka skattafrádráttin fyri renturútreiðslur, so at hann bert svarar til realrentuna.

Prinsippið verður tá, at í taldømunum omanfyri skal sparari bert skattast við 40% av 8% — 6% = 40% av 2% = 0,8%, meðan lántakarin bert kann draga 10% — 6% = 4% frá, og hetta gevur honum tí bert ein skattalætta svarandi til 40% av 4% = 1,6%. Hugsa vit okkum, at bankin eisini letur 40% í skatt av sínum renturinningi uppá 10% — 8% = 2%, so verður hann at lata 0,8% í skatt, og vit siggja at nettoskatturin, sum væntandi var, verður 1,6% — 1,6% = 0.

Ein **rein realrentuskatting er torfør**, tí hon krevur at ein alla tíðina lagar sog eftir tí skiftandi prísvøkstrinnum.

Ein tillaging kundi tó hugsast, t.d. við einum lágum skattaprosenti á renturinntøku — í taldømunum omanfyri hevði t.d. 10% verið á leið — og eini tilsvarandi reglu á útlánssíðuni, soleiðis at renturútreiðslan ikki varð drigin frá í skattainntøkuni, men 10% vórðu frádrigin í sjálvum skattinum.

Ein slík skipan hevði verið «rættvís» samlagt realrentusjónarmiðið og hevði samstundis stuðlað peninga-uppsparing og minkað um lánilugin. Helst hevði hon eisini virkað ov darvandi á summar ílogur, ið tað almenna tí hevði verið noytt at givið rentustudning til. Eisini sosialt ynskiliga skuld, sum t.d. húsalán hjá ungum fólki, ið seta búgv, hevði helst verið neyðugt at stuðlað. Hesir stuðlar kundu hugsast at verið gjørdir á tann hátt, at nærri útgreind lán sum t.d. lán frá Realkredittstovninum, Ídnaðargrunninum og bankalán svarandi til ein ávisan part av bókførda virðinum av tí kapitali, ið varð bundin í eini fyritoku frammegis kundu dragast frá í inntøkuni hjá fyritøkuni og at lán frá sparikassa, Húsalánsgrunni o.t. í nýggjum húsum og við nærri avmarkaðari lánitíð kundu geva størri skattafrádrátt, t.d. 30 ella 40%.

Realrentusjónarmiðið er sostatt ikki uttan áhuga, men skal farast eftir tí, eigur tað at verða gjørt konsekvent.

3) Rentuskatturin førir til lægri lánirentu hjá vinnulívinum.

Ein av teimum alfinningum, ið kunnu gerast ímóti rentuskattinum í dag er júst tann munur, ið gjørdur verður á renturinntøku og renturútreiðslu. Hevur ein persónur ein markskatt uppá 40%, kann tað loysa sog at læna pening fyri 10%, sum við eini skattasparing uppá 4% verður til eina

nettorentu uppá 6%, og seta peningin inn á bók til 8%, sum við einum rentuskatti uppá ½% verður til eina tøka rentu uppá 7½%, so 1½% verður til avlops.

Minsta kravið til konsekvens í skattingini má vera, at ein hugsað disposition sum henda ikki má kunna loysa seg.

Viðhvørt verður tann hugsan borin uppá mál, at tann lági rentuskatturin ikki so nógv kemur spararunum til góður, men ger, at innlánsrentan kann haldast lægri enn t.d. í Danmørk og sostatt eisini útlánsrentan. Fyrimunurin skuldi sostatt eisini komið lántakarunum fyrst og fremst vinnulívinum til góður.

Til hetta er at siga, at tey tøl, ið finnast til og við 1972 benda á, at innlánsrentan hjá teimum føroysku peningastovnunum er nakað sum í Danmørk, útlánsrentan hjá bankunum líkaleiðis, meðan útlánsrentan hjá teim føroysku sparikassunum tykist vera eitt sindur lægri enn hjá teim donsku. Tað er sostatt ongin grund til at halda, at rentuskattafyrimunurin verður skúgvaður yvir á vinnulívið. Men, húsaeigarar fáa fyrimun av tí lágu sparikassarentuni.

Sum áður er nevnt við, er tað hent í 1973, at avtalan millum danskar peningastovnar um at halda sonn innlánsrentu, er avtikin, og rættilig kapping hevur nú tikið seg upp teirra millum um innlánsfæið. Hetta hevur fört til nummandi hækking í donsku innlánsrentuni.

Henda rentuhækking er ikki komin til sjóndar hjá føroyskum peningastovnum enn.

Spurningurin er, um ein eigur at vera so bjartskygdur at halda, at tann rentumunur, ið hevur tikið seg upp í 1973 fer at standa við, og at hetta fer at henda tí, at rentuskatturin í Føroyum er lægri enn í Danmark.

Tá ið ein hugsar um, at í tiðarskeiðinum síðan rentuskatturin kom í gildi í 1953 og inntil 1972 hevur rentumunurin verið lítil og sum frá leið minkandi, er neyvan grund til at líta á, at tann munurin, ið nú er uppkomin, fer at standa við longi.

Heldur eigur at verða roknað við, at tað, at likviditeturin í 1973 hevur verið óvanliga góður í Føroyum (og óvanliga trongur í Danmark) hevur fingið føroysku peningastovnarnar at geva sær góður stundir við at hækka rentuna, men tá ið likviditetsviðurskiftini aftur verða meira normal í báðum londum fara innskotsrenturnar aftur at nærkast.

Sum áður nevnt kemst ikki burtur frá, at tað at Føroyar eru ein partur av einum størri kapitalmarknaði, ger at føroyska rentan lættliga ella trekliga verður at laga seg eftir rentuni á «høvuðsmarknaðinum». Vilja menn

gera Føroyar til lágrentuland uttan at missa lánifæ til útlandið, so er neyðugt við kreditpolitiskum tiltøkum, ið kunnu girða føroyska kapitalmarknaðin inni. Eitt av teim tiltøkum, ið tá kundu koniið upp á tal var ein «rentuútjavningarskattur» á allari rentuinntøku úr útlandinum. USA hevur havt ein slíkan skatt (IET) í nøkur ár, men er í ferð við at avtaka hann, tí at teir ikki halda seg hava brúk fyri honum, sum konjunkturviðurskiftini eru nú.

Niðurstøðan rentuskattinum viðvíkjandi verður sostatt, at tann núverandi ógvuliga lági rentuskatturin, ið, seddur frá vanligum skattleggingarsjónarmiðum, er órættvísur, ikki í sínum núverandi líki tykist at hava búskaparligar fyrimunir, ið ikki kunnu verða uppnáddir á annan hátt, ið stríðir minni ímóti góðum skattleggingarsiði.

Ein hækkan av hesum skatti, so hann nærkaðist meðalinntøkuskattinum hevði gjørt skattingina rættvísari og samlaða skattleggingarmynstrið fyri kapitalinntøkur betri. Teir mest samlíkiligu búskaparligu og sosialu vansarnir av hesum kunnu rættast við eini rættiliga einfaldari undantaksskipan. Verður farið eftir **realrentusjónarmiðinum** ber eisini til at skapa eina skipan fyri rentuinntøkur og -útreiðslur, ið bæði kann vera rættvís og búskaparliga gagnlig, men sum helst krevur størri umsiting.

12. Skatturin og ynskið um eitt fjølbroyttari vinnulív.

a) Inngangur.

Ynskið um eitt fjølbroyttari vinnulív er sum nevnt eitt búskaparligt høvuðsendamál. Her kann verða hugsað um at gera fiskivinnuna og fiskiídnaðin meira fjølbroytt, men mest verður hugsað um ídnað, sum ikki nýtist at tilvirka fiskavørur, og um framleiðslu av tænastum, t.d. ferðamannavirksemi (turismu). Niðanfyri verður dentur lagdur á ídnaðin, men tær hugsanir, ið settar verða fram, kunnu eisini verða nýttar um aðrar vinnugreinir.

b) **Skatturin og ídnaðarútbyggingin.**

Fyri at meta um, hvussu ið skattingin kundi hugsast at virka til frama fyri ídnaðaruppbyggingina er vert fyrst og fremst at geva sær far um, hvørjir høvuðsmeinbogarnir fyri ídnaðarútbyggingini eru og síðani at meta um, hvussu skatturin kann hugsast at ávirka teir.

Mestu meinbogarnir fyri ídnaðarútbyggingini eru helst slíkir sum:

1) Lítil heimamarknaður.
2) Fjarstøðan frá teim stóru marknaðunum.
3) Lítil traditión.
4) Tørvur á lánipeningi.
5) Tørvur á eginpeningi.
6) Tørvur á kønnari leiðslu.
7) Tørvur á ídnaðarvandari arbeiðsmegi.

Við flestu av hesum meinubogum gerst valla nógv við skattinum, helst eru tað bert teir undir pkt. 4 og 5 nevndu.

Spurningurin er síðan, hvussu tí myndugleikarnir við skattinum ella á annan hátt kunnu stimbra bugin at seta íløgupening í ídnaðarfyritøkur sum ávikavist lán og eginpening.

Møguleikarnir fyri størri lánum til ídnaðarfyritøkur kunnu økjast lutvís við at økja um tilgongdina av lánifúsum kapitali sum heild, lutvís við at beina ein størri partur av hesum kapitali yvir í ídnaðin. Ein økt tilgongd av lánipeningi kann fáast annaðhvørt við at økja innlendsku uppsparingina, ta privatu og/ella ta almenna, ella við at upptaka lán í útlondum. Taka vit fyrst spurningin um økta kapitaltilgongd er fyrst at gera vart við, at tað almenna hevur fult ræði á, hvussu stór tess egna uppsparing skal vera, og harumframt hevur møguleikar fyri at skipa fyri lánuppføkum í útlondum.

Sum áður nevnt er tað helst møguligt at ávirka privatu uppsparingina ígjøgnum skattareglurnar, t.d. við at skatta háinntøkurnar lættari, ella við serligum uppsparingarfremjandi skipanum.

Síðani er spurningurin, hvussu lítt almenna kann ávirka nýtsluna av lánikapitalinum so, at ein størri partur fer til ídnaðin.

Kapitalinum, ið stavar frá almennari sparing ella lántoku skuldi onki problem verið við. Tað almenna hevur t.d. gjort bæði ídnaðargrunn og menningargrunn, «egnudviklingslán» kunnu eisini fáast, og eru menn ónøgdir við hesi tiltøk, ber til at finna uppá onnur. Til tess at beina tí privata útlánskapitalinum yvir í ídnaðin, krevjast fyrst og fremst peningapolitisk tiltøk.

Tað er torført at lugsa sær skatta- ella figgjarpolitisk amboð, ið kundu verið nýtilig til helta. Eitt bugskot kundi kanska verið at givið peningastovnunum studning til lann partin av útlánunum, ið fór til ídn-

aðarendamál og/ella lagt avgjold á tann partin av útlánunum, ið fór til onnur endamál, kanska bert á ein part av hesum, til dømis á tað, ið varð sett í útlendsk virðisbrøv og bankar.

Eisini her til at siga, at egimpeningurin, ið hevur hug at leita til ídnaðin, kann økjast tveir vegir, við at samlaða nøgdin av risikofúsum peningi veksur og við at ein størri partur av honum heldur velur at leita til ídnaðin enn til aðrar vinnur. Eisini her eru 3 høvuðskeldur møguligar.

i) hitt almenna sjálvt,
ii) útlandið,
iii) innlendski privati sektorurin.

Viðv. i) **Hitt almenna** hevur sett pening í fyritøkur í ein vissan mun. Kommunurnar hava verið rættiliga fyritaksamar á hesum øki, meðan landið hevur verið afturhaldandi og bert gjørt helta undantaksvís í serligum førum. Í hvussu stóran mun helta eigur at verða gjørt má vera ein politisk avgerð, ið má vera úrslit av eini avvegan millum tørvin fyri ídnaðarvirkjum øðrumegin og ideologiska mótstøða ímóti almennum ognarrætti til framleiðslutól hinumegin.

Nevnast kann tó, at í so ymiskt politiskt liðlum londum sum Svøriki, Italia og Spania er landsogn av virkjum sett í system á tann hátt, at hitt almenna hevur skotið pening inn í ognarfelog, ið verða stýrd av sakkønum eftir forrætningsligum prinsippum og hava til uppgávu, einsamøll ella saman við privatum, at seta egimpening í øyggj virkir og at reka tey. Á henda hátt verður roynt at varðveita leir møguleikar fyri økonomiskt rationellari drift, ið annars lætliga hvorva, um leiðslan verður stýrd av politiskum áhugamálum.

Viðv. ii) Um áhugi er fyri **útlendskum beinleiðis íløgum,** má sum áður nevnt sigast at vera ein spurningur um at avvega tørvin á virkjum upp ímóti politiskum ynskjum um at varðveita og úthyggja landsins búskapurligu sjálvstøðu. Í ávisnum førum má viðgangast, at virkir neyvan kunnu koma í gongd uttan brúk av útlendskari vitan («knowhow»), ið oftast bert kann fáast saman við útlendskum eginpeningi. 50-50% (ella 45-45-10%) luttøka er viðhvørt ein loysn í slíkum førum.

Viðv. iii) Eftir er so, hvussu ið til ber at brúka skattalóggávunna at økja um hugin og evnini hjá **privatum** at seta pening í virkir og at fáa ein størri part av hesum peningi settan í ídnaðarfyritøkur.

Áður er umtalað, hvørji tiltøk, ið kunnu hugsast at økja sparsemið sum heild. Veksur sparsemið, vaksa ið hvussu er evnini til at liggja innskot av eginpeningi í nýggj virkir ella øking av eginpeningi í verandi virkjum (konsolidering). Spurningurin er síðan hvussu ið ein tryggjar sær, at ein øking í uppsparingini ella ein størri partur av tí uppsparing, ið er, júst fæst at leita inn í vinnulívið sum risikofúsur eginpeningur, og til seinast at ein størri partur av hesum ikki fer til traditionellar vinnur, men til nýggjar vinnur sum ídnaðin.

Kapitalinntøka, ið stavar frá aktivari luttøku í vinnulívinum verður sum nú er skattað harðari enn passiv kapitalinntøka. Hetta ber til at broyta.

Frammanfyri er vist á, at tiltøk, ið fremja skuld uppsparing og hugin at seta pening í vinnulívið sum heild, onga trygd geva fyri, at tað júst verður ídnaðurin, ið fær peningin. **Hesi tiltøk eru tí ikki serliga beinrakin amboð í ídnaðarpolitikkinum,** og ansast má eftir, at tær óynsktu avleiðingarnar av slíkum almennt virkandi tiltøkum ikki verða ov stórar, samanborið við teir ídnaðarpolitisku fyrimunir, ið royndt verður at fáa fram ,og sum helst kundu verið náddir á annan, meira beinleiðis hátt.

Um lanu íløgufúsi peningurin leitar til ídnaðin ella í aðrar vinnur velst um, hvar ið hann roknar við at fáa mest burturúr.

Nógvir meinbogar eru hjá foroyskum ídnaði, og tí er sjáldan, at menn kunnu rokna við at fán meira burtur úr ídnaði enn øðrum vinnum.

Hetta kunnu myndugleikarnir ávirka fyrst og fremst við láni- og studningspolitikkinum, men kanska eisini fyri ein part av skattapolitikkinum.

Hetta kann m.a. gerast við at geva ídnaðinum rúmar avskrivingarreglur, m.a. fyri bygningar, sølufremjandi útreiðslur, rannsóknarútreiðslur, útreiðslur til útbúgving av fólki o.s.fr., men kann enn lættari gerast við at minka um avskrivingarmøguleikarnar hjá øðrum vinnum, t.d. fiskivinnuni. Sum nú er, eru fyrimunirnir hjá fiskivinnuni so stórir sammettir við ídnaðin, at sjálvt vinningur, ið stavar frá ídnaði, verður freistaður at leita inn í fiskivinnuna, heldur enn at verða nýttur til útbygging av ídnaðarvirkjum.

Sum áður nevnt ber til at brúka almennar skattareglur til at stuðla monnum til at spara upp, seta peningin í virkir og eisini í parlafelog, men aðrir faktorar vera at avgera, hvussu nógv av hesum, ið verður ídnaðinum at

gagni, og tí er neyðugt aftrat slíkum skattareglum at hava onnur tiltok, ið miða ímóti at tað verður innan ídnaðin, at virksemið veksur.

13. Skatturin og ynskið um landsumfatandi framburð.

Í summum londum verða skattareglur eisini brúktar til at ávirka fyritøkurnar til at seta virkir á stovn í serstøkum landspørtum, t.d. við serligum avskrivingarreglum í slíkum førum.

Slíkar reglur samsvara ikki við góðan skattleggingarsið, og í Foroyum má haldast, at møguleikarnir hjá myndugleikum til at ávirka hetta valið á annan hátt eru so góðar, at skattareglur við hesum endamáli skuldu verið óneyðugar.

14. Skatturin og ynskið um at framburðurin verður flestum føroyingum at gagni.

Her verður hugsað um ta ávirkan, ið skattleggingin kann hava á, hvor tað er, ið fær mesta ágóðan av ti framburði, ið við almennum stuðli verður roynt at skapa, um tað verða fá ella fleiri í foroyska samfelagnum ella um tað verða borgarar uttanfyri Foroyar.

a) Býtið innanlanda

Stundum verður peikað á, at vinnufremjandi skattatiltok sum t.d. rúmar avskrivingarreglur eru til mestan fyrimun fyri tey fáu, og er ein almennur stuðul til uppbygging av privatum formúgum, sum láginntøkufólkið figgjar, og sum gevarin: hitt almenna, onki tamarhald hevur á, tá ið nøkur ár eru umliðin, og privati formúgueigarin er vorðin nóg vælstandandi til at hann ikki hevur brúk fyri tí almenna meir.

Frá hesum sjónarmiði eru slíkir skattafyrimunir av tí illa, tí at teir ikki koma fjøldini til góðar.

Hetta sjónarmið kann hava ávirkan á, um tað verða skattafyrimunir og treytaleysir studningar oðrumegin ella lán og treytaðir studningar himmegin, ið verða nýttir til at stuðla privata vinnulívið við, ella um hitt almenna sjálvt skal standa sum eigari.

Hesir spurningar eru av so stórum politiskum týdningi, at hugsast

kann, at striðið imillum ynskið um framburð uðrumegin og rettvíst býti hinumegin kann gera það politiskt torfort at stuðla framburðinum nóg dyggiliga.

Tí er vert at umhugsa reglur, ið kunnu samcina hesi ynski.

Her kann m.a. verðið hugsað um reglur, ið miða ímóti at frenja hugin hjá fólki yvirhovur at eiga partabrev og harvið ogmarrætt til framleiðshutólini, og um serskipanir fyri yvirskot, ið verður býtt út sum meðarbeiðarapartabrev o.l.

Eisini kann sigast, at skipanir, ið miða ímóti at hjálpa smáum nýstovnaðum fyritøkum, eru meira «demokratisk» enn tiltøk, ið miða ímóti at gera stórar fyritøkur enn størri. Til hetta skal tó viðmerkjast, at ein vinnulig útbygging í Føroyum eisini fer at krevja nakrar kapitalkonsentratiónir, ið eru stórar eftir føroyskum metti, og at það er eitt politiskt mál um tær skulu vera føroyskar ella útlendskar, almennar ella privatar, á fáum ella nógvum hondum.

b) Innlendskar ella útlendskar fyritøkur.

Sjálvur spurningurin, um ráðiligt er at geva útlendingum hovi til at geva íløgur í Føroyum er umrøddur áður.

Verða generellir ella serstakir skattafyrimmir nýttir, má stoða takast til, um teir eru ætlaðir føroyingum burturav, ella um útlendingar eisini eiga at sleppa upp í part.

Altjóðareglur ella avtalur, t.d. avtalur við ESF, kunnu gera það ógjørligt at geva útlendingum verri kor, um hugur skuldi verið til tess.

Skatturin av teim inntøkum, ið útlendingar vinna í Føroyum, t.d. við úthandlum, dótturfeløgum ella sum partaeigarar í føroyskum fyritøkum, kann í stórt mát innrettast so, at sum mest av hesum skatti liggur eftir í Føroyum, uttan at það nýtist at skaða ta útlendsku fyritøkuna, sum ofta annars skuldi goldið tann sama skattin í heimlandi sínum .

15. Skatturin og konjunkturrørðslurnar.

a) Inngangur.

Í undanfarnu peltunum í hesum kapitli hevur høvuðsdenturin verið lagdur á langtíðarpolitikkin, ið fremur búskaparligan vøkstur, men tilløk, ið miða móti at javna úr konjunkturbroytingar, ið koma innanella uttaneftir hava eisini týðning.

b) Hvussu koma konjunkturrørslur til sjóndar í føroyska búskapinum?

Føroyski búskapurin er sum áður nevnt ógvuliga opin, og konjunkturbroytingarnar koma tí helst utanfrá, t.d. sum lækkan ella lækkan av inn- og útflutningsprísunum ella sum broytingar í útfluttu nøgdunum, orsakað av skiftandi fiskiskapi.

Øktar útflutningsinntøkur skapa inntøkuvøkstur hjá virkjum og húsarhaldum. Húsarhaldini spara meiru við tí úrsliti, at bankarnir fáa størri likviditet, tey brúka eisini meir við tí úrsliti, at innflutningurin veksur.

Virkini fáa størri yvirskot og tí størri íløgulug. Yvirskotið og økti likviditeturin hjá bankunum skuldu givið størri íløgumøguleikar o.s.fr. íløgurnar vaksa tí, og harvið innlendski eftirspurningurin eins væl og innflutningurin av framleiðslutólum. Falla útflutningsinntøkurnar hendir tað øvugta: innflutningur, likviditetur og íløgur minka.

c) Møguleikar fyri konjunkturdoyvandi skatting.

Møguleikarnir fyri at doyva hesar konjunkturrørslur eru ógvuliga avmarkaðir.

Tað ber tó til at royna at innretta skattleggingina soleiðis, at hon við minst møguligum dráli kann taka avleiðingarnar av eini konjunkturbroyting og harvið minka um inntøku- og likviditetsbroytingarnar í privata sektorinum og harvið eisini um innflutnings- og íløgubroytingarnar.

Slík sjálvvirkandi konjunkturdoyving fæst frá tolli og vørugjoldum hvørs upplægd fer upp, so skjótt sum forbrúkið og innflutningurin fara upp.

Sum umrøtt í kapitli IV høvdu útflutningsgjold helst verið tann mest konkunkturdoyvandi skatturin í føroyska búskapinum, við tað at hann hevði virkað har, ið meginparturin av konjunkturrorslunum kemur frá: útflutninginum.

Tey londini, ið hava samtiðarskatt á inntøku (kelduskatt) hava oftast innført hesa skipan m.a. fyri at gera inntøkuskattin konjunkturdoyvandi. Ein inntøkuskattur, ið sum tann føroyski, byggir á 1½ ára gamla inntøku, ið haraftrat er ávirkað av frádrátti fyri skatt av 2½ ára gamlari inntøku, kann ikki roknast at hava nevniverda konjunkturdoyvandi ávirkan.

16. Samandráttur

a) Í hesum kapitli er víst á, at til tess at náa teimum búskaparligu høvnðsendamálunum: jøvnum og landsumfatandi búskaparligum framburði, ið ger vinnulívið meira fjølhroytt og kemur flestum føroyingum at gagni, er neyðugt at nýta teir avmarkaðu búskaparligu møguleikarnar til fulnar, eisini skattleggingina. Tí má ansast eftir, at skattingin ikki í óneyðugt mát darvar arbeiðssemi, nýtslu av framleiðslukreftum, skynsamari virkisleiðslu, ílogum, sparsemi og kapitalinnflutningi um slíkur verður bildin ynskiligur. Hinvegin má ansast eftir at skattleggingin fyri at náa hesum endamálum ikki verður avhronglað og órættvís. Hetta setir mark fyri, hvussu dúgliga skattaamboðini eiga at verða nýtt, og tí eigur dentur at verða lagdur á, at oftast er skynsamari at nýta útreiðslusíðuna enn inntøkusíðuna á fíggjarlógini til vinnupolitisk endamál.

b) Gjøgnumgongdin av galdandi skattareglum og torvinum á nýggjum reglum gevur m.a. høvi til at peika á hesar spurningar:

i) Ansast má eftir at markskatturin verður ikki av hogur.
ii) Tað gagnar bæði fyritaksemi og uppsparing, um inntøkuskatturin verður avlastaður við skattum, ið heldur fylgja forbrúki, ogn og inntøkumøguleikum.
iii) Serstakar uppsparingarfremjandi skattaskipanir roynast oftast ódrúgvar.
iv) Sum nú er verður passiv ognarinntøka betur viðfarin enn aktiv ognarinntøka. Millum annað er lutvis dupultskatting á partafelagsinntøkum.
v) Skattafyrimunurin av skuld darvar sparseminum.

vi) Rentuskatturin er ein órationellur máli at stuðla sparsemi og fløgum uppá. Hann gevur lítla og ouga trygd fyri størri nettosparing og tykist ikki føra til lægri reutubyrði hjá vinnulívinum.

vii) Risikofýsni kann økjast við lagaligari frádrátti fyri lap.

viii) Ein partafelagsskatting, ið er lagaligari enn nú kann virka stimbrandi fyri vinnulívið sum heild .

ix) Tá ið talan er um at fremja eitt fjølbroyttari vinnuliv er fyrst at siga, at onnur tiltøk eru meira nýtilig enn skattatiltøk. Vert er at ansa eftir, at avskrivingarreglur, ið á pappirinum eru eins fyri allar vinnur, kortini gagna summum vinnum meira enn øðrum, m.a. eru galdandi reglur til størri gagn fyri sjóvinnuna enn frímaðin.

x) Skatturin kann gerast meira konjunkturdoyvandi m.a. við samtíðarskatti, útflutningsgjøldum, burturavlegging í konjunkturgrunnar o.l.

xi) Hugsað eigur at verða um, hvussu rættvist býtið er av teim fyrimunum, ið veittir verða vinnulívinum.

c) Serligur áhugi hevur verið fyri at fáa tveir spurningar lýstar: i) skattligar avskrivingar m.a. hjá partreiðarfum og ii) skatt av yvirtíðararbeiði. Hesir spurningar eru viðgjørdir í skjølunum A og B til hetta kapitul.

SKJAL V A

AVSKRIVINGAR HJÁ PARTREIÐARIUM

1. Inngangur.

Í kapitlunum IV og V er stutt nortið við avskrivingarreglurnar, harímillum eisini fyri skip. Tann skattamissur, ið stendst av hesum reglum, ið hvussu er í summum kommunum, hevur fört til ynski um eina nærri lýsing av hesum spurningi.

2. Ognarformar.

Avskrivingarreglurnar eru tær sonna, hvør ið so eigur skipið, men ognarformurin kann hava ávirkan á, hvussu skattamissurin hjá tí almenna verður.

i) Er tað ein **einstaklingur**, ið eigur skipið, heftir hann fyri skyldur skipsins (t.d. rindan av rentu og avdrátti av lánum) einsamallur og við øllum ognum sínum. Hevur skipið hall, t.d. tlat avskrivingarnar

eru størri enn rakstraravlopið áðrenn avskrivingarnar, kann hann draga tað frá í inntøku sínu frá øðrum keldum enn skipinum, um hann hevur slíkar.

ii) Er tað eitt vanligt íognarfelag (interessentselskab), ið eigur skipið, ábyrgjast felagsmenninir fyri skyldur skipsins við øllum ognum teirra ein fyri allar og allir fyri ein. Hevur skipið avlop ella hall verður tað býtt millum luttakararnar í mun til innskot teirra og teir kunnu draga hallið frá í aðrari inntøku, hava teir slíka.

iii) Er tað eitt **partreiðarí**, ið eigur skipið, ábyrgjast luttakararnir fyri skyldum skipsins við øllum ognum sínum, men bert í mun til teirra part av skipinum. Tann luttakarin, ið eigur ¼ av skipinum bert ¼ av ábyrgdini, hvorki meir ella minni, og tann, ið bert eigur 1/8 ber somuleiðis bert 1/8 av ábyrgdini o.s.fr. Avlop ella hall verða vanliga býtt millum partreiðararnar í mun til part teirra og hallið kann verða drigið frá í aðrari inntøku teirra.

iv) Er tað eitt **samløgufelag** (kommanditfelag), ið eigur skipið ábyrgjast luttakararnir fyri skyldum skipsins í mun til innskot teirra, men bert teir sonevndu komplementarnir (ið oftast bert eru ein í tali, t.d. eitt partafelag) ábyrgjast við allari ogn teirra, hinir kommanditistarnir ábyrgjast bert við innskoti teirra. Vit kunnu hugsa okkum eitt skip við einum komplementari og einum kommanditisti, ið eiga hvor sína helvt. Skipið kostar 1 milj. kr., og teir hava innskotið 10% svarandi til 100.000 kr., 50.000 kr. frá hvørjum. Sambært samløgusáttmálan ábyrgist kommanditisturin bert við innskoti sínum: 50.000 kr. Klárar skipið nú ikki at vinna fyri rentur og avdrátt, so at til domis 20.000 kr. resta í, so skuldu teir goldið hvør sína helvt, um tað var eitt íognarfelag ella partreiðari, men tá ið talan er um eitt kommanditfelag, og kravið fer upp um tær 50.000 kr., ið kommanditisturin hevur sett sum hánark fyri ábyrgd sína, so noyðist komplementarurin at gjalda allar tær 20.000 krónurnar.

Hevur skipið vinning, verður hann býttur millum eigararnar í samsvari við innskot teirra, og vísir roknskapurin hall, verður tað býtt á sama hátt og kundi sambært tær gomlu skattareglurnar verða drigið frá aðrari inntøku hjá eigarunum. Nú eru reglurnar broyttar, soleiðis at kommanditistarnir ikki kunnu draga tapið av skipinum frá í aðrari inntøku.

v) Er tað eitt **partafelag**, ið eigur skipið, so ábyrgist partafelagið sum

slikt fyri skyldum skipsins við øllum ognum sínum, meðan partaeigararnir onga ábyrgd hava. Hevur skipið avlop, verður tað skattað í partafelagnum og hevur tað hall, kann tað dragast frá øðrum inntøkum hjá partafelagnum, men ikki hjá partaeigarunum.

Ein kann sostatt siga, at broytingin, ið gjørd varð í skattingini av kommandittfeløgum, varð at skatta tey eins og vóru tey partafeløg, og er argumentið fyri hesari javnstilling helst, at talan er um avmarkaða ábyrgd í báðum førum.

3. Avskrivingarreglurnar.

Avskrivingarreglurnar fyri skip eru, sum nevnt er í kap IV og V, at avskrivast kann við 30% av bókførda virði skipsins. Í tíðini frá tí at skipið er umbiðið og inntil tað verður latið eigaranum kann verða forskotsavskrivað við upp til 15% um árið í upp til 3 ár.

Í taldømunum niðanfyri hugsa vit okkum 10 partaeigarar, sum eiga hvør sínt 10% av einum skipi, ið kostar 1 milj. kr., svarandi til at hvør parturin er uppá 100.000 kr. Vit hugsa okkum at eigararnir í meðal hava ein markskatt upp á 40% (10% til kommununa og 30% til landið) og at teir hava aðrar inntøkur, sum rakstrarhall hjá skipinum kann verða mótroknað í. Roknað verður við, at í 1. rakstrarári hevur skipið ein vinning aftaná at rentur, men áðrenn avdráttur er goldin, uppá 50.000 kr., svarandi til 5% av keypsvirðinum, og at hetta avlop tey fylgjandi árini er 100.000 kr., svarandi til 10% av keypsvirðinum. Hetta er ikki nakað stórfingið úrslit, men nóg mikið til, at skipið kann gjalda hvørjum sítt og reiðiliga tað.

Vit hugsa okkum, at menninir bíleggja skipið í 1971, fáa tað í 1974 og selja tað aftur í 1980 fyri ca ⅔ av upprunaliga keypsvirðinum. Allir partaeigararnir búgva í sonu kommunu.

Ár		Bókaða virði skipsins 1/1	Ungsta loyvda avskriving	Rakstrarúrslit áðrenn avskriving	Rakstrarúrslit aftanú avskriving	Skattamissur hjá			
						kommununi (10%)	landinum (30%)	tils. (40%)	Tils.
		(1)	(2)	(3)	(4)	(5)	(6)	(7)	
1971		(1000)	150	-	+ 150	15,0	45,0	60,0	60,0
1972	1/	(1000)	150	—	+ 150	15,0	45,0	60,0	120,0
1973		(1000)	150	—	+ 150	15,0	45,0	60,0	180,0
1974		550	165	50	+ 115	11,5	34,5	46,0	226,0
1975		385	115	100	+ 15	1,5	4,5	6,0	232,0
1976		270	81	100	19	+ 1,9	+ 5,7	+ 7,6	224,4
1977		189	56	100	44	+ 4,4	+ 13,2	+ 17,6	206,8
1978		133	40	100	60	+ 6,0	+ 18,0	+ 24,0	182,8
1979		93	28	100	72	+ 7,2	+ 21,6	+ 28,8	154,0
1980	1/1	65	—	—		—	—	—	
1980	2/1	665	+ 600	—	600	+ 60,0	+ 180,0	+ 240,0	+ 86,0
Tils.		-	2/ 335	550	115	+ 11,5	+ 34,5	+ 46,0	+ 86,0

1 Tey fyrsta 3 árini verður forskotsavskrivað og verður bókaða upphæddin í 1974 ti 1 milj. minus samlaðu forskotsavskrivingina kr. 450,00.

2. Hetta er vinningur í mun til bókaða virðið.

Hyggja vit fyrst at heildarúrslitinum fyri tá tíð, ið partreiðariið hevur átt skipið, so siggja vit, at tað hevur havt eitt rakstraryvirskot áðrenn avskriving uppá 550.000 kr., men við tað, at skipið er minkað í virði við 335.000 kr. í hesum sama tíðarskeiði, so er vinningurin netto bert 115.000 kr. Hesin nettovinningur er vorðin skattaður við ávikavist 10% og 30% av kommunu og landskassa. Úrslitið fyri tað almenna er, tá ið avtornar, ikki ein skattamissur, men ein skattainntøka, og soleiðis vil tað vera, tá ið íløgan er so mikið væleydnað, at hon gevur vinning. Gevur íløgan tap, sigur tað seg sjálvt, at tað førir til lægri skattskyldnga inntøku og lægri skatt.

Dømið er treytað av, at inntøkan av øðrum slagi er, ið tapið av skipinum kann dragast frá í. Henda treyt kann verða uppfylt undir øllum ognarformum. Er talan um eitt partafelag, ella kommandittfelag, ið bert eigur hetta skipið, so verða avskrivingarnar avmarkaðar til eina upphædd, ið svarar til rakstrarúrslitið áðrenn avskriving sama ár.

Í mun til taldømið hevði hetta merkt, at avskrivingin fyrst kundi byrjað í 1974. Frá 1974 til 1979 hevði felagið kunnað avskrivað svarandi til rakstrarúrslitið áðrenn avskriving, so skattliga úrslitið varð = 0. Í 1980 hevði felagið so fingið ein søluvinning uppá 665.000 kr. ÷ 550.000 kr. = 115.000 kr., ið hevði verið skattaður sum áður við tilsamans 46.000 kr. Í hesum føri hevði skattainntøkan hjá tí almenna í árunum 1971 - 75 sostatt ikki verið minni enn um onki skip var, soleiðis sum hon var í taldøminum. Rentufría skattalánið til eigararnar hevði verið minni og hevði runnið í nógv stytri tíð enn í taldøminum.

4. Vandamál, ið standast av avskrivingunum.

Tað, sum serliga verður vist á sum óhepnar síður av avskrivingarreglunum er 1) at hitt almenna missir stóra skattainntøku á henda hátt, 2) at persónar, ið eftir vanligari mannahugsan eru mentir at bera eina stóra skattabyrði sleppa ov lættliga í skatti og fáa harafturat lættari atgongd til sosialar veitingar, 3) at tað í stóran mun eru fólk uttan serligt samband við fiskivinnu, ið njóta gott av avskrivingarfyrimununum og 4) at íløgurnar verða ov stórar, ójavnar og illa undirbygdar.

Til hetta kann verða viðmerkt:

Viðv. 1) **Skattamissi hins almenna.**

Sum vist varð á í taldøminum, so verður nettoinntøka skipsins í livitið tess skattað á vanligan hátt. Ein kann tí av røttum spyrja, hvat ið vandamálið so er.

Hartil er fyrst at siga, at meir-skatturin í dømi okkara **er ógvuliga ójavnt býttur ímillum árini.** Frá 1971 til 1975 missir hitt almenna skatt. Hesin munur verður bert lutvíst uppvegaður í 1976-79. Ikki fyrr enn í 1980, tá skipið verður selt, kemur rættilig vend í. Aftrat hesum skal leggjast, at í veruleikanum er tað ofta so, at í 1980 (ella kanska longu í 1976) bíleggja eigararnir eitt nýtt skip og útskjóta á henda hátt skattgjaldingina enn longur fram í tíðina. Sum áður vist á, so føru avskrivingarreglurnar við sær, at hitt almenna gevur skipaeigarunum eitt rentufrítt lán, ið verður latið teimum tey fyrstu árini eftir at teir hava bilagt skipið, og síðani verður kravt innaftur so við og við, um ikki fyrr so tá ið skipið verður selt, um ikki annað skip verður keypt.

Í samband við argumentið um, at skattamissurin hjá tí almenna er ov stórur, er vert at minna á tað, ið sagt varð í kapitli II um brúk av skatti ella studningi.

Ein av vansunum við at nýta skattaútseting heldur enn tilsvarandi rentufri lán, er at torførari er at halda skil á skattamissum enn á útreiðslum á figgjarlógini.

Tað er mest skattamissurin hjá einstøku kommununum, ið hevur verið umrøddur. **Við at velja at geva rentufría lánið sum skattaútseting hevur løgtingið noytt kommunurnar at taka lut í hesi studningsveiting.** Meðan landið á annan hátt, t.d. við láni- og veðhaldstilsøgnum kundi stýrt íløguvirkseminum í ein vissan mun, so hava kommunurnar ongar møguleikar fyri at avmarka hesar skattaútsetingar.

Um so er, at tað ikki er landskassin, men bert kommunurnar, ið hava figgjarligan ampa av skattaútsetingunum og meon annars eru nøgdir við avskrivingarreglurnar sum tær eru, er einfaldasta loysnin helst, at landskassin gevur teim meinast raktu kommunum rentufri lán yvir eini 5 ár, inntil skattainntøkurnar hjá hesum kommunum aftur fara at vaksa.

Viðv. 2) **Persónar,** ið eru mentir at bera eina stóra skattabyrði, sleppa ov lættliga í skatti og fáa haraftarat lættari atgongd til sosialar veitingar.

Skattligar avskrivingar, ið eru størri enn veruliga virðisminkingin hjá skipinum, føra við sær, at skattskyldiga inntøkan undirmetir fíggjarmegina hjá summum borgarum. Teir sleppa tí lættari í skatti enn svarandi til veruligu avlopsfíggjarmegi teirra, og hetta er, sum nevnt í kap. II, órættvist.

Avskrivingarreglurnar eru tí annaðhvørt gjørdar uttan hugsan um rættvist skattabýti, ella er ætlanin við teimum júst at javna **samfelagsbyrðarnar sum heild.** Um so er, at tað at gera íløgur og harvið binda pening og átaka sær risiko verður uppfatað sum ein byrði, ið bert fáir samfelagsborgarar eru fúsir at bera sjálvbodnir, so kann tað hugsast, at samfelagið — í ásamman av, at íløgubyrðin skal berast á ein ella annan hátt - hjóðar teimum, ið vilja bera íløgubyrðina, ein lætta í skattabyrðini afturfyri. **Er tað henda hugsan, ið býr undir avskrivingarreglunum, so virka tær júst eftir ætlan, tá ið fólk við stórum inntøkum og íløgum sleppa bíliga í skatti.**

Eftir stendur tó, at jú størri skattainntøkan er undan avskriving, jú størri verður skattaútsetingin og harvið rentuvinningur borgarans av tí rentufriu útsetingini. Víst kann verða til tolini í skjali IV G hesum viðvíkjandi.

Hetta kemur av, at jú hægri markskatturin er, jú størri er skattasparingin. Í taldømunum var markskatturin hjá øllum teim 10 eigarunum 40% og rentufría lánið hjá hvørjum 23.200 kr., tá ið tað var upp á tað mesta (í 1975). Varð markskatturin hjá onkrum eigara bert 30%, so varð lánið hægst 17.400 kr. Afturat hesum kemur, at jú størri inntøkan er, jú meira rúm er fyri avskrivingunum.

Fyri at avmarka fylgjurnar nakað er nú gjørd regla um, at maður ikki má avskriva so nógv, at inntøka fer niður um eitt minstamark, ið svarar til útreiðslurnar hjá prístalshúsarhaldinum (um 22.000 kr.). Henda regla førir m.a. við sær, at maður við 42.000 kr. í inntøku kann avskriva 20.000 kr., men maður við 122.000 kr. í inntøku kann avskriva 100.000 kr. Taka vit so eisini sosialveitingarnar við, verður skeivleikin uppaftur grefligari. Hin vælstandandi fær nú rætt til bíliga læknahjálp o.m.a., ið bert var ætlað teim minni mentu.

Hetta er eitt ógvuliga greitt dømi um, hvussu vandamikið tað er at royna at brúka skattleggingina til endamál, ið er skattinum óviðkomandi. Øðru-

megin verður skattskylduga inntøka nýtt sum mát fyri sosialum tørvi, hinvegin verður tað loyvt at rokna hana út á ein slíkan hátt, at hon ikki gevur nakra mynd av veruligu figgjarmegini hjá einum persóni.

Skal bøtast um hetta er prinsipielt beinasta leiðin at reinsa skattainntøkuhugtakið, so tað veruliga er eitt mát fyri figgjarligu orkuni. Er hetta ikki gjørligt, eiga avleiðingarnar av hesum at verða tiknar, so smiðað verður eitt «sosialinntøku»-hugtak, ið kann verða nýtt sum mát fyri sosialum tørvi og ikki er ávirkað av avskrivingum, ið eru storri enn veruliga virðistapið á framleiðslutólum o.s.fr.

Viðv. 3) Fólk uttan serligt samband við fiskivinnuna njóta gott av avskrivingarreglunum.

Hesin spurningur er meira vinnupolitiskur enn skattapolitiskur.

Hava øll fólk høvi til at fáa skattaútsetingarfyrimun, fáa persónar, ið ikki higartil hava havt við fiskivinnuna at gera, hug at seta pening í hesa vinnu. Verður atgongdin til skattaútseting avmarkað til ávisar partar av fólkinum, t.d. fiskimenn, so verður hetta at stuðla til, at tað mest verða fiskimenn, ið eiga fiskiskip. **Hvørja støðu, ið menn taka til henda spurning, velst tí um, hvussu teir vilja hava ognarviðurskiftini í fiskivinnuni at verða.**

Halda menn tað verða gott, at so stórur partur av fólkinum sum til ber hevur beinleiðis figgjarligan áhuga í høvuðsvinnuni igjøgnum eigaraskap, so eigur atgongdin ikki at vera avmarkað. Halda menn tað vera best, at bert teir, sum starvast í sjálvari vinnuni sum fiskimenn, reiðarar o.t. eiga flotan einsamallir, so kann ein avmarking, t.d. soleiðis at hall av fiskiskipi ikki kann verða drigið frá í inntøku, ið stavar frá øðrum keldum, óivað hjálpa til at uppnáa hetta. Ein slík regla hevði helst verið lott at umsitið, tá ið talan er um lønarinntøkur. Truplari hevði verið at umsitið hesa reglu viðvíkjandi feløgum ella persónum, ið reka aðra vinnu enn fiskivinnu.

Er tað serliga lontakararnir uppi á landi, ið hugsað verður um, og serliga teir hægst løntu, kundi ein hugsað sær eina reglu, sum ikki heilt bannaði, men strangliga avmarkaði møguleikarnar fyri at draga undirskot av fiskiskipi frá í slíkari lønarinntøku, t.d. til 20.000 kr. árliga.

Ein slík regla hevði havt betri sosiala javnvág enn tað núverandi hámarkið. Í dømínum áður hevði tann, ið vann 42.000 kr. framvegis kunna av-

skrivað seg niður í 22.000 kr., men hann, ið vann 122.000 kr. hevði bert komið niður á 102.000 kr.

Um slíkar avmarkingar er at siga, at tær óivað høvdu minkað um lugin hjá teimum bólkum, ið raktir vórðu, til at seta pening í fiskiskip. (Um slíkar reglur eisini skuldi umfatað farmaskip, velst um hvørji ognarviðurskifti, ið menn ynskja í tí vinnuni).

Nakað av tí peningi, ið tá ikki verður settur í skip, fer inn í skatti. Um restin verður nýtt til forbrúk, passiva uppsparing ella aðrar fløgur er ikki lætt at siga. Vanliga hugsanin millum búskapurfroðingar er, at lontakarar yvirhøvur nýta størri part av inntøkuni til forbrúk enn t.d. fólk í egnari vinnu.

Hvørja ávirkan, ið ein slík avmarking hevði havt á fiskivinnuna er eisini ilt at meta um. Jú strangari avmarking, jú meira eru tað tey gomlu, «traditiónsbundnu», «feitu» virkini, ið fjálgað verður um. Tað er royndur hitur innan allar vinnur, men serliga innan «tradionellar» vinnur sum landbúnað og fiskivinnu, at tær neyðugu endurnýggjaninar sjáldan koma frá teimum «etableraðu» men oftast frá teimum nýggju, ið koma inn í vinnuna uttanífrá. Hetta sjónarmið talar fyri varðsemi við avmarkingum.

Leggjast kann aftrat, at ein avmarking fyri løntakarar á landi sum tann áðurnevnda helst í summum førum hevði fört til, at menn á landi fóru til skips ein part av árinum til at tryggja sær størri frádráttarmøguleikar. Hetta hevði so annaðhvørt hjálpt til at minka um fiskimannatrotið, um slíkt er, ella gjørt tað truplari hjá teimum, ið fiska burturav, at fáa arbeiði árið íkring, um so er, at tað stendst á við tí.

Viðv. 4) fløgurnar eru ov stórar, ójavnar og illa undirbygdar.

Um fløgurnar í fiskiskip í Føroyum hesi seinastu árini sum heild eru ov stórar er ilt at siga. Ein umlegging av fiskivinnuni, so hon verður meira mekaniserað, hevur vist seg at vera neyðug. Hetta setur stór krav til fløgur. Skal flotin verða nokurlunda nútímans, er eisini brúk fyri at skifta skip út í heilum. Framvegis eru nógvir føroyskir fiskimenn í vinnu uttanfyri Føroyar. **Tað er tí neyvan nøkur grund til at halda, at fløgurnar í fiskiskip sum heild eru størri enn tær eiga.**

At fløgulagið er ójavnt hevur fleiri orsøkir. fløgurnar kunnu minka eina tíð, av tí at menn hava ilt við at siggja løtandi fløgumøguleikar. Tá ið so slíkir møguleikar koma til sjóndar, vinda fløgurnar aftur uppá seg.

Tað er tó ongin ivi um, at **avskrivingarreglurnar gera hesa ójøvnu gongd enn ójavnari.** Íløgugrunnarnir eru til nakra hjálp í so máta, men mark er fyri, hvussu nógv álit, ið eigur at vera sett til teirra, tí møguleikin at leggja í íløgugrunn er einvíst til fyrimun fyri teir, sum eru «etableraðir» í vinnumi frammanundan.

Hvørja ávirkan, ið ein herðing av avskrivingarreglunum hevði havt á íløgur og íløgulag er ilt at meta um. Tað er ikki givið, at hetta hevði minkað um íløgurnar ella gjørt tær minni ójavnar. Hugsa vil okkum ein persón, ið vil sleppa at avskriva 150.000 kr. í ár. Hetta kann hann við núgaldandi 15% forskotsavskriving gera við at biðja um eitt skip fyri 1.000.000 kr. Varð forskotsavskrivingin lækkað niðnr í 10% hevði hetta møguliga ført til, at hann umbað skip (ella part í skipi) fyri 1.500.000 kr.

Á sama hátt kann vísast á, at rúmari avskrivingar t.d. heilt frælsar avskrivingar, ikki við vissu kunnu sigast at føra til størri ella ójavnari íløgur.

Sumnir óttast fyri, at rúmir avskrivingarmøguleikar, ið koma ollum til góðar uttan mun til, um tey hava skil fyri skiparekstri ella ikki, føra til **illa undirbygdar íløgur við skattasparing sum einasta endamáli.**

Í hesum viðfangi er vert at minna aftur á taldomið í 2. petti. Hetta var ein skipaíløga, ið «endaði vel», við tað at eigararnir fingu peningin aftur við einum ávísum avlopi (sum teir eisini lótu skatt av, tá ið avtornaði). Var íløgan ikki undirbygd, so teir t.d. noyddust at selja skipið í 1980 fyri 400.000 kr., so er skilligt, at hetta var ein ring forretning, bæði fyri hitt almenna, fyri føroyska samfelagið sum heild, men sannliga eisini fyri eigararnar, sum hevdu havt eitt tap uppá tilsamans 150.000 kr. Skattamyndugleikarnir høvdu borið 40% av tapinum, men hini 60% svarandi til 90.000 kr. høvdu teir borið sjálvir.

Ein rationelt hugsandi persónur setur tí ikki pening í eitt tiltak, ið hann væntar undirskot av, bert tí at avskrivingarreglurnar hjálpa honum til at útseta ta løtu, tá ið undirskotið skal gjaldast. Hinvegin kann verða endurtikið, at ein høgur markskattur ger menn ikki bert minni fegnar um ein vinning, men eisini minni eymar um eitt tap. Hetta, og so tað, at avskrivingarreglurnar – við at fáa vinningin at koma seinri og tap fyrr til sjónular í skattaroknskapinum – í veruleikanum fáa vinningin at koma skjótari og tap eisini seinni til gjaldingar hjá eigarunum, ger lætst menn meira fúsar at taka eina risiko. **Hetta økir um íløgnhugin og ger menn minni bangnar fyri at royna nýggjar leiðir, og skuldi sostatt verið gott.**

Leggjast skal aftrat, at tað, ið her er sagt, byggir á, at menn hugsa skynsamliga. Er henda treyt ikki uppfylt, ber ikki til at siga nakað um búskaparligu afleið teirra.

5. Samandráttur.

Avskrivingarreglurnar geva skipaeigaranum eitt reintufrítt lán, sum tó kann verða longt um við framhaldandi íløgum. Fyrimunurin er størri, jú størri inntøkan er, og eru tað tí mest háinntøkufólk, ið fáa fyrimunin, bæði av sjálvari skattaútsetingini og av øktum sosialum ágóðum. Skulu hesir skeivleikar avmarkast, er rudduligasta loysnin at minka um avskrivingarnar, so tær samsvara betur við veruliga virðistapið. Reglur um avmarking av tí undirskoti av skipum, ið kann dragast frá í aðrari inntøku samsvara illa við reglurnar fyri góðari skatting, og mugu uppfatast sum vinnupolitisk tilløk til at ávirka ognarviðurskiftini í fiskivinnuni.

Tær rúmu avskrivingarnar virka íløgufremjandi, so verða reglurnar herdar, er helst neyðugt við øðrum tiltøkum, ið kunnu uppihalda teim vanstu íløgunum uttan at avlaga skattleggingina .

Skjal V.B.

Skattalætti fyri yvirtíðararbeiði.

1. Inngangur.

Løgtingið heitti hin 27. november 1973 á landsstýrið um at áleggja nevndini at kanna møguleikarnar fyri skattalætta á yvirtíðararbeiði.

Fyrst verður greitt frá grundunum til at uppskot um slíkan lætta er komið fram. Síðan verður spurningurin um tað er beint at geva ein slíkan lætta viðgjørdur, fyrst úr búskaparligum og síðani úr skattafrøðiligum sjónarmiði. At enda verður vist á hvørjir møguleikar, ið eru fyri at seta slíkan skattalætta í verk í Føroyum.

2. Grundir fyri uppskotinum um skattalætta fyri yvirtíðararbeiði.

a. Heitið «yvirtíðararbeiði» merkir sum kunnugt «úrtíðararbeiði», t.e. arbeiði, ið gjørt verður uttan fyri ta í lønarsáttmálanum fastsettu «vanligu» arbeiðstíðina, (ið til dømis kann vera frá kl. 8 á morni til kl. 17 á kvøldi mánudag til friggjadag). «Yvirtíðararbeiði» kann umframt «úrtíðararbeiði» vera «eykaarbeiði», t.e. arbeiði út um vanliga arbeiðsviku, (ið t.d. kann vera avtalað til 42 tímar), men nýtist ikki vera tað. Talan

kann vera um «reint úrtíðararbeiði», ið liggur á kvøldlið, nátt ella um vikuskifti, men heldur seg innanfyri teir ásettu 42 tímarnar.

Tað tykist sum at áhugi hevur verið fyri at geva skattalætta til alt yvirtíðararbeiði, ikki bert eyka arbeiði, men eisini reint úrtíðararbeiði.

b. Taka vit fyrst tær grundir, ið tala fyri at stuðla til **eyka arbeiði**, t.e. til longri arbeiðsviku enn 42 tímar ella longri arbeiðsár enn ca. 2.000 tímar, so er vert at minna aftur á tað, ið sagt varð í kap. V 5, petti um, at skatturin sum heild, men serstakliga hin progressivi inntøkuskatturin, hevur lyndi til at minka um hugin til at arbeiða og vinna meira.

Ein skattalætti á yvirtíðarløninni minkar um markskattin á hesi løn og skuldi á henda hátt stuðla til eykaarbeiði.

c. Sum grund fyri at stuðla til **úrtíðararbeiði** (ið ikki nýtist vera eykaarbeiði) verður víst á, at summi virkir, eitt nú fiskavirkir, vegna ójavnan rávørutilflutning hava eina ógvuliga ójavna arbeiðsgongd. Onnur virkir, t.d. skipasmiðjur, hava ofta brúk fyri at avrika eitt ávist arbeiði innan fyri eina ógvuliga stutta frest. Í báðum forum er neyðugt at biðja fólk átaka sær úrtíðararbeiði, men hóast dýrtíðarviðbøtur, ið eru tyngjandi útreiðslur hjá hesum virkjum, so gongst kortini strillið at fáa fólk at átaka sær úrtíðararbeiði.

Ein skattalætti á úrtíðarviðbótini hevði fingið hana at munað betur og sostatt økt um hugin at átaka sær úrtíðararbeiði.

3. Búskaparligar viðmerkingar til yvirtíðarskattalætta.

a. Fyrst eigur at verða hugt eftir, hvussu, ið lønin fyri yvirtíð verður ásett.

Tá ið lønarsáttmálarnir áseta serliga lønarviðbót fyri yvirtíð, stendst tað av, at løntakarin ikki bert hugsar um tann pening, ið hann kann forvinna, men eisini um tað ið hann ofrar, fyrst og frenst av **tíð**, fyri at fáa fatur á inntøkuni. Valið stendur imillum frítíð og inntøku; jú meira hann vil hava av peningi, jú meira má hann ofra av frítíð. Hann vil helst hava bæði, og roynir at finna einu javnvág, hvar ið hann júst ofrar so nógva tíð, at ein fritími aftrat júst er eitt sindur minni verdur enn ein tímanløn og ein tímanløn aftrat júst er eitt sindur minni verd enn ein mistur frítími.

Tað er eitt alment fyribrigdi, at jú meira ein hevur av onkrum, jú minni vil ein ofra fyri at fáa eitt sindur av tí aftrat. Nyttan av eini eind

aftrat er støðugt minkandi. Hetta er eisini galdandi fyri inntøku sum heild. Jú størri inntøka, jú minni hugur at ofra ein tíma aftrat til tess at økja hana.

Ynskja virkini tí at fáa fólk at átaka sær **eykaarbeiði** er tí neyðugt at gjalda meira enn vanliga løn.

Sama er um **úrtíðararbeiði** at siga. Fólk flest vilja helst hava arbeiði sítt innanfyri vanliga arbeiðstíð. Skal arbeiðast á kvøldi, nátt ella um vikuskifti vilja tey bert gera hetta, um tey fáa eina viðbót fyri ta eyka byrði, ið tey halda tað vera at arbeiða utlan fyri vanliga arbeiðstíð.

Í Føroyum verða lønirnar á arbeiðsmarknaðinum sum kunnugt avtalaðar beinleiðis imillum løntakara- og arbeiðsgevarafeløgini — uttan nevniverda uppílegging frá myndugleikunum.

Hetta er eisini galdandi fyri yvirtíðarlønina.

Higartil hevur verið hildið, at partarnir sjálvir duga best á at skyna, deils hvar, ið markið eigur at gangа imillum løn øðrumegin og ofring av frítíð hinumegin, deils hvussu høga yvirtíðarløn, ið framleiðslan er ment at bera.

Í einum marknaðarstýrdum búskapi sum tí føroyska hava allir prísir eina týdningarmikla uppgávu til tess at finna fram til, hvat ið framleiðslukreftir landsins skulu brúkast til.

Prísurin, ið avtalaður verður fyri yvirtíðararbeiði hevur til uppgávu at avvega ta eyka byrði, ið yvirarbeiði er fyri arbeiðsfólkið upp ímóti virðinum av teimum vørum og tænastum, ið framleiddar verða við yvirarbeiði, til tess at tryggja, at bert tað arbeiði, ið er so nógv vert, at tað er fært fyri at fíggja yvirtíðarkostnaðin, verður framleitt uttanfyri vanliga arbeiðstíð.

Er tað nú so, at virðismikið arbeiði, ið kastar meira av sær enn svarandi til yvirtíðarlønina, liggur á láni, tí at arbeiðsfólk ikki fæst til yvirtíðararbeiði fyri galdandi yvirtíðargjald, so er tað tekin um førv-

andi javnvág á arbeiðsmarknaðinum, ið stendst av, at avtalaði prisurin á yvirtíð er ov lágur. Tann náttúrliga loysnin í einum liberalistiskum búskapi er tá at hækka prísin, so at nakað av tí yvirtíðararbeiði, sum verður gjørt í dag, men sum ikki er ment at bera eina hægri løn, dettur burtur, og sostatt friger yvirtíðarhugaða arbeiðsmegi, ið samuan við tí eyka arbeiðsmegini, ið tann hægra lønin fær at koma fram, kann avrika so mikið meira av tí yvirtíðararbeiði, ið gevur eina so stóra samfelagsliga úrteku, at ráðini eru til at gjalda fa hægru lønina.

Ein slík hækking av yvirtíðarlønini kann sustatt tryggja, at allir partur fáa meira burturúr. Meira verður arbeitt. Arbeiðararnir fáa eina eykainntøku, ið er nóg stór til at uppvega tann økta frítíðarmissin. Tey virkini, ið hava so lønandi uppgávur, at tær kunnu bera ta hægru yvirtíðarlønina, fáa nú loyst tær, meðan tey virkini, hvørs framleiðsla ikki er so virðismikil, at hon orkar at bera ta hækkaðu lønina, nú noyðast at flyta framleiðsluna til vanliga arbeiðslíð ella lata hana detta niðurfyri. Eitt slíkt umskifti er ein samfelagsøkonomiskur vinningur.

Ein uppílegging í hesa náttúrligu marknaðarstýring við serligum skattafyrimunum til yvirtíðarløn kann forða búskapinum í at finna ta samfelagsøkonomiskt ynskiligastu javnvágina. Hon førir til, at virðismikil arbeiðskraft verður nýtt til at framleiða vørur og tænastur, ið ikki eru so mikið verdar, at tær eru førar fyri at gjalda eina løn, ið kann uppvega virðið av tí mistu frítíðini.

Eitt er, at ein skattastudningur sum nevnt kundi hjálpt til at fingið eina (falska) javnvág í lag ímillum útboð og eftirspurning av yvirtíðararbeiði á einum marknaði við ov lágum yvirtíðargjaldi frammanundan. Á øðrum pørtum av arbeiðsmarknaðinum, har roknast kann við, at javnvág var í frammanundan, tí at yvirtíðarviðbøturnar eru nóg stórar, eisini tá ið skatturin av teimum er goldin, kemur nú ólag í, soleiðis at løntakararnir nú fáa «yvirkompensatión», sum kanska førir til at yvirtíðarviðbøturnar í øðrum umfari verða settar niður ella kanska bert til, at yvirtíðararbeiðið vekstur. Hetta sjónarmið er serliga týdningarmikið á teimum økjum, har ið danskt lønarlag er galdandi. Teir donsku fakstiðnir fyri yvirtíð eru ásettir so mikið stórir, at teir skulu kunna bera ein markskatt, ið er 10—20% hægri enn tann føroyski javnvágarmarkskatturin.

Búskaparlig sjónarmið tala sostatt ímóti einum serligum skattastudningi til úrtíðararbeldi og harvið til serliga úrtíðarkrevjandi framleiðslu.

b. Eftir stendur so tann meira almenna grundin, at skattleggingin sum er — við at skatta arbeiðsúrteku (og nýtslu), men ikki frítíð kann fáa fólk at velja stytri arbeiðstíð og longri frítíð enn tey høvdu valt um ongin skattur var. Skatturin tarnar sostatt arbeiðslunginum og tí kundi tað hugsast at verið skynsamt (rationelt) at royna at uppvega nakað av hesi vicksemisdarvandi ávirkan við tiltokum, ið miðaðu ímóti at fáa fólk at arbeiða meira og sostatt kanska koma nærri at tí arbeiðstíð, ið tey høvdu valt, um skatturin ikki hevði havt nakra ávirkan.

Til hetta er fyrst at viðmerkja, sum nevnt er í kapitli V 5. petti, at tann virksemisdarvandi ávirkanin hjá skattinum ikki er heill so einvís sum ofta verður hildið.

Til her at hugsa sær dømi um, at minni hevði verið arbeitt um ongin skattabyrði var. Hinvegin er valla nakað at ivast í, at ein høgur markskattur á inntøku helst minkar um hugin til at átaka sær meirarbeiði ella eykaarbeiði ella á annan hátt vinna meira pening.

Sum nevnt í kap. V 5. petti er torført at hugsa sær ein markskatt, ið var null, um ein samstundis ynskir at skatta borgararnar eftir føroynni.

So skuldi ein uppkravt skatt — ikki eftir veruligari — men eftir moguligari inntøku, og tann uppgávan, at meta um, hvussu nógv, ið hvor einstakur skattaborgari hevði verið førur fyri at vunnið, um hann nýtti evni sini best gjørligt, er bart til sagt ógjørlig. Vit noyðast tí helst at liva við markskattinum og hansara doyvandi ávirkan á fyritaksemið, men sum víst er á í kap. V, so er moguligt at minka um hann, lutvís við at broyta skattalagið, so inntøkuskatturin fær minni týdning, lutvís við at breiðka grundarlagið undir inntøkuskattinum, so moguligt verður at krevja sonnu upphædd inn við lægri prosentum.

Í Føroyum er serlig grund til at peika á skattafrádráttarreglurna, sum førir við sær, at miða metna eftir einum markskatti í longdini (javavágarmarkskatti) uppá 45%, so er neyðugt at seta markskattin fyrsta árið til 82%.

Hóast allir skattaborgarar vita, at hetta høga prosent ikki er galdandi í longdini, so er óvissan um endaliga úrslitið kortini so stór, at hon

helst skapar ein varðhuga av, at markskatturin er hægri enn hann veruliga er. Hetta er virksemisdarvandi.
Hinvegin er tað helst ein fyrimunur fyri arbeiðsfýsnið, og ikki minst hugin til at átaka sær yvirtíðararbeiði, at skatturin ikki verður uppkravdur sum samtíðarskattur.

c. Tann almenna grundin, at skatturin sum slíkur er virksemisdarvandi, talar ikki ímóti skattatiltøkum, ið kunnu uppvega nakað av hesari ávirkan og fremja virkisfýsnið.

Serligir skattalættar fyri eykaarbeiði hjá løntakarum tena hesum endamáli, men sum vist er á, so er spurningurin heilt almennur, og tí má verða rátt til at royna at loysa hann við so alment virkandi tiltøkum sum gjørligt og rátt má verða til at nýta sertiltøk sum yvirtíðarlættar við varðsemi.

4. Skattleggingarsjónarmið viðvíkjandi yvirtíðarskattalætta.

a. Sambært tað rættvísissjónarmið, ið inntøkuskatturin byggir á, eigur øll inntøka at verða skattað eins, uttan mun til hvussu hon er vunnin, eisini uttan mun til um hon er vunnin undan ella aftaná kl. 17.

Hinvegin er greitt, at allar útreiðslur, ið neyðugar eru til at vinna inntøkuna, skulu kunna dragast frá. Standast serliga stórar útreiðslur av yvirtíðararbeiðnum eiga tær sostatt at geva rætt til frádrátt. Er ein partur av yvirtíðarviðbótini samsýning fyri eykaútreiðslur, eigur hesin partur ikki at verða roknaður uppí skattainntøkuna.

b. Sum grund fyri serliga mildum skatti av yvirtíð verður onkuntíð vístá, at jú meira stríggið tað hevur verið at vinna inntøkuna, jú mildari eigur hon at verða skattað.

Líknandi sjónarmið hava eisini verið førd fram til frama fyri hugsanina um, at ognarinntøkur skulu skattast harðari enn arbeiðsinntøkur o.s.fr.

Hóast hetta sjónarmið sær ógvuliga rættvist út, so er vanliga hugsanin millum skattafrøðingar tann, at hesi viðurskiftini eiga at vera skattinum óviðkomandi.

Henda áskoðan hyggir á tað sama sum nevnt varð í 3. petti, at vit í einum marknaðarstýrdum búskapi í fyrstu syftu eiga at áleggja markn-

aðinum sjálvum at skapa «útjavnandi lønarmunir», ið gera, at størv, ið t.d. krevja nógv úrtíðararbeiði, langa fráveru heiman, stræviðella skitið arbeiði o.s.fr. fáa hægri løn, enn størv, ið ikki bera hesar vansar við sær.

Ein uppílegging við serligum skattalætta til tey minni atdragandi størvini førir lættliga við sær, at tann ynskiliga útjavningin við lønarmunum ikki verður framd.

Heldur ikki hetta sjónarmið er sostatt nóg góð grund fyri serliga mildari skatting av t.d. yvirtíðarinntøku.

c. Ein grund fyri at skatta eykaarbeiði milt ella als ikki, er hitt sonevnda »limagjaldssjónarmiðið», ið vil vera við, at um so er at maður letur skatt av eini inntøku, ið svarar til vanliga arbeiðstíð í yrki hansara, so hevur hann gjørt skyldu sína ímóti samfelagnum, og tað eigur ti ikki at krevja meira av honum enn svarandi til hetta «limagjald», men lata hann hava eina eyka inntøku út um hetta skattafría fult og heilt.

Eitt er at hetta sjónarmið — ið møguliga er rættiliga útbreitt manna millum — er torført at sameina við sjónarmiðið um skatt eftir førimuni. Verri er, at tað helst er ógjørligt at gjøgnumføra.

Tað kann so dánt nýtast upp á ein persón, ið er tímaløntur í einum starvi við almannakunngjørdum lønarsáttmála, men hvat við akkordvinningi, ognarinntøku og inntøkuni hjá fólki í sjálvstøðugum virki? Hesi vandamál eru ikki minni enn tey, ið umrødd vórðu í 3. petti um skatting eftir inntøkumøguleikum.

d. **Tað skattliga grundsjónarmiðið verður sostatt, at serliga linlig skatting av inntøku av yvirtíðarvinningi ikki er í samsvari við vanliga góðtiknar reglur fyri góðari skattlegging.**

5. Hugsanligar yvirtíðarskattalættaskipanir.

a. Er politiskt ynski um at áseta serligar reglur um skattalætta fyri yvirtíðararbeiði verður trupult at finna gongdar leiðir at vísa á.

Tað hevur ikki verið møguligt at finna fram á galdandi ella royndar skipanir av hesum slag í útlondum. (Í Týsklandi sigst tó galda ein skipan, ið líkist tí undir b. uppskotnu). Donsku skattamyndugleikarnir, sum ið hvussu er í prinsippinum hava havt eitt hugskot um slíka skipan

til umhugsunnar, tykjast hava víst skipanini frá sær, tí teir hava hildið tað vera ógjørligt at finna eina skipan, ið kann tunsitast.

b. **Skattafrælsi fyri yvirtíðarviðbøtur.**
Ein toluliga greið skipan hevði verið at gjørt allar yvirtíðarviðbøtur hjá øllum løntakarum skattafríar.

Ein slík skipan krevur, at løntakarar og arbeiðsgevarar geva upp, hvussu stórur partur av lønarinntøkuni, ið er yvirtíðarviðbót. Hetta er lætt at rokna við, men helst trupult at hava eftirlit við.

Ein slík skipan hevði helst havt ymsar óynsktar avleiðingar fyri inntøkubýtið.

Áður er nevnt, at nógvar prísviðbøtur longu frammanundan vóru nóg stórar til at tær kundu bera skattin, og aðrar (hjá teim dansktlønlu) eru enntá størri. Eitt annað er, at støddin á yvirtíðarviðbótunum vekstur, í hvussu er ájavnt við lønarhæddina, og skipanin verður tí helst til størstan fyrimun fyri báinntøkufólk. Afleiðt hesum kemur, at hjá summum bólkum, sum t.d. lærarum og sjúkrahúslækknum er ein rættiliga stórur partur av arbeiðinum úrtíðararbeiði, meðan onnur onki úrtíðararbeiði kunnu fáa í størvum teirra.

Ein annar vansi er, at uppskotið ger mannamun í millum løntakarar og fólk í sjálvstøðugari vinnu, ið ofta hava langa arbeiðsviku, sum tey eftir hesi skipan bert kunnu fáa skattalætta fyri, um tey skipa virki sini sum partafeløg og seta seg sjálvi sum løntakarar eftir sáttmála, ið gevur riviligar yvirtíðarviðbøtur.

Men, heldur ikki allir løntakarar verða at fáa part í eini slíkari skipan. Her verður hugsað um fiskimenn, sum helst eru teir føroysku løntakarar, ið hava flestar úrtíðartímar. Meðan menn í farmasigling (sum nógvir hava skattafyrimunir frammanundan íggjøgnum sjómansskattin) fáa ein stóran part av løn sini sum yvirtíðarløn og fiskil kunnu sleppa upp í part, so fáa føroyskir fiskimenn onga serstaka yvirtíðarsamsýning og sleppa sostatt ikki upp í part.

Hvussu stórt eftirlitsproblemið verður, er ilt at meta um, men tað er ikki óhugsandi, at ein slíkur lætti hevði nært um hugin at átaka sær yvirtíðararbeiði yvirhøvur, og serstakliga úrtíðararbeiði. Hugsandi er eisini, at bæði løntakarar og arbeiðsgevarar hevdu havt hug til at avtala ein lutfalsligan størri part av komandi lønarhækkingum sum úr-

tíðarviðbotur enn higartil og at áhugin fyri ótraditionellum arbeiðstíðum hevði vaksið, somuleiðis hevði áhugin fyri at arbeiða longur kanska gjørst størri enn áhugin fyri at arbeiða skjótt.

c. **Frádráttur fyri arbeiðstímatal út um vanligt arbeiðsár.**

Um so varð, at tað bert var **eykaarbeiði**, og **ikki** reint **úrtíðararbeiði**, ið hugur var at geva skattalætta, kundi ein hugsa sær eina skipan, sum álegði løntakarum og arbeiðsgevarum at uppgeva tað tímatal, ið arbeitt varð, og at givið inntøku- ella skattalætta fyri hvønn tíma, ið fór upp um teir umleið 2.000 tímarnar um árið, ið svara til vanliga arbeiðsviku. Ein kundi t.d. hugsað sær ein frádrátt í inntøkuni upp á 5 kr. pr. tíma ella í skattinum uppá 2 kr. pr. tíma .

Við at halda seg til reint eykaarbeiði slepst undan úrtíðarspurninginum og skipanin verður lí einfaldari, men eftirlitsspurningurin verður helst stórur kortini. At sleppa fólki í sjálvstøðugari vinnu uppí er helst framvegis ógjørligt, men tað ber til at fáa fiskimennirnar við, t.d. við eintum frádrátti pr. dag úr havn út yvir t.d. 200 um árið.

Henda skipan hevur sostatt færri vansar enn hin fyrra, men uppfyllir eisini bert ein part av teim ynskjum, ið sett vórðu fram. Hon er t.d. til lítla hjálp fyri fey, ið arbeiða á virkjum, ið hava ójavnt virksemi ígjøgnum árið, við nógvum úrtíðararbeiði ein part av árinum, men ikki nóg miklum ársvirksemi til at náa upp um leir 2.000 tímarnar pr. fólk pr. ár.

Hetta ger tað helst ivasamt, um tað er ómakin vert at royna hesa skipan.

6. Samandráttur.

Skatturin hevur lyndi til at tarna arbeiðssemi og virkisfýsni sum heild. Tað finst ongin «patentloysn», ið kann loysa henda spurning til fulnar, men gjørligt er at hroyta skattleggingina, so hon tarnar virksemiinum minni enn nú. Best er at royna at bøta um hetta almenna vandamál við almennum tiltøkum. Sertiltøk, sum t.d. lætti fyri inntoku av eykaarbeiði eiga at koma í aðru røð.

Bæði húskaparligar og skattligar grundir tala móti serskipanum fyri úrtíðararbeiði.

Tvær møguligar yvirtíðarskattalættaskipanir eru umrøddar.

Hin fyrra gevur skattafrælsi ella lætta fyri allar yvirtíðarviðbøtur (men ikki fyri grundlønina). Hon gevur skeivleikar ímillum ymsar bólkar av skattaborgarum, her vanda í sær eisini fyri avlagandi ávirkan á arbeiðsviðurskiftini í vinnulívinum og er hartil torfør at hava eftirlit við.

Hin seinra gevur bert lætta fyri eykaarbeiði út um vanligt arbeiðsár, og ger tí ikki so nógvan mun, men afturfyri eru vansarnir eisini minni.

Niðurstøðan tykist at vera tann, at tá nógv arbeiði er til, eru virkir, sum hava trupulleikar við at fáa fólk at arbeiða yvirtíð, men gongda leiðin er ikki í hesum førum at avlaga skattaskipanina sum heild fyri einkult virkir. Støða má heldur takast til, um hesi virkir skulu fáa serskilta hjálp.
Viðmerkjast skal, sum áður nevnt, at skatting uttan skattafrádrátt hevði vist meira greitt, at skattatrýstið (støðan tá menn nýta roknaðan skattafrádrátt) á síðst vunnu krónuni í veruleikanum ikki er meira enn til helvtar so stórt, sum sagt verður.

Skjal V.C.

SKJALTALVA

Bruttotjóðarúrtøka í marknaðarprísum (eftir SNA-definitión, t.e. umvælingar eru drignar frá) pr. íbúgva í Føroyum og øðrum londum.

1. Føroyar	18.200 kr.	100
2. Ísland	21.600 —	119
3. Noreg	24.800 —	136
4. Danmark	26.000 —	143
5. Svøríki	32.600 —	179
6. Finland	18.100 —	99
7. EF («teir 9»)	20.600 —	113
8. OECD alt [1])	23.600 —	130
9. OECD, Europa [2]) ..	17.400 —	96

Kelda: 1. Føroyar: Tjóðarrokniskapur 1971, 2. Hini londini:
OECD: National Accounts of OECD Countries 1960-1971, Paris 1973.

[1]) Her er tað USA og Canada, ið draga meðaltalið uppeftir.

[2]) Her eru tað tey Suðureuropeisku londini og Írland, ið draga meðaltalið niðureftir.

VI YVIRLIT YVIR PARTAFELAGSSKATTASKIPANIR:

1. Prinsippspurningar viðvíkjandi partafelagsskatti.

a) Grundir fyri serstøkum partafelagsskatti.
Eitt partafelag er ein serstakur juridiskur persónur, men hevur onga fíggjarliga sjálvstøðu, við tað at aðrir persónar, veruligir ella juridiskir, eiga hann.

Henda dupultstøða førir eisini til tvídrátt um, hvørja støðu felagini hava skatti viðvíkjandi.

Teir, ið leggja dent á juridisku sjálvstøðuna, koma til tað úrslit, at eitt partafelag skal skattast eins og aðrir persónar.

Teir, ið leggja dent á fíggjarligu ósjálvstøðuna hjá juridiska persóninum: partafelagnum, visa á, at skattabyrðar í evstu syftu bert kunnu verða bornar av fólki, og at partafelagið bert er ein serligur samarbeiðsháttur millum privatpersónar, og tað er tí út frá hesum sjónarmiði meiningsleyst at tosa um skatt á partafelagum. Verður skattur lagdur á partafelag, kann tað bert vera talan um eina fyribilsskatting, ið skal mótroknast hjá eigarunum, tá ið høvi verður til tess.

Vanligt er, at partafelag gjalda inntøkuskatt, men tey grundsjónarmið, ið nevnd eru omanfyri hava havt ymiska ávirkan í ymiskum londum, og tí er rættiliga ójavnt, hvussu partafelagsskatturin er uppbygdur.

b) Serligir spurningar viðvíkjandi partafelagsskatti.

1. Dupultskattingin.
Verður partafelagsinntøkan skattað hjá partafelagnum, og síðan vinningsbýtið skattað hjá partaeigarunum, er vinningsbýtið so at siga skattað tvær ferðir, bæði hjá felagi og eigara.

Her er talan um eina formella dupultskatting, men hvussu hørð tann veruliga dupultskattingin er, velst um hæddina á partafelagsskattinum og á vinningsbýtisskattinum, og hvussu long tíð, ið gongur frá tí, at vinninguriu verður vunnin og skattaður hjá felagnum og inntil hann verður útgoldin til eigara og skattaður hjá honum.

Seta vit rentuna (aftaná skatt) til 6 pct. so svarar ein skattaútseting í 7 ár til, at skatturin minkar við einum triðingi, 12 ár svara til at hann minkar niður í helvt og 18 ár, til, at hann minkar niður í ein triðing.

Bert um vinningsbýtið verður skattað sama ár sum felagið skal gjalda skatt av vinninginum er ongin útsetingarfyrimunur, og dupultskattingin virkar fult út.

Vilja menn sleppa frá dupultskattingini, so kann hetta gerast á ymiskan hátt.

Teir, ið leggja dent á sjálvstøðu partafelagsins halda ta rættastu leiðina vera at meta vinningsbýtið javnt við aðrar fíggjarútreiðslur hjá felagnum og koma til tað úrslit at vinningsbýtið eigur at verða drigið frá í felagsinntøkuni (frádráttarskipanin). Teir, ið leggja dent á ósjálvstøðu felagsins halda, at vinningur felagsins bert skal skattast hjá eigarunum. Tann skattur, ið felagið letur, tá ið vinningurin kemur fram hjá ti, eigur at verða mettur sum fyribilsskattur, ið eigur at verða góðskrivaður partaeigaranum og mótroknaður í skatti hansara av vinningsbýtinum **(endurgjaldingarskipanin).**

Hesir báðir mátar miða hnóti at avtaka ella minka um bæði tann formella og tann veruliga dupultskattin.

Tað ber eisini til at minka um ella avtaka tann veruliga dupultskattin uttan at avtaka ta formellu dupultskattingina.
Hetta kann m.a. gerast við at skatta bæði vinningin hjá partafelagnum og vinningsbýtið hjá partaeigarunum lægri enn aðra inntøku. Lutvíst kann hetta eisini gerast við ti sonevndu «splitrate» skipanini, ið er uppbygd soleiðis, at inntøkan hjá felagnum verður skattað ymiskliga, alt eftir um hon verður lutað út ella verður standandi í felagnum. Tann parturin, ið verður standandi, verður skattaður við einum høgum skattaprosenti, og tann parturin, ið verður lutaður út við einum lágum prosenti.

Ein annar «dupultskattaspurningur» stendst av, at vinningurin hjá partaeigarunum persónliga umfatar bæði vinningsbýtið og kursvinning á partabrøvum. Ein partur av hesum kursvinningi er eitt úrslit av burturavlegging av skattaðum yvirskoti hjá felagnum. Í Føroyum er hesin spurningur sum nú er uttan týdning, við tað at ongin skattur er á kursvinningi.

II) Búskaparligu avleiðingarnar av partafelagsskattinum.

Ikki allir halda, at tann veruligi dupultskatturin hevur nakað uppá seg. Teir vísa á, at hugsandi er, at partafelagini uppfata sín egna skatt og kanska eisini bruttovinningsbýtið (t.e. vinningsbýti, áðrenn skatturin hjá eigaranum verður drigin frá) sum kostnað, ið antin verður skúgvaður framefter, yvir á søluprísirnar ella aftureftir sum lægri prísir á rávøri og arbeiðsmegi.

Jú sterkari monopolstøðu, ið felagið hevur, ávikavist á sølu- og á innkeypssíðuni, jú meira trúligt er, at hetta er so.

Spurningurin er síðan, hvussu fyrimunurin av avtøku av tí formella dupultskattinum (sum eftir hesi áskoðan ikki er veruligur) verður býttur imillum felagið, eigararnar, teir, ið keypa frá, og teir, ið selja til felagið.

Er fyritøkan støðd í harðari kapping á sølumarknaðinum (sum t.d. føroyskar útflutningsfyritøkur), men ikki á innkeypssíðuni, hevur hon hert møguleika fyri at skúgva skattin frá sær á rávøruseljararnar og arbeiðsmegina. Stendur fyritøkan sterkt yvirfyri hesum, fáa teir neyvan nakran fyrimun av skattalættanum. Skattalættin kemur tí í fyrsta umfari bert fyritøkuni tilgóðar. Hon fær tí størri vinning. Um hann verður nýttur til størri tøkt vinningsbýti (t.e. vinningsbýtið eftir at skatturin er frádrigin) ella til størri burluravleggingar er ilt at siga. Tað velst um so nógv, m.a. hvussu ið skattaskipanin sær út.

Var eisini hørð kapping millum virkini á innkeypssíðuni hava rávøruseljarar ella arbeiðsfólk longu frammanundan fingið tann prís og ta løn, ið marknaðurin sum heild kann geva. Sostatt skuldi onki hent uttan tað, at fyritøkan fekk størri tøkan vinning. Fyritøkan fær hesar vørur og tænastur fyri marknaðarpris sum vant. Í øðrum umfari kundi hugsast, at hendan (og aðrar) fyritøkur nú fáa størri tøkan vinning og tí viðka um virksemið. Hesin størri eftirspurningur eftir framleiðslukreftum kann tá fáa prísirnar á rávørum ella arbeiðsløninna at hækka. Kanska verður eisini neyðugt at seta vinningsbýtið upp fyri at fáa meira av partapeningi.

Sum frálíður má ein umfatandi skattalætti á øllum felagum (ella betri: á øllum vinnulívsinntøkum) fara at koma eisini øðrum til góðar enn teimum núverandi eigarunum.

Hevur fyritøkan monopol (ella eina sterka støðu) á sølumarknaðinum (føroyskar heimamarknaðarfyritøkur t.d.), hevur hon longu (við at framleiða minni) skúgvað skattin yvir á keypararnar. Lætnar skatturin, skuldi lað loyst seg hjá virkinum at økt nakað um framleiðsluna og sett prísin nakað niður. Hvussu nógv, velst um, hvussu stóra ávirkan, ið ein prisniðurskurður fær á eftirspurningin. Er fyritøkan undir monopoleftirlíti, má eftirlitið taka støðu til, um skattabyrðin hígartil hevur verið roknað inn í koslnaðin, tí um so er, eiga prísirnir at verða lækkaðir.

Verður skattalættin ikki skúgvaður viðari, men verður verðandi hjá felagi og eigarum, fer sjálvur skattalættin til ein kapitalvinning fyri eigararnar, soleiðis at interna virðið á partabrøvum hækkar og við tí belst eisini kursurin. **Henda ásannan av, at partafelagsskatturin ofta er vorðin skúgvaður viðari, hevur ofta verið nýtt sum avgerandi argument ímóti avtøku av dupultskattingini.**

III) Neutralitetskrøv til partafelagsskattin.

Hesi neutralitetskrøv eru fleiri. Eitt krav, ið samsvarar við rettvísiskravið er, at inntøka skal verða **skattað eins,** annaðhvørt hon verður vunnin í persónligum virki ella í partafelag. Skattingin eigur **ikki at ávirka valið ímillum persónligt virki og partafelag.**

Eitt annað krav er, at skatturin ikki skal ávirka figgingina av einum partafelag.

Felagið skal verða **skattað eins, um tað figgjar seg við lántøku ella partapeningi.** Frádráttur fyri vinningsbýti sum fyri rentu uppfyllir hetla krav. Verður dupultskatturin avlikin, verður hesin spurningur uttan áluga.

Eitt triðja krav er, at inntøkan skal **skattast** eins (antin hjá felagnum ella hjá felagi og eigarum tilsamans), **annaðhvørt hon verður nýtt til uppsparing í felagnum ella verður býtt út til eigararnar.**

Eitt fjórða neutralitetskrav er, at skatturin ikki skal hava ávirkan á, hvar, ið partafelagið fær sær **heimstað.** Av hesi orsøk og fyri at spara umsiting er partafelagsskatturin nógvastaðni (t.d. í Danmark) eins um alt landið og verður inngoldin til ríkið, ið síðan letur ein part (t.d. 1/5) viðari til heimstaðarkommununa.

IV. Búskaparpolitisk endamál við partafelagsskattinum.

Tað kann hugsast, at hitt almenna antin vil stuðla vinnulívsmonnum til at skipa seg sum partafelag ella vil mótarbeiða hesum.

Í eldri tíð, tá avmarkaða ábyrgdin í partafeløgunum varð hildin at vera ódámlig, varð hetta brúkt sum argument fyri harðari skatting av partafelagsinntøkum enn persónligari inntøku, harundir dupultskatting.

Í nýggjari tíð hevur lyndið heldur verið at stuðla monnum til at gera partafeløg, út frá tí hugsan, at vinningur, ið vinnin verð í partafelagi og umsitin av eini partafelagsnevnd, heldur verð nýttur til uppsparing og íløgur enn til nýtslu, mótsett persónligari inntøku.

Eisini hevur verið tosað um at uppsparing, ið verð sett í risikokend partabrøv, skuldi fáa eina mildari skatting enn passiv, risikofri uppsparing.

Í hesum sambandi kann verða nevnt, at í orðaskiftinum um hvørt partafelagsskattingin eigur at stuðla til vinningsbýti ella burturavlegging og um hvør háttur, ið bestur var at lætta um dupultskattin, at geva felagnum lættan (frádráttarskipanin) ella partaeigarunum (endurgjaldsskipanin) hava summir hildið uppá felagið, av tí at felagsnevndin má haldast at duga betur at nýta peningin rætt enn partabrævaeigarin, meðan aðrir hava hildið, at kapitalurin sum heild verður best nýttur, um partabrævaeigarin fær hann út úr felagnum og kann taka støðu til, um hann vil seta peningin inn aftur í hetta felagið ella kanska í okkurt annað felag, ið kastar meira av sær. Hesir seinnu halda, at hin skipanin tryggjar, at tey gomlu «feitu» feløgini trívast («survival of the fattest») meðan teirra skipan tryggjar, at teir dugnaligastu trívast («survival of the fittest»).

Til hetta kann viðmerkjast í fyrsta lagi, at tað at eitt felag gevur yvirskot jú er eitt tekin um, at dugur er í leiðsluni, og at felagið tí ikki kann gerast «feitt» uttan eisini at duga nakað, og í øðrum lagi, at tað væl kann vera, at t.d. tann breiski partabrævaeigarin er kønari enn tann breiski nevndarlimurin, men at hetta neyvan er galdandi í Føroyum. Í londum sum Bretlandi er avgomul traditión, at almenningurin setur pening í partabrøv, og stórur partur av partabrøvunum verður umsitin av monnum, ið hava hetta til slarv burturav og hava lagt seg eftir at fylgja við í, hvussu tað gongst virkjunum sum heild og sum

tí væl kunnu hugsast at duga betur at skyna á, í hvørji feløg tað loysir seg at seta pening.

Í Føroyum er ikki slík tradition og tí er grund til at halda, at sum nú er, eru tað nevndarfimirnar, ið eru teir kanaru til at umsita avlopspeningin, so hann verður til størst samfelagsgagn; sum nevnt talar helta fyri at stuðla til burturavleggingar í feløgunum.

Eitt annað endamál, ið kann ávirka partafelagsskattin, er hvørja støðu, ið lond hava til **útlendskar fløgur.** Tey flestu lond skatta alla inntøku hjá borgarum teirra, hvaðani hon er, og alla inntøku, sum vunnin verður innanlands, hvar tann, ið vunnið hana hevur, so býr.

Av hesum stendst ein dupultskatting, ið rakar bæði innlendskar eigarar í útlendskum partafeløgum og útlendskar eigarar í innlendskum partafeløgum. Í flestu londum ber heldur ikki til at sníkja seg undan hesi dupultskatting, við tað at partafeløgini hava skyldu at halda einum prosentparti av vinningsbýtinum eftir sum kelduskatt. Jú minni vekt, ið verður løgd á partafelagsskattin og jú størri vekt, ið verður løgd á skattin av vinningsbýti, jú størri verður problemið. Roynt verður at seta reglur fyri hesum skattabýti við dupultskattaavtalum. OECD hevur eisini gjørt eina fyrimynd fyri slíkar avtalur. Har verður roknað við, at heimlandið hjá partafelagnum kann halda 30% av vinningsbýtinum aftur sum fyribils kelduskatt frá innlendskum borgarum, men til útlendskar partaeigarar eiga í minsta lagi 15% at verða latin aftur (tó størri prosent fyri dóttirfelag), tí prinsippið er, at vinningsbýtið helst skal verða skattað í tí landinum, har partaeigarin býr.

Við endurgjaldsskipanini stendur ein serliga sterkt yvirfyri útlendskum partaeigarum, við tað, at endurgjald kann verða treytað av, at partaeigarin letur skatt í innlandinum. Henda treyt kann síðan verða linkað við dupultskattaavtalum.

V. Umsitingarkrøv til partafelagsskatt.

Tað, at tað eru færri partafeløg enn partaeigarar, ger at jú meira av skattaviðurskiftunum, ið verða avgreidd beinleiðis millum tað almenna og felagið, jú lættari er umsitingin. Umsitingarkravið talar fyri, at partafelagið letur skatt, at lætti fyri dupultskatt verður givin felagnum og ikki partaeigarunum, og at skattur av vinningshýti verður inngoldin av felagnum sum endaligur kelduskattur.

Verður endurgjald fyri partafelagsskattin latið partaeigarunum tala umsitingarligu sjónarmiðini (serliga eftirlitssjónarmiðið) fyri at partafelagsskatturin svarar til hægsta marskatt hjá persónum.

2. Partafelagsskatturin í Føroyum.

Í Føroyum verða felog skattað sum persónar, t.e. eisini eftir sama progressiva sliga (tó lata tey ikki fólkapensjónsgjald). Vinningsbýtið upp til 6% av partapeninginum kann dragast frá í skattskyldigu inntøkuni hjá felagnum. Hjá fiskivinnufeløgum er tó ikki neyðugt at útgjalda tey 6 prosentini.

Sambært dansk-føroyska dupultskattasáttmálanum fáa føroyingar endurgoldið tann danska 30% kelduskattin á vinningsbýtið, tá ið inntøkan verður skattað í Føroyum. Somuleiðis sleppa danskir partaeigarar í Føroyum undan at gjalda skatt í Føroyum av vinningsbýtinum. Í Føroyum er ikki kelduskattur av vinningsbýti. Vinningur við sølu av partabrøvum verður ikki skattaður, men frípartabrøv verða skattað hóast tað, at fáa eitt frípartabrev ikki í sjálvum sær merkir nakra øking í figgjarnegi móttakarans.

3. Partafelagsskattaskipanir í úttøndum yvirhøvur.

Reina klassiska skipanin uttan nakrau lætta fyri dupultskattingina verður brúkt í t.d. Australia, Danmørkini, Luxembourg, Hollandi, Spania og Sveits.

Klassisk skipan við lutvís dupultskattalætta, við at vinningsbýti innanfyri ávíst mark kann dragast frá í felagsins inntøku finst í Føroyum, Íslandi, Svøriki og Finnlandi.

Í øðrum londum verður eitt sindur av lætta givið partaeigarunum t.d. við at vinningsbýti upp til eina ávísa upphædd er skattafrítt t.d. í USA.

Skattaskipanir, ið fult og heilt gera av við allan dupultskatt finnast næstan ikki.

Í Grikkalandi sigst, at leir hava fullan skattalætta fyri felagið av øllum vinningsbýti.

I Canada og í Týsklandi hevur verið skotið upp at geva partaeigarunum fult endurgjald fyri tann skatt, ið felagið hevur latið av vinningsbýtinum, men í hvørgum landinum fekst politiskur meirluti fyri hesum.

I summum londum hava teir roynt at sleppa undan einum stórum parti av dupultskattinum við at veita felagnum lættan við eini «split-rate» skipan ella veita eigarunum lættan við eini endurgjaldsskipan.

I Týsklandi hava teir, sum fyrr nevnt eina «splitrate» skipan, men umhugsa at gera sum Ongland og fara yvir til eina endurgjaldsskipan, ið líkist tí fronsku ella belgisku. Eysturríki, og Japan hava skipan, ið minnir um ta týsku. Eftir fronsku endurgjaldsskipanini letur felagið ein partafelagsskatt uppá 50%. Restin kann verða útgoldin sum vinningsbýti, ið eigarin skal rokna upp í inntøku sína, men hevur hann rætt til endurgjald fyri tann partafelagsskattin, ið er goldin av vinningsbýti hansara. Hetta verður gjørt á tann hátt, at hesin partafelagsskattur (50% av vinningsbýtinum) verður lagdur afturat vinningsbýtinum í skattaskyldugu inntøku hansara, men verður mótroknaður í tí skatti, hann skal gjalda av sínu samlaðu innføku. Er endurgjaldið størri enn samlaði skatturin, fær hann munin útgoldnan.

Henda skipan gevur ikki fult endurgjald fyri partafelagsskattin.

Hvussu ið hesar skipanir virka er víst í skjølum til kap. VIII.

4. Serligar áhugaverdar reglur í einstøkum londum.

Nevnast kann at í **Noregi** hava teir loyst dupultskattaspurningin á ein serligan hátt: Felagið letur kommunuskatt av allari inntøku sini. Í skattainntøkuni til ríkið er vinningsbýtið loyvdur frádráttur. Eigararnir lata bert ríkisskatt av vinningsbýtinum, ikki kommunuskatt.

Frádráttur in fyri vinningsbýti til ríkið er bert avmarkaður til yvirskotið fyri tað árið. Herumframt er loyvdur ein lítil frádráttur fyri hurturavlegging í vinningsbýtisútjavningargrunn.

Í Íslandi kunnu teir umframt vinningsbýti eisini draga frá tað, sum lagt verður í lógfestan tiltaksgrunn. Hetta er til serligan fyrimun fyri nýstovnaði felløg.

í Svøriki er frádráttur fyri vinningsbýti bert loyvdur upp til 5% av partabrøvum, ið stava frá tíðini eftir lógarbroytingina í 1966.

Mesti skattalættin fyri partafeløg í Svøriki eru íløgugrunnarnir, ið skulu setast inn í peningastovnarnar og bert kunnu nýtast til íløgur, tá ið lítt almenna sigur til. Endamálið við hesum er at fáa eitt javnt íløgulag.

í Finlandi og Álandsøyggjunum kunnu 40% av útgoldnum vinningsbýti dragast frá í skattskyldugu inntoku felagsins. Vinningsbýti verður skattað sum vanlig inntøka hjá partaeigaranum. Nýggj feløg fáa 100% frádrátt fyri vinningsbýti fyrstu 5 árini.

í Danmørk hava teir í prinsippinum fullan dupultskatt, men lætt verður um hann á tann hátt, at partafelagsskatturin er nummandi lægri enn hægsti markskattur hjá persónum (36%, veruliga bert umleið 34%, móti 67%). Lata eigararnir inntøku partafelagsins verða stundandi í felagnum í nøkur ár fáa teir tí ein rættuliga nummandi **útsetingarfyrimun,** ið minkar nógv um tann veruliga dupultskattin.

í fleiri londum, eitt nú Bretlandi, USA og Týsklandi, eru smá «stongd» partafeløg og stór almenn partafeløg ikki skattað eins. Í Bretlandi vórðu tey smáu partafeløgini skattað sum fognarfeløg, t.v.s. úrslitið varð skattliga sæð býtt sundur millum partaeigararnar. Á henda hátt slapst undan dupultskatti, og skipanin varð samstundis neutral.

í Canada skjeyt hin sonnevnda «Carter-kommissiónin» (sí bókayvirlit nr. I.1.). upp at taka dupultskattin fullkomiliga av á ein hátt, ið skuldi uppfylla øll rættvísis- og neutraliletskrøv.

Teir góðkenna bert, at persónar kunnu bera skatt, og mela tí bert partafelagsskattin sum ein fyribilsskatt.

Skipan teirra er, áseltur verður ein partafelagsskattur uppá 50%, svarandi til hægsta markskatt av persónum sambært uppskot teirra til persónskatt.

Partaeigararnir fáa fult endurgjald fyri partafelagsskattin, tá ið inntøkan verður lutað teimum. So langt líkist skipanin eini vanligari endurgjalds-

skipan. Munurin er, at eftir teirra uppskoti er ikki neyðugt, at vinnings hýtið, ið verður lutað eigarunum, verður útgoldið til teirra. Felagið kann t.d. samtykkja, at allur vinningur felagsins aftaná skatt, skal útlutast men ikki útgjaldast. Allur bruttovinningur partafelagsins verður tá roknaður upp í persónligu inntøku eigaranna, sum fáa endurgjald fyri partafelagsskattin sambært skattaprosent teirra. Ein vælstandandi eigari, ið hevur ein markskatt uppá 45% fær 5 % aftur, ein pensionistur við einum markskatti uppá 20% fær 30% aftur.

Hendla skipan er neutral:

1) Ein fyritøka verður skatta eins, antin hon er skipað sum partafelag ella persónligt virki.
2) Partaeigararnir verða skattaðir eins, um teir figgja felagið við lántøku ella eginpeningi.
3) Inntøkan verður skattað eins, antin hon verður útgoldin til eigararnar ella spard upp í felagnum.

Skipanin er rættvís, við tað, at inntøka partaeigarans av partafelagnum verður tald upp í skattskyldign inntøku hansara og skattað við skattaprosenti hansara.

Útlendskir partaeigarar fáa skattaendurgjald, um so er at hetta verður avtalað við heimland teirra.

Vinningur við sølu av partabrøvum er vanlig skattskyldug inntøka, men ein upplrædd svarandi til tann part av inntøku felagsins, ið verður útlutaður og ikki útgoldin, verður løgd aftrat útveganarvirðinum hjá partabrævinum, so bert vinningur, ið ikki stavar frá skattaðari burturavlegging verður skattaður.

Skipanin er løtt at hava eftirlit við, við tað at partaeigararnir sjálvir hava áhuga fyri at uppgeva vinningshýti teirra, men hon krevur nakað væl av papptri, av tí at hvør einstakur partaeigari skal viðgerast sær.

5. Gongdin í partafelagsskattinum seinastu árini.

Broytingar í partafelagsskattinum hava verið til umlugsunar í mongum londum.

Tað, sum mest upptekur menn, er dupultskattaspurningurin, men tað tykist sum at ongin rættiliga hevur hug at avtaka dupultskattin heilt.

Helst man tað vera vandin fyri inntøkumissi, ið ger tað, men eisini politiskir trupulleikar gera seg galdandi. Tað hevur gingið striltið at sannføra vinstravong t.d. í týska javnaðarflokkinum um, at tað var rætlast at geva partacigarnm henda skattalætta.

I felagsmarknaðinum, EF, er ein tillaging av partafelagsskattinum eisini á skránni. Fyrsta stigið er at finna saman um eina felags skipan. Skattaprosentini koma í aðru røð.

Ongan veg er komið eru við at finna eina felags skipan.

Kommissiónin læt hollendska fíggjarfrøðingin Van der Tempel skriva eina ritgerð um, hvør skipan, ið mátti haldast at vera mest gagnlig út frá hugsjón EF's, um at lætta um kapitalflutningin landanna millum.

Hann ráddi til at brúka klassisku skipanina.

Tá ið nú bæði Týskland og Ongland hava gjørt av at fylgja Frankaríki og Belgiu, má haldast fyri vist, at endin verður, at EF-londini við tíðini øll fara yvir til hesa endurgjaldsskipan, ið ikki gevur partacigarnnum fult endurgjald.

6. Samandráttur.

Sum tað sæst av hesi gjøgtumgongd eru grundhugsanirnar undir partafelagsskattingini rættiliga ymiskar, og tey krøv, ið setast kunnu til skattaskipanina torfør at lúka samstundis. Hetta er helst orsøkin til, at partafelagsskattleggingin er so ymisk land úr landi. Tað kanadiska uppskotið, ið umrøtt er, tykist á ein greiðan háll at lúka bæði rættvísis- og neutralitetskrøvini. Hóast vaksandi áhuga fyri dupultskattaspurninginum (ið helst hevur samband við vøksturin í samlaða skattatrýstinum), sær tað út, sum at menn himprast við at avtaka dupultskattin heilt. EF-londini tykjast á veg ímóti eini endurgjaldsskipan, við lutvísari avtøku av dupultskattingini.

VII GJØGNUMGONGD AV GALDANDI FØROYSKA PARTAFELAGSSKATTINUM.

1. Inngangur.

I ti orðaskifti, ið verið hevur í Føroyum seinastu tíðina, hevur verið vist á ymiskar síður av føroysku partafelagsskattingini, ið verða hildnar at vera óhepnar. Sum tað sæst av undanfarnu kapitlunum er grund til at halda, at ein endurskoðan av hesi skattlegging kundi verið gagnlig.

Niðanfyri verður nomið við ymsar spurningar viðvíkjandi føroyska partafelagsskattingini.

Roynt verður at lýsa, á hvørjum økjum tørvur kundi verið fyri broytingum og møguleikarnir fyri ábótum .

Teir einstøku spurningarnir, ið nomið verður við, eru hesir:

a) Dupultskattur á vinningsbýti.
b) Tað, at partafelagini verða skattlagd eftir sama progressiva skattastiga sum persónar.
c) Samlaða skattatrýstið á inntøku frá partafelagum.
d) Misrumurin, ið verður gjørdur á vinningsbýti og rentu.
e) Fremur skattingin ein ynskiligan vinningspolitikk?
f) Fremur skattingin uppsparing og íløgur í felagunum?
g) Skatturin á frípartabrøvum.
h) Skattingin í sambandi við sølu av partabrøvum og likvidatión.
i) Skattleggingin av útlendskum partaeigarum í Føroyum.
j) Móður- og dótturfeløg
k) Sonløgufeløg verða skattað sum partafeløg.
l) Ójavnin í skattingini frá kommunu til kommunu.
m) Møguleikarnir fyri at nýta partafelagsskattingina í vinnulívspolitikkinum.

2. Viðgerð av teim einstøku spurningunum viðvíkjandi partafelagsskattingini.

a) Dupultskatturin á vinningsbýti.

Dupultskatturin er umrøddur í kapitul VI. Hann verður í flestu londum uppfataður sum eitt brek. Vert er tó at leggja til merkis, at í lond-

um við lágum skattaprosentum sum t.d. USA og Spania hevur lítið verið tosað um henda spurning.

Hetta hendir á, at tað meira er tað skattatrýstið, ið kemur fram, tá ið eitt høgt skattaprosent verður lagt omaná eitt annað høgt skattaprosent, enn sjálv tann formella dupultskattingin, ið skapar ónøgd.

Dupultskatturin gevur inntøku úr partafelagi verri viðferð enn persónligari inntøku og hevur tí lyndi til at fáa menn at lata vera við at gera partafeløg. Hetta er í stríð við tað í kapitli V umrødda kravið um neutralitet hesum viðvíkjandi. Summir halda, at skattaskipanin heldur átti at stuðla mannum til at skipa seg í partafeløg.

Hugsanin er m.a., at skattingin av vinnulívsinntøkum á henda hátt gerst einfaldari og at tað, at vinnulívið er skipað sum partafeløg, lættir um stýringina av samfelagsbúskapinum.

Verður hugt at, hvussu stórur dupultskattaspurningurin er í Føroyum, er fyrst at vísa á, at útseling av útgjalding av vinningsbýti sum nevnt í kap. VII, 1, b, gevur ein rentulætta og síðan at reglan um 6% frádrátt gevur vissar møguleikar fyri at sleppa undan dupultskatti. Um so var, at 6% av partapeninginum svaraðu til 6% av egnpeninginum, so hevði hesin frádráttur gjørt stóran mun. Hartil kann leggjast aftur-at, at tey fleslu føroysku partafeløgini eru smá og verða stýrd av nøkrum fáum høvuðspartacigarum, ið hava fult løgliga atgongd til at taka ein part av ágóðanum av felagnum út sum løn, provisjón o.t., ið kann deagast frá í inntøku felagsins og sleppa sostatt í stóran mun undan dupultskatti. Sum nú er, finst tó ein annar máti at sleppa undan dupultskatti, nevniliga, at lata vinningin standa í partafelagnum og at realisera henda vinning við sølu av partabrøvum, smbr. punkt **h**).

Rættvísis- og neutralitetskravið, at inntøka eigur at verða skattað eins, um hon verður vunnin í privatvirki ella í partafelag, **talar fyri at lætta um ella avtaka dupultskattin.**

Tað, sum omanfyri er nevnt um teir ójøvnu møguleikar, ið fáment og fjølment feløg hava fyri at komast undan dupultskattinum bera á sama borðið.

b) **Partafeløgini verða skattlagd eftir sama progressiva skattastiga sum persónar.**

Prinsippið um skatting eftir avlopsfíggjarmegi kann ikki flytast yvir á skatting av partafeløgum, við tað at tað fyri menniskju so avgerandi hugtakið «lívsminimum» ikki kann brúkast um juridiskar persónar. Sum dømi kann verða nevnt, at ein inntøka uppá 100.000 kr. er stór hjá einum persóni. Tað er hon eisini hjá einum lítlum partafelag, men hjá einum stórum partafelag kann hon lettliga roynast alt ov lítil.

Hesi sjónarmið tala fyri, at partafeløg verða skattløgd við proportionalum skatti.

Tó eigur at verða gjørt vart við, at **um ein slíkur proportionalskattur brýtur alt ov nógv av frá markskattinum fyri háinntøkufólk kann hetta geva óætlaðar flytingar frá persónligari inntøku til partafelagsinntøku.**

c) **Samlaða skattatrýstið á inntøku frá partafeløgum.**
Sum taldømini í kap. VIII vísa, er skattatrýstið á partafelagsinntøku hjá felagi og eigara tilsamans í Føroyum rættiliga stórt, sjálvt sammett við javnvágar markskattin á høgum persóninntøkum.

Hóast ta dupultskatting, ið víst er á omanfyri, kundi skjal VII A fingið ein at trúð, at dupultskatturin fyri árið 1972 helst bert hevði ávirkan fyri 4 feløg, men kann hetta eins vel vera partur av tí óhepnu ávirkan á atburði felagsins, ið eitt høgt skattatrýst hevur. Feløgini velja tí ikki at gjalda vinningsbýti útyvir 6% fyri at komast undan ti høga skattatrýstinum. Feløgini samla upp í felagnum og partaeigarin kann síðan fáa vinningin skattafrítt við sølu av partabrevunum.

Sum víst á í kapitli V eru grundir til at haldu, at eitt stórt skattatrýst kann fáa eina óhepna ávirkan á atburðin hjá feløgunum

Skjal VII A visir, at umleið 2/3 av øllum partafeløgum í Føroyum at kalla onga skattskylduga inntøku høvdu í 1972, at umleið 10% av feløgunum umboðaðu 50% av vinningsbýtinum og um 90% av partafelagsskattinum. 4 feløg (1½) umboða umleið 60% av vinningsbýtinum og 2 feløg (¾%) umboða umleið 70% av partafelagsskattinum. Sostatt eru tað bert nøkur fá feløg, ið bera at kalla allan skattin. Ynskiligari var, at fleiri feløg høvdu ein vinning at skatta av.

d) **Mismunur verður gjørdur á vinningsbýti og rentu.**

Umfram dupultskattin, sum umrøddur er frammanfyri er eitt aftrat, ið ger menn ónøgdar, nevnliga tann mannamunur, ið gjørdur verður í skattingini av rentum av bankabók og vinningsbýti frá partafeløgum.

Sum áður vist á, so verður ein rentuinntøka uppá 4% (vanlig bankabók) skattað við ½%, svarandi til 1/8 = 12,5%, og ein rentuinntøka uppá 8% (1 árs uppsøgn) við ½%, svarandi til 1/16 = 6,25% av rentuinntøkuni.

Inntøka av vinningsbýti verður skattað við markskattinum, ið kann røkka uppá nøkur og níti %, sum tá, ið skattafrádrátturin virkar, førir til ein javnvágarmarkskatt uppá kanska 40—48%.

Hesin munur er ikki bert órættvísur, men fremur passiva uppsparing fram um aktiva íløgu og samsvarar tí heldur ikki við tey búskaparligu endamál, ið skattaskipanin sum aðrastaðni nevnt eisini eigur at tarna.

Spurningurin er síðani, hvussu hetta kann fáast í rættlag.

Ein nærliggjandi møguleiki er at seta skattin á vinningsbýti líka so langt niður sum á rentu.

Skatturin á vinningsbýti skal so vera ½%, men av hvørjum?

Tað, sum fyrst dettur einum í huga, er partapeningurin. Hetta er tó bert problemleyst, um partabrævið stendur í parikursi. Hevur skattaborgarin keypt partabrævið fyri kurs 1000, so svarar ½% av partapeninginum bert til ½‰ av tí peningi, ið maðurin hevur sett í partabrævið, og skatturin av einum vinningsbýti, ið svarar til 8% av kursvirðinum, verður tí bert ein tíggjundapartur av rentuskattinum av bankabók. Tað skattaprosentið uppá 6,25%, ið nevnt varð frammanundan verður tá til 0,625%.

Skal skatturin svara til bankarentuskattin, eigur hann sostatt at vera ½% av verulígu íløgunni, t.e. av kursvirðinum ella interna virðinum. At finna sanna interna virðið av einum partabrævið, t.e. tann partin av eginpeningi felagsins, ið partabrævacigarin eigur, er torført.

Um vit nú hugsa okkum, at hesin spurningur kortini kann loysast, so uppstendur ein annar spurningur.

Bankarentan liggur vanliga millum áðurnevndu 4 og 8%. Tað er peningamarknaðurin sum slíkur, ið ásetir hesa rentuhædd og ikki spararin sjálvur.

Annarleiðis er við partabrævaeigaranum. Hann er sum aðalfundarloltakari við til sjálvur at áseta hvussu høgt vinningsbýtið skal vera. Jú størri partaeigari hann er, jú størri vald hevur hann at gera hetta.

Hetta merkir, at meðan skattafyrimunurin av rentuskattinum kann avmarkast til eini 30-40% av 4-8% av einum veruligum peningainnskoti, so er onki mark fyri, hvussu nógv av sínu inntøku, ið ein sterkur partaeigari kann velja at fáa útgoldið sum vinningsbýti úr einum partafelag við lítlum eginpeningi á pappírinum.

Hetta kundi tó lutvist verið bøtt um við at avmarka tann partin av vinningsbýtinum, ið kundi fingið skattalætta til eitt prosent, ið samsvarar við vanligt bankarentuprosent og kanska eisini til ein ávísan part av skattskylduga vinningi partafelagsins.

Áðrenn hildið verður fram við hesum, eiga vit tó at steðga á og spyrja, um tað er beint at ganga út frá tí núverandi rentuskattinum og royna at laga skattin av vinningsbýti eftir honum.

Sum víst er á aðrastaðni í hesi frágreiðing er rentuskatturin, sum nú er, eitt álvarsamt avvik frá góðum skattleggingarprinsippum. Eisini sæð úr búskaparpolitiskum sjónarmiði er orsøk til at ivast í, um hesin stóri studningur til passiva uppsparing, er kostnaðin verður. Hinvegin má sigast, at tað at uppkrevja rentuskatt sum endaligan kelduskatt er ein stórur umsitingarligur fyrimunur.

Eisini viðvíkjandi vinningsbýti og rentu av føroyskum lánsbrevum hevði ein endaligur kelduskattur verið ein umsitingarligur fyrimunur.

Treytað av, at rentuskatturin verður ajourførður, so at mismunurin imillum skatt av rentu og av aðrari inntøku fellur burtur ella minkar munandi kann sigast, at grundir eru,ið tala fyri at umhugsa ein felags endaligan kelduskatt fyri bæði bankarentu, lánsbrævarentu og vinningsbýti.

c) **Fremur skattingin ein ynskiligan vinningsbýtispolitikk?**

Her verður hugsað um, hvørt skattleggingin fær feløgini til at føra ein vinningsbýtispolitikk,ið hvørki er so stórtøkin, at hann tarnar uppsparingini í felagnum, ella so kargur, at fólk flest missa hugin at seta peningin í partabrøv.

6% frádrátturin gevur feløgunum hug at reka ein javnan vinningsbýtispolitikk. [1])

Spurningurin er síðan, um hesi 6% eru hóskandi. Hesin spurningur kann býtast í tvey:
a) Er 6% eitt hóskandi tal?
b) Er tað grundarlagið,ið tey 6 prosentini verða tikin av, hóskandi?

Viðvíkjandi a) er at siga, at rímligt er at samanbera hetta vinningsbýti við bankarentu.

Her kann annaðhvørt verða hugsað um ta innlánsrentu,ið partaeigarin kundi fingið, um hann setti peningin á bók, ella ta útlánsrentu,ið felagið sparir við at víðka partapeningin heldur enn at læna úr bankanum.

Krav**ið** um neutralitet millum figgjarkeldur felagsins talar fyri at leggja útlánsrentuna til grund, meðan kravið um neutralitet millum inntøkukeldurnar hjá almenninginum talar fyri innlánsrentuni.

Tað, at risiko er knýtt til ogn av partabrævi talar fyri at vinningsbýtið eigur at verða sett hægri enn bankarentan. Hinvegin kann tað, at

[1]) Sí skjaltatvu VII A.

partacigarin umfram vinningsbýtið eisini fær ognarrættin til burturavleggingar felagsins kortini fora til, at hann verður nøgdur við eitt vinningsbýti, ið er minni enn imlánsrentan.
Sammanhildið kann sigast, at ógjørligt er at siga, at júst 6%, ið svara til eina meðalimlánsrentu, er tað rætta vinningsbýtið, meðan ein frádráttur, ið svarar til meðalrentuna, samsvarar ið hvussu er við neutralitetskravið.

Viðvíkjandi b) er at siga, at lánn peningur, ið bundin er í felagnum og skal rentast, bert í undantaksførum svarar til partapeningin.

Í einum eldri og væl konsolideraðum felag er egnpeningurin væl størri enn partapeningurin, og 6% av partapeninginum svara tí til nógv færri prosent av egnpeninginum. Tað, at fripartabrøv verða skattað sum inntøka hjá partacigarunum, ger, at ein vøkstur í egnpeninginum sjáldan forir til eina uppskriving av partapeninginum.

Verða 6% í vinningsbýti hildin at vera rímilig, má sigast at ein frádráttur, ið svarar til 6% av partapeninginum er ov strangur ímóti hesum felløgum.

Eisini kann verða viðmerkt, at í felogum við stórum avskrivingum, ið gera bókførda egnpeningin sambært skattarokniskapin lítlan, kann verða spurt, um tað er rætt og rimligt, at feløgini skattafrítt kunnu útgjalda eitt vinningsbýti, ið er 6% av einum tali, ið er størri enn tatur egnpeningur, ið sæst av skattarokniskapinum.

Hesi viðurskifti kunnu tala fyri at prosentfrádrátturin ikki átti at verið roknaður av partapeninginum, men av skattskyldugu bókaða egnpeninginum.

At enda kann verða lagt aftarat, at ein hóskandi vinningsbýtispolitikkur bert er ein av mongum fortreytum fyri, at fólk fáa hug at seta sparing teirra í partabrøv.

f) **Fremur skattingin uppsparing og íløgur í felløgunum?**

Sum nevnt undir e) er skattatrýstið á tí partinum av inntøkuni, ið verður standandi felløgunum heldur hart, og hetta kann minka um hugin til at vísa eitt yvirskot, ið kann verða lagt til síðis sum opinber konsolidering. Tó eru møguleikar fyri burturavseting til íløgugrunn (og til klassingargrunn fyri skip).

Hinvegin er at siga, at avskrivingarreglurnar geva rettiliga rúmar møguleikar fyri ósjónligari konsolidering, serliga í vinnum við langlívaðum rakstrargøgnum, sum t.d. sjóvinnuni.

Eitt uppsparingarfremjandi tiltak, ið kundi hugsast, er at geva felagnum loyvi til frádrátt fyri tann part av vinninginum, ið settur verður í serligan konjunkturgrunn.

Frádrátturin fyri vinningsbýti uppá 6% av partapeninginum má sigast at vera ein so mikið mátahildin stuðul til at útluta vinningsbýti, at hann ikki skuldi verið nakar vandi fyri konsolideringini.

g) **Skatturin á fripartabrøvum.**

Fripartabrøv verða skattað sum inntøka, hóast tað, at eitt fripartabrev ikki í sær sjálvum ger partaeigarin ríkari, men er ein bókhaldsteknisk flyting frá eini tiltakskonto til partabrevakonto. Um tann virðisvøksturin í felagnum, ið helst liggur aftanfyri útgávuna av fripartabrøvum, skal skattast, er ongin grund til at gera hetta í sambandi við sjálva fripartabrevútgávuna.

Halda vit fast um tað sjónarmið, at vøkstur í figgjarmegi hins einstaka ikki skal skattast fyrr enn hann verður realiseraður, eigur tann omanfyri nevnda skattingin at biða inntil partabrevið verður selt ella felagið likviderað.

h) **Skattingin í samband við sølu av partabrøvum og likvidatión.**

Tann virðisvøkstur í partafelagnum, ið ikki verður útlutaður sum vinningsbýti, kemur fram, annaðhvørt tá ið partabrøvini verða seld ella tá ið felagið verður avtikið.

Verður hesin virðisvøkstur realiseraður við avtøku verður hann eftir galdandi reglum skattaður sum inntøka, men verður hann realiseraður við sølu av partabrøvunum er hann skattafrium. Tann upphæddin, ið roknað verður sum inntøka við avtøku er munturin ímillum tað, sum útgoldið verður og útveganarvirðið á partabrevinum.

At hesin virðisvøkstur verður skattaður, er bæði rætt og rímligt. **At virðisvøksturin bert verður skattaður við avtøku, men ikki við sølu tykist løgið og má haldast at vera eitt rættiliga álvarsamt «hol» í skattleggingini.** Sum tað sæst niðanfyri er eitt og annað, ið bendir á, at

skuldi munur verið gjørdur, varð lað úrtøkan við avtøku, ið átti at verið skattað mildari.

Tá ið talan er um skatting av áðurnevnda virðisvøkstri kann verða viðmerkt, at ynskið um at avtaka alla dupultskatting av partafelagsinntøku talar ímóti at skatta tann virðisvøkstur, ið stavar frá uppsparing av tí inntøku, ið longu einaferð er skattað í felagnum. Til hetta er at siga, at í fyrsta lagi er ikki vist, at dupultskattingin skal verða avtikin fullkomiliga, í øðrum lagi má tað vera ein treyt, at skattingin í partafelagnum hevur verið nóg høg til, at ein kann meta inntøkuna at vera skattaða fult út, tá ið partafelagsskattur er goldin av henni. I triðja lagi eru eisini aðrar orsøkir til slíkan virðisvøkstur enn uppsparing av skattaðari inntøku, t.d. prísvøkstur, good-will og know-how.

Verður felagið avtikið, ber til at gera vøksturin upp og greina út, hvussu stórur partur av honum, ið stavar ávikavist frá uppsparing (ið ikki skal skattast) og frá prísvøkstri, good-will, know-how o.t., ið rímiligt er at skatta.

Verður virðisvøksturin konstateraður við sølu av partabrøvum, meðan felagið er í gongd, ber als ikki til at gera omanfyri nevndu uppbýting. Valið stendur tá ímillum at skatta alt ella onki. Ein meting av, hvat ið rætt og rímiligt er, førir til, at ein persónur, ið keypir eitt partabrævv og síðani selur tað aftur við vinningi, verður skattaður av hesum vinningi.

Sum sagt er frammanfyri, eigur virðisvøkstur, ið verður konstateraður við sølu av partabrøvum ella avtøku av partafelagnum, at verða roknaður sum skattskyldug inntøka. Kemur vinningurin fram við sølu, eigur hann at verða skattaður fult út. Sum nevnt kundu prinsipiellar grundir talað fyri at skatta úrtøku við likvidatión eitt sindur øðrvísi, men trupulleikarnir við at skilja ímillum keldurnar til virðisvøksturin og ynskið um eina skipan, ið er løtt at umsita, tala fyri, at skatturin verður roknaður eins í báðum førum.

Á sama hátt eiga tap at kunna dragast frá.

Um so er, at vinningurin ikki verður roknaður upp í persónligu inntøkuna, men verður skattlagdur við serligum kapitalvinningsskatti, ið er lægri, eigur atgongdin til at draga tap frá at vera avmarkað samsvarandi.

i) **Skattleggingin av útlendskum partaeigarum í Føroyum.**

Ein partur av føroyskum partafeløgunum er heilt ella lutvíst á útlendskum, mest donskum hondum. Dømi um hetta eru ammar bankin, oljufeløgini og einstakar heilsølur.

Nakað av útlendskum (donskum) partabrøvum er á føroyskum hondum.

Teir donsku partaeigararnir í føroyskum feløgum lata bert skatt í Danmark av vinningsbýti teirra.

Teir føroysku partaeigararnir í donskum feløgum skulu skattast í Føroyum av hesi inntøku, men 30 prosent av vinningsbýtinum verða uppkravd í Danmark sum kelduskattur (kupongskattur). Hesin kelduskattur verður tó endurgoldin fult út, um føroyski skattaborgarin prógvar, at hann er skattlagdur í Føroyum av hesi inntøku.

Tað er ikki greitt, um politiski viljin er til at fremja útlendskar íløgur í føroysk partabrøv ella um hildið verður rættast at avmarka tey, men haldast má, at tað ikki er eitt politiskt endamál at føroyingar í størri mál flyta pening av landinum og seta hann í dansk partabrøv.

Mælt verður fí til, at um so er, at ein kelduskattur á vinningsbýti verður gjøgnumførdur, so verða samráðingar tiknar upp við Danmark um broyting í dupultskattaavtalunni, so ein upphædd svarandi til mestamarkið hjá OECD, 15%, verða afturhildin í Føroyum og ikki endurgoldin donsku partaeigarunum og tilsvarandi sjálvsagt fyri føroyskar eigarar av donsku partabrøvunum.

Partaeigararnir líða neyvan nakað tap av hesum, við tað at tey 15%, ið teir donsku partaeigararnir ikki fáa endurgoldið úr Føroyum kann mótroknast í skatti teirra í Danmark, ið helst man liggja omanfyri 15%.

Á sama hátt verða føroysku myndugleikarnir noyddir at mótrokna tey 15%, ið danir ikki endurgjalda, í føroyska skattinum.

Av tí at donsku interessurnar í føroyskum partafeløgum eru størri enn føroysku interessurnar í donskum feløgum, verða føroysku skattamyndugleikarnir at fáa eina inntøkuøking burtur úr hesi broyling.

Útlendskar fyritøkur, ið hava deild í **Føroyum**, kunnu annaðhvørt hava hana sum «úthandil» ella sum partafelag (dótturfelag). Ein úthandil verður skattlagdur sum ein serstøk fyritøka. Verður úthandilin umskipaður til partafelag, skal partafelagið lata skatt, men tað vinningsbýtið, ið móðurfelagið tekur út, verður ikki skattað í Føroyum. Sum nú er, er tað tí ein fyrimunur fyri føroysku skattamyndugleikarnar, at úthandlarnir ikki verða skipaðir sum partafeløg. **Ynskiligt hevði verið, um skatturin var tann sami í báðum førum.**

j) **Móður- og dótturfeløg.**

Eftir tí skattaskipan, ið er galdandi í Føroyum í dag, verður vinningsbýtisinntøka millum feløg skattað í øllum liðum, t.v.s. fyrst hjá dóttur, so hjá móður og endaliga hjá partaeigara.

Hetta førir við sær, at skattleggingin kann hava avgerandi týdning í valinum av, hvussu feløg skulu skipast.

Eitt av aðalkrøvunum til eina skynsama skattlegging er, at hon skal vera neutral. Roynt eigur at verða at uppfylla hetta krav, utlan so at góðar grundir eru fyri at víkja frá hesum kravi.

Tað tykist ikki at vera nøkur ávís grund ella politiskt fyribrigdi, ið er orsøkin til, at vinningsbýti millum feløg her á landi verður skattað uttan mun til, hvussu nógv lið hetta sama vinningsbýti skal igjøgnum, og má tí haldast, at hetta er ein skeivleiki sum er komin av tilvild heldur enn grundað á serligar fyritreytir (6% frádrátturin fyri vinningsbýti lettir um skeivleikan). Tað kunnu vera rationellar grundir til at skipa feløg sum lið í eini konsern og tykist eingin verulig grund vera fyri at straffa henda skipanarhátt.

Spurningurin um skatting av vinningsbýti millum feløg verður vanliga loystur á tveir ymiskar mátar land úr landi, alt eftir um tann einstaka skipanin góðtekur hugtakið um at avtaka dupultskatting ella ikki.

a) Tey lond sum ikki vilja avtaka dupultskattin, men lætta um dupultskattingina, sum t.d. Danmark og U.S.A. velja loysnir, sum byggja á eina definition um, nær eitt felag er eitt dótturfelag, og so kunnu feløgini undir ávísum treytum loysa spurningin tveir vegir:

1) Er felagið eitt dótturfelag, men t.d. 75% av partabrøvunum eru á øðrum hondum, so fær móðurfelagið ein skattalætta, ið svarar til

tann partin av skattinum í móðurfelagnum, sum kann førast til inntøkuna frá dóttirfelagnum, tó ongantíð meira enn tað, sum svarar til tann goldna skattin í dóttirfelagnum.

2) Eigur móðurfelagið øll partabrøvini í dóttirfelagnum ella felagnunum (rein konsern) so kunnu felagini undir ávísum fyritreytum skattasi saman.

b) Tey lond, sum góðtaka hugtakið um at lætta mest møguligt um dupultskattin, loysa spurningin á tann hátt, at um felagini ikki verða skattað saman, so verður ein á conto skattur goldin í dóttirfelagnum og annaðhvørt verður vinningsbýtið frá dóttirfelag ikki tikið við í skattskyldugu inntøku móðurfelagsins, ella fær móðurfelagið ein lætta av vinningsbýtisinntøkum uttan mun til, um hetta felag eigur ein stórran ella lítlan part av partabrøvunum í tí felagnum, sum gav vinningsbýti.

Henda seinra loysnin samsvarar best við tey sjónarmið, sum framsett eru frammanfyri, um at skattleggingin um gjørligt, skal vera neutral og sostatt ikki ávirka, hvussu vinnulívið verður skipað.

Tað tykist at verða gongd leið at broyta føroyska skipanina á henda hátt, uttan so at hugsanin er, at tess oftari ein ávís inntøka verður skattað, tess betur. Fyritreytin fyri eini slíkari broyting er helst, at partafelags-skatturin verður broyttur til ein proportional-skatt uttan skattafrádrát.

Verður frádráturin fyri vinningsbýti at standa við, eigur hesin partur av vinningsbýtinum at verða skattaður hjá tí felag, ið fær ágóðan.

Inntøkur frá deildum av partafeløgum og dóttirfeløgum í útlandinum verða sum er, skattaðar við fullum skatti, uttan mun til um hesar deildir ella feløg eisini verða skattað í útlandinum.

Er ynski um at lætta dupultskattin av sovorðnum inntøkum, kann hetta gerast við eini reglu um, at felagið, ið fær ágóðan, fær ein skattalætta, sum svarar til skattin av inntøkuni frá hesum deildum ella feløgum, tó ongantíð meira enn svarandi til tann skatt, ið er goldin í útlandinum av hesum inntøkum.

Ein slík broyting hevði skapað størri javnvág millum íleggingar heima í Føroyum og í útlandinum og kundi sostatt ført við sær, at íleggingar í útlandinum nú gjørdust meira lønandi enn áður. Útlendskar íløgur viðu sostatt verið meira kappingarførar enn áður, og kundi broyt-

ingin fört til, at minni varð gjørt av fleggingum í Føroyum enn, um ein slik broyting ikki varð gjørd.

k) **Samløgufeløg og onnur feløg.**

Samløgufeløg (kommanditfeløg) verða, sum er, skattað sum partafeløg. Broytingar í skattingini av partafeløgum eiga sostatt eisini at galda fyri hesi feløg.

Keypsamtøkur og **sølufeløg** verða ikki skattað sambært galdandi skattalóg. Tað er vert at umhugsa, um hetta framvegis eigur at vera so. Flest øll lond skatta hesi feløg við einum føstum prosenti, antin av ognarvirðinum ella av søluvirðinum.

l) **Ójavni í skattingini frá kommunu til kommunu.**

Sum nú er, lata partafeløgini vanligan landsskatt og vanligan kommunuskatt. Eitt partafelag við heimstaði í eini «dýrari» kommunu fær tí eitt hægri skattalrýst enn eitt felag, ið býr í eini «bíligari» kommunu.

Teir faktorar, ið gera av um ein kommuna er bílig ella dýr, hava sjáldan nakað við virkini ella partafeløgini í kommununi at gera.

Av hesum orsøkum og fyri at tryggja sær, at ójavni í kommunuskatti ikki fær ávirkan á hvar, ið partafeløgini leita sær heimstað, kundi skipanin verið broytt og gjørd einfaldari, soleiðis at partafelagsskatturin varð eins fyri alt landið og at skatturin varð uppkravdur av gjaldstovuni, ið læt eitt ávist prosent, ið var eins fyri allar kommunur, til kommununurnar.

Halda menn, at kommununurnar við høgum skattaprosenti eiga at fáa luttfalsliga meir enn hinar, so ber hetta eisini til.

Leggjast kann aftrat, at hevur ein kommuna serstakliga stórar útreiðslur í samband við eitt virki í kommununi, ber til at bøta um hetta við ymsum avgjøldum.

m) **Møguleikarnir fyri at nýta partafelagsskattingina í vinnulívspolitikkinum.**

Sum tað skilst av hesum og undanfarnum kapittlum er nógv í núverandi føroyska partafelagsskattingini, ið ger, at hon mótvirkar vanliga góðtiknum búskaparpolitiskum endamálum.

At avtaka ella minka um dupultskattin, ikki skatta aktiva ognarinntøku harðari enn passiva, ikki forða virkjum í at skipa seg í konsernlíki, um tey halda tað verða skynsamt o.s.fr. fær eisini skattingina at samríma betur við ynskið um búskaparligan framburð.

Harumframt er eisini møguligt at stuðla vinnulívinum íggjøgnum t.e. mildan skatt á burturavleggingum í feløgunum, møguleikum fyri avseting í grunnar o.s.fr. Tá skal bert ansast eftir, at ynskið um at stuðla vinnulívinum ikki gongur alt ov harðliga út yvir hini endamálini við skattleggingini.

Er ætlanin ikki bert at stuðla vinnulívinum sum heild, men eisini at fremja summar vinnugreinar meira enn aðrar, er tó neyðugt at nýta onnur meira heinrakin amboð umframt.

3. Niðurstøða.

Henda gjøgnumgongd bendir á, at til ber at bøta nummandi um føroyska partafelags skattleggingina.

Tað tykist gagnligt at minka um ella avtaka dupultskattin, at gera partafelagsskattin (antin hann verður mettur at vera endaligur ella fyribils) proportionalan, seta samlaða skattatrýstið á partafelagsinntøku niður á somu hædd sum á inntøku í persónligum virki, minka um ella avtaka mismunin íntillum vinningsbýti og rentur, framvegis at stuðla til ein javnan og hóvligan vinningsbýtispolitikk, men gera tað á ein meira skynsamari hátt enn nú, og møguliga í eitt vist mál stuðla til uppsparing og íløgur í feløgunum við lægri skatti á burturavlagda felagsvinninginum. Skatturin á fripartabrøvum er ikki skynsandliga grundaður. Vinningur við sølu av partabrøvum eigur at verða skattaður minst líka so hart sum úr-

tøkan við likvidatión, ið tó kanska ikki átti at verið skattað fult út sum nú. Royni eigur at verða at skatta vinningsbýti útlendinga í føroyskum partafeløgum heilt ella lutvist. Inntøka hjá dótturfelag eigur ikki at verða skattað bæði hjá dóttur- og móðurfelag. At samløgufeløg verða skattað sum partafeløg kann forsvarast við, at ábyrgdin er avmarkað í báðum førum. Grundir eru, ið tala fyri at hava sama partafelagsskatt um alt landið. Nakrir av teim umrøddu broytingunum hava reint skattligar grundir, men tær flestu høvdu samstundis eisini gjørt partafelagsskattin meira framburðsfremjandi. Harumframt eru ávísir møguleikar fyri beinleiðis vinnulívsstudningum ígjøgnum t.e. ein mildan skatt á felagssparing, men slíkir møguleikar eiga at verða nýttir varliga. Til at ávirka sjálva vinnulívssamansetingina er tó brúk fyri øðrum amboðum aftrat.

Í kapitli VIII verður farið í holt við at meta um, hvussu nakrar hugsaðar partafelagsskipanir kundu hugsast at bøtt um tey omanfyri umrøddu viðurskiftini.

SKJAL VII A

YVIRLIT YVIR PARTAFELAGSSKATT FYRI ÁRIÐ 1972.

(1.000 kr.)

Nettoinntøkur	Nettoinntøka áðrenn skattafrádrátt	Goldin ella roknaður skattur	% av inntøku	Vinningsbýti	% av partapeningi	Partapeningur	Tal á p/f
kr. upp til 0	+ 4.112	125		165	0,8	21.462	120
kr. 0 - 25.000	792	136	17,1	237	1,0	12.207	90
kr. 25.000 - 100.000	2.829	826	29,1	191	2,8	6.662	43
kr. 100.001 - 300.000	3.645	1.441	39,5	801	5,0	16.102	22
kr. 300.001 - og hægri	18.333	9.684	52,8	1.192	9,7	12.350	9
	21.487	12.212	47,7	2.586	3,8	68.783	284

Ein kanning av teimum felogum, sum eru innanfyri teir tveir hægstu inntøkubótkarnar omanfyri vísir, at bert 4 felog hava goldið vinningsbýti útyvir tey 6% sum frádráttur er fyri.

Møguligar nýskipanir fyri skatting av føroyskum partafeløgum.

1. Hvørji krøv eiga at verða sett til partafelagsskattin í Føroyum í dag?

Í kapitli VI er víst á nakrar prinsippspurningar viðvíkjandi partafelagsskatti yvirhøvur, og í kap. VII er víst á serligar spurningar viðvíkjandi nógaldandi føroysku skipan.

Uppgávan er nú at finna hvørjar av teimum skipanum, ið umrøddar vórðu í kapitli VI, sum bæði virða tey prinsippkrøv, ið sett vórðu upp í kapitlinum II og VI, og sum bøta mest møguligt um teir vansar, ið umrøddir eru í kapitli VII.

Í kapitli II varð vístá tey 4 aðalkrøvini til eina skynsamu skattaskipan, nevnliga, at hon skuldi vera:

1) rættvís,
2) greið,
3) løtt at umsita,
4) samsvara við búskaparlig endamál.

Tey búskaparliga málini av týðningi í hesum viðfangi eru fyrst og fremst ynskini um økta uppsparing, og at ein størri partur av uppsparingini verður settur í vinnulívið sum risikofúsur kapitalur.

Heldur enn at leggja dent á serstøk búskaparlig mál, kann ein leggja dent á kravið um **neutralitet,** sum nevnt varð í kapitli VI, so innløka verður skattað eins, um hon verður vunnin íggjøgnum partafelag ella í persónligari fyriløku, og skattað eins hjá felagnum antin hon verður verður spard upp í felagnum ella útgoldin sum vinningsbýti, eins og felagið eigur at verða sett javnt antin tað fíggjar íløgurnar við lánum ella egimpeningi.

Ein høvuðsspurningur er, um ein vil hava fulla dupultskatting, lætta um hana sum nú ella á annan háti, ella avtaka hana heilt.

Antin ein ynskir neutralitet millum ognarinntøkur ella at stuðla aktivum íløgum fram um passiva uppsparing, er vert at ansa eftir, at vinningshýti ikki verður skattað harðari enn hinar ognarinntøkurnar sum t.d. bankarenta.

Fyri at uppfylla kravið um, at skattingin skal vera greið, er roknað við, at skattafrádráttarreglan er tikin burtur í møguligum nýskipanum.

2. Hvussu væl uppfylla ymiskar skipanir krøvini?

Í skjali VIII A verður gjørd ein lýsing av, hvussu tær mest kendu partafelagsskattaskipanirnar virka undir føroyskum viðurskiftum.

Í skjalinum verður fyrst gjørd ein samanbering ímillum hesar skipanir (sb. talvu 1):

1) Traditionell, uttan frádrátt,
2) Galdandi føroyska skipan,
3) «Split-rate» - skipan,
4) Rein frádráttarskipan,
5) Rein endurgjaldsskipan,
6) Fronsk endurgjaldsskipan.

Av talvu 1 í skjalinum skilst, hvussu hesar skipanir virka, og vist verður hvussu tær virka viðvíkjandi:

a) Hvussu stórur skatturin verður tilsamans,
b) Hvussu nógv, ið verður eftir í partafelagnum,
c) Hvussu nógv, ið verður eftir hjá eigarum og felagi tilsamans, og
d) Maximala trýstið, táið allur vinningur verður hýttur út.

Á talvu 2 er á sama hátt roynt at samanbera nakrar hugsaðar føroyskar nýskipanir við ta núgaldandi.

Nr. 1. er galdandi skipan.
Nr. 2. er ein skipan, ið skattar partafelagsins inntøku ájavnt við hægsta persónskatt, men vinningsbýti við ½% svarandi til núgaldandi rentuskatt.
Nr. 3. skattar partafelagið lágt, við 25%, men vinningsbýti við einum 40% kupongskatti svarandi til markskattin hjá vanligum føroyskum háinntøkum.
Nr. 4. skattar hæði partafelagsinntøku og vinningsbýti við 35%.
Nr. 5. Kanadiska skipanin við partafelagsskatti uppá 40%.

Allar hesar skipanir uttan kanadiska skipanin loyva frádrátt fyri vinningsbýti upp til 6% av antin partapeningi ella eginpeningi. Allar uttan tann núverandi føroyska skatta vinning við sølu av partabrøvum.

Fyri at meta um, hvussu væl, ið hesar skipanir uppfylla tey krøv, ið sett eru, er spurnarskjalið á talvu 3 sett upp.

Úrslitið av hesari meting er, sb. skjal A, Tann reina klassiska skip-

anin við fullum skattatrýsti, bæði á felagi og á vinningsbýtismóttakara og uttan nakran dupultskattalætta verður her vrakað, av tí, at hon hevur eitt óhóskandi stórt samlað skattatrýst, ikki stimbrar felagsuppsparingini á annan hátt enn við at dupultskatta vinningsbýti, og sostatt fær fólk at lata vera við at seta sparipening í partabrav.

Tann **galdandi føroyska skipanin** hevur nógv brek, sum ávist varð longu í kapitli VII, og spurnarskjalið her á sama borðið. Millum annað lýkur hon ikki eitt av aðalkrøvunum, nevniliga kravið um rímiliga skatting t.e. at ongin inntøka skal kunna sleppa munandi bíligari enn svarandi til meðalskattatrýstið á persónum (umleið 30%). Hetta kemst av, at tað sum nú er, er møguligt at fáa partafelagsinntøkuna út sum søluvinning, ið als ikki verður skattaður. Harumfram eru nógv onnur brek, ið umrødd eru í kapitli VII.

«Split-rate»-skipanin er, sum tað sæst av skjalinum, heldur ikki serliga góð.

Reina frádráttarskipanin hevur fleiri fyrimunir. Hon teknr allan dupultskatt burt, men fremur ikki uppsparing og íløgur í felagnum.

Reina endurgjaldsskipanin hevur somu fyrimunir og brek. Harafturat hevur hon tað brek, at hon krevur meira av umsiting enn hin.

Tann franska endurgjaldsskipanin gevur bert lutvísl endurgjald, og tarnar tí ikki uppsparingini so nógv sum hin. Hetta ger hana samstundis minni greiða. Umsitingarkrøvini eru tey somu.

«½%-skipanin» hevur tann vansa, at eitt inntøkuslag, nevniliga vinningsbýti, nú sleppur nógv bíligari í skatti enn aðrar inntøkur. Hesin vansi kundi tó verið avmarkaður, um ongin frádráttur var fyri vinningsbýti. Ein høgur skattur á sjálvari partafelagsinntøkuni hevði tryggjað eitt hóskandi samlað skattatrýst, men stimbrar ikki uppsparing í felagnum.

Skipan við serliga lágum skatti á sjálvum partafelagnum (25% á p/f, 40% á vinningsbýti). Henda skipan uppfyllir **ikki** kravið um rímiliga skatting, við tað at tann uppsparda partafelagsinntøkan sleppur undan einum meðalskatti. Hon gevur stóran stuðul til uppsparing í felagnum.

Skipan við meðalskattatrýsti bæði á partafelag og vinningsbýti (35%/35%). Hon uppfyllir í høvuðsdráttum tey krøv, ið eru sett her, serliga um so er, at renta verður skattað við sama prosenti sum vinn-

ingsbýti. Hon hevur endaligan kupongskatt, ið er lættur at umsita. Lætt er munandi um dupultskattin í fyrsta lagi við frádrátti og í øðrum lagi við, at bæði partafelags- og vinningsbýtisskattur liggja niðanfyri markskattin á háimtøkum (sum gevur ein útselingarfyrimun til ta inntøku, ið spard verður upp í felagnum).

Kanadisk endurgjaldsskipan. Henda skipan uppfyllir øll rættvísis- og neutralitetskrøv. Munurin á hesari skipan og tí «reinu endurgjaldsskipanini» er, at her er ikki neyðugt at gjalda vinningsbýtið út fyri at fán endurgjald. Henda skipanin er tí ikki uppsparingartarnandi. Endurgjaldsskipanirnar eru rætlvísari enn skipanirnar við proportionlum endaligum kupongskatti, við tað at partafelagsinntøkan verður løgd aftrat persónligu inntøkuni og skattað saman við henni og tí eisini skattløgd við markskatti eigarans. Umsitingarliga eru endurgjaldsskipanirnar tyngri, við tað at skattamyndugleikarnir skulu í samband við allar partaeigarar. Hin vegin ger tað, at fyribilsskatturin eftir kanadisku skipanini verður uppkravdur við einum prosenti, ið svarar til hægsta markskatt, at partaeigararnir sjálvbodnir geva upp vinningsbýtisinntøku teirra, og er skipanin tí lítið eftirlitskrevjandi.

Í talvuni er roknað við einum partafelagsskatti upp á 40%. Onkur vildi kanska hildið, at hesin skattur darvar uppsparingini í felagnum. Tað skal jú av við tey 40 prosentini, og hevur eigarin ein lægri markskatt, so er tað hann og ikki felagið, ið fær munin útgoldnan ella mótroknaðan í skatti sínum. Munurin imillum hesa skipan, og so eina skipan við 40 prosents partafelagsskatti uttan endurgjald er, at partaeigarin helst verður so fegin um endurgjaldið, at hann minkar tilsvarandi um krøv sín um at fáa vinningsbýti **útgoldið.** Hugsa vit okkum, at eigararnir eru nøgdir við eitt tøkt vinningsbýti (t.e. vinningsbýtið, tá ið skatturin er goldin) upp á 12.000 kr. út av einum vinningi uppá 100.000 kr. (svarandi til tað, ið teir fáa við einum vinningsbýti uppá 6% av eginpeninginum undir eini 35/35 skipan) og markskattur teirra er 35 so tørvar teimum hert eitt útgoldið vinningsbýti uppá 7.000 kr. til tess at uppnáa hetta (hini 5.000 eru jú mótroknað í inntøkuskattinum), og tá eru framvegis 100.000 ÷ 40.000 ÷ 7.000 = 53.000 kr. eftir í felagnum, júst tað sama sum eftir tí uppsparingarfremjandi 35/35-skipanini. Er markskattur eigara hægri, skiftir myndin nakað, men tá er ikki óhugsandi, at felagið kann fáa eigararnar at skjóta pening inn í felagið, ið kann uppvega gjaldorkutapið av skattinum, um fyritøkuni tørvar størri eginpening.

3. Uppskot til nýskipanir.

Ein beindeiðis samanbering millum tær umreddu skipanirnar vísir, at hin kanadiska endurgjaldsskipanin skarar framúr. Næst hemi kemur «35%-35%-skipanin». Hvørja skipan ein velur, velst í stóran mun um, hvørji politisk endamál ein leggur størstan dent á, og tí ikki roknast við fullari semju manna millum um hetta.

Hesar báðar loysnirnar uppfylla best tey krøv, ið her eru sett til eina skynsama skattlegging av partafelagum. Hvør av teimum, ið eignir at verða vald, velst um eina meting av teimum fyrimunum og vansum, ið tær, hvør í sínum lagi, hava. Tann kanadiska við rettvísi og neutraliteti, hin við léttari uppkrevjing og stuðli til partafelagsuppsparing.

Í báðum førum er tað ein treyt fyri neutralari skatting av ognarinntøku, at aðrar ognarinntøkur, fyrst og fremst renta, verða skattaðar á sama hátt sum vinningsbýti.

Niðanfyri verður greitt nærri frá innihaldinum í hesum báðum skipanum.

Alternativ 1: Kanadiska endurgjaldsskipanin.

1. Partafelagsskatturin verður broyttur soleiðis, at felagið verður skattað við einum proportionalskatti, ið er ein fyribilsskattur á partaeigarin, og sum av umsitingarligum grundum (eftirlitsgrundum) eigur at vera minst 40%.

2. Felagið kann deklarera vinningsbýti uttan at hetta verður útgoldið. Partaeigarin verður skattaður uttan mun til, um vinningsbýtið verður útgoldið ella ikki, men fær partaeigarin afturgoldið munin millum tann skatt, sum felagið hevur goldið og tann skatt, hann sjálvur eigur at gjalda av hesi inntøku, dømi:

Skattskyldug inntøka áðrenn vinningsbýti	kr. 30.000
Vinningsbýti	kr. 10.000
Samanlagt	kr. 40.000
Skattur 30%	kr. 12.000
Endurgjald fyri partafelagsskatt av vinningsbýti (40% av 10.000)	kr. 4.000
At gjalda	kr. 8.000

Partabrævaeigarin fær sostatt í hesum føri minni í persón-skatt við at fáa vinningsbýti, enn uttan. (Skattur av lønarinntøku, 30% av kr. 30.000 = kr. 9.000, skattur tilsamans kr. 8.000, minking í persón-skatti kr. 1.000).

3. Frádrátturin fyri vinningsbýti verður avtikin.

4. Tap við sølu av partabrøvum kann dragast frá í skattskyldugu inntøkuni. Tap verður at rokna sum munurin millum søluvirði og útveganarvirði.

5. Vinningur við sølu av partabrøvum verður roknaður sum skattskyldug inntøka. Vinningurin verður á partabrøvum, keypt aftaná 1. januar 1974 at rokna sum munurin millum søluvirði øðrumegin og hinumegin keypsvirði + partur partaeigarans av skattaðu hurtuavleggingum felagsins síðan keypsárið. Fyri partabrøv, keypt áðrenn 1. januar 1974, skal ein meting gerast av interna virði felagsins pr. 1. januar 1974 og skal hetta virði setast í staðin fyri keypsvirðið.

6. Á sama hátt sum við sølu verður farið fram við likvidatión, bæði viðvikjandi vinningi og tapi.

7. Fripartabrøv verða ikki skattað, tá hesi ikki eru inntøka, men ein flyting av reservum felagsins.

8. Vinningsbýti frá partafelag til eitt annað partafelag verður ikki skattað. Frádráttur verður givin fyri skatt, ið deildir og dótturfeløg í útlandinum hava goldið har, tó ikki meira enn tann skatt, sum lutfalsliga fellur á inntøkuna frá hesum deildum og feløgum.

9. Partaeigarnir í útlandinum fáa ikki afturgoldið skatt. Í hesum førum er partafelagsskatturin tann endaligi skatturin, uttan so er, at annað verður avtalað samsvarandi dupultskattaavtalu.

10. Samløgufeløg verða skattað sum partafeløg, eisini hvat viðvikur útútbýti millum feløg.

11. Frádrátur fyri hall verður broyttur til 5 ár framefter og 2 ár afturefter.

Allur partafelagsskatturin verður uppkravdur av gjaldstovuni, sum eisini letur endurgjøldini. Skattakommuna partaeigarans fær vanligan inntøkuskatt av partafelagsinntøku hansara. Heimstaðarkommuna partafelagsins fær ongan kommunuskatt frá felagnum.

Henda skipan byggir á hugtakið um, at eingin verulig grund er til, at dupultskatta inntøku, sum vunnin er í partafeløgum ella feløgum, sum verða skattað sum partafeløg.

Trýr ein, at tann, ið keypir partabrøv, sjálvur, tá keypt verður, roknar við útsettari skattabyrði, og er ein ikki sinnaður at skatta konjunturvinningarnar, so ber til við hesum broytingum at lata vera við at skatta vinning við søln av partabrøvum, men tap eiga helst at verða loyvdur frádráttur, eftir somu regium sum nevnt frammanfyri.

Ein slík skipan hóskar sjálvsagt best saman við einum persónskatti, uttan skattafrádrátt, men kann eisini sameinast við ein persónskatt við skattafrádrátti. Tvørleikarnir av hesum kundu eisini verið minkaðir, um kravt varð av persónum, ið vildu hava partafelagsskatt endurgoldnan, at teir brúktu roknaðan og ikki veruligan skattafrádrátt.

Skal misrinnur ikki verða millum skatting av ognarinntøkum, so eigur rentuinntøka at verða skattað sum vanlig inntøka. Er ynski um at geva smáspararum skattalætta, eigur nógaldandi skipan at verða broytt soleiðis, at tað bert eru smá spararnir, ið fáa ágóðan av skipanini. Tann sosiali ójavnin, sum stendst av rentuskattinum er ikki burtur, tá dupultskatturin á vinningshýti er linkaður ella burtur, men ójavnin í mun til skatt-

ing av vinningsbýti er minkaður. Ójavnin í mun til lønarinntøkur og aðrar inntøkur er ikki loystur fyrrenn renteinntøka verður skattað sum vanlig inntøka.

Skattamissurin orsakað av hesum broytingum í partafelags- og vinningsbýtisskattingini er sambært skjal VII A leysliga nettur til umleið kr. 2 milj. og er uppgjørdur sum 7,7 % av 25,6 milj. (samlaða skattainntøkan + negativu skattainntøknarnar smbr. skjal VII A). Hetta er treytað av, at markskatturin hjá partaeigarunum er umleið 40%.

Verður renteinntøkan skattað sum vanlig inntøka, verður úrslitið (sum nett er í kap. IV) ein skattafágóði upp til umleið kr. 4 milj. soleiðis, at roknast má við einum nettoágóða upp til umleið kr. 2 milj. (Av hesum kann tó roknast við, at nakað fer útaftur í studningi til smáspararar).

Hesi tøl eru nakað óviss, í fyrsta lagi tí tey eru grundað á gomul tøl, og í øðrum lagi tí at ikki kann litast á, at hagtølini eru heilt bein.

Alternativ 2: 35/35 skipanin.

Vil ein ikki góðtaka hugtakið um at avtaka dupultskattin heilt, men er ynski um at lætta henda dupultskatt minnandi, samstundis sum ynski er um eina skipan, sum ikki bert er greiðari, men eisini er meira vinnulívsvinarlig enn núgaldandi skipan, so er ein skipan sum 35/35 skipanin rímilig. Skipanin er avbalanserað, løtt at minsita, fremur bæði fløgur í felagið og vinningsbýtið.

1. Partafelagsskatturin verður broyttur til ein proportionalskatt upp á 35% uttan skattafrádrátt.

2. Frádráttarin fyri vinningsbýti verður broyttur til 6% av skattskyldugu ogn felagsins, tó ongantið meira enn 50% av vinningi (yvirskoti) felagsins.

3. Vinningsbýtið verður skattað við endaligum kopongskatti uppá 35%.

4. Móðirfeløg í Føroyum fáa endurgoldið kupongskattin á vinningsbýti. Móðirfeløg í øðrum londum fáa afturgoldið sambært dupultskattaavtalu.

5. Vinningur við sølu av partabrøvum og rentuinntøku verða eisini skattað við kupongskatti upp á 35%.

6. Gjørt verður av, hvussu, ið partafelagsskatturin og vinningsbýtisskatturin skal verða býttur ímillum landskassan og heimstaðarkommunu partafelagsins (ikki partaeigarans).

Annars verða somu broytingar gjørdar sum viðgjørt omanfyri fyri alternativ 1.

Hóast tað ikki er heilt í samsvar við rættvísissjónarmiðið at skatta rentuinntøku øðrvísi enn vanliga lønarinntøku, so verður hildið, at tað ern umsitingarligir fyrimunir at skatta rentuinntøku og vinningsbýti við einum endaligum kupongskatti heldur enn at leggja hana omaná aðrar inntøkur og sostatt skatta hesar inntøkur við markskatti.

Nettoskattaágóðin við eini slíkari broyting verður undir somu fyritreytum sum frammanfyri, umleið kr. 0,8 milj. og kann uppgerast soleiðis:

Skattaágóði við broytan av rentuskatti	kr. 4,0 milj.
Skattamissur við broytan av partafelagsskatti 25,6 milj. (sí frammanfyri) x 12,7% (47,7%÷35%)	kr. 3,2 milj.
	kr. 0,8 milj.

Her er roknað við at 35% kupongskattur av vinningsbýti ikki fær ávirkan á skattainntøkuna.

Í hvørjari skipan hava verið høvi til at meta um, hvussu nógv ið ein broyting í skattingini av útlendskum partaeigarum gevur av sær.

Báðar hesar skipanir eru avvigaðar. Tann seinra er meira traditionel og gevur møguleika fyri eitt sindur størri uppsparing í felagnum, men samlaði skatturin á felagi og vinningsbýti er størri enn eftir tí kanadisku loysnini. Útsetingarfyrimunurin kann tó heilt ella lutvist javna henda mun. Sjálvt um partafelagsskatturin verður settur til 40%, er skipanin væl nýtilig. Ynskja menn at stuðla nýstovnaðum feløgum, kundi ein regla verið gjørd um, at feløg tey fyrstu t.d. 5 árini kundu leggja 6% av skattskyldnga eginpeninginum, tó ikki meir enn 50% av vinninginum í vinningsbýtisgrunn, uttan at deklarera vinningsbýti, hesin skuldi tó havt eitt hámark upp til t.d. 25% av skattskyldnga eginpeninginum. Tá vinnings-

býti frá vinningsbýtisgrunninum síðani verður útgoldið, hevur hetta onga skattliga ávirkan uppá felagið.

Viðmerkjast skal, at ein partafelagsskattur í Føroyum upp á 40% er ein høgur skattur á partafeløgum í mun til samlaða inntøkuskattatrýstið samanhildið við onnur lond.

Lyndið er til at kalla eina lækking av partafelagsskattinum við tí fyri eyga at lætta um dupultskattingina fyri eina «liberalisering», men ein kundi eins væl tosa um avtøku av revsing av fyriløkum, sum verða riknar sum partafeløg og sostatt um eina «normalisering».

Er ynski um ikki bert at javnsfilla partafelagsinntøku við aðra, men heint fram at geva stuðul gjøgnum partafelagsskattin, eigur partafelagsskatturin sostatt at verða lækkaður uppaftur meir.

Idnaðarfyriløkur verða oftast riknar sum partafeløg. Ein avtøka av diskrimineringini av partafeløgum hevði tí meira kom iðidnaðinum at gagni enn sjóvinnuni, har skattleggingin higartil hevurført við sær, at hesi feløg í dag oftast verða stovnað sum iognarfeløg ella partreiðari.

Fyrimunir við at stuðla gjøgnum partafelagsskattin mótvegis avskrivingum er, at tað er lætt at fylgja við, hvussu stórur stuðulin er.

Verður partafelagsskatturin settur munandi niður um meðalskattatrýstið fyri háinntøkur, eigur krav at vera um, at lógin skal endurskoðast, tá tørvur er og í seinasta lagi innan t.d. 5 ár.

SKJAL VIII A

YVIRLIT YVIR FYRIMUNIR OG VANSAR VIÐ NØKRUM PARTAFELAGSSKATTASKIPANUM Í MUN TIL FØROYSK VIÐURSKIFTI,

Fyri at fáa eitt yvirlit yvir hvussu tær mest kendu skattaskipanirnar fyri skatting av partafeløgum virka er skjal talva 1 viðløgd.

Tað, sum royndt er at fáa fram í hesi talvu er hvør munur, ið er tá ið ein sumanber skipanirnar viðvíkjandi:

a) Skatti tilsamans
b) Eftir í P/F
c) Eftir hjá eigarum og P/F tilsamans
d) Maximala trýstið, tá ið allur vinningur er býttur út.

Øll dømini eru grundað á sama vinning, 50% sum skattaprosent fyri partafeløg og 40% sum skattaprosent fyri vinningsbýti. Roknað er við, at 50% av tøku partafelagsinntøkumi (t.e. partafelagsinntøkumi aftaná skatt) verða býtt út sum vinningsbýti, uttan á reglu 20, har roknað er við at øll løk partafelagsinntøka verður býtt út.

Tað er ein fyritreyt í viðgerðini av skjaltalvunum 1 til 3 at vinningur við sølu av partabrøvum verður skattaður sum vinningsbýti.

Fyri partafelagsskattin er her nýttur ein satsur upp á 50%, tí at hesin satsur er nógv nýttur í øðrum londum og tí at føroyski markskatturin fyri partafeløg nærkar seg 50.

Fyri vinningsbýti er nýttur ein markskattur upp á 40%, sum samsvarar nøkurlunda við javnvágar skattatrýstið á eini inntøku omanfyri meðal í Føroyum.

Í flestu av teimum londum, ið nýta tær skattaskipanir, ið her eru viðgjørdar, er skattatrýstið á eini høgari inntøku millum 60 og 70%, men í hesi samanbering er hildið, at betri er at samanbera hvussu skipanirnar eru háttaðar eftir vanligum føroyskum viðurskiftum.

Yvirlitið vísir, sum fyrr sagt í VI parti, at bert tann reina frádráttarskipanin og tann reina endurgjaldsskipanin eru heilt uttan dupultskatt. Með-

an bæði tann franska endurgjaldsskipanin og «the split rate» skipanin bert lætta munandi um dupultskattin, men ikki avtaka hann.

Fara vit síðani at samanbera siggja vit, at skattur tilsamans og maximaltrýst er munandi hægst eftir tí føroysku og tí tradionelln skipanini.

Undir teimum gjørdu fyritreytunum hava «the split rate» og franska endurgjaldsskipanin helst eftir vanligum hugsunarháttí, eitt hóskandi skattatrýst, meðan rein frádráttarskipan og rein endurgjaldsskipan hava eitt heldur lágt skattatrýst.

Eftir hjá partaeigarum og partafelagi tilsamans er tað sum ikki er goldið í skatti og verður hesin partur minni jú størri skattatrýstið er.

Vert er at leggja til merkis, at hóast samlaða skattatrýstið er næstan tað sama við reinum frádrátti sum við reinum endurgjaldi, so er undir teimum gjørdu fyritreytunum munandi meira eftir í partafelagnum við frádráttarskipanini.

Á talvu 2 eru øll dømini býtt í tvey. Núgaldandi 6% frádrátturin fyri vinningsbýti er nýttur í øllum dømunum uttan dømi 5, tó so, at frá dømi 2 til 4 eru tey 6% roknað av eginpeninginum mótvegis partapeninginum fyri dømi 1. Uppbýtingin er gjørd fyri at vísa skattatrýstið, um feløgini undir teimum gjørdu fyritreytunum býta út 6% sum vinningsbýti svarandi til tann nú loyvda frádráttin.

Dømini 2 til 4 byggja á ta fyritreyt, at bæði partafeløg og vinningsbýti verða skattað við proportionalskatti og at skatturin av vinningsbýti verður uppkravdur í felagnum sum kupongskattur.

Dømi 2 er grundað á ein høgan partafelagsskatt og skatting av vinningsbýti á sama hátt sum renta verður skattað í Føroyum í dag.

Dømi 3 er grundað á ein lágan partafelagsskatt og ein kupongskatt av vinningsbýti upp á 40%, meðan dømi 4 er grundað á sama skattasats fyri vinning hjá partafeløgum, rentuinntøku, inntøku við sølu av partabrevum og vinningsbýtisinntøku.

Dømi 5 — kanadiska skipanin — er ein endurgjaldsskipan, sum brýtur av frá eini vanligari endurgjaldsskipan á tann hátt, at vinningsbýti kann skattast hjá partaeigaranum uttan at verða útgoldið. Í dømi 5 er roknað við einum vinningsbýti upp á 50% av vinninginum aftaná skatt, tí ikki

verður útgoldin, meðan dømi b er grundað á eitt vinningsbýti uppá 6% av eginpeninginum, og verður hetta vinningsbýti útgoldið. Hevði ein valt at skatta allan vinningin sum vinningsbýti, hevði endurgjaldið fyri vinningsbýtið verið 4.

Regla 17 maximaltrýst er ikki útfylt, ti at trýstið er ymist alt eftir um partaeigarin hevur ein lágan ella høgan markskatt. Skattaprosentið (35%) er í dømunum sett lægri enn skattaprosentið fyri felagið (40%) fyri best at vísa, hvussu skipanin virkar. Tað ið vert er at leggja til merkis er, at skattatrýstið fyri felag og eigara undir einum svarar til persónskattatrýstið.

Fyri at fáa eina grova fyribils meting av, hvør skipan og hvørjir skattasatsir tykjast best undir ávísum fyritreytum er eitt spurnarskjal gjørt og er hetta viðlagt sum skjaltalva 3 (spurnartalvan).

Spurnartalvan er grundað á tað, sum sagt er frammanfyri og tær viðmerkingar, sum gjordar eru niðanfyri til teir eginleikar, ið kannaðir verða í talvu 3.

1. **Rímilig skatting:** Ein skipan er her metti at geva rímiliga skatting, um so er, at hon ikki gevur nakrari inntøku (partafelagsvinningi, vinningsbýti, úrtøku við likvidatión, vinning við sølu av partahrøvum) møguleikan at sleppa undan einum vanligum meðalskattatrýsti.

2. **Greið:** Fyrst og fremst verður hugsað um, at lætt er hjá bæði felagum og eigarum at rokna út, hvørjar avleiðingar, ið ein avgerð føreir við sær. Er skipanin heilt konsekvent, t.d. fullur ella als ongin dupultskattur, verður sagt ja, er skipanin inkonsekvent (letur sær t.d. at geva fult endurgjald, men ger tað kortini ikki) verður svarið nei. Ein «blandað» skipan, ið kortini er løtt at rokna við, fær svarið «M».

3. **Løtt at umsita:** Her verður mest hugsað um partaeigaraskattin. Er endaligur kelduskattur á vinningsbýti verður sagt ja, verður vinningsbýtið roknað upp í skattainntøku eigaranna verður sagt «M». Er skipanin hareftir heldur fløkt, verður sagt nei.

4.c. **Hóskandi samlað skattatrýst:** Skattatrýstið hjá partafelagi og partaeigara tilsammans verður her metti at vera hóskandi, tá ið tað í mesta lagi kann vera 60% (svarandi til hægsta markskatt fyri persónar + 10 prosentstig) og í minsta lagi 35% (svarandi til meðalskattatrýstið á persónum + 5 prosentstig).

4.d. **Sami skattur av rentu og vinningsbýti:** Bert í B. «Galdandi føroyska skipanin» er renta skattað annarleiðis enn onnur inntøka, og vinningur við sølu av partabrøvum ikki skattaður.

5. **Neutral:**
Her verður hugsað um tey trý mentalitetskrøvini:

1. Javnstilling millum partafelag og persónligt virki.
2. Fíggjanarhátturin.
3. Javnstilling, tá uppspart verður, og tá vinningurin verður býttur út.

Ja verður sett, um skipanin lýkur allar tríggjar treytirnar. Nei verður sett, um ongin treyt er lokin og M, tá minst ein treyt er lokin.

Teknfrágreiðing:
Ja er her sett, tá skipanin lýkur la treyt, ið spurd verður um. Lýkur skipanin ikki hesa treyt, verður svarað nei. M er nýtt í tí støðu, tá skipanin er nøkurlunda neutral. Parantesar merkja, at svarið er bæði og. Í samandráttinum niðan á talvuni eru parantesar og M samanløgd.

Ein viðgerð av nær og hví svarið á skjali 3 er ávikavist ja, nei ella M er gjørd niðanfyri.

1. **Rímilig skatting.**
Her er svarið nei fyri tað nógaldandi føroysku skipanina, tí at vinningur við sølu av partabrøvum ikki verður skattaður, men góðtekur ein hugtakið um avtøku av dupultskattinum, so er skattingin rímilig. Skatturin er bert tekniskt fyri størsta partin uppkravdur í feløgunum. Fyri dømi 11 er svarið líkaleiðis nei, tí her er skattatrýstið undir feimum fyritreytum, sum her eru gjørdar, og lágt um so er, at felagið gevur vinningsbýti upp á 6% (sí talvu 2, 3b).

Tað hevur verið fært fram, at góðtekur ein hugtakið um at dupultskatturin skal heilt burtur, so er óneyðugt at skatta inntøku av vinningsbýti og vinning við sølu av partabrøvum, bert partafelagsskatturin er rímiliga høgur. Henda argumentatión er ikki skeiv, men tá er neyðugt at hava ein partafelagsskattasats, ið er so høgur, at eingin fyrimunur er við at útseta vinningsbýtisútgjalding.

2. **Greið.**
Her er tað tann traditionella skipanin og rein frádráttar- ella rein endurgjaldsskipan og kanadiska skipanin, ið eru best, tí hesar eru undir teimum gjørdu fyritreytunum konsekventar. «The split-rate» og franska endurgjaldsskipanin fáa svarið nei, tí at hesar skipanir á ein heldur fløktan hátt geva nakað av endurgjaldi, men tó ikki fult endurgjald.

Hinar skipanirnar verða her bildnar at verða lættar at rokna við, hóast tær eru blandaðar t.v.s. geva nakað av endurgjaldi fyri dupultskatt.

3. **Løtt at umsita.**
Her eru tað skipaninar í dømi G til I, ið vinna, tí hesar hava endaligan skatt av vinningsbýti (kupongskatt). «The split-rate» og franska endurgjaldsskipanin fáa svarið nei, tí at hesar ikki hava kupongskatt og haraftanat eru heldur fløktar.

Hinar skipanirnar fáa svarið M, tí at tær hava ikki kupongskatt, men kunnu annars ikki sigast at vera torførar at umsita.

4a. **Dupultskattur á vinningsbýti burt.**
Tað er bert rein frádráttarskipan, rein endurgjaldsskipan og kanadiska skipanin, ið eru heilt uttan dupultskatt. Dømi G hevur eisini fingið svarið ja, tí at skatturin á vinningsbýti er so lítil, at hann helst er uttan týdning.

Tað er bert tann traditionella skipanin, ið hevur fullan dupultskatt. Hinar hava allar avmarkaðan dupultskatt. Franska endurgjaldsskipanin hevur fingið svarið (ja), tí at her verður miðað inóti at avtaka dupultskattin, men hetta verður ikki gjørt fult út.

4b. **Proportionalskattur í P/F.**
Her er tann føroyska skipanin eitt undantak við progressivum skatti fyri partafeløg.

4c. **Hóskandi samlað skattatrýst.**
Her fáa tann tradionella skipanin og føroyska skipanin svarið «nei», tí at samlaða skattatrýstið undir teimum gjørdu fyritreytunum er ov

høgt, meðan skipanin í dømi G fær svarið nei, tí at samlaða skattatrýstið kann verða ov lágt. Allar hinar skipanirnar lúka tær treytir, ið her eru settar.

Tað hevur verið fört fram, at í Føroyunn hevur samlaða skattatrýstið ikki verið so høgt í praksis, sum ávist her, tí at tann gløgga partafelagsnevndin fær partaeigaran at lata vera við at krevja vinningsbýti úlyvir 6%. Tað er so møguligt at realisera vinningin við sølu av partabrøvunum og soleiðis sleppa undan dupultskattinum.

Hetta fyribrigdi er ikki tikið við sum ein høvuðsregla, og er hetta veruliga høvuðsreglan í praksis, so tykist grund vera til at umhugsa eina broyting í bræði, sum líkastillar skatting av vinningsbýti og av vinningi við sølu av partabrøvum.

4d. **Sami skattur av rentu og vinningsbýti.**
Her tykist tann føroyska skipanin aftur at vera eitt undantak frá, hvat er vanligt.

Í flestu londum verður rentuinntøka skattað eins hart og arbeiðsinntøka.

4e. **Fremur vinningsbýti.**
Við avgerðini, um antin ein skipan fremur vinningsbýti ella ikki, verður hugsað um, hvørt skipanin heilt ella lutvíst gevur frádrátt fyri vinningsbýti.

Ein skipan við fullum endurgjaldi ella fullum frádrátti fær svarið ja. Er onki endurgjald, so er svarið nei.

Skipanir sum hava lutvísan frádrátt ella onnur tiltøk, ið lætta um dupultskattin fáa antin ja ella nei við parantes.

Rein frádráttarskipan og rein endurgjaldsskipan fáa svarið ja, tí at dupultskatturin er burtur.

Tradionella skipanin hevur ongi tiltøk, ið fremja vinningsbýti og er svarið her nei.

Allar hinar skipanirnar hava svarið (ja) uttan «the split rate». Hetta stendst av, at allar uttan «the split rate» hava lutvísan frádrátt fyri vinningsbýti, meðan «the split rate» skattar tann partin av parta-

felagsinntøkuni, ið útgoldin verður sum vinningsbýti lættari hjá partafelagnum.

4f. **Fremur uppsparing og íløgur í P/F .**
Viðvíkjandi avgerðini av, um ein skipan fremur uppsparing og íløgur í p/f er her meir hugsað um skipanirnar í mun til hvørja aðra. Avgerðin er her einans grundað á, hvat eftir verður av felagnum, tá partafelagsskattur er goldin. Tað merkir, at hæddin á partafelagsskattasatsinum er avgerandi. Undir hesum fyritreytum verða skipanirnar frá H. til I. tær bestu, tí H. og I. hava ein minnandi lægri partafelagsskattasats enn hinar skipanirnar, meðan J (tann kanadiska skipanin) við regluni um skatting av vinningsbýti hjá partacigara, hóast vinningsbýti ikki verður útgoldið og verður verandi partur av eginpeningi felagsins, er her roknað sum íløgu- og uppsparingsfremjandi.

5. **Neutral.**
Traditionella skipanin, «split rate» og franska endurgjaldsskipanin lúka ongar av teimum treytum, ið stillaðar eru til neutralitet. Hinar skipanirnar lúka allar minst eina treyt, men her eru ikki tiknir dagar ímillum, hvør treyt átti at havt mest vekt.

Ein beinleiðis samanbering á talvu 3 av, hvussu nógv ja, nei og M tann einstaka skipanin hevur fingið vísir, at tann føroyska skipanin onki ja fekk, men 4 nei og er sostatt undir hesum fyritreytum ringasta skipanin.

Hetta tykist saman við tí sum sagt er í pørtunum frammanfyri, at benda á, at tørvur er fyri ábótum.

Skuldi nøgdin av ja svarum verið avgerðandi fyri vali av skipan, so skuldi ein út frá talvu 3 valt kanadisku skipanina.

Tað sum avgerðandi er fyri val av skipan grundað á talvu 3 er hvørja vekt tann einstaki leggur í hvønn spurningin sær. Tað er ikki stór líkindi til, at menn meta eins í slíkum førum.

Sambært tað sum sagt er í øðrum parti av hesi frágreiðing um rættvísiskrav og skattagrundarlag, so kundi tað verið rímligt at sagt, at tær skipanir, sum fáa svarið nei til fyrsta spurning ikki eru nýtiligar.

Hetta merkir, at dømi B, G og H ikki lúka eitt grundleggjandi krav.

Tað, sum nú eftirstendur fyrst og fremst er at avgera um ein gongur inn fyri hugtakinum um at avtaka dupultskattin av innøku sum vunnin er í partafelag. Tað tykist ikki at vera nøkur logisk orsøk til hesa revsing, men hóast tað hevur onki land fult út avtikið dupultskattin.

Verður henda leið vald, henda tær viðmerkingar, sum her eru gjørdar á at kanadiska endurgjaldsskipanin varð besta loysnin.

Vil ein ikki avtaka dupultskattin, men lætta um hann og samstundis miða ímóti eini skipan, ið er greið og lett at umsita, tykist ein skipan sum er uppbygd sum 35/35 skipanin at verða ein góð loysn.

Tað hevur verið fløt fram, at lættast hevði verið bert at skatta felagið við einum so høgum skatti, at ikki var neyðugt at skatta partaeigaran.

Hetta er ein loysn, sum tó hevur teir vansar, at partaeigarin við tí lága markskattinum verður straffaður í mun til partaeigarin við tí høga markskattinum, og ein slik skipan er ikki fløgu- og uppsparingsfremjandi fyri partafeløgini, heldur tvørturímóti.

Skattatalva 1.

YVIRLIT YVIR MEST KENDU SKATTASKIPANIR FYRI SKATTAN AV PARTAFELØGUM OG VINNINGSBÝTI

	1. Tradionelt uttan frádrátt	2. Foroyska skipanin	3. Split-rate	4. Rein frádráttarskipan	5. Rein endurgjaldsskipan	6. Fronsk endurgjaldsskipan
1. Eginpeningur	300	300	300	300	300	300
2. Partapeningur	200	200	200	200	200	200
3. Vinningur	100	100	100	100	100	100
4. Frádráttur fyri vinningsbýti	—	12	(30)	33	—	—
5. Skattagrundarlag hjá P/F	100	83	(100)	67	100	100
6. P/F-skattur	50	44	41	33	50	50
7. P/F — dispunibul inntøka	50	56	59	67	50	50
8. Vinningsbýti	25	28	30	34	25	25
9. Skattaendurgjald	—	—	—	—	25	12
10. «Bruttovinningsbýti»	25	28	30	34	50	37
11. Skattur av vinningsbýti	10	11	12	14	20	15
12. Skattaendurgjald	—	—	—	—	25	12
13. Disponibult vinningsbýti	15	17	18	20	30	22
14. Skattur tilsamans	60	55	53	47	45	53
15. Eftir i P/F	25	28	29	33	25	25
16. Eftir hjá eigarum og p/f tils.	40	45	47	53	50	47
17. P/F — skattur	50%	50%	50%	50%	50%	50%
18. Vinningsbýtis-skattasatsur	40%	40%	40%	40%	40%	40%
19. Vinningsbýtispolitikkur	50%	50%	50%	50%	50%	50%
20. Maximaltrýst tá allur vinningur verður býttur út.	70%	66%	60%	40%	40%	55%

Skjaltalva 2.

YVIRLIT VIÐ DØMI UM MØGULIGAR SKATTASKIPANIR OG SKATTASATSIR FYRI PARTAFELØG OG VINNINGSBÝTI.

	1 Føroyska skipanin		2 ½% skipanin við frádrátti		3 25/40 skipanin		4 35/35 skipanin		5 Kanadiska skipanin	
	a	b	a	b	a	b	a	b	a	b
1. Eginpeningur	300	300	300	300	300	300	300	300	200	200
2. Partapeningur	200	200	200	200	200	200	200	200	200	200
3. Vinningur	100	100	100	100	100	100	100	100	100	100
4. Frádráttur fyri vinningsbýti	12	12	18	18	18	18	18	18	—	—
5. Skattagrundarlag hjá P/F	88	88	82	82	82	82	82	82	100	100
6. P/F Skattur	44	44	41	41	21	21	29	29	40	40
7. P/F — Dispunibul inntøka	56	56	59	59	79	79	71	71	60	60
8. Vinningsbýti	28	12	30	18	40	18	36	18	2) —	3) 18
9. Skattur av vinningsbýti	14	6	2	2	16	7	13	6	+ 2	+ 1
10. Dispunibult vinningsbýti	14	6	28	16	24	11	23	12	2	19
11. Skattur tilsamans	58	50	43	43	37	28	42	35	38	39
12. Eftir í P/F	28	44	29	41	39	61	35	53	60	42
13. Eftir hjá eigarum og P/F tilsamans	42	50	57	57	63	72	58	65	62	61
14. P/F — skattasatsur	50	50	50	50	25	25	35	35	40	40
15. Vinningsbýti — skattasatsur	50	50	½%	½%	40	40	35	35	35	35
16. Vinningsbýtis politikkur	50%	4) 6%	50%	1) 6%	50%	1) 6%	50%	1) 6%	50%	1) 6%
17. Maximalt tryst tá allur vinningur verður býttur út	72%	72%	44%	44%	54%	54%	54%	54%	?	?

1) Vinningsbýtissatsurin upp á 6% er tikin sum 6% av eginpeninginum svarandi til maximalan frádrátt.

2) Vinningsbýtið er deklarerað, men verður ikki útgoldið.

3) Her verður vinningsbýti útgoldið svarandi til 6%.

4) Her verður vinningsbýti útgoldið svarandi til 6% av partapeninginum.

SKJALTALVA 3.

SPURNARSKJAL

Skipan / Eginleikar	A Tradionel uttun frádrátt	B Føroyska skipanin	C Split-rate	D Rein frádráttarskipan	E Rein endurgjaldsskipan	F Fronsk endurgjaldsskipan	G ½ % skipanin	H 25/40 skipanin	I 35/35 skipanin	J Kumuliska skipanin
1. Rímilig skatting	Ja	Nei	Ja	Ja	Ja	Ja	(Nei)	Nei	Ja	Ja
2. Greið	Ja	M	Nei	Ja	Ja	Nei	M	M	M	Ja
3. Løtt at umsita	M	M	Nei	M	M	Nei	Ja	Ja	Ja	M
4. Búskaparligar avleiðingar	—	—	—	—	—	—	—	—	—	—
a) Dupultskattur á vinningsbýti burt	Nei	(Nei)	(Nei)	Ja	Ja	(Ja)	Ja	(Nei)	(Nei)	Ja
b) Proportionalskattur á p/f	Ja	Nei	Ja	Ja	Ja	Ja	Ja	Ja	Ja	Ja
c) Hóskaudi samlað skattatrýst	Nei	Nei	Ja	Ja	Ja	Ja	Ja	Nei	Ja	Ja
d) Sami skattur á rentu og vinningsbýti	Ja	Nei	Ja	Ja	Ja	Ja	Ja	Ja	Ja	Ja
e) Fremur vinningsbýti	Nei	(Ja)	(Nei)	Ja	Ja	(Ja)	(Ja)	(Ja)	(Ja)	Ja
f) Fremur uppsparing og fløgur í p/f	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei	Ja	Ja	Ja
5. Neutral	Nei	M	Nei	M	M	Nei	M	M	M	Ja
Ja	4	0	4	7	7	4	5	4	6	9
Nei	5	4	4	1	1	3	1	2	0	0
M ()	1	6	2	2	2	2	4	4	4	1

IX HJÚNARSKATTURIN

1. Skattlegging av inntøkum hjá hjúnum í Føroyum í dag.

Sambært § 17 í galdandi føroysku skattalógini verður giftur maður skattaður av allari inntøku síni og inntøku konu hansara, tá ið tey búgva saman. Hevur konan havt inntøku av sjálvstøðugari vinnu ella lønarheiði, verður veittur manninum ein frádráttur við helvt av inntøku kommununnar, tó ikki meira enn 2.000 kr.

Giftir menn verða settir í landsskatt sambært skattastigan fyri uppihaldarar, ið m.a. hevur eitt skattafrítt strekki uppá 10.000 kr., meðan stigin fyri ikki-uppihaldarar ásetur skatt av øllum inntøkum frá 6.000 kr. og uppeftir (sb. skjal IV C.).

Burtursæð frá hesum verður, hvat ið landsskatti viðvíkir, ikki farið eftir, um tað er eitt ella tvey vaksin fólk, ið skulu liva av eini inntøku, ella um samlaða inntøkan er vunnin av einum ella av tveimum fólkum.

Kommunuskattinum viðvíkjandi kann verða vist á, at samhært § 34, 2. petti 1 verður «lætt hús» roknað sum grund til at hækka skattskyldugu inntøkuna, og má hetta helst føra til, at hjún við ávísari inntøku skulu sleppa lættari enn støk við somu inntøku.

Leggjast kann aftrat, at eru børn í einum húsarhaldi, so verður roknaður barnafrádráttur (450 kr. fyri hvørt barnið), ið verður drigin frá í sjálvum skattinum hjá uppihaldaranum. Hava børnini inntøku verður hon tald uppí inntøku húsbóndans, tó ikki um barnið er 16 ár ella hevur vunnið inntøku sína hjá uttanhýsisfólki.

2. Prinsippspurningar viðvíkjandi hjúnarskatti.

a) Høvuðsspurningarnir.

Tann avgerandi spurningurin í hesum sambandi er, hvør, ið tann skattlagda eindin skal vera: húskið ella einstaklingurin.

Hesin spurningurin er í stóran mun politiskur. Svarið velst um, hvørt vit ynskja at uppfata samfelagið sum samansett av húskjum ella av einstaklingum og her serliga um vit ynskja frigering einstaklingsins, serliga kvinnur, frá húskinum.

Søguliga gongdin hevur verið tann, at flestu lond eru byrjað við at skatta húskið, umboðað av húsbóndanum. Seinri hava menn so

fingið lug at broyta lesa samskatting. Hetta hevur fleiri grundir, sum til dømis:

a) Fleiri og fleiri konur hava sjálvstøðuga inntøku.

b) Politiskt ynski er um at styrkja støðu kvinnunnar í samfelagnum, og harimillum eisini í hjúnarlagnum. Tað verður tí ein spurningur um javnrættindi kvinnunnar, at hon eisini fær hovi til at vera sjálvstøðugur skattaborgari.

c) So hvørt sum skatturin er vaksin og er vorðin meira progressivur, er skattabyrðan hjá einum samskattaðum hjúnum vorðin væl hægri enn hjá tveimum støknum við sonn inntøkum .

d) Hetta, at inntøkan hjá konuni verður uppfatað sum lagd oman á inntøkuna hjá manninum, og tí rakt av tí markskatti, ið hansara seinasta króna verður skattlagd við, gevur fólki varðhugan av, at tað illa loysir seg, at eisini konan arbeiðir. Hetta farnar luttøkuni hjá giftum konum í arbeiðslívinum. Hetta er ikki bert eitt kvinnupolitiskt vandamál, men eisini búskaparligt, um so er, at trot er á arbeiðsmegi í samfelagnum.
Samskattingin ger, at tað «ikki loysir seg» hjá tveimum, ið bæði hava inntøku at vera gift.
Eitt familjupolitiskt ynski um at styrkja hjúnarlagsstovnin sum slíkan, førir tí til krav um serskatting ella lættari samskatting.

b) Prinsipploysnir.

Tær broytingar í samskattingini, ið omanfyri nevndu grundir kunnu føra við sær, kunnu vera meira ella minni viðgongdar.

Er tað sjálvt tað politiska ynskið um javnrættindi, ið er avgerandi, so er ruddiligasta leiðin helst fullkomin serskatting av manni og konu.

Um fólk eru gift og hava felags húsarhald, verður tá mett sum eitt privatmál, ið ikki kemur skattingini við. Búskaparligu vandamálini av samskattingini verða samstundis loyst.

Henda loysnin er rættiliga einføld, tá ið hjúnini virka hvørt sær, t.d. sum løntakarar.
Tað sum gevur trupulleikar er felagsognin, um tey hava slíka, og har serliga um so er at annar hjúnarfelagin starvast í virkinum hjá hinum.

Ein minni víðgongd loysn, sum tó setir nunu og konu javnt, er at uppihalda samskattingini, men lata hjúnini sjálvi gera av, hvør teirra, ið vil standa sum skattaborgari. Hesin máti loysir tó ongan av teim búskaparligu trupulleikunum, ið áður vórðu nevndir.
Verður politiski javnrættarspurningurin hildin hava minni týdning, men ynskt verður bert at lætta um tær búskaparligu avleiðingarnar av samskattinum, so kann hetta verða gjørt við at varðveita samskattingina, men tó lata tað, at tvey skulu liva av hjúnarinntøkuni føra við sær, at samlaða hjúnarinntøkan verður skattað mildari enn ein tilsvarandi einstaklingainntøka.

Hetta kann t.d. verða gjørt við at brúka ein stiga fyri hjún og ein annan fyri støk, við frádrátti í stigainntøkuni fyri bæði konu og mann o.t.

Ein annar máti er at býta hjúnarinntøkuna javnt millum hjúnini bæði og sostatt serskatta tey av samlaðu inntøku teirra, uttan mun til um tað er annað ella bæði, ið hava vunnið inntøkuna.

c) Døni um loysnir.

I **Danmørk** varð ein lutvís serskatting sett í verk í sambandi við keldurskattin. Í prinsippinum er samskattingin framvegis í gildi, men hevur konan lønarinntøku uttanhýsis ella sjálvstøðugt virki, verður hon skattað serstakt av inntøkuni, ið stavar frá hesum. Inntøkan av felagsognini verður framvegis skattað hjá manninum og frádráttirnir verða drignir frá inntøku hansara (tó undantikið løntakarafrádráttur). Arbeiða bæði í felags virki, verður maðurin skattaður av inntøkuni, tó so, at møguligt er at býta hana í helvt, men soleiðis, at konunnar partur lægst kann verða 12.000 kr.

Bert ein skattastigi er, men tá ið skatturin verður útroknaður, fær hvør persónur ein persónfrádrátt uppá góðar 5.000 kr. í stigainntøkuni. Er inntøkan hjá øðrum minni enn 5.000 kr. fær hin hjúnarfelagin frádráttin. Hevur bert annar inntøku, kann hann sostatt draga frá fyri tveir persónar.

Tá ið skatturin av lønarbeiði ella sjálvstøðugari vinnu hjá giftari konu

verður rokuaður út, fær hon serligan konufrádrátt uppá hægst 2.000 kr., men fer inntøka hennara upp um 10.000 kr., verður frádrátturin minkaður við 100 kr. fyri hvørjar 1.000 kr., ið inntøkan fer upp, soleiðis at hann heilt er horvin, tá ið inntøkan røkkur upp á 30.000 kr.

Í Danmørk er barnafrádrátturin nú heilt loystur frá skattinum og verður útgoldin beinleiðis til barnið sjálvt (t.e. móðrina).

Sum tað sæst av hesum, so er danska skipanin framvegis í prinsippinum ein samskattaskipan, sum haraftarat ger mun á manni og konu. Tosað verður nú um at fara longur ávegis ímóti eini fullkomnari serskatting.

Í Íslandi hevur skipanin verið tann, at hjón kundu velja millum samskatting við rættiliga stórum frádrátti og serskatting. Frádrátturin var so stórur, at hert fólk við heilt høgum inntøkum hava hildið fyrimunin av serskatting vera størri.

3. Hví er ónøgd við hjúnarskattin í Føroyum í dag?

Henda ónøgd kann lutvíst vera av prinsippiellum slag, t.d. tí at ynskt verður at tað er einstaklingurin og ikki hjúnini ella húskið, ið er tann skattlagda eindin. Ein onnur prinsipiell orsøk kann vera tann familjupolitiska, at samskattingin er so dýr, at hon fær fólk at búgva saman ógift heldur enn at giftast.

Arbeiðsmarknaðarpolitiskar orsøkir koma eisini upp á tal. Á ávísum økjum og til ávísar tíðir er trot, t.d. á ófaklærdari kvinnuligari arbeiðskraft, t.d. í fiskiídnaðinum. Hinvegin, so er strukturarbeiðsloysi innan fyri fleiri a vteimum yrkisgreinum, ið vanliga hava stóra kvinnuliga tilgongd í Føroyum, t.d. sjúkrarøkt.

Ein lætti í dupultskattinum hevði helst fört til størri framboð av kvinnuligari arbeiðsmegi og hetta hevði so høtt um trotið á arbeiðsmegi á teinnum økjum, ið tað finst, og økt um arbeiðskraftaryvirskotið á teimum økjum, har tað ger seg galdandi.

Økt tilgongd av giftum kvinnum á arbeiðsmarknaðinum fører til hægri framleiðslu og til kanska hóast alt eisini til størri skattainntøku hjá tí almenna enn áður, við tað, at skatturin av hesi meirinntøku meira enn uppvegar skattamissin, ið stendst av at samskattingin verður avtikin.

Royndirnar aðrastaðni vísa tó eisini, at henda okta luttoka setur storri krav til almennar útreiðslur til voggustovur, barnagarðar, frítíðarheim o.t.

4. Møguligar fyribils ábøtur.

Allir teir møguleikar, ið umroddir vórðu í 1. petti av hesum kapitli standa eisini Føroyingum í boði, hæði serskatting og samskatting við øktum frádráttum og sundurbýti av inntøku. Nevnilin heldur seg ikki til at ráða til nakra serstaka av hesum loysnum sum er.

Økið er teknisk trupult og hongur saman við allari persónskattingini, sum hon er. Økið er eisini so stórt, at broytingar kunnu fáa rættiliga stóra ávirkan á skattainntøku hins almenna.

Mælt verður tí til at kanna spurningin nærri, áðrenn prinsippavgerð verður tikin um munandi broytingar í núgaldandi skipan.

Tað, sum kenst mest átroðkandi at hota um, er ávirkanin á hjúnarskattin av, at inntøkurnar verða taldar saman og skattaðar progressivt, og dentur hevur verið lagdur á ta darvandi ávirkan hetta hevur á hugin hjá giftum konum at leita út á arbeiðsmarknaðin.

Tann komufrádráttur, ið er, bøtir nakað um hesi viðurskifti, men ov lítið, orsakað av mestamarkinum uppá 2.000 kr. fyri henda frádráttur.

Hetta mestumark hevur staðið við síðan 1961 og tí kundi ið hvussu er verið orsøk til at umhugsa at ført støddina á tí ajour samsvarandi tí inntøkuvøkstri ið hevur verið síðan.

Í 1961 var meðal skattskylduga inntøkan í Føroyum 7.100 kr. Í 1971 var hon vaksin til 18.800 kr. Ein ajourføring merkir tí eina hækking við 165%, svarandi til 3.300 kr., so at markið kann verða flutt upp á 5.300 kr.

Fyri arbeiðshugin er tað sum mestan týðning hevur neyvan sjálvt frádráttarmarkið, men meira, hvussu høgt upp, ið komuinntøkan kann fara, áðrenn frádráttur in steðgar.

Tá ið frádráttur in er so stórt prosent av inntøkuni sum 50, skal ein rættiliga stutt upp í inntøku fyri at røkka mestafrádráttarmarkinum.

Við minni frádráttarprosenti, men hægri upphædd, hevði tann mesta inntøkan, ið fekk lut í frádráttinum kunna økst uppaftur meir.

Verður frádráttur in t.d. settur til 25% og mesti frádráttur in til 10.000 kr., so kann inntøkan fara heilt upp til 40.000 kr., áðrenn fyrimunurin av eini frádráttaroking dettur burtur.

Sum nevnt má ráðiligast vera at bíða við broytingum í hjúnarskattinum, men halda menn tað vera avgerandi neyðugt at geva ein lætta beinanvegin, hevði ein gongd leið kanska verið ein ajourføring sum tann omanfyri nevnda. Hon kundi verðið gjørd á tann hátt, at omaná tann núverandi frádráttin uppá 50% av hægst 4.000 kr. varð lagdur ein frádráttur uppá 25% av komuinntøkuni omanfyri 4.000 kr. við einum hægstamarki uppá 5.000 kr., ið varð nátt, tá ið komuinntøkan rakk upp á 16.000 kr.

Avleiðingarnar fyri skattainntøku hins almenna kunnu gerast upp umleið soleiðis: Hin økti konufrádráttur in kann metast at liggja um 4—4½ milj. kr., og fer hetta at merkja ein javnvágarskattaniss uppá knappar 2 milj. kr. fyri hitt almenna (landsskatt, pensiónsgjald og kommunuskatt). Hinvegin telur, at ein slík «úttamban» av frádráttinum kann føra til økfar komuinntøkur, ið síðan minka um inntøkumissin hjá tí almenna av, at frádráttarmarkið verður hækkað.

X. SKATTURIN HJÁ TEIMUM, IÐ FÁA FÓLKAPENSJÓN

1. Spurningar í samband við skattlegging av fólkapensiónistum. Áhugi hevði verið fyri at kanna møguleikarnar fyri at gera skattin hjá fólkapensjónistum minni ella uppkrevjingina einfaldari.

   Hugsanir hava verið framumi um deils at sleppa fólkapensjón undan skatti, deils, um hetta ikki kundi gerast, at krevja skattin av fólkapensiónini upp á ein slíkan hátt, at pensjónistarnir sluppu undan at hugsa um skatt, tá ið teir høvdu fingið pensjón sína útgoldna.

   Eitt serstakt problem er yvirgongdin frá aktivari vinnu til pensiónisttilveruna. Heldur persónur uppat at arbeiða 1. januar 1973, tí at hann fær fólkapensjón frá hesum degi, skal hann uppgeva inntøkuna í 1972 og lata skatt eftir henni heilt fram til mai 1974.

Viðmerkjast skal tó, at pensjónistarnir hava atgongd til at søkja um at fáa skattingina broytta, so teir aftaná at inntøkan er niðurfarin, verða skattaðir av framtíðarinntøku, men verri enn so allir nýta henda rætt.

2. Metingar av ábótum, ið kundu komið upp á tal.

Tær hugsanir, ið elva til orðaskifti um henda spurning, eru m.a.

1) Tað kann tykjast øvugt, at hitt almenna fyrst letur fólki 1.000 kr. í fólkapensjón og síðan tekur t.d. 200 kr. frá teimum aftur sum skatt.

2) Tað kann tykjast ópraktiskt, fyrst at gjalda 1.000 kr. út gjøgnum eina skrivstovu og síðan innkrevja 200 kr. frá sama fólki ígjøgnum eina aðra skrivstovu.

Til hetta er at viðmerkja:

ad. 1) a) Út frá rættvísisskattleggingarprinsippinum eigur øll inntøka at verða skattað eftir vanliga skattastigamum. Er brúk fyri at fara serliga milt fram ímóti fólkapensionistum, tí at inntøkur teirra eru lágar, so eigur ein rættvísur skattastigi at uppfylla hetta krav — ikki bert fyri fólkapensionistar, men fyri øll við smáum inntøkum.

b) Tað politiska endamálið við fólkapensiónini má vera at veita teim gomlu møguleikar fyri einum ávísum livifóti, t.e. eini tøkari inntøku (altso inntøku aftaná at skattur er goldin) av eini ávisari stødd.

Hugsa vit okkum, at ætlanin er at geva pensionistinum eina livifótsøking uppá 12.000 kr. árliga, og vit hugsa okkum at hetta svarar til eina inntøkuøking uppá 15.000 kr. :- skatt av 15.000 kr. = 3.000 kr., so kundi hetta verðið gjørt á tvinnanda hátt, antin við at gjalda teimum eina fólkapensión, ið rækkur bæði til at gjalda skatt og til at uppihalda tí ætlaða livifótinum, altso 15.000 kr. ella við at gjalda teimum eina skattafría fólkapensión, ið líka rækkur til at gjalda ta ætlaðu nýtsluna, altso 12.000 kr.

Tað eru tvær høvuðsorsøkir til at hin fyrra leiðin eigur at vera vald:

i) Av skattleggingargrundum:
Flugsa vit okkum ein pensionist, sum umfram fólkapensjónina hevur eina inntøku uppá 50.000 kr., ið hann t.d. skal lata 15.000 kr. í skatti av, (so at tøka inntøka hansara er 35.000 kr.,) og sum fær eina fólkapensjón uppá 15.000 kr., so inntøka hansara veksur til 65.000 kr. Er markskattur hansara t.d. 40%, so skal hann lata 40% av økingini, t.e. 6.000 kr. meira í skatti til tess at lata tann skatt, ið galdandi skattalóggáva heldur, at maður við 65.000 kr. í inntøku eigur at lata, t.e. tøka inntøka hansara verður nú 35.000 kr. + 9.000 kr. = 44.000 kr. eins og hjá øllum øðrum, ið vinna 65.000 kr. Fekk hann bert 12.000 kr. skattafríar, so vaks tøka inntøka hansara til 47.000 kr., altso 3.000 kr. størri enn hjá øðrum persónum við tilsvarandi inntøku. Tað er ilt at síggja, at nøkur grund er til at innføra ein skattleggingarhátt fyri fólkapensionistar, sum er til so nógv størri fyrimun fyri tey, ið hava stórar inntøkur við síðuna av fólkapensiónini.

ii) Av fíggjarligum grundum:

Sum umtalað í III kapitli, so talar ynskið um eitt rationelt býti av útreiðslum hins almenna fyri, at allar útreiðslur verða roknaðar sum bruttostøddir á útreiðshusiðuni á fíggjarætlanini, so skilligt sæst, hvussu nógvur peningur, ið fer til ymisk endamál.

Ein nettorokning av fólkapensiónini er í stríð við hesa aðalreglu. Serliga tá talan er um eina stóra upphædd sum fólkapensiónina er orsøk til at ávarða ímóti einum slíkum fráviki frá góðum fíggjarsiði.

viðv. (2) Hin spurningurin, um tað ber til at laga skattgjaldingina so, at tann meirilutin av fólkapensionistum, ið ikki hevur inntøkur við síðuna av pensiónini, kann sleppa undan at hava strlð av skattgjaldingini, kundi kanska verið loystur við at uppkravdur verður ein kelduskattur (ið altso eisini er ein samtíðarskattur), ið svaraði til landsskatt og meðal kommunuskatt av eini inntøku, svarandi til fólkapensiónina. Hetta hevði fært við sær, at teir flestu fólkapensionistar høvdu sloppið undan at hugsa um skattgjalding.

Tann vanligasta eykainntøkan fyri fólkapensionistar er renteinntøka. Verður renteinntøka framvegis skattað við endaligum kelduskatti, so verða tað v.o.o. bert pensionistar við vinnulívsinntøku, leararinntøku ella øðrari pensiónsinntøku, ið koma at fáa skattgjalding at hugsa um.

3. Niðurstøða.

Spurningurin um skattabyrðina hjá fólkapensiónistum eigur at verða sæddur í sambandi við skattabyrðina av lágginntøkum yvirhovuð. Hetta er eitt alment problem, ið verður loyst bert við eini broyting av skattastigamum. Bæði skattligar og fíggjarligar grundir tala ímóti at mótrokna skattin í pensiónini. Sjálv skattgjaldingin hjá fólkapensiónistunum kann kanska verða gjord einfaldari við at taka kelduskatt av pensiónini.

XI. TILRÁÐINGAR UM VÍÐARI KANNINGAR AV FØROYSKUM SKATTAMÁLUM.

1. Inngangur.

Sum umrøtt er í kapitli I, so er ein gjøllig gjøgnumgongd av øllum føroyskum skattaspurningum ikki løtuverk. Valt varð tí í fyrsta umfari at gera deils eina gjøgnumgongd í høvuðsdráttum (kap. III-V), deils nakað gjøllari lýsingar av nøkrum serspurningum, ið serligur áhugi var fyri (kap. VI-X og skjølini til kap. IV og V).

Er politiskur áhugi fyri tí, kann væntast at uppskot til lógarbroytingar verða gjørd á teim økjum, har, ið serkanningar eru gjørdar, og kanska eisini á nøkrum av teim økjum, ið nevndin hevur nortið meira leysliga við í kap. IV-V. Eisini kann væntast, at politiskur áhugi er fyri at seta gjøllari kanningar í verk av nøkrum av teim spurningum, ið peikað er á í kap. IV-V.

2. Spurningar, ið rátt verður til at taka upp.

Tað má eisini haldast at vera ynskiligt, at nevndin sjálv peikar á nakrar spurningar, ið tykjast verdir at taka upp í framtíðarkanningum. Verða tey ymsu skattasløgini tikin í tí raðfylgju, ið nýtt er í kapitli III, kunnu hesar viðmerkingar verða gjørdar:

1) **Vøruskattir.**

a) Út frá tí tilfarinum um forbrúkssammansetingina, ið verður nýtt til at finna fram til nýtt prístalsgrundarlag, eigur at bera til at gera eina sonevnda «insidenskanning», ið kann vísa hvussu nógv, ið húsarhald við ymsum inntøkum lata í óbeinleiðis skatti. Hetta hevði hjálpt til at funnið út av, hvussu progressiv ella degressiv vørugjøldini eru, og kundi verið ein hjálp, um farið verður í holt við at gera gjøldini einfaldari sum rátt varð til í kap. IV.

b) Spurningurin um at áleggja ein vanligan vøruskatt, antin í smásøluliðinum eina, ella sum virðisøkingarskatt, er verðin kannaður fyri nøkrum árum síðani. Er áhugi fyri tí, kann henda gamla kanning verða førd ajour.

2) **Inntøkuskattur.**

a) Tann kanningin av sjálvuppgávuni, ið umrødd er í skjali 6, kann vónandi geva eina fleiri virðismikil tøl, bæði til lýsing av týðningunum av ymsum frádráttum og til brúk fyri avgerðum um, hvør ið hin endaliga loysnin viðvíkjandi hjúnarskattinum skal vera.

b) Teir skattastigar, ið landsskatturin verður álíknaður eftir, tykjast ov progressivir í fyrra enda enn ynskiligt er.

Annars tykjast stigarnir at hava tað reint tekniska lýtið, at teir hava óneyðuga nógv stig og órundar prosentssatsir.

Tað má bera til at gera ein einfaldari stiga. Í hesum viðfangi hevði eisini verið vert at umhugsað at havt fastan stiga við skiftandi útskrivingarprosenti.

Síðan hetta varð skrivað er skattastigin broyttur nakað (í januar 1974).

c) Kommunuskatturin eigur eisini at verða kannaður nærri. Ger «hækkingar- og lækkingarskipanin» hann progressivan? Hvussu eru skattaborgararnir nøgdir við henda framferðarhátt? Skal hann varðveitast er helst vert at kanna møguleikarnar fyri at gera hækkingarnar og lækkingarnar meira objektivar.

Hvussu nógv hevur skatturin frá láginntokufólki sum fólkapensionistum at týða fyri tær smærru kommununum. Hvørji moguleikar eru fyri at lætta um kommunuskattin við at lata kommununum fáa blokktilskot frá landskassanum?

d) Er áhugi fyri at gera eitt «sosialinntøku»-hugtak, sum nevnt í kap. IV, so er eisini neyðugt at kanna, hvussu tað eigur at siggja út.

e) Skattleggingin av samvinnufyritokum (andeilsfelagum, kooperativum) eigur eisini at verða tikin upp, tá ið støða er tikin til partafelagsskattin.

f) Verður áðannevnda «insidenskanning» gjørd viðvíkjandi avgjøldnum, ber til at útbyggja hana við at taka inntøkuskattin við, so siggjast kann, um skattingin sum heild er progressiv ella ikki.

g) Haðani er bert eitt stig viðari eisini at taka studningar (bæði sosialar og vinnuligar) við so siggjast kann, hvørja umfordeilandi ávirkan, ið skattur og studningur tilsammans hava. Um gjørligt, eiga eisini teir studningar, ið hava form sum skattalætti, at verða tiknir uppí.

h) Er áhugi fyri samtíðarskatti, eiga serliga tær umsitingarligu síðurnar av hesum spurningi at verða kannaðar gjølliga.

i) Ein gjøllig teknisk gjøgnumgongd, við meðvirkan frá kommunalum líkningarmonnum, løgfrøðingum, grannskoðarum o.ø., av inntøkuskattinum við tí fyri eyga at finna og gera uppskot um at tippa smærri ella størri «hol» í inntøkuskattinum hevði verið gagnlig.

j) Sum nevnt fleiri staðni í undanfarnum kapitlum er tað óhaldbart í longdini at gera so lítið burtur úr ognarbroytingum og ognarinntøkum í inntøkuskattingini, sum gjørt er higartil í Føroyum. Búskaparligi framburðurin ger, at henda síðan fær vaksandi týðning. Neyðugt er at kanna, hvørji umsitingarlig krøv, ið tað fer at seta, at gera meira burtur úr ognarsíðuni í framtíðini, t.d. til at gera metingar av ognum, virðisbrøvum o.t.

k) Annars eigur allur spurningurin um, hvussu líkningarvaldið eigur at verða skipað og mannað at verða kannaður. Uppkrevjingin eigur at verða endurskoðað.

3) - 4) **Sosialgjøld og arbeiðsgevaragjøld.**
Spurningurin um vert er at uppihalda sjúkrakassagjaldinum er fyrst og fremst ein spurningur um, hvort tað verður bildið vert at uppihalda sjúkrakassastovninum sum slíkum. Hetta er ein sosial- og heilsupolitiskur spurningur.

Spurningurin um fleiri arbeiðsgevara (ella arbeiðstakara)gjøld verður aktuellur um so er, at menn umhugsa arbeiðsloysis-, sjúkratrygdar- ella eykapensiónsskipanir.

5) **Ognarskattur.**
Um vanliga formúgnskattin er at siga, at ein leyslig kanning av ognaruppgerðunum skuldi kunnað gjørt av, um vert er at geva hesum skatti gætur.

Nakað truplari verður at gera eina meting av, hvussu stór fastognarvirðini munnu verða í úrvalduum kommununum og landinum sum heild. Ein slík meting hevði kunnað givið grundarlag undir metingum um, hvussu stóran ella litlan týðning ein fastognarskattur hevði havt.

6) **Transaktiónsgjøld v.m.**
Ein kanning av, hvussu stórar tær tinglýstu upphæddirnar fyri lán, skeylir o.t. eru, hevði givið eina hylling á, um nóg mikið figgjarligt grundarlag er fyri at umhugsa stempulskatt.

Aftaná hesa gjøgnumgongd av leim ymsu skattasløgunum eigur eisini enn einaferð at verða peika á sambandið millum skatt, skattafyrimunir og studningar. Tað kundi eisini verið skilagott at gjørt eina kanning — ikki bert av studningsskipannum, sum áður er nevnt — men eisini av, um nakar av teim útreiðslum, sum í dag verða figgjaðar heilt ella lutvist íggjøgnum skatt, heldur átti at verðið figgjaðar lutvist ella heilt við at fólk sjálvi skuldu gjalda kostnaðin. Ofta eru sosial rættferðarsjónarmið, ið tala fyri skattafiggjan, meðan húskaparlig skynsemissjónarmið tala fyri at nýta «prísmekanismuna» til tess at fáa avdúkað, um fólk veruliga eru fús at ofra nakað fyri at fáa ymsar almennar tænastur.

3. Møguleikar fyri framhaldandi kanningum.

Sum tað skilst av tí, ið omanfyri stendur, eru nógvir spurningar, ið nevndin heldur áttu at verðið viðgjordur nærri.

Um nøkur av omanfyri umrøddu evnunum ella onnur eiga at verða kannað er ein politisk avgerð.

Nakrir av spurningunum eru hóskandi til kanningar í uttanveltaðum serfrøðinganevndum sum hesari. Aðrir verða best kannaðir í sjálvari umsitingini, t.d. hjá likningarráðnum, ið nú er betur mannað enn áður til slíkar uppgávur.

Nøkur av evnunum eru so væl avmarkaði og lurtil teoretiskt áhugaverd, at møguligt skuldi verið at fingið lesandi við teir lærdu háskúlarnar at kanna tey sum prógvtøkuarbeiði o.t.

Sostatt skuldi verið hampuliga góðir møguleikar fyri framhaldandi kanningum.

Meginparturin av tí, sum í hesi frágreiðing stendur, er ætlaður at vera grundarlag undir prinsippavgerðum um á hvønn bógv, ið skattaskipanin sum heild eigur at verða broytt. Næsta stigið er at fara í holt við nakrar av omanfyri nevndu serspurningum við konkretum broytingum í byggju. Til tess at tryggja sær slíkar serkanningar lura til so nýtilig úrslit sum tilber, hevði ein gongd leið verið at latið serfrøðingarnevndir og nevndir, mannaðar við politikkarum, arbeitt lið um lið við sama spurningum.

BÓKAYVIRLIT

I Bøkur og rit, ið hava verið brúkt beinleiðis sum grundarlag undir frágreiðingini.

II Statistiskar keldur.

III Onnur rit, ið vísast kann til, teim umrøddu evnunum viðvíkjandi.

I Bøkur og rit, ið hava verið brúkt beinleiðis sum grundarlag undir frágreiðingini.

1. Report of the Royal Commission on Taxation, Vol. 1-6. «The Carter Report», Toronto, 1966.

2. OECD: Committee on Fiscal Affairs. Final Report of Working Party No. 3 on Company Taxation, Paris 1973. (Margfaldað).

3. IMF. Skýrsla um skattamál á íslandi. Fjármálaráðuneytið, Reykjavík 1972.

4. Finansministeriet. Betænkning om selskabsbeskatning. Statens Trykningskontor, Bet. nr. 640, København 1972.

5. Finans- og tolldepartementet, Innstilling fra skattekomiteén av 1966, Oslo 1968.

6. Finans- og tolldepartementet. Innstilling om skattereglene for aksjeselskaper og aksjonærer, Oslo 1966.

7. Socialministeriet: Redegørelse fra Udvalget vedrørende beskatning af sociale ydelser, Nov. 1972 (markfaldað).

8. Arthur Andersen & Co: Tax and Trade Guide, Sweden, Chicago 1972.

9. Arthur Andersen & Co: Tax and Trade Guide, United Kingdom, Chicago 1969.

10. Arthur Andersen & Co: Tax and Trade Guide, United States, Chicago 1972.

11. C. Helkett: Opgørelse af den skattepligtige indkomst (nýggjasta útgáva: 11. útg. G.E.C.Cad, Kbh. 1974).

12. Juristforbundets skattelovsamling. Juristforbundets forlag, Kbh. 1974 (nýggjasta útgáva).

13. Jørgen Andersen: Vejledning i aktieselskabsbeskatningen, samt beskatning af andre selskaber. Foreningen af statsaut. revisorer, Kbh. 1966.

II Statistiskar keldur.

1. OECD: Revenue Statistics of OECD Member Countries 1968 - 1970, Paris 1972.

2. Búskaparráðið: Tjóðarrokuskapur 1968, 1969, 1970, 1971.

3. Landskassarokuskapur 1968/69, 1969/70, 1970/71.

4. Rigsombudsmandens Beretning, 1969, 1970, 1971, 1972.

5. Tilsynet med banker og sparekasser:
Beretning om sparekasserne i Danmark 1971 - 72, København 1972.
Beretning om de danske bankers virksomhed i året 1972, København 1973.

III Onnur rit, ið vísast kann til teim umrøddu evnunum viðvikjandi.

A. Almennt:

1. Richard A. Musgrave: The Theory of Public Finance. International Student Edition, Tokyo 1961 (Mc Graw - Hill).
2. Kjeld Philip: Skattepolitik. 2. udg. Gyldendal, København. 1965.
3. Bent Hansen: Finansdepartementet: Finanspolitikens Ekonomiska teori; Penningsvärdenudersøkningen: Del II). SOU 1955:25. Endurprent 1963: Studentliteratur, Lund.

4. J. Børglum Jensen og G. Thorlund Jepsen: Skatter og offentlige afgifter. (Erhverv og Samfund). G. F. Gads Forlag, København 1971.

B. Viðvíkjandi einstøkum evnum:

a) Skattafrádráttarreglur:

5. Sven Danø: Om skattefradraget og kildeskat. Grein í Nationaløkonomisk Tidskrift 1961,99. Bind 3-4 Hefte, Kbh.

b) Partafeløg:

6. Handelsministeriet: Betænkning om fællesnordisk aktieselskabslovgivning. Statens trykningskontor, Bet. nr. 540, København 1969.

7. Handelsministeriet: Kollektiv investering i aktier. S.T. bet. nr. 505, København 1955.

8. N. Th. Kjølbye: De nye selskabslove. Industrirådet København 1973.

c) Uppsparingarfremjandi skattaskipanir:

9. Finansministeriet: Betænkning vedrørende skattebegunstigelse for opsparing, S. T. Bet. nr. 378, København 1964.

10. Finansministeriet: Betænkning om forbrugsbeskatning: Bet. nr. 202, København 1958.

11. Finansministeriet: Betænkning om beskatning af pensionsordninger m.v. S.T. Bet. nr. 419, København 1966.

12. Boligministeriet: Betænkning vedrørende opsparing til boligformål, S.T. Bet. nr. 361, København 1964.

13. Moritz Hansen: Skattebegunstigende pensionsordninger, G.E.C. Gad, København 1972.

d) Avskrivingarreglur:

14. Finansministeriet: Betænkning vedrørende skattefri afskrivninger og skattefri henlæggelser til investeringsfonds. S.T. nr. 171, København 1957.

15. Finansministeriet: Betænkning om skattefri afskrivninger på bygninger m.v. S.T. Betænkning nr. 478, Københ. 1968.

e) Fastognarskattur:

16. Finansministeriet: Betænkning vedrørende ændringer af ejendomsbeskatningen. S.T. Bet. nr. 399, Københ. 1965.

f) Keldnskattur:

17. Moritz Hansen: Kildeskat. G.E.C. Gad, København 1974.

18. Finansministeriet: Betænkning fra udvalget til forbedring af kildeskatten. S.T. Bet. nr. 638 ,København 1972.

Metan av og skipanaruppskot

fyri

STRANDFARASKIP LANDSINS

av

Thomas Arabo, civilverkfrøðingi.

(Framlagt í ólavsøkutingsetuni 1974).

Hendan frágreiðing er gjørd sambært avtalu við Føroya Landsstýri.

Fyrsti partur er ein lýsing av virkisøkinum hjá Strandferðsluni. Hetta havi eg gjørt, fyri at Løgting og Landsstýri skulu hava so nógv grundtilfar sum gjørligt, tá ið spurningar viðvikjandi hesi fyritøku verða viðgjørdir.

Annar partur er mín metan av fyritøkuni Strandfaraskip Landsins. Partur 3 og 4 er eitt idé-uppskot til nýskipan.

Juli 1974

Thomas Arabo
civilverkfrøðingur.

1. Stutt lýsing av Strandfaraskipum Landsins virkisøki, skipan o.a.

1.1. Støða og virkisøki.

Strandfaraskip Landsins verður rikin sum sjálveigandi stovnur undir Foroya Landsstýri. Strandferðslan hevur einkarrætt til flutning av ferðafólki sjóvegis til tey pláss í eru vist á fylgiskjali 1. Harumframt hevur hon einkarrætt til regluligan góðsflutning til tey øki, ið eru vist skrástrikaði á fylgiskjali 2.

1.2. Skipan.

Strandferðslan er skipað við einari høvuðsdeild í Tórshavn og einari deild í Klaksvík. Harafturat eru avgreiðslur á teimum plássum siglt verður til, men hesar avgreiðslur eru sjálvstøðugar og verða í høvuðsheitinum løntar við lossigjaldi av teimum vørum, ið koma til plássið.

1.2.1. Tal av starvsfólki á avgreiðslum og virkisøki tess.

Á høvuðsdeildini í Tórshavn arbeiða 6 fólk fast á skrivstovuni. Harumframt er ein tímaløntur bókhaldari og arbeiðir hann umleið hálvan dagin.

Skrivstovan tekur sær av frankering av góðsi út frá Havnini. Harumframt verða allar lønir útroknaðar og ávistar frá skrivstovuni. Bókhaldarin filrættaleggur alt tað rokniskapstekniska og verður hellar arbeiði síðan gjørt av einum skrivstovumanni. Í pakkhúsinum í Tórshavn arbeiða 3 mans. Arbeiði teirra umfatar góðsmóttøku til og frá Havnini. Eisini taka hesir menn sær av at avgreiða skipini (loysa, binda og tílíkt).

Á avgreiðshuni í Klaksvík ,ið sum áður nevnt er einasta avgreiðsla uttanfyri Tórshavn sum strandferðslan sjálv rekur, eru 2 fastløntir mans. Afturat teimum er av og á tímaløntur hjálparmaður. Klaksvíkar deild tekur sær av at avgreiða tey skip ið strandferðslan hevur í sigling í Norðoyum. Harafturat tekur hon sær av at umskipa góðs til partar av Eysturoy og restina av Norðuroyum. Á fylgiskjali 3 er yvirlit yvir avgreiðslur hjá strandferðshuni sum í høvuðsheitinum verða riknar fyri gjald av vørum til og frá teimum ymsu plássunum.

1.2.2. Tekniska eftirlitið.

Tekniska eftirlitið verður røkt av Tekniskn Deild Landsins undir Niclas Magnussen. Eftirlitið arbeiðir sum ráðgevandi í tekniskum spurningum og tekur sær annars av tilsýni við bedingsarbeiði, klassingum og tílíkum.

1.2.3. Siglandi starvsfólk, skipatal, virkisøki og tílíkt.

Í løtuni eru umleið 70 starvsfólk fastlønt á teim skipum Strandfaraskip

Landsins umsitir. Uppi í hesum tali eru 9 manns ið sigla við Jens Christian Svabo. Starvsoki teirra er í samráð við Fiskiransóknarstovuna.

Fyri hini skipini er arbeiði skipað soleiðis at manningin, umfram at luttaka í vanligum sjómannsarbeiði undir sigling, eisini tekur sær av lossing í havn. Undantiknir frá lossing í havn er restaurationspersonalið á Smyrli.

Til at røkja ruturnar við hevur strandferðslan í dag 11 skip og eru tey bundin í sigling umleið soleiðis:

Smyril: Høvuðsruta Tórshavn-Suðuroy.
Um summarið haraftirat í sigling uppá Klaksvík.

Pride: Høvuðsruta Tórshavn-Klaksvík.
Um summarið haraftirat í sigling uppá Suðuroy og Sandoy.

Ritan: Høvuðsruta Tórshavn-Skopun.
Annars smábygdirnar nærindis Havnini.

Kjógvin: Mest góðsflutningur til Vágar, Sandoy og smáplássir har á leið.
Hann røkir eisini flutning til Sandvík og Hvalba.

Teistin: Sigling á smábygdir nærindis Havnini.

Súlan: Í Mikinessigling.

Dagstjørnan: Tiltaksskip. Í løtuni í vaktartænastu.

Ternan: Í sigling Fuglafjørð-Klaksvík

Másin: Í rutusigling eystanfyri Múla.

Sildberin: Siglur til Kallsoy, Kunoy og eystursíðuna av Eysturoy.

Barskorð: Til umvælingar í løtuni. Skal eftir ætlan røkja tær ruturnar ið Sildberin røkir nú.

1.3. Bond á virkisøkinum hjá Strandfaraskipum Landsins.

Skipini hjá strandferðsluni eru undir eftirlitið av Statens Skibstilsyn og skulu sostatt lúka allar treytir, ið har verða fyrisettar.

Á manningsiðuni verða treytirnar fyrst og frenst settar av galdandi manninga- og sjólóg. Harafturat eru lønar og onnur arbeiðsviðurskifti sambært sáttmála við Starvsmannafelagið og galdandi starvsmannalóg. Starvsmannasáttmáli umfatar upphæld av lønum og fastsetan av arbeiðstíð. Hendan er í løtuni 44 timar um vikuna og fyri tíð útyvir tað «avspasering» tíma fyri tíma. Sunnu- og halgidagar og aðrar lógfestar fridagar verður goldin úrtíðarløn uttan mun til arbeiðstíðina restina av vikuni. (sí annars fylgiskjal 3 a-c)

Viðvíkjandi tí skipastødd í Strandfaraskip Landsins kann nýta, er altavgerandi hvussu lendingarviðurskiftini eru. Hendan avmarking ber tað í sær, at í dag kunnu strandfaraskipini stórt sað skipast í 3 flokkar.

1. Tey størru skipini, ið bert kunnu sigla har havnarviðurskiftini eru heilt í lagi (t.d. Smyril, Pride).

2. Tey meðalstóru skipini ið kunnu nýtast á smærri pláss (t.d. Ritan og Kjógvin).

3. Tey smáu skipini, ið kunnu nýtast har bert talan er um smáar lendingar, (t.d. Másin, Sildberin o.a.).

Hettar er so tey bond ið liggja á virkisøkinum hjá strandferðsluni bæði viðvíkjandi manning og skipum, og í teinnum førum skip verða nýtt fram yvir, mugu bondini roknast at blíva tey somu.

1.4. Flutningstól hjá skipunum.

Fylgiskjal 4 vísir tað samlaða talið av ferðaseðlum fyri 3 tey seinastu árini. Vøksturin í 1971/72 er 24.203 ella umleið 18%. Fylgiskjølini 5-9 vísa ferðaseðlatalið hjá teinnum smærru skipunum. Hesi skip umboða bert umleið 12% av tí samlaða flutninginum, so eg geri onga størri sundurgreining av hesum. Flutningstølini hjá Pride siggjast á fylgiskjali 10. Á fylgiskjali 11 havi eg vist eina kurvu yvir, hvussu fordeilingin hevur verið gjøgnum árið fyri trý tey seinastu árini. Sum tað sæst, so hevur sambandið Klaksvík-Eysturoy skarvað nakað burtur av flutninginum hjá Pride. Týdningurin av Priderutuni til ferðafólkaflutning er fallandi, nú alternativsambandið Klaksvík-Tórshavn yvir Eysturoy batnar, so eg meti tað ikki vera av serligum týdningi at gera eina gjøllari analysu av flutninginum Klaksvík-Tórshavn sjóvegis.

Øðrvísi er við sambandinum Lorvík-Klaksvík. Fylgiskjal 12 vísir flutningstøl fyri 3 tey seinastu árini. Sum tað sæst so tykist ferðamannatalið á hesi rutu at hava stabiliserað seg, og eru tvinnar orsøkir til hetta. Onnur

er, at rutukoyringin í Eysturoy í samband við Tróndu er ikki so væl skipað, at tryggleiki allið fæst fyri, at bilkapaciteturin er nóg mikil. Ein orsøkin er, at privatbilflutningurin er nervaður av, at ikki kann koyrast umborð á Termna. Fylgiskjal 13 vísir, hvussu flutningurin hevur verið fyri hvønn mánað sær. Bíðast skal merki í, at meðan strandfaraskipini vanliga hava størst ferðingatal í juli mánaða, so tykist hetta tal fyri Ternuna at skifta alt eftir, hvussu veðurlikindini eru at ferðast við Pride. Fylgiskjølini 14 og 15 vísa eina nágreiniliga uppbýting av ferðingatølunum fyri 1972 og 1973. Hetta er gjørt fyri at fáa eina metan av, hvussu kapaciteturin fyri bilar og ferðafólk er. Kurvarnar á fylgiskjølunum 16 og 17 vísa ferðamanna- og bilflutningin svarandi til sonu uppbýting. Ovast á kurvahløðunum havi eg «belegningsprocentini». Vert er at býta merki í, at Ternan, ið hevur loyvi at flyta 116 fólk og kann flyta 14 vanligar bilar, sambært hesi skjøl sjáldan hevur verið ov lítil til hendan flutning. Tað skal viðmerkjast, at Ternan ikki hevur haft møguleika fyri at flyta stórar og meðalstórar bilar. Fyri Smyril vísa fylgiskjøl 18 til 22 tabellir og kurvar yvir ferðingina. Her er vert at bita merki í, at fyri tey trý árini, yvirlitið umfatar, er talið av túrum, har Smyril er fullsettur av fólki (t.d. 8 ferðir í juli 1973) í stórum vøkstri. Við ti ferð (10 mil), sum skipið hevur, er rættuliga avmarkað, hvussu nógv hesin spurningur kann loysast við at økja um túrtalið. Ferðingatølini fyri Rituna eru vísl á fylgiskjølunum 23 og 24. Tað hevur ikki verið gjørligt at fáa grundtilfar til eina nágreiniliga sundurgreining, men kanningar vísa, at um viðurskiftir, serliga á summri, er hon rættuliga ofta fullsett til og frá Sandoynni. Her er tó tað at siga, at havnaumstøðurnar í Skopun eru so vánaligar, at ikki er gjørligt at nýta størri skip, og haraftarat kann túratalið her um neyðugt økjast rættuliga nógv.

Farmaflutningin er ikki í løtuni gjørligt at lýsa í tølum, men kanningar vísa, at her er tað Smyril, sum er ringast fyri. Hann er ofta fullsettur, og førir hetta við sær, at tað vanliga má sigast nei til ein stóran part av teimum bilum, ið fyrispurningur er um at fáa við.

1.5. Viðmerkingar til rakstrarúrslitið.

Rakstrarroknskapurin fyri skipini tvey tey seinastu árini siggjast sum fylgiskjøl 25 og 26. Fyri at vísa, hvat umleið tær ávísu rutunnar kosta at reka, havi eg á fylgiskjali 27 gjørt eina nøkurlunda uppstilling yvir kostnaðin. Viðmerkjast skal, at her havi eg bert tikið tann beinleiðis rakstur. Avskrivingar eru ikki við. Eg skal nú í stuttum gera viðmerkingar til tær einstøku inntøku- og útreiðslubólkarnar.

1.5.1. Inntøka av farmagjaldi

Her er talan um ein vøkstur uppá umleið 20%. Hesin vøkstur stavar

frá øktum umsetningi. Eftir teimum kanningum, ið eg havi gjørt, so gera tær truplu goymsluhúsaumstøðurnar, at ein partur av góðsinum verður undirfrankerað. Hetta kemst av, at avgreiðslurnar, og ger hetta seg galdandi serliga í Tórshavn, ikki hava umstøður at siggja tað góðs, ið verður frankerað. Um goymslumstøðurnar vóru soleiðis, at frankering og góðsmóttøka var á sama stað, so vildi undirfrankeringin minkað.

1.5.2. Inntøka av ferðaseðlum

Her er talan um vøkstur omman fyri 25%, og stavar hesin frá øktum ferðafólkatølum.

1.5.3. Inntøka av postflutningi

Her er prístalsreguleraður sáttmáli við Postverkið. Soleiðis sum t.d. oljuútreiðslurnar vaksa, so er tað mín metan, at hesin sáttmáli eigur at reviderast skjótast gjørligt.

1.5.4. Inntøkur av eykatúrum, kiosk og cafeteria

Her er talan um ein bólk, ið skal bera seg. Her eru stig tikin til eina øking við umleið 20% .

1.5.5. Útreiðslur til lønir

Hetta er sum tað sæst størsta útreiðsla í Strandferðslunni. Eg havi kannað hesa útreiðslu gjølla. Niðurstøðan er, at skulu starvsmannasáttmáli og manningarlógir galda, so eru ikki møguleikar fyri skerjingum í hesari útreiðslu út yvir umleið 3%, og hetta er í mindirkanti av 33% av árliga lønarvøkstrinum. Skal skerjast munandi her, so må strukturbroyting til í skipan og materiel. Vit hava tí sum eitt stig á hesi leið «ekspanderað» virkiðkið við farmaflutningsrutum í Norðurstreym og í Eysturoy. Hetta kann gerast uttan at økja lønarútreiðslurnar munandi. Nýtslustigið av verandi lønum verður soleiðis økt. Ein annar vegur at ganga er at minka um servicegradin, men hetta má so vera ein politiskur spurningur.

1.5.6. Útreiðslur til kostarhald

Hesar eru sáttmálabundnar við Starvsmannafelagið.

1.5.7. Oljuútreiðslur og tílíkt

Her er ein útreiðsla, ið stendur beinleiðis í samband við servicegradin.

1.5.8. Útreiðslur til viðlíkahald og umvælingar

Hesi tøl vísa tær beinleiðis útreiðslurnar til rakstur. Tær veruligu útreiðslurnar, tá ið tikið verður við tað, sum fer á aktivini, eru nógv størri. Rakstrartapið fyri skipini er heldur ikki við. Samantikið er tað mín metan,

at umvælingarútreiðslurnar eru alt ov høgar, serliga tá ið rakstrartapið verður tikið við. Fyri at minka um hesar, so vil eg mæla til, at inspektiónin hjá Strandferðslunni verður gjørd sum ein deild beinleiðis undir tí dagligu leiðsluni og ikki sum nú, har inspektiónin úti í Tinganesi er ein sokallað «stabsfunktión». Eisini má Strandferðslan leggja seg meira eftir sjálv at standa fyri og gera smærri umvælingar og í hesum sambandi at gera sokallað fyribyrgjandi viðlikahald.

1.5.9. Útreiðslur til trygging

Hesar eru so lágar sum gjørligt, um ikki seravtala fæst í lag við Tryggingina.

1.5.10. Farmasamsýning til avgreiðslur.

Her er tað mín metan, at sum lønarvøksturin er í dag, so verður ikki lætt hjá Strandferðslunni at halda hesa útreiðslu niðri. Tó eru ávísir møguleikar fyri skerjing av talinum av avgreiðslum við centralisering. Hetta er longu nú gjørt í Eysturoy.

1.5.11. Útreiðslur til leigu av eykaskipum

Hesar útreiðslur standa í samband við tær undir 1.5.8. og kunnu skerjast sambært tilmæli í hesum sambandi.

1.5.12. Samsýning fyri postflutning

Her er talan um útreiðslur til flutning frá skipi til posthús fyri rokning. Ein treyt fyri, at Strandferðslan sjálv kann røkja hendan flutning t.d. í Klaksvík er, at goymslunumstøðurnar broytast.

1.5.13. Endurgjald fyri vantað farmagóðs

Hendan útreiðsla er vaksandi, og effektivt eftirlit kann bert fremjast, um so at siga øll vøra kann avgreiðast yvir goymsluhús, og tað eru tað ikki nmstøður til í dag.

1.5.14. Útreiðslur til havnagjøld

Hetta er ein spurningur, ið eigur at verða tikin upp. Mín metan er, at strandfaraskipini eins og onnur «statsskip» áttu at sloppið undan havnagjaldi.

1.5.15. Avskrivingar

Hesin spurningur eigur eftir mínari metan at verða tikin upp til nýggja viðgerð. Spurningurin er principiellur, og eg komi við mínari metan seinni í hesi frágreiðing. Her skal bert vísast á, at avskrivingar av bergholum og brúm vanliga ikki verða álíknaðar brúkarnum sum beinleiðis avgjald.

1.5.16. Ymiskar útreiðslur

Hesar eru fjølbroytlar og smáar hvør sær (skipasýnið, telegrafavgift o.t.). Vanliga eru tær bundnar av fastum takstum, og møguleikar fyri broyting eru smáir.

Av øðrum útreiðslum siggjast á fylgiskjølum 27a og 27b fyrisitingarútreiðslurnar. Hesar eru vaksandi. Her eru ávisir møguleikar fyri rationalisering í pappírsmongdini, soleiðis at vøksturin kann steðgast.

Farið verður nú í summar undir at gera slíkar skipanir, men minnast skal til, at møguleikarnir eru avmarkaðir, so leingi sum tær materiellu umstøðurnar við hølum og tilikum eru so vánaligar.

2. Metan av virki Strandfaraskipum Landsins.

2.1. **Inngangur:** Áðrenn eina slíka metan, er tað neyðugt at lýsa hvørji grundsjónarmið ein slík byggir á.

2.1.1. Grundsjónarmið um almenna kollektiva ferðslu.

Góðir flutningsmøguleikar hava allar tíðir verið grundstøðulin undir allari framleiðslu og handli. So at siga øll framkomin lond eru í dag komin til ta niðurstøðu, at skulu landøkir við fáum ibúgvum fylgja við í tí búskaparliga vøkstri, ið fer fram í tætbygdum økjum, so má flutningssambandið vera í lagi. Hettar er so eitt grundsjónarmið aftan fyri alment rikna kollektiva ferðslu. Slík ferðsla verður sostatt rikin útfrá tvinnum sjónarmiðum:

1. Hon skal rekast effektivt í sær sjálvum.
2. Hon skal tilrættaleggjast soleiðis, at hon hevur størst møguligan búskaparligan týdning.

Hettar hevur so tær avleiðingar, at meðan privat ferðsla verður rikin við tí fyri eyga at hava so stórt rakstraryvirskot sum gjørligt, so verður tað

ein politisk avgerð, hvussu stórt ferðsluttilskol tað almenna letur til sína ferðslu, fyri at reka flutningin til økir, har fá fólk búgva.

2.1.2. Organisatiónsuppfatan.

Organisatiónsgranskarar eru á einum máli um at allar organisatiónir, uttan mun til starvsøki, hava serstøk felags eyðkenni. Eitt sindur ymiskir eru menn tó á máli um hvussu ein organisatión skal avmyndast. Mest vanligt er í dag at sammeta hana við eina livandi organismu. Ein slík skal vera í samsvar við sínt umgevilsir, samtíðis sum hvør partur innanhýsis skal arbeiða saman soleiðis, at organismun kann yvirliva. Arbeiðir organismun ikki í samsvar við sínt umgevilsir og arbeiða teir ymsu partarnir ikki saman, so er hon sjúk. Somuleiðis er við organisatiónum. Eru tær ikki í lagi, vísa «symptonir» hvat bagir, og stig kunnu takast til at lekja.

2.2. Krøv til Strandfaraskip Landsins, og hvussu úrslitið verður mett.

Vanligt er at sela krøv til eina organisatión og meta úrslitið á hesum grundarlagi. Út frá krøvunum verður so ein málsetningur gjørdur, og organisatiónin rekur so ein politikk fyri at røkka hetta mál. Her er nakað avgerandi, sum svíkur hjá Strandfaraskipum Landsins. Skiftandi landsstýri og løgting hava ikki haft ein formuleraðan samferðslupolitikk, og krøvini til Strandferðsluna hava verið sett av «pressiónsbólkum» av ymiskum slag. Krøvini hava haft tað felagseyðkenni, at tey eru sett út frá búskaparligum og hitvís socialum sjónarmiðum. Somuleiðis lýkist metanin av úrslitinum hjá Strandferðsluni í bløðum og aðrastaðir at hava haft eitt felagseyðkenni: Tað verður mett út frá yvirskotsprincippinum, soleiðis sum privat virkir verða tað.

Her er so talan um at krøvini verða sett í einari búskaparligari og sosialari verð og metanini í einari økonomiskari. Eg skal her venda aftur til 2.1.1. har tey grundleggjandi krøvini til almennt rikna kollektiva ferðslu standa.

Mín metan er at sjálvandi skal effektivitetskravið (krav 1.) lúkast, men hettar kann ikki metast út frá yvirskotsprincippinum grundað á tann interna rokniskapin hjá strandferðsluni. Krav 2. ger at skal yvirskotsmetanin nýtast, so má tað vera tað nationaløkonomiska yvirskotið talan er um.

Í staðin fyri at lata ársrokniskapin vera tað einasta basisgrundarlag fyri einari metan átti Strandfaraskip Landsins eisini at verið kravt eftir einari ársfrágreiðing ið lýsti flutningin í tølum (t.d. ferðafólk, góðsmongd, mjólkaflutning o.t.).

2.3. Metan av Strandfaraskip Landsins sum organisatión.

Strandferðslan er í skipafali og starvsfólkafali fleirfaldað tey seinastu 10 árini.

Hóast hettar so er organisatiónsskipanin í høvuðsheitum hin sama. Organisatiónin er vaksin eftir sama mynstri sum áður. Hettar er tað ið danir vanliga nevna «organisationsudvikling ved knopskydning».

Organisatiónsgranskarar ern á einum máli um at tá ið ein organisatión fer upp um eina ávísa støðd eigur hon at umskipast til tær broyttu umstøður, sum nú einaferð ein vøkstur gevur. Verður ikki umskipað so verður organisatiónin ikki før fyri at virka so væl sum hon eigur. Ein slík umskipan er ikki farin fram hjá Strandfaraskip Landsins, men sitandi landsstýri tykist lugað fyri einari linjuskipaðari organisatión. Innanhýsis í strandferðsluni førir hetta við sær, at ógreið støða er um, hvønn avgerðarrætt tær ymisku funktiónirnar hava. Serliga viðvíkjandi teknískt orienteraðum avgerðum er spurningurin um avgerðarrætt ógvuliga fløktur, og kemst hetta fyri ein stóran part av, at inspektiónin er beinleiðis undir Tekniska Deild Landsins og ikki undir tí dagligu leiðsluni á strandferðslunni. Eisini uttanhýsis, tað vil siga mótvegis landsstýrinum, tykist spurningurin um avgerðarrætt at vera heldur fløktur. Hetta kemur til sjóndar, lá ið talan er um investeringar og setan av fólki. Til sammetingar kann nevnast, at TLF og Landsverkfrøðingurin verða rikin nógv meira sjálvstøðugt enn Strandfaraskip Landsins.

Hyggur ein at tí samstarvi, ið natúrligt eigur at vera við aðrar kommunikatións- og úlbyggingarorganisatiónir í samfelagnum, kann sigast at samstarvið við Postverkið er rættuliga gott, meðan samstarvið við Landsverkfrøðingin hevur verið so at siga einki, sjálvt um hendan fyritøka stendur fyri byggjan av øllum atløguplássum og ferjudegum, ið Strandfaraskip Landsins nýtir.

2.4. Starvsmannaviðurskifti.

Sum áður nevnt verður starvsfólkið lønt eftir sáttmála imillum Starvsmannafelagið og Landsstýrið. Hóast sigling og arbeiði á skipum er arbeiði, ið vanliga verður rokt sum vaktararbeiði, so er sáttmálin lýðuliga merktur av at vera skipaður sum ein skrivstovusáttmáli. Hettar ber í sær at hann er tungur at arbeiða við og tykist í ávisum førum at vera órímuligur í sínum umsilingarkrøvum. (Her er serliga hugsað um § 11.) (Fylgiskjal 3a - c).

Kommunikatiónin og samstarvið innan starvsfólkið er ov vánalig. Hettar

gildur bæði fyri skipini sínamillum og avgreiðslur og skip. Orsøkin tykist vera, at tær ymisku eindirnar meta seg sum eitt sjálvstøðugt virki og ikki sum part av tí virki og serviceorganisatión, sum eitur Strandfaraskip Landsins.

2.5. **Metan av virkisøki Strandfaraskip Landsins.**
Fyrst og fremst er virksemið hjá strandfaraskipunum merkt av tí áðurnevnda manglandi málsetningi. Hetta ber í sær, at í summum førum, har «pressiónsbólkar» av ymsum slag eru sterkir, verða riknar reinar servicerutur, meðan aðrastaðir verða ruturnar riknar út frá tí sjónarmiði, at tær **skulu** bera seg.

Dømi um bæði hesi fyribrigdir eru siglingin Klaksvík-Fuglafjørð og siglingin til Vágarnar.

Samanfata vit nú fyrst vanligu atfinningarnar at virkisøkinum hjá Strandfaraskipum Landsins, so eru tær hesar:

1. Lossitíðin hjá skipunum er ov long og harav raksturin kostnaðarmikil.
2. Servicegradurin ov vánaligur.
3. Ov nógv góðs blívur skatt og verður burtur (mankokontoin veksur).
4. Tað verður siglt ov sjáldan til ávis plássir, og fyri fólkaflutningin kemur haraftucat at
5. Ferðingartíðin er ov long (serliga merkist hettar í Suðuroyarsiglingini).
6. Møguleikarnir fyri flutningi av viðføri (serliga bilum) eru ógvuliga smáir.
7. Koyggjuplássini á teimum longru rutunum eru ov fá.

Eg havi mett um orsøkirnar til hetta, og kann eg samandraga hesar soleiðis.

1. Planlegging er ov traditionel og hevur ikki innstillað seg til tey við tíðini broyttu krøv.
2. Avgreiðsluviðurskiftini eru alt ov vánalig, og umstøðurnar fyri einari nútíðar skipan av vøruflutningi er als ikki til steðar.
3. Fleiri av flutningsførunum eru ótíðarhóskandi og lúka ikki treytirnar fyri nútíðar fólka- og vøruflutningi.

ad 1. Sjálv planleggingin í strandferðslumi er merkt av traditionellum hugsunarhátti. Soleiðis fer allur flutningur fram sjóvegis. Ilóast vega-

sambandið nú er vorðið ógvuliga gott á teinnum flestu oyggjum, so verður hetta ikki nýtt av strandferðslunni til góðsflutning. Siglingin fer fram eftir sama mynstri, sum var, áðrenn veganetið bleiv útbygt. Eitt tað besta dømi um hetta er siglingin til Hvalbiar og Sandvíkar. Hendan framferð avmarkar eisini flutningin til tær bygdir, sum hava havnarviðurskiftini í lagi. Eisini føriir hon við sær, at avgreiðslurnar verða nógvar og smáar. Orsakað av at skipini eru dýr í rekstri, ávirkar hetlar eisini tann frekvens, ið rutur eru til ley ávisu plássini.

ad 2. Tey vánaligu avgreiðsluviðurskiftini gera, at viðferðin av góðsi er vánalig og harav umkostningarnir til manko vaksandi. Arbeiðsháttur in er ótíðarhóskandi og lossiamboðum sum t.d. truckum er ógvuliga lítið av. Orsøkin til hettar er partvís at finna í sjálvari skipanini av avgreiðslunni. Tær eru nógvar og smáar, so tað líggjarliga grundarlagið fyri effektiviseringsamboðum er ikki til stoðar. Sum effektiviseringsamboð hugsi eg her bæði um truckar og tílíkt og um goymsluhølir. Í Havn og Klaksvík eru truckar og onnur lossi og lastingaramboð, men her eru goymsluumstøðurnar harafturímóti út av lagi vánaligar.

Umstøðurnar ávirka sjálvandi effektivitetin í arbeiðinum hjá strandferðsluni, men einamest nervar tað viðskiftafólkið, av tí at tey verða noydd at koyra so at siga alt góðs beinleiðis til skipini. Hvussu langar biðitíðirnar har kunnu verða er øllum kunnugt, ið ferðast við strandfaraskipunum. Sum áðurnevnt so eru tær flestu avgreiðslurnar útliciteraðar og skulu hvíla í sær sjálvum og klára seg við teinnum inntøkum, ið fáast við lossing og útkoyring av vørum. Hettar hevur so ta ávirkan, at teir brúkarar, ið ikki sjálvir hava møguleika at heinta vørurnar, og sum eventuelt búgva í aðrari bygd enn tí, har uppskipingarhavnin er, koma at gjalda munandi meir fyri vørurnar. Her er sostatt eitt órættvíst býti, ið kundi verið øðrvísi, um Strandfaraskip Landsins hevði flutningin allan vegin.

ad 3. Á hesum økinum eru havnarviðurskiftini ógvuliga avgerðandi. Soleiðis má metanin um, nær eitt skip er tíðarhóskandi ella ikki, gerast út frá siglingarøki og hvat skipið vanliga flytur. Leggur ein hettar til grund, kann sigast at bátarnir, ið sigla í Norðuroyum (til útoyggjarnar) og Mikinesar, eru hóskandi til vøruflutning og nøkulunda til tann fólkaflutning, har fer fram. Teistin og Ritan eru sum skip rætturliga vælhóskandi til tær siglingarleiðir, tey røkja. Tó skal viðmerkjast, at Ritan ikki kemur at hava nóg stóran bilkapacitet sum frálíður. Ternan er vælhóskandi til fólka- og persónbilaflutning, meðan hon ikki kemur at lúka krøvini til effektivan rakstur viðvikjandi lastbilum og í tí sambandi vøruflutningi. Hon kemur

eftir mánari metan uppá longri sikl at vera darvandi í flutninginum og vil koma at vera til hindurs fyri einum rationellum flutningssystemi.

Pride er rættligga effektivur sum frakthátur, men støddin av bátinum ger, at hann ikki væl kann nýtast til fólkaflutning á longum leiðum eftir opnum havi (t.d. í Suðuroya sigling). Fyri tær rutur, hann skal nýtast til, má tó altíð vera alternativmøguleikar fyri bilflutningi. Smyril er eitt gott skip til fólkaflutning, men flutningstølini vísa, at hann alt ov ofta er ov lítil, soleiðis at ferðafólk ikki hava møguleikar at ferðast so «komfortabult» sum nútíðin krevur. Her er bæði hugsað um sitiplássir og koyggjuplássir. Ferðin á skipinum er ov lítil (bert umleið 10 mál), og ger ein ferðingartíð uppá 6 timar aftur og fram til Suðuroyar, at hendan oyggj er heilt øðrvísi stillað í mun til aðrar oyggjar. Her er talan um eina isolatión búskaparliga, ið má metast at vera óacceptabul longu í dag, og sum kemur at merkjast enn meir framyvir. Harafturat kemur, at Smyril er tungur at arbeiða við sum flutningsfar fyri góðs, og bilkapaciteturin er, eftir hvat erfaringarnar og tøl vísa, alt ov lítil. Kjógvin er ikki tíðarhóskandi. Harafturat hevur báturin ikki styrki til sigling í vánaligum veðri um opið hav. Umvælingarútreiðslurnar eru alt ov stórar. Samantikið kann sigast at báturin er ikki serliga væl nýtiligur til bundna rutusigling, men kann væl nýtast tit frá sigling við óstortsligum góðsi (t.d. timbur, rør, cement o.t.).

Dagstjørnan er væl nýtulig sum góðsflutningsskip, men er í løtuni útleigað fyri longri tíð til vaktartænastu.

2.6. **Rokniskapur og statistiskir upplýsingar.**
Bókhaldið og peningaregistreringin verður førd væl og virðiliga. Tolini og framferðin er kanska ikki tann mest nýmólans, men tað tykist at virka í lagi og tað má sigast at vera høvuðssakin í hesum sambandi.

Tað statistiska grundarlagið er gott og verður ført ógvuliga væl. Í løtuni finnst slíkt tilfar bert fyri 3 ár aftur í tíðina, so tað er avmarkað, hvussu mangar avgerðir kunnu grundast á hetta. Sum frálíður má hetta grundtilfarið sigast at fáa stóran týdning, og eigur tað sjálvandi framyvir at førast eins væl og nú.

Sum ískoyti til tað tilfar, ið finnst, kundi tó verið ynskiligt, at kanningar vóru gjørdar yvir, hvør ferðast (tænastuferðir, stuttleikaferðir, forrætningsferðir, vanlig ferðandi, aldur og tilíkt) og hvaðar (viðari frá har sum skipið fer til).

Niðurstøða.

Soleiðis sum tað føroyska samfelagið er háttað við nógvum smáum bygdum og oyggjum, so mugu serliga stór krøv setast til alment skipaðan flutning fyri at tryggja øllum borgarum og øllum vinnuhættum forsvarligar flutningsmøguleikar. Hetta er ofta ein fyritreyt fyri at fáa fólk at verða verðandi úti á smáplássunum og reka vinnu har.

Tað er nógv, ið bendir á, at eitt effektivt transportsystem hevur størri týdning fyri minni framkomin øki enn statsligur ella kommunalur stuðul á annan hátt.

Soleiðis sum eg her havi mett Strandfaraskip Landsins, so er týðuligt, at har væntar nakað. Strandferðslan røkkur ov fá pláss í landinum og røkir tey ofta ov sjáldan. Orsøkin er fyri ein stóran part, sum nevnt, at umstøðurnar, ið Strandferðslan arbeiðir undir, eru ov vánaligar, og hetta stavar so aftur frá, at skiftandi landsstýrir og løgting higartil ikki tykjast hava haft ein miðvísan samferðslu- og samferðsluinvesteringspolitikk.

3.0. Uppskot til skipan av Strandfaraskipum Landsins framyvir.

3.1. **Inngangur.** Eg havi nú stutt lýst virkisøkið hjá Strandferðsluni og gjørt eina metan av tí. Spurningurin er síðan: Hvussu kunnu Strandfaraskip Landsins røkja ferðsluna effektivari og við einum hægri servicegradi?

Sjálvandi kunnu ávísar smærri «rationaliseringar» gerast í tí systemi, sum nú er, men tað er mín metan, at hetta vil vera ógvuliga stuttskygt, um so er at eingin ætlan yvir eitt longri áramál finnst.

Eg vil tí tilevna eitt uppskot til eina slíka ætlan og lýsa fíggjarligar og rakstrarligar avleiðingar av einari sovorðnari.

Uppskotið er bygt stigvíst soleiðis:

1. Avmarking av virkisøki
2. Formulering av máli hjá alment riknari ferðsla
3. Meting av samfelagsligu gongdini og øðrum, ið kann hava týdning fyri einum transportsystemi (prognosur)
4. Tilevnan av einum systemi við økonomiskum avleiðingum.

3.2. Hóskandi uppbýting av samferðsluspurninginum.

Samferðsla innanoyggja er ein ógvuliga fløktur og umfatandi spurningur. Neyðugt er tí at gera eina sundurhýting soleiðis at lættari er at greiða henda spurning. Eg havi gjørt eina tílíka, og sær hon út sum fig. 3.1.

Sjóvegis flutningur - - fólka-, post- og farmaflutningur saman
Landvegis flutningur - - fólkaflutningur fyri seg, farma- og postflutningur fyri seg
Loftvegis flutningur - fólka- og postflutningur, møguleikar fyri smávegis farmaflutningi.

Fig. 3.1.

Eg skal her stutt lýsa nøkur sjónarmið aftan fyri hesa uppbýting:

1. Sjóvegis flutningur er kostnaðarmikil bæði í investering og rakstri og hevur tað tí verið neyðugt at finna skipatypur við so fjølbroyttum flutningsmøguleikum sum gjørligt við tí fyri eyga at halda skipafalið niðri og økja um inntjeningina. Á smáplássum her á okkara leiðum loysir spurningurin seg sjálvan, tí her kunnu bert «konventionel» skip nýtast, og vera tey tí nýtt bæði til farma- og fólkaflutning. Farmurin er lítil og nervar tí ikki fólkaflutningin. Til tey størrn plássini hevur hendan sammanblandingin harafturímóti tarna fólkaflutninginum. Við teimum skipatypum, ið finnast í dag (t.d. roll on roll off skip), er tað bert ein spurningur um at útbyggja afløguplássini og goymslumøguleikarnar har, so vil farmaflutningur í teimum nøgdum, vit hava, ikki tarna fólkaflutningin nevnivert. Sjálvandi er her ein fyritreyt, at tað skal vera effektiv planlegging aftanfyri.

2. Flutningur eftir landi er sermerktur av smærri flutningsførum bæði í investering og rakstri. Her verður vanliga neyðugt við einari uppbýting av flutninginum, sum vist á í fig 3.1. Til smáar bygdir er tó greitt at ein slík ikki altíð er neyðug, og kann flutningurin røkjast heilt ella partvís samlaður við specialakførum. Støða til hetta má takast í hvørjum einstøkum føri.

3. Landsstýrið hevur fyriskipað vissum kanningum um innanoyggja flogferðslu. «Betænkning afgivet af udvalget vedrørende en lufthavn på Færøerne» frá 21. december 1973 nertur eisini við spurningin, og má hetta metast at vera ein flutningsmøguleiki innan alt ov langt áramál.

Støða er tó eingin tikin til hendan spurning hvørki um materiel ella skipan. Verður talan um vanlig flogfør, má slíkur flutningur í dag metast bert at koma at hava týdning fyri fólka- og partvís postflutning.

Øðrvísi er um talan verður um helikoptaraflutning. Her verða vissir møguleikar fyri smávegis farmaflutningi eisini t.d. til og frá útoyggjunum.

3.3. Avmarking av virkisøkinum hjá alment skipaðum flutningi.

So umfatandi samferðsluspurningurin er, so er eyðsæð, at hann ikki, í hvussu so er í fyrsta umfari, kann loysast bert av einari organisatión. Eitt uppskot um, at tað almenna skuldi umsitið og rikið allan flutning í Føroyum, hevur eftir mínari metan í dag ongan realistiskan møguleika fyri at koma ígjøgnum. Hetta er eisini tann niðurstøða, ið Samferðstunevnd Føroya Løgtings er komin til. Hendu nevnd arbeiðir í løtuni við at samskipa allan fólkaflutning eftir landi og sjógvi. Hendan samskipan er grundað á, at fólkaflutningur eftir landi skal vera partvís ella allur á privatum hondum, soleiðis at hann verður fraundur við tí bilkapaciteti, ið nýttur verður dagliga til annan flutning (skúlabarnaflutning, taxaflutning o.a.).

Skoytast skal uppí, at menn, ið arbeiða við samferðsluspurningum, eru samdir um, at jú meira landsumfatandi slíkar organisatiónir eru, jú hægri er servicegladuria, og jú betri verður tann sociali balansin í samferðsluni (samamber úrskurðin hjá flogvallarnevndini).

Mitt uppskot er tí grundað á, at tað almenna, í hvussu so er í fyrsta umfari, setur sær sum mál

1. sjálvt at reka alt flutningssamband, ið er neyðugt at fremja sjóvegis,
2. sjálvt at reka neyðugan farmaflutning til øll pláss í Føroyum.

Hetta verður gjørt fyri at kunna koma við einari loysn, ið er realistisk, og sum møguleiki er fyri at umsita. Í hesum skal tó einki vera, ið skal vera til hindurs fyri, at tað almenna, um politisk avgerð skuldi komið um nakað tíllíkt, fer upp í umsitingina av fólkaflutningi landvegis. Somuleiðis við flutningi út eftir til onnur lond. Mín metan er, at tað fyrsta stigið til víðari úthygging av almennari ferðslu er at fáa «strukturera» og setl í system í flutningin á tí øki, ið eg her havi skotið upp. Tá er sjálvt tað grundleggjandi «transportapparatið» har, og møguleikar eru at byggja víðari haðanífrá um neyðugt.

3.4. Uppskot til víðari málsetning fyri almenn riknari samferðslu her á landi.

Tey málini, ið eg skeyt upp undir 3.3. eru sokallaði «yvirordnaði» mál. Út frá hesum mugu so deilmál setast fyri tí organisatión, ið rekur ferðslunna. Neyðugt er at hava slík mál, soleiðis at organisatiónin kann reka ein miðvísan politikk fyri at fremja hesi.

Tað vil altíð fyri eina almenna fyritøku vera ein landspolitiskur spurningur, hvørji mál hon skal hava. Serstakliga ger hetta seg galdandi fyri

eina organisatión, ið heilt ella partvís skal figgjast fyri almennan pening. Eg skal her gera **uppskot** til nøkur mál á tí rakstrartekniska økintum, og eg skal her minna á, at virkisøkið er sum tað undir 3.3. nevnda:

1. Ferðslan skal rekast við einum frekvensi, ið er í samsvar við produktiónina og búskapin annars í avvarandi øki.
   Verður postur fluttur so í samsvar við fey krøv, ið postverkið setur.
2. Inntøkurnar skulu setast soleiðis, at ferðslan ber seg við tí undir- og yvirskoti, sum landsstýrið til eina og hvørja tíð ásetur.

Mitt uppskot í hesum sambandi er:

a. Landskassin skal bera avskrivingarnar.
b. Landskassin ávísur árliga peningaupphædd til nýinvesteringar.
c. Sjálvur raksturin skal balancera (dekningsbidrag 0) ella rekast við tilskoti.

3. Ferðslan hjá tí almenna setur sær sum mál at reka ein takstpolitikk soleiðis:

at økir, ið eru náttúrliga illa fyri, ikki verða stillaði øðrvísi enn hini,

at tað skal vera biligari at flyta pr/km jú longri avstanduri er. (Her eigur eitt maksimalmark fyri ferðaseðlar at umhugsast).

at farmagjald skal setast í mun til virðið á tí flutta.

3.5.0. Metingar av samfelagsøkjum, ið hava týdning fyri flutning og fyri flutningsmongdir.

Tær metingar, her kann vera talan um, eru

3.5.1. samfelagsøkonomiskar
3.5.2. fólkavøkstur
3.5.3. flutningsmongdir (fólk, góðs)

3.5.1. Hvussu stóran týdning broytingar í samfelagshúskapinum hava á ferðsluna innanoyggja hava vit í dag ikki nóg nógv statistiskt tilfar yvir. At tær hava stóran týdning, kann tó eingin ivi vera um. Fylgiskjøl 28 til 33 vísa til sammetingar, hvussu stóra ávirkan útflutningstólini hava

á nýtsluna av telefon, og eru kurvarnar baseraðar á statistik frá TFL. At nakað liknandi ger seg galdandi fyri strandferðsluna er hugsandi. At gera metingar um ta økonomisku gongdina her á landi framyvir er sum øllum kunnugt ógvuliga torført, og eg skal ikki gera royndir í so máta, tí óvissan er alt ov stór. Harafturímóti má væntast, at ein vaksandi idnaðarframleiðsla vil skapa ein størri stabilitet í inntøkunum, og vil hendan gongd skapa møguleikarnar fyri og tørva eitt stabilt flutningssystem. Fylgiskjal 34 vísir eina prognosu yvir ta samfelagshúskaparligu javnvágina 1975-85. Hendan vísir, at tann almenna nýtslan vil vaksa við ca. 100%, meðan tann privata vil vaksa við ca. 50%. Hendan gongd vil ikki eftir mínari metan hava nakra negativa ávirkan á ferðslu og flutning.

3.5.2. Prognosur um fólkatal.

Danmarks Statistik hevur gjørt nakrar metingar um gongdina í fólkatalinum í Føroyum.

Eg havi fikið tvinnar burturúr - eina optimistiska (prognosa 10) og eina pessimistiska (prognosa 4). Tær síggja soleiðis út:

	0 - 6 ár	7 - 16 ár	17 - 66 ár *)	yvir 66 ár	Tilsamans	Herav *) 17 - 29 ár
Prognosa 4:						
1968	6.045	7.430	21.625	2.803	37.903	7.404
1976	5.429	8.153	23.064	3.276	39.922	7.788
1987	5.000	6.967	24.700	4.367	41.033	8.403
Prognosa 10:						
1968	6.076	7.456	21.702	2.801	38.034	7.460
1976	6.464	8.442	23.841	3.251	41.998	8.235
1987	6.893	9.028	26.848	4.293	47.064	9.285

Longu í dag ber alt á tað borðið at prognosa 4 er tann mest trúliga.

Tendensurin hevur higartil verið, at fólk búsetist í trimum økjum, nevniliga Tórshavn, Klaksvík og Skálafjørðinum.

Tað er nín metan, at eitt fullfíggjað flutningssystem vil minka um hendan tendens. Danmarks Statistik hevur eisini gjørt eina metan um, hvussu fólkamongdirnar í hesum økjum verða, og sær tað soleiðis út fyri tær báðar áðurnevndu prognosur:

	Tórshavn + Tórshavnar uttanbiggja	Klaksvík	Skálafjørð-økið + Fuglafjørð	Onnur økir	Føroyar tilsamans
Prognosa 4					
1968	11.174	4.662	5.024	17.043	37.903
1976	14.643	4.958	5.277	15.043	39.922
1987	18.604	5.137	5.271	12.019	41.033
Prognosa 10:					
1968	10.933	4.683	5.028	17.391	38.034
1976	12.672	5.278	5.504	18.542	41.997
1987	14.487	6.044	6.214	20.319	47.064

3.5.3. Meting um flutningsnøgdir.

Tað skal beinan vegin gerast greitt, at metingar grundaðar á statistiskar upplýsingar bert fyri 3 ár vilja altið verða heftar við rettuliga stórum ótryggleika. Hinvegin so eru slíkar metingar neyðugar. Fylgiskjølini 35 til 38 vísa metingar av flutningstølum fyri ferðafólk og bílar á okkara høvuðsrutum. Fyri rutuna Klaksvík - Leirvík (fylgiskjal 35 - 36) er tað soleiðis mín metan, at flutningstølini verða hesi:

	Ferðafólk	Bílar
1974	53.000	8.000
1975	56.000	9.000
1976	60.000	10.000
1977	75.000	12.000

Fylgiskjal 37 vísir mína metan av flutninginum á rutuni Klaksvík-Tórshavn, og er hon hendan:

	Ferðafólk
1974	27.000
1975	29.000
1976	30.000
1977	20.000

Um ferðingartalið hendan veg kemur at stabilisera seg um 20.000 framyvir kemur sjálvandi at hava nær samband við, hvat skip kemur at sigla á rutuni.

Samlaða flutningin til og frá Norðuroyum meti eg sostatt soleiðis:

	Ferðafólk tilsamans	Ferðir pr. íbúgva ca.
1974	80.000	15
1975	85.000	16
1976	90.000	16
1977	95.000	17

	Bilferðir tilsamans	Bilferðir pr. íbúgva ca
1974	8.000	1,5
1975	9.000	1,6
1976	10.000	1,8
1977	12.000	2,0

I fylgiskjali 37 havi eg vist liknandi metan fyri rutuna Tórshavn-Suðuroy. Fyri hesa rutu er tað soleiðis min metan, at flutningstólini við núverandi Smyrli verða hesi:

	Ferðafólk tilsamans	Ferðir pr. íbúgva ca.
1974	48.000	8
1975	54.000	9
1976	59.000	10
1977	65.000	11

Kemur nýtt skip í hesa rutu, kunnu væntast væl hagri tøl. Sum áður nevnt, so tykist ferðingartalið pr. íbúgva at vera nær knýtt til ferðingartíðina, so tað er mín metan, at um nýtt skip fæst til Suðuroyarsigling áðrenn árslok 1976, so kemur ferðamannatalið í 1977 at vera umleið 80.000 á rutuni Tórshavn-Suðuroy. Hetta kemur at svara til ca. 14 ferðir pr. íbúgva ella nakað tað sama, sum longu í dag galdar fyri Norðoyar.

Bilflutningurin á rutuni til Suðuroyar er sum vist á fylgiskjali 37 a. Sum vist er hesin flutningur fyri 1973 2.300 bilar. Núverandi Smyril kann ikki væntast at flyta stórt meira um árið. Kemur bilferja áðrenn árslok 1976, so má hetta tal metast at blíva ca. 8.000 í 1977.

Fylgiskjal 38 vísir meting av flutningstølunum fyri rutuna Tórshavn-Skopun.

Samlaðu tølini fyri flutningin á hesi rutu meti eg at vaksa nakað, men

havast skal fyri eyga, at flutningstalið pr. íbúgva longu í dag liggur serstakliga bøgt í mun til aðrar rutur. Tey flutningstølini, ið eg havi mett, eru hesi:

	Ferðafólk tilsamans	Ferðir pr. íbúgva
1974	44.000	24
1975	47.000	26
1976	49.000	27
1977	50.000	28

	Bilar tilsamans
1974	1.000
1975	1.200
1976	1.300
1977	1.350

Tølini eru grundaði á núverandi Ritu.

Hesar metingar mugu sum áður nevnt takast við fyrivarni, av tí at grundtilfarið er so lítið og røkkur so stutt aftur.

Eg havi ikki gjørt nakra meting um tær privatu sjóvegis ruturnar. Stórt sæð kann sigast, at rutan Tórshavn-Skálafjørður kemur at hava flutningstøl yvir 150.000 til Eysturoyartunellin opnar. Hvussu nógv hetta tal kemur at falla, kemur at standa í mun til, hvussu væl ferðamannaflutningurin landvegis til ta tíð er skipaður. Rutan Vestmanna-Oyragjógv er og verður ein góð ruta, so leingi sum flogvøllurin er í Vágum.

Eg havi ikki grundtilfar at meta um flutningin her. Um ruturnar blíva alment riknar, so kann ein slík meting altíð gerast til ta tíð.

4.0. Gongdin innan flutningsøkið aðrastaðni og hjá okkum

Okkara flutningsskipan líkist ímongum førum tí, vit kenna — ella rettari sagt hava kent — aðrastaðni í heiminum, serliga í tilafturskomnum produktiónsøkjum. Felags eyðkennið er, at flutningurin gongur frá einum stað (t.d. høvuðsstað ella produktiónsmiðdepli) beinleiðis til hvørt pláss í einum øki. Her er okkara flutningur frá Tórshavn til fleiri bygdir í Sandoy og fleiri bygdir í Suðuroy góð dømir. Hesin flutningsháttur er góður í so máta, at góðs kemur beinleiðis til tey plássini, meðan øll, ið ikki eru á staðnum, fáa eina verri servicu. Her á landi fær tað sum áður

nevnt tær avleiðingar, at øll, sum ikki sjálvi hava flutningsmøguleikar (egnan bil ella tílíkt) frá havnarøki, fáa ein vánaligan og kostnaðarmiklan flutning.

Ein onnur avleiðing tykist hava verið tann, at øll framleiðsla á økjum, uttan um tey ávísu plássini, ikki hevur havt livilíkindir, og úrslitið hevur sostatt verið, at øll framleiðsla er centraliserað á teimum plássum, har flutningssambandið er í lagi.

Almennt flutningssamband skipað á henda hátt er sostatt við til at skapa ein ójavna í livivilkorunum hjá avsíðis liggjandi plássum mótvegis teimum, sum eru geografiskt betur fyri. Hetta er júst ikki uppgávan hjá einum slíkum sambandi.

Tann hugsan, ið liggur aftan fyri slíka flutningsskipan, er, at fráleiki og góðstyngd eru avgerandi fyri flutningskostnaðin og prísir í aðrar mátar. Hetta skal skiljast soleiðis, at góðstyngdin hevur verið avgerandi í so máta, at flutningsskipanin hevur umfatað minst møguliga umskipan. Viðvíkjandi fráleika er at siga, at tað hevur verið galdandi hugsan, at beinleiðis flutningur altíð hevur verið tann mest ódýri uttan mun til bundnan kapital í flutningsamboðum.

Við teimum teknisku møguleikum vit í dag hava, eru avgerandi broytingar komnar í tað grundtilfar, hesar hugsanir byggja á. Tekur ein fyrst góðstyngd so er so at siga eingin munur á, hvat eitt skip (her verður hugsað um okkara vanliga vøruflutning) og ein lastvognur kunnu. Við øðrum orðum møguleikarnir fyri umskipan eru heilt broyttir.

Hyggja vit síðan at spurninginum um fráleika, so er tað eyðsæð, at flutningsførini, ið krevja tær stóru investeringarnar (í okkara førum skip) og tær dýru rakstrarútreiðslurnar, skulu nýtast á so stuttum farleiðum sum gjørligt. Umskipan til bíligari flutningseindir (sum t.d. bílar) ger møguleikan fyri einum snildligari flutningssystemi størri, og møguleikarnir fyri einum hægri serviceniveau eru tá betur.

Eg skal nú sum dømi uppá tað, sum er framført her, taka flutningin til Suðuroy, bæði sum hann nú fer fram, og hvussu hann vildi farið fram, um flutningsmynstrið var uppbygt við einum «knútapunkti» til umskipan í smærri flutningseindir. Strandferðslan røkir Suðuroy við Smyrli og partvís Kjógvanum, og er farmaflutningsfrekvensurin í dag hesin:

Tvøroyri	6 ferðir um vikuna
Hvalba	2 ferðir um vikuna
Sandvík	2 ferðir um vikuna
Øravík	0 ferðir um vikuna
Hov	0 ferðir um vikuna
Porkeri	0 ferðir um vikuna
Fámjin	0 ferðir um vikuna
Lopra	0 ferðir um vikuna
Víkarbyrgi	0 ferðir um vikuna
Sumba	0 ferðir um vikuna
Vág	2 ferðir um vikuna

Útreiðslurnar fyri sambandið eru hesar:

Smyril	ca. 2.000.000
Kjógvin	ca. 200.000

og inntøkurnar

Smyril	ca. 2.000.000
Kjógvin	ca. 150.000

Bleiv flutningurin framdur við einum skipi til eitt stað kundi útreiðslurnar til Kjógvan verið nýttar til lastvognstransport á landi og flutningsfrekvensurin vildi verið hvønn dag til allar bygdir beinleiðis til móttakara fyri sama farmagjald, sum í dag verður goldið til uppskipingarhavnina.

Eitt slíkt knútapunktssystem krevur effektivt materiel, men av tí at nógvar avgreiðslur hlíva til eina, er grundarlag fyri at gera investeringar. Effektivt materiel førir so aftur við sær betri góðsviðferð.

Innan ferðamannaflutning hava vit longu í fleiri ár praktiserað flutning eftir hesum systemi. Sum dømir kunnu nevnast Sandoy við Skopun sum knútapunkti og Norðuroyar við Klaksvík sum knútapunkti.

Í roynd og veru er tað hetta systemið, ið verður nýtt eisini, tá ið talan er um farmaflutning til Norðuroyar. Her er bert tann skeivleiki, at neyðugar investeringar í lossiamboð og goymsluhús ikki eru gjørdar, og ferst farmur tí illa hæði við upp- og umskipan. Eg skal enda við at samandraga fyrimunirnar við einum flutningssystemi grundað á knútapunktir:

1. Nýtslustigið hjá teimum flutningseindum, ið eru dýrar í investering og rakstri, er størri.
2. Flutningurin kann rokjast til øll pláss av sonu organisatión, og gevur hetta møguleikar fyri einum rettvísum lakstpolitikki.
3. Flutningurin verður meira tíðum til øll pláss.
4. Flutningurin verður javnur.
5. Farmurin verður fluttur til dyrnar, og er hetta við í farmagjaldinum.
6. Av tí at fleiri avgreiðslur verða til eina, so eru møguleikar fyri at hava effektivt materiel har.

4.1. Uppskot til «høvuðsknútapunkt» í føroyskari flutningsskipan.

Eitt slíkt system sum áður skitserað kann eftir mánari metan nýtast við ógvuliga stórum fyrimuni her á landi.

Spurningurin um hvussu hesi knútapunkt skulu leggjast má fyrst loysast. Sum útgangspunkt nýti eg fylgiskjal 39, ið vísir rutunetið í dag. Av hesum sæst, at ein náttúrlig placering av knútapunktum norðanfjørðs er í Klaksvík og Tórshavn. Fyri Sandoy er Skopun tað mest náttúrliga staðið, um havnaviðurskiftini verða í lagi. Hetta pláss gevur minst siglingartíð og er við endan av einum veganeti. Somuleiðis gevur tað møguleika fyri seinni sambandi um Kirkjubø. Fyri Suðuroy er spurningurin meira fløktur. Fólkatalstyngdupunktið liggur beint sunnan fyri Trongisvágsfjørð, og stytsta siglingarleið til hin partin av landinum er frá teimum norðaru bygdunum. Besta placeringin vil tí eftir mánari metan vera í Nesi í Hvalba (fylgiskjal 40), um havnaumstøður kunnu fáast til vega á hesum plássi. Hetta pláss gevur eisini, eins og Skopun pláss fyri útbyggjan av ferðasambandi Suðuroy-Tórshavn yvir Sandoy og Kirkjubø. Kunnu ikki havnaumstøður gevast í teimum norðastu bygdunum, so má Hvítanes á Tvøroyri (fylgiskjal 41) sigast at vera tann frægasta loysnin. Fyri at eingin misskiljing skal vera, so skal eg vísa á, at ein centralisering av góðsflutningi til Suðuroy ikki nýtist at vera til hindurs fyri, at ferðafólkaflutningurin til tíðir kann ganga út frá t.d. Vági.

Verður góðsflutningurin centraliseraður fyri hvørt økið sær, so kann góðsflutningurin t.d. í 1977 ganga eftir teimum sjóvegis farleiðum, sum vist á í fylgiskjali 42. Upp aftur seinni tá ið t.d. Kirkjubø og Sund eru útbygd, vil flutningssambandið sjóvegis kunna fam fram sum vist á fylgiskjali 43.

Bítast skal merki í, at eg í báðum førum hevi roknað við, at Sands havn er so væl útbygt, at Skúvoy kann røkjast á sama hátt, sum Mykines verður tað í dag.

4.2.0.�upphæddin í sjóvegis flutningssambandi.

Ein slík centralisering av flutninginum millum okir gevur la storstu nýtsluna av skipakapacitetinum, men samtíðis setur hon stærri krav til kvalitetin av skipinum. Tey skulu kunna føra øll slog av farmi, føra tað neyðuga biltalið og føra tað neyðuga ferðamannalalið. Á hin bógvin er ein so altur bundin av atlaguviðurskiftunum.

Eg skal nú gera eina metan av teimum investeringum, ið eftir mínari metan eru neyðugar fyri at fáa eitt effektivt sjóvegis flutningssystem, og hví tær eru neyðugar. Fyri at gera hetta, er neyðugt at taka ruturnar eina og eina.

4.2.1. Ruturnr í Norðuroyum.

Á hesum rutum eru umstøðurnar við lendingum og tilikum soleiðis, at her kunnu bert smærri træskip nýtast. Strandferðslan hevur í løtuni tvinni skip stationeraði í hesum øki, eitt í Klaksvík og eitt í Hvannastundi. Oyggjarnar liggja soleiðis, at neyðugt verður framyvir at hava eitt skip í hvurjum av hesum plássunum. Skipini eru í løtuni í slíkum standi, at ikki verður neyðugt við nýinvesteringum her tey næstu árini. Sum tað sæst á rokuskapinum geva ruturnar í Norðuroyum eitt hall uppá umleið 500.000 kr. Tað eru eftir mínari metan eingir møguleikar at «rationalisera» her uttan at skerja servicegradin, og tað er sum kunnugt ein politiskur spurningur. Nakað annað er, at møguleikarnir fyri at Strandfaraskip Landsins kundu yvirtikið sjúkraflutningin á hesum øki átti at verið kannaðir, tí hetta vildi givið strandfaraskipunum í økinum betri figgjarligt grundarlag.

4.2.2. Rutan Klaksvík - Lorvík.

Ternan er í løtuni til umvæling, so hon kann nýtast til ferguleguna í Klaksvík og Lorvík. Tá hon er liðug, kemur hon væntandi rættuliga væl at kunna røkja fólka- og persónbilaflutningin nøkur ár fram. Harafturímóti kemur hon bert at kunna taka ein lasthil ella vøruvogn um ferðina, og kemur hetta eftir mínari metan at avmarka farmaflutningin og á tann hátt at nerva handilssamvinnu og aðra vinnu, ið nemur við flutning. Haraftur at kann væntast, at tá ið Eysturoyartunnellin opnar — væntandi í 1976 — so kemur tann núverandi Ternan sum áður nevnt at vera darvandi í farmaflutningssambandinum, og rutan kemur ikki at hava tann búskaparliga týdning fyri Norðuroyar, sum hon skuldi havt.

Neyðugt er tí ikki seinni enn 1977 at fáa eitt annað betur hóskandi skip til rutuna. Skal nýtt skip byggjast, má fyrireikast longu í ár. Viðvikjandi støddini av einum skipi má beinan vegin gerast greitt, at havnin í Lorvík ger, at skipið ikki má fara upp um 40 metra longd. Á rakstrarsíðuni eigur at hugsast um, at skipið skal kunna rekast av 3 mannum. Við núgaldandi

manningarlóg vil helta millum annað siga, at motorurin skal vera 600 hestar ella minni. Støddin (ca. 40 m) verður avgerandi (sambært skipasýnið) fyri, hvussu nógv ferðafólk eitt slíkt skip kann taka. Investeringin verður leysliga metti út frá liknandi projektum umleið 7 milj. kr. Fylgiskjøl 35 og 36 vísa ávikavist kurvur yvir eina metan um fólkaflutnings- og bilflutningstøl á rutuni, og fylgiskjal 44 visir eina rakstrarmeting fyri árið 1977/78. Prísirnir eru dagsprísir og lønin samsvarandi. Avskrivingar eru ikki við.

4.2.3. Rutan Tórshavn - Skopun.

Ritan røkir í dag hesa sigling. Skipið er rætturliga nýtt og vælhóskandi til ferðamanna- og góðsflutning. Her tørvar tó longu bilkapacitetur. Havnarviðurskiftini í Skopun eru í dag so vánalig, at ein ferja kann ikki setast í sigling hagar. Útbyggjan av Kirkjubø sum ferjuhavn er ikki við á løgtingsins fimm ára havnaætlan, so alt í alt má sigast, at møguleikarnir fyri broyting í skipamateriel ikki eru til staðar í løtuni.

Um flutningsmøguleikarnar til Sandoy ikki skulu vera verri enn til aðrar størri oyggjar í Føroyum má tó longu nú gerast greitt, at tá ið havnaumstøðurnar í Skopun og í Kirkjubø ella Tórshavn gera tað møguligt, verður neyðugt við einari liknandi investering sum á rutuni Klaksvík-Lorvík. Fylgiskjal 38 vísir sum fyrr nevnt eina metan av, hvussu persónflutningurin verður frannyvir til og frá Sandoy. Bitast skal merki í at ferðingartalið longu í dag er óvanliga høgt, nevniliga umleið 25 ferðir pr. íbúgva. Rutan kemur, mett eftir tí fólkatali, ið er í Sandoy, at hava verri møguleikar fyri at standa seg enn rutan Lorvík - Klaksvík, um so er at samhand ikki verður yvir Sand til Suðuroyar. Meðan Ritan siglur kann væntast, at hon í roknskapinum 1974/75 kemur at hava eitt positivt rakstrarúrslit áðrenn avskrivingar. Við Skopun sum einastu frakthavn í Sandoy má roknast við einum størri nýtslustigi av Rituni, enn vit hava í dag.

4.2.4. Ruturnar til Hest, Koltur, Nólsoy og Kaldbaksfjørð.

Hendan sigling bindur í dag umleið 1 bát. Rakstrarhallið er umleið 300.000 kr.

Her hevur Strandfaraskip Landsins skip, ið eru vælhóskandi til siglingina, og áðrenn nýinvesteringar verða neyðugar má roknast við vegasambandi á Kaldbaksfjørð. Aftaná hetta kann siglingin til Nólsoyar, Hest, Koltur væntandi røkjast við tí eykakapaciteti, ið aðrar rutur hava. Til dømis vil ein havn í Kirkjubø gera tað møguligt at røkja Hest og Koltur við skipinum, ið skal sigla til Skopunar.

4.2.5. Rutan Sand - Skúvoy.

Skúvoy verður í dag ferðsluliga røkt beinleiðis frá Havnini.

Um havnarviðurskiftini á Sandi veeða í lagi, er tilráðiligt og mest rationelt bæði út frá rakstrartekniskum og serviceteknikskum sjónarmiði at reka hesa ferðslu heinan av Sandi á sama hátt, sum Mykines verður røkt í dag. Investeringin her má roknast at koma at vera umleið 300.000 kr. í hóskandi far. Raksturin má metast at koma at geva eitt hall uppá umleið 40.000 kr. árliga.

4.2.6. Rutan Mykines - Sørvág.

Í dag verður Mykines røkt frá Sørvági. Sum støðan er, so er ein fyritreyt viðvíkjandi vali av flutningsfari, at tað skal kunna leggja til lendingina í Mykinesi. «Súlan» er í lumpuligum standi, so ikki verður neyðugt við tað fyrsta við nýinvesteringum her. Rakstrarhallið á hesari rutu má væntast at fara at vera umleið 40.000 kr. árliga.

4.2.7. Rutan Klaksvík - Tórshavn - Suðuroy.

Hendan rutan bindur í dag Smyril, Pride og partvís Kjógvan. Inntøkurnar eru umleið 3 milj. kr. og rakstrarútreiðslurnar nakað tað sama.

Sambandið Klaksvík - Tórshavn hevur í nógv ár verið høvuðsferðsluæðrin til Norðuroyar. Siglingin við Ternuni hevur broytt nakað um hendan týdning hvat viðvíkur ferðamannaflutningi og postflutningi. Framyvir má væntast, at beinleiðis sambandið Klaksvík - Tórshavn primert verður av týdningi sum farmaflutningsruta, og sekundert sum fólkaflutningsruta. Skal Iron kunna konkurrera á tí seinna økinum, so má tað vera við materielli, sum er skjóttgangandi og «komfortabult». Ilinvegin er tað mín metan, at tað framyvir ikki verður strangt neyðugt, at henda ruta skal røkjast hvønn morgun út frá Klaksvík. Alternativ sambandið Teruan - eysturoyartunnellin ella Tróndur vil til fulnar koma at útfylla hetta behov.

Tórshavn - Suðuroy. Her verður siglingarleiðin nógv ár fram primersambandið bæði fyri fólka- og farmaflutning. Smyril røkir í høvuðsheitinum hesa rutu. Siglingartíðin er umleið 3 tímar. Ferðingartalið er sum áður greitt frá ca. 8 pr. ibúgva. Tað er mín metan, at hetta lága ferðingartalið sammett við onnur økir skyldast tí lougu ferðingartíðini og harav tí lága frekvensinum. Smyril er dýrasta skip í rakstri pr. tíma hjá Strandfaraskipum Landsins. Liggitíðin er long grundað á vánaligar lossiumstøður og amboð, og hendan tíð er so at siga eins dýr og siglingartíðin. Behovið fyri flutningi av øðrum farmi, t.d. bilum, er vaksandi, og Smyril er óegnaður til slíkan flutning. Tað er mín metan, at aftaná at eysturoyartunnellin er tikin í nýtslu, kann siglingin Klaksvík - Tórshavn - Suðuroy røkjast av einum effektivum flutningsfari. Krøvini til hetta flutningsfar verða hesi:

1. Ferðin skal vera minst 16 mil
2. Skipið skal taka umleið 400 fólk
3. Skipið skal hava pláss til minst 40 bilar
4. Skipið skal vera av roll-on roll-off typuni, tí annars verður liggitíðin ov long, og farmaflutningurin kemur at nerva ferðamannaflutningin.

Haraftanat skulu krøv um økonomiskan rakstur, tryggleika og fartsumráði lúkast. Hetta eru krøvini, ið liggja aftan fyri tað projekt, sum tekniska deildin úti í landsstýrinum hevur gjørt. Kostnaðurin verður umleið 30 milj. kr. og leveringstíðin ca. 2 ár.

Tað er mín metan, at hendan investering er neyðug, um búskapurin í Suðuroy skal fáa eins góð livikor og aðrastaðni í landinum. Fylgiskjal 44 a vísir eitt rakstraryvirlit fyri ein nýggjan Smyril, um hann kemur ca. 1. januar 1977. Yvirlitið umfatar raksturin í 1977. Sjálvandi er stórur ótryggleiki í tølunum, men ferðamannatølini skuldu verið rættuliga haldgóð (sí 3.5.3. við fylgiskjølum).

Alt í alt skuldi verið møguleikar at fingið sjálvan raksturin av einum sovorðnum skipi at borið seg, um landskassin ber avskrivingarnar.

4.2.8. Rutur á privatum hondum.

Sum óivað øllum kunnugt eru 2 av okkara høvuðsrutum á privatum hondum, nevniliga rutan Oyragjógv - Vestmanna og rutan Tórshavn - Skálafjørður. Hetta at tvær slíkar rutur eru inni í tí almennt rikna høvuðsnetinum ger, at tað er eitt ávist órættvísi við farmagjaldi í so máta, at allur farmur má frankerast um aftur til hesar rutur, tá ið hann hevur verið fluttur av tí almenna netinum áðrenn. T.d. er eitt farmagjald goldið til Strandfaraskip Landsins nóg mikið til, at góðsið verður flutt allastaðni í Føroyum, har tað almenna rutunetið røkkur. Kemur ein privat ruta inn ímillum, má gjaldast eyka. Brúkarin er so tann, ið má taka sviðan.

Eg skal ikki fara nærri inn á spurningin um privatar mótvegis almennum rutum, men skal bert vísa á, at fyri brúkaran og fyri samskipan av flutningi sum heild hevði verið best, at allur flutningur og ábyrgd í so máta lá hjá einari organisatión. Fylgiskjal 45 a og b vísa eitt skriv, ið eg havi sent til landsstýrið, har eg havi lýst mína støðu til flutningin inn á Skálafjørðin.

4.2.9. Samlaðar íløgur í sjóvegis flutningssamband.

Samanfata vit nú tað, ið her er framført undir 4.2.0 — 4.2.7, so koma íløgurnar í dagsprísum til eitt effektivt innanoyggja sjóvegis flutningssamband og vera umleið 44 milj. kr. frá nú av og fram til 1980 (sí fylgiskjal 46). Við teimum finansieringsháttum, ið vanliga galda fyri skipabygging, so er tað tó øllum greitt, at hesar íløgur í praksis koma at røkka

yvir eitt rættuliga langt áramál. Á hin bógvin so skuldi flutningsmaterielliið aftan á verið so nýmótans, at ikki skuldi verið neyðugt við stórum íløgum tey fylgjandi 10-15 árini. Á fylgiskjali 46, har íløguupphædd og skipatypur eru vistar, standa uppskot til kontraktliðspunkt og leveringstíð. Viðvíkjandi tí fyrra so er tað at siga, at tað sjálvandi er ein politisk avgerð, nær hetta tíðspunkt verður, men raðfylgjan av investeringunum verður eftir mínari metan hin sama uttan mun til, nær hin politiska avgerðin kemur.

Verða íløgurnar gjørdar, so kemur Strandfaraskip Landsins áðrenn 1980 at hava hendan skipaflota:

2 smæri skip í Norðoyum
1 ferju Lorvík - Klaksvík
1 ferju Klaksvík - Tórshavn - Suðuroy
1 ferju Sandoy - Streymoy
1 cu. 12 tons hál til Sand - Skúvoy
1 do Sørvág - Mykines
1 bát til bygdir nærhendis Havnini
1 eykaskip kombinerað frakt - ferðafólk.

Heraflucat koma so eventuellar yvirliknar privatar rutur. Skipatalið í dag er 11.

Tey skip, ið koma at ganga út úr sigling og aftur mugu seljast ella nýtast til eykaskip verða sambært hetta:

Smyril
Pride
Kjógvin
Dagsstjørnan
Ritan
Ternan.

Smyril er tað av skipunum, ið hevur avgjørt tað hægsta søluvirði, og er av einum kvalileti, sum er langt omán fyri meðal fyri skip til vanligan post- og ferðamannaflutning. Pride, Dagstjørnan og Ritan hava eisini eitt rættuliga høgt søluvirði, meðan Kjógvin og Ternan ikki kunnu væntast at geva nógv í so máta.

4.3.0. Metan av íløguupphæddum á landi.

Fyri at fáa eitt so slórt nýtslustig av skipunum og so høgan serviceegrad sum gjørligt, er neyðugt at investera pening í sokallaðar terminalar í teimum áðurnevndu knútapunktum.

Sum grundarlag fyri hesum upphæddum nýti eg kostnaðarætlan, ið er gjørd fyri ein slíkan terminal, ið ætlanin er at fara undir í Klaksvík. Men hesir terminalir eru ikki nokk, um transportsystemið skal umfata allar bygdir í landinum. Her verður neyðugt at investera í bilar eisini.

Tað er tó mín metan, at tað ikki í øllum førum verður neyðugt, at Strandfaraskip Landsins skal eiga øll flutningsføcini. Her má í hvørjum einstøkum føri takast støða til samstarv við postverk, telefonverk og aðrar almennar stovnar. Eisini má, serliga við flutningi til heilt smá pláss, hugsast um at útlicitera flutningin, soleiðis at eventuelt skúlabarna-, post-, ferðamanna- og smágóðsflutningur verður samskipaður mest gjørligt, soleiðis at hesar rutur fáa tað størst gjørliga figgjarliga grundarlagið. Eg skal nú stutt taka øki fyri øki og geva eina metan av teimum neyðugu investeringunum.

4.3.1. Ætlan fyri Norðuroyar.

Í Klaksvík er neyðugt við einum terminali. Sjálv bygningsútreiðslan verður umleið 700.000 kr. Harafturat verður neyðugt at nýta 50.000 kr. til ein bil. Manningina í Klaksvík ætli eg til 3. Tað einasta landvegis ferðasamband verður innan fyri tað komandi árið sambandið Klaksvík - Árnafjørð - Hvannasund - Viðareiði. Tað eru longu tikin stig til eina farmarutu hendan vegin. Samráðingar hava verið við postverkið, og tá ið byrgingin um Hvannasund er liðug, byrjar farma- og postruta frá Viðareiði hvønn morgun til allar áðurnevndu bygdir og aftur hinvegin úr Klaksvík hvønn fyrrapart. Avgreiðslurnar í Hvannasundi, Norðdepli og Viðareiði kunnu niðurleggjast, av tí at automattelefon er í øllum hesum bygdum, soleiðis at farmur móti Klaksvík antin kann fráboðast til avgreiðsluna í Klaksvík ella til tann mann á Viðareiði, ið skal røkja koyringina. Allar aðrar bygdir í Norðuroyum mugu røkjast við báti. Summarferðaætlan, ið nú kemur, gevur samband til allar bygdir uttan Múla hvønn dag í vikuni. Hetta er neyðugt fyri mjólkaflutningin. Samantikið kann sigast, at á summri í ár skuldi flutningurin í Norðuroyum verið so góður, at neyvan fæst hann betur, uttan so at onnur flutningsfør, sum t.d. helikoptari verður tikin í nýtslu. At ein slíkur burdi umhugsast gjølla sæst best av teimum útreiðslum, ið Strandferðslan hevur í hesum øki.

Tað samlaða undirskotið í Norðuroyum hjá Strandferðsluni av siglingini eystan- og vestanfyri Múla, flutningi við bílum og rakstur av avgreiðsluni fer ætlandi at vera umleið 500.000 kr. árliga. Skal broyting koma í her, so má antin kostnaðurin upp ella servicegradurin niður, og tað eru politiskir spurningar.

4.3.2. Ætlan fyri Suðuroy.

Í Suðuroy vil terminaliløgan verða umleið hin sama sum í Klaksvík, umleið 700.000 kr. Viðvíkjandi farmaflutninginum til tær sunnaru bygdirnar, so má eisiuj her fáast samstarv í lag við postverkið. Hetta ber í sær, at flutningurin má ganga frá Sumba og Fámjin til tað pláss, har terminalurin er. Tær norðaru bygdirnar kunnu røkjast frá sjálvum terminalinum. Hvat viðvíkur Vági so er tann mest rationella loysnin, at Strandferðslan røkir vanligan vøruflutning sjálv. Her má tó umhugsast eventuelt at hava goymslu í samstarvi við t.d. postverkið og so samla góðs og koyra út við vøruvogni. Koyringin til og frá goymslu eigur so at vera røkt av Strandferðsluni.

Niðurstøðan er, at partar av farmaflutninginum (serliga til smábygdirnar í sunnara enda og Fámjin) eiga at vera útliciteraðir. Til tann partin, ið ikki verður útliciteraður er neyðugt at investera umleið 500.000 kr. í vøruvogn, lastvogn (til tungt góðs og stórar rúgvur) og truckar.

Neyðug manning (fastlønt) ca. 3 manns.

Rakstrarútreiðslurnar fyri Strandferðsluna í Suðuroy kunnu ætlast at hlíva umleið 300.000 kr. árliga. Um góð samskipan fæst við postverkið, er tað ikki órealistisk metan, at inntøkurnar frá avgreiðslugjaldi, postflutningi ímillum bygdir koma at vera nøkurlunda tær somu.

Eg skal vísa á tað, sum eg fyrr havi nevnt, at tað at farmaflutningurin gongur til eitt stað í Suðuroy ikki nýtist at føra við sær, at ferðamannaflutninguriu skal gera tað sama. Slíkur flutningur vil ikki vera uakað til hindurs fyri, at Strandferðslan kann niðurleggja allar avgreiðslur í Suðuroy og gera sína egnu avgreiðslu. Telefonetið er automatiskt og kann nýtast til fráboðau um farm, ið síðan kann avheintast.

4.3.3. Ætlan fyri Sandoy.

Sandoy er so mikið nógv ótættari fólkað eru hinar oyggjarnar, at her er nokk haldbesta loysnin at leggja terminal í Skopun og so útliciteru flutningin víðari. Investeringarnar hjá Strandferðsluni verða umleið 600.000 í bygging og umleið 80.000 til truck. Manning ca. 2 manns fastløntir. Allar tær núverandi avgreiðslurnar kunnu niðurleggjast, um terminalur verður bygdur í Skopun, og tað skuldi verið ein vissur møguleiki fyri at fingið flutningin í hesum øki at staðið seg figgjarliga, men realistiskt er nokk at rokna við einum halli uppá ca. 100.000 kr. árliga.

4.3.4. Ætlan fyri centraløkið (Streymoy - Vágoy - Eysturoy).

Her verður høvuðsílagan terminalur í Tórshavn. Orienterandi samrøður hava verið við tollumsitingina, og hevur tað vist seg, at grundarlag er fyri einari samvinnu um felags goymsluhølir.

Samlaða arealkravið er umleið 2000 m², og kostnaðurin av strandferðslupartinum má ætlast at vera umleið 2,5 milj. kr.

Tað idéuppskot (dec. 1973), sum konsulentfirmaið Anders Nyvig A/S hevur gjørt fyri Tórshavnar Býráð, er soleiðis háttað, at økið inn av Bursatanga er tann mest nærliggjandi loysnin fyri einum terminali í Tórshavn.

At meta tørvin fyri flutningsførum er ógvuliga torført í hesum stóra øki. Av hesi orsøk er byrjað royndarkoyring við farmi til Vágarnar - Vestmanna, Kvívík og Leynar. Somuleiðis eisini til sundalagsbygdirnar, Saksun og Norðureysturoy. Ætlanin við hesum royndum er at kanna hóskandi akfør og ætla um flutningsmongdir. Tann økonomiska risikoin í tí seinast nevnda royndarøkinum er heilt avmarkað, av tí at sáttmáli er gjørdur við postverkið um flutning fyri teir.

Um skipanina av flutninginum er tað at siga, at Kvívík, Leynar og Vestmanna eiga at røkjast beinleiðis úr Havnini. Fráboðan um góðs móti Havnini skal fráboðast telefoniskt á næstu boðstøð hjá TFL. Í Vágum má skaffast høli til góðsfordeilingsstøð, helst í samband við annan almennan stovn, og síðan lata teir menn, ið eru settir á Súluna, standa fyri útdeiling og innheintan av farmi. Samstarv eigur at fáast í lag við postverkið, soleiðis at Strandferðslan fær postflutningin. Hetta vil gera tað neyðugt hæði at hava flutningsfar úr Havn og til Havnar tíðliga á morgni hvønn dag. Hetta gerst heltast við umbýting av bilum við Oyragjógv. Til flutning av størri rúgvum og tungum góðsi má nýtast stórur og vælútgjørdur bilur, ið í høvuðsheitum má koyra til góðsfordeilingsstøð. Á ein slíkan hátt verður tann lutfallsliga stóra íløga, ið eitt slíkt flutningsfar krevur, best útnyttað, við tað at hetta eisini kann nýtast til flutning til onnur pláss.

Flutningsspurningarnir norðuri í Sundalagnum og í Eysturoynni verður eftir mínari metan best loystir, við at strandferðslan sjálv rekur flutningin á høvuðsrutunum og útliciterar tann vanliga flutningin til smábygdirnar. Tó má altíð so stórur flutningskapacitetur vera til staðar, at serligur flutningur t.d. av seyði altíð má kunna fremjast av Strandferðslumi. Alt í alt meti eg, at íløgan til flutningsfør í centralokinum verður umleið 800.000 kr., og umfatar hetta 5 smærri og 1 stóran bil.

Økið er so mikið fólkarikt, at um eitt rímuligt samstarv er við postverkið og aðrar almennar stovnar, so skuldi raksturin aflamá eina innkoyringstíð havt rættuligu góðar møguleikar fyri at borið seg.

4.3.5. Samanfatan av íløgutørvinnu á landi

Draga vit nú saman tað, sum er framført her undir 4.3.0 til 4.3.4, so er íløgutørvurin til landvegis farmaflutningssamband við allar bygdir í Føroyum hesin:

íløgur til terminalar á teimum plássum sigit verður til	4.500.000 kr.
íløgur í truckar o.t.	360.000 kr.
íløgur til bilar	1.070.000 kr.
Tilsamans	5.930.000 kr.

1.430.000 kr. til bilar og truckar er ein investering, ið røkkur 4 ár, meðan tær 4,5 milliónirnar eru so at siga ein eingangsinvestering.

4.4.0. Viðmerkingar til ta samlaðu íløguupphæddina.

Av hesum, ið er framført, sæst, at fyri at fáa eitt nútímans flutningssystem, ið skal vera til gagn fyri handil, ídnað, landbúnað, postflutning og tann einstaka borgaran sum heild krevst ein íløga omanfyri tær 50 milliónirnar. Eg skal vera fyrstur til at viðganga, at ótryggleiki er í hesum tali, og kemst hetta av tí ógvuliga lítla erfaringsmateriali, ið finst, serliga um landvegis flutning. Men á hitt borðið so er ólryggleikin ikki størri enn eini 10%, tá ið projektið um nýggjan Smyril hevur verið í útboð.

Tað flutningssystemið, ið vit fáa fyri hendan pening, verður landsumfatandi, og skuldi tað kunnað stuðla búskapinum á øllum plássum í landinum við ódýrum flutningi og við so stórum frekvensi, sum tørvur er á, um neyðugt hvønn dag.

4.5.0. Rakstrarútlit

Eftir mínari metan so vil tað vera órealistiskt at lugsa sær, at hetta flutningssystem skal bera seg út frá einum rakstrarsjónarmiði, **um landskassin ikki ber avskrivingarnar.** Ger hann tað ,so sær øðrvísi út. Tað er ikki, soleiðis meti eg tað, órimuligt at reka ein takstpolitikk soleiðis, at dekningsbidragið antin verður 0 ella positivt. Sjálvandi skal effektivitetskravið vera í lagi.

Tá ið rakstrarútlitið skal metast, eigur, sum eg nevndi í byrjanini, at roknast við tí nationaløkonomiska yvirskotinum.

Eg skal annars í hesum sambandi minna á mítt uppskot (3.4.) til málsetning fyri alment riknan flutning.

Fylgiskjal 1



3 ferðir um vikuna ella minni
15 plássa ~ 5.227 íbúgvar

Meir enn 3 ferðir um vikuna
22 plássa ~ 21.260 íbúgvar

Fylgiskjal 2



Fylgiskjal 2 a

AVGREIÐSLUR & AVGREIÐSLUMENN V. M.

HØVUÐSAVGREIÐSLAN TÓRSHAVN TLF. 11512 — 13013,
GOYMSLAN TLF. 13948.

Avgreiðslan	í Vági	v/ Sverra Skaalum,	Tlf.	73012-73029
—	á Tvøroyri	v/ Otto Mortensen,	—	71038
—	í Hvalba	v/ D. J. Thomsen,	—	19
—	í Sandvík	v/ Niels M. Nielsen,	—	2
—	í Skúvoy	v/ Leivur Skálagarð,		
—	á Sandi	v/ Niels Mohr,	—	12
—	í Húsavík	v/ Thomas P. Olsen,		63
—	í Skálavík	v/ Viggo Dalsgaard,	—	31
—	í Skopun	v/ Kristoffer Poulsen	—	1
—	í Hesti	v/ Ansgar Lenvig,		
—	í Miðvági	v/ Kristoffer Svabo,	—	1
—	í Sørvági	v/ Arnold Jacobsen,	—	71
—	í Mikinesi	v/ Jógvan Meinhard Jacobsen	—	støðin
—	í Nólsoy	v/ Jens Hansen,	—	7
—	í Kaldbak	v/ J. P. Nolsøe,	—	25
—	í Gøtu	v/ Hans Hansen,	—	33
—	í Lorvík	v/ Óla Olsen,	—	81
—	í Fuglafirði	v/ Erhard Petersen,	—	7
—	í Oyndarfirði	v/ Peter Klein,	—	2
—	á Hellunum	v/ Sindri Johannesen,		
—	í Elduvík	v/ Sofus Davidsen,	—	støðin
—	í Funningi	v/ Peter Johannesen,		
—	í Klaksvík	v/	—	56000
—	á Syðradali K	v/ Andr. Eliasen,		
—	á Húsum	v/ Anthon Hojgaard,		
—	í Kunoy	v/ Jógvan E. Olsen,	—	11
—	í Mikladali	v/ Líggjas Eliassen,	—	2
—	á Trollanesi	v/ Jógvan Joensen,		
—	í Haraldsundi	v/ A. Magnussen,		
—	á Viðareiði	v/ Jacob M. Jacobsen,	—	22
—	í Hvannasundi	v/ Niels í Buð,	—	12
—	í Norðdepli	v/ Johan A. Petersen,		
—	á Kirkju	v/ Kai Simonsen	—	støðin
—	í Hattarvík	v/ Tróndur Fuglø,	—	støðin
—	í Svínoy	v/ Simun Olsen,		

Fylgiskjal 3.

Millum Føroya landsstýri og Starvsmannafelagið er gjørdur hesin

SÁTTMÁLI
viðvíkjandi lønum o.t. á strandfaraskipum Landsins
og «Jens Chr. Svabo».

§ 1.

Skiparar á størru strandfaraskipunum t.v.s. frá Smyrli til og við Svabo kr. 27.745,00 um árið í grundløn hækkandi 2. hvørt ár við kr. 1.200,00 til kr. 36.145,00.

Skiparar á minnu strandfaraskipunum kr. 26.900,00 um árið í grundløn hækkandi 2. hvørt ár við kr. 830,00 til kr. 32.710.

Fyri at vera til taks útyvir 44 tíma viku fáa skiparar serløn kr. 2.040,00 árligu. Um tað við árslok vísir seg, at skipari hevur haft effektiva tíð, ið fer upp um tað, ið fasta serlønin svarar til, eigur hesin rætt til eykaserløn í mun til úrtíðargjaldið hjá stýrimonnum. Við effektiva tíð er at skilja tann tíð, ið viðkomandi skip er í tænstu.

§ 2.

1. stýrimenn á størru strandfaraskipunum kr. 26.900,00 um árið í grundløn hækkandi 2. hvørt ár við kr. 830,00 til kr. 32.710.

2. stýrimenn á størru strandfaraskipunum og kom b.stýrim./motorp. á minnu skipunum kr. 25.775,00 um árið í grundløn hækkandi 2. hvørt ár við kr. 615,00 til kr. 30.080,00.

Arbeiðstíðin hjá stýrimonnum er í meðal 44 tímar um vikuna. Lønin fyri úrtíðararbeiði er kr. 12,75 um tímin.

§ 3.

1. meistarar á størru skipunum kr. 26.900,00 um árið í grundløn hækkandi 2. hvørt ár við kr. 830,00 til kr. 32.710,00.
2. meistarar á sonnu skipum kr. 25.775,00 um árið í grundløn hækkandi 2. hvørt ár við kr. 615,00 til kr. 30.080,00.

3. meistarar kr. 24.525,00 um árið í grundløn hækkandi 2. hvørt ár við kr. 490,00 til kr. 28.445,00.

Motorpassarar kr. 23.225,00 um árið í grundløn hækkandi 2. hvørt ár við kr. 490,00 til kr. 27.145,00.

Fyri at vera til taks út yvir 44 tíma viku fáa 1. meistarar í serløn kr. 3.060,00 um árið. Umtað við árslok vísir seg, at 1. meistari hevur haft effektiva tíð, ið fer upp um tað, ið fasta serlønin svarar til, eigur hesin rætt til eykaserløn í mun til úrtíðargjøldini hjá maskinmonnum. Við effektiva tíð er at skilja tann tíð, ið viðkomandi skip er í tænastu.

Arbeiðstíðin hjá 2. og 3. meistarum og motorpassarum er í meðal 44 tímar um vikuna. Lønin fyri úrtíðararbeiði er kr. 12,75 um tíman.

§ 4.

Hovmeistarar kr. 25.775,00 um árið í grundløn hækkandi 2. hvørt ár við kr. 615,00 til kr. 30.080,00.

Kokkar kr. 23.225,00 um árið í grundløn hækkandi 2. hvørt ár við kr. 490,00 til kr. 27.145,00.

Kahytsgentur kr. 14.190,00 um árið í grundløn.

Fyri at vera til taks út yvir 44 tíma viku fáa omanfyrinevndu serløn kr. 3.060,00 um árið. Um tað við árslok vísir seg, at hesi hava haft effektiva tíð, ið fer upp um tað, ið fasta serlønin svarar til, eiga tey rætt til eykaserløn uppá kr. 12,75 um tíman. Hovmeistarar, kokkar og kahytsgentur fáa ikki aðra úrtíðarløn.

§ 5.

Jens Chr. Svabo: Fyri sunnu- og halgidagar í sjónum verða veittir frídagar í landi. Arbeiðstíðin er tann sama sum hjá manningunum á strandfaraskipunum, og ger skiparin av, nær avspaseringin kann fara fram.

§ 6.

Lønir, serlønir og úrtíðargjøld verða at javna upp ella niður við 1½% fyri hvørji 6 stig, ið prístalið fer upp um 400 ella niður um 405. Dýrtíðarviðgerðin fer fram hvørm 1. apríl og 1. oktober eftir tí prístali, ið lýst er at galda fyri ávikavist januar og juli ársfjórðing frammanundan.

§ 8.

Manningin eigur rætt til frían kost umborð, tá ið teir sigla. Eru ikki umstøður at matskaffa á skipi, verða veittar hvørjum av manningini kr. 10,00

um dagin, tá siglt verður. Fyri sigling í 75 timar ella meira um vikuna, verða veittar kr. 12,50 um dagin.

§ 9.

Fyri sigling sunnu- og halgidagar, grundlógardagin og ½ flaggdagin verður veitt manningini úrtíðarløn + 33⅓% tó minst 75 kr. til samans fyri dagin.

§ 10.

Uppsagnarfreistin hjá manningini gongur eftir reglunum í sjómanslógini bæði fyri teir og fyri reiðara, tó eiga dekkarar og kokkar rætt til 1 mánaða uppsøgn.

§ 11.

Arbeiðstíðin hjá manningini verður gjørd upp fyri hvørja viku sær, og møgulig yvirtíð avspaserað tíma fyri tíma. Tílík avspasering eigur at fara fram beinanvegin aftaná uppgerðardagin, ella so sum seinja læsi um partanna míllum.

Eigur ein aftaná avspasering yvirtíð til góðar, verður úrtíðarlønin goldin í seinasta lagi tann síðsta í mánaðinum. Sama er galdandi á skipum, har ongin avspasering er.

Viðvíkjandi uppgerð av arbeiðstíðini verða teir í grein 9 ásettu halgidagar og føstu frídagar (tó ikki sunnudagar og halgidagar, ið fella á sunnudøgum) at rokna við í tímatali, ið viðkomandi skip er í tænastu. Óveðursdagar, har ongin sigling er, verða í hesum sambandi at rokna við í tímatali, ið viðkomandi skip vildi verið í tænastu undir vanligum umstøðum eftir ferðaætlanini.

Fyri arbeiði meira enn 15 timar í einum døgni, verður latið úrtíðargjald, svarandi til galdandi úrtíðarløn + 33⅓% fyri tað tíð, ið fer út yvir 15. tíman, uttan mun til tu í sáttmálanum ásettu arbeiðstíð.

Manningin fær summarfrí eftir sonnu reglum sum aðrir starvsmenn. Umframt frítíðina eigur manningin rætt til serstakt frítíðargjald svarandi til 1½% av føstu ársinntøkuni.

§ 12.

Hesin sáttmáli fær gildi frá 1. apríl 1973. Sáttmálin kann verða uppsagdur av báðum pørtum við 3 mánaða freist, tó fyrstu ferð til 1. oktober 1974.

Fylgiskjal 4.

FERÐAFÓLK — TILSAMANS

Smyril - Pride - Másin - Sildberin - Dagstjørnan - Ternan - Barskor
Lisshøvdi - Súlan

Mánaður	1971	1972	1973
Januar	8.083	8.996	10.739
Februar	7.524	8.113	9.085
Mars	8.512	9.778	11.725
April *)	5.748	12.601	14.776
Mai *	11.718	14.485	14.624
Juni	16.945	17.445	21.479
Juli	18.561	22.024	23.668
August	17.774	18.245	21.025
September	11.570	13.491	16.995
Oktober	10.248	12.601	13.763
November	8.356	10.232	11.632
*) verkfall í 1971	134.415	158.618	180.955

Fylgiskjal 5.

M/S SILDBERIN — FERÐAFÓLK

Mánaður	1971	1972	1973
Januar	534	386	828
Februar	505	454	598
Mars	594	609	658
Apríl	362	524	857
Mai	895	708	711
Juni	1278	849	954
Juli	1339	842	1044
August	1210	851	772
September	872	661	818
Oktober	907	789	817
November	413	482	1036
December	656	704	997
	9.565	7.859	10.090

Fylgiskjal 6.

M/S DAGSTJØRNAN — FERÐAFólK (KJóGVIN)

Mánaður	1971	1972	1973
Januar	88	132	177
Februar	75	118	91
Mars	119	56	201
Apríl	247	193	236
Mai	416	208	107
Juni	584	294	499
Juli	446	367	371
August	530	273	190
September	102	234	220
Oktober	14	187	145
November	108	122	98
December	84	247	126
	2.813	2.421	2.461

Fylgiskjal 7.

M/S BARSKOR — FERÐAFÓLK

Mánaður	1971	1972	1973
Januar	291	493	421
Februar	259	200	299
Mars	270	435	435
Apríl	184	570	554
Mai	377	618	517
Juni	515	603	895
Juli	771	829	814
August	669	821	1070
September	454	457	565
Oktober	411	534	
November	327	422	
December	537	566	
	5.065	6.844	

Fylgiskjal 8.

M/S LISSHØVDI (MÁSIN) — FERÐAFÓLK

Mánaður	1971	1972	1973
Januar	113	143	177
Februar	126	109	171
Mars	91	203	158
April	136	207	303
Mai	161	175	236
Juni	265	282	347
Juli	321	608	712
August	322	505	673
September	276	248	327
Oktober	284	306	251
November	163	143	251
December	95	261	164
	2.353	3.190	3.695

Fylgiskjal 9.

M/B SÚLAN — FERÐAFÓLK

Mánaður	1971	1972	1973
Januar	11	12	1
Februar	8	5	3
Mars	3	14	3
April	19	11	21
Mai	39	57	64
Juni	106	162	67
Juli	182	344	358
August	52	88	213
September	23	22	20
Oktober	18	15	20
November	8	5	13
December	12	0	3
	481	735	811

Fylgiskjal 10

M/S PRIDE — FERÐAFÓLK

Mánaður	**1971**	**1972**	**1973**
Januar	1152	852	1236
Februar	1037	598	1026
Mars	1242	1026	1447
April	956	1851	2450
Mai	2019	1894	2371
Juni	3363	2482	3582
Juli	3518	3523	3790
August	3272	2447	2773
September	1677	2235	2688
Oktober	1389	1553	1685
November	1215	1245	1780
December	1126	1412	1164
	21.966	21.118	25.988

Fylgiskjal 11



Fylgiskjal 12

M/S TERNAN — FERÐAFÓLK

Mánaður	1971	1972	1973
Janúar	2615	3263	3456
Febrúar	2524	3023	2796
Mars	2831	3079	3495
Apríl	1372	4316	3612
Maí	3975	4174	3870
Júní	4454	5255	6061
Júlí	4359	6052	5254
Ágúst	5014	4789	4809
September	2989	3615	4462
Oktober	2773	3211	3256
November	2675	3031	3486
December	2737	2925	3159
	38.321	46.633	47.616

Vylgiskjal 13



I er morguntúrar
II er fyrrapartstúrar
III er kvøldtúrar ca. kl. 19
IV er kvøldtúrar ca. kl. 21
*) merkir, at eykaskip hevur verið nýtt.

Ein túrur er frá Klaksvík til Fuglafjarðar og aftur.
Einkulttúrar er annan vegin

1972

	Jan.	Febr.	Mars	April	Mai	Juni	Juli	Aug.	Sept.	Okt.	Nov.*)	Des.*)	Tils. f. ár. 1972
Tal av I túrum	30	29	30	28	30	30	31	31	30	31	19	18	337
Ferðafólk I túrar samlað	902	767	912	1066	1031	1152	1278	986	827	798	492	536	10747
Ferðafólk I túrar pr. túr	30	26	30	38	34	38	41	32	28	26	26	30	32
Bilar I túrar samlað	82	71	86	119	132	106	149	119	105	117	62	29	1177
Bilar I túrar pr. túr	2.7	2.4	2.9	4.3	4.4	3.5	4.8	3.8	3.5	3.8	3.3	1.6	3.5
Maximum ferðafólk einkulttúrar	61	47	55	97	109	104	68	82	73	40	29	41	
Maximum bilar einkulttúrar	8	5	6	11	13	7	7	12	11	7	6	2	
Tal av II túrum	20	17	22	19	30	30	31	31	30	30	15	16	291
Ferðafólk II túrar samlað	813	589	955	893	1178	1386	2085	1403	1022	1176	569	965	13035
Ferðafólk II túrar pr. túr	41	35	43	47	39	46	67	45	34	36	38	60	45
Bilar II túrar samlað	71	58	82	60	148	118	223	189	127	167	53	34	1330
Bilar II túrar pr. túr	3.5	3.4	3.7	3.2	4.9	3.9	7.2	6.1	4.2	5.5	3.5	2.1	4.6
Maximum ferðafólk einkulttúrar	34	45	69	90	82	110	93	89	73	71	36	77	
Maximum bilar einkulttúrar	4	6	5	9	13	12	14	9	9	9	6	2	
Tal av III túrum	30	29	27	28	30	30	31	31	30	26	14	13	319
Ferðafólk III túrar samlað	1548	1670	1222	2312	1770	2322	2435	2400	1699	1228	824	440	19870
Ferðafólk III túrum pr. túr	52	58	45	83	59	77	78	77	57	47	59	34	62
Bilar III túrum samlað	103	150	133	253	184	263	257	274	205	155	76	23	2076
Bilar III túrum pr. túr	3.4	5.2	4.9	9.0	6.1	8.8	8.3	8.8	6.8	6.0	5.4	1.8	6.5
Maximum ferðafólk einkulttúrar	64	96	53	116	114	115	86	89	116	49	84	45	
Maximum bilar einkulttúrar	8	9	10	16	12	15	14	10	13	10	13	2	
Tal av IV túrum	0	0	0	1	2	3	1	0	0	0	0	0	7
Ferðafólk IV túrar samlað				45	194	395	254						888
Ferðafólk IV túrar pr. túr				45	97	132	254						127
Bilar IV túrar samlað				6	17	18	18						59
Bilar IV túrar pr. túr				6.0	8.5	6.0	9.0						8.4
Maximum ferðafólk pr. einkulttúr				36	110	101	130						
Maximum bilar pr. einkulttúr				6	10	4	13						
Túrar tilsamans	80	75	79	76	92	93	94	93	90	87	48	47	954
Ferðafólk tilsamans	3263	3026	3089	4316	4174	5255	6052	4789	3548	3203	1885	1941	44540
Ferðafólk pr. túr	41	40	39	57	45	57	64	52	39	37	39	41	47
Bilar tilsamans	256	279	301	438	481	505	647	582	437	439	191	80	4642
Bilar pr. túr	3.2	3.7	3.8	5.8	5.2	5.4	6.9	6.3	4.8	5.0	4.0	1.8	4.9

I eru morguntúrar
II eru fyrrapartstúrar
III eru kvøldtúrar ca. kl. 19
IV eru kvøldtúrar ca. kl. 21

Ein túrur er frá Klaksvík til Fuglafjarðar og aftur.
Einkulttúrur er annan vegin

1973

*) merkir, at eykaskip hevur verið nýtt

	Jan.	Febr.	mars	April	Mai	Juni	Juli	Aug.	Sept.	Okt.	Nov.	Des.	F.árið	í mun til 1972
Tal av I túrum	30	28	321	28	21	31	31	31	30	31	30	30	362	+ 15
Ferðafólk I túrar samlað	845	659	777	946	1087	1347	1214	1070	1015	658	690	761	11069	+ 322
Ferðafólk I túrar pr. túr	28	24	25	34	35	43	39	35	34	21	23	25	31	÷ 1
Bilar I túrar samlað	71	76	111	129	128	137	165	160	156	90	68	69	1360	+ 183
Bilar I túrar pr. túr	2.4	2.7	3.6	4.6	4.1	4.4	5.3	5.2	5.2	2.9	2.3	2.3	3.8	÷ 0.3
Maximum ferðafólk einkulttúrar	55	73	71	77	116	96	77	73	112	36	59	51		
Maximum bilar einkulttúrar	5	7	10	14	8	10	11	14	8	7	5	6		
Tal ev II túrum	30	28	31	16	31	29	31	30	30	31	30	30	349	+ 58
Ferðafólk II túrar samlað	1480	1290	1480	818	1063	1339	1546	1526	1285	908	969	994	14698	+1663
Ferðafólk II túrar pr. túr	49	46	48	45	34	46	50	51	43	29	32	33	42	÷ 3
Bilar II túrar samlað	119	105	167	109	116	165	208	242	134	120	105	98	1688	+ 358
Bilar II túrar pr. túr	4.0	3.8	5.4	6.1	3.7	5.7	6.7	8.1	4.5	3.9	3.5	3.3	4.8	+ 0.2
Maximum ferðafólk einkulttúr.	81	84	83	62	78	88	74	72	52	55	59	43		
Maximum bilar einkulttúrar	8	7	11	13	8	12	14	13	14	9	9	4		
Tal av III túrum	17	16	19	28	29	29	29	29	29	31	30	26	312	÷ 7
Ferðafólk III túrar samlað	1131	847	1238	1848	1586	2333	2183	1939	1755	1442	1699	1407	19408	÷ 462
Ferðafólk III pr. túr	67	53	65	66	55	81	75	67	61	47	37	54	62	0
Bilar III túrar samlað	84	87	147	229	209	266	282	284	202	169	167	139	2265	+ 189
Bilar III túrar pr. túr	4.9	5.4	7.7	8.2	7.2	9.2	9.7	9.8	7.0	3.5	5.5	5.3	7.3	+ 0.8
Maximum ferðafólk einkultt.	87	85	66	82	91	116(2 f.)	85	103	92	55	72	81		
Maximum bilar einkulttúrar	3	8	11	12	14	12	13	14(2 f.)	10	11	8	9		
Tal av IV túrum	0	0	0	0	4	13	6	6	5	4	1	0	39	+ 32
Ferðafólk IV túrar samlað					134	1042	311	274	407	148	128		2444	+1556
Ferðafólk IV túrar pr. túr					34	80	52	46	81	37	128		63	÷ 64
Bilar IV túrar samlað					13	105	47	53	34	21	0		273	+ 214
Bilar IV túrar pr. túr					3.3	8.1	7.8	8.6	6.8	5.3	0		7.0	÷ 1.4
Maximum ferðafólk einkulttúrar					26	116	53	43	116	45	64			
Maximum bilar einkulttúrar					4	12	10	10	8	5	0			
Túrar tilsamans	77	72	81	74	45	102	97	96	94	97	91	86	1062	+ 108
Ferðafólk tilsamans	3456	2796	3495	3612	3870	6061	5254	4809	1462	3156	3486	3162	47619	+3079
Ferðafólk pr. túr	45	39	43	49	41	59	54	50	47	33	38	37	45	÷ 2
Bilar tilsamans	274	268	425	467	466	673	702	739	526	400	340	306	5586	+ 944
Bilar pr. túr	3.6	3.7	5.2	6.3	4.9	6.6	7.2	7.7	5.6	4.1	3.7	3.6	5.3	+ 0.4


Tal av ferðafólki við Ternuni 1972(----) 1973(——)
Fyri árið
Fólsyningsprocentið
1972
1973
7000
6000
5000
4000
3000
2000
1000
JANUAR
FEBRUAR
MARTS
APRIL
MAJ
JUNI
JULI
AUGUST
SEPTEMBER
OKTOBER
NOVEMBER
DECEMBER

Fylgiskjal 17



Fylgiskjal 18

M/S SMYRIL — FERÐAFÓLK

Mánaður	1971	1972	1973
Januar	1861	2082	2422
Februar	1472	1743	1827
Mars	1574	2369	2735
Apríl	1688	2520	3617
Mai	2226	3589	3298
Juni	4335	4266	5148
Juli	4780	5451	5866
August	4098	4567	5648
September	3133	2934	4381
Oktober	2682	3128	3805
November	1545	2195	2536
December	2170	2147	2492
	31.564	36.991	43.775

Fylgiskjal 19

SMYRIL **1971**

Kapacitetur: Á vetri 175, á sumri 275 ferðafólk. Max. 10 bilar, 20 koyggjur.
Ein túrur er aftur og fram. Einkultferð er annan vegin.

	Jan.	Febr.	Mars	Apríl	Mai	Juni	Juli	Aug.	Sept.	Okt.	Nov.	Dec.	F.árið	í mun t.ár. fyri
Túrar Suðuroy	28	25	26	9	21	30	29	29	30	31	23	26	307	
Ferðafólk tilsamans	1861	1472	1574	1148	1988	3153	3980	3207	2532	2292	1456	2089	26752	
Ferðafólk pr. túr	66	59	61	128	95	102	137	111	84	74	63	80	87	
Koyggjur	294	248	279	118	257	322	392	396	309	339	250	358	3562	
Bilar tilsamans	63	57	70	61	77	122	228	236	124	131	66	95	1330	
Bilar pr. túr	2.3	2.3	2.7	6.8	3.7	4.1	7.9	8.1	4.1	4.2	2.9	3.7	4.3	
Max. ferðafólk pr. einkult ferð	171	107	90	300 (3f.)	197	230 og 240 og 290	325	300 200	135	109	80	120		
Max. koyggjur	18	15	16	14	18	18	16	18 (4 f.)	16	15	11	15		
Max. bilar pr. einkultferð	4	5	4	8	7	8	10	9	9	8	6	6		
Túrar Klaksvík					7	15	11	13	13	12	3	3	77	
Ferðafólk tilsamans					275	1182	761	891	601	387	89	81	4267	
Ferðafólk pr. túr					39	79	69	69	46	32	29	27	551	
Bilar					0	0	0	21	5	13	0	5	44	
Túrar total	28	25	26	9	28	45	40	42	43	43	26	29	384	
Ferðafólk total	1861	1472	1574	1148	2263	4335	4741	4098	3133	2679	1545	2170	3119	
Koyggjur pr. túr	66	59	61	128	257	81	119	98	73	62	59	75	81	
Koyggjur total	294	248	279	118	257	322	392	396	309	339	250	358	3562	
Bilar total	63	57	70	61	77	122	228	257	129	144	66	100	1374	
Bilar pr. túr	2.3	2.3	2.7	6.8	2.8	2.7	5.7	6.1	3.0	3.3	2.5	3.4	3.6	

SMYRIL **1972**

Kapasitetur: Á vetri 175, á sumri 275 ferðafólk. Max. 10 bilar. 20 koyggjur.
Ein túrur er aftur og fram. Einkultferð er annan vegin.

	Jan.	Febr.	Mars	April	Mai	Juni	Juli	Aug.	Sept.	Okt.	Nov.	Dec.	F.árið	í mun t.ár. fyri
Túrar Suðuroy	26	24	27	25	30	30	29	31	30	31	30	27	340	÷ 33
Ferðafólk tilsamans	1979	1640	2256	3537	3311	4350	4350	3642	2304	2611	2195	2147	32412	+5660
Ferðafólk pr. túr	76	68	84	98	118	110	150	117	77	84	73	80	95	+ 8
Koyggjur	365	324	382	333	400	472	492	518	332	437	414	356	4825	÷1263
Bilar tilsamans	100	83	120	125	174	177	278	278	172	135	111	117	1770	÷ 440
Bilar pr. túr	3.8	3.5	4.4	5.0	5.8	5.9	9.6	9.0	5.7	4.4	3.7	4.3	5.2	÷ 0.9
Max. ferðafólk pr. einkulta ferð	141	110	250	260 og 175	286 og 204	293 og 205	326	200	109	200	108	198		
Max. Koyggjur	18	18	18(2 f.)	19	17	16	18(2 f.)	19	16	18(2 f.)	15	18		
Max. bilar pr. einkultferð	10	8	10	10	10	10	10(5 f.)	10(4 f.)	9	9	5	9		
Túrar Klaksvik	4	3	3	2	13	15	12	13	13	13			91	÷ 14
Ferðafólk tilsamans	103	103	113	80	552	942	893	925	630	517			4858	+ 592
Ferðafólk pr. túr	26	34	38	40	42	63	74	71	48	40			53	÷ 2
Koyggjur					20	13	4	4	1	2			44	+ 44
Bilar	6	3	5	1	18	19	26	24	26	12			140	÷ 96
Túrar total	30	27	30	27	43	45	41	44	43	44	30	27	431	÷ 47
Ferðafólk total	2082	1743	2369	2520	4089	4253	5243	4567	2934	3128	2195	2147	37270	+6251
Ferðafólk pr. túr	69	65	79	93	95	95	128	104	68	71	73	80	86	÷ 5
Koyggjur total	365	324	384	333	420	485	496	522	333	439	414	356	4869	+1307
Bilar total	106	86	125	126	192	196	304	302	198	147	111	117	1910	+ 536
Bilar pr. túr	3.5	3.2	4.2	4.7	4.5	4.4	7.4	6.9	4.6	3.3	3.7	4.3	4.4	+ 0.8

Fylgiskjal 21

SMYRIL **1973**

Kapasiletur: Á vetri 175, á sumri 275 ferðafólk. Max. 10 bilar. 20 koyggjur.
Ein túrur er aftur og fram. Einkultferð er annan vegin.

	Jan.	Febr.	Mars.	Apríl	Mai	Juni	Juli	Aug.	Sept.	Okt.	Nov.	Dec.	Árið	í mun t.ár.fyri
Túrar Suðuroy	31	28	31	28	28	28	31	31	30	31	29	31	357	+ 17
Ferðafólk tilsamans	2422	1827	2735	3617	2964	4117	4921	4575	3831	3306	2536	2492	39343	+6931
Ferðafólk pr. túr	78	65	88	129	106	147	159	148	128	107	87	80	110	+ 15
Koyggjur	309	288	405	481	374	477	594	552	455	558	409	339	5241	+ 416
Bilar tilsamans	80	103	144	276	169	188	294	433	201	244	143	115	2300	+ 530
Bilar pr. túr	2.6	3.7	4.6	9.9	6.0	6.7	9.5	11.1	6.7	7.9	4.9	3.7	6.4	+ 1.2
Max. ferðafólk pr. einkulta ferð	125	98	112 (2 f.)	223,240 og 212	125	270.240 og 225	275 (8f.)	275.250	225	178	117	138		
Max. koyggjur	13	14	16 (2 f.)	15	18 (2 f.)	18 (4 f.)	19 (3 f.)	19 (3 f.)	18	18 (3 f.)	17	18 (2 f.)		
Max. bilar pr. einkulta ferð	5	10	6	10 (2 f.)	9	10	10 (3f.)	10 (10f.)	9	10	7	9		
Túrar Klaksvík					9	13	11	14	12	12			71	÷ 20
Ferðafólk tilsamans					334	1031	945	1073	550	499			4432	÷ 426
Ferðafólk pr. túr					37	79	86	77	46	42			62	+ 9
Koyggjur					7	41	6	5	2	1			62	+ 18
Bilar					8	8	26	37	10	11			100	÷ 40
Túrar total	31	28	31	28	37	41	42	45	42	43	29	31	428	÷ 3
Ferðafólk total	2422	1827	2735	3617	3298	5148	5866	5048	4381	3805	2536	2492	43775	+6505
Ferðafólk pr. túr	78	65	88	129	89	126	140	126	104	88	87	80	102	+ 16
Koyggjur total	309	288	405	481	381	518	600	557	457	559	409	339	5303	+ 434
Bilar total	80	103	144	276	177	196	320	380	211	255	143	115	2400	+ 490
Bilar pr. túr	2.6	3.7	4.6	9.9	4.8	4.8	7.6	8.4	5.0	5.9	4.9	3.7	5.6	+ 1.2

Fylgiskjal 22



Fylgiskjal 23

M/S MASIN (RITAN) — FERÐAFÓLK

Mánaður	1971	1972	1973
Januar	1418	1633	2021
Februar	1518	1563	2274
Mars	1788	1991	2573
April	784	2409	3126
Mai	1610	3062	3450
Juni	2045	3275	3926
Juli	2845	4226	5479
August	2607	3904	4696
September	2044	3185	3489
Oktober	1770	2888	3365
November	1902	2488	2107
December	1959	2345	2791
	22.293	32.969	39.297


Forbruk
8000
6000
4000
2000
JANUAR
FEBRUAR
MARTS
APRIL
MAI
JUNI
JULI
AUGUST
SEPTEMBER
OKTOBER
NOVEMBER
DESEMBER

Fylgiskjal 25

STRANDFARASKIP LANDSINS SERROKNSKAPUR

	«Smyril»	«Dagstjarnan»	«Másin»	«Sildberin»	«Lissbøvdi»
Inntøkur:					
Farmagjald	231.638,70	205.505,40	104.091,70	93.147,15	20.882,16
Persónflutningur	987.937,80	43.625,90	210.467,50	77.375,20	18.826,00
Postflutningur	73.000,00	39.450,00	38.949,38	38.949,39	27.990,00
Eykatúrar	19.236,40	115.370,53	1.765,00	4.650,00	
Kiosk, br.vinn.	25.861,61				
Cafeteria, br.vinn.	14.825,14				
	1.352.502,65	404.011,83	356.173,58	214.121,74	76.698,16
Útreiðslur					
Hýrur	740.138,24	386.981,03	218.780,45	195.977,21	184.036,68
Kostur til manning	53.540,00	24.075,41	8.325,00	9.154,20	9.220,50
Brenni- og smyrjiolja	207.509,30	72.186,70	25.970,61	20.050,69	5.675,24
Umvælingar og viðlíkahald v.m.	174.769,12	204.194,68	42.975,19	74.535,59	12.907,87
Tryggingar	135.409,15	39.941,04	25.118,75	16.222,09	
Farmasamsýningar til avgreiðslur	8.001,20	20.867,50	6.405,00	5.880,00	21.278,43
Umlossing, viðurflytan v.m.					17.188,25
Leiga av eykaskipum		14.400,00	180,00	2.440,00	143.247,87
Samsýningar fyri postflutning	31.575,04	16.084,86	9.945,36	12.025,36	33.881,54
Endurgjald fyri væntandi farmagóðs	1.995,13	1.337,15	833,00	72,00	964,25
Havnagjald v.m.	30.730,90	10.734,15	962,80	1.571,40	375,00
Avskrivingar	300.000,00	88.776,26			
Ymiskar útreiðslur	55.379,53	17.424,57	5.979,80	5.094,25	14.353,00
Samlaðar útreiðslur	1.739.047,61	892.004,15	345.425,98	343.022,79	443.128,63
Samlaðar inntøkur	1.352.502,65	404.011,83	356.173,58	214.121,74	76.698,16
Undirskot	386.544,96	487.992,32		128.901,05	366.430,47
Yvirskot			10.747,62		

FYRI SKIPINI FYRI 1971/72

«Pride»	«Ternan»	«Barskor»	«Sólan»	«Kjógvin»	«Ritan»	Ialt
200.002,58	27.507,00	32.883,22	1.060,50	15.374,75	11.478,25	959.551,41
393.506,10	426.101,74	38.485,50	2.892,00	2.394,00	6.862,00	2.208.473,74
76.007,30			24.900,00			319.246,07
5.300,00		1.756,00	1.978,00	983,50	4.400,00	158.439,43
					1.197,79	27.059,40
						14.828,14
683.815,98	453.606,74	73.124,72	30.850,50	18.752,25	23.938,04	3.687.598,29
306.090,49	296.413,60	129.648,75	28.723,04	29.515,59	37.439,79	2.553.745,47
23.856,69	11.236,50	6.925,85		2.750,27	1.004,23	150.088,65
70.871,75	66.519,77	13.889,77	1.007,42	3.704,75	5.647,46	493.033,46
64.412,38	211.234,02	52.398,96	14.327,69	41.666,25	33.132,21	926.554,16
39.035,20	47.294,40	3.781,95	8.306,25	9.450,28	22.941,80	347.530,91
15.015,72	12.943,86	26.694,95	2.137,50			119.224,16
6.090,50	7.943,50	3.724,00				34.946,25
	1.100,00	8.600,00	400,00			170.317,87
41.178,48	6.052,72	24.127,30	2.807,24			177.677,85
5.246,34		173,45				10.621,32
12.716,36	21.137,10	698,20	360,00	1.221,15	7.278,20	87.776,26
130.425,70	168.189,44	12.000,00	15.213,67	153.047,46	140.329,73	1.007.982,26
25.294,38	19.044,10	2.279,80	1.628,60	1.759,40	7.873,95	150.551,58
740.233,94	869.109,01	284.933,96	74.311,61	243.145,15	255.647,37	6.230.010,58
683.815,98	453.608,74	73.124,72	30.850,50	18.752,25	23.938,04	3.687.598,14
56.417,96	415.500,27	211.809,26	43.461,11	224.342,90	231.709,33	2.553.159,63
						10.747,62

Fylgiskjal 26

STRANDFARASKIP LANDSINS SERROKNSKAPUR

	Smyril	Dagstjørnan	Ritan	Másin (Sundoyarr.)	Másin (Norðoyarr.)	Lishøvdi
Inntøkur:						
Farmagjald	291.359,46	38.847,25	121.732,14	5.238,00	41.104,07	
Persónsflutn.	1.252.374,70	7.933,00	350.309,80	10.037,00	23.585,00	3.693,00
Postflutningur	127.411,66		95.558,76		50.964,66	
Eykatúrar	17.500,00	470.670,19	16.060,00		1.000,00	
Kiosk	47.896,17					
Cafeteria	28.290,79					
	1.764.832,78	517.450,44	583.650,70	15.275,00	116.653,73	3.693,00
Útreiðslur:						
Tal av monnum í útróðri við deksførum, um allir vóru í heilársvinnu

	Mans neyðugir	Landingartal roknað um til bátar í heilársvinnu (sí talvu)	Tal av monnum umroknað til heilársvinnu. Mans × bátar.
VIÐ TROLLOYVI			
undir 25 BRT	5	12	60
25 - 40 BRT	6	8	48
yvir 40 BRT	7	16	112
UTTAN TROLLOYVI			
undir 25 BRT	6	33	198
25 - 40 BRT	7	7	49
40 - 60 BRT	8	8	64
yvir 60 BRT	10	20	200
			681

Talva 2 b 1

Veiða, roynd og úrtøka hjá stálskipum.

Tølini fyri stálskip eru roknað út á sama hátt sum fyri deksførini.

Mannningarparturin er roknaður út frá partinum uttan studning í 1974, minkaður við lutfallinum millum prísin tá og prísin nú, somuleiðis við cigarapartinum.

Talva 2 c 1

Ráfiskur landaður í Føroyum frá føroyskum skipum í 1974 býttur upp á leiðir og sløg.

Hesi tøl eru við serligum EDV-programmi skrivað út frá avrokningarhagtølunum. Tølini eru sammett við tey tøl, sum flakavirkini geva upp, og funnin at svara vel saman.

Talva 2 c 2

Ráfiskur landaður fyrstu 3 mánaðirnar frá føroyskum skipum til flakavirkini.

Samanborið við sama tíðarskeið 1974, 1974-tølini eru fingin til vega á sama hátt sum í talvu 2 c 1.

Tølini fyri 1975 eru fyribilstøl, og tey tøl, sum flakavirkini góvu upp pr. 8. apríl 1975. Eini 3 av teimum smærru virkjunum kundu ikki geva upp og eru ætlað.

Talva 2 *c* 1

Ráfiskur, tons sløgdur fiskur landaður í Føroyum 1974.

I **Tilskotsfiskur** (toskur, upsi, hýsa, longa, brosma, hvitingur)

Ísland	12.798
Føroyar	21.263
RockAll	1.740
Eysturgrønland	906
Norðsjógvur	1.013
Tilsamans	37.720
+ II	2.381
Heildartal	40.101

II **Annað** (skøta, flatfiskur, havtaska, steinbítur o.a.)

Ísland	536
Føroyar	1.445
Rockall	250
Eysturgrønland	63
Norðsjógvur	87
Tilsamans	2.381

Talva 2 c 3 og 4

Hetta eru veiðutøl føroyinga fyri øll sløg og allar leiðir 1973 og 1974 roknað eftir livandi vekt.

Tølini eru frá núgaldandi fiskihagtalsskipan, sum fiskirannsóknarstovan umsitur.

Í mun til tey veiðutøl fyri 1974, sum fyrr eru send út frá fiskirannsóknarstovuni, eru onkrar broytingar. Hetta kemur av, at neyva arbeiðið við tølunum í sambandi arbeiðinum at útvega faltilfarið til heildarloysnina avdúkaði nakrar EDV-feilir.

Hesi tølini skuldu tey verið tey endaligu, og vera tey, sum verða send út í endaligu og almennu veiðuhagtølunum frá hagdeildini fyri 1974.

Talva 2 c 2

Ráfiskur. Landingar fyrstu 3 mánaðirnar 1975 (fyribilstøl) og 1974.

	1975	1974 *)	1975 í mun til 1974
Toskur	8000	4522	+ 3478
Hýsa	1900	1574	+ 326
Upsi	900	1475	÷ 575
Brosma	430	246	+ 184
Longa	100	58	+ 42
	11330	7875	+ 3455

*) Januar - aprfl 1974 var roknað sum óvanliga gott vár til veður og veiðu.

Talva 2 c 3

HAGDEILDIN
Tórshavn

FØROYAR 1973.

Fiskiveiða, fiskileið, tons, livandi vekt.

Fiskasløg (species)	Tilsamans (total)	Ísland (Icelands ground)	Føroyar (Faroe grounds)	New Foundland	W. Grønland (W. Greenland)	E. Grønland (E. Greenland)	Noreg (Norway)	Norðsjógvurin (North Sea)	Ókent (not known)
Tilsamans:	246.408	21.547	31.236	19.934	6.238	219	3.636	161.201	2.394
Laksur (salmon)	199		28		171				
Kalvi (halibut)	346	48	256		4	4		5	29
Reyðsprøka (plaice)	6							1	5
Sv.kalvi (Gr.l.halib.)	1.138	188		950					
Lálla (witch)	1		1						
Sandsprøka (dab)	179	2	177						
Tunga (lemon sole)	1.193	3	1.190						
Brosma (tusk)	7.348	3.368	3.402		2	16		52	513
Toskur (cod)	53.569	14.207	13.276	16.981	4.499	167	1.916	1.069	1.454
Lýsingur (hake)	1							1	
Longa (ling)	2.608	984	1.428			1		124	71
Blálonga (blue ling)	125	74	51						
Hýsa (haddock)	9.378	813	6.018			4	1.212	1.203	128
Upsi (saithe)	5.053	1.467	2.973				7	556	50
Hv.bróður (Norw.pout)	53.630							53.630	
Sv.kjaftur (Bl.whit.)	4.869		168					4.701	
Hvítingur (whiting)	1.846	4	384					1.458	
Langasporl (r.nose gr.)	14					14			
Steinbítur (wolffish)	249	39	201		1				8
Liri (catfish)	30	9		5	12				4
Nebbasild (sandeel)	1.413							1.413	
Kongafiskur (redfish)	501	243	121	84	8	13	32		
Havtaska (monkfish)	579	6	535					35	3
Rognkelsi (lumpsucker)	13		2		11				
Rossamak. (horse mack.)	5.370							5.370	
Sild (herring)	76.370		49					76.321	
Brislingur (sprat)	84		59					25	
Makrelur (mackrel)	11.837							11.837	
Hemari (porbeagle)	274		4	269				1	
Háur (dogfish)	132		3					122	7
Skøta (skate)	371	80	150	2				132	7
Hummari (Norway lobst.)	43		43						
Røkja (shrimp)	1.379				1.371				8
Jákupskel (scallop)	708		708						
Ymist (various)	5.552	17	9	1.643	159		469	3.148	107

Talva 2 c 4

HAGDEILDIN
Tórshavn

FØROYAR 1974

Fiskiveiða, fiskileið, tons, livandi vekt

Fiskasløg (species)	Tilsamans (total)	Ísland (Icelands grounds)	Foroyar (Faroe grounds)	New Foundland	W. Grønland (W. Greenland)	E. Grønland (E. Greenland)	Noreg (Norway)	Norðsjógvurin (North Sea)	Vestan fyri 4°W	Rockall norðureftir
Tilsamans:	347.274	21.911	26.775	10.096	7.742	1.076	6.695	154.039	16.749	22
Laksur (salmon)	118		18		100					
Kalvi (halibut)	141		141							
Reyðsprøka (plaice)	89		89							
Sv.kalvi (Gr.halib.)	601		7	594						
Lálla (witch)										
Sandsprøka (dab)	24		24							
Tunga (lemon sole)	607		607							
Brosma (tusk)	5.183	3.172	1.541							47
Toskur (cod)	48.730	14.465	13.236	9.194	5.460	652	5.717			
Lýsingur (hake)										
Longa (ling)	3.591	890	1.242							45
Blálonga (blue ling)	43		43							
Hýsa (haddock)	6.778	1.032	4.823				923			
Upsi (saithe)	5.438	1.712	3.726							
Hv.bróður (Norw.pout)	86.606							85.025	1.521	
Sv.kjaftur (Bl.whit.)	4.137		426					2.610	1.101	
Hvítingur (whiting)	167		167							
Langasporl (r.nose gr.)										
Steinbítur (wolffish)	64		64							
Liri (catfish)										
Nebbasild (sandeel)	6.422							6.422		
Kongafiskur (redfish)	28		28							
Havtaska (monkfish)	418		418							
Rognkelsi (lumpsucker)										
Rossmak. (horse mack.)	1.114							1.114		
Sild (herring)	38.664							33.293	5.871	
Brislingur (sprat)	4.159		70					4.089		
Makrelur (mackerel)	27.284							18.625	8.659	
Hemari (porbeagle)										
Háur (dogfish)										
Skøta (skate)	95		95							
Hummari (Norway lobst.)										
Røkja (shrimp)	2.023				2.023					
Jákupskel (scallop)										
Ymist (various)	1.889	640	4	308	153	424	55		27	27
Annar matfiskur	1.211							1.211		
Annar, ídnaðarfiskur	1.650							1.650		

Talva 3.1.

8 flakavirkir 1973 og 1974. II.

I hesi talvu eru tey verunligu rakstrartølini frá 8 virkjum samanborin fyri 1973 og 1974.

Talva 3.1. **8 FLAKAVIRKIR 1973 og 1974**

			kr. t. ráfisk	
1.000 kr.	1974	1973	1974	1973
Søla				
Sølukostn.				
Goymslubroyt.				
Frannleiðsla	110057	91648	3634	3208
Ráfiskur	74196	54942	2452	1865
Arbeiðsløn	18003	17500	595	594
Pakkitilfar				
Salt				
Ravnagn	7364	5837	243	198
Flutningur				
Ym fr kost				
Fram kost ts	99563	78279	3290	2658
Dekk avlop	10494	13369	347	454
Aðrar innt				
Avlop				
Virkis útr.				
	6543	6127	216	298
Fyrisiting út				
Avlop	3951	7242	131	246
Rentu út	4481	3273	148	111
Avlop	—530	3969	— 18	135
Tons ráfiskur	30263	29453	1	1
Dekk avlop kr./kg	347	454		
D A ráfiskakeyp				
Kr/kr.				

Talva 5 A. 1

Miðalráðfiskaprísur eftir veiðuhætti, veiðuøki og fiskaslagi.

Miðalprísirnir eru roknaðir út sum vigaðir miðalprísir út frá teimum prísbroytingum, sum hava verið í tíðini, og nøgd av fiski í teim ymisku bólkunum.

Talva 5 A. I

Miðal ráfiskuprísir veiðuhættir, veiðuøki kr./kg.

Føroyar	miðaltal	trol	gørn	línu	snella
1973	1,85	1.97	2.04	1.89	1.47
1974	2.59	2.72	3.14	2.48	2.37
28.2.75	1.97	2.13	2.83	1.80	1.69

Ísland	miðaltal	trol	gørn	línu	snella
1973	1.73	2.01		1.68	1.50
1974	2.46	2.64		2.43	2.15
28.2.75	1.89	2.07		1.88	1.50

Føroyar & Ísland	miðaltal	trol	gørn	línu	snella
1973	1.81	1.98	2.04	1.82	1.48
1974	2.54	2.68	3.14	2.46	2.32
28.2.75	1.94	2.10	2.83	1.84	1.65

Miðal prísir fiskaslag kr./kg.

	1973	1974	28.2.75
Toskur 1	2.19	3.30	3.17
Toskur 2	1.87	2.53	1.56
Hýsa 1	2.29	2.63	1.60
Brosma	1.26	1.69	1.00
Longa	1.69	2.34	1.48
Upsi	1.10	1.65	1.05
Hvitingur	1.48	1.43	0.71
Miðal	1.81	2.54	1.94

Talva 5 A. 1. (framhald)

Føroyskar ráfiskalandingar 1973, fiskileið Føroyar, tons ráfiskur

	Jan	Feb.	Mars	Apr.	Mai	Juni	Juli	Aug.	Sept.	Okt.	Nov.	Dec.	Tils.
Toskur 1	1030	958	2861	924	464	1265	1220	1121	415	861	691	150	11960
Toskur 2													
Toskur 3													
Hýsa 1	1022	655	327	169	90	227	408	438	241	801	899	152	5422
Hýsa 2													
Brosma	168	192	239	432	423	206	430	259	241	214	168	95	3065
Longa	93	98	94	125	132	121	196	118	120	106	69	14	1286
Upsi	65	111	326	501	412	346	400	236	179	91	9	1	2678
Hvitingur	4	4	14	81	39	90	55	31	14	12	3		346
Tilskotsfiskur tils.	2382	2018	3861	2232	1560	2255	2709	2203	1210	2085	1839	412	24757
Flatfiskur	4	5	4	19	68	517	432	165	20	5	—	1	1242
Annar fiskur	40	35	32	56	102	342	303	192	50	54	20	28	1306
Tilsamans	2426	2058	3897	2307	1730	3114	3444	2560	1280	2144	1859	441	27305

Ikki greitt eftir mánaðum 44 tons.

Annar fiskur = laksur, kalvi, steinbítur, kongafiskur, havtaska, rognkelsi, síld, brislingur, hemari, hávur, skøta.

Summartrolingin (við serloyvi) 1973, 1974, tons ráfiskur.

	1973	1974	% 1973	% 1974
Toskur 1	2042	2289	45,7	53,3
Toskur 2				
Toskur 3				
Hýsa 1	713	722	15,9	16,8
Hýsa 2				
Brosma	—	—		
Longa	5	90	0,1	2,1
Upsi	92	112	2,1	2,6
Hvítingur	108	39	2,4	0,9
Tilskotsfiskur tils.	2960	3252	66,2	75,7
Flatfiskur	975	619	21,8	14,4
Annar fiskur	538	424	12,0	9,9
Tilsamans	4473	4295	100	100

Føroyskar ráfiskalandingar 1973, tilsamans, tons ráfiskur.

	Jan.	Feb.	Mars	Apr.	Mai	Juni	Juli	Aug.	Sept.	Okt.	Nov.	Dec.	Tils.
Toskur 1	1499	1433	3600	1400	869	1632	1488	1779	1005	1226	1014	806	17803
Toskur 2													
Toskur 3													
Hýsa 1	1163	869	413	196	96	230	455	406	275	940	950	263	6218
Hýsa 2													
Brosma	332	605	681	854	1050	368	645	464	368	414	275	141	6260 (462)
Longa	177	213	196	228	342	163	264	147	167	213	140	34	2272
Upsi	86	120	428	603	626	681	885	421	295	134	23	2	4436 (132)
Hvítingur	4	4	14	83	40	90	55	31	14	13	3	—	350
Tilskotsfiskur tils.	3214	3094	5122	3364	3023	3161	3792	3248	2126	2940	2405	1227	37339
Flatfiskur	4	5	4	19	68	517	432	165	20	5	—	1	1242
Annar fiskur													
Tilsamans	3330	3175	5206	3525	3268	4054	4700	3641	2212	3030	2454	1270	40505

Ikki greitt eftir mánaðum 641 tons.

Annar fiskur = laksur, kalvi, steinbítur, kongafiskur, havtaska, rognkelsi, síld, brislingur, hemari, hávur, skota.

Ráfiskalandingar 1974, tons. Trol undir Føroyum.

	Jan.	Feb.	Mars	Apr.	Mai	Juni	Juli	Aug.	Sept.	Okt.	Nov.	Dec.	Tils.
Toskur 1	2	3	53	195	50	305	472	446	94	66	55	9	1755
Toskur 2	0	0	47	99	78	368	340	489	116	33	22	0	1592
Toskur 3	0	0	1	0	0	2	3	4	0	0	2	0	12
Hýsa 1	1	3	26	41	20	155	281	212	35	9	6	0	789
Hýsa 2	0	0	1	1	4	11	24	10	5	4	4	1	65
Brosma	0	0	0	0	0	0	0	0	0	0	0	0	0
Longa	0	0	1	5	2	26	76	10	2	2	0	0	124
Upsi	0	0	41	36	18	58	75	19	9	5	3	0	264
Hvítingur	0	0	0	0	2	18	14	2	1	0	0	0	37
Tilskotsfiskur tils.	3	6	170	377	179	943	1285	1192	262	119	92	10	4638

Flatfiskur
Annar fiskur
Tilsamans

Ráfiskalandingar 1974 (Føroya - økið). Ráfiskalandingar tils. trol undir Føroyum.

	Jan.	Feb.	Mars	Apr.	Mai	Juni	Juli	Aug.	Sept.	Okt.	Nov.	Dec.	Tils.
Toskur 1	421	767	2447	809	86	83	118	68	39	140	344	17	5339
Toskur 2	10	44	724	331	235	169	159	152	120	297	489	25	2755
Toskur 3	0	1	2	1	0	4	1	1	2	3	7	0	22
Hýsa 1	466	531	513	249	26	26	53	99	101	264	709	25	3002
Hýsa 2	7	13	13	3	2	5	6	12	17	28	31	0	137
Brosma	25	61	160	185	66	61	167	161	196	184	140	14	1303
Longa	7	36	57	128	130	68	77	93	60	79	73	4	812
Upsi	30	545	859	972	242	100	78	52	82	87	1	0	3048
Hvitingur	0	1	12	42	3	13	29	9	3	3	2	1	118
Tilskotsfiskur tils.	966	1999	4787	2720	799	529	688	647	530	1088	1795	86	16625

Flatfiskur
Annar fiskur
Tilsamans

Ráfiskalandingar 1974, tons Føroya-økið.

	Jan.	Feb.	Mars	Apr.	Mai	Juni	Juli	Aug.	Sept.	Okt.	Nov.	Dec.	Tils.
Toskur 1	423	770	2500	1004	141	388	590	514	133	206	399	26	7094
Toskur 2	10	44	771	430	313	537	499	641	236	330	511	25	4347
Toskur 3	0	1	3	1	0	6	4	5	2	3	9	0	34
Hýsa 1	467	534	539	290	40	181	334	311	136	273	715	25	3851
Hýsa 2	7	13	14	4	0	16	30	22	22	32	35	1	202
Brosma	25	61	160	185	60	61	167	161	106	187	140	14	1333
Longa	7	36	58	133	132	94	153	103	62	81	73	4	936
Upsi	30	545	900	1008	260	158	153	71	91	92	4	0	3312
Hvilingur	0	1	12	42	15	31	43	11	4	3	2	1	155
Tilskotsfiskur tils.	969	2005	4957	3097	969	1472	1973	1839	792	1207	1888	96	21263

Ftatfiskur
Annar fiskur
Tilsamans

Ráfiskalandingar 1974, tons. Aðrar leiðir enn Føroyar.

	Jan.	Feb.	Mars	Apr.	Maj	Juni	Juli	Aug.	Sept.	Okt.	Nov.	Dec.	Tils.
Toskur 1	547	608	872	552	190	243	557	487	228	373	397	347	5401
Toskur 2	9	26	309	33	33	348	930	648	159	179	136	86	2897
Toskur 3	0	3	4	0	0	19	10	3	1	0	0	0	40
Hýsa 1	157	157	153	144	10	4	3	10	193	221	147	59	1258
Hýsa 2	8	15	10	1	0	0	0	0	44	24	18	14	135
Brosma	204	309	754	870	180	157	287	112	247	348	201	42	3723
Longa	44	86	130	285	51	108	57	48	72	94	41	12	1027
Upsi	1	19	94	247	413	502	435	118	100	18	24	3	1974
Hvítingur	0	0	0	3	0	0	0	0	0	0	0	0	3
Tilskotsfiskur til.	970	1223	2325	2141	885	1381	2277	1426	1044	1258	964	503	16457

Flatfiskur
Annar fiskur
Tilsamans

Ráfiskalandingar 1974 fyri allar leiðir incl. Føroyar,
tons ráfiskalandingar tls.

	Jan.	Feb.	Mars	Apr.	Mai	Juni	Juli	Aug.	Sept.	Okt.	Nov.	Dec.	Tils.
Toskur 1	969	1378	3372	1556	331	631	1147	1001	361	579	796	373	12494
Toskur 2	19	70	1080	463	340	885	1429	1289	395	509	647	111	7244
Toskur 3	0	4	7	1	0	25	14	8	3	3	9	0	74
Hýsa 1	624	691	692	434	50	185	337	321	329	494	862	84	5108
Hýsa 2	15	28	24	5	6	16	30	22	66	56	53	15	337
Brosnua	229	370	914	1061	252	218	454	273	353	535	341	56	5056
Longa	51	122	188	418	183	202	210	151	134	175	114	16	1963
Upsi	31	564	994	1255	673	659	588	189	191	110	28	3	5288
Hvítingur	0	1	12	45	5	31	43	11	4	3	2	1	158
Tilskotsfiskur tils.	1939	3228	7282	5238	1854	2853	4250	3265	1836	2465	2852	659	37720

Flatfiskur
Annar fiskur
Tilsamans

Ráfiskalandingar 1974 fyri allar fiskileiðir ÷ trol undir Føroyum.

	Jan.	Feb.	Mars	Apr.	Mai	Juni	Juli	Aug.	Sept.	Okt.	Nov.	Dec.	Tils.
Toskur 1	967	1375	3319	1361	276	326	675	555	267	513	741	304	10739
Toskur 2	19	70	1033	364	268	517	1089	800	279	476	625	111	5652
Toskur 3	0	4	6	1	0	23	11	4	3	3	7	0	62
Hýsa 1	623	688	666	393	30	30	56	109	294	485	856	84	4319
Hýsa 2	15	28	23	4	2	5	6	12	61	52	49	14	272
Brosma	229	370	914	1061	252	218	454	273	353	535	341	56	5056
Longa	51	122	187	413	181	176	134	141	132	173	114	16	1839
Upsi	31	564	953	1219	855	601	513	170	182	105	25	3	5022
Hvitingur	0	1	12	45	3	13	29	9	3	3	2	1	121
Tilskotsfiskur tils.	1936	3222	7112	4861	1675	910	2965	2073	1574	2346	2760	646	33032

Flatfiskur
Annar fiskur
Tilsamans

Ráfiskaprístal. Jan. 1973 — Mars 1975

	1973												1974											
	Jan.	Febr.	Marts	Apr.	Maj	Juni	Juli	Aug.	Sept.	Okt.	Nov.	Dec.	Jan.	Febr.	Marts	Apr.	Maj	Juni	Juli	Aug.	Sept.	Okt.	Nov.	Dec.
Toskur I	100	100	103	104	100	102	102	103	114	110	122	125	144	138	159	177	175	174	163	163	148	148	156	156
Toskur II	100	96	105	107	102	103	102	121	135	139	145	149	171	154	154	178	175	156	142	142	125	120	116	111
Toskur III	100	100	100	100	100	100	100	100	100	100	100	100	100	100	100	100	100	100	100	100	100	100	100	100
Hýsa I	100	89	93	95	93	93	89	104	114	110	122	125	140	129	129	114	104	99	86	90	116	111	106	102
Hýsa II	100	100	100	100	100	100	100	100	100	100	100	100	100	100	100	100	100	100	100	100	100	100	100	100
Brosma	100	100	105	114	109	107	107	109	109	108	122	122	122	163	163	163	158	131	129	129	129	128	128	128
Longa	100	100	110	110	105	115	112	137	148	143	168	172	172	186	186	173	168	164	143	146	149	146	137	134
Upsi	100	100	100	100	100	105	105	115	150	142	169	173	180	157	157	175	170	170	119	119	119	105	105	105
Hvítingur	100	93	105	109	106	113	104	107	143	154	166	172	180	160	160	125	111	108	81	85	90	84	78	75
Trol Føroyar	100	88	86	87	97	94	96	111	119	116	107	0	159	150	137	167	154	146	133	140	130	134	139	156
Gørn Føroyar	100	141	194	195	191	0	164	196	0	0	0	0	173	237	293	309	0	291	270	0	0	0	0	0
Lina Føroyar	100	92	98	85	76	91	83	85	97	108	125	111	152	141	143	130	102	100	87	93	103	108	118	111
Snella Føroyar	100	70	78	78	70	74	88	72	129	99	140	0	103	95	132	132	171	141	134	130	106	110	129	130
Allur for. fiskur	100	91	97	84	75	88	88	99	106	109	126	113	153	127	143	138	131	136	122	126	111	110	120	117
Trol Ísland	100	0	100	110	96	102	106	117	130	128	143	147	0	139	147	143	122	167	149	153	130	142	149	160
Gørn Ísland	100	0	0	0	0	0	0	0	0	0	0	0	0	0	0	0	0	0	0	0	0	0	0	0
Lina Ísland	100	96	101	97	82	74	77	78	106	103	130	140	149	144	148	139	145	114	92	99	118	121	132	147
Snella Ísland	100	0	0	0	100	162	112	143	201	0	0	0	0	0	0	0	164	169	182	231	179	0	0	0
Allur ísl. fiskur	100	96	101	99	82	80	84	97	117	113	132	142	149	144	147	140	128	132	131	146	121	126	136	153

Ráfiskaprístal

	1973											
	Jan.	Feb.	Marts	Apr.	Maj	Juni	Juli	Aug.	Sept.	Okt.	Nov.	Dec.
Toskur I	100	100	103	104	100	102	102	103	114	110	122	125
Toskur II	100	96	105	107	102	103	102	121	135	130	145	149
Toskur III	100	100	100	100	100	100	100	100	100	100	100	100
Hýsa I	100	89	93	95	93	93	89	104	114	110	122	125
Hýsa II	100	100	100	100	100	100	100	100	100	100	100	100
Brosma	100	100	105	114	109	107	107	109	109	108	122	122
Longa	100	100	110	110	105	115	112	137	148	148	168	172
Upsi	100	100	100	100	100	105	105	115	150	142	169	173
Hvilingur	100	93	105	109	106	113	104	107	143	154	166	172
Trol Føroyar	100	88	86	87	97	94	96	111	119	116	107	0
Gørn Føroyar	100	141	194	195	191	0	164	196	0	0	0	0
Lina Føroyar	100	92	98	85	76	91	83	85	97	108	125	111
Snella Føroyar	100	70	78	78	70	74	88	72	129	99	140	0
Allur Før. fiskur	100	91	97	84	75	88	88	99	106	109	126	113
Trol Ísland	100	0	100	110	96	102	106	117	130	128	143	147
Gørn Ísland	100	0	0	0	0	0	0	0	0	0	0	0
Lina Ísland	100	96	101	97	82	74	77	78	106	103	130	140
Snella Ísland	100	0	0	0	100	162	112	143	201	0	0	0
Allur Ísl. fiskur	100	96	101	99	82	80	84	97	117	113	132	142

jan. 1973 — mars 1975

1974												1975		
Jan.	Feb.	Marts	Apr.	Maj	Juni	Juli	Aug.	Sept.	Okt.	Nov.	Dec.	Jan.	Feb.	Marts
144	138	159	177	175	174	163	163	148	148	156	156	154	153	152
171	154	151	178	175	156	142	142	125	120	116	111	103	99	89
100	100	100	100	100	100	100	100	100	100	100	100	100	100	100
140	129	129	114	104	96	86	90	116	111	106	102	80	78	70
100	100	100	100	100	100	100	100	100	100	100	100	100	100	100
122	163	163	163	158	131	129	129	129	128	128	128	95	86	86
172	186	186	173	168	164	143	146	149	146	137	134	116	112	102
180	157	157	175	170	170	119	119	119	105	105	105	86	102	100
180	160	160	125	111	108	81	85	90	84	78	75	65	62	53
159	150	137	167	154	140	133	140	139	134	139	156	142	129	100
173	237	293	309	0	291	270	0	0	0	0	0	83	247	268
152	141	143	130	103	100	87	93	103	108	118	111	121	115	97
103	95	132	132	171	141	134	130	106	110	129	130	49	66	101
153	127	143	128	131	136	122	126	111	110	120	117	120	107	115
0	139	147	148	122	167	140	153	130	142	149	160	160	122	98
0	0	0	0	0	0	0	0	0	0	0	0	0	0	0
149	144	148	139	145	114	92	99	118	121	132	147	136	126	113
0	0	0	0	164	169	182	231	179	0	0	0	0	0	0
149	144	147	140	128	132	131	146	121	126	136	153	130	126	110

Ráfiskaprísir

1973

	Jan.	Feb.	Marts	Apr.	Maj	Juni	Juli	Aug.	Sept.	Okt.	Nov.	Dec.
Toskur I	208	208	215	217	208	212	212	214	237	228	254	260
Toskur II	175	168	184	187	176	181	179	212	237	228	254	260
Toskur III	100	100	100	100	100	100	100	100	100	100	100	100
Hýsa I	228	203	213	216	212	213	203	237	259	250	279	284
Hýsa II	100	100	100	100	100	100	100	100	100	100	100	100
Brosma	116	116	122	132	126	124	124	127	127	125	141	141
Longa	145	145	160	160	152	167	163	198	214	208	244	250
Upsi	105	105	105	105	105	110	110	121	158	149	177	182
Hvítingur	134	125	141	146	142	152	139	143	191	207	222	280
Trol Føroyar	193	169	165	167	188	182	185	213	230	223	207	0
Gorn Føroyar	109	154	211	213	208	0	179	214	0	0	0	0
Lína Føroyar	199	184	195	169	152	181	165	169	194	216	249	222
Snella Føroyar	183	128	143	143	129	135	161	131	237	181	250	0
Allur Føroyafiskur	197	179	190	165	148	173	172	194	208	213	248	222
Trol Ísland	177	0	177	195	170	181	188	208	231	228	254	260
Snurl Ísland	0	0	0	0	0	0	0	0	0	0	0	0
Lína Ísland	179	171	180	173	146	132	137	139	190	183	232	249
Snella Ísland	0	0	0	0	117	190	131	167	236	0	0	0
Allur fsl. fiskur	178	171	179	170	146	143	150	173	210	202	235	253

jan. 1973 — mars 1975

1974												1975		
Jan.	Feb.	Marts	Apr.	Mai	Juni	Juli	Aug.	Sept.	Okt.	Nov.	Dec.	Jan.	Feb.	Mar.
300	286	331	369	365	361	340	340	307	307	324	324	320	319	317
300	269	269	311	306	273	248	248	219	210	203	195	180	173	156
100	100	100	100	100	100	100	100	100	100	100	100	100	100	100
320	295	295	261	236	220	197	205	265	252	242	232	182	178	160
100	100	100	100	100	100	100	100	100	100	100	100	100	100	100
141	189	189	189	183	152	150	150	150	149	149	149	110	100	100
250	270	270	251	243	238	207	212	216	211	198	195	168	163	148
189	165	165	184	179	179	125	125	125	110	110	110	90	107	105
241	215	215	167	149	145	108	114	120	113	105	100	87	83	71
307	291	265	322	296	281	256	271	251	259	268	302	274	249	194
189	258	320	336	0	317	294	0	0	0	0	0	90	269	292
304	282	284	258	205	200	173	185	205	215	236	221	241	222	194
189	174	242	242	313	258	245	238	194	202	237	238	90	121	186
300	251	281	272	258	267	240	248	217	216	236	231	237	210	226
0	247	261	253	216	297	265	272	230	253	264	285	285	216	173
0	0	0	0	0	0	0	0	0	0	0	0	0	0	0
266	257	263	249	259	204	164	176	211	216	230	263	243	226	201
0	0	0	0	191	197	212	271	209	0	0	0	0	0	0
266	257	263	250	229	235	233	260	216	226	243	272	243	225	196

Ráfiskaprísir

1978

	Jan.	Feb.	Marts	Apr.	Mai	Juni	Juli	Aug.	Sept.	Okt.	Nov.	Dec.
Toskur I	208	208	215	217	208	212	212	214	237	228	254	260
Toskur II	175	168	184	187	178	181	179	212	237	228	264	260
Toskur III	100	100	100	100	100	100	100	100	100	100	100	100
Hýsa I	228	203	213	216	212	213	203	237	259	250	279	284
Hýsa II	100	100	100	100	100	100	100	100	100	100	100	100
Brosma	116	116	122	132	126	124	124	127	127	125	141	141
Longa	145	145	160	160	152	167	163	198	214	208	244	250
Upsi	105	105	105	105	105	110	110	121	158	149	177	182
Hvítingur	134	125	141	146	142	152	139	143	191	207	222	230
Trol Føroyar	193	169	165	167	188	182	185	213	230	223	207	0
Gørn Føroyar	109	154	211	213	208	0	179	214	0	0	0	0
Lína Føroyar	199	184	195	169	152	181	165	169	194	216	249	222
Snella Føroyar	183	128	143	143	129	135	161	131	237	181	256	0
Allur fer. fiskur	197	179	190	165	148	173	172	194	208	213	248	222
Trol Ísland	177	0	177	195	170	181	188	208	231	228	254	260
Gørn Ísland	0	0	0	0	0	0	0	0	0	0	0	0
Lína Ísland	179	171	180	173	146	132	137	139	190	183	232	249
Snella Ísland	0	0	0	0	117	190	131	167	236	0	0	0
Allur ísl. fiskur	178	171	179	176	146	143	150	173	210	202	235	253

jan. 1973 — mars 1975

1974

Jan.	Feb.	Mars	Apr.	Mai	Juni	Juli	Aug.	Sept.	Okt.	Nov.
300	286	331	369	365	361	340	340	307	307	324
300	269	269	311	306	273	248	248	219	210	208
100	100	100	100	100	100	100	100	100	100	100
320	295	295	261	236	220	197	205	265	252	248
100	100	100	100	100	100	100	100	100	100	100
141	189	189	189	183	152	150	150	150	149	149
250	270	270	251	243	238	207	212	216	211	198
189	165	166	184	179	179	125	125	125	110	110
241	215	215	167	149	145	108	114	120	113	105
307	291	265	322	296	281	256	271	251	259	268
189	258	320	336	0	317	294	0	0	0	0
304	282	284	258	205	200	173	185	205	215	236
189	174	242	242	313	238	245	238	194	202	237
300	251	281	272	258	267	240	248	217	216	236
0	247	261	253	216	297	265	272	230	253	260
0	0	0	0	0	0	0	0	0	0	0
266	257	263	249	259	204	164	170	211	216	238
0	0	0	0	191	197	212	271	209	0	0
266	257	263	250	229	235	233	260	216	226	243

Viðv. løgtingsmáli nr. 56/1974 (vetrartingsetan):

Nýtt prístalsgrundarlag

Uppískoyti til framløguna

undirskjøl 1 — 4 og skriv viðv. málinum.

HAGDEILDIN skjal 1.

Roknskapur prístalshúsarhaldsins
1. januar 1972 — 5,8 fólk í húsi

Vørubólkar		nýtsla	% av nýtsluni	% av brutto-inntøkuni
100.0 — 110.2	Brevð	1.060	3,16	2,38
110.3	Mjøl	502	1,50	1,12
111.1 — 111.3	Kjøt	3.639	10,86	8,15
112.1 — 112.2	Fiskur	1.404	4,19	3,15
113.1 — 113.2	Mjólkavørur	2.149	6,41	4,82
113.3 — 113.4	Feilt	1.077	3,21	2,41
113.5	Egg	540	1,61	1,21
114.1 — 114.3	Frukt	761	2,27	1,71
115.0	Epli	657	1,96	1,47
116.1 — 116.3	Grønmeti	578	1,72	1,30
117.0 — 118.2	Sukurvørur	709	2,12	1,59
119.0	Aðrar matvørur	245	0,73	0,55
121.0 — 122.0	Kaffi, te og suft	987	2,94	2,21
123.0	Rúsdrekka	655	1,95	1,47
211.1 — 211.2	Tubbak	1.336	3,99	2,99
831.1 — 831.3	Klæði	2.663	7,95	5,97
832.1 — 832.3	Skógvar	639	1,91	1,43
835.0	Tógv	176	0,53	0,39
836.0	Reingerð	728	2,17	1,63
841.0	Innbúgv	1.379	4,12	3,09
842.0	Seingjaklæði	144	0,43	0,32

Vorubólkar		nýtsla	% av nýtsluni	% av brutto-inntøkuni
843.0 — 845.0	Koksbúnyttur	724	2,16	1,62
851.0	Snák	450	1,34	1,01
851.2	Olja	1.358	4,05	3,04
851.3	Ravmagn	1.018	3,04	2,28
852.0	Bøkur	337	1,01	0,76
853.0	Skúlaskapur	193	0,58	0,43
854.0	Postur og telefon	394	1,18	0,88
861.9	Heimahjálp	186	0,56	0,42
872.2	Heilsa	562	1,68	1,26
881.1 — 881.2	Flutningur	1.200	3,58	2,69
891.2	Útvarp	465	1,39	1,04
891.3	Vørur til skemtan	300	0,90	0,67
891.5	Skemtan	235	0,70	0,53
892.1	Aðrar vørur	39	0,12	0,09
893.1	Limagjald	111	0,33	0,25
895.1	Egin bús	3.588	10,71	8,04
895.2	Húsaleiga	315	0,94	0,71
	NÝTSLA	33.503	100,00	
898.2	Skattur	7.299		16,36
	ÚTREIÐSLA	40.802		
	Sparing	3.818		8,56
	BRUTTOINNTØKA	44.620	100,00	100,00

skjal 2.

UPPSKOT TIL NÝTT PRÍSTALSGRUNDARLAG

Vørubólkar		% av nýtsluni
100.0 — 110.2	Breyð	2,98
110.3	Mjøl	1,41
111.1 — 111.3	Kjøt	10,23
112.1 — 112.2	Fiskur	3,95
113.1 — 113.2	Mjølkavørur	6,04
113.3 — 113.4	Feitt	3,02
113.5	Egg	1,52
114.1 — 114.3	Frukt	2,14
115.0	Epli	1,85
116.1 — 116.3	Grønmeti	1,62
117.0 — 118.2	Sukurvørur	3,97
119.0	Aðrar matvørur	0,69
121.0 — 122.0	Kaffi, te og saft	2,77
123.0	Rúsdrekka	1,84
211.1 — 211.2	Tubbak	3,76
831.1 — 831.3	Klæði	7,49
832.1 — 832.3	Skógvar	1,80
835.0	Tógv	0,50
836.0	Reingerð	2,04
841.0	Innbúgv	3,88
842.0	Seingjaklæði	0,41
843.0 — 845.0	Køkshúnyttur	2,03
851.0	Snák	1,26
851.2	Olja	7,63
851.3	Ravmagn	2,86
852.0	Bøkur	0,95
853.0	Skúlaskapur	0,55
854.0	Postur og telefon	1,11
861.9	Heimahjálp	0,53
872.2	Heilsa	1,58
881.1 — 881.2	Flutningur	3,37
891.2	Útvarp	1,31
891.3	Vørur til skemtan	0,85
891.5	Skemtan	0,66
892.1	Aðrar vørur	0,11
893.1	Limagjald	0,31
895.1	Egin hús	10,09
895.2	Húsaleiga	0,89
		100,00

Skjal 3.

Frágreiðing til prístalsgrundarlagið.

Uppskotið er eitt Laspeyres' prístal eins og tað, vit hava í dag. Eitt Laspeyres' prístal vísir, hvussu prísurin veksur á teirri vørumøgd, sum prístalshúsarhaldið keypti. Um tú keypir lutfalsliga somu vørumøgd, og løn tín fylgir prístalinum, kanst tú altið keypa somu vørumøgd.

Stoðið undir uppskotinum er nýtslan hjá 47 húsarhaldum, sum Prístalsnevndin hevur valt. Hvørt húsarhald hevur sítt nýtsluprístal, sum er ólíkt øllum øðrum. Eitt prístal er tí rætt fyri øll. Uppskotið er eitt annað enn eitt miðalprístal fyri tey 47 húsarhaldini, sum eru við í kanningini. Tí hevur tað áhuga at hyggja nærri eftir, hvørji tey eru.

Hvørt húsarhald hevur ført rokn skap yvir nýtsluna. Matvørurokn skapurin er førdur í fýra vikur samanlagt; ein vika í senn í tíðarskeiðinum 1.9.1971 til 15.6.1972. Aðrar vørur eru førdar fyri eitt heilt ár í bók fyri seg. Tilfarið í hesi bók er ikki tað besta. Fyri at bøta eitt sindur um hetta, hava vit fingið upplýsingar um hvørt einstakt húsarhald frá oljufeløgum, SEV, líkningar- og skattavaldinum.

Alt eru 511 vørur, sum eru býtlar sundur í 67 bólkar.Meiningin var, at nøgdirnar eisini skuldu við, men heilt fá húsarhald høvdu uppgivið nøgdir, so hetta varð ómøguligt.

Fyri 42 av teimum 47 húsarhaldunum hava vit fingið fatur á bruttoinntøkuni fyri árini 1971 og 1972. Miðalinntøkan teirra var 46.093 kr. Miðalnýtslan hjá hesum 42 var 3,3% størri enn miðalnýtslan hjá øllum 47. Tí hava vit sett miðalinntøkuna hjá øllum til 46.093 + 1.033 kr. = 44.620 kr. Hetta er samanlagda inntøka hjá manni, konu og børnum. Vit hava bert nýtt inntøkuna til at avgera, hvussu stór sparingin skuldi vera.

Til bruttoinntøkuna kann viðmerkjast, at eftir eini kanning, sum Líkningarráðið hevur gjørt, lá tann mest vanliga inntøkan í 1972 hjá hjúnum millum 30.000 kr. og 40.000 kr., og 50% høvdu minni enn 40.000 kr.

Skjal 4 er okkara uppskot til nýtt prístalsgrundarlag. Í skjali 3 hava vit sammett uppskotið við nógaldandi prístalsgrundarlag, sum tað var 1.1. 1975. Krónutalið er nógv størri, men tað er ikki krónutalið, sum avger gongdina í prístalinum; tað er tann lutfalsliga vørusamansetingin, sum avger hana.

Nýtslusamansetingin er tíðarfest til 01.01. 1972. Um so var, at tær lutfalsligu prísbroytingarnar á vørunum hava verið tær somu, so var lítil grund til at broyta nýtslusamansetingina. Men vit vita, at prísvøksturin hevur verið ógvuliga ójavnur, tí er nýtslusamansetingin broytt.

Um húskini hava keypt somu nøgdir, sum tey gjørdu í 1972, kunnu vit bert broyta nýtslusamansetingina við prísvøkstrinum. Hetta er sjálvsagt

ikki heilt rætt, tí um ein vøra uppá seg er vorðin dýrari, mugu vit gangga út frá, at tað verður brúkt eitt sindur minni av henni í nøgd.

Vit vita ikki, hvussu hetta broytist, tí kunnu vit ikki gera annað enn at hækka nýtslunna við prísvøkstrinum, og vóna at vit koma nærmast veruleikanum á henda hátt.

Broytingarnar eru gjørdar á tann hátt, at vit hava nýtt prísir frá prísráðnum fyri 1.1. 72 og 1.1. 75 og hækkað hvørja einstaka vøru við hesum prísvøkstri. Í teimum førum prísráðið ikki hevur havt prísir fyri vørurnar, hava vit fingið teir beinleiðis frá keypmonnum.

Tá nýtslusamansetting, sum vit koma fram til á henda hátt, siga vit er nýtslusamansetingin tann 1.1. 1975.

Uppskotið er sammansett av 38 ymiskum vørubólkum, hesir bólkar eru aftur samansettir av ymsum vørum t.d. vørubólkurin kaffi, te og saft.

Kaffi	0.917
kaffipulvur	0.198
Kakao	0.108
Sodavatn	0.237
Saft	0.226
Veikt øl	0.107
T.s.	2.77

Fyri at rokna prístalið mega vit fáa fatur á prísbroytingunum fyri hvørja vøru. Tað eru nógv ymisk sløg av saft, í nógum ymsum støddum. Um vit bert spyrja keypmannin hvussu nógv kostar ein litur av saft, so fáa vit prísin á nógvum ymsum merkjum, og helst gevur hann upp prísin á tí merki, sum er nærmast fyri hondina tann dagin hann skal geva upp. Illa her eisini til at áleggja honum, at geva upp prísin á ávísum merki, hann selur tað kanska ikki. Merkini skifta eisini skjótt. Tí biðja vit keypmannin, at geva okkum prísin á tí merki sum hann selur mest av, hann skal eisini nágreiniliga siga frá hvat merki hetta er og hvussu stórar fløskurnar eru. Hann skal geva upp prísin á sama merki næstu ferð og bert skifta merki um sølan av hesum merki er nógv minkað.

Fyri hvønn handil verður so prísvøksturin á saft útroknaður. Um ein handil ikki hevur givið upp prísin á sama merki fyrru ferð verður hann ikki tikin við í útrokningunum hesa eina ferðina. Her er at vóna, at allir handlar ikki skifta merki í senn. Prísbroytingar í prosentum fyri handlarnar verða saman og deildir við talið á handlum. Á henda hátt fáa vit prísbroytingina á saft. Um miðalprísbroytingin er + 10% á saft, verður nýtslu vektin fyri saft 0.226 faldað við 1.10 og vit fáa nýggja nýtsluvekt fyri saft 0.2486, sum er 0.0226 meir. Allar nýtsluvektirnar sannanlagdar eru prís-

talið. Um nú allir hinir prísirnir eru óbroyttir, so verður prístalið eftir hesum 100,0226.

Í tí núgaldandi prístalsgrundarlagi er húshaldarstøddin útroknað til 3,7 vaksin fólk. Hetta merkir, at konan í húsinum er sett til 0,90 fólk, barn undir 4 ár 0,15, barn 4-6 ár 0,20 o.s.fr., maður 1,00.

Um vit rokna út húsarhaldsstøddina í «uppskotinum» á sama hátt, verður húshaldarstøddin 4,29 fólk.

Livikostnaðurin er eftir galdandi prístalið 27.890 uppá fólkið. Livikostnaðurin er í dag eftir uppskotinum umleið 42.883 ella 9996 kr. uppá fólkið, hetta er ein vøkstur uppá 33%.

Grundarlagið er ikki tað besta, men tað er eingin ivi um, at eitt grundarlag gjørt í 1972 við 47 húshaldum er betri enn eitt, sum er gjørt í 1948 við 15 húshaldum. Statistisk Departement sigur eisini um prístalið frá 1948:

«Alt i alt må Departementet anse det foreliggende regnskabsmateriale for meget spinkelt som grundlag for et tilfredsstillende prístalsbudget: selv om Departementet derfor vil anbefale, at der i forholdsvis nær fremtid foretages en ny forbrugsundersøgelse på Færøerne for at tilvejebringe materiale til et mere betryggende prístalsbudget, anser man dog nærværende materiale som et bedre grundlag for prístalsberegningen end det hidtidige prístalsbudget, som bygger på en enkelt families regnskab før krigen.»

Á sama hátt er eitt við 47 húsarhaldum betri enn eitt við 15.

Einaferð enn vilja vit leggja áherðslu á, at fyri gongdina á prístalinum hevur tað ongan týdning hvat tær samanlagdu útreiðslurnar eru settar til. Tað einasta, sum hevur týdning, er tað lutfallsliga býtið millum vørubólkarnar.

Ein samanburður av uppskotinum og nýtsluprístalinum í Danmark, Íslandi og Noregi.

	Danmark	Ísland	Noreg	Uppskotið
	1966	1966	1967	1972
	%	%	%	%
Matur	22,0	27,9	30,2	42,6
Rúsdrekka og tubbak	10,3	4,4	4,2	5,9
Klæðir	7,9	12,7	11,9	10,4
Hús og hiti	13,2	19,3	11,5	18,7
Innbúgv	10,0	8,4	9,3	9,5
Heilsa	1,3	1,9	2,0	1,7
Flutningur, telefon	12,5	12,1	15,4	4,8
Frítíð og mentan	17,5	6,6	8,6	4,6
Annað	5,3	6,7	7,1	1,8
	100,0	100,0	100,2	100,0

skjal 4.

Prosentvís nýtsla av ymsum vørusløgum eftir galdandi prístalsgrundarlagi og eftir uppskotinum til nýtt grundarlag.

	Galdandi 1.1.75	Uppskot
1. Matvørur	49,0	42,2
2. Klædnavørur	15,7	8,4
3. Skóbúnaður	3,1	1,8
4. Vask og reinsan	1,1	2,0
5. Ljós og hiti	6,7	10,5
6. Býli	8,4	10,5
7. Tryggingar	2,9	2,2
8. Búmyttur	1,9	5,9
9. Rúsdrekka	1,9	1,8
10. Tubbaksvørur	4,6	3,8
11. Annað	4,7	10,9
	100,0	100,0

Tórshavn, 9. apríl 1975

Føroya Landsstýri
3800 her. —

Ein 7-manna nevnd við umboðum úr hesum løntakarafeløgum:

Føroya Arbeiðarafelag
Havnar Arbeiðsmannafelag
Føroya Handverkarafelag
Havnar Handverkarafelag
S & K
Klakksvíkar Arbeiðsmannafelag
Klakksvíkar Arbeiðskvinnufelag
Havnar Arbeiðskvinnufelag

hevur havt høvi til at gera seg kunnuga við tey uppskot, sum landsstýrið ætlar at leggja fyri tingið viðvíkjandi prístali, prístalsviðgerð o.a. Og somuleiðis hevur nevndin sæð roknskapartilfarið, sum landsstýrið ætlar at nýta til nýtt prístalsgrundarlag.

Nevndin loyvir sær at koma við hesum viðmerkingum:

Løgtingsmál nr. /1974 (vetrarting): Nýtt prístalsgrundarlag.

Húsheldsroknskapirnir, og serliga spyrjuskemaini, eru so ógjølla førd, og so lítið sundurgreinaði, at hetta tilfar eftir okkara tykki ikki er nýtuligt til at geva eina sanna mynd av livikostnaðinum idag.

Av somu orsøk verður býtið sundur í vørubólkar, og útrokningin av hvussu nógv hvør vørubólkur vigar av samlaða livikostnaðinum, eisini tilvildarligt.

Teir nýttu prísirnir eru frá tíðarskeiðinum september 1971 til juni 1972.

Livikostnaðurin sambært prístalinum januar 1975 er kr. 27.890,— til eitt húski við 3,7 vaksnum fólkum, ella kr. 7.508,— uppá fólkið.

Umrokna vit prísirnar frá 1971/72 soleiðis sum prístalshækkingin hevur verið frá januar 1972 til januar 1975, verður livikostnaðurin eftir nýggja prístalsgrundarlagnum kr. 33.503,— + 28%, ella umleið kr. 42.883,— til eitt húski við 5,8 vaksnum fólkum, ella kr. 7.221,— uppá fólkið. Munurin millum bæði prístalsgrundarløgini verður, at hjá einum húski við 5,8 fólkum verður tað kr. 2.440,— bíligari at liva eftir nýggja grundarlagnum enn eftir núgaldandi grundarlagi.

Tórshavn, 9. apríl 1975

Føroya landsstýri, her

Eftir okkara tykki kann ein yvirgongd frá einum prístalsgrundarlagi til eitt annað føra slíkar broytingar við sær í prístalsútrokningini, harvið í prístalsviðgerðini av lønum, at vit mugu mæla frá at tað verður gjørt, uttan at málið verður kannað gjøllari fyrst.

Síðan skjýtur landsstýrið upp, at prístalið nú skal roknast av hagdeildini, undir eftirliti av einum prístalsnevnd við 3 limum, harav sorinskrivarin velur formann, og landsstýrið velur hinar báðar.

Vit meina at prístalið, eins og higartil, skal roknast av einari nevnd, har feløg okkara eru beinleiðis umboðaði, soleiðis at okkara umboðsmenn framvegis taka beinleiðis lut í útrokningini. Feløgini eiga ikki at missa tað beinleiðis eftirlit, tey á hendan hátt hava við útrokningini. Og hendan skipanin hevur riggað væl.

Løgtingsmál nr. /1974: Uppskot til løgtingslóg um prístalsviðgerð av arbeiðslønum.

Okkara krav er, sum kunnugt, at sama prístalsviðgerð í krónum og oyrum skal setast í gildi fyri allar løntakarar í Føroyum, bæði í almennum og privatum størvum, bæði starvsfólk og tænastumenn.

Vit kunnu ikki ganga við til, at prístalið verður sett aftur til 100.

Hetta kann fáa slíkar avleiðingar, sum eingin dugir siggja ídag. Og her koma fleiri ivamál fram ,sum uppskotið einki sigur um.

Tað hevði verið ynskiligt, at hagdeildin gjørdi eina útrokning, við prístalinum 1. januar 1975 sett til 100, og so hvørja ávirkan tað hevði á prístalið 1. apríl 1975.

Lógin frá 1961 sigur, at tá prístalið er komið niður á 100 verður eingin prístalsviðgerð. Og tað man vera út frá tí sjónarmiðinum, at tá eru vit komin niður á «normalar» prísir aftur. Men eingin kann siga at inflatiónsprísirnir ídag liggja í einari «normalari» legu.

Tað kann væl hugsast at prístalið, og helst serliga við tí nýggja prístalsgrundarlagnum, fer at lækka. Men uppskotið sigur einki um, hvussu ein lækking av prístalinum skal ávirka prístalsviðgerðina av lønunum.

Tórshavn, 9. apríl 1975

Føroya Landsstýri, her.

Vit mugu eisini mótmæla uppskotinum um, at tímalønin bert skal hækkast fyri hvørji full 3 stig, sum prístalið broytist í mun til prístalið 100.

Fyri tað fyrsta meina vit ikki, at lønin kann lækka, um prístali fer niður um 100.

Og fyri tað næsta so skulu stórar prísbroytingar til, áðrenn tær telja full 3 stig, tá prístalið verður sett frá prístalinum ídag og aftur til 100. So vitt vit skilja uppskotið skulu ídag uml. 10 núverandi prístalsstig til eitt stig eftir uppskotinum. Og tað vil siga uml. 30 núgaldandi prístalsstig, áðrenn nøkur dýrtíðarviðbót verður roknað.

Og hækkar prístalið 2 stig eitt fjórðingsár, má ein hækking aftur at uppá 1 stig næsta fjórðingsár, áðrenn nøkur dýrtíðarviðvót verður. Og har missa lønirnar 2/3 av einari dýrtíðarviðbót tað fyrra fjórðingsárið.

Vit meina at galdandi skipan við hækking og lækking av tímalønini fyri hvørt stig, sum prístalið broytist frá núgaldandi prístali, gevur tær lønarbroytingar, sum best svara til broytingarnar í vøruprísunum.

Í uppskotinum hjá landsstýrinum stendur einki um, hvussu nógv oyru skulu svara til 3 prístalsstig. Og so leingi vit ikki vita tað, kunnu vit ikki góðtaka uppskotið.

Frá 1961 til januar 1975 hevur dýrtíðarviðbótin verið 1,15 oyru fyri hvørt prístalsstig. Ikki fyrr enn í ár er hetta broytt til 1,3 oyru. Men tað man vera øllum greitt, at hendan hækkingin í ár gevur okkum ikki fulla samsýning fyri tær stóru príshækkingarnar sum hava verið síðan 1961.

Tað kann eingin ivi vera um, at núgaldandi prístalsviðbót 1,3 oyru er ov lágt sett.

Løgtingsmál nr. /1974 (vetrarting): Kannan av lóggávuni um prísefirlit.

Vit skjóta upp, at løntakarafelagini velja 3 av teim 5 limunum, sum landsstýrið ætlar at seta í hesa nevnd at kanna lóggávuna um prísefirlit.

við hávirðing
vegna 7-mannanevndina
D. P. Danielsen
skr.

Føroya landsstýri,
att. Dánj. P. Danielsen, landsstýrismaður,
her.

Meginfelag starvs- og tænastumanna hevur havt tey fýra løgtingslógaruppskotini viðvikjandi

1) nýggjum prístalsgrundarlagi,
2) kanman av lóggávuni um príseftirlit,
3) prístalsviðgerð av arbeiðsløn og
4) broyting í løgtingslóg um tænastumannalønir v.m. til umhugsunar.

Meginfelagið tekur undir í princippinum við teimum ætlaðu lógarbroytingum, við tað at tað ikki er nakar ivi um, at broyting í lønarlagnum í landinum er neyðug.

Um øll lógaruppskotini viðmerkja vit, at har, sum talan er um at seta nevndir til kanningar ella til útrokningar, mugu vit, ið umboða ein stóran stætt í samfelagnum, ja, nærum alla umsitingina, verða umboðaðir.

Vit mæla til, at prísráðið fær fimm limir, og at teir landsstýrisvaldu limirnir verða settir soleiðis, at ein verður tikin eftir tilmæli frá Meginfelag starvs- og tænastumanna.

Viðvikjandi nevndini, sum setast skal til kanningar av lóggávuni um príseftirlit, halda vit, at, skal umhoðanin vera so fjølbroytt sum tilætlað í viðmerkingunum in fine, tá verður neyðugt at hava hesa nevnd eitt sindur meiri fjølmenta. Tað man tó bera til, at fleiri felag við stórt sað sonu álugamálum eru saman um viðmælið .Vit fyri okkara viðkomandi, sum í løtuni umhoða fýra felag, halda, at vit eiga at hava uppskotsrætt til ein lim í teiri nevnd.

Viðvíkjandi uppskotinum um løgtingslóg um broyting í løglingslóg um tænastumannalønir v.m. hava vit hesar serligu viðmerkingar:

ad § 1, 1): Henda grein tykist okkum ikki heilt greið. Er tað so, at tað krónu- ella oyratal, sum skal setast inn ,verður sett eina ferð fyri alla? So tykir okkum, at hetta fer at verða eitt slag av lønstopp. Er hetta meiningin?

ad § 1, 3): Tá ið nú tann principbroyting er gjørd, at prístalsviðgerðin av lønum skal vera tann sama hjá øllum, nevniliga so og so mikið í peningi fyri hvørji trý stig, ið prístalið broytist, so tykir okkum tað løgið, at tann gamla procentskipanin, sum hevur verið so kontroversiel og ónoktiliga hevur givið so merkilig úrslit, skal takast innaftur her um bakdyrnar. Eftir

okkara áskoðan eigur tann anomali, at pristalsviðgerðin í rættiliga stóran mun hevur verið avgeraudi fyri lønarlagið hjá summum, at beinast heilt burtur. Um so er, at ávísir tænastumenn í veruleikanum hava notið ov mikið við procentviðgerðina, men nú tvørturímóti verða fyri tí ringa býtinum, tá ið tann fasta viðbótin kemur í kraft, tá eigur hetta ikki at føra til, at fyrrnevnda anomali verður uppfildin, men ein serlig «taktregulering» eigur at koma.

Annars vilja vil gera vart við, at tað verður neyðugt at veita kompensatión fyri juli kvartal í ár, ið eins og fellur millum beggja, við tað at tað verður gingið út frá pristalinum fyri juli, og tann nýggja skipanin kemur ikki í kraft fyrr enn 1. oktober.

Tórshavn, 8. oktober 1975

Virðiliga

fyri Meginfelag Starvs- og Tænastumanna

W. D. Jakobsen
formaður

Ernst Hansen
nevndarlimur

FØROYA ARBEIÐSGEVARAFELAG

Tórshavn, 25. mars 1975

Føroya Landsstýri
3800 Tórshavn

Á nevndarfundi í felagnum lann 21. í hesum mánaði var til umræðu tað tilfar viðvíkjandi nýggjum prístalsgrundarlagi og dýrtíðarviðgerð av arbeiðsløn, sum umboð fyri felagið fingu handað á fundi í Føroya Landsstýri dagin frammanundan.

Tilfarið er sostatt ikki gamalt í hond felagsins, men fara vit tó sum lovað at geva hesum okkara viðmerkingar, ið sum eyðvitað er undir slíkum umstøðum mest verða av prinsipiellum karakteri.

Ad uppskot til løgtingslóg um prístal:

Sum framgongur av gr. 1 í uppskotinum, so er tað ætlanin framyvir at lata útrokningina av prístalinum upp í hendurnar á hagdeildini einsamallari.

Hetta heldur felagið er skeivt.

Prístalið er nú í skjótt fjórðungsøld útroknað saman við umboðtun vald av vinnufeløgunum, og hevur hendan skipan ,ið ikki kann sigast at hava verið samfelagnum kostnaðarmikil, í tí stóra og heila fungerað væl.

Vit siggja tí onga orsøk vera til at hurturelimenerð tað felagsliga elementið í samband við sjálva útrokningina, tí tað verður jú her at eitt eginligt eftirlit fer fram ,og fara vit tí at mæla til, at útrokningin verður gjørd saman við teirri í gr. 2 uppskotnu prístalsnevndini.

Hesi nevnd eigur eftir áskoðan okkara eisini at verða latið upp í hendi at umsita tær í gr. 3 og 4 petti 2 nevndu uppgávur nevniliga at taka avgerð um hvørjar vørunøgdir v.m., ið til eina og hvørja tíð skulu ganga inn í prístalsgrundarlagið og hvussu farast skal fram viðvíkjandi innsavnan av vøruprísum.

Ad uppskot til løgtingslóg um prístalsviðgerð av arbeiðsløn:

Sum vit halda okkum skilja, so eru allir partar samdir um, at tað hagfrøðisliga tilfarið sum nýggja prístalsviðgerðin skal byggja á er rættiliga ófullfíggjað, og er hetta sjálvandi ikki beint.

Hesin spurningur skuldi tó verið til at loyst, um ein veruliga fer í holt við at loysa hann.

Undir teirri fyritreyt, at tann í uppskotinum um løgtingslóg um prístal nevnda prístalsnevndin fær virkisøki sum av okkum frammanfyri skotið upp, so halda vit tó, at vit kunnu ganga inn fyri nýggju skipanini.

Vit fara í hesum sambandi at draga fram, at vit hava merkt okkum upplýsing landsstýrisins um, at tað er ætlanin at leita sær hjálp hjá viðurkendum útlendskum institutti í samband við kanning av forbrúkaravanum her á landi kanningar, sum koma at verða ajourførdar við ávísum millumbilum.

Hvat viðvíkur 45 oyrunum pr. prístalsstig, sum er komið inn í danska tekstin til gr. 1., so loyva vit okkum at ganga út frá, at upphæddin er komin at standa av misgáum, tí so vítt vit duga at meta, so er henda upphæddin sett alt ov høgt.

Tað er annars at siga, at hvat tí resonnementi viðvíkur sum gjørt verður í viðmerkingunum til lógaruppskotið, so hevur tað ikki verið gjørligt hjá okkum at fylgja hesum.

Virðingarnest

Føroya Arbeiðsgevarafelag

Tormóður Djurhuus
skrivari.

FØROYA FISKIMANNAFELAG

Tórshavn, 14. apríl 1975.

Føroya Landsstýrið
her.

Vit hava frá landsstýrinum fingið til umnælis uppskot um broyting í lóg um minstaløn y.m., hereftir minstaløn skal prístalsviðgerast á sama hátt sum aðrar lønir, nevniliga við kr. 105 pr. mánaða pr. 3 prístalsstig.

Vit skulu siga frá, at vit í prinsippinum kunnu góðkenna hesa skipan. Vit vilja tó viðmerkja, at vit halda ikki, at minstaløn skal kunna fara niður, sjálvt um prístalið fer niðurum 100. Vit vilja eisini gera vart við, at eftir uppskotinum skal rættuliga stór hækkan av prístalinum til fyri at geva prístalsviðbót. Vit kundu hugsað okkum, at í staðin fyri 3 stig kom at standa 1 stig.

Vit fara annars at biðja um ,at grundupphæddin fyri minstalønina verður hækkað. Við prístalsviðbótini, frá 1. januar hava arbeiðarar fingið eina lønarhækkan, sum merkir, at ein arbeiðsmanna mánaðarløn í dag er kr. 3.695, meðan minstaløn bert er kr. 3.474, ella meira enn kr. 200 minni. Vit halda, at minstaløn hjá fiskimonnum kann ikki vera minni enn mánaðarløn hjá einum arbeiðara, og tá havast má í huga, at timaløn helst fer upp pr. 1. mai fara vit at mæla til, at minstaløn verður sett til kr. 4.000 pr. mánaða.

Við heilsan

FØROYA FISKIMANNAFELAG
Óli Jacobsen.

RED: 10 X



Nasjonalbibliote

Nasjonalbiblioteket
National Library of Norway
Rana Division
N-8607 Mo i Rana
Telephone: +47 75 12 11 11 Telefax: +47 75 12 1